

RI

Na

Telephone: +47

LØGTINGS TIDINDI

1976

Løgtingstíðindi

1976

Bind A

Løgtingsmál

TÓRSHAVN 1978

Løgtingstíðindi 1976
fr. Føroya landsstýri
Lagt til rættis hevur Eiden Müller
Prentað hevur Dagprent
Bundið inn hevur Helgi Justinussen.

LØGTINGSMÁL Í NUMMARRØÐ

		bls.
Frágreiðing frá løgnarmi		XVII
Løgtingssetanin		1
Tingmannir		2
1. Figgjarlogtingslóg 1977/78		3
2. Útflyting av fiskimarkinum		19
3. Eykafíggjarlogtingslóg 1975/76		23
4. Klaksvíkar sjúkrahús		41
5. Óskrivan av vali		45
6. Ymsar reguleringar av fiskiskapinum í urðfur-eystara partinum av Atlantshavinum (NEAFC-eykafundurin apríl 1976)		48
7. Veðhald fyri láni til Miðvágs kommuna		51
8. Millumtinganevnd í fiskimarks- og felagsmarknaðarmálum		52
9. Skúlaskapur í Føroyum		54
10. Betur veðurtænasta við Føroyar		57
11. Kanman av lóggávu og reglum fyri skipasýn í Føroyum		58
12. Landsstýrismál		65
13. Regulering av fiskiskapinum á ICNAF-økinum (ársfundurin juni 1976)		65
14. Byggilán til bygging av 2 deildum fyri eynaveik		70
15. Broyting í lóg um fuglaveiði		72
16. Lán til Telefonverk Føroya Loglings		76
17. Kongilig fyriskipan um fiskimarkið undir Føroyum		93
18. Lóggáva um fiskiveiðu á landleiðini		96
19. Broyting í lóg um fuglaveiðu van.		102
20. Lóg um hundar		106
21. Rettargangslógin		118
22. Regulering av prísunum á sild til matna landað í Føroyum		120
23. Løgtingslóg um leingjan av bráðfongisstuðlunum til flaka- og saltfiskaveiðu		123
24. Broytan í reglunum um flutningsstuðning til avreiðing av feskfiski		125
25. Broytan í lógini um Báfiskagrunnin		127
26. Regulering av útróðrarstuðninginum		130
27. Broytan í skattalógini		132

28. Skatting av partafelogum 142
29. Broytan í løgtingslóg um flogagrunnar 148
30. Gerðabókin hjá fiskimarks- og felagsmarknaðarnevndini 150
31. Broytan í skallalógini 151
32. Broytan í løgtingslóg um skattligar avskrivingar 162
33. Broytan í løgtingslóg um flogagrunnar 163
34. Veðhald fyri láni til Vágs kommunu 165
35. Broytan í «Lov for Færøerne om den offentlige sygeforsikring» (gravarferðahjálp v.m.) 168
36. Fyrispurningur til Petur Reinert, landsstýrismann 169
37. Alloguhryggjn í Kirkjubø 171
38. Brennioljustuðningur til fiskiskip 173
39. Studningur til veiðu av jákupsskel 175
40. Sínamillum veiðurettindi Føroyar-Ísland 177
41. Broytan í «Lov om oprettelse af en stilling som vicebiskop på Færøerne» 178
42. Ljósmóðir í Suðuroy 184
43. Bann móti skjóling av grindahvali á landleiðini 186
44. Veðhald fyri láni til Leirvíkar kommunu 189
45. Veðhald fyri lánum til fiskamjøl v.m. á goymslu 191
46. Veðhald fyri lánum til fiskiskip og fiskavirkir 192
47. Føroysk navnalóggáva 194
48. Sínamillum fiskirettindi Føroya-EBC 197
49. Fiskirettindasáttmáli við Noreg 204
50. Svensk svartkjaftaveiða undir Føroyum 208
51. Norðurlanda hús í Føroyum 211
52. Orkuráð 214
53. Broytan í kgl. fyriskipan um góðkenning av handilsskúlum, tekniskum skúlum v. fl., studning v.m. til hesar skúlar 220
54. Føroyska umboðanin í Norðurlanda Ráðnum 222
55. Lán til ídnaðarlúlur 226
56. Gjald av undorakferum 229
57. Broytan í lógunum fyri Føroyar um fólkapensjón og um avlamispensjón v.m. (hækking av inntokumarki) 232
58. Byggjan av ferðaskipi og ferju til strandfarasiglingina 235
59. Hækking av samsýning til postverkið fyri uppkrevjing av tollgjoldum .. 238
60. Broytan í ferðslulógini 240
61. Fyrispurningur til lognmann 245
62. Fyrispurningur til Finnboga Isaksen, landsstýrismann 246
63. Fyrispurningur til lognmann 247
64. Príseftirlit 249
65. Bygging av nýggjari royndarstað 275

66. Broytan í forsorgarlógini (treytir fyri einkjupensjón) og lóg um uppískoytisveiting til einkjur 288
67. Broytan í forsorgarlógini (víðkað heimild at veita heimahjálp v.m.) 295
68. Bygging av nýggjum útvarpssendara 298
69. Ábyrgd fyri lánum til Útvarp Foroya 303
70. Ríkisborgarrættur 305
71. Ríkisborgararættur 306
72. Studningur til fiskiskip 307
73. Fyribilsskipan um loyvi til skip hjá EEC til fiskiskap undir Foroyum 308
74. Prísansarar 313
75. Sala av gomlu telefonstoðini á Tvoroyri 311
76. Rulusiglingin til Suðuroyar 315
77. Samráðingar við USA um fiskirettindi 316
78. Friðing av ávisum foroyskum fiskileiðum 317
79. Læknasetan í Suðuroy 319
80. Rikisborgarrættur 320
81. Skipan millum Noreg og Foroyar um sinamillum fiskirettindi 321
82. Hækking av minstulonini og minstaforvinninginum 325
83. Forboð móti laksaveiðu 328
84. Brennioljustudningur 329
85. Bráðfongisstuðul til flaka- og sallfiskaframleiðslu 332
86. Regulering av útróðrarstudninginum 333
87. Troling innanfyri 12 fjórðingar 335
88. Val av álitismonnum og nevndum 339
89. Framhald av fyribilsskipan um rettindi hjá fiskiforum frá felagsmarknaðarlondum at veiða á sjóoki Foroya 342
90. Loyvi til fiskifor heimahoyrandi í Póllandi, og Týska demokratiska Lýðveldinum (DDR) at veiða svartkjaft á sjóoki Foroya 344
91. Broytan í skiftilógini 346
92. Fyribilsskipan um loyvi til skip frá EEC til fiskiskap undir Foroyum 348
93. Veðhald fyri láni til p/f Fiskaaling 350
94. Vegir og lendingar 360
95. Skipan millum Foroyar og Sovjetsamveldið um sinamillum fiskirettindi .. 374
96. Havnælan 1978/85 377
97. Forboð fyri troling á Foroya Banka og hægri minstumeskur fyri trol v.m. 380
98. Partapeningur í flakavirkið í Haldórsvík 390
99. Logtingslóg um endurnýgging av fiskiskipaflotanum 393
100. Fólka- og farmfluhingur 402
101. Veðhald fyri láni til Klaksvíkar kommunu 404
102. Ríkisborgararættur 407
103. Undantaksloyvi til fremmand skip at umskipa veiðu á foroyskum sjóoki.. 408

104. Læknaviðurskiftini á Suðuroyar sjúkahúsi 409
105. Broytan í lóg um fuglaveiðu v.m. 410
106. Hækking av samsýning til postverkið fyri uppkrevjing av tollgjoldum .. 411

EYKATINGSETAN 1976

1. Framhald av fyribilsskipan um rætlindi hjá fiskiforum frá felagsmarknaðarlondunum at veiða á sjóoki Foroya 415
2. Broytan í sjúkahúslógini 417

INNIHALD

ÓLAVSØKUTINGID 1976

TINGNEVNDIR — AÐRAR NEVNDIR

bls.

Løgtingsnevndir .....

ALMANNAMÁL

Klaksvíkar sjúkahús 41
Broytan í «Lov for Færøerne om den offentlige sygeforsikring» 168
Ljósmóður í Suðuroy 184
Broytan í lógunum fyri Foroyar um fólkapensión og um avlamispensión v.m... 232
Broytan í forsorgarlógini (Heimahjálp) 282
Broytan í forsorgarlógini 295
Læknasetan í Suðuroy 319
Læknaviðurskiftini á Suðuroyar sjúkahúsi 409

FIGGJARMÁL

Eyka-figgjarløgtingslóg 1975/76 23
Figgjarløgtingslóg 1977/78 32
Broytan í løgtingslóg um skattligar avskrivingar 162
Broytan í løgtingslóg um ílogugrunnar 163
Hækking av samsýning til postverkið fyri uppkrevjing av tollgjøldum 238
Prísefirlit 249
Prísansarar 313
Hækking av minstuløn 325
Brennioljustudningur 329
Bráðfangis stuðul til flaka- og saltfiskaframeiðslu 332
Regulering av útróðrarstudninginum 333
Partapeningur í flakavirkið í Haldórsvík 390
Hækking av samsýning til postverkið fyri uppkrevjing av tollgjøldum 411

FISKISKAPUR OG SJÓVINNA

Útflyting av fiskimarkinum 19
Ymsar regulerings av fiskiskapinum í norður-eystara parti av Atlantshavi (NEAFC) 18
Milliumfinganevnd í fiskimarks- og felagsmarknaðarmálum 52
Betur veðurtenasta í Foroyum 57
Kannan av løggávu og reglum fyri skipasýn í Foroyum 58

Regulering av fiskiskapinum á ICNAF okinum 65
Broytan í lóg um fuglaveiðu v.m. 72
Kgl. fyriskipan um fiskimarkið undir Føroyum 93
Lóggáva um fiskiveiðu á landleiðini 96
Broyting í lóg um fuglaveiðu v.m. 102
Regulering av prísinum á sild til matna, landað í Føroyum 120
Løgtingslóg um leingjan av bráðfongisstuðlinum til flaka- og saltfiskaveiðu .. 123
Broytan í reglunum um flutningsstuðning til avreiðan av feskfiski 125
Broytan í lógini um ráfiskugrunnin 127
Regulering av útróðrarstuðninginum 130
Gerðabókin hjá fiskimarks- og felagsmarknaðarnevndini 150
Studningur til veiðu av jákupsskel 175
Sínamillum veiðurættindi Føroyar - Ísland 177
Bann móti skjóting av grindahvali á landleiðini 186
Sínamillum fiskirættindi Føroyar - EEC 197
Fiskirættindasáttmáli við Noreg 204
Svensk svartkjaftaveiða undir Føroyum 208
Byggjan av ferðaskipi og ferju til strandferðsluna 235
Fyribilsskipan um loyvi til skip hjá EEC til fiskiskap undir Føroyum 308
Rutusigtingin til Suðuroyar 315
Samráðingar við USA um fiskirættindi 316
Friðing av ávistum føroyskum fiskileiðum 317
Skipan millum Noreg og Føroyar um sínamillumfiskirættindi 321
Forboð móti laksaveiðu 328
Troling innanfyri 12 fjórðingar 335
Framhald av fyribilsskipan um rættindi hjá fiskiførum frá felagsmarknaðarlondum at veiða á sjóoki Føroya 342
Loyvi til fiskifor heimahoyrandi í Pólandi og DDR at veiða svartkjaft á sjóoki Føroya 344
Fyribilsskipan um loyvi til skip hjá EEC til fiskiskap undir Føroyum 348
Skipan millum Sovjet og Føroyar um sínamillum fiskirættindi 374
Forboð fyri troling á Føroya Banka og hægri minstumeskur fyri trol v.m. 386
Løgtingslóg um endurnýggjan av fiskiflotanum 393
Fólka- og farmaflutningur 402
Undantaksloyvi til fremmand skip at umskipa veiðn á føroyskum sjóoki 408
Broytan í lóg um fuglaveiðu v.m. 410

FYRISPURNINGAR

Fyrispurningur til Petur Reinert, landsstýrismann 169
Fyrispurningur til løgmann 245
Fyrispurningur til Finnboga Isaksen, landsstýrismann 246
Fyrispurningur til løgmann 247

HAVNIR OG LENDINGAR

Vegir og lendingar 360
Havnaætlan 1978/85 377

LÁN OG LÁNABYRGDIR

Veðhald fyri láni til Miðvágs kommunu 51
Byggilán til bygging av 2 deildum fyri eynaveik 70
Veðhald fyri láni til Vágs kommunu 165
Veðhald fyri láni til Leirvikar kommunu 189
Veðhald fyri lánum til fiskamjøl v.m. á goymslu 191
Veðhald fyri lánum til fiskiskip og fiskavirkir 192
Ábyrgd fyri lánum til Útvarp Føroya 303
Studningslán til fiskiskip 307
Veðhald fyri láni til p/f Fiskaaling 350
Veðhald fyri láni til Klaksvíkar kommunu 404

LANDSSTÝRIÐ

Landsstýrismál 65

LØGTINGIÐ

Løgtingssetanin 1
Tingmenninir 2
Frágreiðing frá lógmanni XVII

RÍKISLÓGIR

Broytan í «Lov om oprettelse af en stilling som vicebiskop på Færøerne» 178
Ríkisborgararættur 305
Ríkisborgararættur 306
Ríkisborgararættur 320
Ríkisborgararættur 407

SAMFERÐSLUMÁL

Atløgubryggja í Kirkjubø 171
Gjald av motorakfarum 229
Broytan í ferðslulóginl 240

SKATTAMÁL

Broytan í skattalógini 132
Skattan av partafeløgum 142
Broytan í skattalógini 151

SKÚLAMÁL

Skúlaskapur í Føroyum 54
Broyting í kgl. fyriskipan um góðkenning av handilsskúlum, tekniskum skúlum v.fl. og stuðning v.m. til hesar skúlar 220

TELEFONVERKIÐ

Lán til Telefonverk Føroya loglings 76
Søla av gomlu telefonstoðini á Tvøroyri 314

ÚTVARP FØROYA

Bygging av nýggjum útvarpssendara 298

ØNNUR MÁL

Útskrivan av nývali 45
Lóg um hundar 106
Rættargangslógin 118
Broytan í logtingslóg um íløgugrunnar 148
Føroysk navnalóggáva 194
Norðurlanda hús í Føroyum 211
Orkuráð 214
Føroyska umboðanin í Norrøna Ráðnum 222
Lán til ídnaðarbátar 226
Byggjan av nýggjari royndarsloð 275
Broytan í skiftilógini 345

EYKATINGSETAN 1976

Framhald av fyribilsskipan um rettindi hjá fiskiforum frá felagsmarknaðarlondum at veiða á sjóoki Føroya 415
Broytan í sjúkahúslógini 417

Tingnevndir

FIGGJARNEVND:

Fastir limir: Hákun Djurhuus, Poul J. Olsen, Hilmar Bech, Jógvan Durhuus, Signar Hansen, Pauli Ellefsen, Asbjørn Joensen.

Tiltaksmenn: Elieser Arge, Haldor Hansen, Tórálvur Olsen, Ove Mikkelsen, Erlendur Paturssen, Johs. M. Olsen, Hilmar Kass.

LÓGARNEVND:

Tórálvur Olsen, J. Fr. Øregaard, Agnar Nielsen, Elieser Arge, Erlendur Paturssen.

FISKIVINNUNEVND:

Poul Jacob Olsen, Johan Simonsen, Ove Mikkelsen, Jógvan Olsen, Vilhelm Nielsen.

LANDSSTYRISMALANEVND:

Ove Mikkelsen, Óli Breckmann, Johs. M. Olsen.

UMSÓKNARNEVND:

Hilmar Bech, Agnar Nielsen, Heðin Klein.

MARKNAÐARNEVND:

Fastir limir: Hákun Djurhuus, Jógvan Sundstein, Erlendur Paturssen, Poul J. Olsen, J. Fr. Øregaard, Jógvan Olsen, Hilmar Kass.

Tiltaksmenn: Elieser Arge, Óli Breckmann, Jógvan Durhuus, Tórálvur Olsen, Haldor Hansen, Pauli Ellefsen, Asbjørn Joensen.

SKATTANEVND:

Jona Henriksen, Hilmar Bech, Heðin Klein, Jógvan Sundstein, Agnar Nielsen.

VEGA- OG HAVNANEVND:

Johan Simonsen, Heðin Klein, Vilhelm Nielsen, Óli Breckmann, Jógvan Olsen, Haldor Hansen, Kjartan Mohr.

SOSIALNEVND:

Ove Mikkelsen, Jógvan Sundstein, Tórálvur Olsen, Sverri Midjord, Jákup Mortensen.

SKÚLANEVND:
Jákup Mortensen, Hilmar Bech, Vilhelm Nielsen, Óli Breckmann, Signar Hansen.

KIRKJUNEVND:
Vilh. Nielsen, Johan Simonsen, Agnar Nielsen, Poul J. Olsen, Hilmar Bech, Kjartan Mohr, Hilmar Kass.

LANDBÚNAÐARNEVND:
Johan Simonsen, Heðin Klein, Vilh. Nielsen, Haldor Hansen, Agnar Nielsen.

AÐRAR NEVNDIR:

NEVND AT VIÐGERA SKÚLASKIPAN Í FØROYUM:
Óli Breckmann, Signar Hansen, Asbjørn Joensen, Kjartan Mohr, Jákup Mortensen, Hilmar Bech og Jona Henriksen.

LANDSSKATTANEVND:
Fastir limir: Albert Mortensen, Poul J. Olsen, Kári Petersen, Frederik Hansen, Andreas Djurhuus.

Tiltaksmenn: Høgni Mohr, Haldor Hansen, Jógvan Páll Lassen, Sigurd Joensen og Thomas Iversen.

ORKUNEVND:
Haldor Hansen, Ove Mikkelsen, Óli Breckmann, Jákup Mortensen, Asbjørn Joensen.

PLANLEGGINGARNEVND FYRI SJÚKRAHÚSINI:
Trygve Samuelsen, Tórshavn, Johan Simonsen, Klaksvík, Hans H. Strøm, Trongisvágur.

STYRIÐ FYRI MENTUNARGRUNN FØROYA LØGTINGS:
Fastur limur: Jákup Lindenskov, Tórshavn.
Tiltaksmaður: Hilmar Bech, Porkeri.

GRUNNURIN FYRI FØROYSK KIRKJUMÁL:
J. Fr. Øregaard, Hákun Djurhuus (valdir av nýggjum).

NEVND VIÐV. NAVNALOGGVAU:
Johan Hendrik Winther Poulsen, Kirkjubøur, Theodor Hansen, Tórshavn og Petur Martin Rasmussen, Eiði.

NORÐURLANDA RAÐIÐ:
Fastir limir: Erlendur Patursson, J. Fr. Øregaard.
Tiltaksmenn: Poul J. Olsen, Ove Mikkelsen.

TEY FØROYSKU SJÚKAHÚSINI, val av nevndum:
KLAKSVÍKAR SJÚKRAHÚS:
Fastir limir: Olvheðin Jacobsen, Klaksvík, Johan Simonsen, Klaksvík, Obert Eliasen, Fuglafjørður.
Tiltaksmenn: Bjarti Højbro, Klaksvík, Petur Simonsen, Fuglafjørður, Asbjørn Joensen, Klaksvík.

LANDSSJÚKRAHÚSIÐ:
Fastir limir: Helgi Øster, Líggjas Joensen, Trygve Samuelsen, allir Tórshavn.

Tiltaksmenn: Hentzar Ellingsgaard, Sørvágur, Dia P. Johannesen, Glivrar, Samson Højgaard, Vestmanna.

SUÐUROYAR SJÚKRAHÚS:
Fastir limir: Andreas Djurhuus, Vági, Hans Hendrik Strøm, Trongisvági, Gunnar Westergaard, Tvøroyri.
Tiltaksmenn: Sverri Skaalum, Vági, Olaf Westergaard, Sumba, Levi Niclasen, Hvalba.

Frágreiðing frá løgmanni 1976

Orðaskiftið um løgmansrøðuna 29. juli 1976 fór fram 8. november. Frágreiðing løgmansins var lenda:

Fyri ári síðani metti landsstýrið í teirri frágreiðing løgd varð fram á ólavsøku, at samfelag okkara hevði munandi orku til at bøta um avleiðingarnar fyri vinnu okkara av, at virkisumstøðurnar vóru so nógv versnaðar av prísfalli á fiskavørum, hækkaðum rakstrarútreiðslum og trongri veiðuatstøðum, men at henda orka, skuldi hon røkka til vit silgdu fram í betri tíðir, bert átti at vera nýtt, tá tær gjølligastu kanningar vóru gjordar av hvussu stuðulin munnði best, og tá fortreytin um, at vinnan sjálv nýtti av teirri konsolidering, samfelagið hevði givið atstøður til at fremja, var fylgd.

Farna tingár var tí nógv merkt av umhugsingum um hvussu vit kundu tryggja okkum at hjólini vóru í gongd hesa tíð, og framd var í tingsetuni tíðandi stuðulslóggáva sum røkkur út ímóti teim 60 milliónunum á ársgrundarlag.

Tingið lók eisini undir í, at ikki skuldi slakast í almenna virksemnum uppi á landi, so sleppast kundi undan arbeiðsloysi her.

Samlaðu tiltøkini hava munað so mikið, at ikki er ov nógv sagt at siga, at Føroyar mugu vera sloppnar eina frægast burturúr teim trupulleikum verið hava í heimshúskapinum nú í útvið 2 ár.

Vinnumunstøðurnar eru í løtuni munandi betri og alsamt batnandi, hóast ikki sigast kann, at vit eru undansloppin á hesum sinni enn.

Tá hetla verður sagt, er sjálvsagt bert hugsað um konjunktúrútlitið og prísútlitið sæð stutt fram í tíðina. Langtíðarútlitið verður meira at meta saman við teim stórbroytingum sum í løtuni fara fram fiskimarkunum og veiðurættindunum viðvíkjandi. Úrslitið av hesum broytingum og teim mongu samráðingum, sum mugu fara fram um skipanina aftan á útflytingarnar, verður avgerandi fyri møguleikum okkara fyri framhaldandi at hava fiskivinnu sum lívsgrundarlag í eins høgan mun og nú. Hesi viðurskifti vil eg nærri greina undir umroðuni av fiskimarksspurninginum og uttanlanda viðskiftinum.

Í 1975 høvdu føroyingar fyri fyrstu ferð í fleiri ár eina minni afturgongd (umleið 22 mill. kr.) í útfluttningsvirðinum. Samlaði útfluttningurin var 464 mill. kr. mótvegis 487 mill. kr. í 1974. Henda afturgongd var tíðliga á

árinum væntandi, ikki bert tí fiskaprísirnir fullu, men eisini vegna vinnusteðgin hjá ídnaðarskipunum og mjølvirkjunum og útróðrarverkfallið, sum var í mai - juni mánað, soleiðis at fyrra hálvár sýndi eina afturgongd uppá 38 mill. kr. Seinna hálvár 1975 hevur sostatt vignast betur enn sama tíðarskeið 1974, og í 1976 er hendan framgongd økt, soleiðis at vit inntil 1. juli í ár hava útflutt fyri 262,3 mill. kr. ella 53,1 mill. kr. meira enn sama tíð ífjor. Hetta er hálvársmet, um 10 mill. kr. meira enn í 1974 sum var besta árið.

Hvat útflutninginum viðvíkur hava vit sostatt vónir um at sela nýtt met fár. Henda vón byggir á at fiskaprísirnir framvegis eru uppgangandi, at rekjurnar eru munandi meira í nøgd, at mjølprísirnir nú í longri tíð hava verið vaksandi og nú tykjast at hava rokkið hæddum, sum skuldu givið hampulig rakstrarúrslit hjá ídnaðarveiðuflotanum. Men alt velst sjálvandi um veiðumøguleikar og veiðuúrslit.

Gjaldjavni og handilsjavni sýndu aftur í fjor munandi hall. Innflutt var fyri heilar 650 mill. kr., so undirskotið á handilsjavnanum var 186 mill. kr., meðan gjaldsjavnin, sum er uttanlandshandilin í víðari merking har tænasturveitingar og tilskot danska ríkisins eru við, hevði eitt hall uppá 122,9 mill. kr. mótvegis 118 mill. kr. í 1974.

Hesi hall eru lutvist fíggjaði við lántøku uttanlanda, lutvist við at nýtt er av yvirskotinum árini frammanundan.

Skipaíløgurnar eiga bæði í 1974 og 1975 sín stóra part av gjaldsjavnahallinum, tí hesi bæði ár eru innflutt skip fyri ávikavist 84 mill. kr. og 143 mill. kr. Skipaíløgurnar eru ógvuliga ójavnar ár um ár, viðlvørt niðri á 8 mill. kr., men ífjør umleið dupult so stórar sum nakað ár frammanundan. Haraftarat hava íløgurnar í framleiðslutól innan ídnað, handverk og bygging verið óvanliga stórar so partar av lántøkuni viðvíkja slíkum tólum. Tá so er, er ikki orsøk til at lata seg órógva ov mikið av, at hall er á gjaldsjavnanum, tí við fleiri og betri framleiðslumunnboðum og skipum er útlitið fyri einum øktum framleiðsluvirði hitt fregasta.

Samanburður av einstaklinga og almennum íløgum seinna árini hevur áhuga til lýsan av samlaða virksemínum í landinum. Seinastu fimm árini (1971 - 75) hava tølini verið 192, 212, 243, 400 og 469 mill. kr., harav tær almennu hava verið 82, 110, 119, 172 og 162 mill. kr. Ár og valla heldur næstu ár verður ífagt minni í føroyska samfelagnum, heldur er væntandi ein spakuligur vokstur. Talið av óloystum uppgávum er ongantíð minkandi og strembanin móti at fjøltátta vinnugrundarlag føroyinga krevur framhaldandi stórar peningaíløgur.

Sparingin í 1975 var 406,4 mill. kr. mótvegis 361 í 1974 og 400 í 1973. Sum umstøðurnar hava verið, meli eg hetta úrslit rættuliga gott at vera.

Nevndi at rættuliga stórar lánløkur eru framdar uttanlandi seinna árini, tey seinastu lánini eru uppá ávikavist 42 og 30 mill. kr., bæði tikin í dollar,

annað um bretskan banka úr U.S.A. og hitt um danskan banka úr oljulandinum Dubai. Hesi lán eru tikin sambært heimildir tingsins í vár til fíggjan av vega- og bergholsbygging, skúlabygging og automatstøð í Havn.

Annars hava í fíggjarárinum farnu og hesum, vit eru í, inntøkur landskassans gingið hampuliga væl inn. Inntøkumetini á gomlu fíggjarlógini vistu seg at halda væl og reiðuliga tað. Inntøkurnar bliva samanlagt 305 mill. kr. mólvegis mettum 270 milliónum krónum, men sum vant eru eisini útreiðslurnar lægri, 303 mill. kr. móti mettum 269 mill. kr. Fykafíggjarlóg viðvikjandi hesum mani verður framlogd fyri tingið fyrsta dagin, og er so ællanin at viðgera hana beinanvegin tingsetan verður uppafturtikin í heyst.

Skattaeftirstøðurnar viðvikjandi gomlu fíggjarlógini vóru 1.7.1976 umleið 13% og er hetta minni enn tey seinastu árini. Hetta sýnir at gjaldorka borgaranna er ikki viknað undir hesi sonevndu krepputíð.

Fyrsta fjórðingsárið av verandi fíggjarlóg er lýst í einum av fylgjuskjølunum, og sæst har, at inntøkurnar, hóast tolini eru munandi størri, ganga væl inn. Greinað er ikki hvorjir samfelagsbólkar ella hvorjir staðfir tað eru sum gjalda rættstundis, men ívaleyst er, tá procenttolini ikki eru broytt, gjaldingin javnað eins og áður. Hetta sigur eitt sindur um inntøkumøguleikarnar í lotuni og so mikið, at inntøkurnar eru lægri enn seinasta ár. At inntøkurnar hjá øllum stættum hæði í krónum og realokonomiskt eru vaksandi er eisini tað sum væntað og ætlað var. Men at realinntøka samfelagsins sum heild er fallin í 1975 er greitt, tí so nógv vesnaði býtislutfallið í handli okkara, at hesum slepst ikki undan.

Skal ein taka sammanum viðvikjandi føroyskum búskapi, er at gera vart við, at forbrúkið framvegis er ógvuliga stórt millum manna, orsakað av stórum virksemi, virksemi sum seinasta ár fyri stóran part var fíggjað við privatum og almennum lántøkum uttanlanda, trekki uppá tjóðarbanken og sterkt vuksandi ríkisstuðuli (serliga til sjúkrahúsrakstur, social- og skúlamál) sum røkk 183 mill. kr. seinasta fíggjarár.

Orsøkin til lántøkurnar er at býtislutfallið í handli okkara broyttist so avgerandi í 1975 og at hetta lutfall slær so hart ígjøgnum í føroyskum búskapi har inn- og útflutningur er so stórur partur.

Her heima er nýtt sanna framferð sum í restini av vesturheimminum, at undirskotið er fíggjað við lántøku. Kortini her við tí úrsliti, at nærtan er sloppið undan arbeiðsloysi.

Prístalsvøksturin í skeiðnum frá 1. juli 1975 til 1. juli 1976 er um 8% og er hetta minni enn í londunum uttanum okkum, og má tykjast rættuliga nøktandi, tí ein veit hvussu lætt vit imflyta prísvøkstur í handli okkara.

Uppá styttri og lougri sikt er vesnandi at matfiskur sum handilsvara

kemur í eina heilt aðra og betri støðu enn nakrantíð, so meginspurningurin fyri føroyskan búskap verður ikki sølu- men veiðumoguleikarnir.

Ørtøka skipaflotans og fiskimanna.

Tíverri tykist tað trupult at fáa til vega tey rakstrartøl, skylda er til at lata búskaparráðnum, og er tí tað sum nú er vitað um úrslitini av skiparakstrinum grundað á eitt ógvuliga lítið tal av skipum innan hvørn bólk, og er ikki fingið tilfar fyri sonnu skip í sonnu veiðu í slíkum tali, at samanburður beinleiðis kann gerast eru.

Kortini sýna tølini, at avlopið til rentur, avdrátt og fyrisæti er minkað munandi hjá ídnaðarskipum, línuskipum og feskfiskatrolarum, meðan nótaskipini, flaka- og saltfiskatrolararnir og frystiskipini hava hampulig úrslit.

Tann fjøltáttan dentur hevur verið lagdur á seinni árini munar aftur her, tí tað vil vera lettari hjá samfelagnum at bota um afturgongdina hjá einum parti av flotanum lá ið hin parturin hevur frægari úrslit.

Fleiri ferðir fyrr hevur verið gjort vart við torvin á nóg góðum hagfrøðisligum tilfari og vilja til samvirkan frá vinnuni við at lata tøl frá sær. Tað er ikki bert veiðutøl ein skal kenna so líðliga sum møguligt. Nevnda dømi sýnir at stuðulin veittur er, kanska kunnli verið givin minni generelt um ein hevði møguleika at fylgt neyvari við gongdini í rakstrinum hjá einstøkum vinnugreinum.

Í komandi tingseti eigur gjølla at verða viðgjørd øll tann serliga stuðningslóggáva vit í løtuni hava, soleiðis at eykastuðningarnir sum skjótast kunnu falla burtur aftur, tí í longdini kann hetta, at lyndi er til, at fyribilsstuðningsskipanir gerast varandi, ikki tæna teirri rationalisering og nýtímansgerð sum er neyðug, skal ein standa seg í kappingini.

At vit sjálvt í 1973, lá vit hovdu bestu útfluttningsumstøður, lótu 13 mill. kr. í beinleiðis stuðningi til fiskaprísir o.a. sýnir betri enn annað hvussu torført tað er at koma burtur úr vanu.

Vit fáa onga sosialistiska samfelagsskipan bert við at tað almenna rindar rakstrarhall og rindar stuðning, men vit hava heldur onga liberalistiska skipan við at taka burtur áhugan fyri at skapa avlop ella trongdina til at sleppa undan halli, ella við at lata prísir, lønir, manningarpartar, íloguprocentir o.s.fr. standa fyri heilt øðrum enn tí, tølini verumliga skuldu sýnt.

Hinvegin hevur samfelag okkara tann veikleika, at í alt ov stóran mun verða fiskaprísir og manningarpartar stillarin ella regulatorurin í upp og niðurgongutíðum, tær tvær harmonikurnar sum fremst ávirkast av broytingum í býtislutfallinum, og sum tá tað gongur væl eingi tiltok krevja frá

almennari síðu, heldur ikki at stuðulin minkar, og sum tá tíðirnar verstu heimanvegin krevja eina umflytlan av inntøku millum stættir.

Henda veikleika mugu vit burturúr, fyrst tí tað ikki ber til, at bert fiskimenn og skipaeigarar sita heilt øðrvísi fyri enn onnur, men eisini tí manningarpartarnir fyri stóran part av flotanum ikki kunnu sigast at hava verið ov høgir sjálvt í bestu tíð.

Ráfiskagrunnurin er ein royndi at sleppa burtur úr lesi støðu, og tryggja javnari príslegn fyri rávarunna, men henda skipan má úthyggjast til at fevna størri parti av vinnuni, soleiðis at tað verður møguligt at leggja nakað til síðis í uppgongutíðum til at javna prísir við í verri tíðum.

Eisini mugu vit tryggja okkum betri amboð at fylgja gongdini í rakstrinum við, soleiðis at skipanin gerst so liðilig sum møguligt og verður tikin í nýtslu, har hon ger nyttu. Men fremst av øllum verður frá almennari og einstaklinga síðu at leggja doyðin á at fremja ta rationalisering, sum kann fremjast, og sum má og skal fremjast.

Annars er um manningarpartarnar í 1975 at siga, at við teim studningsskipanum samtyktar vóru í 1975 og 1976 er eydnast at tryggja teir hampuliga í mun til árini frammanundan, fyri flaka og saltfiskahekkutrolararnar, ísfiskatrolararnar, nótaskipini og frystiskipini er talan um góðar hýrur, har partarnir liggja millum 77.000 kr. og 104.000 kr. meðan saltfiskalínuskipini geva nakað minni (43-55.000 kr. mótvegis 59.000 kr.) og ídnaðarskipini munandi minni (58.000 kr. mótvegs 93.000 kr. í 1974). Men hesi seinastu hovdu sum kunnugt rettuliga langan vinnusteðg. Nú prísirnir á ídnaðarfiski í Danmark eru komnir upp í 47 oyru pr. kg. (og vit vónandi skjótt kunnu fylgja við herheima) skuldi ídnaðarveiðan kunna konsolidera seg aftur, og harvið givið hækkandi manningarpartar. Hýruyvirlitini eru hjáløgd í skjali.

Við prisunum, galdandi eru idag, skuldu manningarpartarnir aftur verið í vokstri, men fyri ávísar veiðuhættir treingjast leiðirnar sum kunnugt meir enn fyri aðrar.

Ídnaður.

Sambært tey síðstu almennu tølini eru umleið 4.000 fólk í arbeiði innan handverk og ídnað. Av hesum 80% menn og 20% kvinnur.

Í framkomnum demokratiskum loundum verður deildur lagdur á, at skapa umstøðurnar soleiðis, at fólkið fær dagligt arbeiði við hampuliga góðari úrtøku.

Støðið er lugt til fremjun av ídnaðarúthygging, eisini ídnaði, ið ikki er knýttur at tí, sum kemur úr sjónum.

Við galdandi lógunum, sum skaptar eru í 70-unum, ídnaðargrunnunum,

Menningargrunninum, donsku egusútviklingslógini og ymsum veðhaldslógum, hevur føroyskur ídnaður fingið ræfturliga góðan moguleika at menna seg. Vit siggja góða frukt av hesum, hóast vit kundu yntskt, at tað hevði gingið skjótari.

Men tað hevur verið sannað so mangan, at tíð skal til alt, eisini at umskipa arbeiðslagið, sum í Føroyum ikki hevur verið stórvegis merkt av ídnaðarmentaliteli, sum krevst, um ræfturlig framstig skulu spyrjast.

Men við teimum ileggingarmøguleikum, vit nú hava og við eini bending, kanska á sama hógv, sum tá vit bygdu upp fiskiskipaflotan, eru vónir um, at vit komandi árini fremja enn skjótari stig ávegis.

Hugsað er her ikki einans um nýggj tiltøk (nýggjar ídnaðargreinir) men eisini um ídnað sprottnan úr tí handverki, sum hevur verið dagligur og munagóður bústólpi higartil, men sum við kappingini uttanífrá kann tykjast at hava ilt við at standa seg. Innan húsabygging og sum heild bygging her á landi, er kappingin stór uttanífrá, ein føríð avbjóðing, sum vónandi livessir okkum og elvir til at vit taka okkum fram og í summum føri taka upp annan tátt.

Skipabygging er framvegis av stórtýdningi. Umstøðurnar, hóast broyting í fiskivinnuni, eiga at lagast so, at føroysku skipasmiðjurnar eiga møguleika at byggja meginpartin av okkara flota.

Uppskotið sum fyrr hevur verið sett fram um skipan av sáttmálastovni er ein vegur at ganga fyri at tryggja føroyskum skipasmíði rímulig kor. Figgjarmøguleikar okkara eru veikari enn onnur lond veita og bjóða. Ein umskipan, sum gevur føroyskum skipasmíði tryggari figgjarligt støði verður at fremja, um framhaldandi skipabygging skal verða .

Eitt sjófarandi fólk byggir skip. At vit taka lut í hesari bygging er sjálvsagt og somuleiðis at samfelagið fremur tiltøk til tess at so kann verða.

Í sungouguskjalinum stendur at skipabyggistuðulin skal verða broyttur til lagalig lán, her eigur kortini slikur munur at verða gjørdur ímillum treytirnar tá bygt verður í Føroyum og tá bygt verður uttanlanda, at okkara smiðjur, sum sjálvsagt skulu vera kappingarførar, ongar truguleikar hava við at tryggja sær sáttmálar. Umleggingin til veiðu á føroyaleiðunum í størri mun verður eisini at krevja munandi útbyggingar av fiskaídnaðinum uppi á landi.

Landsstýrið viðgerð hvørt ár hóp av umsóknum, bæði til figgjan av nýggjum virkjum og viðkan og umskipan av verandi virkjum, og vil í komandi tingsetu leggja fyri tingið uppskot um broytan av summum av galdandi lógunum fyri uppaftur betur at kunna styðja føroyskt fyritaksemi. Tað er altíð neyðugt at brynja seg til broytt viðurskifti. Vit hugsa her um skipabygging, húsabygging og sum heild ídnað, eisini hann, ið vit áttu at skapt í tilknýti til aðrar stórar vinnur, ikki minst fiskivinnuna.

Landbúnaður.

Landbúnaðurin, sum gjøgnum tíðirnar hevur verið høvuðsvinna landsins, hevur seinastu árini lutfallsliga fingið minni týðning í tjóðarbúskapinum.

Hetta metir landsstýrið vera skeiva gongd, bæði frá einum almennum figgjarligum sjónarmiði, og hitt, at av hesum stendst, at javnvágin í fólkavøkstrinum og búsetingarmynstrinum fer av lagi, bygdir fána burtur og verður landið harav fylgjandi minni. Tað almenna verður í samráð við vinnuni at støðga hesari skeivu gongd og fremja tiltøk, ið skapa framgongd í føroyskum landbúnaði.

Ein arbeiðsbólkur við umboðum fyri felog og landbúnaðarstovnar hevur arbeilt við spurninginum um landbúnaðarskúla, royndar- og upplýsingarstarvsemi í landbúnaðinum, og verður uppskot skjótt lagt fyri landsstýrið.

Keyp og søla av foroyskum landbúnaðarvørum hevur verið ov illa organiserað. Tá nú verður farið undir byggjan av sláturhúsum, skuldi ligið helur fyri at sloppið av við framleiðsluna, og skuldi hetta gjort tað lættari hjá tí almenna at fremt tiltøk, ið vardu landbúnaðin móti innflutningi uttanfrá, ið bygdi á óvanligar prísir.

Landbúnaðarlóggávan verður at taka til viðgerðar, og har vandi er fyri, at bygdir ella oyggjar eru at fara í oyði, verður at umbugsa, um ikki serlig lóggáva og onnur tiltøk eiga at gerast á tílíkum støðum.

Sethúsabygging.

Tað er framvegis tvorligt hjá teimum, ið vilja byggja sær egin hús. Tilfarsprísirnir fara upp og arbeiðslonin sonnleiðis, meðan lánimøguleikarnir ikki eru góðir, lánini ov dýr og stuttfreistað. Landsstýrið arbeiðir við hesum máli og vónar, at ið hvussu so er nakað kann koma á tingborð í hesi tingsetu. Millum annað verður arbeitt við at víðka og broyta virksemið hjá Húsalánsgrunninum. Tað er saunstundis eyðsæð, at grunnurin hevur brúk fyri nógv meira peningi, enn hann hevur nú. Løgtingið samtykti tí eisini, eftir uppskoti frá landsstýrinum, at seta 7,5 mill. kr. av á núverandi fíggjarlóg til Húsalánsgrunnin. Hetta var ein vøkstur uppá 4 mill. kr. í mun til avsetingina árið fyri.

Men hert at veita Húsalánsgrunninum meira pening og at broyta og víðka virksemi hansara loysir ikki íbúðarspurningin í Føroyum. Tað verður neyðugt at hugsa um onnur tiltøk eisini, millum annað um at stovna eina miðstøð fyri innkeypi av tilfari, og at skapa betri moguleikar fyri bygging av íbúðarhúsum.

SOSIAL MÁL

Dagpeningaskipan.

Í framhaldandi úthyggingini við sosialum lógum, so flestum er tryggjað fíggjarligt lívsgrundarlag, hevur landsstýrið í umbúna at fremja uppskot um eina dagpeningaskipan at tryggja inntøkumiss fyrst og fremst hjá tímaløntum undir sjúku-, vanlukku- og undir barnsburði. Miðjað verður ímóti at henda skipan skal kunna veita peningahjálp upp í 3 mánaðar. Samráðingar eru farnar fram millum umboð fyri danska stjórnina og landsstýrið um hvussu langt sleppast kann í fyrstu atlogu. Tá hetta stendur greitt verður farið undir samráðingar við fakfelagini, so hesi kunnu hava ávirkan á lóggávuna. Funnist hevur verið at, at felagini ikki fyrr eru komin inn í myndina, men tað er nú einaferð neyðugt at tala seg ávegis við tann partin sum ivaleyst kemur at bera ein munagóðan part av kostnaðinum áðrenn farið verður viðari.

Lógaruppskot vænlar landsstýrið at leggja fyri tingið í vetrartingsetuni.

Sjúkrahúsini.

Tann úthyggjan av sjúkrahúsunum, sum tey nógvu síðstu árini hevur verið í Føroyum, hevur givið væl betri moguleikar at viðgera sjúklingar heinna í Føroyum. Tó verða enn um 400 sjúklingar hvørt ár sendir til viðgerðar á Ríkishospitalinum í Keypmannahavn. Úthyggingin verður at halda fram, um endamálið at veita eina so neyva viðgerð sum gjørligt og so skjótt sum gjørligt, skal fremjast. Tað er tó av størsta týdningi fyri einstaklingin, at tað kann fáast viðgerð í Danmark, tá okkara viðgerðarmoguleikar ikki rokka til.

Á landssjúkrahúsinum verður í hesum fíggjarári opnað nýggj viðgerðardeild — intensiv deild — serliga til viðgerðar av hjarta-sjúklingum. At tað eru aðrar serdeildir, ið eisini tørva, kenna vit m.a. frá viðgerðum her á tingi, men her velst eisini um, um tað er gjørligt at fáa leir serbinu læknar og onnur starvsfólk, sum krevjast. Serdeildir til viðgerð av eygna-, oyrna-, næsa- og hálsasjúkum hava seinnu árini bert verið tokar í styttri millumbilum. Oyrna-, hálsa- og næsalækni er nú aftur í føstum starvi á landssjúkrahúsinum, og er við honum ein mannandi bati í heilsuroktini fingin aftur í rættlag.

Men ólryggin er tíverri mangar ferðir størri á hinum sjúkrahúsunum, tí tað hevur ikki borið til at fingið tær neyðugu útbúnu læknakreftir. Á Norðuroyar sjúkrahúsi er tó bæði medisin- og skurðlækni, men sjúkrahúsini krevja mannandi modernisering.

Landsstýrið hevur í hyggju á ólavsoku at leggja fyri tingið lógarupptskot til nýtímansgerð av Norðuroyar sjúkrahúsi – – her uppi er eisini ætlanin um at byggja sjálvstoðugt røktar- og ellisheim í tilknýti til sjúkrahúsini. Henda ætlan, sum umfatar røktar- og ellisheim, heilsumiðstoð, fysiurgiska deild, umfatar eisini umbyggjan av koki, vaskarii og gerð av nýggjum kapelli. Kostnaðarætlanin liggur um 16 mill. kr.

Í Suðuroy verður byggingin av røktar- og ellisheiminum í tilknýti til Suðuroyar sjúkrahús lokin í hesum ári. Hetta heim skal rúma 28 fólkum. Kostnaðurin er uml. 8 mill. kr.

Á Ellisheiminum í Havn fer fram aftrabygging til 10 búfólk aftrat. Henda aftrabygging er metti at kosta umeið 2 mill. kr.

Upprunaliga ætlanin við útbygging av røktar- og ellisheimum umfatar eisini eitt heim í Eysturoynni.

Heimahjálparskipanin.

Henda skipan er nú komin í rættiliga góða legu. Fyri fyrstu ferð í sogunni er ein endalig úfbúgving av kvinnum øll sum hon er, farin fram í Føroyum. 30 heimahjálparar hava í hesum døgum fingið prógv sum fullærdir heimahjálparar.

Tað virka í løtuni 156 heimahjálparar. Heimahjálparaskipanin man vera ein tanu lýðningarnesti fátturin í royndunum at stuðla teim gomlu og sjúku í egnu heimum teirra og harvið egnum umhvørvi. Landsstýrið leggur dent á at henda skipan verður framhaldandi viðkað og stimbrað.

Vistarheim.

Tað eru í løtuni 2 vistarheim í rekstri, eitt í Havn og eitt í Runavík, ið hýsa 24 fólkum, sum tørva at vera undir serligari umsjón og rokt, og sum ikki hava møguleika at búgva heima. Uppi hesum tali eru eisini fólk, sum í mong ár vóru undir vernd í Danmark. Í umbúna er at víðka virkið hjá Vistarheiminum soleiðis, at møguleiki gevst at veita fólki, sum kunnu arbeiða til egið uppihald, men sum tó ikki eru før fyri at halda egið hús, íhúð ella húsarúmd, tó soleiðis at tey sjálvi kunnu halda útreiðslurnar av bústaði og kostarhaldi.

Revalidering.

Revalideringsarbeiðið í Føroyum hevur fyri stóran part verið rekt av ALV-stovninum. Ætlanin er at skipa henda stovn sum part av almennu

revalideringini, soleiðis at moguleiki verður at rokka longri til teirra sum løtva revalideringshjálp.

Specialskúlin.

Frá komandi skúlaári byrjar Føroya Specialskúli í nýggja Skúlanum á Trøðni. Við hesum er undirvisingin av teimum, sum krevja serundirvising, komin undir góðar holisunistøður. Tó er at vóna, at endamálið, at undirvísingin fer fram í heimbygdini, eisini tá talan er um serundirvising, verður framt í mestan mun.

Andsveikaforsorgin.

Andsveikaforsorgin hevur fá ár á baki í Føroyum. Men hesi ár hava sýnt, at vit við góðum samstarvi við Statens Andssvageforsorg og vel útbúnum starvsfólki, hava møguleikan at geva hina bestu umsorgina til teirra sum krevja verju og sum tróta andsevnini at kunna liva óvard í samfelagnum. Tað er nú vorðið greitt, at útbyggingin á Statshospitalinum verður framd og hevur staturin játtað tær 12,7 mill. kr. sum byggingin av tveimum andsveikadeildum verður metti at kosta. Tað vera tá 48 pláss til andsveik. Hetta røkkur tó ikki lørvinum, men er ein góður bæti. Ynskjandi er, at viðari útbygging kann fara fram soleiðis at nærstøðan til tey eiustøku heimini kann vera so neyv sum gjørligt. Landsstýrið vil virka fyri at tryggja teimum ólutlføru eina so góða tilveru, sum tað nú er gjørligt hjá okkum at skapa.

Sjúklingaheim.

Í Keypmannahavn er ognað vistarheim til at taka imóti sjúklingum úr Føroyum, sum søkja sær heilsubót í Danmark. Teir sjúklingar, sum verða sendir til heilsuviðgerðar frá føroyskum sjúkrahúsum og sum ikki skulu liggja burturav á sjúkrahúsi, kunnu búgva á hesum vistarheimi ókeypis. Hetta tiltak skuldi eisini rokkið tí lørvi, sum hevur sýnt seg at verið hjá næstrafólki sjúklinga at fáa bústað til so lagaligan kostnað sum gjørligt. Tað er at vóna at hetta tiltak kann útbyggjast til eisini at umfata aðrar sosialar uppgávur fyri føroyingr sum noyðast til viðgerðar í Danmark, í hvussu so er so leingi vit ikki eiga eitt verdligt Føroyahús.

Skúlamál.

Arbeiðið við at fáa lagt allan skúlaskap í Føroyum undir eina felags leiðslu undir landsstýrinum er nú komið so langt, at samráðingar verða væntandi í næstum við ríkisstjórnina um yvirtøkuna av skúlamunsitingini. Samráðingar vóru í januar í ár við kunsmálaráðið og forsætisráðið um spurningin, tá var semja um, at ein arbeiðsbólkur, settur av landsstýrinum og ríkisumboðinum, skuldi leggja fram eina gjallíga frágr. um skúlaskap í Føroyum. Henda frágr. er nú gjørd og send ríkisstýrinum, og væntandi verða samráðingar útfrá hesum grundarlagi um stutta tíð. Landsstýrið hevur í sínum uppleggi miðað móti at fáa sum mest av myndugleika yvir skúlaskapi í Foroyum lagdan undir ein stovn undir landsstýrinum, uttan at hetta skal broyta tað figgjarliga býtið millum statskassan, landskassan og kommununurnar.

Í 1970 samtykti løgtingið, at landsstýrið skuldi seta eina nevnd at gera uppskot um eina felags leiðslu av skúlaskapinum. Nevndin varð sett sama ár, men ikki fyrr enn í vár varð álit lagt fram. Hetta og onnur álit um skúlaskap – millum annað álit um fólkaskúlan og álit um vinnuskúlarnar – ætlar landsstýrið at leggja fyri løgtingið nú á ólavsøku, so tey kunnu koma til umroðu seinni í heyst.

Roknast kann við at løgtingið fer eina rað av týðandi málum á skúlaøkinum til viðgerðar í komandi tíð. Tað verður neyðugt at samtykkja nýggja löggávu fyri fólkaskúlan, læraraskúlan, sjómannasskúlarnar, vinnuskúlarnar og kvoldskúlan. Álit ella uppskot fyriliggja longu í flestu av hesum málum.

Í Danmark varð tann broyting gjørd í skúlaskapinum, at ongin nýggjur realflokkur verður tikin upp nú í summar, men í staðin er stovnaður ein valskúli. Henda broyting er ikki framd í Foroyum enn, men tað er greitt, at okkara skúli má broytast skjólast gjørligt.

Trýstið á landskassan frá kommununum fyri at fáa studning til bygging av skúlum, íttróttarhallum og svimjihallum er stórt. Vanliga verður slík bygging figgjað soleiðis, at kommununurnar rinda 50%, staturin fetur 20%, og landsstýrið rindar 30%. Í vár gav løgtingið landsstýrinum heimild at taka upp til 10 mill. kr. í láni til partvísa rindan av landskassans studningi til kommununurnar. Landsstýrið hevur tikið 8 mill. kr. í láni til hesi endamál.

Tann pædagogiska ábyrgdin av studentaskúlanum og HF er nú løgd undir eitt 3-manna ráð undir landsstýrinum. Samstundis hevur endalig prøvtøka verið fyri fyrstu ferð á HF skeiðinum í Havn, Klaksvík og Suðuroy.

Mentunarmál.

Á mentunarøkinum er gróður. Føroyingar royna seg sum ongantið fyrr í teimum ymsu listargreinunum. Fremmand listarfólk vitja hígar, og føroyingar vitja í onnur lond.

Starvsemið á Fróðskaparsetrinum er vaksandi, og næmingatilgongdin til Føroyamálsdeildina og Stoðisútbúgvingina meiri enn deildirnar eru førar fyri at taka imóti. Byrjað verður í árinum við guðfroðislestri, og ætlanir eru um at fara undir aðrar lestrargreinir, um peningur verður játtaður.

Nýtt og nútíðarhóskandi landshókasavn er í gerð, og býar- og bygdabókasøvnini verða útbygd. Landsskjalasavnið starvar í nýggjum holum, og tá nýggja landshókasavnið er liðugt, skuldi verið møguligt at fingið betur høli til hini søvnini, so sum forntminnisavnið og náttúrfroðisavnið.

Nýtt útvarpshús er skjótt liðugt til útbjóðingar, og í seinastu tingsetu varð viðtikið á løgtingi, at føroyskt sjónvarp skal setast á stovn.

Landsstýrið verður í tingsetuni at leggja lógaruppskot fram í sjónvarpsmálinum.

Landsstýrið metir, at áðrenn long tíð er gingin, skuldu ytru treytirnar fyri einum góðum føroyskum útvarpi og sjónvarpi verið til staðar.

Vega- og havnarmál.

Hildið verður fram við vegabyggingini um alt landið, og verða fleiri týdningarmikil vegastrekki á bovaðsferðslovegunum liðug í hesum árinum.

Eysturoyar bergholið verður opnað fyrsta dagin, og kemur sambinding av Eystur- og Streymoynni tá fyrsteni rættiliga til sín rætt.

Økta ferðslan ger tað neyðugt, at stórur partur av gomlu vegunum verða umbygdir, breiðkaðir og asfalteraðir, samsvarandis sum hildið verður fram við nýgerðini.

Landsstýrið miðar ímóti, at vegur kemur sum skjótast til hvørja bygd í landinum, har tað er møguligt, og ællast kann, at fólk verða búgvandi.

Øktu vegalongdirnar seta størri og størri krav til viðlíkahald, og verður vaksið um grótknúsorkuna og nýtt asfaltverk gjort. Í hesum sambandi eigur spurningurin, um píkadekk skulu verða loyvd, at verða tikin til viðgerðar.

Ollbyggingin av fiskivinnuni bæði við skipum og virkjum á landi, serliga tann umlegging ið fer fram, at størri og størri partur av veiðu føroyinga fer fram á nærleiðunum, veksur um kravið um góð havnarlog.

Flestu havnirnar, ið peningur er játtaður til í verandi havnaætlanum, eru bygdar ella í gerð, og miðar landsstýrið ímóti at leggja nýggja havna-

ætlan fyri tingið í hesari tingsetuni. Landsstýrið metir, at ein tílík ætlan hægst eigur at røkka tinum ár, og umhugsað eigur at verða, um ikki ein ávís nøtfylgja skal skipast í hesum tíðarskeiðinum, so almenni studningurin verður útgoldin í byggitíðini og tíggjarliga byrðan hjá kommununum sostatt minni.

Støðan í vega- og havnabyggingini er annars gjølligari lýst í einum av fylgjuskjølunum.

Strandferðslan.

Tað er farin fram stór útbygging av strandferðslunni leys seinastu árini, og verður hesin táttur í okkara samfelagsvirksemi røktur so væl nú sum ongantíð fyrr. Skipini eru nýggjari, størri og betri bóskandi, og siglt verður eisini oftari, enn tað hevur verið gjort framumanundan. Samstundis hevur strandferðslan gjørt nýtslu av tí vega-, berghols- og brúgvagerð, ið hevur verið her á landi. Til tess at okja um tenastu sína hevur strandferðslan keypt bílar, ið koyra fólki vorunnar til dyrnar víða hvar í landinum.

Alt hetta hevur sjálvandi samstundis ført við sær, at útreiðslurnar til strandferðsluna eru vaksandi. Enn fyriliggur grannskoðaður roknskapur fyri 1975/76 ikki, men fyribils tol frá strandferðsluni vísa, at rakstrarundirskotið hetta ár lá um 7 mill. kr. móti 4,2 mill. kr. árið fyri. Hovuðsútreiðsluvøksturin er hall hjá Smyrli uppá 2,1 mill. kr., bílturnar hava kostað útvið ½ mill. kr., og umsitingin er vaksin við einum 700.000 kr. Tey 3 skipini Teistin, Sildberin og Kjógvin, sum vórðu løgd seinasta heyst, kostaðu kortini í roknskaparárinum útivið 600.000 kr. Meginparturin av hesi útreiðslu stóðst av siglingini í fjør summar, og vónir eru tí fyri at spara nakað í hesum tíggjarári, eftirsum hesi skip nú einans verða nýtt til taks.

Pride, sum er dýrari í rakstri enn skipini sum røktu Kaldbak, Hest, Koltur, Skúvoy og Sandoy, hevði í fjør eitt hall uppá 700.000 kr. og klassingarútreiðslurnar vóru serliga stórar í 1975.

Smyril er aftur í summar í uttanlandssigling, og umframt eins og í fjør at sigla til Íslands og Noregs, verður nú siglt til Skotlands. Talið á ferðafólkum er numandi størri í ár enn í fjør. Tíl og við seinastu viku hevdu yvir 10.000 ferðafólk verið við Smyrli á uttanlanda rutunum í summar móti 8.200 fólkum alt summarið í fjør. Í ár hevur hann flutt 1.700 bílar mótvegis 1.300 alt árið í fjør. Hetta fører eisini við sær, at skipið gevur yvirskot summarmánaðirnar, meðan tað hevur undirskot um veturin.

Um nakrar dagar opnar Eysturoyar berghólið, og tað kann hugsast, at hetta kemur at broyta ferðingarmynstrið nakað. Onki er at ivast í, at bil-

ferðslan til og úr Klaksvík kemur at økjast í sambandi við hergholið, og tað verður tí ivaleyst neyðugt at fáa annað far, sum tekur fleiri bílar og lastbílar í staðin fyri Ternuna at røkja henda flutning. Fyribils er ætlanin at láta Tróndi sigla sum vant millum Havnina og Skálafjørðin, til eitt yvirlit fæst yvir, um opningin av bergholinum ger torvin fyri so nógvari sigling hjá Trónda mimi. Um stutta tíð er øll strandferðslan í Foroyum undir tí almennu. Sum tí varð yvirtikin av strandferðsluni í vár, og tá ið Eysturoyar bergholið letur upp, verður tað seinnsta privatu strandferðuskipið selt av landinum.

Tað gerst meira og meira greitt at neyðugt verður at fáa annað skip fyri Dúgvuna, skal summarsiglingin innanlanda ikki fáa alt ov stórt afturstig í mun til vetrarsiglingina. Hetta hevði eisini givið betri møguleikar fyri at nýtt teir mongu ónýttu møguleikarnar, sum liggja í at røkja summarsigling millum norðurlond, nú ferðastreymurin tykist at linka suðureftir og tey ferðandi meira venda eygunum móti teim norðaru økjunum.

Landsstýrið hevur ta áskoðan, at foroyingar sum sjófarandi tjóð náttúrliga eiga at fryggja sær lut í hesum flutningi.

Telefonverkið

Arbeiðið við at fullfiggja landsautomatiseringina av telefonini heldur fram. Ætlanin er, at all landið skal hava automattelefon innan árslok næsta ár.

Hetta seinasta árið hava Foroyar eisini fingið automatiskt telefonsamband við útheimin. Telefonverkið rokir hesa tænastu, og hevur hetta eisini økt um inntøkumøguleikarnar hjá verkinum.

Størsta útbyggingarmál, nú steðar fyri hjá verkinum, er stoðin í Havn. Her hevur løgtingið játtað veðhald fyri lán upp til 22 mill. kr. til bygging av nýggjari stoð, og lán er fingið til endamálið. Farið verður undir útbyggingina so skjótt sum tilber.

Ein hin størsti spurningurin telefonverkið í løtuni hevur at arbeiða við, er at fáa til vega eina meira langfreistaða figgjan ístaðin fyri nokur av teim sluttfreistaðu útbyggingarlánunum sum vórðu tikin árini herfyri. Møguliga kemur tingið at taka støðu til at flyta veðhaldini fyri hesu yvir á slík langfreistaði lán.

Uttan eina slíka umlegging av lánunum kemur telefonverkið í eini tvey trý ár at vera í rætfuliga trongari likviditetsstøðu.

Postverkið.

Tað eru bert lidnir 4 mánaðir, síðani postverkið varð yvirtikið sum føroyskt sermál og gjordist stovnur undir landsstýrinum. Tað er tí ógjørligt longu nú at gera nakra haldgóða meting av teimum rakstrarligu og figgjarligu viðurskiftunum á Postverki Føroya. Løgtingið samtykti í vár at sela 3,5 mill. kr. av á galdandi figgjarlóg til Postverkið, og leysliga verður mett, at hesin peningur í hvussu er fer at rokka.

Landsstýrið hevur hetta farna árið havt drúgvar samráðingar við danskar myndugleikar um yvirtøkuna av postverkinum. Úrslitið av samráðingunum varð m.a., at bygningar og aðrar ognir, sum Post- og Telegrafvæsenet hevði í Føroyum, vórðu latnar heimastýrinum ókeypis, og harafturat varð funnið fram til eina nýggja skipan fyri starvsfólkið á postverkinum, sum nú starvast undir líkuandi umstøðum sum alment starvsfólk í Føroyum annars.

Í sambandi við yvirtøkuna 1. apríl í ár gav Postverk Føroya út 3 nýggj frímerki. Tey fyrstu føroysku frímerkini komu í januar mánaða í fjor. Síðani yvirtøkuna hevur postverkið selt frímerki til savnarar kring allan heim fyri 3,9 mill. kr., og samanborið við útgávuna av teimum fyrstu føroysku frímerkjunum seinasta ár er hetta heldur betri úrslit.

Ætlan postverksins er at geva út eina rað av frímerkjum aftrat í hesum figgjarárinum. Við framtíðarútgávu av frímerkjum verður deittur lagdur á at finna fram til motivrøðir, sum í mest moguligan mun kunnu siga frá Føroyum, okkara søgu, mentan, náttúru, vinnulívi og øðrum. Tann komandi fyrsta røðin av frímerkjum kemur at hava motiv frá fiskivinnuni.

Skattur, tollur og gjøld.

Meginparturin av teimum málsøkjum, frammanfyri eru nevnd, eru lið í samfelagsins gonguverki — hjá okkum eins og øðrum framkomnum samfeløgum. Men fyri at hesi málsøki kunnu rokjast so til fulnar, at vit kunnu kallast eitt nýmótans samfelag, har landsins íbúgvar á øllum økjum kenna seg hava kor at liva undir, ið kunnu javnsetast við grannatjóðir okkara, skulu inntøkur til — inntøkur at gjalda hetta gonguverk. Krovini til landskassan eru tí alstór og fyri at lúka hesi krøv sum frægast hava vit skatta-, toll- og avgjaldslógir, ið løgting okkara hevur samtykt og sum gevur heimild til at áleggja fólkinum gjaldsskyldur — gjaldsskyldur til landskassa og kommunur.

Okkara fyrsta skattalóg frá 1923 varð nýtt við ymiskum broytingum til 1963, tá nýggj og meira greinilig skattalóg kom, og hevur hon verið nýtt nú í 13 ár, tó við fleiri broytingum gjøgnum árini, og hava hesar

broytingar yvirhøvur borið í sær skattalætta serliga fyri tey við teim lægru inntøkunum. Umfram nevndu skattalóg frá 1963 fingu vit triggjar serskattalógir í 1971. Givið er tað, at bæði inntøkubroytingin hjá tí starvandi fólkinum og tað framtak, ið er farið fram innan okkara høvuðsvinnu, gevur landsstýrinum orsøk til at taka hesa lóggávu upp til nærri umhugsunar. Ásamnast má tó, at tær stóru privatu ilogurnar í tann núlíðandi fiskiflota, vit eiga, eisini hava sína orsøk í lóggávuni frá 1971. Landsstýrisins meting um skattalættar má sjálvandi hava eina aðra meting við sær, og er tað landskassans tørv til landsluisarhaldið. Hesin tørvur má prioriterast, tí bert á tann hátt fæst eitt gott tamarhald á útreiðslunum. Hetta er ikki bert galdandi fyri landskassan, men eisini fyri kommunurnar, sum tær flestu ilag liggja við einum bogum skattaprosenti í mun til ár frammanundan.

Viðvikjandi tollgjoldum er at siga, at her eru smávegis broytingar farnar fram í farna ári, og hevur landsstýrið í ætlan at gera einstakar broytingar, men ikki tílíkar, ið kunnu grípa inn munandi í prísleguna, ið aftur ávirkar lønarlag okkara, sum seinasta árið hevur verið rættiliga stabilt.

Nøkur týðandi mál sum tingið helst kemur at taka støðu til.

Flogvallaleingingin hevur leingi verið samráðst um við statin, men hev hava loftferðslumyndugleikarnir verið ótrúliga seinførir. Nú er tilmæli teirra komið, og verða tær eudaligu samráðingarnar við ríkisstýrið við tað fyrsta. Tekur stjórnin ikki undir í leingjanini, skal málið aftur fyri tingið.

SEV er í eini truplari støðu í løtuni, útreiðslurnar til rentur og avdrátt eru stórar og trupult er at orka la neyðugu útbyggingina. Tingið eigur møguliga at taka støðu til, um SEV framhaldandi eigur at vera ein felagskommunalur stovnur ella um landið eigur at koma uppí.

Landsbankamálið eigur at koma til støðutakan á vári 1977 og miðar landsstýrið ímóti, at arbeiðið við hesum kann verða liðugt til la lið.

Uppskot til nýggja prislóggávu er gjørt og vil verða lagt fyri tingið beinanvegin, tað kemur saman í heyst.

Málið um samskipan av samferðsluni á landi og sjógvi má avgreiðast í heyst, tí støðan sum hon nú er, ger at rututænastan á landi er versnandi.

Reglugerðin fyri stýrið fyri iløgugrunnin verður framløgd eins og uppskot um broyting av stýri Realkreditstovnsins.

Nøkur lógarmál m.a. um ferðslu, arvalóg, ljúnarbandslóg liggja fyri at taka støðu til, og helst átti málið um innflutning av øli og bryggjan av øli í Føroyum at verðið tikin upp aftur.

Undirgrundir.

Tær samráðingar, verið hava við stjórnina um undirgrundsspurningar, eru ikki loknar enn, flesin spurningur er ógvuliga viðbrekin, og er vorðin tað í meira mun av teirri gongd, verið hevur í Grønlandi, men føroyska sjónarmiðini eru so framvegis tey, at endaligi avgerðarrætturin í øllum spurningum viðvíkjandi kanningum og virksemi á havbotni okkara og í undirgrundini, liggur í Føroyum.

Landsstýrið er framvegis av teirri áskoðan, at tað ikki hevur so stóran skund at loyva slíkum virksemi, tí vandil fyri avlaging av búskapi okkara, mentan okkara og tí livsformi vit hava valt er alstórur.

Veiðurættindi — Fiskimark — Samráðingar.

Størsta málið, sum stendur fyri at taka stoðu til er útflytanin av fiskimarkunum og tær mongu avleiðingar av hesum verða, og tær mongu samráðingar, sum fara mugu fram í hesum sambandi.

Landsstýrið leggur nú ólavsokutingselan byrjar uppskot fyri løgtingið um heimild til at samráðast við donsku stjórnina um at fremja útflyting av føroyska fiskimarkinum í seinasta lagi 1. januar 1977, og um uppsogn av sáttmálanum við seks lond um veiðu á føroyaleiðunum.

Segði í løgmansrøðuni í 1973, at stríðið ikki stóð um útflyting ella ikki útflyting, men um at nýta tíðina sum fór at ganga til nýggj rættarviðurskifti vóru skipaði á havinum á skilabesta hátt, at tryggja sær fleiri rættindi á heimasjógvi, meðan vart varð so gott ein kundi á fjarleiðum.

Sum kunnugt vóru ikki allir politiskir flokkar samdir um hvat skilabesti háttur var, ella nær útflyting frægast kundi fremjast, men óreslitið er so vorðið tað, at vit fyri so vítt í senju — í seinastuni undir tí fyrisetningi sum liggur í samgonguskjalinum — hava bíðið til tað er øllum eyðsýniligt at tíðin er búgvin at fremja leik.

Í hesum máli mugu nú allir standa saman, og vit tað gera meg ógvuliga bilsnan, um ikki uppskot landsstýrisins fær undirtøku frá 26 tingmonnum.

Slík undirtøka frá samlaður tingi er mótvegis umheiminum veruligt tekin um styrki.

Vit hava havt trý ár undir fyribilsskipan at fyrireika økta troyting av føroyaleiðunum og er partur okkara vaksin mumandi, ja so mikið at lár verður nøgdin undan Føroyum mumandi størri enn nakrantíð fyri. Vit koma sjálvir at veiða meira enn 32.000 tons av toski og hýsu og er tað í sjálvum sær orsøk til at siga sáttmálan upp, nú samráðingar um broytingar vildu verið uttan meining.

Landsstýrið hevur leingi fyrireika tann leik, ið stendur fyri, í samráð-

ingum í 1975 og 1976 við Noreg, Bretland, Canada, Island, Grønland, EF og ikki minst við danskn stjórnina er royut sum fraegast af tryggja, at rættindi verða eftir at veiða á okjunum, hesi lond og henda eina samgonga koma at hava undir valdi sínum. Samstundis er gjort londunum greitt, at Føroyar fóru at flyta út í tráð við ta útflyting, aðrir fremja.

ICNAF-fundurin í Montreal har Canada boðaði frá útflyting eins og U.S.A. frammanundan hevði gjort, sýndi at býtið av kvotum eftir tí mynstri verið hevði, varð vorðið soga, og at tann gongd verið hevði nokur ár, at strandalondini tóku sín lut fyrst, nú var góðlikin av ollum.

Sama sogan endurtók seg á NEAFC-fundinum í Lissabon, og bíða tí nú samráðingar um kvotabýti allastaðni eftir at myndin við 200 fjórðinga fiskimarkun liggur greið. ICNAF og NEAFC fáa í framtíðini annan setning enn tey hava í lotuni.

Landsstýrið boðaði í vár stjórnini frá, at tilmæli tess vildu verða givin á ólavsøku, og aftaná fundin í Montreal var fundur millum umboð fyri landsstýrið og stjórnina umboðaða av forsætisráðharranum og uttanríkismarknaðar-, fiskivinnu- og grønlandsmálaráðharranum, har landsstýrið legði fram støðu sína um útflyting áðrenn árslok.

Stjórnin hevur gjort útkast til neyðuga løggávu viðvikjandi fiskimarksútflytingini, og tá henda er samtykt, er so við samráðingum við grannalondini at fáa lagt miðlinjurnar fastar har minni enn 400 fjórðingar eru millum londini.

Størsta arbeiði tingsins hetta og moguliga komandi skeið verður at taka støðu til spurningar um hvussu fyriskipast skal á okinum innanfyri fiskimarkið. Hetta kennur nú undir føroyska løggávu. Hvørji umboð skulu nýtast hvar, hvørjar avmarkingar, friðaði øki, nueskavíddir, skipastøddir, studningsveitanir o.s.fr. o.s.fr. skulu vera.

Ein meginspurningur — og hann sum í sær ivaleyst eigur størsta spiran til politiskt tjak — verður hvussu nógv av loyvdu heildarvriðmi vit kunnu og skulu lata øðrum í býti fyri rættindi hjá teim.

Egna áskoðan mín hevur verið og er, at vit við galdandi skipaslag, veiðuhættum, viðgerðarstigi, marknaðum o.s.fr., ikki fáa tað mest rationella burturúr við at ileggja í, at vit sjálvir skulu taka alt undir Føroyum og herí nýta før okkara her. Harlil eru stovnar okkara ov viðbrekin og veiðan ov nógv bundin til árstíðir, umfram at okið er trongt og merkt av streyni og skiftandi veðurlikindum, og gevur ov smáar moguleikar fyri fjølbroyttum veiðuhættum.

Ein støða, har vit veiða meginpartin av tí, veiðast kann her, og samstundis royna at varðveita ávís rættindi sum allernativ nðrastaðni — hóast hesi rættindi verða nóg so smá — meti eg er hollasta grundarlag okkara. Men her eru menn kanska nakað ójavnir á máli. Kortini má semja vera um, at eina tillagingartíð, og helst rættuliga langa, kunnu vit væl nýta,

soleiðis at allur fjarfiskifloti okkara ikki skal troðkast inn á foroyaskið í einum.

Vit fáa úr at gera við at kanna hetta okið so gjølla sum gjørligt, ja sum nevnt í onkrari av undanfarnu ólavsøkuroðunum frá minsta pluki til frægastu mið, úr fjørum og út í djúpastu rennu og frá hellingini niður í dýpið og inn aftur yvir landgrunnin allan.

Vit mugu kanna hvørji skipastøg kunnu veiða á hesum øki við góðum rakstrarúrslitum, og vit mugu nýta orku og pening til rationaliseringar av teim førum, sum í løtuni ikki geva nóg góða úrtoku.

Hvørjar møguleikar síggja vit so í løtuni fyri tann flota vit eiga?

Ja, her er lítið vitað um møguleikar fjarfiskiflotans á okkara leiðum. Teir mest svartskygnu halda at teir eru eingir, meðan aðrir meta teir góðar at vera.

Oftast hoyrir ein ivaleyst, at vit skulu selja ein munandi part og fáa okkum minni skip. Hesum eri og ikki samdur í, tí roynast skal í hvussu er hvat neyðugt er at gera. Eri millum teirra, sum meti, at stórir partar av flotanum beinanvegin eiga møguleikar heima, meðan aðrir, um teir bert hava ávís alternativir burturi ein part av árinum, eisini kunnu fáa val burturúr her.

Verða idnaðarbátarnir skeredir á norðsjóarleiðunum, vil stórt tal av teimum hava munandi betri møguleikar at veiða matfisk undir Foroyum enn dýrari nýbyggdir trolarar.

Skal upsin veiðast, og í hesum stovni liggur sum kunnugt størsti expansiónsmøguleiki hvat matfiski viðvíkur — verður hann valla veiddur við snellu, men heldur av stórum hekkutrolarum við góðari maskinorku, slíkar hava vit nakrar av. Kunnu hesir ella ávist tal av teim so aftarat troyta rættindini við Labrador, Vestur- og Austurgrønland og Norðurnoreg og kanska í ein lítlan mun undir Íslandi, er teim ivaleyst liv lagað.

Kemur sildin aftur norðanfyri verður brúk fyri kraftblokkaførum og svartkjaft hava hesir sýnt, teir kunnu veiða, verða so møguleikarnir fyri lodnuveiðu við New Foundland, Norðurnoreg og vónandi Ísland nýtlir og verða ávís rættindi aftur í Norðsjónum, skuldi eitt munandi tal av kraftblokkaførum dugnað.

Stutt sagt kann ikki beinanvegin sigast, at vit hava eina óbóskandi samanseting av flota okkara. Harafturat kemur, at royndirnar vísa, at eins svikalig fiskivinna kann roynast, eins ofta opnar hon nýggjar møguleikar, sum vit sóðu í vár við svartkjaftinum.

Men sum nevnt í fjør, skulu vit livbjarga okkum, verður neyðugt við sterkari stýring enn føroysk fiskivinna hevur verið undir áður, bæði hvat iløgum og fiskiskapi viðvíkur. Kvoturnar burturi skulu veiðast og ásetingarnar heima haldast, treytirnar fyri veiðuloyvum burturi í ongum førum brótast, tí tá hevur skipið, sum vit hava sæð undir Íslandi, forbrotið

sínar livsmøguleikar. Veitt verður undir eftirliti, og bátar okkara koma hvonn dag at siga frá fiskileiðir, veiðumøgd og veiddum fiskaslag.

Hesar treytir koma vit eisini at seta øðrum, og vil hetta geca vaktarhaldið á storra økinum einfaldari.

Hvat hesum viðvíkur er greitt, at vit ikki røkka bert við einum vaktar- og bjargingarskipi aftúrat danska vaktarhaldinum, vit mugu sjálvir ileggja munandi í betri vaktarhald og verða at krevja danska parlin munandi bøttan og margfaldaðan, harúfturat verða at taka í nýtslu núlímanstól sum radari á landi og flogfor. Hetta vil alt seta stór krøv til orku okkara.

Ein liðilig studningsskipan, sum tryggjar at tey fiskaslog og tær kvotur, sum veiðast kunnu, verða veidd, verður ein foetreyt, og skal hon verða meira differenticroð og minni generel enn hendan, vit nú hava, eisini hetta vil seta stór krøv til lingið, eins og tað at fáa til vega rottu foetreytirnar fyri støðutakanum í hvørjum einsøkum føri.

Harafturat verða vit í eitt storri mun enn higartil at kýta okkum fyri at skapa nýggjar vinnumøguleikar innan iðnað, farmasigling, landbúnaða o.s.fr.

Lat meg at enda taka uppaftur, at vónin er at lingið fer undir hetta mikla arbeiði í breiðastu semja.

Løgtingssetan 1976

Ár 1976, hósdagin 29. juli kl. 13.00 varð løgtingið sett.

Formaðurin las skriv frá løgmanni, dagfest 19. juli 1976, har løgmaður smb. stýrisskipan Føroya stevnir tingmonnum til fundar ólavsøkudag kl. 13.00.

Tingmenninir eru:

Norðoya valdømi

Hákun Djurhuus, Klaksvík, tf.
Poul J. Olsen, Klaksvík, jv.
Jóhan Simonsen, Klaksvík, tf.
Ásbjørn Joensen, Klaksvík, sj.

Eysturoyar valdømi

Jógvan Sundstein, Tórshavn, tf.
Jóhan M. Olsen, Strendur, sb.
Jógvan Olsen, Toftir, sb.
J. Fr. Øregaard, Gøtu, jv.
Signar Hansen, Fuglafirði, tf.

Norðstreymoyar valdømi

Agnar Nielsen, Vestmanna, sb.
Jógvan Durhuus, Vestmanna, tf.

Suðurstreymoyar valdømi

óli Breckmann, Tórshavn, tf.
Eliesar Arge, Tórshavn, tf.
Jona Henriksen, Tórshavn, jv.
Erlendur Paturssøn, Kirkjubø, tf.
Pauli Ellefsen, Tórshavn, sb.
Hilmar Kass, Tórshavn, sj.
Kjartan Mohr, Tórshavn, fb.

Vága valdømi

Vilhelm Nielsen, Sandavági, tf.
Haldor Hansen, Tórshavn, jv.

Sandoyar valdømi

Heðin M. Klein, Sandur, tf.
Tórolvur Olsen, Sandur, jv.

Suðuroyar valdømi

Hilmar Bech, Porkeri, jv.
Sverri Midjord, Tvøroyri, jv.
Ove Mikkelsen, Vágur, tf.
Jákup Mortensen, Tvøroyri, sb.

Formaðurin bað Hilmar Bech og Heðin Klein um at vera fyribils skrivarar.

So fór fram val av formansskapi.

Til formann varð valdur J. Fr. Øregaard og til næstformann Jógvan Sundstein.

Til 1. skrivara varð Hilmar Bech valdur og til 2. skrivara varð Heðin Klein valdur.

Síðani fekk løgmaður orðið til løgmansvøðuna 1976.

Formaðurin bað tingmenn rópa eitt 9-falt hurrá fyri Margrethe drotning og eitt 3-falt hurrá fyri Føroyum.

Tingsetan endaði 12. mai 1977.

Skrásett tingmál vóru 106.

Fundirnir vóru 86 í tali.

1. Fíggjarløgtingslóg 1977/78

Ár 1976, 14. desember, legði Dennmus Hentze, landsstýrismaður, fram

Uppskot til fíggjarløgtingslóg 1977/78.

1. viðgerð 7. februar, málið beint í fíggjarnevndina.
2. viðgerð 25. mars, 3. viðgerð 28. mars.

Uppskot landsstýrisins við broytingum frá fíggjarnevndini endaliga samtykt við 21—0 atkvøðum.

Meirilutaálit
i
løgtingsmáli nr. 1/1976: Fíggjarløgtingslógin 1977/78.

Tann 14. december 1976 legði landsstýrið uppskot fram til fíggjarløgtingslógina 1977/78 og undir 1. viðgerð 7. februar 1977 varð málið beint í fíggjarnevndina.

Í fíggjarløgtingslógaruppskotinum vísir landsstýrið á, at uppskotið hevur eina javnvág uppá 380,7 milj. kr., og er hetta ein vøkstur uppá 16,3% sammett við verandi fíggjarlóg. Landsstýrið hevur í sínum uppskoti mett inntøkurnar at vaksa við 5,7% og ger landsstýrið vart við, at orsøkin til, at vøksturin ikki verður mettur hægri, er hon, at landsstýrið hevur í ætlan at leggja fram uppskot um broyting í skattalógini, sum verður mett til at lækka um skattin við 10 - 12 milj. kr.

Tollinntøkurnar metir landsstýrið til 180 milj. kr., og er her talan um eina meirinntøku í tollinum uppá 41 milj. kr. Frá seinasta ári. Tá gav tollurin 142 milj. kr., og verður hann nú mettur at geva 163 milj. kr. Henda meting er grundað á ta hækking í vokstri, sum hevur verið seinastu árini. Vegskattin metir landsstýrið at geva umleið 3 milj. kr. meiri í hesum fíggjarárinum, tí umhugsað verður ein hækking í vegskattinum, ið hevur verið óbroyttur síðani 1968.

Um útreiðslurnar, ið eru vaksnar 53,2 milj. kr. sigur landsstýrið frá leimum størstu hækkingunum, og nevnir tær greinir, ið hækkaðar eru, og fa einu, ið er lækkað.

Sagt verður frá, at lønarútreiðslurnar eru settar upp við mígaldandi prístali. Fyri sjúkrahúsini eru nýlt tollini frá seinastu figgjarlóg við eini hækking uppá 10%. I yvirliti visir landsstýrið á, hvørjar grundirnar eru til, at tær ymisku greinirnar eru hækkaðar ella lækkaðar, t.d. verður sagt frá, at lækkingin í § 6: landsstovnar stendst av, at raksturin av postverkinum er fluttur til § 13.

Undir viðgerðini av figgjarlógaruppskotinum hevur figgjarnevndin havt samroður við umboð fyri Búskaparráðið, Foroya Fiskasøln og peningastovnarnar fyri at hoyra teirra meting um figgjarstøðu landsins í løtuni og teirra meting um figgjarvánirnar framyvir.

Samstundis sum hetta er gjørt fyri at royna at finna so haldgott støði sum gjørligt undir figgjarnevndarinnar meting av samfelagsins beriorku í komandi ári, hava samráðingar verið við leiðandi menn innan umsitingina.

Búskaparráðið metir uppsparingina fyri at hava verið stóra og ger vart við, at føroyska samfelagið hevur ein høgan livifót.

Um inflatiónsratuna varð sagt, at hon er minkandi, og var niðurstøðan hjá umboðsmonnunum fyri Búskaparráðið hon, at støðan hjá føroyska búskapinum og vánirnar vórðu batnaðar.

Svarið, ið figgjarnevndin fekk frá peningastovnunum um teirra meting av inntøkutoltunum í figgjarlógaruppskotinum, var, at nógvur peningur er millum fólk, likviditeturin er góður, og hildu teir, at støðan var góð, húsabyggingin t.d. hevur ongantíð verið størri enn nú. Teir vístu eisini á, at uppsparingin í 1976 var betri enn í 1975, sonuleiðis er likviditeturin betri.

Fyri Føroya Fiskasøln mótti tekniski stjórin á figgjarnevndarfundi. Um flakaframleiðsluna sagði hann, at har hevði verið triðingur í vøkstri í nogd og uppgongd í prísinum. Vist varð á, at fyri 5-punds pakkar hevur prísvøksturin verið frá 5 - - 15%.

Viðvíkjandi saltfiskinum vísti nýggjur sáttmáli eitt prisfall. Sagt var, at umleið 2.000 tons liggja ósald, at prisfallið helst verður at standa við, og metir Fiskasølan, at tað verður torført at selja saltfisk undir 22". Um rekjur vísti stjórin á vøkstur í framleiðsluni og hevði marknaðurin kunnað tikið henda vøkstur. Nakað varð prisurin dragnaður í 1976, men var nú komin aftur fyri seg, og roknað verður við eini ávísari prishækkan seinni. Um rekjukvotuna varð sagt, at hon verður øll útnyttað í 1977, og metir Fiskasølan, at góðskan av leimum rekjum, ið føroyingar selja, er hin besta.

Um møguleikan fyri at tilvirka fisk meiri serviðgjørdan sagði stjórin, at tað er sera avgerandi at funnið verður fram til eina «specialvøru» og at

eitt útviklingsarbeiði verður gjørt. Fiskasølan arbeiðir við at seta á stovn slíka útviklingsdeild. Um likviditetin er at siga, at hann er betri nú enn í fjør.

Sambært orðalagnum, ið menn frá vinnulívinum hava nýtt, er útlitið á figgjarøkinum goft. Sjálvandi er eitt so lítið samfelag sum okkara sárbart, og tað er mark fyri, hvussu nógv tað tolir av vekt á borði, men við figgjarligum varsemi skuldi komandi ár kunna komið at royndst okkum sum eitt gott ár, serliga um úrslitið av feimum veiðiroyndum á fremmandum leiðum, ið nú samráðst verður um, kemur at roynast soleiðis, at vit ikki koma at standa við spógvabýti á hesum lívstýðningarmikla øki, sum okkara partur.

Í góðum samarbeiði hevur meirilutin í figgjarnevndini (Hákun Djurhuus, Poul Jacob Olsen, Hilmar Beck, Jógvan Durhuus og Signar Hansen) við minnilutanum (Paudi Ellefsen og Ashjørn Joensen) gjøgnumarbeitt landsstýrisins uppskot til figgjarløgtingslóg, og er meirlutans meting, at samlaðu inntøkurnar kunnu verða settar til kr. 393.551.000, ið geva kr. 157.600 í vinningi.

Tá er í landsstýrisins inntøku uppskoti

§ 1/0010:	Vanligur landsskattur mettur at geva ..	2	milj. kr. meiri
§ 1/0070:	Sjómansskattur	1	milj. kr. minni
§ 1/0090:	Vegskattur	1,5	milj. kr. minni
§ 1/0095:	Fólkapensjónsskattur	0,4	milj. kr. meiri
		0,1	milj. kr. minni
§ 2/0100:	Tollgjøld mett at geva	11,7	milj. kr. meiri

Broytingarnar á útreiðslusíðunni í mun til landsstýrisins uppskot eru hesar:

§ 10: Løgtingið 4.021.000
konto 510-1014-2310:
Av játtanini uppá tilsamans kr. 115.000 verða játtaðar útreiðslur í sambandi við keyp av tveimum bandtólum til upprit av munnligum orðaskifti.

§ 11: Landsfyrisitingin. Greinin sett til 22.291.000
Broytingarnar eru hesar:
Konto 1101 Landsskrivstovan:
nýggj konto: serkøn hjálp viðv. landsbankamálinum 75.000

konto 1150 serkøn hjálp til skattamáls-kanningar - líkningarráðið		30.000	
konto 1170 hækkað við ialt		90.000	
konto 1201 hækkað við ialt		110.000	
kr. 60.000 til skatta-e.d.v.-programm, kr. 50.000 árfiðarlønir.			
§ 12: Heilsumál. Greinin sett til			30.039.400
Broytingar eru hesar:			
Konto 2001	+	974.400	
Fíggjarnevndin mælir løgtinginum til at játta meirkostnað á § 12 til ein yvirlækna aftrat í almennari kirurgi.			
Serviðgerð í ortopedi fer fram á og frá Klaksvíkar sjúkrahúsi. Mælt verður til eisini at játta meirkostnað í samband við setan av einum yvirlækna í patologi.			
Konto 2020	+	522.000	
Konto 2030	+	68.000	
Konto 2040	+	250.000	
Konti 2020-2030-2040 settar sambært uppskot frá sjúkrahússtjóranum.			
§ 13: Samferðslumál. Greinin sett til			78.900.000
Broytingarnar eru hesar:			
1. Nýggir vegir og brýr:			
Upphæddin lækkað við		3.000.000	
2. Lendingar í grunn:			
Upphæddin hækkað við		6.000.000	
§ 14: Skúlamál. Greinin sett til			41.187.000
Broytingarnar eru hesar:			
Konto 2290/3110 játtað		500.000	
Konto 2295/3130 uppskotið hækkað við		1.000.000	
§ 15: Vísind, bókmentir og list.			
Greinin sett til			12.553.000
Broytingarnar eru hesar:			
Konto 2380		90.000	
Konto 2390/3205 konfoin hækkað við 105.000 kr. (sí viðm.)			

Konto 2390/3208 upphædd økt við kr. 2.000 (sí viðm.)		
Konto 2390/3211 upphædd økt við kr. 324.000 (sí viðm.)		
§ 16: Fiskivinna, sigling o.t.		
Greinin sett til		71.998.000
Broytingarnar eru hesar:		
Konto 2430 økt við kr. 500.000 til akhumátarar.		
Konto 2490/3301 økt við 1.600.000 í samband við hækking av minstuløn upp til kr. 4.300 og til saltfiskastudning kr. 1.000.000.		
§ 17: Landbúnaður og matrikulering.		
Greinin sett til		5.981.000
Broytingarnar eru hesar:		
Konto 2501	+ 35.000	
Konto 2520	+ 120.000	
§ 18: Handil, ídnaður v.m.		
Greinin sett til		7.392.000
Broytingarnar eru hesar:		
Konto 2790/3502 uppskot økt við kr. 100.000.		
ad konto 2720: 2 bileftirlitsmenn ávikavist í Klaksvík og Suðuroy.		
Konto 2790/3504 økist við	500.000	
§ 19: Almannamál v.m.		
Greinin sett til		70.635.000
Broytingarnar eru hesar:		
Konti 2805, 2810, 2830 og 2845 (sí løgtingsmál nr. 57/1976) hækkaðar við	300.000	
(sí løgtingsmál nr. 66/76)	1.600.000	
(sí løgtingsmál nr. 67/76)	20.000	
Konto 2890/3684 økt við	50.000	
Konto 2890/3688 aftrat í grunn: Sjúkra-		

grunnur verkamanna og handverksmanna	60.000
2890/3689 upphædd økt við	1.000.000

Samsvarandi tí, við fört fram er í málinum, mælir meirilutin (Hákun Djurhuus, Poul Jacob Olsen, Hilmar Beck, Jógvan Durhuus og Signar Hansen) løgtinginum til at samtykkja viðlagda uppskot til fíggjarlogtingslóg fyri 1977/78.

Meirilutin í fíggjarnevndini, 24. mars 1977.

Hákun Djurhuus Poul Jacob Olsen Hilmar Beck

Jógvan Durhuus Signar Hansen

Viðmerkingar:

Fíggjarlógaruppskotið 1977/78 hevur eina javnvág uppá 380,7 milj. kr., sum er ein vøkstur uppá 53,2 milj. kr. ella 16,3% í mun til verandi fíggjarlóg.

Inntøkurnar:

Vanligi landsskatturin í mun til seinastu fíggjarlóg er meltur at vaksa við 8 milj. kr. ella 5,7%. Orsøkin til, at vøksturin ikki verður mettur hægri, er tann, at landsstýrið hevur í ætlan at leggja fram uppskot um broytingar í skattalógini, sum verða meltar at geva ein skattalætta uppá umleið 10—12 milj. kr.

Tollinntøkurnar verða mettar til 180 milj. kr. í mun til mettu tollinntøkuna fyri 1975/76, sum var uppá 139 milj. kr., er talan um eina meirinntøku í folli uppá 41 milj. kr. Tollurin í 1975/76 gav 142 milj. kr. og í 1976/77 er hann mettur at geva 163 milj. kr. Hækkingin svarar sostatt til vøksturin, sum hevur verið seinastu árini.

Vegskatturin verður mettur at geva umleið 3 milj. kr. meira enn í hesum fíggjarári, tí umlugsað verður ein ávís hækking av vegskattinum, sum hevur verið óbroyttur síðan 1968.

Útreiðslurnar:

Útreiðslurnar eru vaksnar við 53,2 milj. kr. og eru tær størstu hækkingarnar hesar:

§ 6 Landsstovnar	2.000.000,—
§ 10 Løgtingsmenn	1.034.000,—
§ 11 Fyrisiting	2.911.000,—
§ 12 Heilsumál	2.300.000,—

§ 13	Samferðslumál	8.900.000,–
§ 14	Skúlamál	4.813.000, -
§ 15	Vísind- bókmentir og list	1.805.000, -
§ 16	Fiskivinna	5.123.000,–
§ 19	Almannamál	8.779.000,
§ 24	Avdráttarburturleggingar	9.600.000,—

Í uppskotinum eru lønarútreiðslurnar uppsettar við núgaldandi prístali. Fyri sjúkrahúsini eru nýtt tolini frá seinastu figgjarlóg við eini hækking uppá 10%.

Til tær einstøku §§ kann annars viðmerkjast:

ad § 6: Landsstovnar.

Lækkingin av útreiðslunum til landsstovnar stavar frá at raksturin av postverkinum er fluttur til § 13: Samferðslumál.

ad § 10: Løgtingsmenn.

Hækkingin stavar frá nýggju lønarskipanini.

ad § 11: Fyrisiting.

Hækkingin er uppá 15,2% og kemur av vanligari øking og prís- og lønarvøkstri.

ad § 13: Samferðslumál.

Til nýggjar vegir og brýr eru í hesum figgjarári avsettar 40 milj. kr., meðan heimilað verður til lántøku til vegabygging uppá 20 milj. kr., smbr. § 41. Í hesum figgjarári er játtanin 30.000.000 kr. og lániheimildin 30 milj. kr.

ad § 14: Skúlamál.

Størsta hækkingin undir hesi grein stavar frá øktum rakstrarútreiðslum hjá fólkaskúlanum og studentaskúlanum uppá tilsamans 3,2 milj. kr.

ad § 15: Vísind-, bókmentir og list.

Útreiðslurnar undir hesi grein eru vaksnar við 17,6%, ella 1,8 milj. kr. Størsta einstaka hækkingin er játtanin til bygging av Norðurlandahúsi uppá 500.000 kr.

ad § 16: Fiskivinna.

Samlaða hækkingin er uppá góðar 5 milj. kr. Játtanin til grunnin til endurnýggjing av skipaflotanum er økt við 11 milj. kr. til 19 milj. kr. umfram at søkt verður um heimild at læna 10 milj. kr. til grunnin. Játtanin til minstuløn og annan sluðnl til fiskivinnuna er eftir meling av torvinum lækkað við 8 milj. kr. til 40 milj. kr. Nýggja vaktarskipið er komið í rakstur og er játtanin til vaktar- og bjarggingartænastuna hækkað við 2,4 milj. kr. til 5,9 milj. kr.

ad § 19: Almannamál.

Veitingarnar til fólkapensión, avlamispensión og til aðrar sosialar veitingar eru hækkaðar við umleið 7,4 milj. kr. og játtanin til Húsalánsgrunnin er hækkað við 1 milj. kr. til 8,5 milj. kr.

ad § 24.

Av skjølunum til fíggjarlógina framgongur, at avdráttur av verandi lánum í komandi fíggjarári verður 11,5 milj. kr. Upphæddin er hækkað við 10,1 milj. kr. til 21,6 milj. kr. Hetta stendst av, at á fíggjarlógini er avsettur peningur til afturrindan av lánum, sum seinni falla til gjaldingar undir eimum. Her verður serliga hugsað um «Orion-lánið» uppá 42 milj. kr., sum er avdráttarfrítt í 5 ár, men skal afturgjaldast alt tann 28. april 1981.

Demmus Hentze
landsstýrismaður

/ J. Djurhuus.

Minnilutaálit
í
løgtingsmáli nr. 1/1976: Fíggjarløgtingslógin 1977/78.

Eftir lokið nevndararbeiði í løgtingsins fíggjarnevnd ger minnilutin í nevndini (Pauli Ellefsen úr Sambandsflokkinum og Asbjørn Joensen úr Sjálvstýrisflokkinum) hesar viðmerkingar til uppskotið.

Arbeiði nevndarinnar hevur sum vant verið rúgvismikið og drúgfort við nógvum fundum, hvar ið høvi hevur verið til at hoyrt áskoðan teirra, sum í ti dagliga takast við vinnu- og fíggjarpolitik landsins.

Hesar samrøður leggur minnilutin stóran dent á, eins og tær áskoðanir, sum har komu fram, eru ógvuligga tungtvigandi í metan og støðutakan minnilutans av vantandi inntøkum, sum er grundarlagið undir útreiðslu-

síðn lógarinnar, tá tað má haldast at veru óráð, um ikki javnvág er á landsins figgjarlóg.

Tó er her at gera varl við tann forda figgjarpolitikkin og tær stóru láruppheddirnar, sum eru innlagdar í figgjarlógaruppskotið, partvís fyri at skjóta út byrðarnar til seinni, eins og ógjørligt er at sjálvfiggja tær stóru játtanir, sum givnar eru.

Her verður einamest hugsað um § 16 í lógaruppskotinum, hvar ið minnilutin nú eins og seinast, lógin var til 2. viðgerð, gjørdi viðmerkingar um tørvandi útgreining av útreiðslum, eins og fórt varð fram, at neyðugt var longu tá at ávísa meiri pening til endurnýgging av skipaflotanum. Hendan skilagóða hugsan minnilutans, sum tá var feld, er nú vorðin váttað við teimum stóru upphæddum, sum meirilutin mælir til at játta, beinleiðis á figgjarløgtingslógini eins vel og við stórari lántøku.

Hóast hesar upphæddir, lán og beinleiðis játtan, stendur spurningurin støðugt ógreiður, um upphæddin stendur í mun til neyðugan tørv.

Minnilutin tekur undir við meirilutanum og fegnast um, at uppskot minnilutans til seinasta figgjarlóg er tikið so gjølla til eftirtektar av meirilutanum.

Samanber ein meling millum nú og seinastu árini um figgjarvánirnar, so er útlitið gott fyri komandi ári.

Tann figgjarpolitikkur, sum førdur verður í grannalondum okkara, hvar ið vit hava mestan partin av vøruhýtinum, tykist komandi árið at skula vera so háttaður og tryggur, at hetta skal koma okkum til gagns.

Sjálvandi er hetta treytað av, at okkara vinnumøguleikar ikki verða skerdir enn meira hvat fiskiskapinum viðvíkir.

Um so verður, so skuldu figgjarvánirnar komið at royndst okkum vel í árinum sum kemur.

Við hesum sjónarmiði sum grund og við tí stóra meirgjaldi, sum komið er inn fyri toll hesi seinastu árini, um 35 milj. kr. hvørt árið, metir minnilutin tað rímligt at rokna við eini stórri inntøku í tolli enn mett er í uppskoti meirilutans, hóast minni verður tikið til enn tað, sum feilmett hevur verið seinastu árini.

Meirilutauppskotið til figgjarløgtingslóg fyri 1977/78 vísir eina javnvág uppá 393.551.000 kr. ella 12.900.000 kr. meira enn uppskot landsstýrisins.

Javnvágin er sostatt 66.100.000 kr. ella 20% hægri enn figgjarløgtingslógin fyri 1967/77.

Tað er í hesum føri rímligt at samanbera prisvoksturin her og í grannalondunum, har ið inflatiónslyndið altíð ávirkar okkara figgjarløgtingslóg. Ávirkanin hevur tíðetur seinastu tíðina verið til okkara fyrimuns, og líkt er til, at hetta lyndið kemur at vara við nakað framyvir.

Við gjøllari kanning av meirilutauppskotinum til figgjarlóg fyri 1977/78, hvar minnilutin í flestu førum tekur undir, er tað minnilutans

hugsan, at neyðugt er í verandi stoðu at avsetta ávisar meirupplæddir til figgjarlogtingslógina, ikki bert fyri at gera nýflogur, men eisini fyri at kunna fremja løgtingssamtyktir eins vel og ílogur, sum fráboðaðar eru at koma á tingborð, og sum eftir minnilutans meti eiga at sjálvfiggjast mest moguligt. Út frá hesum vil minnilutin mæla til eina hækkan av § 16, sum snýr seg um fiskivinnu, og har at avsetta 1 milj. kr. til tær útróðrarstøðir, sum løgtingið samtykti í næstseinastu tingsetu.

Eins og gjort var seinasta ár, vil minnilutin leita á landsstýrið um at fáa skipað fyri tí ofta umrøddu reglugerð fyri asfalteringsgrunnin. Hendan reglugerð eigur at orðast so, at hesin grunnur nú kemur at fevna um meira enn bert asfaltering, men at hann eisini kann brúkast til ílogur sum byggibúgving, spæliplass o.a.

Eisini var í seinasta minnilutaáliti mælt til, at hesin grunnur varð umsitin av Foroya kommunufelag, vit vilja endurtaka hesa hugsan okkara.

Í § 12 verður skotið upp at skipa eina nýggja konto, sum eitur 3009: dálking, og at avsettar verða til hetta endamál 100.000 kr.

Sigast kann, at tað er uppgáva starvsslovunnar at gera tær neyðugu kanningarnar viðvíkjandi okkara matvørum, at tær heilsufrøðiliga eru í lagi eins vel og neyðugar kanningar eiga at verða gjordar av okkara drekkivatni og møguliga eisini kanningar av sjónum í firðunum, hvar framtíðar fiskaaling kemur at fara fram. Neyðug tiltøk eiga tí at verða framd, har hetta er møguligt. Men alt hetta krevur pening, og verður tí hetta uppskot sett fram.

§ 14. Har verður mælt til undir 31-13 at sela pening av 100.000 kr. til bókasavnsbuss, eins og gjørt var seinasta ár. Tað er áskoðan minnilutans, at allar bygdir eiga at kunna taka lut í og fáa ágóða av tí almenna lesnatilfari, sum finst, og knan hetta loysast á hendan hátt.

Afturat hesum mælir minnilutin til ávísar broytingar, sum her verða ávístar.

§ 15. Sjónvarp, í grunn	÷	250.000 kr.
§ 17. Landbúnaðarráðgevari	÷	120.000 kr.

Viðvíkjandi § 18 3502: Sluðul til ítnaðarfrembjandi endamál, so mæla vit til, at hendu uppliæddin verður 750.000 kr. og verður gjørd tann viðmerking, at grunnurin verður at umsita saman við figgjarnevndini.

§ 19. Almannamál 3691 er arbeiðsloysisgrunnur arbeiðarafelaga. Her mælir minnilutin til, at hendan uppliæddin verður økt við 75.000 kr. til 400.000 kr. Sum viðmerking til øking á hesi konto verður sagt, at hesar 75.000 kr. verða at lata Foroya Handverkarafelag til sama endamáli sum lun peningurin á sonu konto, tí latin verður Foroya Arbeiðsmannafelag, Tórshavnar Arbeiðarafelag, Klaksvíkar Arbeiðarafelag, Foroya Fiskimannafelag og Føroya Arbeiðskvinnufelg. Umsóknir hesum viðvíkjandi

eru sendar landsstýrinum og løgtinginum frá umroddu felagsskapi Føroya Handverkarafelag.

Í sama grein 3694: Ansingar og røktarheim vil minnilutin mæla til, at hendla konto verður økt við 2 milj. kr. til 3 milj. kr.

Tað eru nú mong ár síðani, at farið varð undir byrjanina til bygging av ansingar- og røktarheimi kring landið, men enn hava vit ikki nomið hálva leið.

Minnilutin heldur fí, at neyðugt er nú at fáa loyst hendan átroðkandi spurning um bygging av teimum tørvandi heimunum, tað veri seg í Klaksvík, í Eysturoynni, á Sandoynni ella vælog neyðugt má vera at taka stig til øðrvísi umstøður enn tær, sum givnar vera teimum gomlu, sum búgva í barakkbygninginum á hospitalinum í Havn.

Íbúðarspurningurin eigur at finna sína loysn. Uppskot er um at veita Húsalánsgrunninum 9,5 milj. kr. í 1977/78. Hetta loysir eftir okkara tykki ikki hendan spurning. Neyðugt er at upptaka lán til hetta endamál, helst úr útlondum. Vit skjóta upp, at tær 2 milj. kr. eiga at verða nýttar til rentuískoyti, helst viðvikjandi uttanlandalánum, sum Húsalánsgrunnurin tekur upp og lemir út aftur til tey, sum vilja byggja sær íbúð.

§ 14, konto 3110, her mælir minnilutin til, at avsett verður 1 milj. kr. til lánigrunn til ítróttaranlegg.

Nakað av peningi er tokur í hesum grunni, sum virkað hevur í eini trý ár. Upprunaendamálið við hesum grunni var at geva kommununum møguleika fyri einari betri fíggjan enn tann háttur, sum vanliga stendur teimum í boði við kreditlánum. Hesar lántokur føra sjálvandi við sær, at rentan gerst høg og kemur hetta ivaleyst til at nerva hugin hjá kommununum at fáa loyst hendu spurningin, sum tað er at byggja hesar hallir. Og eyðsæð er, at tað verður torfort at fáa rimiligar rakstrarútreiðslur, um ikki fíggjarmøguleikarnir eru sámiligir.

§ 13. 2: Her er avsett ein upphædd uppá 11 milj. kr., sum er tað, ið nýtast skal í verandi fíggjarári til havnagerð.

Minnilutin vil mæla til at hækka hesa konto við 5 milj. kr. til 16 milj. kr.

Fleiri ferðir í hesi tingsetuni hava samgongumenn málborið seg soleiðis, at væntast kundi uppskot um nýggja havnaætlan at verða tøgd fyri tingið í hesi tingsetuni. Um enn einki er komið á tingborð hesum viðvikjandi, so eru vit vitandi um, at talan er um stórar upphæddir, og rímligt er tá, at vit longu nú seta pening av til hetta endamál, soleiðis at vit eru førir fyri mest møguligari sjálvfíggjan av hesum arbeiðum og ikki framhaldandi hert hugsa um at leita upp stór lán fyri at svara landskassans skyldur, í hesum føri til kommunur, sum fara undir havnagerð.

§ 12 undir heilsumálum, konto 3005, vil minnilutin mæla til at hækka við 85.000 kr. til 100.000 kr. Hesin peningur, sum er ætlaður sum tilskot til skúlatannlæknastovur, eigur eftir uppskoti minnilutans at kunna nýtast

á tann hátt, at studningur verður latin, tá talan er um endurnýggjun, viðkan av hesum tannlæknastovum ella til tannlæknatól.

Undir skúlamálum, § 11, verður sagt undir 3113, at studningur til ferðir innanoyggja er settur til 350.000 kr. og í sonnu grein, konto 3127 verður sagt, at útreiðslurnar til skúlabarnaferðir innanoyggja er sett til 400.000 kr.

Minnihlutin metir, at tað er ógrundað at halda hesar studningskonti opnar til strandferðslunna, og mælir til, at hesar upphæddir, 750.000 kr. verða fluttar á § 6.2., sum eitur: Undirskot sambært rakstrarætlan fyri strandferðslunna, 5 milj. kr., soleiðis at tann samlaða upphæddin verður 8,25 milj. kr.

Eins og árini frammanundan kann gerast vart við, at hendan upphæddin um undirskot strandferðslunnar er alt ov lítil, tá ið upphæddin til rentur og avdráttir framvegis ikki verða tiknar við í hesari útreiðslugrein.

Undir samferðslumálum, § 13, so er tann samlaða upphæddin í ár roknað til slakar 76 milj. kr., sum beinleiðis skulu fáast av figgjarlógini. Aftrat hesi upphædd verður roknað við eini lántøku á § 41, sum er 20 milj. kr. Minnihlutin er av teirri áskoðan, at ikki eigur at vera gingið av lang við hesum lántøkum, og mælir tí til at strika hesa upphædd á figgjarlógini.

Saman við uppskoti meirlutans og teimum her gjørdu viðmerkingum til broytingar, so er minnihlutin av tí áskoðan, at bett er nakað um hetta uppskot, sum fyrilá frá landsstýrinum fyrr í hesi tingsetuni, og vil minnihlutin (Pauli Ellefsen og Ashjørn Joensen) tí seta fram fylgjandi

Broytingaruppskot

til

meirlutans uppskot

1) Ad § 2: Toll- og fraintleiðslugjald	13.000.000
Konto 0100 Tollgjøld	+ 11.700.000
toldafgifter	
broytt til	+ 22.000.000
2) Ad § 6: Landsstovnar	
Konto 0110 Strandfaraskip landsins	+ 7.500.000
Lagtingets kystfart	
broytt til	+ 8.250.000
3) Ad § 12: Heilsumál	
2090 sum nýtt punkt:	
309 dálkingarkanning	100.000
forureningsundersøgelse	

4) Ad § 12: Heilsumál
2090
3005 studningur til skúlatannlæknastovur .. 15.000
tilskud til skoletandlægeklinikker
verður broytt til 100.000
til viðkan av og endurnýgging av skúlatannlæknastovum.

5) Ad § 13: 1. Lániheimild kr. 20.000.000 fellur burtur
(sí § 41.2.1.)

6) Ad § 13.2. Havnagerð í grunn 11.000.000
havnebygning, henl. i fond
verður broytt til 16.000.000

7) Ad § 13.7. Studningur til kommunur til asfaltering,
í grunn 3.500.000
verður broytt til:
Studningur til kommunur til asfaltering, kloakering, spæliplass v.m.

Viðmerkingar til § 13.7:
Fyri nýtslu av hesum grunni verður reglugerð at gera.

Anmærkninger til § 13.7:
For anvendelse af fondens midler skal udfærdiges reglement.

8) Ad § 14 2290/3110 Lánigrunnur til ítróttaranlegg 0
verður broytt til 1.000.000

9) Ad § 14 2295/3127 Skúlabarnaferðir innanoyggja 400.000
verður flutt til § 6-0110.

10) Ad § 14 2290/3113 Studningur til ferðir innanoyggja 350.000
Tilskud til indenøs rejser
verður flutt til § 6-0110.

11) Ad § 15 2311 Sum nýtt punkt
Bókasavnsbussur 100.000
biblioteksbus

12) Ad § 15/3215 Sjónvarp, í grunn 250.000
Fjernsyn, henl. i fond
verður broytt til 500.000

13) Ad § 16 2490		Sum nýtt punkt	
	3320	Stuðningur til útróðrarstøðir	1.000.000
		Tilskud til hjemmefiskeristationer	
14) Ad § 17 2504		Landbúnaðarráðgevari	120.000
		landbrugskonsulent	
		verður broytt til	0
15) Ad § 18 2790/3502		Stuðul til idnaðarfremjandi endamál	650.000
		Støtte til industrifremmende formål	
		verður broytt til	750.000
		ið skal býtast út í samráð við fíggjarnevnd løgtingsins.	
16) Ad § 19 2890/3689		Húsalánsgrunnur (viðm.)	9.500.000
		Húsalánsgrunnur (anm.)	

Viðmerkingar

Kr. 2. milj. verða at nýta sum rentustudningur helst í samband við uttanlandslán, ið Húsalánsgrunnurin tekur.

Annærkninger

Kr. 2 mill. anvendes som rentetilskud helst til udlandslån, der er optaget af Húsalánsgrunnurin.

17) Ad § 19 2890/3694		Ansingar- og røktingarheim, í grunn	1.000.000
		Opholds- og plejehjem, henl. i fond	
		verður broytt til	3.000.000
18) Ad § 19 2890/3691		Arbeiðsloysisgr. arbeiðarafelaga ..	325.000
		Arbejderforeninger arbejdsløshedsfonds	
		verður broytt til	400.000

Minnilutin í fíggjarnevndini, 24. mars 1977.

Asbjørn Joensen Pauli Ellefsen

Broytingaruppskot
í
løgtingsmáli nr. 1/1976: Fíggjarløgtingslóg 1977/78.

Í §§ 6, 10, 11, 13 og 15 verða upphæddirnar broyttar, soleiðis at samlaða upphæddin fyri hvørja grein sær verður minkað við 15%, t.v.s. samanlagt fyri nevndu greinir kr. 18.800.000.

2. stk. Løgmaður og fíggjarnevndin taka avgerð um fremjan av teimum tiltøkum, ið heimilaðar eru í fíggjarlógini í tann mun og at avrika í tí so mikið sum tørvur fyri hesum býður, soleiðis at minni átroðkandi uppgávur mugu fara afturum tær, ið krevja skjóta og biliga loysn.

I §§ 6, 10, 11, 13 og 15 ændres beløbene således, at det samlede beløb for hver paragraf formindskes med 15%, i alt for nævnte paragraffer 18.800.000 kr.

Stk. 2. Lagmanden og finansudvalget tager afgørelse om iværksættelse af de foranstaltninger, der er hjemlet i finansloven i den proportion og at igangsætte tidsmæssigt efter de behov, der er herfor, således at mindre påtrængende opgaver prioriteres efter dem, der kræver hurtig og billig løsning.

Viðmerkingar:

Almennu útreiðslurnar, serliga á umsitingarøkinum, eru nú so stórar, at neyðugt er at royna at fremja eina ávísa minking og avmarking á hesum økinum.

Tørvur er fyri, at hægstu játtandi myndugleikar við umsitingina prioritera tær uppgávur, ið liggja fyri.

Á Føroya Løgtingi, 28. mars 1977.

FRAMBURÐSFLOKKURIN
Kjartan Mohr.

2. viðgerð av fíggjarløgtingslógini 1977/78.

§§ 1—5 samtyktar við 23—0.
minnilutauppskot til § 2 afturtikið.
§ 6 í minnilutauppskoti afturtikin.
§§ 6—8 samtyktar við 23—0.

§ 10 viðmerkingar frá fjárlaganefndinni samþykktar við 22—0.

§ 10 samþykkt við 22—0.

§ 11 breytingar frá fjárlaganefndinni samþykktar við 22—0, § 11 sameiðis breytt samþykkt við 22—0.

§ 12 Breytingar við viðmerkingum frá fjárlaganefndinni samþykktar við 22—0, § 12 sameiðis breytt samþykkt við 23—0.

Breytingaruppskot frá minniluta í fjárlaganefndinni 2090/3005 og 2090/3009 fullu við 7—0.

§ 13 eftir fjárlaganefndarinnar uppskoti samþykkt við 22—0. Breytingaruppskot frá minniluta í fjárlaganefndinni pkt. 1 fall við 7—0, pkt. 2 við 6—0, viðm. til pkt. 7 fall við 6—0.

§ 14 eftir fjárlaganefndarinnar uppskoti samþykkt við 22—0. Minnilutauppskot til 2290/3110, 2295/3127 og 2220/3113 fullu við 6—0.

§ 15 eftir fjárlaganefndarinnar uppskoti samþykkt við 22—0. Minnilutauppskot til 2311 fall við 6—0 og til 2390/3215 fall við 5—0.

§ 16 eftir fjárlaganefndarinnar uppskoti samþykkt við 23—0. Minnilutauppskot til 2490/2320 fall við 11—0.

§ 17 eftir fjárlaganefndarinnar uppskoti samþykkt við 22—0, minnilutauppskot til 2504 fall við 6—0.

§ 18 eftir fjárlaganefndarinnar uppskoti samþykkt við 23—0. Viðmerkingar til 2720 frá meiriluta samþykktar við 15—0, minnilutauppskot til 2790/3502 viðmerkingar fall við 6—0.

§ 19 eftir fjárlaganefndarinnar uppskoti samþykkt við 23—0. Minnilutauppskot 2890/3689 viðm. fall við 5—0, 2890/3694 fall við 6—0 og 2890/3691 fall við 7—0.

§§ 20—26 samþykktar við 23—0.

§§ 30—40 samþykktar við 23—0.

§ 41 samþykkt við 16—0.

§§ 42—46 samþykktar við 23—0.

Breytingaruppskot frá Kjartan Mohr, uppskotið fall við 1—0.

2. Útflyting av fiskimarkinum

Ár 1976, 2. august, legði Atli Dam, løgmaður, fram soljóðandi

Uppskot
til
samtyktar.

1. Løgtingið samtykkir, at fiskimarkið undir Føroyum verður 200 fjórðingar (1 fjórðingur = 1852 m). Er fjarstøðan til fremmant land minni enn 400 fjórðingar, verður fiskimarkið sett eftir eini miðlinju, um ikki serstøk avtala er gjørd markinum viðvikjandi.
2. Løgtingið heitir á landsstýrið um at samráðast við ríkisstýrið um at fremja útflytingina av fiskimarkinum í seinasta lagi 1. januar 1977.
3. Løgtingið heitir á landsstýrið um at samráðast við ríkisstýrið um beinanvegin at siga upp sáttmálan við ymisk lond frá 18. december 1973 viðv. fiskiveiðu undir Føroyum.

Viðmerkingar:

Við kongiligari fyriskipan nr. 156 frá 24. april 1963 um «ændring i anordning om fiskeripolitiet i havet omkring Færøerne» varð fiskimarkið undir Føroyum frá 12. mars 1964 sett til 12 fjórðingar roknað frá beinum og teinum lougstu grundlinjunum, jbr. Løgtingstíðindi, bls. 166. Málið hevði frammanundan verið til viðgerðar í løgtingssetuni 1960, jbr. Løgtingstíðindi bls. 223.

Síðani hevur fiskimarksmálið verið viðgjørt av løgtinginum í fleiri tingsetum, jbr. Løgtingstíðindi 1964 bls. 263, 1969 bls. 330, 1970 bls. 155, 1971 A bls. 122, 1972 A bls. 39 og 1973 A bls. 68. Frá hesum viðgerðum er bert ein samtykt, og er hon frá 1969-tingsetuni lur samtykt er at heita á landsstýrið um at taka upp samráðingar við danska ríkisstýrið um at fáa friðað føroyska landgrunnin móti fremmandari fiskiveiðu og annars allari trolveiðu.

Sum kunnugt eru teir tríggir SV-havrættarfundirnir ikki komnir til endaligt úrslit fiskimarkinum viðvikjandi. Hin 4. fundurin verður í august/september í ár.

Óvissan um, at havrættarfundurin finnur fram til eina samtykt um útflytan av fiskimarkinum, óttin fyri ovurfisking í heimasjógvi og tað, at summi lond sjálvi hava flutt ella fara at flyta fiskimarkið út, hevur fort við sær, at ísland hevur flutt út, at Canada hevur samtykt at flyta út frá

1. januar 1977, U.S.A. frá 1. mars 1977, og Noreg hevur samtykt at flyta út, dagurin er ikki kendur enn, men langt burturi liggur hann ikki.

Hesar útflytingar og boðaðar útflytingar koma at ávirka føroyskan fiskiskap á fjarleiðum og miðleiðum og tann vegin, at fiskiskapur okkara verður skerdur. Royni verður tó at minka um avleiðingarnar mest møguligt.

Orsakað av fiskimarksútflytingum er vandi fyri, at trýstið frá fremmandum fiskiførum á fiskastovnarnar undir Føroyum økist.

At verja fiskastovnarnar, at endurbøta fiskivinnuni tap, hon kemur fyri á øðrum fiskileiðum, fyri at tryggja fiskivinnuni veiðurættin á egnum heimasjógvi og fyri at standa sterkari í fiskimarkssamráðingum við onnur lond, heldur landsstýrið, at stundin nú er komin at flyta fiskimarkið út á 200 fjórðingar.

Av tí at fyrireikingar skulu til m.a. nýggj lóggáva um fiskiskapin á tí viðkaðu landleiðini verður mælt til, at útflytingardagurin ikki verður beinanvegin, men at hann tó ikki verður seinri enn 1. januar 1977.

Ein náttúrlig avleiðing av fiskimarksútflytingini er ein uppsøgn av sáttmálanum frá 18. december 1973 við ymisk lond um fiskiveiðu teirra undir Føroyum. Málið er viðgjørt í løgtingssetuni 1973, jbr. Løgtingstíðindi bls. 85.

1. viðgerð 4. august. Málið beint í marknaðarnevndina, ið 5. august legði fram soljóðandi

Álit

Uppskot landsstýrisins er samantikið tað,

at løgtingið samtykkir, at fiskimarkið við Føroyar verður 200 fjórðingar, men tó soleiðis, at har, sum fjarstøðan til onnur lond er minni enn 400 fjórðingar, verður fiskimarkið sett eftir miðlinju, um ikki serstøk avtala er gjørd markinnum viðvíkjandi,

at løgtingið heitir á landsstýrið um at samráðast við donsku ríkisstjórnina um at fremja útflytingina av fiskimarkinum í seinasta lagi 1. januar 1977,

at løgtingið heitir á landsstýrið um at samráðast við donsku ríkisstjórnina um beinanvegin at siga upp sáttmálan frá 18. december 1973 við ymisk lond viðvíkjandi fiskiveiði við Føroyar.

Samtíðis sum nevndin mælir til at samtykkja uppskot landsstýrisins, skal hon gera hesar viðmerkingar:

Viðv. pkt. 1.

Núverandi 12 fjórðinga fiskimark varð sett 12. mars 1964 og er økið innan fyri hetta mark o.u. 12.000 km². Við komandi 200 fjórðinga marki verður økið innan fyri mark o.u. 160.000 km². Samanløgd veiði okkara og útlendinga innan fyri teir 200 fjórðingarnar var í 1974 samanlagt 126.708 tons, har av okkara partur var 26.000 tons og partur útlendinga 100.708 tons. Tey 126.708 tonsini býttust soleiðis eftir fiskasløgunum:

	1974
Toskur	26.632
Hýsa	14.763
Upsi	46.159
Annar fiskur	39.153
Heild	126.708

Nevndin hevur biðið fiskirannsóknarstovuna gera kort yvir 3 fjórðinga fiskimarkið frá 1901, yvir núverandi 12 fjórðinga fiskimark frá 12. mars 1964 og yvir komandi 200 fjórðinga mark. Tær miðlinjur, sum talað verður um í uppskoti landsstýrisins, eru: miðlinjan vestan fyri mótvegis Islandi, miðlinjan eystan fyri motvegis Noregi og miðlinjan sunnan fyri mótvegis Bretlandi. Island, sum longu hevur flutt fiskimarkið út á 200 fjórðingar, hevur í reglugerð sett miðlinju sína mótvegis Føroyum, men samtíðis opnað møguleikar fyri samráðingum við okkum um, hvussu henda miðlinja endaliga skal dragast. Landsstýrið eigur tí at kanna hesa av íslendingum drignu miðlinju og vissa seg um, at hon hevur verið rætt drigin. Viðvíkjandi miðlinjunum mótvegis Noregi og Bretlandi má roknast við samráðingum við hesi lond, um hvussu hesar miðlinjur skulu dragast.

Av tí at Bretland longu hevur sett 12 fjórðinga fiskimark kring Rock All og sýnist ætla at seta 200 fjórðinga mark kring henda klett, eigur landsstýrið at lata avvarðandi myndugleikar vita, at slík markseting ikki verður viðurkend av føroyingum.

Sambært frágreiðing jarðfrøðinga er «Rock All»-grunnurin partur av føroysku undirgrundini.

Viðv. pkt. 2.

Meðan fiskimarkið frá 1901 - - 3 fjórðinga markið - - varð sett við kgl. fyriskipan, men uttan frammau undan góðtøku løgtingsins, varð fiski-

markið frá 1964 — 12 fjórðinga markið — sett eftir at málið hevði verið viðgjørt og samtykt av løgtingi. Soleiðis sum stjórnarskipan landsins er, verða tað donsku ríkismyndugleikarnir sum — við kgl. fyriskipan eins og í 1901 og 1964 — koma at seta útflytingina formliga í gildi. Latur løgtingsins verður so tann sum tilskilaður er í uppskotinum at heita á landsstýrið um at samráðist við donsku ríkisstjórnina um at fremja útflytingina, t.e. at geva út fyriskipanir har um.

Sambært uppskoti landsstýrisins skal útflytingin setast í verk í seinasta lagi 1. januar 1977. Uppskotið útilokar sostatt ikki at útflytingin fer fram fyrr.

Viðv. pkt. 3.

Sáttmálin frá 18. december 1973 um fiskiveiðina við Føroyar varð gjørdur aftaná góðtoku løgtingsins. Mannagongdin, nú ið hesin sáttmáli skal fáast úr gildi, má tí vera, at løgtingið fyrst samtykkir, at hann skal fara úr gildi, og at danska ríkisstjórnin sigur sáttmálan upp við hvørt av teim luttakandi londum, t.e. við Bretland, Frakland, Vestur-Týskland, Pólland, Noreg og Belgia.

Sambært § 6 í hesum sáttmála kann hvørt av teimum luttakandi londunum við 6 mánaða fyrivara siga seg leysan av honum, og tað er hetta, sum landsstýrið skal heita á donsku ríkisstjórnina at gera heinan vegin. Rokna vit við, at henda uppsogn verður givin í seinasta lagi 10. í hs., fer sáttmálin úr gildi 10. februar 1977. Hetta sigur tað, at til henda dag hava tey luttakandi londini í sáttmálanum heimild til eftir teim reglum, sum har gilda, at veiða innan fyri komandi 200 fjórðinga mark, men so ikki longur.

Eftir tí, sum nevndini hevur verið gjort kunnugt, er ætlingin, at ólavsøgutingsetan skal enda í morgin, 6. august 1976, men at tingið skal koma saman aftur seinni í heyst. Við so stuttum fyrivara hevur nevndin ikki umstøður til at viðgera allar teir mongu og mikla spurningar, ið upp koma í sambandi við útflyting fiskimarksins og uppsogn 1973-sáttmálans. Hetta má tí landsstýrið saman við marknaðarnevndini fyrireika og leggja fyri tingið, men nevndin er samd við landsstýrið um, at fyrstu stigini eiga at takast nú — nevniliga at samtykkja at fiskimarkið verður flutt út á

200 fjórðingar ikki seinni enn 1. januar 1977, og at 1973-sáttmálin verður uppsagdur beinan vegin.

Nevndin mælir so slatt tinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

Marknaðarnevndin, 5. august 1976.

Erlendur Patursson — Poul J. Olsen — Tórálvur M. Olsen

Hákun Djurhuus — Eliesar Arge — Hilmar Kass

Jógvan Olsen

2. viðgerð 6. august.

Uppskot landsstýrisins samtykt 11. august við 23 – 0 atkvøðum.

---

3. Eykafíggjarløgtingslóg 1975/76

Ár 1976, 6. august, legði Dennnus Hentze, landsstýrismaður fram

Uppskot
til
eykafíggjarlóg fyri árið 1975/76
lagtingslov om tillægsbevilling for året 1975/76

Inntokur Indtægter		Fíggjarlagtingslóg 1975/76 Finanslagtingslov	Uppískoytisjáttur 1975/76 Tillægsbevilling	Tilsamans Ialt
		kr.	kr.	kr.
§ 1	**Skattir** **Skatter**	(1.000)	(1.000)	(1.000)
0010	Vanligur landsskattur	115.000	18.800	133.800
	Sædvanlig landsskat			
0070	Sjómansskattur	5.600	395	5.995
	Sømandsskat			

F.L. J. nr. 400-22.

0080	Rentuskattur Renteskat	2.000	1.100	3.001
0090	Vegskattur Vejskat	5.000	+ 240	4.760
0095	Fólkapensiónsskattur Folkepensionsskat	11.800	603	12.403
		139.100	20.569	159.959

§ 2 Toll- og framleiðslugjøld
Told- og fremstillingsafgifter

0100	Tollgjøld Toldafgifter	136.000	6.230	142.236
0180	Framleiðslugjøld Fremstillingsafgifter	950	150	1.100
		136.950	6.386	143.336

§ 3 Onnur gjøld
Andre udgifter

0201	Stuttleikagjøld (viðm.) Forlystelsesafgifter (anm.)	600	+ 158	442
0205	Gjøld fyri spiritusskamtannarkort Afgifter for spiritusrationeringskort	35	19	54
0210	Loyvisgjøld Afgifter for bevillinger	50	+ 1	49
0220	Arvagjøld Arveafgifter	150	85	235
0225	Lestagjald Skibsafgift	75	+ 19	56
0250	Bøtur Bøder	1	+ 1	0
		911	+ 75	836

§ 4 Inntøka av spæli
Indtægter ved spil

0301	Gjøld við útgjalding av luppadráttarvinningum Afgifter ved udbetaling af lotterigevinster	60	127	187

0305	Avlop av happadráttí	25	0	25
	Overskud ved lotteri			
0315	Gjald av vinningum	50	39	89
		135	166	301

§ 5 Rentur og vinningsbýti v.m.
Renter og udbytte m.v.

0400	Rentuinntøkur	3.542	1.375	4.917
	Renteindtægter			
0450	Rentuútreiðslur	10.880	1.218	9.662
	Rentendgifter			
		+ 7.338	2.593	+ 4.745

§ 6 Landsstovnar
Landsvirksomheder

0110	Strandfaraskip landsins	+ 3.500	+ 3.600	+ 7.100
	Lagtingets kystfart			
0120	Tjaldurs Apotek	567	149	716
	Tjaldurs Apotek			
0130	Telefonverkið	316	0	316
	Telefonvæerket			
0140	Útvarpið	700	0	700
	Radiofonien			
0145	Postverkið	+ 1.000	+ 20	+ 1.020
	Postvæsenet			
0150	Oljugoymslur	285	308	593
	Oliemuleg			
0156	Hvalastøðin við Áir	+ 88	+ 162	+ 250
	Hvalstationen við Áir			
		+ 2.720	+ 3.325	+ 6.045

§ 7 Partur av avlopi danska tjóðarbankans
smb. lóg
Andel i den danske nationalbanks overskud
iflg. lov

0501	Partur av avloni danska tjóðarbankans smb. log	2.500	10.731	13.231
	Andel i den danske nationalbanks overskud ifølge lov			
§ 8	Ymsar inntøkur			
	Diverse indtægter			
0510	Ymsar inntøkur	5	0	5
	Diverse indtægter			
	Samanlagd inntøka	269.843	37.035	306.878
§ 10	Løgtingið			
	Lagtinget			
501	Løgtingsmenn	1.432	321	1.753
	Lagtingets medlemmer			
510	Løgting	960	÷ 121	838
	Lagtingsbygning			
520	Løgtingstíðindi og kunngerðarsavn	131	260	391
	Lagtingstidende og kundgørelsessamling			
525	Indexyvirlit (Løgtingstíðindi)	35	÷ 14	21
	Indexoversigt (Lagtingstidende)			
530	Granskoðan (extern og intern)	270	35	305
	Revision (extern og intern)			
550	Landsskattanevnd	21	9	30
	Landsskatteudvalg			
560	Norrent Ráð	35	÷ 20	15
	Nordisk Råd			
		2.884	450	3.340
§ 11	Landsfyrisitingin			
	Landsadministrationen			
1001	Lagmaður og landsstýri	906	128	1.034
	Lagmand og landsstyre			
1101	Landsskrivstova	2.468	54	2.522
	Landskontor			
1110	Fiskivinnustova	208	87	295
	Fiskerikontor			

1120	Uttanríkislænasta í Aberdeen Udenrigstjeneste i Aberdeen	304	14	318
1125	Uttanríkistænasta í Keboenhavn Udenrigstjeneste i København	249	÷ 28	221
1150	Likningarráð Ligningsråd	1.310	÷ 35	1.275
1160	Manntalsstova Folkeregister	240	9	249
1170	Almannastova Socialforvaltning	450	182	632
1201	Gjaldstova Oppebørselskontor	3.120	1.031	4.151
1210	Gjaldstovudeild í Klaksvík Oppebørselsfilial i Klaksvík	261	39	300
1215	Gjaldstovudeild í Saltangará Oppebørselsfilial i Saltangará	209	21	230
1220	Gjaldstovudeild í Fuðlafirði Oppebørselsfilial i Fuglafirði	143	17	160
1225	Gjaldstovudeild á Tvøroyri Oppebørselsfilial i Tvøroyri	164	11	175
1230	Gjaldstovudeild í Vági Oppebørselsfilial i Vági	135	20	155
1231	Gjaldstovudeild í Sørvági Oppebørselsfilial i Sørvági	152	÷ 152	0
1239	Endurgjald til sýsluruar fyri skrivstovuhald Kontorgodtgørelse til syslerne	10	÷ 10	0
1240	Tolleftirlit Toldvæsen	1.100	111	1.211
1250	Valuta- og prisráð Valuta- og prisråd	200	78	278
1301	Landsverkfrøðingsskrivstova Landsingeniørkontor	4.000	201	4.201
1260	Lønarráð Lønningsråd	5	÷ 1	4
1270	Búskaparráð Økonomisk råd	850	÷ 17	833
280	Ferða- og dagpeningur innan- og uttanlands Rejse- og dagpenge inden- og udenlands	350	365	715
1290	Innheintingarútreiðslur Udgifter ved inkasso	17	50	67

1295	Ognin Tinganes Ejendommen Tinganes	400	242	642
		17.251	2.417	19.668
§ 12	Heilsumál Sundhedsvæsen			
2010	Landssjúkrahúsið (D.A.H.) Landssygehuset (D.A.H.)	15.624	÷ 1.060	14.564
2020	Klaksvíkar Sjúkrahús Klaksvík sygehus	3.814	246	4.060
2030	Suðuroyar sjúkrahús Suderø sygehus	2.387	÷ 285	2.102
2040	Tuberklastøðin Tuberkulosestationen	162	0	162
2050	Læknar Læger	215	22	237
2060	Ljósmøður Jordemødre	150	11	161
2090	Ymiskar útreiðslur Diverse udgifter	304	÷ 64	240
		22.656	÷ 1.130	21.526
§ 13	Samferðslumál Kommunikationsvæsen			
1	Nýggir vegir og brýr, breiðkan av brúm og umsiting av vegum (viðm.) Nye veje og broer, udvidelse af broer og vedligeholdelse af veje (anm.)	33.200	3.950	37.150
2	Havnagerð, í grunn Havnebygning, henlægges i fond	9.000	0	9.000
3	Lendingar, í grunn Landingspladser, henlægges i fond	6.000	0	6.000
4	Flogferðsla, í grunn Flyvetrafik, henlagt i fond	1.500	0	1.500
5	Strandfaraskip, í grunn Kystskibe, henlægges i fond	8.000	0	8.000

6	Berghols- og brúgvagerð, í grunn	6.000	0	6.000
	Tunnel- og brobygning, henl. i fond			
7	Studningur til kommunur til asfaltering, í grunn	3.500	0	3.500
	Tilskud til kommuner til asfaltering, henl. i fond			
		67.200	3.950	71.150

§ 14 Skúlamál

Undervisningsvæsen

2210	Fólkaskúlin	19.240	126	19.366
	Folkeskolen			
2220	Studentaskúli	4.000	1.178	5.178
	Gymnasium			
2225	Kostdeild Studentaskúlans	338	÷ 63	275
	Studenterskolens kostafdeling			
2230	Føroya Sjómansskúli	1.748	÷ 57	1.691
	Færøernes Navigationsskole			
2240	Klaksvíkar Sjómansskúli	943	÷ 211	732
	Klaksvik Navigationsskole			
2250	Føroya Fólkaháskúli	467	÷ 20	447
	Færøernes Folkehøjskole			
2260	Kvøldskúlar	220	20	240
	Aftenskoler			
2290	Ítrótt			
	Idræt			
	3110 Lánigrunnur til ítróttaranlegg	400	0	400
	Lånefond til idrætsanlæg			
	3112 Studningur til I.S.F.	209	0	209
	Tilskud til I.S.F.			
	3113 Studningur til ferðir innanoyggja..	400	÷ 52	348
	Tilskud til indenøs rejser			
2295	Ymiskir studningar	4.790	287	5.077
	Diverse tilskkud			
		32.755	1.208	33.963

§ 15	Vísind, bókmentir og list Videnskab, litteratur og kunst			
2310	Landsbókasovn Landsbibliotek	787	109	896
2320	Fólkabókasovn Folkebibliotekur	740	÷ 47	693
2330	Landsskjalasavn Landsarkiv	310	: 60	250
2340	Føroya Fornminnissavn Færøernes museum	800	60	860
2350	Bygdasøvn Bygdemuseer	105	÷ 5	100
2355	Fiskirannsóknarstova Fiskeribiologisk laboratorium	750	694	1.444
2365	Fuglakanningarstøð v.m. Ornitoligisk station m.v.	18	0	18
2370	Náttúrugripasavn Naturhistorisk samling	392	÷ 65	327
2375	Fróðskaparsetur Føroya Færøernes Akademi	2.127	54	2.181
2380	Evnafrøðislig starvsstova Kemisk laboratorium	509	27	536
2385	Náttúrufriðingarnevndir Naturfredningsudvalg	45	26	71
2389	Tónleikur og sangur Musik og sang	200	: 117	83
2390	Ymiskir studningar Diverse tilskud	1.849	÷ 23	1.826
		8.632	653	9.285
§ 16	Fiskivinna, sigling o.l. Fiskeri, søfart o.l.			
2401	Vrakarastovnur Vragerinstitution	760	0	760
2410	Nautisk royndarkamar Nautisk prøvekammer	10	÷ 3	7
2420	Sjómansheim (viðm.) Sømandshjem	116	11	127
2430	Vaktar- og bjargingarskip Vagt- og bjærgningsskib	1.617	÷ 37	1.580

2490	Aðrir studningar Andre tilskud			
3301	Minstalon og annar studnl til fiskivinnuna ..... Mindstelon og anden støtte til fiskerierhvervet	25.000	9.000	34.000
3302	Studningur til grunnin til endurnýggjan av skipaflotanum ..... Tilskud til fonden til fiskerflådens foryelse	8.000	0	8.000
3303	Grindir ..... Grindefangst	5	0	5
3304	Prisásetingarnevndir fyri salt- og ráfisk ..... Udvalg til fastsættelse af fiskepriser	90	0	90
3305	Laksa- og silaaling ..... Lakse- og ørredfrift	300	0	300
3306	Havrannsóknarskip, í grunn ..... Havundersøgelsesskib, i fond	500	0	500
3307	Praktiskar fiskiroyndir ..... Praktiske fiskeriforsøg	1.000	+ 588	412
3308	Ráfiskagrunnurin ..... Råfiskefonden	0	9.620	9.260
3730	Landsstýrinum at ráða yvir ..... Landsstyret at råde over	150	3	153
		37.548	18.006	55.554
§ 17	Landbúnaður og matrikulering Landbrug og matrikulering			
2501	Landsdjórakeknaembætið ..... Landsdyrlægeembedet	353	+ 35	318
2505	Seyðaráðgevari og seyðaroyndir ..... Fåreavlskonsulent og fåreavlsforsøg	58	13	71
2510	Útskifting og matrikulstova ..... Udskiftning og matrikelkontor	1.606	61	1.667
2520	Royndarstoðin í Hoyvík ..... Forsøgsstationen i Hoyvik	567	9	576
2530	Fyriskipanir móti munn- og kleyvsótt .. Foranstaltninger mod mund og klovsyge	20	+ 7	13
2590	Aðrir studningar ..... Andre tilskud	2.062	+ 11	2.051
		4.666	30	4.696

§ 18 Handil, idnaður o.l.			
Handel, industri m.v.			
2710 Fabriks- og ketilumsjón v.m.	430	÷ 103	327
Fabriks- og kedeltilsyn m.m.			
2720 Bileftirlit	10	135	145
Biltilsyn			
2730 Skipaskrá og -uppmáting	15	9	24
Skibsreglstrering og -opmåling			
2731 Semingsmannaskipan	16	5	21
Forligsinstitution			
2732 Kolagrevstur	106	96	202
Kulrydning			
2733 Lærarráðið	40	0	40
Lærerådet			
2734 Skeiðvirksemi	115	÷ 43	72
Kursusvirksomhed			
2790 Aðrir studningar			
Diverse tilskud			
3501 Føroya Ferðamannafelag	100	0	100
Færøernes Turistforening			
3502 Stuðul til idnaðarfremjandi endamál	750	÷ 191	559
Støtte til industrifremmende formål			
5303 At leggja í gistingarhúsgrunnin	300	0	300
Henlæggelse i hotelfonden			
3504 Til menningargrunn	3.500	0	3.500
Til udviklingsfond			
3730 Landsstýrinum at ráða yvir	75	÷ 52	23
Landsstyret at råde over			
	5.457	÷ 144	5.313

§ 19 Almenn forsorg v.m.			
Socialvæsen m.v.			
2805 Fólkapensión	25.831	1.789	27.620
Folkepension			
2810 Avlamispensión	10.200	975	11.175
Invalidepension			
2820 Barnastyrk til stakar uppihaldarar	843	64	907
Barnebidrag til enlige forsørgere			
2830 Einkjupensión	750	247	997
Enkepension			

2840	Vanlig forsorg	952	403	1.355
	Almindelig forsorg			
2845	Víðkað hjálp	280	46	326
	Udvidet hjælp			
2850	Einkjuhjálp	1.984	1.266	3.250
	Enkehjælp			
2855	Barnaforsorg	920	211	1.131
	Børneforsorg			
2860	Umsiting av heimahjálpsskipanini	256	674	930
	Administration af hjemmehjælpsordningen			
2890	Ymsir studningar	8.100	43	8.143
	Forskellige tilskud			
		50.116	5.718	55.834
§ 20	Pensiónsútreiðslur			
	Pensionsudgifter			
2901	Pensiónsútreiðslur			
	Pensionsudgifter			
	1060 Pensiónir	195	47	242
	Pensioner			
	1061 Biðipeningur	150	45	195
	Ventepenge			
		345	92	437
§ 21	Effektivar veðhaldsbindingar í grunn			
	Effektive garantiforpligtelser i fond			
2902	Effektivar veðhaldsbindingar í grunn ..	4.000	0	4.000
	Effektive garantiforpligtelser i fond			
		4.000	0	4.000
§ 22	Aðrar og óvissar útreiðslur			
	Andre og uvisse udgifter			
2910	Aðrar og óvissar útreiðslur			
	Andre og uvisse udgifter			

2050	Umboðsm	200	8	208
	Repræsentation			
2570	Útreiðshur av vali	40	+ 30	10
	Udgifter vedrørende valg			
2575	Dóms- og lógreglumál	10	11	21
	Retsvæsen og politi			
2580	Studningur til politisk upplýsingararbeiði v.m.			
	Tilskud til politisk oplysnings arbejde m.m.			
3730	Landsstýrinum at ráða yvir	115	+ 6	121
	Til landsstyret af råde over			
		725	+ 5	720
§ 23	At leggja í ymsar grunnar v.m.			
	Henlægges til forskellige fonds m.v.			
3801	Avlopið hjá apotekinum lagt í apotekaragrunnin	567	149	716
	Apotekets overskud henlagt til apotekerfonden			
3805	Avlopið hjá telefonverkinum	316	0	316
	Telefonværkets overskud			
3810	Avlopið frá Útvarpinum	700	0	700
	Radiofoniens overskud			
3815	Til kirkjugrunnin (viðm.)	587	0	587
	Til kirkefonden (omm.)			
		2.170	149	2.319
§ 24	Burturleggingar til avdráttir av lánum			
	Henlæggelser til afdrag på lån			
2930	Burturleggingar til avdráttir av lánum..	8.220	2.558	10.778
	Henlæggelser til afdrag på lån			
§ 25	Avskrivingar			
	Afskrivinger			
2940	Avskrivingar, bygningar og anlegg	4.512	1.734	6.246
	Afskrivninger, bygninger og anlæg			

§ 26 Ymsar ognarútreiðslur Diverse ejendomsudgifter			
2950 Ymsar ognarútreiðslur	150	+ 132	18
Diverse ejendomsudgifter			
Samanlagdar útreiðslur	269.287	35.500	364.847
Munur	556	1.475	2.031
	269.843	37.035	306.878

Viðmerkingar:

Landsstýrið leggur hervið fyri løgtingið uppskot til eykafíggjarlóg fyri fíggjarárið 1975/76.

Eftir uppskotinum eru samanlagdar inntøkur settar til 305.317.000 kr. meðan samanlagdar útreiðslur eru settar til 303.286.000 kr., soleiðis at inntøkumunur verður upp á samanlagt 2.031.000 kr.

Á eykafíggjarlógini eru:

1. Inntøkur, ið standast av broytingum í lógum, sum eru komnar í gildi aftan á samtykt fíggjarlógarinnar.
2. Útreiðslur, ið standast av broytingum í lógum, sum eru komnar í gildi aftan á samtykt fíggjarlógarinnar.
3. Útreiðslur, ið hvørki høvdu heimild í fíggjarlógini ella í øðrum lógum, men sum hava fingið fyrihils játtan fíggjarnevndarinnar.
4. Bæði inntøkur og útreiðslur, ið standast av ávikavist broyttum inntøkuviðurskiftum og broyttum útreiðsluviðurskiftum aftaná, at fíggjarlógin var samtykt ella bert av tí, at ikki hevur verið rætt mett um inntøkur og útreiðslur, tá fíggjarlógin varð samtykt.

Inntøkan á eykafíggjarlógini kr. 35.474.000 er 13% hækking samanborið við inntøkutalið á sjálvari fíggjarlógini, sum var kr. 269.843.000. Henda hækking stendst eina mest av hægri skattainntøku, ið var kr. 18,8 milliónir hægri, tolli og framleiðslugjøldum kr. 6,2 mill. og avlop frá Danska Tjóðbankanum 10,7 mill. kr. Skattalógirnar eru óbroyttar, so hesin vøkstur stavar frá hægri inntøkum, meðan tollalógin er nakað broytt.

Útreiðslan á eykafíggjarlógini kr. 33.999.000 er 12,6 % hækking samanborið við útreiðslutalið á sjálvari fíggjarlógini, sum var kr. 269.287.000.

Í fíggjarárinum hækkaði pristalið við 5,8% og almennu lønirnar við 8—10%.

Til nevndu hækkingar og lækkingar kunnu hesar frágreiðingar til einstøk konti gevast:

§ 6 **Landsstovnar**

0110 Strandfaraskip landsins.
Undirskotið er fyribils uppgjørt til 7,1 mill. kr. ella 3,6 mill. kr. meira enn mett á fíggjarlógini.

0156 Hvalastøðin við Air.
Meirnýtslan er farin til umvæling og nútímansgerð av ALV-húsunum.

§ 10 **Løgtingið**

520 Løgtingstíðindi.
Í fíggjarárinum eru prentað 2 løgtingstíðindi, sum eisini hava havt størri síðutal enn vanligt.

§ 11 **Landsumsitingin**

1001 Løgmaður og landsstýri.
Meirnýtslan er upp á 14% og stavar fyri størsta partin frá øktum útreiðslum til leigu av íbúðum og keyp av nýggjum skrivstovuinnbúgvi.

1110 Fiskivivinnustovan.
Nýttar eru 87.000 kr. ella 42% meira enn játtað, sum er meirútreiðslur til lønir, m.a. tí at ein parl av fíggjarárinum hava starvast fleiri fólk, enn játtan og normering hevur verið fyri.

1170 Almannastovan.
Meirnýtslan er 182.000 kr. ella 40% og býtir sig soleiðis:

Lønir	92.000 kr.
Ferðaútreiðslur	14.000 —
Leignútreiðslur	20.000 —
Telefon	21.000 —
E.D.V. útreiðslur	32.000 —
	179.000 kr.

1201 Føroya gjaldstova.
Meirnýtslan er 1.030.000 kr. ella 33% og kemur umfram av vanligum lønar- og príshækkingum av, at keyptar eru nýggjar

bókhaldsmaskinur til skattadeildina, at fleiri fólk hava verið í starvi enn normerað, at nýtt innbúgv varð keypt til skattadeildina í samband við flytiing í nýggj bølir og at nýttar eru 346.000 kr. meira til E.D.V. viðgerð.

1250 Valuta- og prísráð.
Nýttar eru 78.000 kr. ella 39% meira enn játtað, harav 41.000 kr. eru ymsar eykasamsýningar í samband við gjøgnumføring av nýggju prístalsskipanini.

1280 Ferða- og dagpeningur.
Brúktar eru 365.000 kr. ella 104% meira enn mett. Nýtslan í 1974/75 var upp á 498.000 kr. av einari játtan upp á 500.000 kr. Teir mongu fiskivinnu- og havrættarfundirnir hava økt munandi um ferðaútreiðslurnar.

1295 Tinganesognirnar.
Av meirnýtsluni upp á 242.000 kr. eru 136.000 kr. farnar til umbyggingar, m.a. av nýggjum skrivstovuhølum til Lønjavningargrunnin, Arbeiðseftirlitið, Búskaparráðið og Forvaltarahúsunum í samband við, at skattadeildin flutti út og hølini vórðu umbygd til fiskivinnuskrivstovur.

§ 12 Heilsumál

2010 - 2030 Sjúkrahúsini.
Orsøkin til, at landskassans útreiðslur til sjúkrahúsini hava verið minni, enn mett, kemur av, at landskassin í fíggjarárinum hevur fingið endurgoldið ríkisstudning við afturvirkandi kraft.

§ 13 Samferðslumál

1. Nýggir vegir og brýr v.m.

Í fíggjarárinum er bygt fyri tilsamans 69.300.000 kr. sum er fíggjað soleiðis:

1) Játtan til vegir v.m.		33.200.000	
2) Lántøka		20.000.000	
3) Grunnur til berghols- og brúgvagerð:			
a) Játtan	6.000.000		
b) Landskassaavlop	3.327.000	9.320.000	
4) Kommununna partur		2.830.000	65.350.000
		Yvirtrekk	3.950.000

§ 14 Skúlamál

2200 Studentaskúlin.

Meirnýtslan 29% ella 1.178.000 kr. stavar fyri størsta partin frá meirútreiðslum til læraralønir.

§ 15 Vísund v.m.

2355 Fiskirannsóknarstovan.

Staturin hevur áður goldið helvtina av rekstrinum av Fiskirannsóknarstovuni, men seinastu árini hevur staturin ikki tikið lut í útreiðsluvøkstrinum. Meirnýtslan er upp á 92,5%.

§ 16 Fiskivinnan v.m.

3301 og 3308 Minstaløn og ráfiskagrunnur.

Meirnýtslan upp á ávikavist 9 mill. kr. og 9,6 mill. kr. stavar frá heildarloysnini, ið varð viðtikin fyri fiskivinnuna á vári 1975, aftan á at fíggjarlógin var samtykt.

§ 18 Handil, ídnaður v.m.

2720 Bileftirlitið.

Meirútreiðslan hevur verið 26%, meðan inntøkurnar hava verið umleið, sum meitar. Orsøkin til meirnýtsluna kemur umfram av vanligum hækkingum av, at ein part av fíggjarárinum hevur verið meira fólk, enn normerað í arbeiði og at útreiðslurnar til húsaleigu, telefon og ferðing hava verið munandi størri, enn upprunaliga mett.

2732 Kolagrevstur.

Tá ið oljukreppan tók seg upp, settu kolahøggarar eftir avfalu við landsstýrið ymisk arbeiði í gongd og keyptu nýggj amboð. Meirútreiðslurnar stava frá eykastubningi til nevndu tiltøk.

§ 19 Almenn forsorg

2850 Einkjuhjálp.

Játtanin umfatar ikki bert einkjuhjálp, men eisini hjálp til aðrar stakar uppihaldarar og kemur hækkingin av, at gjøldini sambært lóg vórðu hækkað við 15% og at talið av móttakarum er hækkað frá umleið 200 til umleið 250.

2860 Heimahjálpsskipanin.

Meirnýtslan er upp á 674.000 kr. ella 263%. Skipanin varð sett

í verk í oktober mánaða 1973. Sum tølini niðanfyri vísa, hava fólk gjørt meira og meira nýtslu av skipanini:

	Tal av heimahjálparum:	Hús, ið verða vitjað:
1/4 1974	60	110
1/4 1975	113	218
1/4 1976	160	288

Í talinum fyri heimahjálparar telja bæði tey, sum arbeiða fullan dag, og tey, sum bert hava nakrar tímar fyri eín.

Frá heimahjálpini verður upplýst, at talið av teimum, ið krevja meira enn meðalrøkt, veksur.

§ 25 Avskrivingar

Uppi í talinum 1.734.000 kr. eru avskrivingar uppá strandferðaskipini við 1.561.000 kr. undantikið m/f «Smyril» og m/s «Dúgvan». Fyri hesi bæði skipini er í staðin avdráttur av lánum bókaður undir § 24. Burturleggingar til avdrátt av lánum.

1. viðgerð 17. november, málið beint í figgjarnevndina, sum 23. november legði fram soljóðandi

Álit

Málið varð lagt fram av landsstýrinum tann 6. august 1976 og undir 1. viðgerð tann 17. november 1976 beint í figgjarnevndina.

Eftir uppskotinum eru inntøkurnar á eykafíggjarlógini kr. 35.474.000,--, meðan útreiðslurnar eru kr. 33.990.000,--. Avikavist er talan um lækkingar uppá 13% og 12,6% í mun til sjálva figgjarlógina, ið hevði tølini kr. 269.843.000,-- fyri inntøkurnar og kr. 269.287.000,-- fyri útreiðslurnar.

Meirilutin í figgjarnevndini (Hákun Djurhuus, Poul Jacob Olsen, Hilmar Bech, Jógvan Durhuus og Signar Hansen) mælir løgtinginum til at samtykkja viðlagda uppskot til eykafíggjarlogtingslóg fyri 1975/76.

Minnilutin (Pauli Ellefsen úr Sambandsflokkinum og Hilmar Kass úr Sjálvstýrisflokkinum) vísir á tær viðmerkingar, sum minnilutin í mars 1975 gjørdi til figgjarløgtingslógina fyri 1975/76.

Har stendur m.a.:

«Í fleiri førum hava verið framdir stórir niðurskurðir, og er kontoin, sum tað eitur í viðmerkingunum, sett í fasta rammu.

Summir av hesum niðurskurðum eru gjørdir uttan samráðingar við

teir leiðarar, sum dagliga disponera yvir útreiðslunum, og bevur minnilutin varhugan av, at ikki allir hesir niðurskurðir í veruleikanum koma at halda.»

«Tað er neyðugt at gera loysnir við eitt sindur longri sikti. Á hesum øki átti meirilutin eftir hugsan Sambandsfloksins at broytt hugsunarhátt og tikið undir við ætlanini um gerð av tí langtíðarætlan, sum Sambandsflokkurin bevur krevt.»

«Samantikið kann sigast, at tað við teinnum útlitum, sum eru fyri framman, bendir á, at tað áðrenn langt frálíður, verður neyðugt at gera eina eykafíggjarlóg við munandi broytingum í mun til fyriliggjandi uppskot meirilutans.»

Minnilutin heldur tað vera neyðugt at endurtaka hesar viðmerkingar, deils fyri at vísa á, at meirilutin tá átti at hurta eftir og tikið við okkara ráðum, deils og ikki minst tí, at hesar viðmerkingar hóska eru betur til fíggjarløgtingslógina fyri inniverandi ár 1976/77.

Minnilutin ynskir at mótmæla tí planloysi, sum nú valdar innan landsins fíggjarviðurskiftir.

Meginpurturin av meirútreiðslunum sambært eykafíggjarlógina er fyrr játtað av løgtingi ella fyribilsjáttað av fíggjarnevndini.

Sum nevnt longu í mars 1975 heldur minnilutin tað vera neyðugt við einari eykafíggjarlóg, og heldur minnilutin tað vera eru meira neyðugt við einari eykafíggjarlóg fyri árið 1976/77. Vónandi verður hendan skjótari avgreidd enn fyriliggjandi eykafíggjarlóg fyri 1975/76.

2. viðgerð 24. november, 3. viðgerð 24. november.
Uppskot landsstýrisins samtykt við 20- -0. atkvøðum.

4. Klaksvíkar Sjúkrahús

Ár 1976, 2. august, legði Jákup Lindenskov, landsstýrismaður, fram

Uppskot
til

løgtingslóg um lán til ymisk byggiarbeiði á Klaksvíkar sjúkrahúsi.

§ 1.

Í sambond við bygging av millumkommunaltum røktar- og aldursheimi í tilknýti til Klaksvíkar sjúkrahús verður landsstýrinum heimilað landskassans vegna at taka neyðug lán til bygging av eini fysiurgiskari deild og til onnur ávís byggiarbeiði á sjúkrahúsinum.

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.

lagtingslov om lån til forskellige byggearbejder på Klaksvig Sygehus.

§ 1.

I forbindelse med opførelsen af et mellemkommunalt pleje- og alderdomshjem i tilknytning til Klaksvig Sygehus bemyndiges landsstyret til på landskassens vegne at optage de nødvendige lån til opførelse af en fysiurgisk afdeling og til andre bestemte byggearbejder på sygehuset.

§ 2.

Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Í løgtingssetuni 1956, jbr. løgtingstíðindi 1956, bls. 145, samtykti løgtingið at geva landsstýrinum heimild at taka neyðug lán til modernisering og víðkan av Klaksvíkar Sjúkrahúsi.

Byggiarbeiðini byrjaðu í 1959 og umfataðu bygging av viðgerðar- og sjúklingadeild, bygging av starvsfólkahúsi og modernisering av gamla sjúkrahúsinum. Seingjatalið varð tó óbroytt 46. Arbeiðið varð liðugt í 1963 og varð kostnaðurin um 4 mió. kr.

Í mong ár er arbeitt við ætlanum at byggja eitt røktar- og aldursheim í Klaksvík umfatandi allar norðoyggjarnar, men eru ætlaniruar av ymsum orsøkum ikki framdar.

Fyri nøkrum árum síðani lók landsstýrið spurningin upp um bygging av røktar- og ellisheimum á ymsum plássum. Orsøkin var, at tað í mong-

um forum var torfort og í summum ógjørligt at fáa fólk, ið ikki kundu fáa neyðugu rokt heima, inn á sjúkrahúsini, sum tá var einasti moguleiki hjá brekaðum og hjá eldri fólki. Landssjúkrahúsið hevði eina roktardeild við 24 sengrum, á Klaksvíkar Sjúkrahúsi var um triðingurin av sengrunum lagdur við røktarsjúklingum og á Suðuroya Sjúkrahúsi lógu altíð nakrir. Einasta aldursheimið í landinum var í Tórshavn. Sjúkrahúsini, serliga tey smærru, bóðu um, at útvegir vórðu gjørdir fyri, at roktarsjúklingarnir komu út uv sjúkrahúsunum, so seingjarplássini kundu nýtast til vanligar sjúklingar og vanliga sjúklingaviðgerð, sum eisini torvaði fleiri sengur.

Fyrsta økið, ið fekk framt eina bygging av røktar- og aldursheimi, var Vága sýsla, har allar kommununnar tóku seg saman um í felag at loysa spurningin.

Síðani hevur landsstýrið samtykt, at ein framhaldandi útbygging fer fram aðrastaðni og í fyrsta umfari eftir hesi ætlan og í hesari raðfylgju:

1. Suðuroyar sýsla, á Tvøroyri, og í tilknýti til sjúkrahúsið, heimið verður liðugt í december mánaða 1976.
2. Viðkan av aldursheiminum í Tórshavnar kommunu.
3. Norðuroya sýsla í Klaksvík og í tilknýti til sjúkrahúsið.
4. Eysturoyar sýsla, helst í Runavík.
5. Streymoya sýsla, í Tórshavn, og í tilknýti til sjúkrahúsið.

Útreiðslurnar til bygging av aldurs- og røktarheimum verða goldnar við 90% úr grunninum eftir § 12, 2. stk. í fólkapensjónslógini og við játtan á fíggjarlógini, meðan ley óreistandi 10% verða goldin av kommununum í økinum.

Viðvikjandi røktarheiminum í Norðoyggjum hevur stýrið fyri Klaksvíkar Sjúkrahús mælt til, at heimið verður bygt, og at tað eins og á Tvøroyri verður bygt í tilknýti til sjúkrahúsið, soleiðis at báðir stovnar fáa fyrimunir av ávisum samarbeiði, t.d. felags kok, vaskari og hitamiðstøð.

Landsstýrið hevur tikið undir í hesum tilmæli og hevur latið arbeiðið projekterað.

Undir viðgerðini av málinum og meðan projekteringsarbeiðið er farið fram, eru ymisk ynski frankomin um at fáa aðrar funktiónir í bygningin enn akkurát tær, ið vanliga verða lagdar undir eitt roktar- og aldursheim. Talan er um eina heilsumiðstøð við viðlatuholum til 3 kommununlæknar, høli til socialráðgevara og til jarðamóðir. Síðani er talan um eina fysiurgiska deild til sjúkrahúsið.

Á sjúkrahúsinum er longu sum er neyðugt at viðka og modernisera køk, vaskarí og matstovu til starvsfólkið. Hesi arbeiði verða enn meira neyðug, um virkisokini skulu tæna báðum stovnum.

Fyriliggjandi skitsuprojekt er ein bygningur í 4 hæddum og undirhædd, har kapel og goymslurúm eru. Av teimum 4 hæddumum eru tær tvær røktar- og aldursheim, ein hæddin er fysiurgisk deild og ein heilsumiðstøð. Bygningurin er bundin til sjúkrahúsið við einum millumbygningi, í honum er høvuðsinngongd og elevator. Hæddarmetrarnir eru 4.037,2, tá eru bæði kokur og vaskarí á sjúkrahúsinum talt við.

Byggikostnaðurin er í december mánaða 1975 roknaður til 14.735.000 kr. Herafturat koma útreiðslurnar til projektering og eftirlit mettar til 12% ella um 1.765.000 kr., tilsamans 16.500.000 kr. Kostnaðurin pr. m² verður tá 4.087 kr.

Sjúkrahússtýrið, Klaksvíkar kommuna og nevndin fyri einum millum kommunalum røktar- og aldursheimi í Norðoyggjum taka undir í projektinum.

Av tí at figgingin av teimum ymsu funktiónunum er ymisk, er neyðugt at gera eitt býti av m² millum funktiónirnar. Sum nevnt verður bygging av røktar- og aldursheimum goldin við 90% úr fólkapensiónsgrunninum. Sjúkrahúshygging hevur hígartil verið goldin við 50% frá statinum í studningi og 50% frá landskassanum, til seinastu byggiarbeiðini á Klaksvíkar sjúkrahúsi og Landssjúkrahúsinum varð landskassans partur útvegaður sum lán úr landskassanum. Viðvikjandi bygging av heilsumiðstøð hevur løgtingið í løgtingssetuni 1975 undir viðgerðini av nýggjari kommunulæknaskipan samtykt, at landskassin letur 50% í studningi til kommunurnar til bygging av viðtalhuhølum, jbr. løgtingsmál nr. 19/1975.

Landsstýrið hevur gjørt fylgjandi býti:

Røktar- og aldursheim:

2 hæddir á 567,2 m²	=	1.134,4 m²	
Millumbyggingar 1/1 av		120,7 m²	
Kapel, ½ av 246,7 m²	=	173,4 m²	
Umklæðing, depot v.m. ½ av 220,9 m²	=	110,5 m²	
Høvuðsinngongd, elevator v.m. ⅓ av 279,0 m²	=	93,0 m²	
Vaskarí og køkur ⅓ av 801,6 m²	=	267,2 m²	1.899,2 m²

Heilsumiðstøð:

1 hædd á 567,2 m²	=	567,2 m²	
Høvuðsinngongd, elevator v.m. ⅓ av 279 m²	=	93,0 m²	660,2 m²

Fysiurgisk deild:

1 hædd á 567,2 m²	=	567,2 m²	
Høvuðsinngongd, elevator v.m. ⅓ av 279 m²	=	93,0 m²	660,2 m²

Sjúkrahúsið:

Kapel, ½ av 346,7 m²	=	173,4 m²	
Vaskarí og køkur ⅔ av 801,6 m²	=	534,4 m²	
Umklæðing, depot v.m. ½ av 220,9 m²	=	110,4 m²	818,7 m²
			4.037,7 m²

Eftir hesum verða útreiðslurnar at býta soleiðis:

Røktar- og aldursheim:	7.760.000 kr.
Heilsumiðstøð:	2.700.000 kr.
Fysiurgisk deild:	2.700.000 kr.
Sjúkrahúsið:	3.340.000 kr.
	16.500.000 kr.

Landsstýrið søkir um at fremja tann partin av byggingini, ið viðvíkur fysiurgisku deildini og sjúkrahúsinum tilsamans 6.040.000 kr., at søkja ríkismyndugleikarnar um 50% í byggistuðningi og at fáa heimild til um neyðugt at upptaka lán til figgjan av landskassans parti.

1. viðgerð 5. august, málið beint í figgjarnevndina.

2. viðgerð 6. august, figgjarnevndin legði fram soljóðandi

Álit

Málið varð lagt fram av landsstýrinum tann 2. august 1976 og undir 1. viðgerð 5. august beint í figgjarnevndina.

Í samband við bygging av millumkommunalum røktar- og aldursheimi í tilknýti til Klaksvíkar sjúkrahús biður landsstýrið um heimild til landskassans vegna at taka neyðug lán til bygging av eini fysiurgiskari deild og til onnur ávíst byggiarbeiði á sjúkrahúsinum.

Gjørd er ein heildarætlan um bygging av røktar- og aldursheimi, heilsumiðstøð, fysiurgiskari deild og sjúkrahúsi fyri tilsamans kr. 16.500.000,00. Landsstýrið søkir nú um at fremja tann partin av byggingini, ið viðvíkir fysiurgisku deildini og sjúkrahúsinum, tilsamans kr. 6.040.000, at søkja

rikismyndugleikarnar um 50% í byggistuðningi og at fáa heimild til um neyðugt at upptaka lán til figgjan av landskassans parti.

Figgjarnevndin kann einmælt taka undir við uppskoti landsstýrisins.

3. viðgerð 6. august. Uppskot landsstýrisin samtykt við 21—0 atkv.

5. Útskriving av vali

Ár 1976, 2. august, legði Kj. Mohr, løgtingsmaður fyri framburðsflokkin, fram

Uppskot
til
samtyktar.

Løgtingið samtykkir, at løgtingsval verður útskrivað sambært § 9 í stýrisskipanarlógini eftir at dómurin er fallin í Føroya rætti tann 23. apríl 1976 í sakarmálinum millum stillarar og valevni á lista hjá tjóðveldisflokkinum og Føroya løgmann, og løgmaður ikki enn hevur appellerað.

Viðmerkingar:

Sum viðmerking til uppskotið verður víst til skriv dagfest 20. juli 1976 frá stillarunum á frammanfyri nevnda lista til Føroya løgting, sum er soljóðandi:

Føroya Løgting
v/ J. Fr. Øregaard
løgtingsformanni
Tórshavn

Tann 23. apríl 1976 varð dómur sagður av Føroya rætti í einum rættarmáli millum stillarar og valevni á lista hjá tjóðveldisflokkinum til

løgtingsvalið 7. november 1974 øðrunegin og Føroya løgmann og løgtingsvalnevndina fyri Suðurstreymoyar valdømi hinunegin.

Úrslitið av dóminum var, at Føroya løgmaður varð dømdur at viðurkenna, at avgerð hansara, kunngjørd í skrivi frá Føroya landsstýri, dagfest 15. oktober 1974 um, at omanfyri nevndi vallisti ikki kann verða merktur við bókstavinum E, er ógyldug, eins og løgtingsvalnevndin fyri Suðurstreymoyar valdømi varð dømd at viðurkenna, at hon átti at havt givið hesum vallista listacyðkenni TJÓÐVELDISFLOKKURIN við hartil hoyrandi bókstavi og nummari.

Hesin dómur, ið okkum kunnugt ikki er skotin inn fyri hægri rætt av teimum saksøktu, ber eftir okkara meting heilt greitt við sær, at seinasta løgtingsval ikki er hildið samhært løgtingsvallógini, og tá tað frávik, ið Føroya løgmaður og løgtingsvalnevndin fyri Suðurstreymoyar valdømi hava gjørt frá løgtingsvallógini, er so týdningarmikið, halda vit tað vera skyldu okkara at gera Føroya løgting kunnugt við dómin, tá roknast má við, at løgtingsins avgerð um gildið av løgtingsvalinum hevði verið ein onnur, um dómurin fyrilá, tá henda avgerð varð tikin, og at núsitandi løgting sostatt er ólógliga valt.

Vit hava ikki viljað skrivað til løgtingið fyrr enn freistin fyri at skjóta dómin inn fyri hægri rætt er farin. Vit loyva okkum kortini at gera vart við, at vit longu undan løgtingsvalinum gjørdu bæði løgmanni og løgtingsvalnevndini greitt, at vit ikki kundu góðkenna avgerðir teirra, eins og løgmaður varð biðin um at broyta avgerðina undan løgtingsvalinum, soleiðis at valið hevði kunnað verið hildið á lógligum grundarlag.

Hjálagt loyva vit okkum at senda eitt eintak av dóminum og eitt eintak av brøvunum til løgmann og løgtingsvalnevndina fyri Suðurstreymoyar valdømi, dagfest 31. oktober 1974.

Vegna stillararnar
Suni Jacobsen

Á Føroya løgtingi, 2. august 1976.

FØROYA FRAMBURÐSFLOKKUR
Kjartan Mohr

1. viðgerð 5. august, málið beint í serliga 5-mannanevnd.

Ein minniluti í nevndini (Jógvan Olsen og Kjartan Mohr) mælir løgtinginum til at taka við uppskotinum frá Framburðsflokkinum um nýval til løgtingið.

Í viðmerkingunum verður sipað til tey skriv frá stillarum og valevni á tjóðveldislistanum til seinasta løgtingsval. Sonuleiðis útskrift av dóminum, ið fall í Foroya rætti, ið gekk lagnaðnum ímóti.

Lagnaður appellerði ikki dómin, og má tí løgtingið leggja honum á at útskriva nýtt løgtingsval til leystur.

Minniluti í 5-mannanevndini, 6. august 1976.

Jógvan Olsen Kjartan Mohr

Meirilutin í nevndini (Erlendur Patursson, Eliesar Arge og Haldor Hansen) vísir til ta frágreiðing, ið lagnaður gav, tá ið málið var til 1. viðgerð, har hann vísti á, at avgerð hansara verð tikin eftir at hann fyrst hevði ráðført seg við serkonar lagfrøðingar, og á at løgtingið sum hægsta vald viðvíkjandi valbrøvum hevði góðtikið teir 26 tingmennirnar, ið valdir vórðu á løgtingsvalinum í november 1974. Hesa frágreiðing heldur nevndin seg til og setir so statt einki uppskot fram.

Meirilutin í 5-mannanevndini, 6. august 1976.

Erlendur Patursson Eliesar Arge Haldor Hansen

2. viðgerð 6. august.
Uppskotið frá Føroya Framburðsflokki fall við 7 ja-atkvøðum.

6. Ymsar reguleringar av fiskiskapinum í norður-eystara partinum av Atlantshavinum (NEAFC)-eykafundurin apríl/1976)

Ár 1976, 2. august, legði Petur Reinert, landsstýrismaður, fram

Uppskot
til
samtyktar.

1. Løgtingið tekur til eftirtektar tær reguleringar, sum umrøddar eru í viðmerkingum landsstýrisins í punktunum 1 sildaveiða í Norðsjónum og Skagerakk, 2 minstamát fyri sild úr Norðsjónum og Skagerakk, samanber tó punkt 2 niðanfyri, 3 sildaveiða í Keltiska sjónum, 4 hrislingaveiða í Norðsjónum og 5 fiskiveiða eftir hummara.

2. Mótmælir land samtyktini um sildaveiðu í Norðsjónum og Skagerakk, fær landsstýrið saman við marknaðarlondunum heimild at mæla ríkisstýrinum til at mótmæla.

Viðmerkingar:

Sum avgjørt á eykafundinum í november mánaða 1975 var eykafundur í NEAFC (North-East Atlantic Fisheries Commission) hildin í London í døgunum 21. til 23. apríl 1976.

Hesi tilmæli vórðu samtykt:

1. Sildaveiða í Norðsjónum og Skagerakk.

Hóast fiskifrøðingar á november eykafundinum mæltu til, at sett varð totalt veiðiforboð í 1976 samtykti fundurin at seta loyvdu heildarveiðuna fyri fyrra hálvár 1976 til 87.000 tons og síðani á eykafundi í apríl taka støðu til seinra hálvárið 1976.

Støða fiskifrøðinga á april-fundinum var, at um loyvda heildarveiðan fyri alt árið 1976 varð hægri enn tey 87.000 tonsini, sum vórðu sett fyri fyrra hálvárið, verður tað ógvuliga ivasamt, um stovnurin nakrantíð mennir seg aftur. Teir mæltú tí til, at loyvda heildarveiðan fyri 1976 ikki

varð sett hægri enn 87.000 tons og herafturat totalt veiðiforboð í 1977, samstundis sum strangar reglur verða gjørdar fyri sild sum hjáveiða í blandaðum fiskiskapi.

Fundurin kundi ikki semjast um ikki at hækka loyvda veiðutalið í 1976, men setti talið til 160.000 tons. Føroya partur fyri alt árið 1976 verður 9.200 tons, fyri fyrra hálvárið var hann settur til 5.000 tons.

Útlit er til, at lond (Noreg, kanska eisini Ísland) koma at mótmæla samtyktini. Helst verður løgtingið ikki samman, tá stoða skal takast til, um Føroyar skulu mótmæla, og verður tí skotið upp, at landsstýrið saman við marknaðarnevndini fær hesa heimild.

2. Minstamát fyri sild úr Norðsjónum og Skagerakk.

Samtykt varð at seta 20 cm sum minstamát fyri sild veidd til matna í heinleiðis fiskiskapi við eini 10% undantaksregln.

3. Sildaveiða í Keltiska Sjónum.

Loyvda heildarveiðan í tíðarskeiðinum 1. apríl 1976 til 31. mars 1977 varð lækkað úr 16.800 tons í 10.850 tons.

4. Brislingaveiða í Norðsjónum.

Á november eykafundinum varð samtykt ein reguleringsskipan, ið hevði givið Føroyum eina kvotu í 1976 uppá um 40.000 tons, svarandi til veiðuna frá 1. januar til 30. november 1975.

Danmark/Føroyar og eisini onnur lond mótmæltu skipanini, skipanin fall. Málið varð tí tikið uppaftur á apríl- eykafundinum.

Fundurin samtykti at seta loyvdu heildarkvotuna fyri árið 1976 til 650.500 tons, av hesum verður kvota Føroya 48.200 tons.

5. Fiskiveiða eftir hummara.

Loyvda minstameskan á øllum konventiónsøkinum 2, sum eftir galdandi reglum var 16 mm, var fyri økið vestanfyri Skotland og Írland víðkað til 40 mm.

Viðløgd er talva yvir føroysku veiðutølini síðani 1970 fyri sild og brisling í Norðsjónum og kvotahýtið í 1976.

	1970	1971	1972	1973	1974	1975
Sildaveiða í Norðsjónum og Skagerrak	73.507	56.796	52.559	67.250	33.293	33.907
Brislingur í Norðsjónum	-	-	-	84	4.117	42.900

1. viðgerð 4. august, málið beint í fiskivinnunevndina, sum 5. august legði fram soljóðandi

Álit

Málið varð við 1. viðgerð beint í fiskivinnunevndina. Nevndin er samd um at taka undir við uppskoti landsstýrisins við tí uppískoyti til 2. stykki í uppskotinum til samtyktar, at samtykt verður eisini at seta egna kvotu.

Nevndin mælir sostatt til, at uppskot landsstýrisins verður samtykt við hesum uppískoyti til punkt 2, aftaná orðini: «at mótmæla» verður sett: «og at seta egna kvotu» — og setur nevndin fram uppskot samsvarandi:

Uppskot
til
samtyktar.

Aftaná orðini «at mótmæla» verður sett: «og at seta egna kvotu».

Fiskivinnunevndin, 5. august 1976.

Poul Jacob Olsen Johan Simonsen Ove Mikkelsen

Jógvan Olsen Vilhelm Nielsen

2. viðgerð 6. august.

Uppskot landsstýrisins til samtyktar, punkt 1 samtykt við 17- -0, punkt 2 við broyting frá fiskivinnunevndini samtykt við 17 0.

7. Veðhald fyri láni til Miðvágs kommunu

Ár 1976, 4. august, legði Petur Reinert, landsstýrismaður, fram soljóðandi

Uppskot
til

løgtingslóg um veðhald fyri láni til Miðvágs kommunu.

§ 1.

Landsstýrinum er heimilt landskassans vegna at veðhalda fyri láni upp til kr. 4.000.000,- úr Kreditforeningen af kommuner i Danmark til Miðvágs kommunu.

§ 2.

Henda lóg fær gildi beinan vegin.

lagtingslov om garanti for lån til Miðvágs kommune.

§ 1.

Landsstyret bemyndiges til på landskassens vegne at garantere for lån indtil kr. 4.000.000 fra Kreditforeningen af kommuner i Danmark til Miðvágs kommune.

§ 2.

Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Miðvágs kommunna hevur fingið játtað eitt lán uppá 4 milj. kr. úr Kreditforeningen af kommuner i Danmark. Nettoúrtøkan av hesum láni skal nýtast lutvist til figgjan av kommununnar parti av útreiðslunum til víðkan av Miðvágs - Sandavágs havn og lutvist til figgjan av útreiðslunum til breiðkan og regulering av høvuðsvegnum íggjøgnum Miðvág.

Við endan á figgjarárinum 1974/75 hevði Miðvágs kommuna í lánum góðar 1,5 milj. kr., haraf umleið kr. 170.000 við landskassaveðhaldi. Í figgjarárinum 1975/76 hevur kommunan lænt umleið kr. 700.000,-.

1. viðgerð 5. august, málið beint í figgjarnevndina, ið 6. august legði fram soljóðandi

Álit

Málið varð lagt fram av landsstýrinum tann 4. august 1976 og undir 1. viðgerð 5. august 1976 beint í figgjarnevndina.

F.L. j. nr. 809-34-17

Tað, hetta mál snýr seg um, er, at landsstýrið fær heimild til landskassans vegna at veðhalda fyri láni upp til kr. 4 milj. úr Kreditforeningen av kommuner í Danmark til Miðvágs kommunu.

Í viðmerkingunum er upplýst, at peningurin verður at nýta lutvist til fíggjan av kommununnar parti av útreiðslunum til viðkan av Miðvágs-Sandavágs havn og lutvist til fíggjan av útreiðslunum til breiðkan og regulering av høvuðsvegunum íggjøgnum Miðvág. Eisini er upplýst, hvat Miðvágs kommuna hevur tikið í lánum fíggjarárini 1974/75 og 1975/76.

Fíggjarnevndin kann einmælt taka undir við uppskoti landsstýrisins.

2. viðgerð 6. august. 3. viðgerð 6. august.

Uppskot landsstýrisins samtykt við 23—0.

---

8. Millumtinganevnd í fiskimarks- og felagsmarknaðarmálum

Ár 1976, 4. august, varð av Framburðsflokkinum, Sjálvstýrisflokkinum og Sambandsflokkinum sett fram

Uppskot
til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um millumtinganevnd í fiskimarks- og felagsmarknaðarmálum.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 22 frá 22. mai 1962 um millumtinganevnd í fiskimarks- og felagsmarknaðarmálum verður skotið upp sum nýtt 3. stk.:

lagtingslov om ændring i lagtingslov om et siddende lagtingsudvalg i fiskerigrænse- og fællesmarkedsspørgsmålene.

§ 1.

I lagtingslov nr. 22 af 22. mai 1962 om et siddende lagtingsudvalg i fiskerigrænse- og fællesmarkedsspørgsmålene indføjes som nyt stk. 3:

«Um tingflokkur eftir tingskipanini ikki er umboðaður í 7-manna tingnevndum, eigur hann tó rætt til eitt umboð í nevndini eftir lesi lóg.»

«Såfremt et lagtingsparti efter lagtingets forretningsordning ikke er repræsenteret i 7-mændsudvalg, har dette parti dog ret til en repræsentation i udvalget i henhold til denne lov.»

1. viðgerð 5. august, málið beint í marknaðarnevndina, ið 6. august legði fram soljóðandi

Álit

Málið varð framlagt av Framburðsflokkinum, Sjálvstýrisflokkinum og Samhandsflokkinum og varð við 1. viðgerð beint í marknaðarnevndina.

Nevndin hevur býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Erlendur Patursson, Hákun Djurhuus, Eliesar Arge, Poul Jacob Olsen og Tórálvur Mohr Olsen) setur einki uppskot fram.

Minnilutin (Pauli Ellefsen og Hilmar Kass) mælir til at samtykkja uppskotið.

2. viðgerð 6. august.

Uppskotið varð við 2. viðgerð sett undir atkvæðu við navnakalli og fall við 9—0.

9. Skúlaskapur í Føroyum

Ár 1976, 6. august, legði Finnbogi Isaksen, landsstýrismaður, fram

Uppskot
til
samtyktar.

Løgtingið tekur undir við, at landsstýrið heldur fram við arbeiðinum at gera uppskot til nýggjar lóggávur fyri skúlaskap í Føroyum, m.a. út frá teimum sjónarmiðum, sum eru førd fram í viðløgdu álitum.

Viðmerkingar:

Tørvur er á at freinja umfatandi og týðandi nýskipanir innan allan skúlaskap í Føroyum. Hesi seinastu 5—6 árini hava fleiri nevndir, settar av landsstýrinum ella skúlastjórnini, arbeitt við álitum um skúlaskapin á teimum ymisku økjunum. Tær flestu nevndirnar hava lagt álit fram, men tey eru ongantið viðgjørd á politiskum stigi.

Nýtt uppskot um sjómansskúlalóg hevur tvær ferðir verið fyri í løgtinginum, men er ikki avgreitt. Tíðin er nú so mikið fráliðin, síðani nevnd legði fram álit í hesum máli, at landsstýrið hevur sett ein arbeiðsbólk at hyggja uppskotið ígjøgnum av nýggjum, áðrenn tað verður lagt fyri løgtingið aftur seinri í hesi tingsetuni.

Ein nevnd situr eisini og ger uppskot til nýggjan kvøldskúla- og frítíðarlóggávu, men her er ikki álit komið enn.

Landsstýrisins metan er, at áðrenn endalig uppskot verða gjørd fyri skúlaskapin yvirhøvur, eigur løgtingið at taka spurningin til viðgerðar sum heild. Landsstýrið leggur tí fram hesi álit til umrøðu:

1. Rit viðvíkjandi broyting í uppbyggingini av skúlanum og um, hvussu hon kann vera framd.
2. Betænkning om erhvervsuddannelsen på Færøerne.
3. Alit frá nevndini, ið sett er at kanna møguleikarnar fyri samskipan av skúlamm.
4. Betænkning om en læreruddannelseslov på Færøerne.
5. Notat vedrørende undervisningsvæsenet på Færøerne (sent ríkisstýrinum í samband við yvirtøkuna av skúlaumsitingini).

Landsstýrið ætlar seinri í hesi tingsetu at koma við uppskotum um ný-

skipan av skúlaskapinum á ávísum økjum. Serliga verður miðað inóti at fáa eina nýggja læraralóg og eina nýggja fólkaskúlalóg avgreidda í hesi tingsetuni.

1. viðgerð 13. august, málið beint í serliga skúlanevnd, ið 28. mars 1977 legði fram

Tað er landsstýrið, sum hevur lagt málið fyri løgtingið, og við 1. viðgerð varð tað beint í serliga skúlanevnd við umboðum úr øllum flokkum.

Nevndin hevur viðgjørt málið, sum er uppskot til samtyktar, hvar landsstýrið biður um tingsins undirtøku til, at tað kann halda fram við arbeiðinum til at gera lóggávu fyri skúlaskapin í Føroyum, og í viðmerkingunum verður víst til, at nevndir hava viðgjørt ymsar partar av føroyska skúlaverkinum, og at hesar nevndir hava latið frá sær álit, sum vórðu umrødd, tá málið fekk 1. viðgerð í løgtinginum.

Álitini eru hesi:

1. Rit viðvíkjandi broyting í uppbyggingini av skúlanum og um, hvussu hon kann verða framd.
2. Betænkning om erhvervsuddannelsen på Færøerne.
3. Álit frá nevndini, ið sett er at kanna møguleikarnar fyri samskipan av skúlanum.
4. Betænkning om en læreruddannelseslov på Færøerne.
5. Notat vedrørende undervisningsvæsenet på Færøerne.

Sagt verður í viðmerkingunum frá landsstýrinum, at miðað verður inóti við tað fyrsta at skipa nýggja lóggávu fyri fólkaskúlan og læraraskúlan, og í grøna «Ritinum» verður vist á, hvussu fólkaskúlin kann verða uppbygdur við 7 ára grundskúla við tvungnari skúlaskyldu og harafturat 8. 9. og møguliga 10. skúlaári fyri teir næmingar, sum vuskja at halda fram aftan á 7. skúlaárið, soleiðis at næmingarnir eru felags um nakrar høvuðslærugreinir, og at teir so fáa høvi til at velja aðrar lærugreinir eftir áhuga og evnum hjá tí einstaka.

Nevndin heldur, at fólkaskúlin eigur at verða bygdur upp eftir hesum sjónarmiðum og skjýtur tí upp, at landsstýrið skipar fyri at gera og leggja fyri løgtingið lógaruppskot til nýggja skúlaskipan, sum í høvuðsheitinum byggir á tær grundreglur, ið eru framsettar í «Rit viðvíkjandi broyting í uppbyggingini av skúlanum og um, hvussu hon kann verða framd».

Nevndin er av teirri áskoðan, at næmingarnir eiga at enda skúlagongdina aftaná 9. ella 10. skúlaár við prøvtøku og hetlar tað eisini vera gago-

ligt fyri nævningarnar í 8. — 10. skúlaári at koma út til at taka lut í praktiskum arbeiði ein part av hesi skúlatíðini.

Nevndin er vitandi um, at ein nevnd av serkønum er vald til at gera nýggja fólkaskúlalóg.

Sonuleiðis eigur landsstýrið í samráð við serkonar at gera og leggja fyri løgtingið lógaruppskot um nýggja læraraútbúgving í tráð við «Betænkning om en læreruddannelseslov på Færøerne», so hon betri sum svarar við tey krøv, sum framtíðarundirvísingin í skúlanum kemur at seta til læararnar.

Landsstýrið eigur eisini at halda fram við og skunda undir arbeiðið til nýskipan av undirvising og útbúgving hjá okkara ungdómi m.a. eftir teimum tankum, sum eru settir fram í «Betænkning om erhvervsuddannelsen på Færøerne» og í samráð við sakkønar á hesum øki.

Nevndin er varug við, at í hesum álitinum er spurningurin um decentralisering av skúlaskapinum umreddur, og verður landsstýrið biðið um at hava hetta í huga undir framtíðar útbyggingini.

Viðløgd eru skriv frá Føroya handverkarafelag og Føroya handverksmeisturafelag.

Tá broyttar umstøður í føroyska samfelagnum og í londunum uttan um okkum seta nýggj krøv til tey ungu og sostatt eisini skúlan, heldur nevndin, at tað er náttúrligt, at hildið verður fram við arbeiðinum um nýskipan innan undirvising og útbúgving her á landi, so okkara ungdómur ikki verður verri stillaður enn tey ungu í grannalondunum.

Eisini eigur at vera hildið fram við arbeiðinum at samskipa skúlaskapin, so betri samstarv kann fáast í lag millum teir ymsu skúlarnar.

Við hesum viðmerkingum setir nevndin fram hetta uppskot til samtyktar í staðin fyri landsstýrisuppskotið.

Uppskot

til

samtyktar.

Landsstýrið, saman við serkønum, fetur gera og leggur fyri løgtingið í komandi tingseta lógaruppskot um nýggja fólkaskúlalóg og nýggja læraraskúlalóg.

Sama verður álagt landsstýrinum viðvikjandi umskipan og nýskipan í

vinnulívsúthúgvingini, samstundis sum løgtingið tekur undir við framhaldandi arbeiði fyri skúlaskapin sum heild.

Serlig 7-manna skúlanevnd, 28. mars 1977.

Hilmar Beck	Óli Breckmann	Sigurd Hansen
Asbjørn Joensen	Kjartan Mohr	Jóna Henriksen
	Jákup Mortensen	

2. viðgerð 29. apríl 1977.

Uppskotið frá nevndini varð samtykt við 21 0 í staðin fyri uppskot landsstýrisins.

---

10. Betur veðurtænasta við Føroyar

Ár 1976, 5. august, legði Sambandsflokkurin fram

Uppskot
til
samtyktar.

Alagt verður landsstýrinum at skipa fyri, at vit fáa veðurtíðindi tríggjar ferðir um dagin frá AKRABERGI, BORÐUNI, FUGLOYNNI, EIÐI og MYKINESI

Viðmerkingar:

Soleiðis sum skipanin nú er, verða bert veðurtíðindini regluliga á morgni givin frá Akrabergi, Borðuni og Havnini. Ikki fyrrenn á miðdegi

fáast veðurtíðindi frá Mykinesi og Fugloy, og sunnudagar koma oftast eingi veðurtíðindi frá hesum plássum. Okkara heimaútróður er treytaður av veðrinum, og tí er tað av stórum týdningi, at teir, sum sjógvin rokja, fáa at vita, hvussu veðrið er á teimum ymiska støðunum kring landið, soleiðis at tað kann verða til hjálp hjá útróðramanninum at meta um útróðralikindini. Arbeitt eigur eisini at verða fram ímóti, at fyriultan at siga vindnegi og sýni, so eisini siga frá, hvussu tað er í sjónum.

1. viðgerð 10. november, 2. viðgeerð 23. november.
Uppskotið frá Sambandsflokkinum samtykt við 17 0 atkvøðum.

---

11. Kannan av lóggávu og reglum fyri skipasýni í Føroyum

Ár 1976, 6. august, legði Sambandsflokkurin fram

Uppskot
til
samtyktar.

Álagt verður landsstýrinum at kanna um lóggáva og reglur fyri skipasýni í Føroyum lúka tey krav, sum eiga at vera sett til slíkan stovn, og at fáa í lag møguligar og tørvandi broytingar.

Viðmerkingar:

Tað er av avgerandi týdningi, at lóggáva og reglur fyri skipasýni í Føroyum til eina og hvørja tíð lúka tey krav, sum setast skulu fyri at tryggja okkara sjómenn og skip. Ávísar hendingar benda á, at tað kundi verið tørvur á lesum øki, og tí seta vit fram hetta uppskot.

1. viðgerð 10. november, málið beint í lógarnevndina, ið 8. mai 1977 legði fram soljóðandi

Álit

Uppskotið hevur verið lagt fyri «Statens skibstilsyn», ið hevur gjørt viðmerkingar sínar.

I hesum viðmerkingum verður fyrst sagt, at tá ið tað í viðmerkingunum til uppskotið verður tikið til, at ávísar hendingar bendu á, at tað kundi verið førvur á møguligum og tørvandi broytingum, so hevði tað verið gott at vita, hvørjar hesar hendingar vóru. Men um so er, at hugsað verður um «Froyur», so verður viðlogd rapport frá sýnsmonnunum, har teir vísa á orsøkina til, at skipið koppaði. I hesi rapport verður tikið til:

«Kæntringen skete som følge af sammenfald af to omstændigheder, der taget hver for sig ikke vilde have været katastrofale. Den ene var, at det næsten tomme skibs stabilitet var af meget ringe størrelse. Den anden var en fjernet plade i affaldskanal gennem skibssiden, hvorigennem vand strømmede ind, da skibet fik en uforholdsmæssig stor krængning.»

Síðan siga sýnsmennirnir:

«Krængningsprøver er udført og har vist, at skibets normale sejlkonstruktioner er sikre. De er godkendt behørigt og det tilgrundliggende materiale af tegninger og beregninger er kontrolleret og fundet i orden. Der er ikke lovfæstede bestemmelser om fiskeskibes stabilitet, men IMCO's rekommendationer er retningsgivende.»

Í viðmerkingum skipasýnisins verður sagt, at ongar reglur verða gjordar so góðar, at ikki okkurt kundi verið betri ella øðrvísi. Síðan verður sagt:

«I løtuni er arbeiðsgongdin í skipasýninum soleiðis, at deildarleiðararnir koma saman fleiri ferðir um árið fyri at tosa um, hvørji tiltøk kunnu gerast fyri at økja um tryggleikan á sjónum hæði fyri skip og manning, og eina ferð um árið koma skipsinspektørar, sum starvast í skipasýninum saman til tað sama. Koma upplýsingar fram, sum haldast vera av týdningi fyri at økja um tryggleikan, verða hesir tiknir upp til nærri kanningar.

Vit úr Føroyum eru eisini við á hesum fundum í Keypmannahavn, og kunnu vit vísa á tiltøk, sum vit halda eiga at verða gjørd, so leggja vit tað fyri á hesum fundum.

Um 2 mánaðar verður hildin ein SOLAS-fundur í London, har fleiri lond luttaka fyri at finna fram til tiltøk, ið kunnu økja um tryggleikan av manning og skipi. Eg haldi ikki, at tað er beint líka nú við loglingslóg at gera serreglur fyri føroysk skip, sum er strangari enn tær, sum í dag eru galdandi, men at vit eiga at støðga til SOLAS-fundurin hevur verið og siggja, hvat úrslit hesin fundur kemur til.

Aftaná fundin verður tað helst so, at vissar broytingar (nationalar broytingar) verða gjørdar fyri donsk og føroysk skip, og tá ber vel til

at fáa okkara ynskir um broyting tikin við, um vit halda, at tað er neyðugt.

Stabilitet er eitt mál, sum hevur verið nógv frammi hesa seinastu tíðina, og er tað einki at ivast í, at við teim skipaslogum, sum vit í dag byggja, er tað av størsta týdningi, at teir menn, sum hava ábyrgdina umborð, til fuluar kenna skipið. Ein tann størsti tryggleiki, sum veitast kann skipi og manning er, at hesir menn hava nóg góðan kunnleika til at finna skipsins stabilitet úr teimum upplýsingum, sum givnar verða umborð, og at teir gera nýtslu av teimum. Tað er tí ikki heilt av leið, at skipað verður fyri skeiðum í stabilitet, so at teir menn, ið tørva henda kunnleika, kunna ognast hann.»

Nevndin hevur kannað lær reglur, sum eru í gildi um stabilitet. Tær eru í «bekendtgørelse om forskrifter for skibes bygning og udstyr m.v.» frá 21. mai 1965, og eru hesar:

§ 32. Stabilitet.

a. Ethvert skib skal, når det er færdigbygget, underkastes en krængningsprøve, og dets stabilitet bestemmes, jfr. § 366.

b. Skibsføreren skal forsynes med sådanne pålidelige oplysninger, som måtte være nødvendige for at sætte ham i stand til på hurtig og enkel måde at få nøjagtig vejledning om skibets stabilitet under forskellige driftsforhold. En genpart skal tilstilles direktoratet.

c. Såfremt der foretages sådanne ændringer ved et skib, at disse får væsentlig indflydelse på skibets stabilitet, skal skibsføreren og direktoratet forsynes med korrigerende oplysninger om stabiliteten. Skibet skal om nødvendigt underkastes en ny krængningsprøve.

§ 60. Stabilitet.

a. For ethvert skib på 20 tons og derover under bygning skal der på tidligst muligt tidspunkt indsendes foreløbige oplysninger om og beregninger af skibets stabilitetsforhold til direktoratets bedømmelse. Med det færdige skib skal der under skibstilsynets kontrol foretages krængningsprøve, og endelige beregninger af skibets stabilitetsforhold skal udføres og indsendes til direktoratet, jfr. § 366.

b. Endvidere kan direktoratet om nødvendigt påbyde, at et skib skal underkastes krængningsprøve under skibstilsynets kontrol, og kan kræve sig forelagt tilsvarende oplysninger og beregninger som under a omhandlet.

c. Til sikring af skibets stabilitet under sædvanlig drift kan der af direktoratet stilles sådånne krav, som efter de foretagne undersøgelser må anses for nødvendige.

d. Efter foretagen stabilitetsundersøgelse skal skibets fører forsynes

med alle oplysninger vedrørende stabilitetsforholdene, som måtte være nødvendige for at sikre skibet under sædvanlig drift i ubeskadiget stand.

§ 366. Stabilitetsundersøgelser.

a. 1. Direktoratet kan påbyde, at et skib underkastes krængningsprøve under skibstilsynets kontrol.

2. Ethvert skib skal, når det er færdigbygget, underkastes en krængningsprøve og dets stabilitetsgrundlag bestemmes. Krængningsprøven skal, for så åvidt angår fiskefartøjer, foretages under skibstilsynets kontrol.

b. Skibsføreren skal forsynes med sådanne pålidelige oplysninger, som måtte være nødvendige for at sætte ham i stand til på hurtig og simpel måde at få nøjagtig vejledning om skibets stabilitet under forskellige driftforhold, og en genpart skal tilstilles direktoratet.

c. Til sikring af et skibs stabilitet under sædvanlig drift kan der af direktoratet stilles sådanne krav, som efter de foretagne undersøgelser må anses for nødvendige.

Sum tað sæst, verður í hesi kunngerð í fleiri støðum tikið til, at «**ethvert skib skal**» o.s.fr. og at í § 366, 2. stk. verður beinleiðis sagt: «Krængningsprøven skal, for såvidt angår **fiskerfartøjer**, foretages under skibstilsynets kontrol».

Nevndin fær ikki oman fyri tilskilaðu orð sýnsmannanna um, at «der er ikke lovfæstede bestemmelser om fiskeskibes stabilitet» at rima við hesi orð í kunngerðini.

Tað hevur ikki hjá lógarnevndini verið gjørligt at kanna málið gjøllgari enn her hevur verið gjørt, men av tí at nevndin metir hetta mál hava alstóran týdning fyri tryggleikan á sjónum, heldur hon, at málið eigur at verða kannað til botns, og mælir so statt til at samykkja uppskotið.

Í aðrar málar tekur nevndin undir við viðmerkingum skipasýnisins um tørvin á skeiðum í stabiliteti, og tekur undir við, at skipasýnið fær slík skeið í lag.

Av tí at spurningurin um yvirtøku av skipasýninum í Føroyum varð umrøddur við fyrstu viðgerð uppskotsins, hevur nevndin eisini umrætt henda spurning.

Hesin spurningur hevur tríggjar ferðir verið til viðgerðar á tingi, men er uppskot um hesa yvirtøku fallið allar tríggjar ferðir.

Fyrstu ferð, ið málið var til viðgerðar, var í tingsetuni 1949, og var tað hin føroyski fólkaflokkurin (radikalt sjálvstýri), ið legði málið fram við skrivi 27. januar 1950, har ið sagt verður:

«Nú allir, sum við skip hava at gera, siggja, hvussu tung henda skipanin er í royndum, og hvussu náttúrligt tað er, at avgerðarrætturin í hesum málum liggur her á landi, loyva vit okkum at seta fram uppskot um,

at hetta mál so sum skipaskrásetingin verður samtykt sum føroyskt sermál og samstundis tikið yvir frá 1. apríl 1950 at rokna (smb. § 9 í lóg nr. 111 frá 23. mars 1948).»

Málið var viðgjort í fíggjarnevndini, ið hevði fund saman við Jessen skipsinspektør, og Peter Dahl og Sofus Sivertsen skipasýnismonnum. Hesir upplýstu, at tá ið smærri broytingar fóru fram, varð avgerð tikin í Føroyum, men at avgerð varð tikin í Keypmannahavn, tá ið tað kom til størri broytingar og umleggingar. Undanlok kundu tó gerast frá reglunum, tá ið góðar grundir talaðu fyri tí. Somuleiðis varð upplýst, at síðan Jessen skipsinspektørur kom til Føroya í oktober, høvdu bert 3 mál verið send til Keypmannahavnar til avgerðar, og at hesi mál høvdu fingið skjóta avgreiðslu. Skipasýnið kostaði tá o.u. 60.000 kr. árliga.

Ein meirihluti í fíggjarnevndini helt ikki, at skipasýnið fyribils kundi verða yvirtikið. Spurningar um serkona manning, kostnaðin av yvirtøkuni við bygging o.a. vóru ikki avgreiddir.

Eftir teim samráðingum, ið fíggjarnevndin hevði havt við umboðsmenn fyri skipatilsýnið, helt nevndin, at viðurskiftini í Føroyum viðvíkjandi fiskivinnuni vóru so ólík donsku viðurskiftunum, at tað gjordist neyðugt, um ikki støðgur skuldi koma í veiðuna, at undantøkuloyvi vórðu givin frá ávísum krøvum, ið lógin setti.

Í málinum varð lagt fram soljóðandi minnilutauppskot:

«Tingið samtykkir, at skipasýnið í Føroyum verður føroyskt sermál og tikið yvir frá 1. oktober 1950 at rokna.

Landsstýrinum verður álagt at gera uppskot til lógarreglur sum fylgja av umskiftinum at leggja fyri tingið á komandi ólavsøku.

Tørvandi peningajáttan verður til ta tíð at veita á framhaldsfíggjarlóg.»

Hetta uppskot fekk bert 8 atkvøður og fall.

Frá meirilutanum í fíggjarnevndini og minnilutanum í aðru syftu kom hetta uppskot:

«Landsstýrið fær í hendi eftir samráðing við skipatilsýnismenninar í Føroyum at heita á ríkisstýrið um at geva neyðug fyribils undantøkuloyvi frá ávísum krøvum, ið lógarreglurnar fyri skipssýnisreglur seta, so eingin steðgur verður í rakstrinum.»

Hetta uppskot varð samtykt við 15 atkvøðum.

Aðru ferð, ið málið um yvirtøku av skipasýninum var til viðgerðar á tingi, var í tingsetuni 1958, og var tað fólkaflokkurin og sjálvstýrisflokkurin, ið reistu málið. Í skrívi flokkanna 4. august 1950 verður m.a. sagt:

«Sum kunnugt er skipauppmálingin á føroyskum hondum og skipaskrásetingin við, har til kemur royndarkamar fyri kompassir. Eftir stendur skipaeftirlitið.

Skipaeftirlitið verður ikki nakar dýrur stovnur í rakstri, eftirsum tað

hevur ikki so lítlar inntøkur av gjoldum, og hev aftur at kemur, at reglur um gjøld fyri skipauppmáling eru í umbúnaði nakað eftir sonu reglum sum í øðrum londum.»

Uppskot fólkaflokksins og sjálvstýrisflokksins var tá hetta:

«Tingið samtykkir, at skipaeftirlitið í Føroyum verður føroyskt sermál frá 1. januar 1959 at rokna.

Landsstýrinum er heimilt at stíla fyri umskiftinum.»

Málið varð hesa ferð viðgjørt í lógarnevndini. Har mælti ein minniluti frá at samtykkja uppskotið við teirri grundgeving m.a. at yvirtøka fór at føra við sær stórar útreiðslur fyri landskassan. Hesin minniluti setti tí einki uppskot fram.

Ein annar minniluti førdi fram, at tað í málinum ikki vóru nakrar frágreiðingar um, hvussu stórar útreiðslur fyri landskassan yvirtøkan av skipaeftirlitinum bar í sær, og mælti tí til at landsstýrið fekk málið til nærri kanningar. Uppskotið frá hesum minnihluta var tá hetta:

«Tingið samtykkir at biðja landsstýrið kanna málið serliga viðvíkjandi kostnaðinum fyri landskassan, ið stendst av yvirtøku av skipaeftirlitinum sum sermál.»

Ein triðji minniluti mælti til at samtykkja uppskotið frá fólkaflokkinum og sjálvstýrisflokkinum.

Bæði uppskotini fullu. Uppskotið um at beina málið til kanningar í landsstýrinum fekk 11 atkvøður, uppskotið um yvirtøku frá 1. januar 1959 fekk 10 atkvøður.

Triðju ferð, ið málið var til viðgerðar á tingi, var í tingsetuni 1972, og vóru tað fólkaflokkurin, tjóðveldisflokkurin og sjálvstýrisflokkurin, ið nú løgdu málið fram. Uppskotið var soljóðandi:

«Løgtingið samtykkir, at skipaeftirlitið í Føroyum verður føroyskt sermál seinast frá 1. januar 1974 at rokna.

Landsstýrinum er heimilt at stíla fyri umskiftinum.»

Grundgevingarnar vóru tær sonu sum í tingsetuni 1958.

Málið var nú viðgjørt í figgjarnevndini.

Ein minniluti setti einki uppskot fram.

Ein annar minniluti tók ikki undir við uppskotinum, men nevndi, at tingið í 1948 hevði samtykt at yvirtaka postverkið sum føroyskt sermál, og helt fyri:

«Nú eru liðin 25 ár síðan Føroyar fingið sína sjálvstýrisskipan, so vit skuldu verið munandi betri fyrireikaðir á hesum tíki enn í 1948, tá einans nøkur fá fólk hevdu kunnleika til umsitingararbeiði. Minnilutin heldur, at áðrenn tingið ger fleiri samtyktir um yvirtøkur, so eigur tingsamtyktin frá 1948 fyrst at verða framd, og tekur so statt ikki undir við uppskotinum um yvirtøku av skipaeftirlitinum, men mælir landsstýrinum til at seta í verk samtyktina frá 1948 ....».

Uppskotið frá hesum minniluta var tá hetta:

«Landsstýrinum verður álagt sambært tingsamtykt frá september 1948 at upptaka samráðingar við donsku ríkismyndugleikarnar um yvirtøku av postverkinum.»

Úrslitið av atkvøðugreiðsluni var, at hetta uppskot um yvirtøku av postverkinum varð samtykt við 18 atkvøðum, meðan uppskotið um yvirtøku av skipasýninum fall við 13 atkvøðum.

Um kostnaðin av skipasýninum upplýsir skipasýnið, at har starvast 6 menn og 2 skrivstovufólk, og at kostnaðurin er um leið hesin:

Lønir	1.000.000 kr.
Ferðapeningur	80.000 kr.
Ljós og hiti	15.000 kr.
Telefon	15.000 kr.
Leiga av skrivstovu	30.000 kr.
	1.140.000 kr.

Her er ikki tikið við skrivstovuinnbúgv, amboð o.a. og heldur ikki útreiðslur til internationalar samráðingar uttanlanda, um talan verður um yvirtøku av skipasýninum.

Minnilutin (Erlendur Patursson) heldur, at uppskotið um yvirtøku av skipasýninum, sum nú er vorðið 27 ára gamal, eigur at fáa frama og vísir á fyrr umrødda álit frá einum av minnilutanum í fíggjarnevndini í tingsetuni 1972, har sagt verður, at nú so langt er liðið, síðan vit fingu sjálvstýrisskipan, skuldu vit verið «munandi betri fyrireikaðir á hesum øki enn í 1948, tá ið einans nøkur fá fólk høvdu kunnleika til umsitingararbeiði». Hesin minniluti mælti tó fyrst til at yvirtaka postverkið. Nú ið postverkið **er** yvirtikið, heldur nevndin, at spurningurin um yvirtøku av skipasýninum, sum hevur so mong ár á baki, eigur at verða avgreiddur.

Uppskot

frá allari nevndini:

I.

Álagt verður landsstýrinum at kanna, um lóggáva og reglur fyri skipasýninum í Føroyum lúka tey krøv, sum eiga at verða sett til slíkan stovn, og at fáa í lag møguligar og tørvandi broytingar.

Uppskot
frá minnilutanum (Erlendur Patursson)

Løgtingið samtykkir, at skipaeftirlitið í Føroyum verður føroyskt sermál seinast 1. apríl 1978.

Landsstýrinum verður álagt at stíla fyri umskiftinum.

2. viðgerð 11. mai 1977.

Uppskot I frá lógarnevndini samtykt við 15—0 atkvøðum.

Uppskotið frá minnilutanum (Erlendi Patursson) fall við 9—0 atkv.

---

12. Landsstýrismál

Útsett til ólavsøku.

F.L. j. nr. 204-2176

---

13. Regulering av fiskiskapinum á ICNAF-økinum (ársfundurin juni 1976)

Ár 1976, 8. november, legði Petur Reinert, landsstýrismaður, fram soljóðandi

Uppskot
til
samtyktar.

Løgtingið tekur til eftirtektar samtyktirnar á ICNAF-ársfundinum í

F.L. j. nr. 1519-2/76

Montreal í juni mánaða 1976 um regulering av fiskiskapinum á konventiónsøkinum.

Viðmerkingar:

26. ársfundurin í ICNAF varð hildin í Montreal, Kanada, í døgunum 8. til 23. juni 1976.

Eitt av týdningarmestu evnunum á skránni var framtíðar lagna nevndarinnar og møguligj teikhubir hennara, nú strandalandini Kanada og USA síðani eisini Danmark (Grønland) flyta fiskimarkini út á 200 fjórðingar. Eisini hava bæði Kanada og USA sagt limaskap sín upp í nevndini. At lýsa hesar spurningar og at seta fram uppskot um møguliga nýskipan varð sett nevnd.

Síðani varð samráðst um býti av heildarveiðuni fyri meira enn 60 fiskastovnar, sum fiskifrøðingar mæltu til, komu undir regulering í 1977. Úrslitið varð, at reguleringstiltøkini verða enn fleiri og strangari enn higartil.

Nevndin samdist um at seta loyvd heildarveiðutøl fyri 55 fiskastovnar og samdist eisini um býti millum limalandini av heildarveiðutølunum fyri 51 stovnar. Av stovnum, sum semja var um at skjóta út til viðgerðar á seinni eykafundi, kunnu nevnast tosktur og rækja undir Grønlandi.

Sama myndin, sum teknaði seg á teimum trimum ársfundunum frammanundan um býti av heildarveiðuni, teknaði seg eisini á hesum ársfundinum, at strandalandini í forhond eiga at fáa so mikið sum tey hava ella rokna við at fáa orku at veiða tað givna árið og ikki í mun til, hvat er veitt árini frammanundan. Fjarfiskarar hava so at býta tað, ið eftir er. Hesi sjónarmið, ið eru góðkend í veruleikanum, og tað, at heildarveiðutølini í flestu førum lækka, førir við sær, at kvoturnar hjá fjarfiskarum minka ár undan ári.

Fyri Føroyar er tað býtið av teimum ymisku toskakvotunum, ið hevur mesta áhugan, fiskiskapur eftir svartkalva er tó eisini av týdningi, og sum nýggir veiðumøguleikar kunnu nevnast langasporl og lodna.

Talvurnar 1, 2 og 3, ið eru viðlagdar, lýsa veiðumøguleikarnar í 1977. Sum tað sæst, er kvotain fyri økið 2 Y 3 K L, Labrador og norðan og eystanfyri New Foundland, lækkað úr 4.200 tons í 1.690 tons og kvotain fyri økið 3 M, Flemmish Cap, er lækkað úr 6.840 tons í 4.050 tons, herafturat hava Føroyar eins og øll onnur fremmand lond mist serkvoturnar millum New Foundland og Nova Scotia og sumanfyri økini 4 Vn 4 T og 4 Vs W.

Tær loyvdu kvoturnar eftir ICNAF-samtyktunum góðkenna strandalandini í 1977, men útflytingin av fiskimarkinum førir við sær, at hvørt skipið sær skal hava loyvi frá strandalandinum at fiska, og at fiskiskapurin fer fram undir jurisdiktión strandalanda.

Eykafundurin í nevndini verður í døgunum 1. til 9. december 1976.

Talva 1.

Toskur Oki	Veiða 1973	1974	1975	Kvotaskipanir [1] 1973	1974	1975	1976	1977
1.	4.499	5.466	5.718	2)	30.000[3]	19.600[4]	19.600[4]	5)
2 GH	—	—	—	2)	(600)	(600)	(600)	(500)
2 J + 3 KL	4.235	4.032	2.596	13.396	13.800	9.000	4.200	1.690
3 M	7.754	1.872	3.288	3)	6.700	7.500	6.840	4.050
3 NO	266	2	—	2.900	1.500	800	(1.300)	(1.000)
3 Ps	99	153	12	2.000	(2.000)	(4.000)	(1.500)	(100)
4 VN (jan. — april)								
4 T (jan. — april)	212	1.577	1.241	2)	2.000	1.300	650	(15.000)[6]
4 Vn (mai — decbr.)	1.027	—	—	2)	(500)	(500)	(1.000)	(100)
4 Vs W	2.481	703	622	1.150	1.150	1.150	350	(100)
4 X	—	—	—	2)	2)	(200)	(100)	(100)
5 Y	—	—	—	(500)	(1.323)	(1.000)	(25)	(5)
5 Z	—	—	—	(2.300)	(3.547)	(1.137)	(1.065)	(20)

1) Tá ið tal stendur í klombra sigur tað, at vit onga serkvotu hava. Vit kunnu saman við teimum, sum onga serkvotu hava, fiska burturav talinum í klombrum.
2) Eingin kvotaskipan.
3) Til Føroyar og Grønlands + 12.000 t. innanfyri fiskimark.
4) Til Føroyar og Grønlands + 9.000 t. innanfyri fiskimark.
5) Skotið út til eykafund í december 1976.
6) Loyvila heildarveiða oll, sum hon er, óbýtt. tv. fiskiskapur við fráboðanarskyldu.

Talva 2.

Svartkalvi	Veiða			Kvotaskipan [5]				
Øki					1974		1976	1977
0 + 1	1973	1974	1975	1973	4)	1975	3.200[6]	7.200
2 + KL	950[1]	594[2]	825[3]	4)	(9.000)	(5.600)	(4.000)	(2.500)

1) Umframt hevur Grønland veitt 4.627 t.
2) Umframt hevur Grønland veitt 3.444 t.
3) Umframt hevur Grønland veitt 3.658 t.
4) Eingin kvotaskipan.
5) Tal í klombru sigur, at vit onga serkvotu hava. Vit kunnu saman við hinum, sum onga serkvotu hava, fiska burturav talinum í klombru.
6) Til Føroyar og Grønland + 4.000 t. innanfyri fiskimark.

Talva 3.

Langasport	Veiða			Kvotaskipan [5]				
Øki	1973	1974	1975	1973	1974	1975	1976	1977
0 + 1	—[1]	—[2]	—[3]		4)	3.500	2.500	2.000
2 + 3	—	—	—	4)	(4.000)	(4.000)	(4.000)	(4.000)

1) Grønland hevur veitt 11 t.
2) Grønland hevur veitt 0 t.
3) Grønland hevur veitt 15 t.
4) Eingin kvotaskipan.
5) Tal í klombru sigur, at vit onga serkvotu hava. Vit kunnu saman við hinum, sum onga serkvotu hava, fiska burturav talinum í klombru.

1. viðgerð 17. november.

Uppskotið beint í fiskivinnunevndina, ið 23. november legði fram soljóðandi

Álit

Málið varð undir 1. viðgerð beint í fiskivinnunevndina.

Nevndin er samd um at ásanna, at tær kvotur, ið lutaðar eru Føroyum (Danmark), tá ið talan er um tosk, eru nógv lækkaðar. Hinvegin er nevndin eisini samd um, at lítið annað er at gera enn at geva seg undir ICNAF-samtyktirnar, men skal nevndin tó mæla til, at landsstýrið í einum og hvørjum føri í samráðingum vísir á tann serliga tørv, sum Føroyar, ið einki annað hava at lita á enn fiskivinnu, hava, tá ið loyvdar veiðumøgdir skulu býtast millum lond.

Vísandi til tað, ið her er framført, setur nevndin fylgjandi

uppskot
til
samtyktar.

Løgtingið tekur undir í uppskoti landsstýrisins til samtyktar.

2. viðgerð 24. november.

Uppskot landsstýrisins samtykt við 18 - 0 atkvøðum.

14. Byggilán til bygging av 2 deildum fyri evnaveik

Ár 1976, 8. nov., legði Jákup Lindenskov, landsstýrismaður, fram sóljóðandi

Uppskot
til

løgtingslóg um byggilán til bygging av tveimum deildum fyri evnaveik.

§ 1.

Landsstýrinum verður heimilað landskassans vegna at upptaka byggilán til bygging av tveimum deildum á Statshospitalinum fyri evnaveik.

§ 2.

Henda lóg fær gildi beinanvegin.

lagtingslån om byggelån til opførelse af to afdelinger for åndssvage.

§ 1.

Landsstyret bemyndiges til på landskassens vegne at optage et byggelån til opførelse af to afdelinger på Statshospitalet for åndssvage.

§ 2.

Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Í løgtingssetuni 1975, jbr. løgtingsmál nr. 72: Nýggj sjúkrahúslóg, samtykti løgtingið, at byggingin av tveimum deildum á Statshospitalinum fyri evnaveik skuldi fremjast eftir fyritiggjandi byggiætlan. Kostnaðurin er í januar mánaða 1975 mettur til 12,8 mió. kr.

Løgtingið ronkaði tá við, at fyrisitingin av Statshospitalinum varð løgd undir heimastýrið 1. april 1976. Eftir tí, sum nú fyriliggur, verður yvirtøkan ikki fyrr enn 1. januar 1977.

Annars samtykti løgtingið, at landsstýrið skuldi skipa fyri byggingini.

Byggingin verður fíggjað við 12 mió. kr. í studningi frá rikiskassanum, tá eru um 0,8 mió. kr. nýttar til projektering. Studningurin verður reguleraður eftir douskum byggiindeksi fyri hús í fleiri hæddum í mun til byggiindekstalið fyri januar mánaða 1975 = 189. Studningurin verður útgoldin við 20%, tá ið grundin er stoypt, 40% tá ið deildirnar eru innilokaðar við tekju og vindeygum og 40%, tá ið klárt er at flyta inn.

Landsstýrið hevur sett byggineynd til sína vegna at standa fyri bygg-

inginí. Nevndin hevur mælt til, at landsstýrið hevur góðkent, at arbeiðið verður boðið út í fleiri arbeiðstøkum, soleiðis at ikki bert tey stóru byggifeløgini hava møguleika at bjóða. Byrjað verður í mars mánaða 1977, og er byggitíðin ættað til 24 mánaðar.

Útbjóðingarhátturin førir við sær, at møguleikar neyvan eru fyri, at útgjalding av byggistudningi og útgjalding til arbeiðstakarar kunnu samskipast í tíð, tað verður óivað soleiðis, at arbeiðstakari skal hava gjald, óðrenn studningurin fellur til gjaldingar.

Av tí, sum er fört fram, er tað neyðugt hjá landsstýrinum at hava heimild til upptøku av byggiláni.

1. viðgerð 10. november, málið beint í figgjarnevndina, ið 23. november legði fram soljóðandi

Álit

Málið varð lagt fram av landsstýrinum tann 8. november 1976 og undir 1. viðgerð tann 10. november beint í figgjarnevndina.

Eftir lógaruppskotinum verður landsstýrinum heimilað landskassans vegna at taka byggilán til bygging av tveimum deildum á Statshospitalinum fyri evnaveik.

Útbjóðingarhátturin í hesum byggimáli førir við sær, at tá útgjalding av byggistudningi og útgjalding til arbeiðstakarar neyvan kunnu samskipast í tíð, er neyðugt at taka byggilán fyri at rinda til arbeiðstakara.

Samsvarandi tí, sum er fört fram í álitinum, mælir figgjarnevndin einmælt til at taka undir við uppskotinum frá landsstýrinum.

2. viðgerð 24. november.

3. viðgerð 24. november.

Uppskot landsstýrisins samtykt við 21--0.

15. Broyting í lóg um fuglaveiðu

Ár 1976, 8. nov., legði Jógvan Durhuus, løgtingsmaður, fyri tjóðveldisflokkin, fram soljóðandi

Uppskot
til
I

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um fuglaveiðu v.m.

§ 1.
Í løgtingslóg nr. 27 frá 9. september 1954 um fuglaveiðu v.m. við seinni broytingum verður í § 16 sett:

«3. stk. Loyvt er ikki at veiða fugl við snaru á sjónum.»

§ 2.
Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.

lagtingslov om ændring i lagtingslov om fuglefangst m.v.

§ 1.
I lagtingslov nr. 27 af 9. september 1954 om fuglefangst m.v. med senere ændringer tilføjes i § 16:

«Stk. 3. Det er forbudt på søen at fange fugle med snare.»

§ 2.
Denne lov træder i kraft straks.

II

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um fuglaveiðu v.m.

§ 1.
Í løgtingslóg nr. 27 frá 9. september 1954 um fuglaveiðu v.m. við seinni broytingum verða gjørdar hesar broytingar:
1) Í § 17, 2. stk., nr. a) ganga orðini: «lomviga, álkn» út.
2) Í § 17, 2. stk. verður sett sum nr. d): «1. august — 15. mars: Lomviga og álku.»

§ 2.
Henda lóg kemur í gildi beinnvegin.

lagtingslov om ændring i lagtingslov om fuglefangst m.v.

§ 1.
I lagtingslov nr. 27 af 9. september 1954 om fuglefangst m.v. foretages følgende ændringer:

1) I § 17, stk. 2, nr. a) udgår ordene «lomvie, alke».
2) I § 17, stk. 2 tilføjes som nyt nr. d): «1. august — 15. mars: Lomvie og alke.»

§ 2.
Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Tað eru nú nøkur ár liðin síðani liknandi uppskot var til viðgerðar her í løgtinginum og var tað tá felt, og hóast lomviga og álka framvegis minka ár undan ári, so hevur ynski verið um at friða, men einki er gjørt við at lóggeva.

Uppskotið miðar í móti, at snara á sjónum verður forboðin, eins og bert verður loyvt at skjóta lomviga og álku í tíðarskeiðinum 1. august til 15. mars.

Tá málið aftur verður lagt fyri tingið, so er tað við vón um, at menn duga at siggja álvaran í støðuni við minkingini av lomviga og álku.

Drúgvar greinir hava verið í bløðum um eli og aðrar orsøkir til at fuglurin minkar, og er tað óivað ein orsøkin, men eitt er givið, at tá fuglurin hevur og skal søkja bjørgini, tá megu byrsurnar hava eina stóra skyld fyri at so lítil fuglur tekur bjørgini.

Á Føroya løgtingi, 8. november 1976.

Jógvan Durhuus

1. viðgerð 10. nov., málið beint til landsstýrið, sum í samband við viðgerðini fekk tvey skriv, ávikavist av Vellbastað 1.-7.-76 og úr Skúvoy 20.-10.-76.

Carl J Beck

Vellbastaður, 1. 7. 1976.

Føroya Løgting,

Aftur í ár loyvi eg mær at flyta fram málið um **friðing av lomviganum.** Við at vísa til brøv mín til Løgtingið av 27.11.73 og 6.1.74, skal eg ikki koma nærri inn uppá at lýsa grundir út í ætir -- tað nýtist ikki, tí allir skilamenn kenna umstøðurnar. Tær hava í mong ár verið álvarsamar, hættisligar og tey seinastu árini ræðuligar. Um heilt stutt áramál verða tær hart út **óbøtandi.**

Nøkur fá dømi: Skúvoyingar rændu 1974 ca. 6.000 egg móti vanliga fyrr, 25.000-30.000. Hvørki í ár ella ífjør hava teir rænt -- deils tí tað kundi ikki loysa seg og deils fyri at eina slovninum. 20.7.72 taldi maður 2, tveir, lomvigar av báti á veg Norðdepli-Viðvík-Norðdepli í besta summarveðri. -- 7.7.74 varð á stuttleikaferð runt Hest talt 3, tríggjar, lomvigar

um Hælsleiðina inntil komið var vestur á Eggjaskorðarstakk, har av konum Hestmanni varð metl at sila um stiva helvt av ti, sum átti at verið. - Á Hælinum skeyt einsamallur maður av róðrabáti 165 lomvigar eftir einum degi og bert 3 ferðir 2 fyri skotið, men tað var í 1921! - 2. juni fár sá eg á útróðri her í fjørðinum 2, tveir, lomvigar. Bátar «stima» fram og aftur og skjóta hendingafugl - og hetta er **búfuglur.**

At skarvur ifjor varð friðaður var óivað gott, men botir ikki um lomvigastovnin.

Einasti ráðini nú at taka er **heildar(total)friðing av lomviganum.** - Friðing móti skjóting innan fyri sjómark, ræning, fleyg, snaru, net og gørn. Friðingin má galda vist, ikki ov stuft, áramál.

Fyribrigdi í náttúruni sum t.d. sjóarhiti, ið ávirkar æti- og sildamengi og hartil dálking ráða vit lítið og einki yvir, men við heildarfriðing kundu vit tó gagnað ikki sørt.

Gera vit einki, inna vit brotsgerð móti Føroya náttúru.

Við hávirðing
Carl Johan Bech

Skúvoy 20/10 - 1976.

Á h e i t a n

Frá Skúvoyingum
til háttvirda løgting Føroya!

Fyri ikki so mongum árum síðan, varð mál lagt inn á løgtingið, um lutvísa friðing av lomviganum.

Hetta mál varð lagt fyri tingið av monum, ið uttan serkunnleika lougu tá, vóru fullvísir í, at lomvigin fækkaði í tali nógv meira enn tað, ið menn vanliga kalla fyri ringt ella ring fuglaár.

Vísandi til samrøðu í summur, fyriskipaða av Útvarp Føroya, við menn úr størstu fuglaplássum í Føroyum, t.d. Skúgvi, Dímun, Fugloy, Vestmanna o.a., varð samantikið eingin ivi um, at friðing á ein ella annan háti, var einasta hálpin, ið vit nú kunnu veita lomviganum.

Síðan hesar samrøður er so tað hent, at fuglafroðingurin Andrias Reinert, við leiðbeinandi hagtølum frá fiskiramsóknarstovnni, letur okkum vita í Dimmalætting 12/10. 1976, at geldfuglurin við sínum 2 milliónum í 1970 er minkaður til 200 túsund í 1976.

Hesi harmiligu tøl siga tó ikki okkum annað enn tað, ið vit og fleiri við okkum í mong ár hava sað og óttast fyri fór at henda.

Áheitan okkara til løgtingið er tí tann, at lomvigin fær sonn søndir og hjálpandi hond, sum lundin fekk á sinni við at friða lunn á sama hátt.

Tá nú løgtingið tekur hetta mál til viðgerðar, er vón okkara, at bert hygni og skynsemi valdar. Her er ikki mest umráðandi at taka dagar ímillum ymiskar áskoðanir, um ella hvi lomvigin fækkar. Vit siggja hvonn veg tað ber, og vit skylda komandi ættarliðum, at vit veita lesum prýðuliga fugli ta hjálp, ið vit kunna.

Gorfuglurin fekk onga hjálp.

Virðisliga frá

Tummas Frank Joensen, Skúvoy — Jákup Jensen — Óli Thomsen — Jens Skipagøta — Brynning Thomsen — Clement Olsen — Meinhard Hentze — Jógvan Joensen — Franklin Midjord — Janus Jensen — Hensar Skálagarð — Poul Johan Mikkelsen — Jóannis Mikkelsen — Hans J. Hendriksen — Kjartan Hentze — Otto Skúlagarð — Magnus Højgaard — Asbjørn Valdemarson — Antines Poulsen — Mortan Poulsen — Manbjørn Tórarinson — Sigmund Brestison-Thomsen — Tórstein Brestison — Valdimar Mikkelsen — Osmund Tórarenni — Herman Mikkelsen — Anthonius Joensen — Andreas Mikkelsen — Ó. J. Hentze — Jóannes Poulsen — Hans S. Joensen — Hans M. Klode.

Verður framlagt við viðmæli.

Á tingi 8/11 — 1976.

Tórálvur Olsen
Heðin M. Klein.

16. Lán til Telefonverk Føroya Løgtings

Ár 1976, 10. nov., legði Finnbogi Isaksen, landsstýrismaður, fram sóljóðandi

Uppskot
til

løgtingslóg um lán til Telefonverk Føroya Løgtings.

§ 1.

Telefonverk Føroya Løgtings verður heimilað at taka upp neyðug lán til umskifting av gomlum lánum.

2. stk. Hendu heimild rekkur ikki longri enn til upptøku av nýggjum lánum svarandi til upphæddina av gomlu lánum telefonverksins, tikin við landskassaveðhaldi.

§ 2.

Landsstýrinum verður heimilað landskassans vegna at veðhalda fyri upptøku av teim í § 1, stk 1 nevndu lánum.

§ 3.

Hendu lóg kemur í gildi beinan vegin.

lagtingslov om lån til Telefonverk Føroya Løgtings.

§ 1.

Telefonverk Færøya Løgtings bemyndiges til optagelse af nødvendige lån til konvertering af ældre lån.

Stk. 2. Denne hjemmel gælder kun til optagelse af nye lån svarende til låneløbet af tidligere af telefonværket optagne lån, optaget med landskassegaranti.

§ 2.

Landsstyret bemyndiges til på landskassens vegne at garantere for optagelse af de i § 1, stk. 1 nævnte lån.

§ 3.

Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Lógarupptøkuskotið er evnað til við tí í huga, at táið lán verða upptikin á heimsmarknaðinum, ber ikki til at bera fram ynski um, at vit læna eina avmarkaða upphædd til ein ávísan dato, men mannagongdin er í staðin, at ein fær tilboð um at lænn til dømis 5 mill. dollars, og lánið skal takast ein ávísan dato. Tey gomlu lánini hava ávísar lántreyfir. Tey kunnu sigast

upp til ávisar tíðir, men ikki til eina og hvørja tíð. Frá tí degi konverteringslánið er tikið, og til tann dag gamla lánið verður afturgoldið, verður landskassin at veðhalda bæði fyri teim gomlu og teimum nýggju lánunum. Landsstýrið vil syrgja fyri, at í hesum millumbili er konverteringslánið bundið í peningastovni.

Telefonútgerð hevur langa livitíð — 15—35 ár — men hon er kostnaðarmikil, umleið 10.000 kr. fyri hvønn felaga. Ein partur av íløgum Telefonverksins er figgjaður við lán úr íløgugrunninum. Her er talan um lagalig, langfreistað lán, men fyri at ikki steðgur skuldi koma í landsautomatiseringina, hevur verið neyðugt at læna pening uttanlands, ið skal gjaldast aftur eftir 3—5 árum. Tað hevur alla tíðina verið greitt, at hesi lán áttu at konverterast til meira lagalig lán. Hetta hevur drigið út, men í løtuni tykjast vissir konverteringsmøguleikar at vera til staðar.

Tey lán, sum konverteringsheimildin skal umfata, eru hesi:

1. 4 mill. dollars lán, restskuld pr. 1. nov. 1976 2,8 mill. dollar. Lánið er upptikið sambært løgtingslóg nr. 56 frá 24. mai 1974.
2. 7 mill. D-marks lán, upptikið sambært løgtingslógir nr. 56 frá 24. mai 1974 og nr. 46 frá 13. mai 1975. Hetta lánið er skipað sum ein kredittur, ið fellur til gjaldingar í juli 1978.
3. Brævalán 1972/88, ið ikki er endaliga avgreitt. Upphæddin er 5 mill. kr., ið landsstýrið í fyrsta umfari hevur lagt út. Rentan er sett til 9%, so høvi til at selja hesi lánibrøv í Føroyum er neyvan til staðar. Tí átti hetta brævalánið at verið tikið við.

Neyðuga konverteringsheimildin til 1, 2 og 3 er tilsamans umleið 10 mill. kr., táið fyrivarni verður tikið fyri kursbroytingum.

Tað er greitt, at so stuttfreistað lán, sum her er talan um, nerva likviditet Telefonverksins sera álvarsliga. Hetta varð eisini nevnt í løgmansrøðunni á ólavsøku 1976, eins og tað sama er skrivað í revisiónsfrágreiðingini fyri 1975/76.

Í figgjarárinum 1976/77 verður mett, at landskassin sum veðhaldari kemur at gjalda 5—6 mill. kr. Um konverteringin verður fraud, og landsautomatiseringin verður liðug summarið 1977, verður mett, at javnvág kemur í peningaviðurskifti Telefonverksins, bæði hvat viðvíkir rakstri og figgjarútreiðslum.

Í mánunum vórðu framlagd ársroknskapur fyri 1975/76 hjá telefonverkinum.

Rakstrarroknskapur/Driftsregnskab 1. april 1975 — 31. mars 1976

Telefonfelagagjald/Abonnement		6.858.903,89
Samtalugjøld/Samtaler		9.675.049,85
Ymisk gjøld/Diverse indtægter		3.973.953,84
Søla av vørumu/Salg af varer (nota 1)		1.123.337,98
		21.631.245,56
Rakstur av stødum/Centralers drift (nota 2)	6.613.264,98	
Rakstur av linjudeildum/ Kabelafdelingers drift	3.045.332,40	9.658.597,38
		11.972.648,18
Stjórnarútreiðslur/Administrationsudgifter (nota 3)		1.702.667,52
		10.269.980,66
Rentur/Renter	7.746.071,82	
Byggirentur, fluttur til anlegg/ Byggerenter, overført til anlæg	2.000.000,00	5.746.071,82
		4.523.908,84
Avskrivingar/Afskrivninger (nota 4)		3.995.065,48
Úrslit/Resultat		528.843,36

Figgjarstøða/Status pr. 31. mars 1976

Aktiv/Aktiver	
Kassapeningur og innistandandi í peningastovnum/ Kontante midler	76.128,63
Skuldarar/Debitorer	6.668.801,75
Vørugoymsla/Varelager (nota 5)	5.434.218,34
Umferðarogn/Omsætningsaktiver	12.179.149,32
Stødisogn/Anlægsaktiver (nota 4)	79.574.705,97
falt	91.753.855,29

Passiv/Passiver

Bankaskuld/Bankgæld	5.492.308,47
Forútgoldið telefonfelagagjald/Forudbetalt abonnement	1.738.796,75
Ognarar/Kreditorer	3.857.402,94
Millumrokning við P & T/Mellemværende med P & T	1.883.966,05
Landskassin/Landskassen	852.834,92
Stuttfreistað skuld/Kortfristet gæld	13.825.309,03
Langfreistað skuld/Langfristet gæld (nota 6)	71.102.355,51
Samlað skuld/Gæld ialt	84.927.664,54
Eginpeningur/Egenkapital (nota 7)	6.826.190,75
Ialt	91.753.855,29

Tórshavn, tann 18. juni 1976

Sólbjørn Jacobsen
stjóri/direktør

/Ernst Hansen
bókhaldari/bogholder

Frammanfyristandandi roknskap, sum samsvarar við bókføring Telefonverksins, hava vit reviderað. Serlig frágreiðing dagfest idag er send Føroya Landsstýri./

Foranstående regnskab, som er i overensstemmelse med Telefonværkets bogføring, har vi revideret. Særlig beretning dateret idag er tilsendt Foroya Landsstýri.

Tórshavn, tann 21. juni 1976

Pauli Ellefsen
statsaut. revisor

/Henry Steingrund

Nota 1 Søla av vørum/Salg af varer

Søla/salg		5.287.209,20
÷ Keyp/Køb	6.434.585,55	
Goymsla/Varelager 1/4-1975	2.901.510,63	
	9.336.096,18	
÷ Goymsla/Varelager 31/3-1976	5.434.218,94	3.901.877,24

		1.385.331,96
Lønir/Lønninger	211.587,96	
Aðrar útreiðslur/Andre udgifter	50.406,02	261.993,98
Dækningsavlop/Dækningsbidrag		1.123.337,98

Nota 2 Rakstur av støðum/Centralers drift

Lønir/Lønninger	4.891.493,66
EDV-service/EDB-service	411.367,26
Aðrar útreiðslur/Andre udgifter	1.575.639,10
	6.881.500,02
Endurgoldið av P & T/Refunderet fra P & T	268.235,04
falt	6.613.264,98

Nota 3 Stjórnarútreiðslur/Administrationsudgifter

Lønir og eftirlønir/Lønninger og pensioner	801.255,92
Frítíðarløn/Ferieløn	404.052,24
EDV-service/EDB-service	252.683,00
Aðrar útreiðslur/Andre udgifter	244.676,36
falt	1.702.667,52

Nota 4 Avskrivingar/Afskrivninger

Avskrivingar eru gjørdar við hesum procentsatsum av upprunavirðinum / Afskrivninger er foretaget med følgende procentsatser af oprindelig værdi.

	%	Avskriving/ Afskrivning	Bókað virði/ Bogført værdi
Støðir/Centraler	4	762.810,15	17.331.913,36
Radiostøðir/Radiocentraler	6¾	854.478,15	11.805.097,58
Káplar/Kabler	5	2.154.205,23	41.932.648,53
Búnyttur/Inventar m.v.	20	102.692,91	320.434,90
Motorakfør/Bilar m.v.	20	42.924,55	452.701,14
Bygningar/Bygninger	1	77.954,49	7.731.910,46
falt		3.995.065,48	79.574.705,97

Nota 5 Vørugoymsla/Varelager

Vørugoymslan er upplikin til kostprísin roknaður út frá seinasta innkeypi av viðkomandi vøruslagi/

Varelageret er optaget til kostprisen beregnet på grundlag af sidst foretagne indkøb af pågældende vareart.

Nota 6 Langfreistað skuld/Langfristet gæld

Føroya Sparikassi	38.304,72
fleggingargrunnurin, 6 ymisk lán/	
6 forskellige lån	17.903.333,29
Bátagrunnur Føroya	90.000,00
Brævalán/Obligations-lån	8.155.000,00
Uttanlandalán/Udlandslån	
D.M.	11.000.000,00
D.M.	16.208.517,50
U.S. dollars	17.707.200,00
falt	71.102.355,51

Staðfest kurstap ella -vinningur verður bókað á rentukonto tá goldið verður./Realiseret kurstab eller -gevinst bliver bogført på rentekonto når betaling finder sted.

Nota 7 Eginpeningur/Egenkapital

Saldo 1. april 1976	6.297.347,36
Úrslit/Resultat 1975/76	528.843,37
falt	6.826.190,75

Føroya Landsstýri
3800 Tórshavn

Vit hava reviderað ársroknskap Telefonverksins fyri 1975/76.

Vit hava gjøgnumgingið bókføringina, skjalatilfarið og mannagongdirnar innanhýsis í tann mun, sum vit halda vera neyðugt fyri at reviderað ársroknskapin.

Sum eitt lið í revisiónini hava vit uttan at boða frá frammanundan avstemnað kassabeholdning og millumverandir við peningastovnar v.m. Hetta er gjørt tann 11. august 1976.

Revisiónin hevur ikki fevnt um serlig tiltøk við tí endamáli at avdúkað falsan ella onnur misbrot. Bert í føruni har revisiónin gevur úrslit sum benda á, at nakað óregluligt er farið fram, verður revisiónin víðkað fyri at fáa greiðu á illgrunanum.

Revisiónin av rakstrarrokuskapinum hevur millum annað fevnt um eina analýsu av upphæddum í rakstrarrokuskapinum, og eina sambering av hesum upphæddum í rakstrarrokuskapinum fyri árið frammanundan.

Revisiónin av figgjarstøðuni fevnir um, sambært góðan revisiónsskikk, at fáa samuføring um, at tey í rakstrarrokuskapinum uppførdu aktiv eru til staðar, og at virðismetan og ognarviðurskiftini eru í lagi. Revisiónin fevnir eisini um at ansa eftir, at tær skyldur og ábyrgdir, sum liggja á Telefonverkinum eru rætt lýstar í rokuskapinum.

Rakstrarrokuskapurin fyri 1975/76 vísir eitt yvirskot uppá kr. 528.843,36 móti einum halli uppá kr. 789.000,29 í 1974/75.

Tá nett verður um vøksturin í úrslitinum uppá kr. 1.317.843,65 skal ein hava í huga at yvirskar principbroytingar eru gjørdar viðvíkjandi uppgerðini av rokuskaparúrslitinum.

Í 1975/76 eru rentir uppá kr. 2.000.000 fluttar til anlegg og aktiveraðar. Av hesum er rokuskaparúrslitið vorðið betur enn það annars hevði verið.

Hin vegin eru ongar umsitingarútreiðslur aktiveraðar undir anleggum í 1975/76. Í 1974/75 vóru umleið kr. 712.000,00 fluttar til anlegg.

Avskrivingarreglurnar eru annarleiðis fyri 1975/76 enn fyri undanfarnu ár. Nú verður avskrivað eftir ávisum procentsatsum sum nokkurlunda samsvarar við tær reglur sum dansku telefonverkini nýta. Avskrivingar falt eru kr. 1.457.667,30 størri enn fyri 1974/75, men hevdu verið enn størri um sonnu avskrivingarreglur høvdu verið nýttar í 1975/76 sum fyri undanfarnu ár.

Inntøkur og útreiðslur hava (í heilum túsund krónum) verið hesar fyri høvuðsdeildirnar samanliknað við 1974/75.

Inntøkur:	1974/75	1975/76	Vøkstur
Telefonfelagagjald	4.166	6.859	2.693
Samtalugjald	8.124	9.675	1.551
Ymisk gjøld	1.623	3.974	2.351
Ymiskt	86		+ 86
Vørusøla (bruttovinningur)	219	1.123	904
	14.218	21.631	7.413

Útreiðslur:			
Rakstur av støðum	4.352	6.613	2.261
Rakstur av linjudeildum	1.638	3.045	1.407
Stjórnarútreiðslur	2.403	1.703	+ 700
Undirdekningur av fordeildum lønum	13	—	+ 13
	8.406	11.361	2.955
Úrslit áðrenn rentur og avskrivingar	5.812	10.270	4.458
Rentur	4.064	5.746	1.682
Avskrivingar	2.537	3.995	1.458
Úrslit	+ 789	529	1.318

Aktiv:	1974/75	1975/76	Vøkstur
Kassa- og bankapeningur	182	76	+ 106
Debetorar	5.006	6.669	1.663
Vørugoymsla	2.902	5.434	2.532
Centralar	15.788	17.332	1.544
Radiostøðir	9.991	11.805	1.814
Káplar	35.607	41.933	6.326
Búnyttur	484	320	+ 164
Motorakfør	207	453	246
Byggningar	5.968	7.732	1.764
	76.135	91.754	15.619

Passiv:

Bankaskuld	878	5.492	4.614
Forútgoldið telefonfelagagjald	- -	1.739	1.739
Skyldugur feriupeningur	296	269	÷ 27
Kreditorar	2.917	3.589	672
Millumrokning við P & T	46	1.884	1.838
Landskassin útlagt	5.074	853	÷ 4.221
Lán	61.261	71.102	9.841
Eginpeningur	5.663	6.826	1.163
	76.135	91.754	15.619

Vørusøla kr. 1.123.337,98
samanboriið við 1974/75 vísir eina øking í bruttovinninginum uppá 904 t.kr. og kemur hetta av at bæði innløkur og útreiðslur eru minni ávíkavist 81 t.kr. og 985 t.kr. Vørugoymslan er uppfiki til seinast kenda kostpris. Vit hava ikki eftirkannað vørugoymslurna.

Skuldarar kr. 6.668.801,75 kunnu sundurgreinast soleiðis:

Eftirstøður fyri telefonfelagar	5.515.423,98
Klaksvíkar kommuna	21.696,32
Post og Telegrafvæsenet	279.162,40
Landssjúkrahúsið	30.471,81
Flyvestation Thorshavn	34.001,23
Føroya Landsstýri - radioóljið	88.142,37
Føroya Banki	211.325,00
Skálabúðin	14.975,00
Landsverkfræðingurin	49.028,00
Tórshavnar kommuna	79.235,77
Hotel Hafnia	51.555,65
Marinestationen	13.703,31
Debitorar til incasso	17.023,90
Aðrir debetorar undir 10.000,00	262.967,01
	6.668.801,75

Vøksturin í samlaðu debitorunum í mun til 1974/75 stavar fyrst og fremst frá at forútgoldið telefonfelagagjald tá var mótroknað í hesi upphædd, men í 1975/76 er vist sum serlig roknskaparupplædd.

Støðisognir kr. 79.574.705,87

Tilgongdin í 1975/76 kr. 15.524.293,80 kann sundurgreinast soleiðis:

Centralanlegg	3.296.939,14
Radiostøðir	1.904.145,32
B. F. støðir	764.240,27
Kaðaldeildin	7.489.384,61
Búnyttur	34.006,92
Motorakfør	193.618,98
Bygningar	1.841.958,56
	15.524.293,80

Forútgoldið telefonfelagagjald, kr. 1.738.796,75
var í 1974/75 mótroknað í roknskaparupphæddini skuldarar.

Kreditorar kr. 3.857.402,94 kunnu sundurgreinas soleiðis:

Jysk Kabel		330.521,26
L. M. Ericsson, loypandi konto	947.755,74	
kontraktleverancir	1.980.056,02	2.927.811,76
Útvarp Føroya		133.957,11
Chr. Rovsing A/S		48.000,00
P/F Data		55.286,05
A/S Elektrisk Bureau		16.792,57
H. Richard Petersen		32.310,70
Óinnloyst brævaláusbrøv		60.000,00
Skyldugur feriupeningur		268.807,44
Aðrir undir 10.000,00		34.795,75

Kreditorar við debetsaldo:

Automatic	115,00	
Finax	6.387,00	
Generaldirektoratet for Post og Telegrafvæsenet	43.546,70	
Granger Associates LTD.	831,00	50.879,70
		3.857.402,94

Langfreista skuld kr. 71.102.355,51 sí skjal

Nevnast skal at Landsstýrið liggur inni við brævalánsbrøvum Telefonverk Føroya Løgtings 1972 uppá kr. 5.000.000,00. Hetta brævalánið verður ikki avdrigið, men verða bert rentur roknaðar. Heitt verður lí á Landsstýrið og Telefonverkið, um at fáa eina avdráttarskipan í lag hesum viðvíkjandi.

Íløgur Telefonverksins vóru í 1975/76 í støðisognir 15.524 t.kr. (sí frammanfyri) og í vørugoymslu 2.532 t.kr. ella ialt 18.056 t.kr.

Hesar íløgur eru figgjaðar soleiðis:

Minking í kassa- og bankapeningi			106
Forútgoldið telefonfelagagjald			1.739
Bankaskuld			4.614
Kreditorar og onnur stuttfreista skuld	÷	1.738	
Øking í debitorum	÷	1.663	÷ 3.401
Lán			9.841
Avskrivingar			3.995
Rakstraravlop			528
Flutt til kapitalkonto			634
			18.056

Sum tað eisini hevur framgingið av roknskapinum og revisiónsfrágreiðingunum fyri undanfarnu ár er likviditeturin hjá telefonverknum ov vánaligur.

Vit eru samdir við leiðslu telefonverksins og við landsstýrinnu í at tað er avgjørt neyðugt at fáa til vega eina meira rímuliga og meira landfreistaða figgjan av samlaðu íløgum telefonverksins ístaðin fyri meginpartin av teimum lánum sum núverandi figgjan fevnir um.

Sí skjal aftanfyri.

Stjórin og bókhaldarin hava váttað at ongar skyldur hvíla á telefonverkinum útyvir tær sum vístar eru í ársroknskapinum.

Roknskapurin hevur fingið hesa átekning:

«Frammanfyristandandi roknskap, sum samsvarar við bókføring Telefonverksins, hava vit reviderað. Serlig frágreiðing dagfest í dag er send Føroya Landsstýri.»

Sambært kunngerð handilsmálaráðsins av 6. apríl 1933 og 28. juni 1967 skal eg váttta, at eg lúki tær av lóggávuni fastsettu habilitetstreytir, at eg undir revisiónini havi fingið allar teir upplýsingar, ið eg havi biðið um til sannføring um rætttleikan av roknskapinum, og at eg haldi roknskapin vera avgreiddan sambært roknskapar- og revisiónsreglurnar í lóggávu og viðtøkum.

Tórshavn, tann 21. juni 1976

Pauli Ellefsen
statsaut.revisor

Yvirlit yvir lán Telefonverk Føroya Løgtings pr. 31. mars 1976

Lánistovnar	Upptikið	Term. ialt	Afturgoldið	Stadt í 1000 kr.	Renta í %	Avdrag hvørt term.	Restlán
Brævlán 1968/84	1/10-68	15	1/04-83	1.000	10,0	70.000,00	535.000,00
Brævlán 1966/81	1/11-66	15	1/01-81	2.050	8,0	137.000,00	820.000,00
Brævlán 1969/85	28/11-69	15	1/12-84	3.000	10,0	200.000,00	1.800.000,00
Brævlán 1972/88	19/12-72	15	1/12-88	5.000	9,0	333.333,33	5.000.000,00
Høgugrunnurin L.K. 80	1/07-66	30	11/06-83	1.850	6,5	61.666,67	924.999,95
Høgugrunnurin L.K. 81		30	11/06-87	1.600	6,5	53.333,33	1.173.333,32
Høgugrunnurin L.K. 82	24/06-71	30	11/12-87	7.600	6,5	253.333,33	6.080.000,02
Høgugrunnurin L.K. 84	24/06-71	30	11/06-85	1.750	6,5	58.333,33	1.225.000,03
Høgugrunnurin L.K. 85	1/04-73	30	11/12-88	5.000	6,5	166.666,67	3.999.999,98
Høgugrunnurin L.K. 86	1/04-74	30	11/12-89	5.000	6,5	166.666,67	4.499.999,99
Føroya Sparikassi	4/11-57	40	11/06-77	200	10,0	5.000,00	38.304,68
Báagrunnurin Føroya	22/10-68	20	11/12-78	300	8,5	15.000,00	90.000,00
Sweitz lán	1/06-73	2	15/05-78	11.000	var.	5.500.000,00	11.000.000,00
U.S.A. lán	11/02-75	10	11/02-80	22.134	var.	2.213.000,00	17.707.200,00
D.M. lán	30/06-75	1	30/06-78	16.209	10,7	16.209.000,00	16.208.517,50
							71.102.355,47

Telefonverk Føroya Løgtings
EH/SJ

3800 Tórshavn, 26. juli 1976

Føroya Landsstýri 3800 Tórshavn

Peningatørvur telefonverksins.

Í skrivi til landsstýri dagfest 4/2 1976 varð gjørd ein fyribils metan av kapitaltørvi telefonverksins. Í skrivinum stendur, at í 1976/77 verður eitt kapitalhall upp á 5 mill. kr.

Nú er ein tíð fráliðin og rokuskapurin fyri 1975/76 er liðugur eins og tøl fyri fyrstu tveir mánaðarnar, april-mei, fyri fíggjarárið 1976/77 eru fingin til vega.

Útfrá hesum tilfari er niðurstøðan tann, at kapitalhallið verður umleið 6 mill. kr.

Telefonverkið hevur ikki heimild at fíggja hesar 6 mill. kr. við lántøku, tí verður landskassin at gjalda upphæddina um ikki aðrir útvegir finnast. Finansieringstrupulleikin hjá telefonverkinum stendst íser av, at meginparturin av íløgunum eru fíggjaðar við stuttfreistaðum útlendskum lánum. Rentan av hesum lánum er umleið 10% p.a. umframt kurstap. Um allar íløgurnar høvdu verið fíggjaðar av íleggingargrunnínum so var støðan heilt øðrvísi. So var likviditetsjavnvág.

Í øllum skrivum til landsstýrið viðv. íløgum og heimild til uppløku av lánum er dentur lagdur á, at fortreytin fyri fíggjarligari javnvág er, at skipað verður fyri lagaligum longfreistaðum lánum. Hetta er trupult, men neyðugt.

Niðurstøðan av metingunum er, at kapitaltørvurin verður:

	1976/77	1977/78	1978/79
Fíggjan av íløgum	6 mill.	4 mill.	2 mill.
Konvertering av lánum	0 mill.	6 mill.	23 mill.
Kapitaltørvur	6 mill.	10 mill.	25 mill.

Kapitaltørvur tilsamans 1976 - - 1979: 41 mill. kr.

I fíggjarárinum 1976/77 er ikki goldnar rentir av avdráttir av lánum telefonverksins hesir:

Juni 1976	1.343.405,—
August 1976	3.530.000,—
November 1976	582.600,—
Desember 1976	2.408.592,—
Januar 1977	850.000,—
Februar 1977	3.750.000,—
Tilsaman	12.464.597,—

Likviditetsætlan fyri 1976 — 1979, konvertering av lánum innframl:

Kapitalfrágongd:	1976/77	1977/78	1978/79
Koslnaður	12,5 mill.	13,0 mill.	13,0 mill.
Rentir	6,5 mill.	8,0 mill.	8,0 mill.
Avdráttir	6,0 mill.	6,0 mill.	6,0 mill.
fløga, sí viðm. *)	12,0 mill.	5,0 mill.	6,0 mill.
Minking av kreditorum	2,0 mill.	0 mill.	0 mill.
Tilsamans	39,0 mill.	32,0 mill.	32,0 mill.
Kapitaltilgongd:			
Inntøkur	25,5 mill.	28,0 mill.	30,0 mill.
Minkan av goymslu	4,5 mill.	0 mill.	0 mill.
Minkan av debitorum	3,0 mill.	0 mill.	0 mill.
Tilsamans	33,0 mill.	28,0 mill.	30,0 mill
Kapitalhall	6,0 mill.	4,0 mill.	2,0 mill.

*) Viðmerking: Nýggja automatstøðin í Havn er ikki við í hesum íloguto lum.

Konvertering av lánum.

Konverteringstørvurin er 6 mill. kr. í 1977/78 og 23 mill. kr. í 1978/79. Her er talan um tvey lán í týskum markum. Tað eina forfellur til gjald-

ingar við 6 mill. kr. í mei 1977 og 6 mill. kr. í mei 1978. Hitt forfellur í einum við 17 mill. kr. í juni 1978. Tað má takast fyrivarni viðvíkjandi kursbroytingum.

Likviditeturin í 1976/77.

Samb. frammanfyri frágreitt verður eitt likviditetshall uppá tilsaman o.u. 6 mill. kr. í 1976/77.

Í meðal eru mettu inntøkurnar fyri restina av figgjarárinum 2,2 mill. kr. um mánan. Mettar upphæddir at gjalda um mánaðan eru:

Rakstur	1.100.000,--
Iløga, lønir	350.000,--
Iløga, aðrar útreiðslur	150.000, -
Minking av kreditorum	200.000,—
Til rentir og avdráttir	400.000,
Tilsaman	2.200.000,- -

Umfram vanligu inntøkurnar verður ein kapitaltilgongd í januar, februar og mars 1977 uppá tilsamans 3 mill. kr., ið verður at stava frá eini umlegging av telefonfelagarokniskapinum.

Metingarnar í hesi frágreiðing umfata bert trý ár, men í samband við eini langfreistaðari figgjarætlan er neyðugt at gera eina 5- og 10-ára figgjarmetan. Til dømis kann nevnast, at longu í februar 1980 er eitt 4 mill. dollar lán fult afturgoldið. Rentir og avdráttir av hesum láni eru í løtuni umleið 6,5 mill. kr. um árið og eru sostatt ein týðandi partur av kapitalútreiðslum telefonverksins.

Í samband við tær upphæddir, ið landsstýrið verður at gjalda, so fer telefonverkið í hvørjum einstøkum føri skrivliga at boða landsstýrinum frá.

Við hávirðing
S. Jacobsen

1. viðgerð 17. nov., málið beint í figgjarnevndina, ið 23. november legði fram soljóðandi

Álit

Málið varð lagt fram av landsstýrinum tann 10. november 1976 og undir 1. viðgerð tann 17. november 1976 beint í fíggjarnevndina.

Eftir § 1 í lógaruppskotinum verður Telefonverki Føroya Løgtings heimilað at taka upp neyðug lán til umskiftling av gomlum lánum. Henda heimild skal ikki røkka longri enn til upptøku av nýggjum lánum svarandi til upphæddina av gomlu lánum telefonverksins, tikin við landskassaveðhaldi.

Eftir § 2 verður landsstýrinum heimilað landskassans vegna at veðhalda fyri upptøku av nevndu lánum.

Landsstýrið upplýsir, at konverteringsheimildin er fyri umleið 40 mill. kr. við fyrivarni fyri kurshroyting.

Utanlands lánini hjá telefonverkinum eru stutt, 3–5 ár, og er tí neyðugt at konvertera.

Ein meirilutí í fíggjarnevndini (Hákun Djurhuus, Poul Jacob Olsen, Hilmar Beck, Pauli Ellefsen og Hilmar Kass) er av teirri áskoðan, at fíggjarnevndin skal veita góðkenning, áðrenn veðhald verður givið fyri avvarðandi láni.

Minnilutin (Jógvan Durhuus og Signar Hansen) tekur undir við uppskotinum frá landsstýrinum.

Sostatt setur meirilutin fram soljóðandi

broytingaruppskot

§ 2 verður orðað soleiðis:	§ 2 får følgende ordlyd:
«Landsstýrinum verður heimilað eftir góðkenning frá fíggjarnevndini landskassans vegna at veðhalda fyri upptøku av teim í § 1, stk. 1 nevndu lánum.»	«Landsstyret bemyndiges til efter godkendelse fra finansudvalget på landskassens vegne at garantere for optagelse af de i § 1, stk. 1 nævnte lån.»

2. viðgerð 24. november.

3. viðgerð 24. november.

Uppskot landsstýrisins samlykt við broyting til gr. 2 frá meirilutanum í fíggjarnevndini við 20–0.

17. Kgl. fyriskipan um fiskimarkið undir Føroyum

Ár 1976, 15. desember, legði Alli Dam, løgmaður, fram

Uppskot
til
samtyktar.

Løgtingið samtykkir viðlagda uppskot frá forsætisráðharradeildini dagfest november 1976 um kongiliga fyriskipan um «fiskeriterritoriet ved Færøerne».

Viðmerkingar:

Í hesi løgtingssetu, jbr. løgtingsmál nr. 2/1976, hevur løgtingið samtykt, at fiskimarkið undir Føroyum verður 200 fjórðingar; er fjarstøðan til fremmant land minni enn 400 fjórðingar, verður fiskimarkið tó sett eftir eini miðlinju, um ikki serstøk avtala er gjørd markinum viðvikjandi. Eisini varð samtykt at heita á landsstýrið um at samráðast við ríkisstýrið at fremja útflytingina av fiskimarkinum í seinasta lagi 1. januar 1977.

Samráðingar hava verið millum landsstýrið og ríkisstýrið.

Í uppskoti til lóg um «Danmarks riges fiskeriterritorium», sum fólkatingið hevur til viðgerðar, stendur í § 1, 3. stk.: «Nærmere regler om afgrænsningen af fiskeriterritoriet ved Færøerne fastsættes veg kgl. anordning.» Upplýst er, at lógin fær 2. og 3. viðgerð í hesi viku, og at hon eisini verður staðfest í vikuni.

Sum tað framgongur av uppskotinum til kongiligu fyriskipanina samanhildin við løgtingslógina um fiskiveiðu á landleiðini, eru nakrar tekniskar smábrotingar gjørdar í ásetingini av støðunum, sum grundlinjurnar verða drignar millum, eisini er talið av støðum lækkað úr 13 niður í 12. Broytingarnar eru gjørdar av «Farvandsdirektoratet» og verða eisini at nýta í broytingini av kongligari fyriskipan um «afgrænsning af søterritoriet ved Færøerne.»

Í øðrum máli í hesi løgtingssetu setur landsstýrið fram uppskot um fyribilsreglur um fiskiveiðu á landleiðini.

Viðlagt uppskot til kongiliga fyriskipan.

F.L. j. nr. 1500-7-3

November 1976

Anordning om fiskeriterritoriet ved Færøerne.

VI MARGRETHE DEN ANDEN, af Guds Nåde Danmarks Dronning, gør vitterligt:

I medfør af § 1, stk. 3, i lov nr. af 1976 om Danmarks riges fiskeriterritorium fastsættes:

§ 1. Fiskeriterritoriet ved Færøerne omfatter, foruden de indre farvande, et farvandsområde, der afgrænses af en linie (fiskerigrænse), som forløber i en afstand af 200 sømil (1 sømil = 1852 meter) fra de i § 2 nævnte basislinier.

Stk. 2. Hvor Islands, Norges og Storbritanniens kyster ligger overfor Færøerne i en afstand af mindre end 400 sømil, forløber afgrænsningen af fiskeriterritoriet, sålænge særlig aftale herom ikke er truffet, efter den linie, der overalt ligger lige langt fra de nærmeste punkter på basislinierne ved de pågældende kyster (midtlinien).

§ 2. De rette basislinier, som i henhold til § 1 lægges til grund ved beregningen af fiskerigrænsen, drages mellem følgende punkter (lavvandsmærket ved middelspringtid) i den angivne rækkefølge:

Punkt 1.	Tørt skær sydvest for øgruppen Munken	61°	20′	19″	306 N
		6	40	06	790 W
Punkt 2.	Vestligste punkt af øen Knopur ved Famara	61°	28′	34″	772 N
		6	52	18	834 W
Punkt 3.	Vestligste punkt af ø vest for Myggenæs fyr	62°	05′	46″	439 N
		7	41	25	623 W
Punkt 4.	Nordvestligste punkt af ø nordvest for Myggenæs fyr	62°	05′	52″	783 N
		7	41	12	936 W
Punkt 5.	Nordvestligste punkt af ø nordvest for Mýling	62°	18′	19″	856 N
		7	12	59	109 W
Punkt 6.	Nordvestligste punkt af Kalsfles nord for Kadlur	62°	22′	26″	968 N
		6	48	18	806 W
Punkt 7.	Tørt skær nord for Ennibergø	62°	23′	49″	299 N
		6	33	38	438 W

Punkt 8. Skopari pynt ved Nordbjerg på Fugløø ..	62° 21′ 16″ 163 N 6 17 59 058 W	
Punkt 9. Nordøstligste punkt af Fugløø	62° 20′ 40″ 637 N 6 15 16 003 W	
Punkt 10. Østligste punkt af Bispen øst for Fugløø..	62° 20′ 27″ 398 N 6 13 00 521 W	
Punkt 11. Østligste punkt af øgruppen Munken ..	61° 20′ 30″ 124 N 6 39 30 108 W	
Punkt 12. Sydligste punkt af Storefles i øgruppen Munken	61° 20′ 26″ 953 N 6 39 33 711 W	

Punkternes koordinater refererer sig til European Datum (1. revision 1950).

§ 3. Anordningen træder i kraft den 1. januar 1977.

Stk 2. Anordning nr. 29 af 27. februar 1903 som ændret ved anordning nr. 129 af 18. marts 1976 ophæves.

1. viðgerð 16. desember, málið beint í marknaðarnevndina, ið 16. desember legði fram soljóðandi

Álit

Málið varð lagt fram av landsstýrinum tann 15. december 1976 og undir 1. viðgerð tann 16. december 1976 beint í marknaðarnevndina.

Marknaðarnevndin tekur einmælt undir við uppskoti landsstýrisins.

2. viðgerð 17. desember.

Uppskot landsstýrisins samtykt við 23—0 atkvøðum.

18. Lóggávan um fiskiveiðu á landleiðini

Ár 1976, 15. desember, legði Petur Reinert, landsstýrismaður, fram

Uppskot
til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um fiskiveiðu á landleiðini.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 12 frá 10. mars 1964 um fiskiveiðu á landleiðini verður gjørd henda broyting:

§ 1 verður orðað soleiðis:

Landleiðin er sjógvurin innanfyri linju, sum gongur 200 fjórðingar (1 fjórðingur = 1852 metrar) frá beinum grundlinjum, drignar gjøgnum hesi 12 støðini í tilskilaðu raðfylgjuni:

lagtingslov om ændring i lagtingslov om fiskeri på fiskeriterritoriet.

§ 1.

I lagtingslov nr. 12 af 10. marts 1964 om fiskeri på fiskeriterritoriet foretages følgende ændring:

§ 1 formuleres således:

Fiskeriterritoriet er farvandet indenfor en linje 200 sømil (1 sømil = 1852 meter) fra lige basislinier, der trækkes mellem følgende 12 punkter i den angivne rækkefølge:

1. Sker í útsymning úr Munkinum Tøet skær sydvest for øgruppen Munken	61° 20′ 19″ 306 N, 6° 46′ 06″ 790 W
2. Vestari endi á Knúpi út fyri Fánnara Vestligste punkt af øen Knopur ved Fannara	61° 28′ 34″ 772 N, 6° 52′ 18″ 334 W
3. Veslasta skerið út fyri Mikines vita Vestligste punkt af ø vest for Myggenæs fyr	62° 05′ 46″ 439 N, 7° 41′ 24″ 623 W
4. Útnyrðingsendi á skeri í útnyrðing úr Mikines vila Nordvestligste punkt af ø nordvest for Myggenæs fyr	62° 05′ 52″ 783 N, 7° 41′ 12″ 936 W
5. Útnyrðingsendi á skeri í útnyrðing úr Mýlingi (Skeiðið)	62° 18′ 19″ 856 N, 7° 12′ 59″ 409 W

F.L. j. nr. 1500-1-7-3.

Nordvestligste punkt af o nordvest for Myling	
6. Útnyrðingsendi á Kallsfles norður úr Kalli Nordvestligste punkt af Kalsfles nord for Kadlur	62° 22′ 26″ 968 N, 6° 48′ 18″ 806 W
7. Sker norður úr Emnibergi Tørt skær nord for Emniberg	62° 23′ 49″ 299 N, 6° 33′ 38″ 438 W
8. Skoparin undir Norðbergi á Fugloynni Skopari pynt ved Nordbjerg på Fugløy	62° 21′ 16″ 163 N, 6° 17′ 59″ 058 W
9. Landnyrðingshornið á Fugloynni Nordøstligste punkt af Fugløy	62° 20′ 40″ 637 N, 6° 15′ 16″ 063 W
10. Eystasta hornið á Bispinum eystan fyri Fugloynna Østligste punkt af Bispen øst for Fugløy	62° 20′ 27″ 398 N, 6° 15′ 00″ 521 W
11. Eystasti endi á Munka-flesjunum Østligste punkt af øgruppen Munken	61° 20′ 30″ 124 N, 6° 39′ 30″ 108 W
12. Sunnasti endi á Stórufles við Munkin Sydligste punkt af Storefles i øgruppen Munken	61° 20′ 26″ 953 N, 6° 39′ 33″ 711 W

Koordinatini frammanfyri vísa til European Datum (1. revision 1950).

2. stk. Har minni enn 400 tjóðingar eru úr strondum Føroya til strendur Íslands, Noregs og Stórabretlands, verður fiskimarkið, um serstøk avtala ikki er gjørd, avmarkað eftir tí linju, ið allastaðni liggur eins langt frá næsta punkti á grundlinjunum við nevndu strendur (miðlinjan).

Koordinaterne foran refererer sig til European Datum (1. revision 1950).

Stk. 2. Hvor afstanden er mindre end 400 sømil fra Færøerne til Islands, Norges, og Storbritanniens kyster, forløber afgrænsningen af fiskeriterritoriet, så længe særlig aftale herom ikke er truffet, efter den linie, der overalt ligger lige langt fra de nærmeste punkter på basislinierne ved de pågældende kyster (midtlinien).

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi 1. janúar 1977.

§ 2.

Denne lov træder i kraft 1. januar 1977.

II

Uppskot til

løgtingslóg um ávísar fyribils heimildir til landsstýrið í samband við fiskimarksútflytingina.

lagtingslov om visse midlertidige bemyndigelseer til landsstyret i forbindelse med udvidelsen af fiskeriterritoriet.

§ 1.

Í sambandi við útflytingina av fiskimarkinum verður landsstýrið fyri tann partin av landleiðini, ið liggur uttanfyri 12 fjórðingar frá grundlinjunum, heimilað við kunngerð, serloyvi ella á annan tílíkan hátt at gera undantak frá hesum reglum í løgtingslóg nr. 12 frá 10. mars 1964 um fiskiveiðu á landleiðini:

1. Frá forboðnum í § 2 um vinnuligan fiskiskap frá fiskiførum, sum hava heimstað og eru skrásett í fremmandum landi og fremmandum ríkisborgarum. Undantak kann bert veitast eftir samráð við løgtingsins marknaðarnevnd.
2. Frá forboðnum í § 3 um veiðu við troli, skovlváð og snurriváð. Undantak kann bert veitast eftir samráð við løgtingsins fiskivinnunevnd.

§ 2.

Í kunngerðum, serloyvum o.l., sum givin verða við heimild í lógini, kann bót verða lagd á fyri brot móti ásetanum í kunngerðum ella treytum í loyvum o.l.

§ 1.

I forbindelse med udvidelsen af fiskeriterritoriet bemyndiges landsstyret for den del af fiskeriterritoriet, der ligger udenfor 12 sømil fra basislinierne til ved bekendtgørelse, dispensation eller på anden lignende måde at gøre undtagelse fra følgende bestemmelser i lagtingslov nr. 12 af 10. marts 1964 om fiskeri på fiskeriterritoriet:

1. Fra forbudet i § 2 om erhvervsmæssigt fiskeri fra fiskerfartøjer hjemmehørende og registreret i en fremmed stat og fremmede statsborgere. Undtagelse kan kun gøres efter samråd med lagtingets markedsudvalg.
2. Fra forbudet i § 3 om fiskeri med trawl, skovlvad og snurrevåd. Undtagelse kan kun gøres efter samråd med lagtingets fiskeriudvalg.

§ 2.

I bekendtgørelser, dispensationer o. lign., der udstedes i henhold til loven, kan der fastsættes straf af bøder for overtrædelser af bestemmelser i bekendtgørelser eller betingelser i dispensationer o. lign.

§ 3.

Henda lóg kemur í gildi 1. januar 1977 og verður at leggja fyri løgtingið til endurskoðan seinast 1. december 1977.

§ 3.

Denne lov træder i kraft 1. januar 1977, loven forelægges lagtinget til revision senest 1. december 1977.

Viðmerkingar:

Fiskimarksútflytingin 1. januar 1977 hevur við óbroyttari lóggávu við sær, at ikki er loyvt fiskiførum, sum hava heimstað og eru skrásett í fremmandum landi, og fremmandum ríkisborgarum at rokja vinnuligan fiskiskap yvirhøvur á víðkaðu landleiðini. Eisini ger tað generella forboðið móti veiðu við troli, skovlváð og snurriváð, at ikki er loyvt fiskiførum skrásett í Føroyum at veiða við hesum reiðskapi innanfyri nýggju fiskimarkið.

Í hvussu so er í eini tilaðingarlíð, til fiskivinnan hevur lagað seg eftir broyttu fiskimøguleikunum, er áhugi at varðveita veiðumøguleikar á gomlu veiðuleiðunum og hinvegin hava fremmandir fiskimenn áhuga fyri at halda fram undir Føroyum. Samráðingar hava tí verið og verða við ymisk lond, Danmark, Grønland, Felagsmarknaðin, Noreg, Ísland, Kanadu og onnur, um føroyskan fiskiskap hjá teimum og teirra fiskiskap undir Føroyum.

Ilt er í løtuni at meta um, hvussu fiskimynstrið hjá føroyskum skipum verður á viðkaðu landleiðini, og hvørjar søndir tað verður neyðugt at veita fremmandum skipum her heima at fáa føroyskum skipum rættindi á teirra heimasjógvi. Tað er tí torført at seta varandi lógarreglur, áðrenn fleiri samráðingarúrslit liggja fyri. Eisini er neyðugt at geva fiskifroðingum og øðrum stundir at meta um, hvussu fiskiskapurin eigur at fara fram undir nýggju viðurskiftunum.

Eftir tí, í hvussu er fert fram, er fyriliggjandi uppskot til ein lóg, sum gevur landsstýrinum fyribils heimildir í samráð við ávikavist marknaðarnevnd og fiskivinnunevnd løgtingsins.

Høvuðslógin er framvegis lógin frá 1964 um fiskivinnu á landleiðini broytt soleiðis, at fiskimarkið er 200 fjórðingar (uppskot 1). Tað vil siga at lógin er galdandi í teimum førum, har landsstýrið ikki ger nýtslu av undantaksheimild. Skip, ið fiska uttan undantaksloyvi, koma tí undir sekt eftir 1964- lógini.

Undantakslógin er avmarkað til økið uttanfyri 12 fjórðingar. Landsstýrið fær tí m.a. ikki heimild at geva fremmandum undantaksloyvi til veiðu innan gamla fiskimarkið. Ammars er lógin avmarkað til at geva fremmandum veiðuloyvi. Tílík heimild er m.a. neyðug, síðani sáttmálin frá 18. december 1973 um fiskiveiðu við Føroyar ikki fer úr gildi fyrr enn 1. mars 1977.

Næsta heimildin er at geva loyvi at nýta trol, skovlváð og snurriváð á

landleiðini inn móti 12 fjórðingum. Heimildin er galdandi bæði fyri foroyingar og aðrar.

Til § er er serliga at viðmerkja, at konfiskatión av veiðu og reiðskapi ikki er heimilað. Sektarreglurnar hava sina fyrimynd í § 5, 3. stk. í 1964-lógini, har bert kann áleggjast, um brot verður gjort móti ásetanum í kunngerðum ella treytum í loyvum. Eisini eigur at verða hugsað um, at struffireglurnar í Føroyum, tá serloyvi er givið til fremmandar, eiga at vera nakað tær sonnu sum tær, ið galda á fremmandum sjógvi fyri brot móti givnum loyvi.

1. viðgerð 16. december, málið beint í marknaðarnevndina, ið 17. december legði fram soljóðandi

Álit

Málið varð lagt fram av landsstýrinum tann 15. december 1976 og undir 1. viðgerð 16. december 1976 beint í marknaðarnevndina.

Út frá tí, sum ført var fram undir 1. viðgerð í løgtinginum, noelir ein samd nevnd til fylgjandi broytingaruppskot til uppskot landsstýrisins.

Broytingaruppskot

Sum stk. 3 í II § 1 verður sett:

«Ein og hvør avtala, ið gjørd verður við onnur lond, verður at leggja fyri løgtingið til góðkenningar, áðrenn hon fær gildi.»

Som stk. 3 i II § 1 sættes:

«Enhver aftale, der træffes med andre lande, skal forelægges lagtinget til godkendelse, forinden den sættes i kraft.»

Uppskot
til
samtyktar.

Landsstýrið fær sannan við marknaðarnevndini heimild til at loyva fiskiskap eftir reglum í sáttmála frá 18. december 1973 um fiskiveiðu við Føroyar fram til 1. mars 1977.

Aftaná 1. januar 1977 og til aðrar reglur eru góðkendar av løgtinginum, kunnu føroysk skip á landleiðini reka fiskiskap eftir teimum reglum, sum eru galdandi 31. december 1976 og teimum broytingum, sum slandast av, at sáttmálin frá 18. december 1973 um fiskiveiðu við Føroyar fer úr gildi.

Áðrenn 1. januar 1977 skal kunngerð hesum viðvíkjandi verða lýst.

Tann 17. december 1976 legði Kjartan Mohr, løgtingsmaður, fram soljóðandi

Broytingaruppskot

Í § 1, 1. og 2. stk. í uppskoti II frá landsstýrinum verður sett ávikavist aftaná marknaðarnevnd og fiskivinnunevnd: «umboðandi allar flokkar í løgtinginum».

I § 1, stk. 1 og 2 i forslag II fra landsstyret tilføjes henholdsvis efter markedsudvalg og fiskeriudvalg: «repræsenterende alle lagtingets partier».

Viðmerkingar:

Í viðmerkingunum hjá landsstýrinum verður sagt, at fyriliggjandi uppskot II er ein lóg, sum gevur landsstýrinum fyribilsheimildir í samráð við ávikavist marknaðarnevnd og fiskivinnunevnd løgtingsins.

Í løtuni eru ikki allir flokkar á løgtingi umboðaðir í omanfyrinevndu nevndum. Framburðsflokkurin mælir til, at hetta verður broytt samsvarandi broytingaruppskotinum.

Framburðsflokkurin, 17. december 1976.

Kjartan Mohr.

2. viðgerð 20., 3. viðgerð 21. desember.

Uppskot landsstýrisins I varð samtykt við 20—0 atkvøðum, uppskot II varð samtykt við broyting frá marknaðarnevndini við 21—0 atkvøðum.

Uppskot til samtyktar frá marknaðarnevndini samtykt við 24—0 atkv.

Broytingaruppskot frá Kjartan Mohr fall við 9 ja-atkvøðum.

19. Broyting í lóg um fuglaveiðu v. m.

Ár 1976, 15. desember, legði D. P. Danielsen, landsstýrismaður, fram

Uppskot
til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um fuglaveiðu v.m.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 27 frá 9. september 1954 um fuglaveiðu v.m. við seinni broytingum gongur í § 17, stk. 2, a) orðið «lomviga» og «álku» út.

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi beinanvegin og verður at endurskoða í seinasta lagi í tingsetuni 1978.

lagtingslov om ændring i lagtingslov om fuglefangst m.v.

§ 1.

I lagtingslov nr. 27 af 9. september 1954 om fuglefangst m.v. med senere ændringer udgår i § 17, stk. 2, a) ordet «lomvie» og «alke».

§ 2.

Denne lov træder i kraft straks og bliver at tage op til revision senest i lagtingssamlingen 1978.

Viðmerkingar:

Seinastu árini er lomvigin í Føroyum nógv minkaður, og eru menn ójavnir á máli um, av hvørjum henduni minking stendst. Nevnt hevur verið lágur sjóvarhiti og harav lítið fuglaæti og ovmikil veiða, serliga við byrsu.

Kanningar vísa, at búfuglurin ikki er so út av lagi nógv minkaður, meðan geldfuglurin, ið serliga verður veiddur, als ikki kemur inn móti landi, og er í tann fuglurin, ið seinastu árini hevur verið veiddur mestsum bert búfuglur.

Hóast serkønir, sum fuglafrøðingar og aðrir, ikki meta minkingina í stovninum koma av mannaávum, og heldur ikki halda stovnin vera so langt niðurkomnan, at vandi er fyri oyðing, halda kønir bjargamenn, at vandi er á ferð og mæla tí til friðing av lomvigunum alt árið fyri allari veiðu.

Sum tað sæst av skrivinum frá Andrias Reinert, meta menn sunnanfjarðs, at minkingin bert fyri lítlan part kann standast av veiðu, meðan øðrvísi kann vera norðanfyri, har talið á búfugli er lítið, har nógv fólk býr, og veiðan við byrsu lutfallsliga nógv meiri.

F.L. j. nr. 610-9-2

Hóast tað ikki er prógvað, at minkingin í lomvigastovninum í veruligan mun stendst av, at ov nógvur fuglur verður veiddur, er møguleiki fyri, at tann veiðan, ið fer fram við byrsu, snaru og í bjørgunum annars við ringum náttúruviðurskiftum kann verða atvoldin til, at fuglurin minkar niður í lítið og einki og kann hava ilt við at koma fyri seg aftur, sjálvt um náttúruviðurskiftini gerast betur. Verður her serliga hugsað um norðara partin av landinum, har summi av bjørgunum bert hava fá hundrað pør og flestu bert nøkur túsund, og royndin er tann, at har lomvigin er oyddur, kemur hann ikki aftur.

Landsstýrið metir, at í dag hevur fuglaveiðan ikki størri búskaparligan týdning, og tá brøv eru komin til tingið, millum annað frá skútvoyingum, at lomvigin verður friðaður fyri allari veiðu eitt ávist tíðarskeið, kann landsstýrið taka undir við hesum og seta uppskot fram hesum samsvarandi.

Tá álkan er tikin við, er tað tí, at hon er uppaftur verri fyri enn lomvigin, og vandi er fyri, at um veturin, tá lomvigi og álka ganga í sama flokki, kann vera ilt at skilja sløgini hvørt frá øðrum.

1. viðgerð 12. januar 1977, málið beint í fiskivinnunevndina, ið 17. mars legði fram soljóðandi

Álit

Málið varð lagt fram av landsstýrinum 15. desember 1976 og varð við 1. viðgerð 12. januar 1977 beint í fiskivinnunevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og býtt seg í ein meirilutu og ein minniluta.

Meirilutin (P. J. Olsen, Ove Mikkelsen, Johan Simonsen og Jógvan Olsen) førir fram: Uppskotið frá landsstýrinum gongur út uppá at friða lomviga og álku alt árið.

Í viðmerkingunum verður sagt, at lomvigin er minkaður nógv í Føroyum tey seinastu árini, og at menn eru ójavnir á máli um, av hvørjum grundum henda minking stendst. Nevnt hevur verið lágur sjóvarhiti og harav lítið fuglaæti og ov mikil veiða, serliga við byrsu, men vístverður á av serkønum, sum fuglafroðingum og øðrum, at teir mela ikki minkingina í stovnunum koma av manmávum, og heldur ikki halda teir stovnin vera so langt niðurkomman, at vandi er fyri oyðing, men harafturimóti halda kønir bjarganmenn, at vandi er á ferð og mæla tí til friðing av lomvigunum alt árið fyri allari veiðu.

Meirilutin heldur ikki at grundgevingin frá landsstýrinum ímóti fuglaveiðu er nóg góð til at seta forboð at galda alt árið, men kann taka undir

í tí, at nakað eigur at verða gjort fyri friðing og helst í verpingar- og klekingartíðini.

Meirilutin heldur, at menn framvegis eiga at hava moguleiku fyri at kunna veiða sær fugl til dogurðarnat ta tíðina av árinum, tá hann er feitastur og heldur tað tí vera rímligt at seta forboð fyri allari veiðu av álku og lomviga frá 15. mai til 1. september.

Eftir metingum frá fiskirannsóknarstovnni vil henda friðing av lomvigunum føra við sær, at veiðan fer at minka niður í 28% av tí hon hevur verið árini frammanundan.

Meirilutin metir, at um ein slík friðing verður framd, so skuldi ikki vandi verið fyri oyðing av lomvgannum orsakað av veiðu á okkara leiðum.

Meirilutin heldur eisini, at tað eigur at vera forboðið at flúgva ov nær fuglabjørgum við helikoptara og flogførum, tá óljóðið frá hesum órógva fuglin, eins og forboð eigur at vera fyri at nýta skipsfloytu út fyri bjørgum og heldur ikki eigur at verða loyvt at sigla ov nær fuglabjørgum við speedbátum, tá hesir eisini gera fuglinum ónáðir.

Við tí í álitinum framførda setir meirilutin fram hetta

broytingaruppskot

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um fuglaveiðu v.m.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 27 frá 9. september 1954 um fuglaveiðu v.m. við seinni broytingum verða gjordar hesar broytingar:

1) Í § 17, stk. 2, a), ganga orðini «lomviga, álku» út.
2) Í § 17, stk. 2, b), verður skoytt uppí: «1. september – 15. mai».

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi 1. mai 1977.

lagtingslov om ændring i lagtingslov om fuglefangst m.v.

§ 1.

I lagtingslov nr. 27 af 9. september 1954 om fuglefangst m.v. med senere ændringer foretages følgende ændringer:

1) I § 17, stk. 2, a) udgår ordene «lomvie, alke».
2) I § 17, stk. 2, b) tilføjes: «1. september – 15. maj».

§ 2.

Denne lov træder i kraft 1. maj 1977.

Minnilutin (Vilhelm Nielsen) mælir til at samtykkja uppskot landsstýrisins óbroytt.

Fiskivinnunevndin, 17. mars 1977.

Poul J. Olsen Johan Simonsen Ove Mikkelsen
Jógvan Olsen Vilhelm Nielsen

Tann 12. mai 1977 legði Jógvan Durhuus, Agnar Nielsen, Eliesar Arge og Jona Henriksen fram

Uppskot
til

løgtingslóg um broyting í Løgtingslóg um fuglaveiðu v.m.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 27 frá 9. september 1951 um fuglaveiðu v.m. við seinni broytingum verða gjørdar hesar broytingar:

1) Í § 17, 2. stk., a) ganga orðini «lomviga, álku» út.
2) Í § 17, 2. stk., b) verður skoytt uppí: «1. september – 14. mai.»

lagtingslov om ændring i lagtingslov om fuglefangst m.v.

§ 1.

I lagtingslov nr. 27 fra 9. september 1951 om fuglefangst m.v. med senere ændringer foretages følgende ændringer:

1) I § 17, stk. 2, a) udgår ordene «lomvie, alke».
2) I § 17, stk. 2, b) tilføjes: «1. september – 14. maj.»

Á Føroya løgtingi, 12. mai 1977.

Jógvan Durhuus Agnar Nielsen Eliesar Arge

Jona Henriksen

2. viðgerð 23. mars

Tingmál nr. 19/1976: § 1 í landsstýrisins uppskoti fall við 12 – 0 atkv.

Broytingaruppskot frá Jógvan Durhuus og Agnar Nielsen fall við 6 – 0 atkvøðum.

§ 1 í uppskoti frá Poul J. Olsen, Ova Mikkelsen, Johan Simonsen og Jógvan Olsen fall við 13 – 0 atkvøðum.

Tingmál nr. 105/1976: § 1 í uppskotinum fall við 14 – 0 atkvøðum, við tað at málið kravdi kvalifiseraðan meiriluta. Málið er sostatt fallið.

20. Lóg um hundar

Ár 1976, 20. desember, legði Jákup Lindenskov, landsstýrismaður, fram

Uppskot
til

løgtingslóg um hundar.

§ 1.

Tann, sum hevur hund, skal ansa eftir, at hundurin hevur helsi og spjaldur við ánarans navni og bústaði, frá tí hann er 4 mánaðar gamal.

2. stk. Landsstýrið kann fyri seta gjøllari reglur, hvussu tey í 1. stk. nevndu spjøldur skulu síggja út.

§ 2.

Tað er forboðið at hava hund á støðum, sum ongin býr, uttan so løgreglan gevur loyvi til tess. Tílíkt loyvi kann bert verða givið, tá ið nóg góð trygd ætlast vera, at hundurin verður ansaður forsvarligu, og loyvi kann takast aftur, nær tað skal vera.

§ 3.

Tað er forboðið at hava hund gangandi leysan á gotu, vegi, breyt ella plássi o.t., sum opin er fyri vanligari ferðslu, uttan so hann er hildin í bandi ella í fylgi við fólki, sum hevur fult ræði á honum. Hundur kann ikki sigast vera undir leiðslu, tí hann er undir eftirliti frá ánarans húsum ella vinnustað. Verður hundur havdur í bandi, skal tað vera so stutt, at

lagtingslov om hunde.

§ 1.

Besidderen af en hund skal sørge for, at hunden, fra den er 4 måneder gammel, bærer halsbånd forsynet med et skilt, der angiver besidderens navn og adresse.

Stk. 2. Landsstyret kan fastsætte nærmere bestemmelser om udformningen af det i stk. 1 nævnte skilt.

§ 2.

Det er forbudt at holde hund på steder, hvor der ikke er beboelse, medmindre politiet meddeler tilladelse dertil. Sådan tilladelse kan kun gives, når der skønnes at være sikkerhed for, at hunden vil blive passet forsvarligt, og tilladelsen kan til enhver tid tilbagetages.

§ 3.

Det er forbudt at lade hunde færdes på gader, veje, stier eller pladser m.v., der er åbne for almindelig færdsel, uden at de enten føres i hånd eller er i følge med en person, som har fuldt herredømme over dem. En hund anses ikke for at være under ledsagelse, fordi den er under tilsyn fra besidderens bolig eller forretningslokale. Føres hunde i bånd, skal dette være så

leiðarin hevur hann tekt inni at sær. Gongur hundur leystur uttan fylgi undir fullum ræði, tekur løgreglan hann upp og boðar ánnaanum frá. Hevur hunduin ikki helsi og spjaldur sum fyrisett í § 1, verður hann lýstur upp. Hevur ánarin ikki innanfyri 3 ferðir 24 tímar eftir, at boðað er frá ella lýst er upp, loyst inn hundin mót at rinda tey gjøld, sum staðist hava av uppløkuni, kann løgreglan avhenda ella avlíva hann. Avlop, um so skuldi verið eigur ánarin, um hann sigur frá innan 3 mánaðar og prógvørir sín ræt og annars landskassin. Landsstýrið kann fyriseta gjøllari reglur um avhending av uppfiknum hundum.

2. stk. Landsstýrið kann fyriseta, at hundur á teimum í stk. 1 nevndu støðum altíð skal havast í bandi. Fyri ferðshuna kann verða fyrisett, at reglan í 1. stk., 1. pkt. skal koma í nýtslu á tilskiláðum vegum ella ognum uttanfyri tey, sum omanfyri eru nevnd.

3. stk. Í tiðini frá sólsetur til sólarrenning, tó minst í tiðini frá kl. 21 til kl. 05.00 skal hundur altíð havast í bandi, havast inni ella forsvarliga bundin. Undir reglunn kemur ikki hundur, sum nýttur verður av almennum valdi ella góðkendur seyðahundur, sum ánarin nýtir at røkta við.

kort, at hunden holdes tæt ind til ledsageren. Såfremt hunde på de nævnte steder færdes løse uden at være i følge med en person, der har fuldt herredømme over den, lader politiet den opfange og underretter besidderen. Bærer hunden ikke halsbånd forsynet med skilt som nævnt i § 1, fremlyses den. Hvis besidderen ikke inden 3 gange 24 timer efter, at underretning eller fremlysning har fundet sted, indløser hunden ved at betale de udgifter, som optagelsen har medført, kan politiet afhænde hunden eller lade den aflive. Et eventuelt overskud ved afhændelsen tilfalder ejeren, hvis han melder sig inden 3 måneder og godtgør sin ret, og ellers landskassen. Landsstyret kan fastsætte nærmere regler om afhændelse af optagne hunde.

Stk. 2. Landsstyret kan bestemme, at hunde på de i stk. 1 nævnte steder altid skal føres i bånd. Af færdselshensyn kan det bestemmes, at reglen i stk. 1, 1. pkt., uden for de dér nævnte områder skal komme til anvendelse for bestemt angivne veje eller ejendomme.

Stk. 3. I tiden fra solnedgang til solopgang, dog mindst i tiden fra kl. 21.00 til kl. 05.00, skal hunde altid føres i bånd, holdes indelukket eller forsvarligt bundet. Bestemmelsen gælder ikke hunde, der benyttes af offentlig myndighed eller godkendte fårehunde, der benyttes af besidderen under fårerøgt.

4. stk. Tað áliggur ánaran at ansa eftir, at hundur reikar ikki um.

5. stk. Glípskur hundur, sum gongur leysur, má ikki nýtast sum varðhundur uttan loyvi frá løgreglunni.

6. stk. Tað er forboðið at hava hund í bandi frá motorakfari, prutli, rossankfari og heldur ikki frá hestbaki.

§ 4.

Ger hundur grannum ónáðir, ti hann goyr ella hvinur og gevst ikki, og kæra verður givin inn til løgreglunna, leggur hon ánaranum ta treytina við at hava hundin innilæstan ella um tað onki hatti, ella um hundurin longu var innilæstur, at heina fyri honum.

§ 5.

Tað er forboðið alsamt at hava hund bundnan.

2. stk. Tá ið hundur verður hildin bundin, skal bandið vera minst 5 m langt, og hann skal sleppa til rúm, so hann fær forsvarligt læ fyri regni, vindi og kulda. Er tað hundahús, skal tað vera rúmligt, og so mikið hogt, at hundur fær staðið uttan at bera ímóti.

§ 6.

Tað áliggur hvørjum, sum hevur hund, at gera tað, sum eftir við umstøðunum krevst at fyrihyrgja, at hundurin ger skaða.

Stk. 4. Det påhviler besidderen af en hund at drage omsorg for, at den ikke strejfer om.

Stk. 5. Løsgående glubske hunde må ikke uden politiets tilladelse anvendes til bevogtning af pladser.

Stk. 6. Det er forbudt at føre hunde i bånd fra motorkøretøj, cykel med hjælpemotor eller hestekøretøj. Heller ikke ridende må føre hunde i bånd.

§ 4.

Forstyrrer en hund de omboendes ro ved gentagen eller vedholdende gøen eller tuden, og der indgives klage derover til politiet, giver dette besidderen påbud om at holde hunden indelukket eller, hvis denne foranstaltning ikke hjælper, eller hunden allerede holdes indelukket, at lade den fjerne.

§ 5.

Det er forbudt til stadighed at holde en hund bundet.

Stk. 2. Når en hund holdes bundet, skal dens lænke være mindst 5 m lang, og den skal have adgang til et opholdsrum, der kan yde den forsvarligt læ mod regn, blæst og kulde. Består opholdsrummet i et hundehus, skal det være rummeligt og så højt, at hunden kan stå oprejst.

§ 6.

Det påhviler besidderen af en hund at træffe de foranstaltninger, der efter forholdene må anses påkrævet for at forebygge, at hunden volder skade.

2. stk. Hevur hundur fyrr elvt skaða, og hann, sum tá hevði hann, kom undir sekt ella endurgjald eftir dómi ella sátt, skal landfútin treyta ánaranum at avliva hundin, um so er at hann verður ikki havdur inni í heilum ella fær forsvarligt kjaftband. Tilika treyt kann ánari koma undir, tá ið hundur lætst bítskur ella hevur sum vana at gera fólki ónáðir á gøtu, vegi, breyt ella plássi, sum opin eru fyri vanligari ferðslu, leypa uppá ella elta ella gera húsdjórum ónáðir heima ella í haga. Verður hundur fluttur í aðra kommunu, bygd ella bý, skal ánarin siga løgregluni á næsta stað frá treytini.

§ 7.

Tann, sum hevur hund, eigur skyldu at endurrinda skaða, sum hundurin elvir. Kemur tað upp, at tann, sum kom fyri skaða, sjálvur gjørdi nakað til, kann endurgjaldið minkast ella heill detta burtur.

2. stk. Tann, sum hevur hund, skal hava hann ábyrgdartryggjaðan. Tryggingarfelagið heftir beinleiðis tí, sum kom fyri skaðan fyri endurgjald eftir 1. stk.

3. stk. Landsstýrið fyriseturr eftir samráð við tryggingarfelagið gjøllari reglur til tess at seta reglunn í stk. 2 í verk.

§ 8.

Verður søk reist móti tryggingarfelag av einum, sum kotrin er

Stk. 2. Har hunden tidligere forårsaget skade, hvorfor dens daværende besidder er ifaldet bøde- eller erstatningsansvar i henhold til dom, vedtagelse eller forlig, skal landfogeden pålægge besidderen at lade hunden aflive, når den ikke bestandig holdes indelukket eller forsynet med forsvarlig mundkurv. Tilsvarende pålæg kan meddeles besidderen af en hund, der viser sig bidsk eller glubsk eller har den vane at forulempe folk ved på gader, veje, stier eller pladser m.v., der er åbne for almindelig færdsel, at fare imod dem eller forfølge dem, eller som forulemper husdyr i ejendom eller på marken. Overflyttes hunden til anden kommune, bygd eller by, skal besidderen underrette nærmeste politimyndighed om pålægget.

§ 7.

Besidderen af en hund er forpligtet til at erstatte den skade, hunden forvolder. Oplyses det, at den skadelidende har medvirket til skaden, kan erstatningen dog nedsættes eller helt bortfalde.

Stk. 2. Det påhviler besidderen af en hund at holde den ansvarsforsikret. Forsikringsselskabet hæfter umiddelbart over for skadelidte for erstatning efter stk. 1.

Stk. 3. Landsstyret fastsætter efter forhandling med forsikringsselskabet nærmere regler til gennemførelse af bestemmelserne i stk. 2.

§ 8.

Anlægger skadelidte sag mod forsikringsselskabet, skal selska-

fyri skaða, skal felagið boða ánaranum av hundinum til hvørm rættarfundin við freist sum eftir § 175 í rættargangslógini er galdandi fyri vitnir í borgarligum sokum. Tilsognin skal siga frá, hvat stendur í 2. stk.

2. stk. Tann, sum fer tilsogn eftir 1. stk. kann gerast partur í sokini móti at siga frá til rættarbókina. Ger hann tað ikki, er avgerðin í endurgjaldsspurninginum bindandi fyri hann.

§ 9.

Verður ákæra reist fyri lógbrot, sum skaði stóðst av og sum eftir § 7 kan hava endurgjaldskrav við sær, skal tann, sum kom fyri skaðan, fáa høvi at leggja inn krav um endurgjald. Næst sátt ikki, skal endurgjaldskravið komið til avgerðar undir sokini, sjálvt um tann ákærdi kemur ikki undir sekt. Tilík avgerð kann verða gjørd fyri ella eftir avgerðina um sekt. Tá ið endurgjaldskrav ræður um materialskaða og er flokt, kann rættur sýta at fremja kravið undir sokini, eftir at sátt hevur verið royndur til óný tís.

2. stk. Tryggingarfelag, sum hevur tikið við ábyrgdartrygging fyri hund, sum elvt hevur skaða, er í endurgjaldsspurningum at rokna sum partur í søkini og skal hava tilsogn til hvørm rættarfundin við freist eftir § 175 í rættargangslógini, sum galdandi er fyri vitnir í straffisøk.

3. stk. Er ákæran reist mót øðrum enn ánara av hundinum, sum

bet tilsige besidderen af hunden til ethvert retsmøde med det varsel, som efter retsplejelovens § 175 gælder for vidner i borgerlige sager. Tilsigelsen skal indeholde oplysninger om reglerne i stk. 2.

Stk. 2. Den, der tilsiges efter stk. 1, kan ved tilmeldelse af begæring herom til retsbogen, indtræde som part i sagen. Indtræder han ikke, er afgørelsen af erstatningsspørgsmålet ved dom eller forlig bindende for ham.

§ 9.

Hvis der rejses tiltale for nogen skadevoldende lovovertrædelse, der i henhold til § 7 kan medføre erstatningsansvar, skal der gives skadelidte lejlighed til at påstå erstatning. Hvis der ikke opnås forlig om erstatningen skal erstatningspåstandene påkendes under sagen, selv om straf ikke pålægges tiltalte. Sådan påkendelse kan ske før eller efter afgørelsen af spørgsmålet om straf. Hvor erstatningskravet angår materiel skade og er af indviklet beskaffenhed, kan retten, efter at forlig forgæves er prøvet, nægte kravets forfølgning under straffesagen.

Stk. 2. Forsikringsselskabet, i hvilket der er tegnet ansvarsforsikring for den skadevoldende hund, anses for erstatningsspørgsmålets vedkommende som part i sagen og skal tilsiges til ethvert retsmøde med det varsel, som efter retsplejelovens § 175 gælder for vidner i straffesager.

Stk. 3. Er tiltalen rejst mod andre end den skadevoldende hunds

elvi hevur skaða, skal eisini áturin hava tilsøgn til hvønn rettarfundin við tilsogn sum tilskilað í 2. stk. Reglan í § 8, 2. stk. kemur eisini í nýtslu.

1. stk. Tó ið endurgjaldsspurningur kemur til avgerðar undir søkini, kann rætturin leggja á rettargangsbót og sakarkostnað eftir reglunum í kap. 30 í rettargangslógini sum um søkin var farin fram eftir reglunum um borgarliga søk. Sakarmálsvirðið verður í hesum føri ásett í dóminum.

§ 10.

Verður straffisøk skotin inn og endurgjaldskrav fekk avgerð undir henni, er einhvør, sum tá var partur í endurgjaldsspurninginum, eisini partur í søkini, sum skotin verður inn, um so er at endurgjaldsspurningurin kemur til avgerðar undir henni.

2. stk. Høvi eftir § 996 í rettargangslógini at skjóta inn søk eftir mannugongdini í borgarligari søk, stendur hvørjum opið, sum tá ið tað ræður um endurgjaldsspurningin var partur í søkini, í spurningi at skjóta inn søk eftir § 9, 1. stk. er avgerð, sum er gjørd fyri seg í sektar ella endurgjaldskravinum at skilja sum egin dómur. § 995, seinasta stk. í rettargangslógini fær ikki nýtslu í her umrøddu søkum.

§ 11.

Undir bót kemur tann, sum ger brot á § 1, 1. stk., § 2, § 3, 1. stk.

besidder, skal tillige besidderen tilsiges til ethvert retsmøde med det i stk. 2 nævnte varsel. Bestemmelserne i § 8, stk. 2 finder tilsvarende anvendelse.

Stk. 1. Når erstatningsspørgsmålet påkendes under sagen, kan retten i overensstemmelse med reglerne i retsplejelovens kapitel 30 påbægge rettergangsbøder og sagsomkostninger, som om sagen havde været behandlet i den borgerlige retsplejes former. Sagsgenstandens værdi fastsættes i så fald ved dommen.

§ 10.

Ankes en straffesag, under hvilken erstatningsspørgsmålet er blevet påkendt, anses enhver, der for erstatningsspørgsmålets vedkommende har været part i den indankede sag, tillige som part under anken, for så vidt erstatningsspørgsmålet tages under påkendelse.

Stk. 2. Den i retsplejelovens § 996 omhandlede adgang til anke i den borgerlige retsplejes former står åben for enhver, der, for så vidt angår erstatningsspørgsmålet, har været part i sagen. I henseende til anke er en i medfør af § 9, stk. 1, sket særskilt påkendelse af straffe- eller erstatningspåstanden at betragte som selvstændig dom. Retsplejelovens § 995, sidste stykke finder ikke anvendelse i de her omhandlede sager.

§ 11.

Med bøde straffes den, der overtræder § 1, stk. 1, § 2, § 3, stk. 1,

3. pkt., § 3, 3. 6. stk., § 5, § 6, 1. stk., § 7, 2. stk., ella treyt, sum givin her eftir § 4 ella § 6, 2. stk.

2. stk. Undir somu sekt kemur hann, sum beitir hund móti onkrum ella ger onki at halda hundinum aftur, fá ið hann sær, at hann leggur eftir onkrum.

3. stk. Í forskriftum, sum gavnar eru eftir § 1, 2. stk. kann sekt av bót verða fyrisett fyri brot móti forskriftunum. Sama sekt kann ásetast fyri at bróta reglur, sum landsstýrið hevur givið eftir § 3, 2. stk.

§ 12.

Tær vanligu reglurnar um sekt og endurgjald og avliving galda ikki skaða, sum seyðahundur í felagshaga elvir seyði fyrstu og aðru ferð hurtur í haga í felagshaga.

§ 13.

Henda lóg kemur í gildi 1. august 1977.

2. stk. Táið lógin kemur í gildi, fara úr gildi fyriskipan nr. 88 frá 31. mars 1928, hareftir lóg nr. 127 frá 18. april 1925 um hundaskatt og um sekt og endurgjald elvt av hundi, varð sett í gildi í Føroyum, løgtingslóg nr. 5 frá 12. mars 1955 og løgtingslóg nr. 18 frá 29. april 1958 um broytingar og uppískoyti til fyriskipan nr. 88 frá 31. mars 1928 og lóg nr. 172 fyri Føroyar um stýri av høgum og rakstur §§ 32 og 33.

1. 3. pkt., § 3, stk. 3 6, § 5, § 6, stk. 1, § 7, stk. 2, eller et i medfør af § 4 eller § 6, stk. 2, givet påbud.

Stk. 2. På samme måde straffes den, der lidser en hund på nogen eller undlader at holde sin hund tilbage, når han bemærker, at den overfalder nogen.

Stk. 3. I forskrifter, der udstedes i henhold til § 1, stk. 2, kan fastsættes straf af bøde for overtrædelse af forskrifterne. Samme straf kan fastsættes for overtrædelse af landsstyrets bestemmelser i henhold til § 3, stk. 2.

§ 12.

De almindelige regler om straf- og erstatningsansvar og aflivning gælder ikke for den skade, som en fælleshauges fårehund første og anden gang forårsager på får under fårerogt i fælleshauger.

§ 13.

Denne lov træder i kraft den 1. august 1977.

Stk. 2. Ved lovens ikrafttræden ophæves anordning nr. 88 af 31. marts 1928, hvorved lov nr. 127 af 18. april 1925 om hundeafgift samt om straf og erstatning forårsaget af hunde sættes i kraft på Færøerne, lagtingslov nr. 5 af 12. marts 1955 og lagtingslov nr. 18 af 29. april 1959 om ændringer og tilføjelser til anordning nr. 88 af 31. marts 1928 og lov nr. 172 for Færøerne om haugers styrelse og drift §§ 32 og 33.

Viðmerkingar:

Vanligu reglurnar, ið eru galdandi um hundar, eru hesar:

1. Lóg nr. 127 frá 18. apríl 1925 um hundaskatt og um straff og endurgjald fyri skaða, sum hundar gera, sbr. fyriskipan nr. 88 frá 31. mars 1928, har lógin verður sett í gildi fyri Føroyar, sum broytt við løgtingslóg nr. 5 frá 18. mars 1955 og løgtingslóg nr. 18 frá 29. apríl 1959.
2. Lóg nr. 172 frá 18. mai 1937 «for Færøerne om haugers styrelse og drift m.m.» §§ 32 og 33.
3. Fyribilsreglur nr. 14 frá 15. apríl 1947 um hundar.
4. Politiviðtøkur frá 3. juli 1931 fyri bygdakommununum í Føroyum, 5. kapitul.
5. Kunngerð nr. 70 frá 15. december 1959 um ábyrgdartrygging fyri hundar.

Reglurnar eru ikki tíðarhóskandi longur og haraftrat torførar at arbeiða við, av tí at tær eru so spjaddar. Neyðugt er tí at fáa eina nýggja lóg, har allar reglurnar um hundar eru savnaðar.

Viðmerkingar til tær einstøku greinirnar:

a.d § 1: Reglurnar um spjaldur við eigarans navni og bústaði á verður skotið upp í staðin fyri galdandi reglur um tilmelding og gjald í fyriskipan nr. 88 frá 31. mars 1928 §§ 1-8, sum í dag eru galdandi í Tórshavn, Klaksvík, Vestmanna, Sandavági og á Tvøroyri, meðan reglurnar ikki eru settar í gildi í øðrum kommununum. Við tilmeldingina verður hundurin skrásettur og eigarin fær útflýggjað hundamerki at festa í hálsband á hundinum móti at rinda eitt gjald, sum liggur millum 5 og 20 kr. Gjaldið fær kommunan, sum rindar útreiðslurnar til merkir, protokollir o.t.

Høvuðsendamálið við hundaskattinum var samtbært lógarviðmerkingarnar at avmarka hundahaldið, men tá havt verður í huga, hvussu lítið gjaldið nú er í mun til útreiðslurnar at hava hund, kann neyvan hugsast, at gjaldið hevur nakran týdning fyri hundahaldið, og tað kann heldur ikki vera rætt at vaksa um gjaldið fyri at minka um hundatalið.

Sigast kann ikki, at kommununnar, har skipanin hevur verið galdandi, koma at missa nakra týðandi inntøknkeldu, tá samstundis verður tikið við, at kommununnar skulu gjalda útreiðslurnar til merkir, protokollir o.t.

Tilmelding og skráseting við hundamerki hevur til endamáls at identifisera hundin, men er annars ein óeffektiv skipan, tá hon bert er galdandi í nøkrum fáum kommununum.

Eftir uppskotinum verður hundaskatturin avtikin. Skrásetingin verður gjørd greiðari og effektivari, við tað at hetta skal hendu samstundis við, at hundurin verður ábyrgdartryggjaður í seinasta lagi 4 mánaðar gamal og fær spjaldur við eigarans navni og bústaði.

a d § 2: Reglurnar svara til § 9 í fyriskipan nr. 88 frá 31. mars 1928.

a d § 3: Eftir uppskotinum er tað forboðið at lata hundar ganga leysar á støðum, sum eru opin fyri vanligari ferðslu.

a d § 4: Tilsvarandi reglur eru nú galdandi eftir politiviðtokunum, men harnfturat er tað tikið við, at talan kann verða um ein innilœstan hund, sum ger øðrum óváðir.

a d § 5: Henda regla er nýggj, men skuldi ikki tørva nærri frágreiðing.

a d § 6: Reglurnar eru nakað broyttar í mun til reglurnar í § 11 í fyriskipan nr. 88 frá 31. mars 1928.

a d § 7: Henda grein inniheldur reglurnar um endurgjaldsgrundarlagið og høvuðsreglurnar um lógskylduga ábyrgdartrygging. Í uppskoti til kunngerð um ábyrgdartrygging av hundum og hundaskatti finnast tær nærri fyriskrivaðu reglurnar um ábyrgdartrygging. Eftir § 4 í kunngerðini kann tann skaddi altíð krevja endurgjald, sjálvt um ein ikki kendi hundin, ella tryggingin ikki var í gildi. Reglan samsvarar við lógskyldugu ábyrgdartryggingina fyri akfør v.m., har Tryggingarsambandið Føroyar eftir nærri reglum hevur bundið seg til at endurgjalda persónskaða, sum ótryggjað ella ókend motorakfor hava volt.

a d §§ 8-10: Hesar greinir innihalda tær prosessuellu reglurnar og eru tær eins og tilsvarandi reglur í dansku hundalógini.

a d § 11: Henda grein inniheldur straffireglurnar.

a d § 12: Reglan er ein nútínansgerð av regluni í § 33 í lóg nr. 172 frá 18. mai 1937 «om haugers styrelse og drift».

a d § 13: Reglurnar í §§ 32 og 33 í hagalógini, sum neyvan kunnu haldast at vera tíðarhóskandi longur, verður skotið upp at taka av. § 33 í hagalógini finst í øðrum líki í § 12 í uppskotinum. Tær serligu reglurnar í lóg nr. 171 «om hegn og markfred» kapittul 5 um ferðslu við hundum á annans jørð verða framvegis galdandi.

Hetta mál var eisini fyri í tingsetuni 1971 (logtingsmál nr. 40/1971) og varð samtykt at senda málið aftur til landsstýrið við áheitan um at leggja málið aftur fyri tingið saman við tí í lógaruppskotinum nevndu kunngerð.

Nevnda kunngerð fylgir nú við uppskotinum sum skjal.

Jákup Lindenskov
landsstýrismaður

/ J. P. Ellendersen

Uppskot
til
Kunngerð
um
ábyrgdartrygging av hundum og hundaspjøldur.

Eftir § 1 stk. 2 og § 7, stk. 3 í løgtingslóg nr. frá hevur landsstýrið fyriset.

§ 1.

Undir skyldu at hava ábyrgdartryggjað koma allir hundar. Hvølpar, sum eru ikki 4 mánaðar, koma undir ábyrgdartrygging hjá tykiui, so leingi hon hevur ikki kastað teir.

Stk. 2. Fyri hvønn hundin skal tryggingarsummin vera kr. 100.000 fyri tingskaða og kr. 150.000 fyri fólkaskaða fyri hvønn skaðatilburð.

§ 2.

Tryggingin skal teknast í Tryggingarsamhandinum Føroyar, sum skyldu hevur at taka ímóti trygging fyri ein hvønn hund undir vanligum tryggingartreytum tess.

§ 3.

Felagið skal tekna tryggingina soleiðis, at eitthvørt endurgjaldsvar aftúrímóti triðja manni liggur á tí, og tað, at tryggingartakari í onkrum ger ímóti ella eftirkemur ikki sínar skyldur mót felagnum, gevur tað tí ikki rætt til at rinda tí, sum rætt hevur til endurgjald.

Stk. 2. Um so er, at felagið rindar tryggingartakaranum endurgjaldið, er tað fyri tess egna risiko, soleiðis at aftúrímóti tí, sum rætt hevur til endurgjald undsvarlig fyri eitthvørt tap, sum tann kemur undir, at endurgjaldið tessvegna kom tí til góðar.

Stk. 3. Hava fleiri, sum skaða hava liðið, krav uppá endurgjald av einum og sama skaðanum, sum kemur undir tryggingina, og fara krøv teirra tilsamans uppum tað, sum felagið hevur skyldu at rinda, skal endurgjaldið býtast lutfalsliga, um so er, at krøvini eru løgd inn til felagið ella á annan hátt komin til tess kunnskap.

§ 4.

Tryggingarfeagið gongur undir skyldu at rinda skaða sum ætlast elvdur av ókendum hundi og til, móti regress móti honum, sum ábyrgdina hevur at rinda endurgjaldið í fari, tá ið skaðin er elvdur av hundi, sum tryggjaður er, ella trygging væl er teknað fyri hann, men tikin aftur av felagnum

ella ikki lildin í gildi. Endurgjald verður ikki rindað út um tað, sum tilskilað er í § 1.

§ 5.

Tá ið ábyrgdartrygging verður teknað fyri hund, skal tryggingarfelagið gera tryggingarskjal, sum inniheldur tryggingartreytirnar.

§ 6.

Henda kunngerð kemur í gildi ..... og samstundis fer landsstýrisins kunngerð nr. 70 frá 15. december 1959 úr gildi.

Hetta verður gjørt kunnugt.

Føroya landsstýri ,

1. viðgerð 10. januar 1977, málið beint í serliga 5-mannanevnd, ið 29. apríl legði fram soljóðandi

Átit

Málið varð lagt fram av landsstýrinum 20. december 1976 og við 1. viðgerð 10. januar 1977 beint í landbúnaðarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt uppskotið og havt fund við djóraverndarfelagið, landsdjóralæknan og bóndafelagið um málið.

Nevndin hevur fingið tu fatan, at á mongum plássum er hundatalið alt ov stórt, og skapar hetta mikið óskil.

Fyri at avmarka hundatalið, heldur nevndin, at tað eigur at vera ásett eitt størri gjald fyri at hava hund, og at heimild skal vera til at seta forboð móti hundahaldi í eini kommunu ella bygd, um bygda(r)ráðið heldur hetta verða neyðugt.

Vísandi hertil mælir nevndin til at samtykkja uppskotið við fylgjandi

b r o y t i n g

1) Sum nýtt 3. stk. í § 1 verður sett:

«Fyri hvønn hund skal latast gjald uppá 500 kr. árliga til kommununa, har hundaánnurin býr. Løgreglan krevur gjaldið inn, um neyðugt við panting. Landsstýrið ásetur nærri reglur um rindan av gjaldinum.»

1) Som nyt stk. 3 i § 1 tilføjes:

«For hver hund betales en afgift på 500 kr. årlig til den kommune, hvor hundens ejer er bosat. Politiet opkræver afgiften om fornødent ved udpantning. Landsstyret fastsætter nærmere bestemmelser om afgiftens betaling.»

2) Sum nýtt 2. stk. í § 2 verður sett:

«Bygda(r)ráð kann við minst eitt árs freist seta forboð móti hundahaldi í kommununi ella parti av henni. Undantak frá forboðnum kann gevast til seyðahundar, varhundar, førarahundar og løgreglubundar.»

2) Som nyt stk. 2 i § 2 tilføjes:

«Et bygderåd kan med mindst et års varsel udstede forbud mod hundehold i kommunen eller en del af denne. Dispensation fra forbudet kan gives til fårehunde, vagthunde, førerhunde og politihunde.»

3) I § 11, 3. stk. verða orðini «eftir § 1, 2. stk.» broytt til «eftir § 1, 2. og 3. stk.»

3) I § 11, stk. 3 ændres ordene «til § 1, stk. 2» til «til § 1, stk og 3».

4) § 13, 1. stk. verður orðað soleiðis:

«Henda lóg kemur í gildi 1. oktober 1977. § 1, 3. stk. kemur tó fyrst í gildi 1. apríl 1978.»

4) § 13, stk. 1 affattes således:

Denne lov træder i kraft 1. oktober 1977. § 1, stk. 3 træder dog først i kraft 1. april 1978.»

Landbúnaðarnevndin, 29. apríl 1977.

Johan Simonsen Heðin Klein Vilhelm Nielsen

Haldor Hansen Agnar Nielsen

Tann 2. mai 1977 legði Jógvan Sundstein fram soljóðandi

Broytingaruppskot

Aftaná orðini «hundaánarin býr» í § 1, 3. stk. verður sett nýtt soljóðandi punktum:

Fyri góðkendar seyðahundar og førarahundar til blind verður goldið kr. 20,00 fyri hvønn hund.

For godkendte fårehunde og førerhunde til blinde er afgiften kr. 20,00 for hver hund.

2. viðgerð 2. mai 1977.

3. viðgerð

§ 1 í landsstýrisins uppskoti fall við 12 0 atkvøðum.

Broytingaruppskot frá landbúnaðarnevndini til § 1 fall við 12 0.

Broytingaruppskot frá Jógvan Sundstein til § 1 í broytingaruppskoti frá landbúnaðarnevndini varð samtykt við 16 0.

Broytingaruppskot frá landbúnaðarnevndini til § 2 fall við 10 0, uppskotið sostatt fallið.

Málið burturdottið.

---

21. Rættargangslógin

Ár 1976, 20. desember, legði Jákup Lindenskov, landsstýrismaður, fram løgtingsmálið: Rættargangslógin.

Løgtingið góðkennir fylgjandi uppískoyti til áður góðkent «Udkast til lov for Færøerne om rettens pleje», samb. løgtingsmál nr. 33/1975:

1) Sum § 14, stk. 2, 2. pkt. verður sett: «Det kan bestemmes, at notarialforretninger udføres af sysselmændene eller af dertil egnede personer»,

2) § 124, stk. 1 verður orðað soleiðis:
«Møderetten for landsret på Færøerne er enhver advokat, der har bestået juridisk embedseksamen.»

Viðmerkingar:

Uppskot landsstýrisins í tingmáli nr. 46/1972: Rættargangslógin var soljóðandi:

«Løgtingið samtykkir viðlagda «Udkast til lov for Færøerne om rettens pleje» við tí uppískoyti, at sum § 14, stk. 2, 2. pkt. verður sett: «Det kan bestemmes, at notarialforretninger udføres af sysselmændene eller af dertil egnede personer».

Uppískoytið um notarialvátlanir varð tikið við fyri at útvega gjaldstovudeildini í Runavík heimild at notarialvátta skipspappírir, so Runavík kundi góðkennast sum útklareringshavn.

F. L. j. nr. 501-8-2

I samtykta uppskotinum er uppiskoytið um notarialváttanir ikki komið við.

I skrivi til lógarnevndina dagfest 7. mars 1973 mælti Sakforarafelag Føroya til nevndu broyting í rættargangslógini viðvíkjandi møtirætti fyri landsrættinum í Føroyum. Líknandi broyting er komin í gildi í Danmark við lóg nr. 267 frá 26. juni 1975.

1. viðgerð 10. januar 1977, málið beint í lógarnvendina, ið 9. mars legði fram hetta

Álit.

Lógarnevndin er samd um at mæla løgtinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

Lógarnevndin, 9. mars 1977.

Erlendur Patursson Tórálvur M. Olsen J. Fr. Øregaard

Agnar Nielsen Eliesar Arge

2. viðgerð 16. mars 1977.

Uppskot landsstýrisins samtykt við 22—0 atkvøðum.

22. Regulering av prísinum á sild til matna, landað í Føroyum

Ár 1976, 21. desember, legði Petur Reinert, landsstýrismaður, fram

Uppskot
til

løgtingslóg um regulering av prísinum á sild til matna, landað í Føroyum.

§ 1.

Tá ið føroyskt fiskifar av havsildaveiðu avreiðir sild til matna í Føroyum fyri 1,20 kr. fyri kg ella meira, verður avreiðingarprísurin reguleraður við uppískoyti úr landskassanum soleiðis:

Er avreiðingarprísurin 1,20 kr. fyri kg, verður uppískoytið 40 oyru fyri kg. Uppískoytið lækkar við 2 oyrum fyri hvørji 3 oyru, avreiðingarprísurin fer upp um kr. 1,50 fyri kg.

2. stk. Uppískoytið verður at býta millum manning og fiskifar, sum søla av veiðu verður býtt.

3. stk. Landingarútreiðslurnar mugu vera skjalprógvaðar.

§ 2.

Treyt fyri skipanini er, at sildin er fyrsta flokks vøru, og at støddin ikki er undir 22 cm.

§ 3.

Skipanin verður umsitin av Lønjavningargrunni Skipsfiskimanna.

§ 4.

Henda lóg hevur gildi frá 1. juli 1976 til 31. mars 1977.

lagtingslov om regulering af prisen på sild, der landes på Færøerne.

§ 1.

Ved indhandling på Færøerne af havsild til konsum fra færøsk fiskerfartøj for 1,20 kr. pr. kg eller mere, reguleres indhandlingsprisen med et tillæg fra landskassen beregnet således:

Er indhandlingsprisen 1,20 kr. pr. kg, er tillægget 40 øre pr. kg. Tillægget formindskes med 2 øre for hver 3 øre, indhandlingsprisen overstiger kr. 1,50 pr. kg.

Stk. 2. Tillægget fordeles mellem mandskab og skib på samme måde, som salg af fangst fordeles.

Stk. 3. Landingsomkostningerne skal dokumenteres.

§ 2.

Det er en betingelse for ordningen, at silden er af første sortering, og at størrelsen ikke er under 22 cm.

§ 3.

Ordningen administreres af Lønjavningargrunni Skipsfiskimanna.

§ 4.

Denne lov gælder for perioden 1. juli 1976 til 31. mars 1977.

F.L. j. nr. 1508-21

Viðmerkingar:

Samlagt serlóggávu, jbr. løgtingsmál nr. 18 og nr. 51 í løgtingssetuni 1975, hevur verið latin studningur til avreiðingarprísir fyri sild, ið hevur verið avreidd í Føroyum til matna. Studningur er latin fyri tíðarskeiðið 15. september 1975 til 1. juli 1976, tá lógin fór úr gildi.

Studningsskipanin hevur verið soleiðis, at ein avreiðingarprísur uppá 1,20 kr. fyri kg útloysti ein studning uppá 40 oyru fyri kg. Studningurin lækkaði við 2 oyru fyri hvørji 3 oyru, avreiðingarprísurin fór upp um 1,50 kr. fyri kg.

Avreiðingarprísurin í Føroyum hevur seinastu mánaðarnar ligið so mikið niðamfyri landingarprísirnar í danskari havn, at bert fáar sildalastir eru avreiddar her í Føroyum.

Við fí dapra útliti, hvussu mikið verður fillulað Føroyum í sildakvotu komandi ár, er tað umráðandi, at mest møguligt av teimum loyvdu nogdunum verða landaðar í Føroyum, so virkini her heima fáa ráevni at virka. Hetta gerst ikki uttan, at studningur ella prísiskoyti til avreiðingarprísin verður latin.

Skotið verður tí upp, at studningsskipanin verður endurnýggjað. Eisini verður skotið upp, at skipanin verður afturvirkandi, so sildaskipini fáa nakað í kompensatión fyri tær lágu kvoturnar.

Upplýst er, at frá 1. juli í ár til 1. oktober er landað í Føroyum um 650 tons í matsild. Verða landingarnar fyri seinastu tveir ársfjórðingarnar mettar til 1.300 tons, verður kostnaðurin við 40 oyru í studningi um 800.000 kr.

Lagt verður aftrat, at landsstýrið í øðrum máli í hesi tingsetu leggur uppskot fram um, at sildalandingar koma undir skipanina fyri ráfiskagrunnin um áseta av avreiðingarprísi og avrokningarprísi.

Petur Reinert
landsstýrismaður

/ J. Djurhuus

1. viðgerð 6. januar 1977, málið beint í fíggjarnevndina, sum 1. febr. legði fram soljóðandi

Álit

Málið varð lagt fram av landsstýrinum tann 21. december 1976 og undir 1. viðgerð 6. januar 1977 beint í fíggjarnevndina.

Landsstýrið skjýtur upp, at studningsskipanin viðvíkjandi avreiðingarprísi fyri sild, ið hevur verið avreidd í Føroyum, verður endurnýggjað. Framvegis verður skotið upp, at skipanin verður afturvirkandi, soleiðis at silduskipini fáa nakað kompensatión fyri tær lágu kvoturnar, ið nú eru tillutaðar.

Undir viðgerðini av málinum í fíggjarnevndini, hevur samráðing verið við Petur Reinert, landsstýrismann fyri fiskivinnumál.

Fíggjarnevndin skjýtur upp, at talið, sum útloysir hækking av studningi, verður hækkað úr kr. 1,50 til kr. 1,68.

Orsøkin til hetta er, at føroyskir sildakeyparar draga frá 18 oyru í landingarútreiðslum og vil við hesari broyting metti avreiðingarprísurin liggja á hædd við tað, ið fekst í útlondum í sama tíðarskeiði.

Sostatt setur fíggjarnevndin fram soljóðandi

Broytingaruppskot

§ 1, 1. stk., seinasta regla verður talið «kr. 1,50» broytt til «kr. 1,68».

§ 1, stk. 1, sidste linie ændres beløbet «kr. 1,50» til «kr. 1,68».

Fíggjarnevndin, 1. februar 1977.

Hákun Djurhuus	Poul Jacob Olsen	Hilmar Bech
Jógvan Durhuus	Pauli Ellefsen	Asbjørn Joensen

2. viðgerð 4. februar, 3. viðgerð 9. februar.

Uppskot landsstýrisins samtykt við broyting frá fíggjarnevndini til § 1, 1. stk. við 21 – 0 atkvøðum.

23. Bráðfongisstuðul til flaka- og saltfiskaveiðu

Ár 1976, 21. desember, legði Petur Reinert, landsstýrismaður, fram

Uppskot
til

løgtingslóg um leingjan av løgtingslóg um bráðfongis stuðul til flaka- og saltfiskaveiðu.

§ 1.

Løgtingslóg nr. 41 frá 6. mai 1976 um bráðfongis stuðul til flaka- og saltfiskaveiðu verður framlongd soleiðis, at lógin eisini hevur gildi fyri seinasta túr, byrjaður í 1976, sjúvt um veiðan verður landað aftaná 1. januar 1977.

§ 2.

Henda lóg fær gildi beinanvegin.

lagtingslov om forlængelse af lagtingslov om midlertidig støtte til filét- og saltfiskfiskeri.

§ 1.

Lagtingslov nr. 41 af 6. maj 1976 om midlertidig støtte til filét- og saltfiskfiskeri forlænges således, at loven også gælder for sidste tur påbegyndt i 1976, selv om fangsten landes efter 1. januar 1977.

§ 2.

Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Í løgtingssetuni 1975, jbr. løgtingsmál nr. 88, samtykti løgtingið uppskot um bráðfongis stuðul til flaka- og saltfiskaveiðu ein stuðul útyvir vanliga studningin eftir lógini um minstulon og annan studning til fiskivinnuna. Lógin er avmarkað til tíðarskeiðið 1. apríl til 31. december 1976.

Ætlanin við uppskotinum var, at stuðulin eisini skuldi galda fyri seinasta túr 1976, bert túrurin er byrjaður í árinum, sjálvt um veiðan verður landað í 1977.

Síðani lógin er orðið soleiðis, at hon bert røkkur til veiðu, landað í 1976, verður fyriliggjandi uppskot sett fram.

Petur Reinert
landsstýrismaður

/ J. Djurhuus

1. viðgerð 6. januar 1977, málið beint í tíggjarnevndina sama 11. januar legði fram soljóðandi

J.nr. 1517-2-1.

Álit

21. december 1976 varð hetta mál framlagt av landsstýrinum og undir 1. viðgerð 6. januar 1977 leint í figgjarnevndina.

Figgjarnevndin er samd um at taka undir við landsstýrisins uppskoti.

Figgjarnevndin, 11. januar 1977.

Hákun Djurhuus	Poul Jacob Olsen	Hilmar Bech
Jógvan Durhaus	Johan Simonsen	Pauli Ellefsen
	Hilmar Kass	

2. viðgerð 28. januar, 3. viðgerð 1. februar.

Broytingaruppskot

frá sambandsflokkinum og sjálvstýrisflokkinum

§ 1 verður orðað soleiðis:

«Løgtingslóg nr. 41 frá 6. mai 1976 um bráðfongis stuðul til flaka- og saltfiskaveiðu verður framlongd til 31. december 1977.»

§ 1 formuleres som følger:

«Lagtingslov nr. 41 af 6. maj 1976 om midlertidig støtte til filé- og saltfiskfiskeri forlænges til 31. december 1977.»

Á Føroya løgtingi, 25. januar 1977.

Sambandsflokkurin	Sjálvstýrisflokkurin
Pauli Ellefsen	Hilmar Kass

Uppskot landsstýrisins varð samtykt við 19–0 atkvøðum, broytingaruppskot frá sambandsflokkinum og sjálvstýrisflokkinum fall við 8–14–4 atkvøðum.

24. Broyting í reglunum um flutningsstudning til avreiðing av feskfiski

Ár 1976 21. desember, legði Petur Reinert, landsstýrismaður fram

Uppskot
til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um minstuløn og annan stuðul til fiskivinnuna.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 69 frá 26. september 1974 um minstuløn og annan stuðul til fiskivinnuna verður gjørd henda broyting:

§ 4, 1. stk. c) verður orðað soleiðis:

«Fyri veiðu avreidd á plássum, har møguleikar ikki eru at virka veiðuna alla ella part av henni, og fann parturin, sum ikki kann virkast, beinanveg verður fluttur til nærmasta fiskavirki, 5 oyru fyri kg fyri henda partin av veiðuni.»

§ 2.

Henda lóg fær gildi beinanvegin.

lagtingslov om ændring i lagtingslov om mindsteløn og anden støtte til fiskerierhvervet.

§ 1.

I lagtingslov nr. 69 af 26. september 1974 om mindsteløn og anden støtte til fiskerierhvervet foretages følgende ændring:

§ 4, 1. stk. c) formuleres således:

«For fangst indhandlet på steder, hvor der ikke er muligheder for at tilvirke fangsten helt eller delvis, og den del af fangsten, der ikke kan tilvirkes, straks føres til nærmeste virksomhed til tilvirkning af fisk, 5 øre pr. kg for denne del af fangsten.»

§ 2.

Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

§ 4, 1. stk. c) í lógini er nú orðað soleiðis, at treyt fyri at fáa flutningsstudning til fiskavirki er, at veiðan, øll sum hon er, ikki kann virkast á avreiðingarplássinum, men má flytast. Nú kann nýmstoðurnar verða soleiðis, at partur av veiðuni kann virkast, eitt nú til saltfisk, meðan hin parturin má flytast.

J. nr. 1517-2-1

Mett verður, at tørvur eisini er at veita flutningsstuðning, um neyðugt er bert at flyta part av veiðuni.

Eisini er mælt til at hækka studningin úr 3 oyru í 5 oyru fyri kg.

Petur Reinert
landsstýrismaður

1. viðgerð 6. januar 1977, málið beint í figgjarnevndina, sum 27. januar legði fram soljóðandi

Álit

Málið varð lagt fram av landsstýrinum tann 21. desember 1976 og undir 1. viðgerð tann 6. januar 1977 beint í figgjarnevndina.

Eftir uppskotinum skal § 4, stk. 1 e), í løgtingslóg nr. 69 frá 26. september 1974 um minstuløn og annan studnil til fiskivinnuna orðast soleiðis:

«Fyri veiðu avreidd á plássum, har møguleikar ikki eru at virka veiðuna ella part av henni, og tann partur, sum ikki kann virkast, heimanvegin verður fluttur til næsta fiskavirki, 5 oyru fyri kg. fyri henda partin av veiðuni.»

Í løtuni er orðingin í lógini soleiðis, at treyt fyri at fáa flutningsstuðning til fiskavirkir er, at veiðan, øll sum hon er, ikki kann virkast á avreiðingarplássinum, men má flytast. Nú kunnu umstøðurnar vera soleiðis, at partur av veiðuni kann virkast, eitt nú til saltfisk, meðan hin parturin má flytast, og verður tí mett, at tørvur eisini er at veita flutningsstuðning, um neyðugt er bert at flyta part av veiðuni. Eisini er tann broyting í uppskotinum í mun til galdandi lóg, at studningurin verður hækkaður úr 3 oyrum upp í 5 oyru fyri kg.

Ein meiriluti (Hákun Djurhuus, Poul J. Olsen, Hilmar Beck og Jógvan Durhuus) mælir til at taka undir við uppskoti landsstýrisins.

Pauli Ellefsen og Asbjørn Joensen mæla til at orðingin í § 1, 2. petti «næsta fiskavirki» verður broytt til «annað fiskavirki.»

Annars var semja í nevndini um at heita á landsstýrið um moguliga at finna ein annan flutningsstuðningsform, tá ikki er gjørligt at avreiða á heimstaði, men fiskimennirnir sjálvir mugu flyta veiðuna .

Eisini at umhugsa spurningin um tað skulu verða virkini, ið skulu fáa studningin.

Ein minniluti (Pauli Ellefsen og Asbjørn Joensen) setir fram soljóðandi

Broytingaruppskot

Í § 1, stk. 2 verður orðið «mesta» broytt til «annað».	I § 1, stk. 2 ændres ordet «nærmeste» til «andet».

Figgjarnevndin, 27. januar 1977.

Håkun Djurhuus Poul J. Olsen Hilmar Beck
Jógvan Durhuus Pauli Ellefsen
Ashjørn Joensen

2. viðgerð 9. februar, 3. viðgerð 10. februar.

Uppskot landsstýrisins samtykt við 19--0 atkvøðum.

---

25. Broyting í lógini um ráfiskagrunnin

Ár 1976, 21. desember, legði Petur Reinert, landsstýrismaður, fram

Uppskot
til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um ráfiskagrunnin.	**lagtingslov om ændringer i lagtingslov om råfiskefond.**
§ 1.	§ 1.
Í løgtingslóg nr. 15 frá 5. mai 1975 um ráfiskagrunnin verða gjørdar hesar broytingar:	I lagtingslov nr. 15 af 5. maj 1975 om råfiskefond foretages følgende ændringer:
1) Í § 3, 1. stk. verður aftaná punkt 5) skotið inn: «Tá ið av-	1) I § 3, stk. 1 tilføjes efter punkt 5):

reiðingarprísur og avrokningarprísur fyri sild verður at áseta verður nevndin skipað soleiðis, at teir undir punktunum 1) og 3) nevndu limir ganga út og í staðin velja:

6) felagið Nótaskip 1 lim og 1 varamann og
7) keyparar av matsild 2 lim og 2 varamenn.»

2) Í § 6, 1. stk. verður skotið inn sum 2. punktum:
«Fyri sild verður avreiðingarprísurin áseltur fyrstu ferð fyri januar mánaða 1977 og víðari fyri 4 mánaðar í senn.»

3) Í § 7, 1. stk. verður aftaná punkt 4) skotið inn:
«Tá ið talan er um prísavgerðir fyri sild verður kærunevndin skipað soleiðis, at teir undir punktunum 1) og 2) nevndu limir ganga út og í staðin velja:
5) Føroya Fiskimannafelag 1 lim og 1 varamann og
6) keyparar av matsild og útflutningsfeløg 1 lim og 1 varamann.

4) Í § 10, 1. stk. verður skotið inn aftaná orðið «fisk» orðini: «sild krevst tó ikki blóðgað».

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.

«Ved fastsættelsen af indhandlingspris og afregningspris for sild sammensættes udvalget således, at de under punkterne 1) og 3) nævnte medlemmer udgår og i stedet vælger:
6) foreningen Nótaskip 1 medlem og 1 suppleant og
7) købere af madsild 2 medlemmer og 2 suppleanter.»

2) I § 6, stk. 1 tilføjes som 2. punktum:
«Indhandlingsprisen for sild fastsættes første gang for januar måned 1977 og derefter for 4 måneder ad gangen.»

3) I § 7, stk. 1 tilføjes efter punkt 4):
«Ved prisfastsættelsen for sild sammensættes ankenævnet således, at de under punkterne 1) og 2) nævnte medlemmer udgår og i stedet vælger:
5) Føroya Fiskimannafelag 1 medlem og 1 suppleant og
6) købere af madsild og eksportforeninger 1 medlem og 1 suppleant.»

4) I § 10, stk. 1 indføjes efter ordet «sortering» ordene:
«sild kræves dog ikke strubeskåret».

§ 2.

Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Lógin um ráfiskagrunnin hevur til endamáls at tryggja tí partinum av føroyska fiskiflotanum, ið avreiðir feskan fisk til fiskavirkir í Føroyum javnan avreiðingarpris fyri longri tíðarskeið.

Hóast orðingin er so viðgongd, at fesk sild eins og annar feskur fiskur — eftir orðingini — er undir lógini, var ikki ætlað, at sildaavreiðingar í

Føroyum, tá lógin varð samtykt, skuldi koma undir reglurnar um tvungna ásetan av avreiðingarprísi og avrokningarprísi. Sama trongdin, sum fyri hin partin av fiskiflotanum, var helt ikki tilstaðar, tá ið hugsað er um inntøkurnar hjá fiskimonnum í sildaveiðu.

Í samband við, at løgtingið fyri tíðarskeiðið 15. september 1975 til 1. juli 1976 samtykti eina studningsskipan, tá ið føroysk skip landa sild í Føroyum til matna, varð sett nevnd at fylgja við og at hava eftirlit við avreiðingarprísinum á sild, jbr. løgtingsmálini nr. 18 og nr. 51 í løgtingssetuni í 1975. Studningsskipanin er nú farin úr gildi, og nevndin er ikki til longur.

Sum fört fram í øðrum máli í hesi tingsetu, mælir landsstýrið til at endurnýggja studningsskipanina fyri avmarkað tíðarskeið.

Endamálið við fyriliggjandi lógaruppskoti er, at sildalandingar koma undir somu reglur sum aðrar landingar av feskum fiski um tvungna áseting av prísi. Trongdin at fáa tær avmarkaðu loyvdu veiðumøgdirnar til Føroyar er nú størri og tí eisini tørvurin at tryggja manning og skipum rímiligar prísir.

ad punkt 1: Eftir uppskotinum hava teir tveir nýggju limirnir bert við prísásetingina at gera, og ikki við fyrisiting grunnsins og við reglugerðina.

ad punkt 2: Skotið er upp, at avreiðingarprísirnir verða ásettir fyri somu tíðarskeið sum fyri annan fisk.

ad punkt 3: Tá ið tað í staðin fyri lim fyri ráfiskakeypara verður skotið upp at seta lim fyri keypara av matsild, er tað fyri at siga, at limurin í hesum føri skal vera ráfiskakeypari av matsild. Keypari av matsild hevur tí somu skyldu eftir lógini sum aðrir ráfiskakeyparar hava, eitt nú tøgnarskyldu.

1. viðgerð 6. januar 1977, málið beint í figgjarnevndina, sum 27. januar legði fram soljóðandi

Álit.

Málið varð lagt fram av landsstýrinum tann 21. desember 1976 og undir 1. viðgerð tann 6. januar 1977 beint í figgjarnevndina.

Endamálið við lógaruppskotinum er, at sildalandingar koma undir somu reglur sum aðrar landingar av feskum fiski um tvungna ásetting av prísi. Landsstýrið vísir á at trongdin at fáa tær avmarkaðu loyvdu veiðumøgdir-

nar til Føroyar eru nú størri og tí eisini førvurin at tryggja manning og fiskiskipum rímmligar prísir.

Fíggjarnevndin kann einmælt taka undir við uppskoti landsstýrisins.

2. viðgerð 4. februar.

3. viðgerð 9. februar.

Uppskot landsstýrisins samtykt við 21- 0 atkvøðum.

---

26. Regulering av útróðrastudninginum

Ár 1976, 21. desember, legði Petur Reinert, landsstýrismaður, fram

Uppskot
til

løgtingslóg um fyribils avmarking í reguleringini av studninginum til avreiðing av feskum fiski.

§ 1.

Fyri tíðarskeiðið 1. oktober 1976 til 31. mars 1977 verður § 4, 1. stk. í løgtingslóg nr. 69 frá 26. september 1974 um minstuløn og annan stuðul til fiskivinnuna broytt soleiðis, at studningurin til avreiðing av feskum fiski ikki kemur niður um 15 oyru fyri kg.

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi beinanvegin.

lagtingslov om en foreløbig afgrænsning i reguleringen af tilskudet til indhandling af frisk fisk.

§ 1.

For perioden 1. oktober 1976 til 31. marts 1977 ændres § 4, stk. 1 i lagtingslov nr. 69 af 26. september 1974 om mindsteløn og anden støtte til fiskeriet således, at tilskudet til indhandling af frisk fisk ikke bliver mindre end 15 øre pr. kg.

§ 2.

Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Sum lógin upprunaliga - - í 1974 varð orðið, kundi studningurin til manningina á føroyskum fiskifari, ið avreiðir feskan fisk í Føroyum, við hækkandi avreiðingarprísi, lækkast við 1 oyra fyri hvørji 10 oyru, fiskaprísurin hækkaði í meðal, tó onguntið niður um 15 oyru fyri kg. Botnmarkið varð í samband við heildarloysnina tikið av.

1. oktober í ár vóru avreiðingarprísirnir hækkaðir so mikið, at studningurin kom niður í 13 oyru.

Landsstýrið metir inntøkurnar hjá hesum partinum av fiskiflotanum í mun til inntøkulegana hjá fólki annars soleiðis, at botnmarkið 15 oyru fyri studningin eigur at verða sett í gildi fyri avmarkað tíðarskeið ella fyri oktober ársfjórðing 1976 og januar ársfjórðing 1977.

1. viðgerð 6. januar 1977, málið beint í fíggjarnevndina, sum 27. januar legði fram soljóðandi

Álit

Málið varð lagt fram av landsstýrinum tann 21. desember 1976 og undir 1. viðgerð tann 6. januar 1977 beint í fíggjarnevndina.

Eftir uppskotinum verður lóggávan á hesum øki broytt soleiðis, at studningurin til avreiðing av feskum fiski ikki kemur niður um 15 oyru fyri kg. Reglan er ætlað at hava gildi frá 1. oktober 1976 til 31. mars 1977.

Fíggjarnevndin kann einmælt taka undir við uppskoti landsstýrisins.

2. viðgerð 4. februar

3. viðgerð 9. februar.

Uppskot landsstýrisins samtykt við 21 - 0 atkvøðum.

27. Broyting í skattalógini

Ár 1977, 6. januar, legði Sambandsflokkurin fram soljóðandi

Uppskot
til

løgtingslóg um broyting í skattalógini.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 50 frá 2. juli 1963 um landsskatt og kommunuskatt við seinnri broytingum verða gjørdar hesar broytingar:

1. § 9, 10. stk. verður orðað soleiðis:
   «20% av tí vinningsbýti, sum verður latið frá feløgum, sum koma inn undir lóg um skatting av partafeløgum v.m. til skattgjaldarar, sum hava fulla skattskyldu í Føroyum.»
2. § 10 fellur burtur.
3. § 14 5)a fellur burtur.
4. § 24, 1. stk. og 2. stk.: Aftaná «eiga heimstað her á landi» verður sett: «og sum ikki koma undir lóg um skatting av partafeløgum v.m.».

§ 2.

Henda lóg fær gildi samstundis sum løgtingslóg nr. .... frá .... um skatting av partafeløgum v.m.

lagtingslov om ændring i skatteloven.

§ 1.

I lagtingslov nr. 50 af 2. juli 1963 om landsskat og kommuneskat foretages følgende ændringer:

1. § 9, stk. 10 formuleres således:

   «20% af det udbytte, som ydes af selskaber under lov om beskatning af aktieselskaber m.v. til skatteydere, der er under fuld skattepligt på Færøerne.»
2. § 10 udgår.
3. § 14, 5)a udgår.
4. I § 24, stk. 1 og stk. 2 indføjes efter ordene: «på Færøerne hjemmehørende selskaber» følgende: «og som ikke kommer under lov om beskatning af aktieselskaber m.v.»

§ 2.

Denne lov træder i kraft samtidig med lagtingslov nr. .... af ..... om beskatning af aktieselskaber m.v.

Viðmerkingar:

Vísst verður til viðmerkingarnar í løgtingsmáli nr. 28/1976: Skatting av partafeløgum.

Á Føroya løgtingi, 6. januar 1977.

Sambandsflokkurin.

1. viðgerð 27. januar 1977, málið beint í figgjarnevndina, sum legði fram felagsálit 1. februar.

Felagsálit
í

løgtingsmálum nr. 27/1976: **Broyting í skattalógini,**
nr. 28/1976: Skatting av partafeløgum,
nr. 29/1976: Broyting í løgtingslóg um íløgugrunnar,
nr. 31/1976: Broyting í skattalógini,
nr. 32/1976: Broyting í løgtingslóg um skattligar avskrivingar, og
nr. 33/1976: Broyting í løgtingslóg um íløgugrunnar.

Tey trý fyrst nevndu skattalógaruppskotini legði sambandsflokkurin fyri løgtingið 6. januar 1977, meðan landsstýrið framlegði tey trý seinast nevndu uppskotini 25. januar í ár. Øll skattalógaruppskotini fingu 1. viðgerð undir einum 27. januar og vórðu tá beind í skattanevndina.

Eisini skattanevndin hevur viðgjort tey 6 lógaruppskotini samtíðis og undir einum og heldur tað tí verða náttúrligt, at tey í felagsáliti verða løgd fyri tingið.

Nevndin hevur býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Heðin M. Klein, Jógvan Sundstein, Hilmar Bech og Jona Henriksen) loyvir sær at føra fram hetta:

Uppskot sambandsflokksins í løgtingslánum nr. 27 og 28 miða ímóti at gera serliga lóg fyri partafelagsskatting burturav og samsvarandi broytingar í skattalógini frá 1963 við seinni broytingum. Høvuðsbroytingarnar í partafelagsskattingini eru smb. uppskot sambandsfloksins, at partafeløg verða skattað við 30% av tí peningahædd, sum skattskyldiga inntøkan (við skattafrádrátti) er hægri enn inntøkufrádrátturin, at inntøkufrádrátturin er 5% av inngoldnum partapeningi við nærri avmarkingum, at frádrigin inntøku móttakarans verða 20% av tí vinningsbýti, sum verður latið fir partafeløgum v.m. í løgtingsmáli nr. 29 er høvuðsbroytingin tann, at avseting í íløgugrunn verður hækkað upp í 30%.

Meirilutin heldur ikki, at uppskot sambandsfloksins verða at skapa rímiliga skatting av partafelogum. Í fyrsta lagi fara uppskotini ivaleyst, verða tey samtykt, at bera í sær, at fólk fara at seta pening í partafelog við tí eina endamáli, at sleppa lættari í skatti. Í øðrum lagi er meirilutin av tí áskoðan, at uppskot sambandsfloksins vilja eggja til spekulatión við partafeløgum.

Meirilutin mælir tí frá at samtykkja uppskot sambandsfloksins.

Til tey 3 landsstýrisuppskotini skal meirilutin loyva sær at viðmerkja.

Landsskattingin.

Landsstýrið skjýtur upp, at skattamarkið til landskassan verður hækkað, fyri leys upp í 10.000 kr. og fyri uppihaldarar upp í 15.000 kr. Avisur skattalætti verður latin teimum lægru inntøkunum, og er lættin minkandi í % av skattskyldugu inntøkuni, jú hægri inntøkan verður, til hann at enda heldur at siga uppat - - fyri leys, tá ið skattskylduga inntøkan er 50.000 kr. og fyri uppihaldarar, tá ið hon er 60.000 kr. Tað svarar til bruttoinntøku upp á ávikavist eina 80.000 kr. og 90.000 kr.

Ymsar broytingar verða gjørdar viðv. ímsendan av sjálvuppgávum hjá løntakarum og roknskaparskyldugum og av lønarseðlum v.m. Ymsar aðrar freistir, eitt nú kærufreist skattgjaldarans viðvíkjandi broytingum í sjálvuppgávuni og freist kommunala líkningarvaldsins at senda inn skattalistan til líkningarráðið, verða somuleiðis longdar.

Partafelagsskattingin.

Lógargreinirnar viðv. partafelagsskatting verða framvegis í lóg nr. 50 frá 2. juli 1963 um landsskatt og kommunuskatt við seinni broytingum.

Høvuðsbroytingarnar, sum landsstýrið skjýtur upp, eru hesar:

Partafeløg verða skattað við ávísum procentsatsum, tær fyrstu 40.000 kr. við 36%, tær næstu 60.000 kr. við 42% og yvir 100.000 kr. við 48%. Frádráttarin upp á 6% av partapeninginum fellur burtur.

Galdandi regla um skatting av fripartabrøvum verður avtikin.

Avgjald til landskassan upp á 12,5% verður lagt á útlutað vinningsbýti.

Fyri vinningsbýti, tá ið felag verður avtikið, verður avroknað alt, sum útlutað verður avvarðandi partaeigara meira enn av inngoldnum partapeningi.

Møguleiki verður at avseta í serligan **rakstrargrunn.** Avsetingin verður í mesta lagi 15% av skattskyldugari inntøku áðrenn skattafrádrátt og áðrenn avseting til íløgugrunn, tó í mesta lagi 400.000 kr. árliga. Avsetingin skal í seinasta lagi 5. inntøkuárið inntøkuførast aftur.

Partafeløg, har meirilutin av partapeninginum er á sama hondum, skulu hava sama roknskaparár. Líkningarráðið kann í serstokum fori geva undantak.

Í løgtingsmáli um broyting í løgtingslóg um **íløgugrunnar** skjýtur landsstýrið upp, at partafeløg v.m. fáa møguleika at avseta í mesta lagi 30% í íløgugrunn. Ætlanin er, at hendu avseting skal fara fram áðrenn skattafrádrátt og áðrenn avseting í rakstrargrunn, men hetta verður ikki nevnt í landsstýrisuppskotinum. Skattanevndin setur tí fram broytingaruppskot, so § 4, 1. stk. í løgtingslóg nr. 50 frá 23. december 1971 um íløgugrunnar fær nýtt orðaljóð samsvarandi tí, sum her er framført.

Avskrivingarlógin.

Landsstýrið hevur skotið upp at gera nýggja broyting í § 16b í løglingslóg nr. 52 frá 29. december 1971 við seinni broytingum. Broytingin miðar ímóti at avmarka avskrivingarnar soleiðis, at tær í mesta lagi verða ⅓ av av aðrari inntøku enn skiparakstri við frádrátti, men uttan skattafrádrátt.

Tá ið løgtingsmál nr. 2/1971: Skattligar avskrivingar v.m. var til 2. viðgerðar 18. december 1971, legði J. Fr. Øregaard fram broytingaruppskot til lógaruppskotið, sum avmarkaði árligu avskrivingina soleiðis, at skattskylduga inntøkan varð minst líka stór sum livikostnaðurin eftir tí til eina og hvørja tíð galdandi prístalsgrundarlag. Broytingaruppskotið varð samtykt við 20—0. Meirilutin mælir til, at henda skipan framvegis verður galdandi.

Í viðmerkingunum til uppskotini boðar landsstýrið frá, at tað alsamt arbeiðir við nýskipanum og broytingum í skattalógunum og hevur sett sær sum mál seinni í hesi tingsetu at koma við fleiri uppskotum. Somuleiðis boðar landsstýrið frá, at tað arbeiðir fram ímóti at gera broytingar í frádráttunum, her undir rentufrádráttunum, at tað arbeiðir fram ímóti at skapa bruttoskatting og serskatting av hjúnum. Harumframmt er meirilutin vitandi um, at landsstýrið arbeiðir við spurninginum um, hvørja ávirkan arbeiðsinntøka hevur á pensiónsupplæddina hjá pensjónistum einkjum, avlamnum, fólkapensjónistum o.ø. — — við tí fyri eyga, at lækkingin av pensjónini skal fara fram seinri.

Eisini hevur landsstýrið gjørt uppskot um hækking av einkjupensjónini. Hetta uppskot er í løtuni til endaliga viðgerð í sosialmálaráðnum. Meirilutin hevur umhugsað at gera ymsar broytingar í frádráttunum, men av tí at landsstýrið hevur boðið frá broytingum júst her, setur meirilutin einki uppskot fram hesum viðvíkjandi.

Meirilutin tekur undir við uppskotum landsstýrisins í løgtingsmáli nr. 31: Broyting í skattalógini, nr. 32: Broyting í løgtingslóg um skattligar avskrivingar og nr. 33: Broyting í løgtingslóg um fløgugrunnur — — við tí broyting, sum skotin er upp niðanfyri.

Ein samd nevnd setur fram soljóðandi

Broytingaruppskot
til
uppskot landsstýrisins í løgtingsmáli nr. 33/1976: Broyting í løgtingslóg um íløgugrunnar.

§ 1 fær hetta orðalag:

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 50 frá 23. december 1971 um íløgugrunnar verður gjørd henda broyting:

§ 4, 1. stk. fær hetta orðalag:

Avsetingin verður roknað av avlopinum av sjálvstøðugum vinnuvirki í avsetingarárinum - - uppgjørdum eftir reglunum fyri uppgerð av skattskyldugari inntøku utan skattafrádrátt og uttan avseting í raksfrargrunn við teim á lesi avlopsuppgerð viðtiknu rentuútreiðslum afturathøgdum og rentu- og vinningsbýtisinntøkum frádrignum. Avsetingin kann fyri tey í § 14 nr. 5 í løgtingslóg nr. 50 frá 2. juli 1963 um landsskatt og kommunuskatt umrøddu feløgum v.m. í mesta lagi vera 30% og fyri aðrar skattgjaldarar 20%. Avsetingin skal í minsta lagi vera 5.000 kr.

§ 1 formuleres som følger:

§ 1.

I lagtingslov nr. 50 af 23. december 1971 om investeringsfonds foretages følgende ændring:

§ 4, stk. 1 affattes sådan :

Henlæggelsen beregnes af overskuddet af selvstændig erhvervsvirksomhed i henlæggelsesåret — opgjort efter reglerne for opgørelse af skattepligtig indkomst uden skattefradrag og uden henlæggelse til driftsfond med tillæg af renteudgifter og fradrag af rente- og udbytteindtægter, som indgår i opgørelsen af dette overskud. Henlæggelsen kan for de i § 14 nr. 5 i lagtingslov nr. 50 af 2. juli 1963 om landsskat og kommuneskat omhandlede selskaber m.v. højst andrage 30% og for andre skatteydere 20%. Henlæggelsen skal mindst andrage 5.000 kr.

Minnilutin (Pauli Ellefsen) førir fram:

Undanfarna landsstýri gjørdi eitt stórt arbeiði við at fáa til vega haldgott tilfar sum grundarlag undir einari umlegging av føroyska skattaskipanini. M.a. læt ein av táverandi landsstýrið sett serlig skattanevnd álit frá sær í 1974. Sambandsflokkurin, sum hevði figgjar- og skattamál um hendi, kom at standa uttanfyri samgongu í inniverandi valskeiði og hevur hetta náttúrliga fört við sær álvarsligan steðg í umleggingina av okkara skattaskipan.

Út frá teimum uppskotum, sum núverandi samgonguflokkar hava lagt fram, sær tað fyri okkum út til, at heilt onnur politisk hovuðssjónarmið liggja aftan fyri tær broytingar, sum nú skulu fremjast. Sambandsflokkurin hevur serliga lagt dent á, at samfelagsbyrðan, her undir skattabyrðan, verður rímiliga úllýtt á teir einstøku borgararnar. Væl vitandi at føroyska

vinnulívið, her fyrst og fremst fiskivinnan, er og framvegis eigur at verða høvuðsinntøkukelda okkara, ynskir sambandsflokkurin, at tær til eina og hvørja tíð galdandi skattareglur skulu leggjast soleiðis til rættis, at fyritakssemi føroyinga, bæði heima og úti, verða stuðlað á ein rímligan hátt. Hin vegin vilja vit helst forða fyri, at hesar sonnu skattareglur koma einstøkum persónum til ov stóran fyrimun. Í fyrru helvt av sjeytiárunum var tað so avgjørt neyðugt, at nógvar og stórar íløgur vórðu framdar innan okkara fiskivinnu. Fyri at náa eitum nóg góðum úrsliti samtykki løgtingið í 1971 nýggjar avskrivingarreglur. Hesar avskrivingarreglur vóru so rúmar, at summir einstaklingar við at útnytta tær heilt og fult, saman við øðrum stuðlandi tiltøkum frá almennari síðu, t.d. studningsláni og studningi til skip fingu persónligar fyrimunir, sum vóru størri enn ynskiligt var.

Fyri í størst møguliga mun at sleppa undan minni heldigum avleiðingum av stuðlandi tiltøkum frá ti almenna til føroyska vinnulívið hevur sambandsflokkurin ferð eftir ferð vist á, at inntøku-, skatta- og figgjarviðurskiftini hjá sjálvari vinnuni og hjá teimum einstaklingum, sum eiga vinnuna í størst møguligan mun verða atskild.

Lættasti og mest rímligi vegurin til at náa hesum máli er at leggja lóggávuna soleiðis til rættis, at menn fáa hug til og siggja fyrimun við at leggja vinnuna inn í partafeløg. Partafeløg eru serligir juridiskir persónar og soleiðis skattliga og figgjarliga atskild frá teimum, sum eiga sonnu partafeløg. Ein avgerandi fyrimunur við partafeløgum er, at eigararnir bert hefta við innskotnum peningi, um ikki onnur serlig skuldbinding er avtalað.

Higartil hevur tað í Føroyum, í mótsetning til t.d. Danmark, ikki verið talan um skattligar fyrimunir av týðningi við at reka partafeløg. Fyri at bøta um hesi viðurskifti legði sambandsflokkurin fram uppskot um serliga partafelagsskattalóg. Um uppskotið varð samtykt, høvdu menn fingið fyrimun av at lagt vinnuvirkir inn í partafeløg. So høvdu vit í størri mun fingið atskilt vinnuna frá teimum, sum eiga hana. Í fyrsta lagi hevði hendan umlegging kostað landskassa, og í ein ávisan mun, eisini kommununum mista skattainntøku. Men ikki meira enn at henda samfelagsiløga eftir heilt stuttari tíð hevði verið goldin aftur og meira afturat, deils beinleiðis orsakað av hægri persónligari inntøku hjá partafelagseigarunum, deils óbeinleiðis orsakað av oktum fyritakssemi. Uppskot samgongunnar vil føra við sær, at flest øll partafelog verða enn harðari skattað av skattskyldugu inntøkuni. Hin vegin eru ávisir smærri møguleikar fyri at seinka hesi hørðu skatting. Hesir møguleikar eru ikki av serligum týðningi.

fleggingar í íløgugrunn krevja nógvan pening (meira og fyrr enn um ein ikki leggur í íløgugrunn) og gevur bert fáum feløgum veruligan fyrimun av týdningi. Rakstrargrunnurin kann geva fyrimun ley allar fyrstu árini, men vil geva tilsvarandi størri trupulleikar, tá tiðin er úti og avsetingarnar skulu inntøkuførast uttan mun til, um hetta passar inn í figgjarligu gongdina hjá felagnum ella ikki. Til ta tíð kann felagið koma til fyri at skula gjalda skatt, sjálvt um rakstur in hevur givið heinleiðis hall. Undir fyrstu viðgerð løgdu framsøgumenninir fyri samgongufloklkarnar dent á, at uppskot sambandsfloksins um lóg um skatting av partafeløgum fór at eggja monnum til at gera partafeløg, og tí kundu fólkaflokkurin, javnaðarflokkurin og tjóðveldisflokkurin ikki taka undir við hesum uppskoti. Hetta er týðilig tala og undirstrikar tað, sum vit hava havt varhuga av. Nevniliga, at samgongufloklkarnir ikki vilja gera reglur um skatting av partafeløgum, sum eggja til, at partafeløg verða stovnað. Lógaruppskotini hjá samgonguni geva eisini fullgott prógv um hesa innstilling, fyri tað fyrsta tørvandi hug til at styrkja um okkara vinnuligu partafeløg, men eisini fyri tað næsta at samgongan yuskir at virðisløna teimum, sum kunnu vika um og helst tøna verandi partafeløg - - jb. uppskotið um 12½% avgjald av vinningsbýti og likvidatiónsprovenue v.m.

Sanniliga merkir ein týðiligan mótvind, tá talan er um at verja og livga føroyska vinnulivið, sum umfram mótstøðu frá sitandi stýri hevur ívaleyst av trupulleikum at takast við.

1 uppskotinum til broyting av skattasligantum hevur landsstýrið havt eina minni óhepna hond. Tann ájourføring, sum her verður framd í landsskattinum av lág- og miðalinntøkum er neyðugt og rætt. At talan ikki verður um veruligan skattalætta av týdningi er óneyðugt at viðmerkja. Tað vil tann einstaki skattaborgarin merkja, tá skattarokningin kemur.

Hin vegin er uppskot landsstýrisins um broyting av avskrivingarreglunum beinleiðis órættvíst. Eftir hesum uppskoti, samanhildið við reglurnar um, at ikki er loyvt at avskriva niður um eina skattskylduga inntøku áðrenn skattafrádrátt uppá umleið kr. 44.000, hevur ein skattaborgari við lág- ella meðalinntøku lítlan og ongan moguleika fyri at fáa avskriving yvirhøvur. Hetta mistak hevur minnilutin rettað uppá við niðanfyri standandi broytingaruppskoti.

Sum fyrr nevnt hevur sambandsflokkurin í undanfarnu samgongum verið við til og stílað fyri einum stórum kanningararbeiði viðvíkjandi okkara framtíðar skattareglum.

Sitandi samgonga kundi yvirtaka úrslitini av hesum arbeiði, og vænta eina vil, at naknað mumagott fór at spyrjast burturúr.

Núverandi landsstýri sigur seg hava stórar og góðar ætlanir. Fleiri av hesum ætlanum eru, tí hvussu so er av navni, lær somu sum undanfarna landsstýri hevur lagt lunnarnar undir, t.d. skatting av hjúnum. Út frá teim-

um trupuleikum og tí ósemju, sum eftir øllum at døma er innan samgongumá, metir minnilutin, at tað fer at taka rúma tíð at fáa fram uppskot um veruliga bøtta føroyska skattaskipan. Tí loyvir minnilutin sær at seta fram nøkur broytingaruppskot til galdandi lóg um kommunuskatt og landsskatt.

Um hesi broytingaruppskot kann í stuttum sigast:

1. Fiskimannafrádráttur, nú nevndur sjómannafrádráttur, verður eisini veittur føroyskum útróðrarmonnum og føroyskum fiskimonnum við útlendskum fiskiskipum. Sjómannafrádrátturin er skotið upp til kr. 300 fyri hvønn siglingarmánaða og kr. 10 fyri hvønn útróðrardag.
2. Skotið er upp, at allir føroyskir skattgjaldarar eftir 3 árum eru gingnir yvir til roknaðan skattafrádrátt.
3. Gift kona, sum fer úr starvi ella vinnu, eigur at fáa skattalætta. Hesin skattalætti verður partvis kravdur inn aftur, um sama kona fer aftur í starv ella vinnu, áðrenn 3 ár eru gingin.
4. Skotið er upp, at einkjur fáa frádrátt í inntøku frá starvi ella vinnu. Hetta deils fyri at líkastilla tær við giftar konur, deils og fyrst og fremst fyri at minka um missin í einkjupensjón orsakað av, at einkja fer í starv ella vinnu.

Minnilutin maelir løgtinginum til at samtykkja tey trý lógaruppskotini, nr. 27, 28 og 29, sum Sambandsflokkurin hevur lagt fram, og haraftarat at samtykkja tey broytingaruppskot, sum minnilutin hevur sett fram.

Broytingaruppskot
til

§ 1.

í § 16 b, 1. stk. verður aftaná orðini «15% av avskrivingarbæra saldovirðinum, tó í mesta lagi» sett «kr. 35.000 ella».

Broytingaruppskot
í

løgtingslóg um broytingar í løgtingslóg um kommunuskatt og landsskatt.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 50 frá 2. juli 1963 um kommunuskatt og landsskatt við seinari broytingum verða gjørdar hesar broytingar:

lagtingslov om ændringer i lagtingslov om kommuneskat og landsskat.

§ 1.

I lagtingslov nr. 50 af 2. juli 1963 om kommuneksat og landsskat med senere ændringer foretages følgende ændringer:

1) Í § 8 d verður í staðin fyri orðini «skattskylduga inntøkan» sett «skattskylduga inntøkan áðrenn skattafrádrátt».

2) Í § 9 verður nr. 7 orðað soleiðis:
a. Sjómenn, sum eru mynstraðir við fiskiførum, og sum fáa inntøku sum løn og/ella pari av veiðu, herundir minstuløn og prísviðbót, og sjómenn, sum eru við føroyskum farmaskipum, ið sigla uttanlands ella millum Føroyar og útland og ikki eru undir danskari sjómannaskatting, hava rætt til sjómannafrádrátt. Frádráttur in er kr. 300 fyri hvønn siglingmánaða í inntøkuárinum.
b. Undir sonnu treytum verður sami frádráttur loyvdur útiróðrarmonnum til lands í Grønlandi innanfyri tíðarskeið prógvført sum eftir reglunum í reglugerð fyri lønjavningargrunnin.
c. Útróðrarmonnum við føroyskum útróðrarbátum og -skipum, sum ikki eru mynstraðir, verður veittur sjómannafrádráttur uppá kr. 10 fyri hvønn útróðrardag, teir eru tiknir við á einum avrokningarseðli.

1) I § 8 d indsættes i stedet for ordene «skattepligtig indtægt» ordene «skattepligtig indtægt før skattefradrag».

2) § 9 nr. 7 affattes således:

a. Søfolk pånønstret fiskerskibe og som har deres indkomst som løn og/eller andel i fangst, herunder mindsteløn og pristilskud, og søfolk med færøske fragtskibe, som sejler udenlands eller mellem Færøerne og udland og som ikke er undergivet dansk sømandsbeskatning er berettiget til sømandsfradrag. Fradraget udgør kr. 300 for hver måned, vedkommende er pånønstret i indkomståret.
b. Under samme betingelser indrømmes fradrag for bådfiskere i Grønland for et tidsrum kokumenteret som foreskrevet i regulativ for Lønjavningargrunnin.
c. Fiskere med færøske både eller skibe, som ikke er pånønstrede, får sømandsfradrag kr. 10 for hver dag, de pågældende er medtaget på en afregningssedel.

3) Í § 9 verður nr. 8 orðað soleiðis:
a. Roknaðan skattafrádrátt eftir reglum, ið verða ásettar av landsstýrinum í samráð við fíggjarnevndina við kunngerð.
b. Við loyvi frá líkningarráðnum kann skattgjaldarin í staðin fyri frádrátt eftir nr. 8 a draga frá tað, sum goldið er í inntøkuárinum av álíknaðum skatti. Tílíkt loyvi kann til og við skattaárinum 1979/80 gevast til skattgjaldarar, sum ikki

3) I § 9 affattes nr. 8 således:

a. Beregnet skattefradrag efter regler, der fastsættes af landsstyret i samråd med finansudvalget ved kundgørelse.
b. Efter indhentet tilladelse fra ligningsrådet kan skatteyderen i stedet for fradrag efter nr. 8 a fradrage beløb, som i det pågældende indkomstår er udredet i påligning skatter. Sådan tilladelse kan til og med skatteåret 1979/80 gives

fyrr eru gingnir yvir til roknaðan skattafrádrátt.

4) 1 § 17 verður nýtt 5. stk. orðað soleiðis:

a. Sigur giftur maður frá, at kona hansara, sum eftir 1. stk. er skattað saman við honum, er farin úr starvi ella vinnu, liknar likningarráðið umaftur, soleiðis at helvtin av tí skatti, sum stavar frá inntøku konunnar, verður strikaður fyri tað tíðarskeið, sum eftir er av tí skattaári, konan fór úr starvi ella vinnu.

b. Um kona, skattað saman við manni eftir 1. stk. í inntøkuárinum er farin úr starvi ella vinnu og ikki aftur er farin í starv ella vinnu, sleppur maðurin við at vera skattaður av helvtini av inntøku konunnar frá tí starvi ella vinnu, hon er farin úr.

c. Fer kona aftur í starv ella vinnu áðrenn 36 mánaðar eru gingnir, síðan hon fór úr starvi ella vinnu, og er skattafyrimunur fingin eftir 5. stk. a og b liknar likningarráðið umaftur soleiðis, at tann parturin av samlaða skattafyrimunimum verður innkravdur, sum svarar til leir mánaðarnar, sum eftir eru av 36 mánaðum, síðan konan fór úr starvi ella vinnu.

5) Nýggj § 17 a verður orðað soleiðis:

5) Einkju, sum ikki uppfyllir treytirnar fyri at fáa fólkapensjón, og sum hevur inntøku frá starvi

skatteydere, som ikke forinden er gået over til heregnet skattefradrag.

4) 1 § 17 affattes nyt stk. 5 således:

a. Oplyser og dokumenterer den gifte mand, at den med ham i medfør af stk. 1 sambeskattede hustru, er holdt op med at drive selvstændig erhvervsvirksomhed eller arbejde udfærdiger likningarráðið en ny ansættelse således, at halvdelen af den skat, der er forårsaget af hendes indtægt, bliver eftergivet for det tidsrum, der er tilbage af det skatteår, hustruen forlod arbejdet eller erhverv.

b. Er hustru, som i medfør af stk. 1 er sambeskattet med den gifte mand, i indkomståret holdt op med arbejde eller erhverv, og ikke har genoptaget arbejde eller erhverv, slipper manden med at blive beskattet af halvdelen af hustruens indtægt fra vedkommende arbejde eller erhverv.

c. Genoptager hustru arbejde eller erhverv inden der er gået 36 måneder fra det tidspunkt, hun forlod arbejde eller erhverv, og har manden opnået skattefordele i henhold til stk. 5 a og b udfærdiger likningarráðið en ny ansættelse, således at den del af den samlede opnåede skattefordel bliver opkrævet, som svarer til de måneder der er tilbage af 36 måneder fra det tidspunkt, hustruen forlod arbejde eller erhverv.

5) Ny § 17 a affattes således:

5) Enke, som ikke opfylder betingelserne for at opnå folkepension, er berettiget til et fradrag,

ella vinnu, verður veittur frádráttur frá inntøkuni við helminginum av inntøkuni, tó í mesta lagi kr. 4.000 árliga.

svarende til halvdelen af indtægten fra arbejde eller erhverv, dog højst kr. 4.000 årlig.

Skattanevndin, 1. februar 1977.

Heðin M. Klein Jógvan Sundsteiu Hilmar Beck

Jona Henriksen Pauli Ellefsen

2. viðgerð 2. februar.

Uppskot Sambandsflokksins fall við 6-0 atkvøðum.

---

28. Skatting av partafeløgum

Ár 1977, 6. januar, legði Sambandsflokkurin fram

Uppskot
til

Løgtingslóg um skatting av partafeløgum v.m.

§ 1.

Skattskyldu eftir hesi lóg hava, tá tey eiga heima her í Føroyum:

partafeløg

onnur vinnufeløg, har sum ikki allir felagsmenn ábyrgjast persónliga fyri skuldbindingar felagsins og sum býta avlopið í luttfalli við lutin pening, sum felagsmenn hava lagt í felagið. Luttakarar í feløg-

Lagtingslov om beskatning af aktieselskaber m.v.

§ 1.

Skattepligt i henhold til denne lov påhviler her i landet hjemmehørende:

aktieselskaber

andre erhvervsdrivende selskaber i hvilke ikke alle deltagere hæfter personligt for selskabets forpligtelser og som fordeler overskuddet i forhold til deltagernes i

um, sum nú koma undir nevndu reglur, og sum eru stovnað áðrenn 20. apríl 1972, verða framvegis undir tá galdandi skattareglum viðvíkjandi rakstri av ognum, ið eru útvegaðar innan 20. apríl 1972 eins og skipsbyggisáttmálum gjørdum áðrenn nevnda dag, meðan rakstur av ognum, útvegaðar frá og við hesum degi, koma undir omanfyri nevndu reglur og skal roknskapurin verða lagdur til rættis eftir hesum.

§ 2.

Nýstovnað felog ella aðrar stovnamir, sum eiga heimstað her á landi jb. § 1 verða fyrsta ferð tikin við í skattsetingini fyri fyrsta skattaár aftaná, at fyrsta roknskaparskeið er gingið, og verða skattað av allari inntøkuni í hesum tíðarskeiði, sama hvussu langt tað er. Á samsvarandi hátt verður farið fram, tá áður stovnað felag o.s.fr., sum hava ikki verið skattskyldug higar til dags, taka upp virki, ið er skattskyldugt.

selskabets indskudte kapital. Deltagere i selskaber, som nu vil falde ind under her anførte regler, og som er oprettet inden 20. april 1972 behandles fremdeles efter dengang gældende skattemæssige regler for så vidt angår drift af aktiver anskaffet før 20. april 1972 samt af skibskontrakter indgået inden nævnte dato, hvorimod drift af nyanskaffelser fra og med nævnte dato behandles efter reglerne i denne lov og skal regnskabsafleggelsen indrettes herefter.

§ 2.

Nystiftede på Færøerne hjemmehørende selskaber jf. § 1 medtages første gang ved skattefastsættelsen for det skatteår som følger umiddelbart efter udløbet af første regnskabsperiode, og ansættes af hele indkomsten i denne periode uden hensyn til periodens længde. På tilsvarende måde forholdes i tilfælde, hvor bestående selskaber m.v. der hidtil ikke har været skattepligtige, overgår til skattepligtig virksomhed.

2. stk. Tá felog o.s.fr., ið eiga heimstað her á landi, verða tikin av ella laka upp skattfrælst virki, stendur skattskyldan við, til það skattaárið er úti, sum avtøkan ella uppføkan av skattafrælsum virki átti sær stað í. Umfram tað skal slíka felag o.s.fr. fyri sama skattaár verða sett serstakliga í inntøkuskatt av inntøkuni í tíðini frá útgongu roknskaparársins, ið síðsta vanliga skattseting felagsins er gjørd eftir, og til felagið varð tikið av ella tók upp skattfrælst virki. Likvidator, ávikavist nevndin, skal

Stk. 2. Når på Færøerne hjemmehørende selskaber m.v. opløses eller overgår til skattefri virksomhed, vedbliver skattepligten til udløbet af det skatteår, i hvilket opløsningen eller overgangen til skattefri virksomhed har fundet sted. Vedkommende selskab m.v. skal derhos for samme skatteår ansættes ekstraordinært til indkomstskat af indtægten for tiden fra udløbet af det regnskabsår, der er lagt til grund ved selskabets sidste ordinære skattefastsættelse, og indtil opløsningen eller over-

í seinasta slagi 4 vikur aftaná avtoku ella upptoku av skattfrælsum virki geva líkningarráðnum boð um hetta og leggja hjá yvirlit yvir inntøkurnar í nevnda tíðarskeiði; hetta yvirlit verður gjort eftir reglunum um sjálvuppgávu, um hesar annars eru hóskandi. Verður ikki boðað frá, soleiðis sum her er fyriskipað, verður likvidator, ávikavist nevndin, dømd í sekt so stóra, sum landsstýrið leggur á. Likvidator, ávikavist nevndin, kann eisini verða tvingað til at lata inn áðurnevndu boð og inntøknuppgerð við at dømdar verða dagbøtur, so stórar sum landsstýrið leggur á.

gangen til skattefri virksomhed. Om opløsningen eller overgangen til skattefri virksomhed skal likvidator, respektiv bestyrelsen, inden 4 uger tilstille ligningsrådet en anmeldelse, bilagt en opgørelse over indkomsten i det forannævnte tidsrum, på hvilken opgørelse reglerne om selvangivelse, for så vidt det er foreneligt med deres indhold, er anvendelige. Undlades den foreskrevne anmeldelse, ifalder likvidator, respektive bestyrelsen en bøde, hvis størrelse fastsættes af landsstyret. Indsendelse af anmeldelsen såvel som af den nævnte indkomstopgørelse kan fremtvinges ved påbud af daglige bøder, hvis størrelse fastsættes af landsstyret.

§ 3.

Skattskyldugu inntøkan verður gjørd upp eftir vanligu reglunum í lóggávuni um so er, at reglurnar eftir innihaldinum eru nýtiligar fyri feløg, umrødd í hesi lóg.

§ 3.

Den skattepligtige indkomst opgøres efter skattelovgivningens almindelige regler for så vidt de efter deres indhold er anvendelige på de i denne lov omhandlede selskaber.

§ 4.

Sum grundarlag undir skattaásetingini fyri givið skattaár fyri feløgini, umrødd í hesi lóg, verður nýtt tað inntøkuárið, sum gongur út í ella fellur saman við skattaárið beint frammanundan uttan so, at líkningarráðið hevur givið loyvi til, at annað inntøkuár verður lagt til grund. Inntøkuár nýtt frammanundan kann ikki verða vikið frá við skattaáseting seinni uttan loyvi frá líkningarráðnum.

§ 4.

Som grundlag for skatteansættelsen for et givet skatteår for de i denne lov omhandlede selskaber benyttes det indkomstår, der udløber i eller falder sammen med det foregående skatteår medmindre ligningsrådet har tilladt, at et andet indkomstår lægges til grund. Et tidligere benyttet indkomstår kan ikke ved senere skatteansættelsen fraviges uden tilladelse fra ligningsrådet.

§ 5.

Upp í skattskyldugu inntøkn hjá partafelag verður ikki taldur vinningur av virðishækking, tá parta-

§ 5.

Til den skattepligtige indkomst for et aktieselskab medregnes ikke overkurs, som et selskab opnår ved

felagið gevur út partabrøv ella veksur um partapeningin.

2. stk. Um partafelag við heimstaði her á landi, sum er undir ræði móðurfelags við heimstaði uttanlands, í handilsligu og figgjarligu viðurskiftum sínum við hetta felag er undirgivið øðrum korum, enn sjálvstøðuglig fyritøka hevði verið, skal upp í skattskyldugu inntøkuna hjá dótturfelagnum her verða taldur tann vinningur, sum ætlast má, at tað hevði havt, um tað var sjálvstøðug fyritøka, ið óheft gjørdi keyp við móðurfelagið.

§ 6.

Inntøkuskatturin fyri feløgini, umrødd í hesi lóg, er 30% av tí peningahædd, sum skattskylduga inntøkan er hægri enn inntøkufrádrátturin.

2. stk. Inntøkufrádrátturin er 5% av inngoldna partapeningi felagsins roknaður av áljóðandi virði partabrævanna, tó hægst ein triðingur av skattskyldugu inntøkuni. Inntøkufrádrátturin, soleiðis útroknaðnr kann tó hægst verða 50.000 kr. fyri einstaka partafelagið.

§ 7.

Aðrenn skatturin verður roknaður eftir reglunum frammanfyri, verður skattskylduga peninga-

udstedelse af aktier eller udvidelse af sin kapital.

Stk. 2. Såfremt et på Færøerne hjemmehørende aktieselskab, der kontrolleres af et udenfor Færøerne hjemmehørende moderselskab, i sine handelsmæssige eller økonomiske forbindelser med sidst nævnte selskab er underkastet andre vilkår end dem, som ville gælde for et uafhængigt foretagende skal til det herværende datterselskabs skattepligtige indkomst henføres den fortjeneste, som det må antages at ville have opnået, hvis det havde været et uafhængigt foretagende, der under frie vilkår afsluttede forretninger med vedkommende moderselskab.

§ 6.

Indkomstskatten for de i denne lov omhandlede selskaber udgør 30% af det beløb, hvormed den skattepligtige indkomst overstiger indkomstfradraget.

Stk. 2. Indkomstfradraget udgør 5% af selskabets indbetalte aktiekapital beregnet på grundlag af aktiernes pålydende værdi, dog højst en tredjedel af den skattepligtige indkomst. Det således beregnede indkomstfradrag kan højst andrage kr. 50.000 for det enkelte aktieselskab.

§ 7.

Inden skatten beregnes efter foranstående regler afrundes det skattepligtige beløb nedefter til

hæddin stytt niðureftir til nærmasta tal, ið býtast kann við 100.

§ 8.

Annars galda reglurnar í skattalóggávuni fyri feløgini, umrødd í hesi lóg, um reglurnar eru í semju við ásetanirnar í lógini.

§ 9.

Av inntøkuskattinum, goldin eftir reglunum í hesi lóg, eigur viðkomandi kommuna ella kommunur, har felagið hevur havt virki sitt, helvtina.

§ 10.

Landsstýrið ger eftir tilmæli frá Likningarráð Føroya reglugerð um neyva virðismetan av øllum tí, sum partaeigarar ella starvsfólk v.fl. fáa út úr partafelag út yvir kontantan pening — t.d. virði av frímum bústaði, privatari nýtslu av bili, vørum, tænastum o.s.fr.

2. stk. Landsstýrið ger eisini:

a. nærri reglur um hvussu tann skattur sum eftir hesi lóg tilkennur kommununum í ávísum førum skal býtast millum fleiri kommunur.
b. í samráð við fíggjarnevndina nærri reglur um roknaðan skattafrádrátt fyri partafeløg v.m.

§ 11.

Metanirnar í hesi lóg verða fyrstu ferð at nýta undir skattaálikningini fyri skattaárið 1977/78.

nærmest med 100 delelige kronebeløb.

§ 8.

Iøvrigt finder skattelovgivningens regler anvendelse på de i denne lov omhandlede selskaber for så vidt de er forenelige med de i denne lov givne bestemmelser.

§ 9.

Af den efter reglerne i denne lov udredede indkomstskat tilfalder halvdelen den eller de kommuner, hvori selskabet har drevet virksomhed.

§ 10.

Efter indstilling fra ligningsrådet udfærdiger landsstyret et reglement om en nøjere vurdering af alt det, som aktieejere eller funktionærer m.fl. modtager fra selskabet ud over kontante beløb, f. eks. værdien af fri bolig ,privat brug af bil, varer, tjenester o.s.v.

Stk. 2. Landsstyret udfærdiger også:

a. nærmere regler for hvordan skat, som efter denne lov tilfalder flere kommuner i visse tilfælde skal deles mellem flere kommuner.
b. i samråd med finansudvalget nærmere regler om beregnet skattefradrag for aktieselskaber m.v.

§ 11.

Bestemmelserne i denne lov finder første gang anvendelse ved skatteligningen for skatteåret 1977/78.

Viðmerkingar:

I august 1975 setti Sambandsflokkurin fram uppskot um serliga lóg um skatting av partafelogum v.m.

Uppskotið var beint í skattanevndina og hevur ikki fingið nakra viðgerð har.

Eftir okkara metan er ein serlig lóg um skatting av partafelogum v.m. eitt neyðugt og avgerandi stig til fremjan av eini meira vimiligari skatting av føroyska vinnulívinum.

Ein viðtøka av lógini vil samstundis gera tað møguligt, at skatting av teimum persónum, sum vinnulívið eiga, og av øðrum enn vinnulívsmonnum verður meira rættvís. Tað áttu at verið greitt fyri øllum, at ein ikki kann fáa eina bert nøkunlunda rættvisa skattaskipan, um ein nýtir sonnu skattareglur til skatting av t.d. einum løntakara, einum flakavirki og einum stórum fjarfiskiskipi. Eftir okkara tykki er tað av avgerandi týdningi í størst møguligan mun at skilja sundur skattingina av føroyska vinnulívinum og skattingina av teimum einstøku persónunum.

Vit ganga t.d. inn fyri, at føroyska vinnulívið fraunvegis fær góðar og bøttar avskrivingarreglur v.m. Hin vegin kunna vit ikki góðtaka, at persónar, sum eiga og reka vinnuna framyvir í eins stóran mun kunnu mótrokna avskrivingar í inntøku, sum verður nýtt til privatnýtslu. Hesir spurningar og aðrir týðandi skattaspurningar kunnu bert loysast á haldgóðum grundarlagi, um serligar skattareglur verða gjørdar fyri ávikavist vinnuliv og persónar.

Tær í lógini nevndu reglur føra við sær, at partafelog v.m. gjalda lutfalsliga nøkunlunda javnan skatt. Fyrisligið er ein skattaprocent uppá 30.

Aðrenn skatturin verður roknaður kann verða drigið frá ein inntøkufrádráttur uppá 5% av inngoldnum partapeningi, tó við ávísum avmarkingum. Hetta fyri at eggja til at meira verður sett í vinnuna.

Lógin er bert galdandi fyri skattgjaldarar, sum hava fulla skattskyldu her á landi. Um útlendsk felog v.m. við avmarkaðari skattskyldu skulu fáa lut í hesum fyciminum, verða tey at stovna serligt føroyskt felag.

Við broyting í lógini um landsskatt og kommunuskatt - - sum samstundis er sett fram sum uppskot - verður givið partaeigarum ein skattafrádrátt uppá 20% av ti vinningsbýti, sum verður vunnið frá felogum skattað eftir hesi lóg. Henda broyting er eisini fyrisligin fyri at eggja til at seta mest møguligt í føroyska vinnulívið, og her umframt fyri at minka um dupultskattingina.

Galdandi millumlandaavtalur forða fyri, at skattur verður tikin av vinningsbýti frá føroyskum felogum til útlendskar partaeigarar. Heitt verður á landsstýrið um at kanna í lívsins mun vil kunna fáa broytt hesar reglur.

Fyri at tryggja at alt, sum kemur út úr felogunum, verður skattað fult

út er í uppskotinum álagt landsstýrinum eftir tilmæli frá líkningarráðnum at gera nærri reglur um virðismetan av øllum, sum felagið letur partaeigarum, starvsfólki og øðrum — t.d. virði av frítum bústaði, privatari nýtslu av bili, vørum, tænastum o.s.fr.

Á Føroya Løgtingi, 6. januar 1977.

Sambandsflokkurin.

1. viðgerð 27. januar, málið beint í skattanevndina, sum legði fram felagsálit 1. februar.

(Sí felagsálit í løgtingsmáli nr. 27/1976: Broyting í skattalógini).

2. viðgerð 2. februar.
Uppskot Sambandsflokksins fall við 6—0 atkvøðum.

---

29. Broyting í løgtingslóg um íløgugrunnar

Ár 1977, 6. januar, legði Sambandsflokkurin fram

Uppskot
til

løgtingslóg um broyting í lóg um íløgugrunnar.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 50 frá 23. december 1971 um íløgugrunnar verða gjørdar hesar broytingar:

1. Í § 4 verður «20%» broytt til «30%».

lagtingslov om ændring i lov om investeringsfonds.

§ 1.

I lagtingslov nr. 50 af 23. december 1971 om investeringsfonds foretages følgende ændringer:

1. I § 4 ændres «20%» til «30%».

2. Í § 5, 1. petti verða orðini «á Føroya gjaldstovu» broytt til «í føroyskum banka ella sparikassa» og «50%» broytt til «30%».
3. § 5, 3. petti gongur út.
4. Í § 16 verður «50%» broytt til «30%».

2. I § 5, stk. 1 ændres ordene «på Føroya Gjaldstova» til «i færøsk bank eller sparekasse» og «50%» ændres til «30%».
3. § 5, stk. 3 udgår.
4. I § 16 ændres «50%» til «30%».

Viðmerkingar:

Lógin um íløgugrunnar hevur síðan viðtikin á løgtingi í 1971 víst seg at havt ávísar fyrimunir.

Tað stendur heilt greitt, at tað er neyðugt við broytingum.

Hvussu nógv ein eigur at geva loyvi til at leggja í íløgugrunn kunnu ymsar meiningar vera um. Fyrisligið er at hækka núgaldandi 20% til 30%. Hesa broyting eigur nærri at verða metti um undir nevndarviðgerðini. Tað, sum fyri okkum hevur størri týdning, er at fáa broytt núgaldandi reglur um støddina av innskotinum og fyrst og fremst at skipa fyri, at innskotið verður goldið inn í banka ella sparikassa. Tey vinnuvirkir, sum eftir núgaldandi reglum seta av til íløgugrunn, eru í verulcikanum likviditeti viðvikjandi verri fyri tað fyrsta árið enn um tey lata vera við at leggja í íløgugrunn.

Her er eftir okkara tykki talan um ein feil við lógini.

Tí hava vit fyrisligið bæði at lækka innskotið frá 50% til 30% og at innskotið verður sett á bundna konto í banka ella sparikassa.

Hesar broytingar vilja gera lógina betur og lætta minandi um likviditetin bæði hjá føroyska vinnulívinum og herundir hjá føroyskn peningastovnum.

Á Føroya Løgtingi, 6. januar 1977.

Sambandsflokkurin.

1. viðgerð 27. januar, málið beint í skattanevndina, ið legði fram felagsálit 1. februar.

(Sí felagsálit í løgtingsmáli nr. 27/1976: Broyting í skattalógini).

2. viðgerð 2. februar.

Uppskot Sambandsflokksins fall við 8—0 atkvøðum.

30. Gerðabókin hjá Fiskimarks- og Felagsmarknaðarnevndini

Ár 1977, 25. januar, legði Kjartan Mohr, løgtingsmaður, fyri framburðsflokkin fram

uppskot
til
samtyktar,

Løgtingið samtykkir, at allir flokkar, umboðaðir á løgtingi, eiga rætt at fáa útskrift av gerðabókini hjá Fiskimarks- og Felagsmarknaðarnevndini.

Útskriftirnar verða at lata formonnunum fyri tingflokkunum.

Viðmerkingar:

Í sínari tíð, táið løgtingið fekk fleiri uttanríkismál at taka støðu til, varð sett millumtinganevnd, ið fekk heitið løgtingsins fiskimarks- og felagsmarknaðarnevnd.

Ætlanin við hesi nevnd var, at allir politiskir flokkar skulu vera umboðaðir í hesi týðandi nevnd.

Hetta hevur eisini verið framt tey fyrstu árini, at allir flokkar vóru umboðaðir, men nú — hendan 18-manna samgonga skipaði seg — varð umboðið fyri framburðsflokkin sett uttanfyri.

Framburðsflokkurin hevur 3 ferðir lagt uppskot inn á ting at fáa umboð í nevndina, men hevur hetta verið vrakað, við at bert 11 atkvøður hava verið fyri. Sjálvur løgtingsformaðurin Øregaard setti uppskot um at víðka marknaðarnevndina til 8 limir, so framburðsflokkurin fekk umboð í nevndini, hetta fekk ov fáar atkvøður og fall.

Nú leikar á við sjómarkið og tílíkum stórum spurningum, ið krevja uttanríkis avgerðir, og er tað sosfatt rímligt, at allir politiskir flokkar fáa at vita, hvussu fram fer. Nú er marknaðarnevndin sett við skrivara og løntum formanni, so má Framburðsflokkurin hava krav uppá at fáa avskrift av gerðabókini av fundum hildnir í marknaðarnevndini.

Sjálvsagt gongur Framburðsflokkurin undir tøgnskyldu eins og hinir flokkarnir.

1. viðgerð 28. januar, 2. viðgerð 1. februar.
Uppskotið frá Foroya framburðsflokki samtykt við 15 ja-atkvøðum.

31. Broyting í skattalógini

Ár 1977, 25. januar, legði Dennmus Hentze, landsstýrismaður, fram

Uppskot
til

Løgtingslóg um broyting í skattalógini.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 50 frá 2. juli 1963 um landsskatt og kommunuskatt við seinri broytingum verða gjørdar hesar broytingar:

1) Í § 2 nr. 3 verður skoytt uppí: «tó ikki renta av peningi innistandandi í føroyskum peningsstovni, smbr. løgtingslóg nr. 4 frá 26. mars 1953, og vinningsbýti hjá partafeløgum v.m. skrásett í Føroyum, smbr. § 14 nr. 5.

2) § 6 verður orðað soleiðis: «Tað vinningsbýti, sum sambært § 2 nr. 3 ikki er undir skattskyldu hjá móttakara, verður álagt eitt avgjald til landskassan uppá 12,5%. Felag, sum útlutar vinningsbýti, skal halda aftur hetta avgjald og í seinasta lagi 14 dagar aftaná aðalfundarsamtykt um hetta rinda peningin til Føroya gjaldstovu.

2. stk. Fyri vinningsbýti av partabrøvum og lutaprógvum verður roknað alt, ið partaeigarar ella luthavarar fáa út-

Lagtingslov om ændring i skatteloven.

§ 1.

I lagtingslov nr. 50 af 2. juli 1963 om landsskat og kommuneskat med senere ændringer foretages følgende ændringer:

1) I § 2 nr. 3 tilføjes: «dog ikke rente af indestående i færøsk pengeinstitut, jfr. lagtingslov nr. 4 af 26. marts 1953, samt udbytte af aktieselskaber m.v., som er hjemmehørende på Færøerne, jfr. § 14 nr. 5.

2) § 6 formuleres således: «Af aktieudbytte, som i henhold til § 2 nr. 3 er undtaget skattepligt hos modtageren, erlægges til landskassen en afgift på 12%. Selskab, som udlodder aktieudbytte, skal tilbageholde denne afgift og senest 14 dage efter generalforsamlingsvedtagelse herom indbetale beløbet til Føroya Gjaldstova.

Stk. 2. Som udbytte af aktier og andelsbeviser anses alt, hvad der udbetales aktionærer eller andelshavere som en del

goldið sum part av avlopi felagsins í síðsta roknskaparári ella undanfarnum árum, annaðhvørt hetta avlop er tilkomið sum innvunnið rakstraravlop, av sølu ella uppskriving av ognum felagsins ella á annan hátt, og annaðhvørt tað er útgoldið sum vinningsbýti, sum útlutan, tá felagið er tikið av, ella tílíkt.

3. stk. Fyri vinningsbýti, tá felag verður avtikið, verður roknað alt, sum útlutað verður avvarðandi partacigara meira enn av inngoldnum partapeningi.

3) § 9 nr. 10 verður orðað soleiðis:
«10) avseting til rakstrargrunn hjá teimum í § 14 nr. 5 umrøddu feløgum. Henda avseting kann í mesta lagi vera 15% av skattskyldugari inntøku áðrenn skattafrádrátt og áðrenn avseting til íløgugrunn, tó í mesta lagi 400.000 kr. um árið.

Henda avseting skal í sein asta lagi fimta inntøkuárið aftaná avsetingarárið inntøkuførast aftur.»

4) § 24, 1. stk. fær hetta uppískoyti:
«Partafeløg, har meirilutin av partapeninginum er á somu hondum, skulu hava sama roknskaparár. Líkningarráðið kann í serstøkum føri gera undantak.

af selskabets overskud i det sidste eller tidligere regnskabsår, hvad enten dette overskud er fremkommet som indtjent driftsoverskud, ved realisation eller opskrivning af selskabets aktiver eller på anden måde, og hvad enten udbetaling finder sted som dividende, som udlodning ved selskabets likvidation, eller lignende.

Stk. 3. Som udbytte ved selskabets likvidation anses alt, hvad der udloddes den pågældende aktionær udover den indbetalte aktiekapital.

3) § 9 nr. 10 formuleres således:

«10) henlæggelse til driftsfond for de i § 14 nr. 5 omhandlede selskaber. Denne henlæggelse kan højst andrage 15% af den skattepligtige indtægt inden skattefradrag og inden henlæggelse til investeringsfond, dog højst 400.000 kr. om året.

Denne henlæggelse skal senest femte indkomstår efter henlæggelsesåret indtægtsføres igen.»

4) § 24, stk. 1 får denne tilføjelse:
«Aktieselskaber, hvor over halvdelen af aktiekapitalen er på samme hænder, skal have samme regnskabsår. Ligningsrådet kan i undtagelsestilfælde gøre undtagelse.»

5) § 27 verður orðað soleiðis:

«Tey í § 14, nr. 1-4 nevndu óavmarkaðu skattskyldugu, ið ikki eru uppihaldarar, og tey í § 15 nevndu avmarkaðu skattskyldugu lata skatt til landskassan eftir hesum stiga:

5) § 27 affattes således:

«De i § 14, nr. 1-4 omhandlede ubegrænset skattepligtige, som ikke er forsørgere, samt de i § 15 omhandlede begrænset skattepligtige svarer skat til landskassen efter følgende satser:

Er inntøkan Er indtægten	men minni enn men mindre end	verður goldið erlægges	av af	og av hinum og af resten
10.000	15.000	0	10.000	15%
15.000	20.000	750	15.000	26%
20.000	30.000	2.050	20.000	35%
30.000	40.000	5.550	30.000	45%
40.000	50.000	10.050	40.000	58%
50.000	75.000	15.850	50.000	63%
75.000	100.000	31.600	75.000	69%
100.000	200.000	48.850	100.000	70%
200.000	400.000	118.850	200.000	72%
400.000	500.000	262.850	400.000	74%
meira enn mere end	500.000	336.850	500.000	76%

Tey í § 14, nr. 1-4, nevndu óavmarkaðu skattskyldugu, ið eru uppihaldarar, og tey, sum eru fólka- og avlamispensionistar, lata skatt til landskassan eftir hesum stiga:

De i § 14, nr. 1-4, omhandlede ubegrænset skattepligtige personer, der er forsørgere, samt folke- og invalidepensionister, svarer skat til landskassen efter følgende satser:

Er inntokan Er indtægten	men minni enn men mindre end	verður goldið erlaggjes	av af	og av hinum og af resten
15.000	20.000	0	15.000	25%
20.000	30.000	1.250	20.000	35%
30.000	40.000	4.750	30.000	45%
40.000	50.000	9.250	40.000	55%
50.000	75.000	14.750	50.000	67%
75.000	100.000	31.500	75.000	68%
100.000	200.000	48.500	100.000	70%
200.000	400.000	118.500	200.000	72%
400.000	500.000	262.500	400.000	74%
meira enn mere end	500.000	336.500	500.000	76%

2. stk. Tey í § 14 nr. 5 nevndu felløg v.m. lata skatt til landskassa og kommunu við tilsamans 36% av teinum fyrstu 40.000 kr. í skattskyldugari inntøku, 42% av teinum næstu 60.000 kr. og 48% av restini uttan frádrátt av goldnum ella roknaðum skattum. Hesin skattur verður býttur við 30% sum kommunuskattur og 70% sum landsskattur.

3. stk. Føroya gjaldstova roknar landsskattin eftir tí lista, sum hon sambæri § 46, 1. stk. fær frá kommunala líkningarvaldinum og krevur hann inn sbrt. § 81.

6) Í § 35, 3. stk. verður «15. januar» broytt til «15. februar» og «31. januar» til «1. mars».

Stk. 2. De i § 14 nr. 5 omhandlede selskaber m.v. svarer skat til landskasse og kommune med tilsammen 36% af de første kr. 40.000 i skattepligtig indkomst, 42% af de næste 60.000 kr. og 48% af resten uden fradrag for betalte eller beregnede skatter. Denne skat fordeles med 30% som kommuneskat og 70% landsskat.

Stk. 3. Føroya gjaldstova beregner og indkræver landsskatten efter den liste, som den i henhold til § 46, stk. 1 modtager fra den kommunale tigningsmyndighed, jfr. § 81.

6) I § 35, 3. stk. ændres «15. januar» til «15. februar» og «31. januar» til «1. marts».

7) Í § 39 a) verður 3. punktum broytt til:
«Verður fullfíggjað sjálvuppgáva latin inn aftaná at innsendingarfrestin er úti, verður samanlagdi inntøkuskatturin hækkaður við 1% fyri hvørm dag, ið er liðin frá tí innsendingarfrestin gekk út, tó í mesta lagi við 10%. Hækkingin skal í minsta lagi vera 100 kr. og í mesta lagi 5.000 kr. Landsstýrið kann, har serligar umstøður tala fyri, heilt ella partvíst eftirgeva hækkingina.

8) Í § 44, 2. stk. verður 1. punktum orðað soleiðis:
«Beinanvegin likningin er liðug, verður tann í 1. stk. umrøddi listi lagdur fram til almont eftirlit í 11 dagar á høgligum staði fyri ílúgvararnar, eftir at hetta frammanundan er kunngjørt soleiðis, sum vanligt er í kommununi.»

9) Í § 44, 5. stk. verður «15. februar» broytt til «tá fyrrnevndi listi verður lagdur fram til eftirlit» og verður «28. februar» broytt til «11. dagin eftir at likningarlistin varð lagdur fram til eftirlits.»

10) Í § 45, 1. stk. verður «tann 28. februar» broytt til «11. dagin aftaná at likningarlistin varð lagdur fram til eftirlits» og verður í § 45, 2. stk. «í tíðini frá 25. februar til 3. mars» broytt til «Beint aftaná at kærufrestin er úti» og verður

7) I § 39 a) ændres 3. punktum til:
«Fremkommer behørig selvangivelse efter at indleveringsfristen er udløbet, bliver den samlede indkomstskat forhøjet med 1% for hver dag, hvormed indsendelsesfristen er oversiddet, dog højst med 10%. Forhøjelsen skal mindst andrage 100 kr. og højst 5.000 kr. Landsstyret kan, hvor særlige omstændigheder taler derfor, helt eller delvis eftergive forhøjelsen.

8) § 44, stk.2, 1. punktum affattes således:
«Straks påligningen er tilendebragt, fremlægges den i stk. 1 omhandlede fortegnelse i 11 dage efter forudgået bekendtgørelse på den i kommunen brugelige måde til almindeligt eftersyn på et for kommunens beboere belejligt sted.»

9) I § 44, stk. 5 ændres «Senest 15. februar» til «Samtidig med fremlæggelse af den foran nævnte fortegnelse» og ændres ligeledes «den 28. februar» til «11. dag efter at ligningslisten blev fremlagt til eftersyn.»

10) I § 45, stk. 1 ændres: «den 28. februar» til «11. dag efter at ligningslisten blev fremlagt til eftersyn» og ændres i § 45, stk. 2 «I tiden fra 25. februar til 3. marts» til «Straks efter klagefristens udløb» og ændres «3.

«3. mars» broytt til «14. dagin aftaná at kærufrestin er úti.»

11) Í § 46, 1. stk. verður «8. mars» broytt til «1. apríl» og í § 46, 2. stk. verður «1. apríl» broytt til «1. mai».

12) Í § 71, 1. stk. verður 1. punktorðað soleiðis:

«Allir, sum hava havt lønað fólk í virki sínum, skulu í seinasta lagi 31. januar lata kommunala likningarvaldinum í heimstaðarkommunni fullfíggjað yvirlit yvir útreiðslur til lønir, samsýningar o.t. í farna ári, annaðhvørt hesar eru útgoldnar ella góðskrivaðar, alt saman við tilskilan av navni og bústaði løntakarans» og verður í seinasta punktum «landsstýrið» broytt til «likningarráðið».

§ 2.

Henda lóg fær gildi frá og við skattaárinum 1977/78.

2. stk. Avgjald av vinningsbýti, sum sambært hesi lóg er útgoldið ella góðskrivað í inntøkuárinum 1976, hevur móttakarin skyldu sjálvur at gjalda áðrenn árstok 1977.

marts» til «14. dag efter klagefristens udløb».

11) I § 46, stk. 1. ændres «8. marts» til «1. april» og i § 46, stk. 2 ændres «1. april» til «1. mai».

12) I § 71, stk. 1 affattes 1. punktum således:

«Enhver, der har beskæftiget lønnet medhjælp i sin virksomhed, skal senest 31. januar tilstille den kommunale ligningsmyndighed i hjemstedskommunen en fuldstændig oversigt over udgifter til lønninger, honorarer m.v. i det forløbne år, hvad enten disse er udbetalt eller godskrevet, alt under angivelse af vedkommende lønmodtagers navn og adresse» og i sidste punktum ændres «landsstyret» til «ligningsrådet».

§ 2.

Denne lov træder i kraft fra og med skatteåret 1977/78.

Stk. 2. Afgift af aktieudbytte, som i henhold til denne lov, er udbetalt eller krediteret i indtægtsåret 1976, er modtageren pligtig til selv at erlægge inden udgangen af 1977.

Viðmerkingar:

Ein av teimum setningum, sum hetta landsstýrið vildi fáa lagt úr hondum, var ein endurskoðan og nýskipan av skattalóggávuni og at lækka skattin á lag- og meðalinntøkunum. Landsstýrið leggur tí fram uppskot um hetta, og tá ið landsstýrið metir tað vera harðliga tiltrongt at fáa hesa broytingarnar um lækking framdar til komandi álikning, verður heitt á tingið at fáa tær avgreiddar til álíkningina í ár.

Viðvíkjandi hesum partinum av lógaruppskotinum skal verða upplýst, at nýggjur stigi er gjørdur til útrokning av landsskattinum.

Eftir hesum stiga er minsta markið hjá ikki-uppihaldarum hækkað úr 8.000 kr. til 10.000 kr. Soleiðis verða øll, sum hava minni enn 10.000 kr. í skattleggjandi inntøku undantikin landsskatt, og er lættin minkandi, til hann við einari skattskyldugari inntøku uppá 50.000 kr. er ájavnt núverandi skatti. Hesar 50.000 kr. í skattleggjandi inntøku svara til eina bruttoinntøku uppá einar 80.000 kr.

Hjá uppihaldarum er minsta markið hækkað úr 10.000 kr. upp í 15.000 kr., soleiðis at skattskyldug inntøka uppá 15.000 kr. er undantikin landsskatti. Moug teirra, ið eru fólka- og avlamispensionistar sleppa við hesum heilt undan landsskatti, og hini fáa lætta. Hesin lættin er minkandi upp til einar 60.000 kr. í skattskyldugari inntøku, svarandi til eina bruttoinntøku uppá umleið 90.000 kr.

Tann samlaði skattalættin verður mettur at liggja um gott 10 mill. kr.

Her verður niðanfyri vist á, hvussu lættin er hjá teysum og uppihaldarum í peningi og procentum av núgaldandi skatti.

	Lækkingin er:	
Inntøka	Ikki-uppihaldarar	Uppihaldarar
kr.	kr.	kr.
10.000	200 ella 100%	
15.000	450 ella um 45%	500 ella 100%
20.000	500 ella um 21,5%	500 ella um 28%
30.000	500 ella um 8%	1.000 ella um 17%
40.000	100 ella um 1%	900 ella um 9%
50.000		1.100 ella um 7%

Viðvíkjandi teimum freistbroytingum, sum skotnar verða upp, skal verða sagt, at seinru árini hevur tað vist seg torført at fingið sjálvuppgávurnar innsendar í rættari tíð, tí ilt hevur verið hjá løntakarum at fáa lønarseðlarnar nóg tíðliga. Hetta er serliga galdandi fyri sjómenn. Kommunalu líkningarvaldini hava tí verið noydd at longt freistina fyri at lata inn sjálvuppgávuna — viðhvørt longur enn lógin tilskilar teimum — og hevur hetta fært við sær, at tey so mikið seinri kundu fara undir líkningararbeiðið. Tí hevur gjaldstovan eisini fingið skattalistarnar í seinra lagi, og ilt hevur verið at fáa skattarokningarnar rættstundis út.

Hildið verður tí, at beinast er at leingja freistina fyri innsending av sjálvuppgávunum við einum mánaða frá 15. januar til 15. februar og hjá rokniskaparskyldugum frá 31. januar til 1. mars, og verða so sjálvandi allar aðrar freistir broyttur samsvarandi.

Hetta skuldi gjørt, at fleiri og beinari sjálvuppgávur vórðu innsendar rættstundis og soleiðis tryggari líkning, uttan at skattarokningarnar verða tarnaðar meira.

Reglurnar í § 39 um hækking vegna vantandi ella ov seint innlatna sjálvuppgávu eru enn tær somu, sum settar vórðu í 1923, tá tann skattalógin varð gjørd, og sum kanska hóskaðu tá, men nú eru tølini vorðin so stór, at hetta fer at virka órimiligt.

Har als ongin sjálvuppgáva er latin inn, og inntøkan tí er mett, er helst beint at nýta verandi reglurna við 25% hækking, men kemur sjálvuppgávan inn seinri, er grundarlag fyri beinari líkning, men eigur tó her at verða løgd ein rímiligari sekt á.

Broytingin her gongur hesum krøvum á møti og avmarkar samstundis bæði við lág- og hámarki.

Higartil hava ongar reglur verið um, nær lønarseðlarnir skulu verða sendir skattavaldinum. Nú freistirnar fyri sjálvuppgávuna eru logudar, verður hildið hóskiligt, at eisini freist verður sett, nær hesir lønarseðlar skulu verða sendir komunnala líkningarvaldinum. Rokuað hevur higartil verið við, at teir skuldu vera innsendir innan 15. januar — samstundis sum sjálvuppgávan varð innsend — og verður skotið upp at seta freistina til 31. januar.

Eitt av teimum málum, sum landsstýrið eisini setti sær fyri at loysa, var ein nýggj skattaskipan fyri partafeløg. Tað hevur leingi verið tiltrongt at fáa eina meiri tíðarhóskandi skatting av partafeløgum, og er tað vón landsstýrisins, at eisini uppskotið hesum viðvíkjandi fær endaligu samtykt løgtingsins til komandi álíkning.

Ætlanin við teimum her gjørdu broytingum í skatting av partafelogum er, at besi vinnufeløg skulu fáa eina ávísa hóskiliga útseting av skatti, um tey í staðin fyri at nýta avlopspening sín til nýíløgur og haraftrat at skapa áluga fyri vinnufrenjandi felagsskapi við at lioka innanmál um ta dupultskatting partafelagseigarar hava verið fyri.

Høvuðsbroytingarnar í uppskotinum eru hesar:

1. Partafeløg verða skattað við einum fastum procenti av skattskyldugu inntøkumi uttan skattafrádrátt. Tað vil siga, at skatturin verður í ein vissan mun lutfalsligur (proportionalur), tó so, at tær fyrstu 100.000 kr. verða skattaðar við lægri procentum enn tann partur av yvirskotinum, sum liggur omanfyri heso upphædd. Skotið verður upp, at hesi procent vera ávikavist 36%, 42% og 48%.
2. Skotið er upp, at partafeløg fáa betri skattafriar avsetingarmøguleikar. Tí verður skotið upp, at burturlegging í **iløgugrunn** verður hækkað úr 20% til 30%, og at møguleiki eisini verður fyri avseting til ein **rakstrargrunn.** Henda avseting skal í mesta lagi vera 15% av skatt-

skyldugu inntøkuni, áðrenn lagt er í iløgugrunn, tó í mesta lagi kr. 400.000 árliga. Hesin grunnur, ið er ætlaður sum ein útjevningarmøguleiki í staðin fyri tað, sum aðrir hava við afturflytan av rekstrarhalli, niðurskriving av vørugoymslum v.m., skal inntøkuførast aftur í seinasta lagi 5. árið eftir burturleggingina. Feløg mega tí í rokuskapinum útgreina grunnin ársvís, og má hann ikki úthutast.

3. Tá ið partafeløg, tó við teimum frammanfyri nevndu avsetingarmøguleikum, skulu rinda vanligan inntøkuskatt, verður skotið upp, at vinningsbýti, tá ið tað verður úthutað, verður skattað hjá móttakaranum við einum avgjaldi uppá 12,5%, sum felagið afturheldur og rindar landskassanum. Hetta avgjald verður eisini goldið, um móttakarin av vinningsbýtinum ikki er skattskyldugur. Henda skatting av vinningsbýti samsvarar rættiliga væl við núgaldandi skatting av rentum innistandandi í føroyskum peningastovnum. Tann núverandi frádráttur hjá feløgum uppá 6% av partapeninginum fer úr gildi.
4. Í sambandi við umlegging av partafelagsskattingini verður galdandi regla um skatting av frípartabrøvum avtikin. Henda regla er fyri langari tið síðani avtikin í øðrum londum.

Samstundis, sum skotið verður upp at gera eina lagaligari skattaskipan fyri partafeløg, er uppskot um broytingar í avskrivingarlógini í samsvari við tann setning, sum varð settur í samgonguskjalinum. Tað hevur vist seg, at íleggingarhugurin í skip hevur verið í størra lagi og kanska ikki altíð hevur verið nóg væl umhugsaður. Tær skjótu avskrivingarnar hava ført við sær, at persónar, sum eftir vanligari bugsan eru mentir at bera eina skattabyrðu, sleppa ov lættliga í skatti, í øllum førum fyri eina tíð.

Skotið verður upp, at persónar, sum eru parthavarar í einum ella fleiri skipum, skulu bert kunna avskriva ein fríðing av aðrari inntøku. Hetta merkir, at um ein persónur hevur 150.000 kr. at skatta av, og hann er parteigari í einum ella fleiri skipum, kann hann í mesta lagi avskriva 50.000 kr.

Sum frammanfyri nevnt vil landsstýrið hava frammanfyri nevndu broytingar í skattalógini at fáa gildi til komandi áltkuing, men tagt skal vera aftrat, at landsstýrið alsamt arbeiðir við nýskipanum og broytingum skattalógini viðvíkjandi og hevur sett sær sum mál seinni í hesi tingsetu at koma við fleiri uppskotum, sum m.a. miða ímóti at gera skattareglurnar einfaldari Tey lógaruppskot, sum landsstýrið harumfram umhugsar at koma við, eru í høvuðsheitum hesi:

Skipað verður fyri skatting av brutto inntøku, og í staðin fyri teir núverandi frádráttir verður ásettur fastur frádráttur ella persónsfrádráttur. Frádráttinum av rentutreiðslum umhugsar landsstýrið at gera ávísar broytingar í.

Ein annan spurning, sum landsstýrið hevur sett sær fyri at loysa, er at fáa aðrar reglur fyri skatting av hjúnum. Landsstýrið kann taka undir við teimum grundum fyri avtøku av samskattingini, ið førdar eru fram í álitinum frá serligari skattanevnd, ið hon læt frá sær í 1974. Grundirnar fyri at avtaka samskattingina av hjúnum vóru í nevnda áliti besar:

«a. Fleiri og fleiri konur hava sjálvstøðuga inntøku.
b. Politiskt ynski er nú at styrkja støðu kvinnunnar í samfelagnum, og harfullhun eisini í hjúnarlagnum. Tað verður tí ein spurningur um javnrættindi kvinnunnar, at hon eisini fær høvi til at vera sjálvstøðugur skattaborgari.
c. So hvørt sum skatturin er vaksin og er vorðin meira progressivur, er skattabyrðan hjá einum samskattaðum hjúnum vorðin væl hægri enn hjá tveimum støkum við sonu inntøkum.
d. Hetta, at inntøkan hjá konuni verður uppfatað sum løgd oman á inntøkuna hjá manninum, og tí rakt av tí markskatti, ið hansara seinasta króna verður skattløgd við, gevur fólki varhugan av, at tað illa loysir seg, at eisini konan arbeiðir. Hetta tarnar luttøkuni hjá giftum konum í arbeiðslívinum. Hetta er ikki bert eitt kvinnupolitiskt vandamál, men eisini búskaparligt, um so er, at trot er á arbeiðsmegi í samfelagnum.

Samskattingin ger, at tað «ikki loysir seg» hjá tveimum, ið bæði hava inntøku, at vera gift. Eitt familjupolitiskt ynski um at styrkja hjúnarlagsstovnin sum slíkan, førir tí til krav um serskatting ella lættari samskatting.»

Løgtingið gjørdi í 1974 eina samtykt, har heitt varð á landsstýrið um at koma við uppskoti um avtøku av samskattingini, sum í høvuðsheitum skuldi grundast á, at inntøkan hjá konu og manni skuldi býtast í tvey og síðani skattast.

Í londunum uttan um okkum er samskattingin í prinsippinum framvegis í gildi, men hevur konan lønarinntøku utanhýsis ella sjálvstøðugt virki, verður hon skattað serstakt av inntøkuni, ið stavar frá hesum, meðan hjúnafelagið, ið ikki hevur tílíka inntøku, verður samskattaður við hinum. Landsstýrið metir seg kunna leggja fram í hesi tingsetu uppskot um avtøku av samskattingini, tá hjún bæði forvinna og gera nýggjar reglur fyri hesum, men fer tað eisini at royna at finna eina hóskandi skipan fyri øll hjún, so tey í prinsippinum verða undir eini einstaklingaskatting.

Av øðrum høvuðsmálum, sum landsstýrið hevur sett sær fyri at fáa broytt, eru reglurnar um kommunuskatt, og er her serliga umhugsað at lata skipanina viðvíkjandi hækking og lækking av inntøkum falla burtur.

1. viðgerð 27. januar, málið beint í skattanevndina, ið 1. februar legði fram felagsálit.

(Sí felagsálit í løgtingsmálinum nr. 27/1976: Broyting í skattalógini).

2. viðgerð 2. februar.

Tann 2. februar 1977 løgdu Hilmar Kass og Ásbjørn Joensen fram soljóðandi

Broytingaruppskot

í § 1, stk. 5 í skattastiganum fyri uppihaldarar í regluni:

15.000	20.000	0	15.000	25%

verður 25% broytt til 15%.

Øll tølini uttan tað ovasta undir orðunum:

verður goldið
erlægges

verða lækkað við 500.

3. viðgerð 7. februar.

Uppskot landsstýrisins samtykt við 20—0 atkvøðum.

Broytingaruppskot frá Hilmar Kass og Ásbjørn Joensen fall við 7—0 atkvøðum.

---

32. Broyting í løgtingslóg um skattligar avskrivingar

Ár 1977, 25. januar, legði Dennnus Hentze, landsstýrismaður, fram

Uppskot
til

løgtingslóg um broytingar í løgtingslóg um skattligar avskrivingar.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 52 frá 29. december 1971 um skattligar avskrivingar v.m. við seinri broytingum verða gjørdar hesar broytingar:

Í § 16 b verður stk. 1, nr. 1 orðað soleiðis:

Avskrivast kann í vinningi av skiparakstri. Harumframt kann avskrivast upp til 15% av avskrivingarbæra saldovirðinum, tó í mesta lagi triðing av aðrari inntøku við frádráttum, men uttan skattafrádrátt. Avdráttir av upprunaligum lánum í skipum, sum ikki rúnast innan fyri rakstrarvinning frá egnum skipum undir einum, kunnu altíð avskrivast, treytað av at tann skattligu saldoin er minst líka stór sum restskuldin uppá skipini. Árlig avskriving eftir § 2 jmt. § 12 kann í mesta lagi vera 30% av tí saldovirði, ið kann avskrivast.

§ 2.

Henda lóg fær gildi frá og við skattaárinum 1977/78.

lagtingslov om ændringer i lagtingslov om skattemæssige afskrivninger.

§ 1.

I lagtingslov nr. 52 af 29. december 1971 om skattemæssige afskrivninger m.v. med senere ændringer foretages følgende ændringer:

§ 16, stk 1 nr. 1 affattes således:

Afskrivning kan foretages i overskud ved drift af skibe. Endvidere kan afskrives op til 15% af den afskrivningsberettigede saldoværdi, dog højst en tredjedel af anden indtægt med fradrag, men uden skattefradrag. Afdrag af oprindelige lån i skibe, som ikke dækkes af driftsoverskud sammenlagt fra egne skibe, kan altid afskrives, når den skattemæssige saldo er mindst lige så stor som restgælden på skibene. Årlig afskrivning efter § 2, jfr. § 12 kan højst være 30% af den saldoværdi, som kan afskrives.

§ 2.

Denne lov træder i kraft fra og med skatteåret 1977/78.

F.L. j. nr. 430-10-3

Viðmerkingar:

Víst verður til løgtingsmál nr. 31/1976.

1. viðgerð 27. januar, málið beint í Skattanevndina.

Broytingaruppskot

frá minniluta í Skattanevndini (Paula Ellefsen):

Í § 16 b, 1. stk. verður aftaná orðini «15% av avskrivingarbæra saldovirðinum, tó í mesta lagi triðing av aðrari inntøku við frádráttum, men uttan skattafrádrátt» sett: «tó altíð upp til kr. 35.000».

2. viðgerð 2. februar, 3. viðgerð 7. februar.

Uppskot landsstýrisins samtykt við 18—0 atkvøðum. Broytingaruppskot frá minnilutanum í skattanevndini fall við 8—0.

---

33. Broyting í løgtingslóg um íløgugrunnar

Ár 1977, 25. januar, legði Dennmus Hentze, landsstýrismaður, fram

Uppskot

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um íløgugrunnar.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 50 frá 23. december 1971 um íløgugrunnar verður gjørd henda broyting:

lagtingslov om ændring i lagtingslov om investeringsfonds.

§ 1.

I lagtingslov nr. 50 af 23. december 1971 om investeringsfonds foretages følgende ændring:

I § 4, 1. stk. 1. reglu verður aftaná «20%» sett: «, tó kunnu tey í § 14, nr. 5 í løgtingslóg nr. 50 frá 2. juli 1963 um landsskatt og kommunuskatt umrøddu feløg v.m. avseta 30%.»

§ 2.

Henda lóg fær gildi frá og við skattaárinum 1977/78.

I § 4, stk. 1, 1. linie indskydes efter «20%» «, dog kan de i § 14, nr. 5 i lagtingslov nr. 50 af 2. juli 1963 om landsskat og kommuneskat omhandlede selskaber m.v. henlægge 30%.»

§ 2.

Denne lov træder i kraft fra og med skatteåret 1977/78.

Viðmerkingar:

Vísst verður til løgtingsmál nr. 31/1976.

Demmus Hentze
landsstýrismaður

/ J. Djurhuus

1. viðgerð 27. januar, málið beint í Skattanevndina, ið legði fram felagsálit (sí løgtingsmál nr. 27/1976: Broyting í skattalógini).

2. viðgerð 2. februar, 3. viðgerð 7. februar.

Broytingaruppskot frá fíggjarnevndini til § 1 í landsstýrisins uppskoti samtykt við 22—0 atkvøðum.

34. Veðhald fyri láni til Vágs kommunu

Ár 1977, 25. januar, legði Petur Reinert, landsstýrismaður, fram

Uppskot
til

løgtingslóg um veðhald fyri láni til Vágs kommunu.

§ 1.
Landsstýrinum er heimilað at veðhalda landskassans vegna fyri láni upp til kr. 5.770.000,- úr Kreditforeningen af kommuner i Danmark til Vágs kommunu.

§ 2.
Henda lóg fær gildi beinan vegin.

lagtingslov om garanti for lån til Vågs kommune.

§ 1.
Landsstyret bemyndiges til på landskassens vegne at garantere for lån indtil kr. 5.770.000,- fra Kreditforeningen af kommuner i Danmark til Vågs kommune.

§ 2.
Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Vágs kommuna søkir um lán stórt kr. 5,77 mió. úr Kreditforeningen af Kommuner i Danmark. Við galdandi obligatiónskursum 57½ vil hetta lán geva 3.218 mió. kr. í úrtøku. Nominella rentan er 7% p.a. og verður lánið at gjalda aftur í 25½ ár.

Lánið er treytað av landskassaveðhaldi og søkir kommunan nú um tílíkt veðhald.

Lánið verður at nýta sum partur til fígging av skúlabygging í Vági.

Sambært kostnaðarætlan verða byggiútreiðslurnar hesar:

til nýbygging (1. stig)	o.u.	16.077.915
og til umbygging (2. stig)	o.u.	700.000
tilsamans.....	o.u.	16.777.915
Hertil koma byggirentur, mettar til		1.722.085
ella tilsamans.....	o.u.	18.500.000

umfram undirvisingartilfar og fíggjarútreiðslur.

F.L. j. nr. 809-48-42

Yvirlit yvir figgingina við egnpeningi ,lánum og studningi:

Egnpeningur	o.u.	3.142.000
Kontant lán	o.u.	3.750.000
Studningur	o.u.	8.390.000
Annuitetslán frá Kreditforeningen (kurs 57½ — nom. 5.700.000 kr.)	o.u.	3.218.000
ella tilsamans	o.u.	18.500.000

Viðlagt er sum skjal yvirlit yvir føstu lánini hjá Vágs kommunu.

Yvirlit yvir lán hjá Vágs kommunu.

		Avdráttur	Saldo 31/3 76
Suðuroyar Sparikassi	2889	12.000,00	0,00
— —	2272	20.000,00	290.000,00
— —	2105	3.840,00	32.640,00
— —	1436	2.000,00	5.000,00
— —	2820	12.300,00	12.400,00
— —	1947	2.250,00	28.215,00
— —	794	2.000,00	4.000,00
— —	3138	6.000,00	6.000,00
Føroya Banki	82031-1	15.974,30	46.358,84
— —	82081-8	16.993,02	82.293,30
— —	82220-9	30.520,80	24.088,69
— —	82198-9	8.232,02	11.630,29
— —	82229-2	22.439,06	0,00
— —	82231-4	18.139,36	61.977,34
— —	82215-2	24.293,84	38.541,12
— —	82268-3	0	192.623,15
Sjóvinnubankin	80876-8	145.116,77	218.000,00
—	80174-1	0	28.000,00
Føroya Sparikassi	83063-5	850,00	1.275,00
		342.949,17	1.083.042,73

1. viðgerð 28. januar, málið beint í fíggjarnevndina, ið 2. februar legði fram soljóðandi

Álit

Málið varð lagt fram av landsstýrinum 25. januar 1977 og undir 1. viðgerð lagt 28. januar 1977 beint í fíggjarnevndina.

Vágs kommuna søkir um lán uppá kr. 5.770.000,- úr Kreditforeningen af kommuner í Danmark.

Roknað verður við, at úrtøkan úr hesum láni við galdandi kursum gevur kr. 3.218.000. Lánið er ætlað at nýta sum partur til fígging av skúlabygging. Sambært yvirlit er 1. stigið av nýbyggingini ætlað at kosta 18.500.000 kr.,og av hesum er eginpeningur kr. 3.142.000. Pr. 31. mars 1976 var lánskuldin hjá Vágs kommunu kr. 1.083.042,73 og avdráttir árliga kr. 342.949,17.

Fíggjarnevndin kann einmælt taka undir við uppskoti landsstýrisins um at veita landskassaveðhald fyri omanfyri nevnda láni.

Fíggjarnevndin, 2. februar 1977.

2. viðgerð 9. februar, 3. viðgerð 10. februar.

Uppskot landsstýrisins samtykt við 19—0 atkvøðum.

35. Broyting í »Lov for Færøerne om den offentlige sygeforsikring« (gravarferðahjálp v. m.)

Ár 1977, 25. januar, legði Jákup Lindenskov, landsstýrismaður, fra m

Uppskot
til
samtyktar.

Løgtingið mælir ríkisstýrinum til at leggja fyri fólkatingið:

Uppskot til lóg um broyting í «Lov for Færøerne om den offentlige sygeforsikring».

Viðmerkingar:

Uppskotið fevnir um eina broyting í galdandi lóg um almenna sjúkratrygging, sum hevur við sær, at sjúkrakassin, tá ið andlátið er hent uttanfyri Føroyar, og gravarferðin fer fram í Føroyum, umframt vanliga gravarferðarhjálp skal rinda eina eykagravarferðahjálp, ið verður ásett soleiðis, at hjálpin rindar rimiligar útreiðslur, sum standast av, at andlátið er hent uttan fyri Føroyar, og sum ikki verða rindaðar av eini privatari ferðasjúkratrygging ella eftir reglunum um almenna sjúkratrygging fyri sjófólk v.fl. Eykagravarferðahjálpin kann í mesta lagi verða 2 ferðir ta vanligu gravarferðahjálpina.

Sambært lóg nr. 573 frá 19. december 1969 fyri Føroyar um sjúkratrygging § 20, 1. petti sum broytt við lóg nr. 590 frá 26. november 1975 § 3 er gravarferðarhjálpin 1.400,- kr., ið verður at javna í sama mun sum gravarferðarhjálpin eftir donsku sjúkratryggingarlógini, soleiðis at hjálpin í løtuni er 1.550,- kr. Eykagravarferðarhjálpin eftir hjálagda uppskoti um nýtt 3. petti í § 20 kann eftir hesum í løtuni í mesta lagi verða 2 ferðir hesa upphædd ella 3.100 kr.

Herumframt fevnir uppskotið um reglur, sum broyta ella seta úr gildi ásetingar í sjúkratryggingarlógini um skyldu sjúkrakassanna at veita studning til viðgerð á sjúkrahúsum ella øðrum viðgerðarstovnum og reglur um flutningsendurgjald í hesum sambandi. Hesar broytingar v.m. standast av broyttum reglum í nýggju sjúkrahúslógini fyri Føroyar, sum

varð samtykt av løgtinginum í løgtingsmáli nr. 72/1975: Nýggj sjúkrahúslóg, og sum er samtykt av fólkatinginum í hesi tingsetu.

1. viðgerð 28. januar, málið beint í figgjarnevndina.

2. viðgerð 1. februar.

Uppskot landsstýrisins samtykt við 21—0 atkvøðum.

---

36. Fyrispurningur til landsstýrismann

SVAR

uppá

fyrispurning til Petur Reinert, landsstýrismann.

Kjartan Mohr, løgtingsmaður spyr, hvat landsstýrið vil gera, nú býráðsformaðurin og formaðurin í figgjarnevndini í fráfarna býráðnum ikki hava fylgt løgtingslóg.

Tað, ið sipað verður til, er broytingin í 1974 í kommunulógini frá 1972 um, at býráðsformaðurin umframt at vera fastur limur í figgjarnevndini er fastur formaður.

Í løgtingssetuni 1975, jbr. løgtingsmál nr. 86, svaraði eg 7. apríl 1976 Kjartani Mohr, løgtingsmanni í liknandi fyrispurningi, at landsstýrið eina ferð vildi áleggja býráðnum at fáa formansskiftið framt. Formansskiftið varð ikki framt.

Landsstýrið hevur ikki enn tikið støðu til, hvørjar avleiðingar, tað eigur at fáa, at formansskiftið ikki fór fram.

Til seinast aspurningin um býráðsformaðurin kann vera tiltaksmaður fyri Óla Breckmann er at siga, at her eigur løgtingið avgerðarrættin.

Petur Reinert
landsstýrismaður

Fyrispurningur til Petur Reinert, landsstýrismann.

Í løgtingsmáli nr. 36/1975 svarnði landsstýrismaðurin nær aftur.

Eg spyrji tí einaferð enn: Hvat vil landsstýrið gera nú eftir býráðsvalið, hvar fyrrverandi býráð við form. í fíggjarnevndini og býráðsformaðurin ikki fylgdi løgtingslógini, sum var kunngjørd í Dimmalætting av løgmanni?

Kann býráðsformaðurin vera í løgtinginum fyri Óla Breckmann, løgtingsmann, tá ið hann ikki respekterar løgtingsins lógir?

Tórshavn, 21. december 1976.

Kjartan Mohr,
løgtingsmaður.

S V A R
uppá
fyrispurning frá Kjartani Mohr, løgtingsmanni.

Fyrispurningurin snýr seg um broytingina í 1974 í kommunallógini frá 1972 um, at bygda- og býráðsformaðurin umfram at vera føddur limur í kommunalu fíggjarnevndini er føddur formaður.

Ivaspurningur hevur bert tikið seg upp í Tórshavnar kommunu. Orsøkin er, at meðan kommunuval hevur verið í øllum hinum kommununum í november/desember 1974, t.v.s. aftaná lógarbroytingina, hevur seinasta val í Tórshavnar kommunu verið í november/desember 1972 ella áðrenn broytingina. Býráðið og allar nevndir hava aftaná valið skipað seg eftir gomlu regluni, at býráðsformaðurin bert var føddur limur í fíggjarnevndini og ikki føddur formaður.

Býráðið hevur víst á, at broytingin, síðani onki verður sagt í lógini um, at broytingin er afturvirkandi, ikki verður at fremja fyri Tórshavnar kommunu fyrr enn aftaná kommunuval í november/desember í ár. Eisini verður víst til, at reglurnar um, at formans- og næstformansval og val av nevndum undir ávísum fyritreytum kundu fara fram í einum valskeiði, eru stroknar við broytingini frá 1974. Lógarbroytingin kann tí føra við sær, um hon verður framd, eina aðra politiska javnvág.

Landsstýrið hevur 15. august 1974 skrivað býráðnum, at § 2 í broytingarlógini sigur, at hon kemur í gildi beinanvegin. Lógin má tí skiljast soleiðis, at formansskifti í fíggjarnevndini skuldi verið framt skjótast gjørligt aftaná, at lógin varð kunngjørd, og var hetta ikki gjørt tá, mátti tað gerast beinanveg.

28. april 1975 verður býráðið spurt, um formansskifti er framt. Býráðið svarar aftur, at so er ikki.

Landsstýrið vil eina ferð enn áleggja býráðnum at fáa formansskiftið framt og seta eina ávísa freist. Verður ongin broyting, vil landsstýrið umhugsa, hvørji tiltøk verða at seta í verk.

Til spurningin um, hvørjar avleiðingar fað hevur fyri landsstýrið, at býráðssamgongan ikki heldur lógirnar, er at siga, at landsstýrið stendur til svars yvirfyri løgtinginum og ikki Tórshavnar býráð.

Síðani verður spurt, um dispositiónirnar hjá kommununi eru lógligar. Landsstýrið hevur ikki tikið støðu, um grundarlag er, at siga avgerðirnar ógyldugar. Spurningurin er tó helst bert um avgerðir í figgjarnevndini og hennara fyrisiting, herundir avleiðingar av virki hennara.

Føroya landsstýri, 7. april 1976.

Petur Reinert
landsstýrismaður

---

37. Atløgubryggju í Kirkjubø

Fyrispurningur til D. P. Danielsen, landsstýrismann.

Hvat hevur landsstýrið gjørt, og hvat ætlar landsstýrið at gera í málinum um atløgubryggju í Kirkjubø.

Viðmerkingar:

1 løgtingssetuni 1969, jbr. Løgtingstiðindi bls. 284, samtykti løgtingið uppskot um at heimilað landsstýrinum landskassans vegna at byggja atløgubryggju í Kirkjubø og at taka upp neyðug lán. Samtyktin er síðan staðfest og kunngjørd sum løgtingslóg nr. 37 frá 2. juni 1970.

Skjótt eru gingin 6 ár síðani samtykt varð at fara undir hetta týðningarmikla tiltakið at bøta um samferðsluna til Sandoynna, bæði at stytta um ferðina og eisini at sleppa undan siglingini um Kirkjubønes.

Enn er eingin atløgubryggja, og heldur ikki eru sjónlig tekin um, at hon verður gjørd.

Eg loyvi mær tí at sela landsstýrismanninum fyrispurningin.

Á Føroya løgtingi, 26. januar 1977.

Kjartan Mohr

SVAR

til Kjartan Mohr, løgtingsmann

frá Dánjal Paula Danielsen, landsstýrismanni.

Tann 26. januar í ár hevur Kjartan Mohr, løgtingsmaður, sett mær henda spurning:

«Hvat hevur landsstýrið gjørt og hvat ætlar landsstýrið at gera í málinum um atløgubryggju í Kirkjubø».

Í Kirkjubø er stutt atløgubrúgv um installeringar sleppa til; í sundinum millum hólmin og land er nevniliga so grunt, at skulu dekksfør kunna leggja at hesi brúgv má hon leingjast heilt munandi og dýpast má fyri at fáa siglingarleið til hana.

Gjøgnum 1960 árini var málið um atløgubryggju í Kirkjubø fyri dekksfør havd á lofti í tinginum, tí áhugi var millum manna at leggja rutusambandið við Sandoynna um Kirkjubø, og ymisk uppskot til loysn av hesum spurningi vóru gjørd; men øll vildu tey kosta nógv meir enn menn høvdu roknað við.

Alt hetta endaði tó í tí løglingslógini frá 2. juni 1970, sum Kjartan Mohr, tingmaður, sipar til í sínum fyrispurningi; henda lóg gevur landsstýrinum heimild til fyri landsins rokning at byggja atløgubryggju í Kirkjubø.

Samferðsluviðurskiftini vóru tá so broytt, at tá ið uppskot til nýggja byggiætlan var gjørt í 1972 var tað havn til rættuliga bilferju talan varð um; henda havn var ætlað lutvist grivin og sprongd inn í landið sunnan fyri Árnanes, og kostnaðurin varð mettur til stívar 7 mill. kr., og tá var ikki roknað við atløgumøguleikum fyri øðrum førum enn ferjuni.

Meiri hendi einki, deils, rokni eg við, tí kostnaðurin var so ovurhonds stórur (hann svarar til einar 14 mill. kr. í dag) og deils og kanska mest tí aðalspurningurin í sambandinum við Sandoynna tá var Skopunar havn.

Skuldi nøkur fiskivinna av týdningi vera í Skopun og skuldi Sandoyggin hava tiðarhóskandi far í rutusambandinum, máttu størri før enn hingartil kunna brúka Skopunar havn, tað vil siga at hon mátti dýpast, og rúmkast mátti um bæði havn og innsigling. Hetta er so gjort nú; men tíverri hevur heuda broyting -- hóast umfatandi laboratoriiroyndir -- borið við sær, at á ávísum ættum og sjóvarfalli er havnin ikki nóg góð; men verður vónandi eisini funnin loysn á hesum spurningi nakað skjótt.

Tá so langt er komið og greitt er hvat slag og hvørja støðd av skipum nýtt kunnu verða í rutusiglingini í Sandoymna, verður spurningurin um havn í Kirkjubø ivaleyst tikin upp aftur.

Hvat úrslitið verður úr eini nýggjari viðgerð av málinum er ilt at siga; men eg kan siga so mikið, at sjálvt um landsstýrið hevur heimild til at byggja atløgu í Kirkjubø, verður ikki farið undir tílíkt tiltak fyrr enn málið hevur verið á tingið aftur, tí eg rokni við at tingmenn, tá ið teir góvu landsstýrinum hesa heimild, ikki hava roknað við so stórum kostnaði.

Á løgtingi, 14. februar 1977.

Dánjal Pauli Danielsen
landsstýrismaður

---

38. Brennioljustudningur til fiskiskip

Ár 1977, 1. februar, legði Petur Reinert, landsstýrismaður, fram

Uppskot
til

løgtingslóg um brennioljustudning til fiskiskip.	**lagtingslov om brændselsolietilskud til fiskerskibe.**
§ 1.	§ 1.
Løgtingslóg nr. 40 frá 6. mai	Lagtingslov nr. 40 af 6. maj

F. L. j. nr. 1539-2-1

1976 um brennioljustudning til fiskiskip verður eisini at galda fyri tíðarskeiðið 1. januar til 31. mars 1977.

§ 2.

Henda lóg fær gildi beinnavegin.

1976 om brændselsolietilskud til fiskerskibe gælder også for perioden 1. januar til 31. marts 1977.

§ 2.

Denne lov træder straks i kraft.

Viðmerkingar:

Í løgtingsmáli nr. 69/1974 (vetrarting) samtykti løgtingið uppskot um at veita deksfiskiførum 12 oyru í studningi fyri hvønn liturin av brennilju. Studningurin varð lækkaður við 1 oyra fyri hvørt oyra, prísurin á brennilju kom niðurum 67,5 oyru galdandi frá 1. mai 1975 til 31. mars 1976. Skipanin varð endurnýggjað fyri tíðarskeiðið 1. apríl til 31. december 1976, men varð studningurin tá settur til 16 oyru og markið fyri lækking til 71,5 oyru, jbr. løgtingsmál nr. 87/1975.

Í apríl mánaða 1975 var prísurin á brennilju 67,5 oyru fyri liturin og í mars 1976 84,5 oyru. Síðani hevur prísgongdin verið: mai 1976 80 oyru, august 84 oyru, og er prísurin í dag 81,5 oyru. Útlit er til, at um 1. mars í ár hækkar prísurin við 5—10 oyrum.

Landsstýrið metir støðuna eina soleiðis, at neyðugt er at veita oljustudning. Síðani óvist er, hvør prislegan verður aftaná 1. mars í ár, verður mælt til at framlongja skipanina, sum fór úr gildi við árslok til 31. mars 1977 og seinri í tingsetuni viðgera spurningin um studningin aftaná 1. apríl.

1. viðgerð 4. februar, málið beint í fíggjarnevndina, sum 10. februar legði fram soljóðandi

Álit

Málið varð lagt fram av landsstýrinum tann 1. februar 1977 og undir 1. viðgerð tann 4. februar beint í fíggjarnevndina.

Landsstýrið skjýtur upp, at løgtingslóg nr. 40 frá 6. mai 1976 um brennioljustudning til fiskiskip verður eisini at galda fyri tíðarskeiðið 1. januar til 31. mars 1977.

Eftir nevndu lóg var studningurin 16 oyru fyri hvønn liturin av brennilju, og markið fyri lækking 71,5 oyru. Prísurin hevur tað seinasta árið ligið um 80—85 oyru, og sigur landsstýrið, at útlit er til, at 1.mars í ár hækkar prísurin við 5—10 oyru.

Landsstýrið metir, at neyðugt er at veita oljustuðning. Vegna óvissu prísleguna verður mælt til, at skipanin verður framlongd til 31. mars 1977, og at málið verður tikið uppaftur aftaná 1. apríl.

Fíggjarnevndin kann einmælt taka undir við uppskoti landsstýrisins.

Fíggjarnevndin, 10. februar 1977.

Hákun Djurhuus	Poul Jacob Olsen	Hilmar Bech
Jógvan Durhuus	Signar Hansen	Pauli Ellefsen
	Hilmar Kass	

2. viðgerð 14. februar, 3. viðgerð 15. februar.

Uppskot landsstýrisins samtykt við 20 – 0 atkvøðum.

39. Studningur til veiðu av jákupsskel

Uppskot
til

løgtingslóg um studning til veiðu av jákupsskel.

§ 1.

Í tíðarskeiðinum 1. september 1976 til 31. mars 1977 verður latið í studningi til veiðu av jákupsskel 20 oyru fyri hvørt kilo landað í Føroyum at býta millum manning og skip á sama hátt, sum veiða annars verður býtt.

lagtingslov om tilskud til fiskeri af kammusling.

§ 1.

I tidsrummet 1. september 1975 til 31. marts 1977 ydes i tilskud til fiskeri af kammusling 20 øre for hvert landet kilo på Færøerne at fordele mellem mandskab og skib på samme måde som fangst iøvrigt bliver fordelt.

2. s t k. Studningurin verður latin úr Lønjavningargrunni Skipsfiskimanna.

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi beinanvegin.

S t k. 2. Tilskuddet ydes af Lønjavningargrunni Skipsfiskimanna.

§ 2.

Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Sambært løgtingslóg nr. 69 frá 12. september 1975 um studning til veiðu av jákupsskel var heimild í tíðarskeiðinum 20. august 1975 til 15. mars 1976 at lata í studningi 20 øyru fyri hvørt kilo, landað í Føroyum at býta millum manning og skip á sama hátt sum veiða annars verður býtt.

Í skrivi frá K/f Remberg, Tvøroyri, til løgtingið er søkt um, at prísískoytið til veiðuna verður 25 øyru kg í tíðarskeiðinum 1. september 1976 til 31. mars 1977.

Málið varð beint til tíggjarnevndina, og undir viðgerðini hevur Petur Reinert landsstýrismaður á fundi har greitt frá málnum í sini heild og m.a. vist á, at søluprísurin á úrdrátti úr jákupsskel í hesum tíðarskeiði hevur verið rættiliga konstantur og ikki tykist at hækka.

Landsstýrið tekur undir í áheitanini og mælir til, at studningurin verður veittur við 20 øyru fyri kg í tíðarskeiðinum 15. september 1976 til 31. mars 1977.

Petur Reinert
landsstýrismaður

/ K. Thomassen

1. viðgerð 4. februar, 2. viðgerð 4. februar, 3. viðgerð 9. februar.

Uppskot landsstýrisins samtykt við 21 --0 atkvøðum.

40. Sínámillum veiðirættindi Føroya—Ísland

Ár 1977, 7. februar, legði Atli P. Dam, løgmaður, fram soljóðandi

Uppskot
til
samtyktar.

Løgtingið góðkennir sínámillum fiskirættindi millum Føroyar og Ísland sambært hjáløgdu skipan.

Viðmerkingar:

Samráðingar vóru í Reykjavik 4. februar 1977 millum umboð fyri landsstýrið og íslendsku stjórnina. Úrslitið av samráðingunum gjørdist hjálagda skipan dagfest 4. februar 1977.

Sambært skipanina verður loyvt 15 føroyskum skipum at veiða tilsamans 25.000 tons av loðnu undir Íslandi í vetrarveiðitíðini 1977. Tó mugu í mesta lagi 8 skip í senn veiða loðnu innan fyri íslendska fiskimarkið. Veiðun skal landast í Føroyum.

Somuleiðis verður loyvt 15 íslendskum skipum at veiða 25.000 tons av svartkjafti á leiðunum við Føroyar í tíðarskeiðinum fyrst í mars til seinast í juni. Um partrol verður nýtt kann samlaða skipatalið verða 17.

Umframt sínámillum fiskirættindi viðvikjandi loðnu og svartkjafti er semja millum føroyskar og íslendskar myndugleikar um, at fiskifrøðingar frá báðum londum skulu samarbeiða um rannsóknir í svartkjaftagongdini.

Atli P. Dam
løgmaður

/ Petur Reinert landsstýrismaður

1. viðgerð 7. februar, málið beint í figgjarnevndina, 2. viðgerð 8. febr. Landsstýrisins uppskot til samtyktar varð samtykt við 19—0 atkvøðum.

F. L. j. nr. 1500/2-4

Løgtingstíðindi 1976 A — 23

41. Broyting í »Lov om oprettelse af en stilling som vicebiskop på Færøerne«

Ár 1977, 10. februar, legði D. P. Danielsen, landsstýrismaður fram

Uppskot
til
samtyktar.

Løgtingið mælir ríkisstýrinum til at leggja hjálagda lógaruppskot fyri fólkatingið:

Uppskot til lóg um broyting í «Lov om oprettelse af en stilling som vicebiskop på Færøerne».

Viðmerkingar:

Í «Lov om oprettelse af en stilling som vicebiskop på Færøerne» § 2 er ásett «Stillingen som vicebiskop for Færøerne for forbindes med embedet som sognepræst for Sydstrømø præstegæld.»

Undir viðgerðini av málinum um sundurbýti av Suðurstreymoyar prestagjaldi í tvey prestagjøld, Suðurstreymoyar eystara prestagjald og Suðurstreymoyar vestara prestagjald, og úrskiljingin av einari nýggjari sókn í Havn, soleiðis at tað nú eru tvær sóknir, Tórshavnar eystara sókn og Tórshavnar vestara sókn, hevur verabispur gjørt vart við, at torfort er at røkja starvið sum varabispur og starvið sum sóknarprestur fyri Suðurstreymoyar prestagjald -- nú Suðurstreymoyar eystara prestagjald -- á ein slíkan hátt, at ein hevur kensla av at hava rímilig arbeiðskor.

Soinuleiðis hevur bispur fyri Keypmannahavnar bispadømi mælt til, at lóg nr. 48 frá 25. februar 1963 um skipan av einum starvi sum varabispur fyri Føroyar verður broytt, soleiðis at starvið sum varabispur kann verða loyst frá starvinum sum sóknarprestur fyri Suðurstreymoyar eystara prestagjald.

Vísandi til hetta, hevur landsstýrið sagt ríkismyndugleikunum frá sínum áskoðan hesum viðvíkjandi, sum er, at um starvið sum varabispur eins og starvið sum sóknarprestur fyri Suðurstreymoyar eystara prestagjald skulu røkjast væl og virðiliga, er tað neyðugt, at hesi hæði størvini verða skild sundur.

Hetta hevur havt við sær, at kirkjumálaráðið hevur gjørt hjálagda uppskot til lóg um broyting í «Lov om oprettelse af en stilling som vicebiskop på Færøerne», har m.a. verður áseti, at § 2 fer úr gildi, soleiðis at starvið sum varabispur fyri Føroyar ikki lougur er samanbundið við starvið sum sóknarprestur fyri Suðurstreymoyar prestagjald, nú Suðurstreymoyar eystara prestagjald.

Um hesa broyting og broytingarnar annars, sum meira eru formligar, verður víst til hjálagda uppskot við viðmerkingum og einum skjali. Eisini verður hjálagt eitt eintak av lóg nr. 48 frá 25. februar 1963 «om oprettelse af en stilling som vicebiskop på Færøerne».

Dánjal Pauli Danielsen
landsstýrismaður

/ J. Djurhuus.

UDKAST

Forslag
til
lov om ændring af lov om oprettelse af
en stilling som vicebiskop for Færøerne.

§ 1.

I lov nr. 48 af 25. februar 1963 om oprettelse af en stilling som vicebiskop for Færøerne foretages følgende ændringer:

1. § 2 ophæves.
2. § 3, 1. pkt., affattes således:

«Kirkeministeren kan bestemme, at reglerne i lov om bispeembeders besættelse og om adgang til stiftsbåndsløsning, skal finde anvendelse med hensyn til besættelse af stilingen som vicebiskop for Færøerne.»

3. § 5 affattes således:

«§ 5. Vicebiskoppens løning dækkes på samme måde som løninger til folkekirkens præster. Kontorholdsgodtgørelse og befordringsgodtgørelse afholdes af statskassen.»

§ 2.

Loven træder i kraft den 19

I. Almindelige bemærkninger.

Menighedsrådene i Sydstrømø præstegæld har gentagne gange fremsat ønske om adskillelse af forbindelsen mellem stillingen som vicebiskop for Færøerne og stillingen som sognepræst for Sydstrømø præstegæld.

Færøerne, der henhører under Københavns stift, har et folketal på ca. 41.300 og er inddelt i 12 præstegæld, hvert omfattende 3—8 sogne eller kirkedistrikter, eller ialt 58 sogne/kirkedistrikter med selvstændige menighedsråd. Til varetagelse af den præstelige betjening af de færøske menigheder er der ansat 17 præster, heri indbefattet vicebiskoppen.

Sagen har været genstand for nærmere overvejelse i ministeriet, og biskoppen over Københavns stift har i forbindelse med spørgsmålet om oprettelse af et sogn omkring den nyopførte kirke --- Vesturkirken — i Tórshavn og deling af Sydstrømø præstegæld i 2 præstegæld, anbefalet, at stillingen som vicebiskop løsgøres fra sin hidtidige forbindelse med stillingen som sognepræst for sydstrømø præstegæld. Ministeriet har herefter fundet det rettest nu at fremsætte lovforslag i overensstemmelse hermed.

Gennemførelsen af lovforslaget medfører udgift til en yderligere præstelønning, hvoraf staten i medfør af § 1, stk. 1, nr. 4 i lov nr. 294 af 18. juni 1969 om folkekirkens lønningsvæsen m.m., jfr. lovbekendtgørelse nr. 320 af 26. juni 1970, afholder 60%. Afhængig af lønningsanciennitet kan statskassens andel anslås til 70-75.000 kr. årlig.

I bilaget for forslaget er de gældende bestemmelser og ændringer heri opstillet som paralleltekster.

II. Bemærkninger til de enkelte bestemmelser.

Til § 1.

Til nr. 1.

Ved lov nr. 48 af 25. februar 1963 om oprettelse af en stilling som vicebiskop for Færøerne, jfr. Folketingstid., 1962-63. sp. 2510-2511, 2604-2617, 2685-2688 og 2854; Till. A. sp. 729; Till. C. sp. 107, blev de forretninger, som hidtil havde været henlagt under provsten for Færøernes provsti, overdraget til vicebiskoppen.

På grund af øernes geografiske beliggenhed har der altid været tillagt provsten for Færøerne videregående beføjelser end landets øvrige provster. Vicebiskoppens beføjelser er yderligere udvidet og er nærmere fastlagt i et regulativ, jfr. kirkeministeriets bekendtgørelse nr. 198 af 31. maj 1963 — lovtidende A 1963, side 343.

Da stillingen som vicebiskop blev oprettet, var det naturligt at forene denne stilling med stillingen som sognepræst i Torshavn — Sydstrømø præstegæld.

I den siden stillingens oprettelse forløbne tid har det imidlertid vist sig, at hensynet til de færøske meningheder og præster taler for, at der gives vicebiskoppen muligher for jævnligt at foretage besøgsrejser til samtlige præstegæld på øerne med henblik på at vejlede og støtte præsterne samt holde gudstjenester for menighederne.

Hertil kommer, at menighedsrådene i Sydstrømø præstegæld som de eneste færøske menighedsråd ikke har indstillingsret til stillingen som sognepræst i det præstegæld, hvori de er valgt, da besættelse af stillingen som vicebiskop sker i henhold til reglerne i lov om bispeembeders besættelse og om adgang til stiftsbåndsløsning, jfr. § 3 i ovennævnte lov om oprettelse af en stilling som vicebiskop for Færøerne og kirkeministeriets bekendtgørelse nr. 424 af 15. september 1971 om valg af vicebiskop for Færøerne - lovtidende A 1971, side 1114.

Forslagets gennemførelse vil ligestille menighedsrådene i Sydstrømø præstegæld med de øvrige menighedsråd på Færøerne.

Til nr. 2.

Forslaget er alene af redaktionel art.

Til nr. 3.

Efter at folkekirkens tjenestemænd er inddraget under samme love som statens tjenestemænd, er klassificeringen af folkekirkens tjenestemandsstillinger optaget under § 25 i lov nr. 13 af 18. juni 1969 om tjenestemandslønninger m.m. og klassificering af tjenestemandsstillinger i staten, folkeskolen og folkekirken. I medfør af denne bestemmelse er stillingen som vicebiskop klassificeret i lønrumme 38.

Efter bestemmelsen i ovennævnte lov om tjenestemandslønninger m.m. er repræsentationstillæg alene opretholdt for stillingsindehavere ansat før lovens ikrafttræden. Da der har fundet nyansættelse sted i stillingen som vicebiskop i 1973, er der således ikke længere hjemmel for at yde repræsentationstillæg til vicebiskopper.

Bilag.

I dette bilag opføres i venstre spalte de i lovforslaget nævnte bestemmelser i lov om oprettelse af en stilling som vicebiskop for Færøerne i den nugældende formulering, medens de foreslåede ændringer opføres i højre spalte.

Gældende formulering.	**Forslaget.**
§ 2. Stillingen som vicebiskop for Færøerne forbindes med embedet som sognepræst for Sydstrømø præstegæld.	1. § 2 ophæves.
§ 3. Kirkeministeren kan bestemme, at reglerne i lov om bispeembeders besættelse og om adgang til stiftsbåndsløsning, jfr. lovbekendtgørelse nr. 159 af 1. april 1950, skal finde anvendelse med hensyn til besættelse af stillingen som vicebiskop for Færøerne. Ministeren kan fastsætte sådanne afvigelser fra reglerne, som øernes særlige forhold tilsiger.	2. § 3, 1. pkt., affattes således: «Kirkeministeren kan bestemme, at reglerne i lov om bispeembeders besættelse og om adgang til stiftsbåndsløsning, skal finde anvendelse med hensyn til besættelse af stillingen som vicebiskop for Færøerne.»
§ 5. Stillingen som vicebiskop for Færøerne og sognepræst for Sydstrømø præstegæld henføres til 14. lønningsklasse i lov nr. 155 af 7. juni 1958 om folkekirkens lønningsvæsen m.v. jfr. lovens § 34.	3. § 5 affattes således: «§ 5. Vicebiskoppens lønning dækkes på samme måde som lønninger til folkekirkens præster. Kontorholdsgodtgørelse og befordringsgodtgørelse afholdes af statskassen.»
Stk. 2. I repræsentationstillæg tillægges der vicebiskoppen 3.000 kr. årlig.	
Stk. 3. Vicebiskoppens lønning dækkes på samme måde som lønninger til folkekirkens præster. Repræsentationstillæg, kontorholdsvederlag og befordringsgodtgørelse vedrørende vicebispestillingen afholdes af statskassen.	

1. viðgerð 14. februar, málið beint í kirkjunevndina, sum 3. mai legði fram soljóðandi

Álit

Málið er framlagt á ting av landsstýrinum og varð við 1. viðgerð beint í serliga 7-manna kirkjunevnd.

Aftaná at Tórshavn er býtt sundur í tvær kirkjusóknir, hevur varabispur gjørt vart við, at torført verður at røkja starvið sum varabispur og sóknarprestur fyri Suðurstreymoyar prestagjald.

Keypmannahavnar bispadømi hevur mælt til, at lóg nr. 48 frá 25. februar 1963 verður broytt soleiðis, at starvið sum varabispur kann verða loyst frá starvinum sum sóknarprestur.

Hetta kemur eisini at bera í sær, at varabispur kemur at hava betri umstøður at ferðast runt landið og halda gudstænastur.

Nevndin er samd um at mæla løgtinginum til at samtykkja uppskotið frá landsstýrinum.

Undir 1. viðgerð var spurningurin um at kanna, hvørjar fylgjur tað fekk fyri kirkjumar støðu, um varabispur fekk heitið biskuppur, og at Føroyar soleiðis verða sjálvstøðugt bispadømi, men at kirkjan framvegis hevur sama status sum higartil. Hesum sjónarmiði tekur meirlutin í nevndini (Vilhelm Nielsen, Hilmar Beck, Poul Jacob Olsen, Agnar Nielsen, Hilmar Kass og Kjartan Mohr) undir við og setur tí fram hetta

Uppskot
til
samtyktar.

Landsstýrið verður biðið um at kanna møguleikarnar fyri at gera Føroyar til bispadømi og samstundis fáa greiði á, hvørjar avleiðingar, ið standast av hesum.

Minnilutin (Johan Simonsen) vísir í fyrstu syftu til minnilutaálit í løgtingsmáli nr. 13/1961: Varabispur í Føroyum og setur í fyrstu syftu

Uppskot
til
samtykt.

Føroya bispadømi verður endurreist.

Í aðru syftu tekur minnilutin undir við uppskoti meirlutans.

Kirkjunevndin, 2. mai 1977.

Vilhelm Nielsen Hilmar Bech Poul Jacob Olsen
Johan Simonsen Agnar Nielsen Hilmar Kass
Kjartan Mohr

2. viðgerð 3. mai.

Uppskot landsstýrisins varð samtykt við 19—0 atkvøðum.

Uppskot frá meirlutanum í Kirkjunevndini samtykt við 19—0 atkvøðum, uppskot frá minniluta í kirkjunevndini fall við 4—0 atkvøðum.

---

42. Ljósmøður í Suðuroy

Ár 1977, 14. februar, setti Jákup Mortensen, hendan fyrispurning til

Jákup Lindenskov, landsstýrismann.

Hví vera ikki tvær ljósmøður settar í Suðuroy, tá hetta er viðtikið í løgtinginum, og tá útbúgvið fólk, sum vil taka sær av uppgávuni, er tøkt.

Viðmerkingar:

6. februar 1976 samtykti løgtingið løgtingsmál nr. 14/1975: Kommunuleknaskipan o.ø.m. í Føroyum.

Í hesum uppskoti stendur m.a., at talið av fastansettum ljósmødrum í

Føroyum skal vera 14, harav 2 í Suðuroy, onnur búgvandi í syðra parli av oynni.

Nú er støðan tann, at tað eru bert er 1 ljósmóður í Suðuroy, og tað er ein eldri dama. Hon hevur so nógv um at vera hæði dag og nátt, at skal hon røkja starvið samvitskufult, má hon leggja meir fyri seg enn hon orkar, og tá er tað kanska ikki eingang nokk til at trygdin er góð nokk.

Síðan lógarupptakan varð samtykt fyri einum ári síðani, hevur útbúgvin ljósmóðir søkt um starv í Suðuroy, men hon hevur fingið at vita, at hon einans kann fáa arbeiði við at byrja fyri seg sjálvan.

Út frá hesum viðmerkingum loyvi eg mær at seta hesa fyrispurning til landsstýrismannin Jákup Lindenskov.

Á Føroya løgtingi, 14. februar 1977.

Jákup Mortensen

SVAR

uppá fyrispurning frá Jákup Mortensen, løgtingsmanni.

Jákup Mortensen spyr, hví ikki tvær jarðamøður verða settar í Suðuroy, víst verður til, at løgtingið hevur viðtikið, at so skal vera, og at útbúgvið fólk er tøkt.

Sum Jákup Mortensen vísir á, samtykti løgtingið 6. februar 1976 m.a. nýggja ljósmóðurskipan. Eftir samtyktini verða at seta 8 senterljósmøður og 6 deildarljósmøður. Heitið senterljósmóðir er nýtt, higartil hava tær allar verið deildarljósmøður.

Senterljósmøðurnar verða at seta ístarv á sjúkrahúsunum, 4 á landssjúkrahúsinum, 2 á Klaksvíkar sjúkrahúsi og 2 á Suðuroyar sjúkrahúsi, og skulu tær eisini hava bæði viðlalu- og kanningarhøli á sjúkrahúsinum.

Av teimum báðum senterljósmøðrunum í Suðuroy skal onnur hava búsað í syðra partinum av oynni.

Í sama máli, har ljósmóðurskipanin varð viðgjørd, samtykti løgtingið, at landskassin veitir helvtina í studningi av útreiðslum kommununnar til bygging ella størri umbygging av viðlaluhølum ella læknamiðstoðum.

Av tí at ógvuliga trongligt er á Suðuroyar sjúkrahúsi, nakað rúmsáttari

verður, tá ið røktar- og aldursheimið er liðugt, er senterskipanin ikki sett í verk á sjúkrahúsinum. Samráðingar hava verið við kommununa og ætlanir fyriliggja eisini um at byggja lækna- og heilsumiðsstoð nærheindis sjúkrahúsinum, har eisini neyðug høli verða lyá jarðamóður.

Annars er at sigu, at ríkisumboðið upplýsir, at jarðamóðir verður fyribilssett sum deildarljósmóður á Tvøroyri frá 1. mars 1977.

Á Føroya lógtingi, 22. februar 1977.

Jákup Lindenskov
landsstýrismaður

---

43. Bann móti skjóting av grindahvali á landleiðini

Ár 1977, 4. mars, setti Ove Mikkelsen, løgtingsmaður fram hetta

Uppskot
til

løgtingslóg um bann móti skjóting av grindahvali á landleiðini.

§ 1.

Tað er ikki loyvt at skjóta grindahval á landleiðini, t.v.s. innan fiskimarkið.

§ 2.

Einasta undantak frá hesi lóg er, tá einstakir hvalir aftanú grindadráp ikki kunnu avlivast á annan hátt.

§ 3.

Henda lóg fær gildi beinnu vegin.

lagtingslov om forbud mod skydning af grindehvaler indenfor for søterritoriet.

§ 1.

Det er ikke tilladt at skyde grindehval indenfor søterritoriet d.v.s. indenfor fiskerigrænsen.

§ 2.

Eneste undtagelse fra denne lov er, hvis enkelte hvaler efter grindedrab ikke kan aflives på anden måde.

§ 3.

Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Hin 9. august 1974 legði undirritaði eitt líknandi uppskot fram á ting, men hevur hetta lógaruppskot enn, hin 15. februar 1977, ikki fingið 1. viðgerð. Vónandi fær hetta betri lagnu.

Skjóting av grindahvali undir Føroyum sum veiðiháttur hevur verið rikin, bæði av føroyingum og útlendingum.

Tað hevur vist seg, serstakliga tey seinastu árini, at grindir, sum koma til rakstur, eru óvanliga styggar. Talið á hvalum í bólkum tykist eisini at lækka ár um ár. Orsøkirnar til, at grindirnar eru í so smáum bólkum og so styggar, tá tær koma undir land, kunnu sjálvandi vera ymiskar, men vist er, at er skotið í ein grindaflokk, spjaðist hann, rýmir langar leiðir og verður so styggur, at bátur næstan ikki kann koma í nánd, og ringt er at fáa rækstur á.

Tvøst og spik var týðandi táttur í føroyska húsarhaldinum og eru líka kærkomin enn, um slikt fæst. Ja ikki minst í hesum tíðum við ókendum høgum prísum á øllum matvørum.

Tað er ongin ivi í, at ein orsøkin til, at færri og smærri grindir koma undir land, er tann, at hon ikki fær frið fyri hvalastingarum, so hesin veiðiháttur eigur at verða bannaður á okkara leiðum.

Tað má eisini haldast at vera skeivt, at fjøldin av fólkinum ikki fær ágóðan av grind, sum kundi lagt beinini, vegna tess, at einstaklingar fáa loyvi at jagsira hana.

Tí verður hetta uppskot lagt fram einaferð enn.

Á Føroya løgtingi, 15. februar 1977.

Ove Mikkelsen

1. viðgerð 7. mars, málið beint í fiskivinnunevndina, sum 17. mars legði fram hetta

Álit

Málið er lagt fyri tingið av Ova Mikkelsen og varð við 1. viðgerð beint í fiskivinnunevndina.

Fiskivinnunevndin hevur viðgjørt málið. Ein meiriluti í nevndini (P. J. Olsen, Vilhelm Nielsen og Jógvan Olsen) heldur ikki at skjóting av grindahvali er høvuðsorsøkin til at tað koma færri og smærri grindir nú enn fyrr. At tað føroyingar vita um, hava tað verið ójøvn grindaár. Tað hava verið tíðarskeið, hvar nógvar grindir eru komnar undir landið, og onnur hvar minni hevur verið.

Meirilutin metir, at ein orsøk til hesi ójøvnu grindaárini kann vera, at miuni hevur verið til av høggusløkki, ið er tann føði, grindahvalurin fyri tað mesta livir av.

Nevndin er eisini vitandi um, at tað í hesi øldini hevur verið skotið nakað av grindahvali á Føroya-leiðini, mest av útlendingum, men metir at henda skjóting hjá útlendingum deftur burtur, nú fiskimarkið er flutt út.

Meirilutin er av teirri áskoðan, at tað ikki eigur at vera loyvt at skjóta grindahval innan fyri 20 fjórðingar frá grundlinjunum, við tað at grindir tá eru so nær, at møguleikar eru fyri at reka tær at landi.

Við tí í álitinum framførda mælir meirilutin til at samtykkja uppskotið við broytlari § 1 og selur fram fylgjandi

broytingaruppskot

§ 1.

Tað er ikki loyvt at skjóla grindahval innan fyri 20 fjórðingar út frá grundlinjunum.

§ 1.

Det er ikke tilladt at skyde grindehval indenfor 20 sømil fra grundlinjerne.

Minnilutin (Ove Mikkelsen og Johan Simonsen) mælir til at samtykkja uppskotið frá Ova Mikkelsen.

3. viðgerð 25. mars.

Uppskot frá Ova Mikkelsen, løgtingsmanni, § 1 fall við 10-0, broytingaruppskot frá fiskivinnunevndini § 1 samtykt við 23—0, lógin endaliga samtykt við 17-0 atkvøðum.

44. Veðhald fyri láni til Lorvíkar kommunu

Ár 1977, 2. mars, legði Petur Reinert, landsstýrismaður, fram

Uppskot
til

løgtingslóg um veðhald fyri láni til Lorvíkar kommunu.

§ 1.

Landsstýrinum er heimilað at veðhalda landskassans vegna fyri láni upp til kr. 2.200.000,- úr Kreditforeningen af Kommuner i Danmark til Lorvíkar kommunu.

§ 2.

Henda lóg fær gildi beinnvegin.

lagtingslov om garanti for lån til Lorvíkar kommune.

§ 1.

Landsstyret bemyndiges til på landskassens vegne at garantere for lån indtil kr. 2.200.000,- fra Kreditforeningen af Kommuner i Danmark til Lorvíkar kommune.

§ 2.

Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Við skrivi 11. januar 1977 hevur Lorvíkar kommuna sent umsókn um veðhald fyri láni 2,2 milj. kr., ið kommunan ætlar at reisa til skúlabygging.

Umsóknin um lánið, sum samstundis er send Kreditforeningen af kommuner i Danmark, vil landsstýrið viðmæla.

Landsstýrið hevur samtykt at veita vanligan stuðul til nevndu bygging, sum er metti at kosta kr. 5.440.000,-.

Lánið, kr. 2.200.000,-, sum er treytað av landskassaveðhaldi, vil við galdandi obligatiónskursi geva í ávtøku um 1,5 milj. kr.

Eftir kostnaðarætlanini verður nevnda skúlabygging figgjað soleiðis:

Innistandandi á bók	500.000,—
Munnliga játtað lán frá tryggingini	1.000.000,—
Kreditforeningen af kommuner i Danmark	1.500.000,—
Játtaður statsstuðul	976.000,—
Játtaður landskassastuðul	1.464.000,—
falt kr.	5.440.000,—

Lánskyldur kommununnar vóru 31. mars 1976 kr. 4.817.380,-.
Í rentum og avdráttum er roknað við:

av **gomlum** lánum		525.000,—
av nýggjum lánum:		
av 2.200.000	200.000,—	
— 1.000.000	75.000,—	
— 250.000	37.500,-	312.500,
	falt kr.	5.440.000,—

Við fylgir sum skjal yvirlit yvir fíggjarstandin hjá Lorvíkar kommunu, herundir spesifikatión av føstu lánunum pr. 31. mars 1976.

1. viðgerð 7. mars, málið beint í fíggjarnevndina, 8. mars legði nevndin fram hetta

Álit

Málið varð lagt fram av landsstýrinum tann 2. mars 1977 og undir 1. viðgerð 7. mars beint í fíggjarnevndina.

Landsstýrið skjýtur upp, at tað fær heimild landskassans vegna at veðhalda fyri einum láni upp til 2.200.000 kr. úr Kreditforeningen af kommuner i Danmark til Lorvíkar kommunu. Peningurin er ætlaður til skúlabygging. Lánið vil við galdandi obligatiónskursum geva umleið kr. 1,5 milj. í úrtøku. Nevnda skúlabygging ætlast at kosta kr. 5.440.000. Pr. 31. mars 1976 skyldaði kommunan kr. 4.817.380,-, og í rentum og avdráttum er roknað tilsamans kr. 837.500,-.

Við lógaruppskotinum var hjálagt yvirlit yvir fíggjarstandin hjá Lorvíkar kommunu saman við specifikatión av føstu lánunum pr. 31. mars 1976. Tá eingin rakstrarroknskapur fyri kommununa fylgdi við, hevur ikki verið gjørligt hjá fíggjarnevndini at meta uppskotið eftir teimum inntøkum og útreiðslum, sum kommunan hevur.

Fíggjarnevndin kann einmælt taka undir við uppskoti landsstýrisins.

2. viðgerð 10. mars, 3. viðgerð 15. mars.

Uppskot landsstýrisins samtykt 22 0 atkvøðum.

45. Veðhald fyri lánum til fiskamjøl v. m. á goymslu

Ár 1977, 22. februar, legði Jákup Lindenskov, landsstýrismaður, fram

Uppskot
til

Løgtingslóg um veðhald fyri lánum til fiskamjøl og lýsi. v.m. á goymslu.

§ 1.

Landsstýrinum er heimilt landskassans vegna í fíggjarárinum 1977/78 at veita veðhald fyri lánum til fiskamjøl, lýsi, matsild og agn á goymslu. Veðhaldið verður givið fyri lánum ikki upp um 70% av lánivirðinum.

§ 2.

Henda lóg kemur beinan vegin í gildi.

garanti for lån til fiskemel og animalsk olie m.v. på lager.

§ 1.

Landsstyret bemyndiges til på landskassens vegne i finansåret 1977/78 at garantere for lån til fiskemel, animalsk olie, konsumsild og agn på lager. Garantien ydes for lån, der ikke må overstige 70% af lånværdien.

§ 2.

Denne lov træder straks i kraft.

Viðmerkingar:

Uppskotið er samsvarandi við løgtingslóg nr. 9 frá 17. februar 1976, sum fer úr gildi 31. mars 1977. Lógin skal fyribils bert galda komandi fíggjarár. Víst verður til viðmerkingarnar frá landsstýrinum í løgtingsmáli nr. 54/1975.

1. viðgerð 2. mars, málið beint í fíggjarnevndina, sum 4. mars legði fram hetta

Álit

Málið varð lagt fram av landsstýrinum tann 22. februar 1977 og undir 1. viðgerð 2. mars beint í fíggjarnevndina.

Landsstýrið skjýtur upp, at tað fær heimild landskassans vegna í fíggjarárinum 1977/78 at veita veðhald fyri lánum til fiskamjøl, lýsi, matsild og agn á goymslu, og má veðhaldið fyri lánini ikki fara upp um 70% av

lánivirðunum. Talan er um endurnýgging av løgtingslóg nr. 9 frá 17. febr. 1976, sum fer úr gildi 31. mars 1977.

Fíggjarnevndin kann einmælt taka undir við uppskoti landsstýrisins.

2. viðgerð 7. mars. 3. viðgerð 10. mars.

Uppskot landsstýrisins varð samtykt við 20—0 atkvøðum.

---

46. Veðhald fyri lánum til fiskiskip og fiskavirkir

Ár 1977, 22. februar, legði Jákup Lindenskov, landsstýrismaður, fram

Uppskot
til

løgtingslóg um veðhald fyri lánum til fiskiskip og fiskavirkir.

§ 1.

Landsstýrinum verður heimilað saman við fíggjarnevndini landskassans vegna í fíggjarárinum 1977/78 at veðhalda fyri lánum til fiskiskip og fiskavirkir, sum eru komin í fíggjarliga trongstøðu. Hin samlaða veðhaldsupphæddin má ikki fara upp um 5 milj. kr.

§ 2.

Treytirnar fyri at veðhald kann verða veitt eru hesar:

lagtingslov om garanti for lån til fiskeskibe og fiskerivirksomheder.

§ 1.

Landsstyret bemyndiges til sammen med finansudvalget på landskassens vegne i finansåret 1977/78 at garantere for lån til fiskeskibe og fiskerivirksomheder, der er kommet i driftsvanskeligheder. De samlede garantibeløb må ikke overstige 5 mill. kr.

§ 2.

Betingelserne for at garanti ydes er disse:

a. at líkindi eru til, at rekstrin framyvir eftir øllum fyriliggjandi upplýsingum fer at bera seg.

b. at egingpeningurin verður lukkaður við í minsta lagi 15% av tí peningi, ið neyðugur er til framhald av rekstrinum, ella fingin verða onnur lán, sum ikki mugu krevjast aftur goldin yvir stytri áramál enn áramálið fyri tey lán, landið veðheldur fyri sambæt hesa lóg.

§ 3.

Henda lóg fer gildi beinan vegin.

a. at der er udsigt til, at driften fremover efter alle foreliggende oplysninger bliver rentabel.

b. at egenkapitalen forhøjes med mindst 15% af det beløb, der er nødvendigt til fortsættelse af driften, eller der opnås andre lån, der ikke må forlanges tilbagebetalt over kortere åremål end åremålet for de lån, for hvilke landet garanterer i henhold til denne lov.

§ 3.

Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Uppskotið er samsvarandi løgtingslóg nr. 38 frá 6. mai 1976, sum fer úr gildi 31. mars 1977. Veðhaldsupphæddin verður óbroytt kr .5 milj., og skal lógin fyribils bert galda hetta fíggjarárið. Landsstýrið og fíggjarnevndin hava inntil nú játtað veðhald fyri lánum upp til kr. 5.966.000 fyri árið 1975/76 kr. 3.410.000 og fyri árið 1976/77 kr. 2.556.000 av galdandi heimild.

1. viðgerð 2. mars, málið beint í fíggjarnevndina, sum 4. mars legði fram hetta

Álit

Málið varð lagt fram av landsstýrinum 22. februar 1977 og undir 1. viðgerð tann 2. mars beint í fíggjarnevndina.

Landsstýrið skjýtur upp, at tað saman við fíggjarnevndini fær heimild til landskassans vegna í fíggjarárinum 1977/78 at veðhalda fyri lánum til fiskiskip og fiskavirkir, sum komin eru í fíggjarliga trongstøðu, og má samlaða veðhaldsupphæddin ikki fara upp um kr. 5 mió.

Talan er um endurnýggging av løgtingslóg nr. 38 frá 6. mai 1976, sum fer úr gildi 31. mars 1977.

Figgjarnevndin tekur einmælt undir við uppskoti landsstýrisins.

2. viðgerð 7. mars, 3. viðgerð 10. mars.

Uppskot landsstýrisins samtykt við 20- 0 atkvøðum.

---

47. Føroysk navnalóggáva

Ár 1977, 2. mai, legði sjálvstýrisflokkurin fram hetta

Uppskot
til
samtyktar.

Løgtingið samtykkir at seta 3-manna utfantinga nevnd. Setningur hennara verður at seta fram uppskot um fornøvn, eftirnøvn, slavseting av nøvnum, skráseting av nøvnum og fasta nevnd til at taka støðu til ívaspurningar nøvnum viðvíkjandi.

Viðmerkingar:

Spurningurin um eina navnalóggávu ella eina reglugerð fyri fólkanøvn kemur fram av og á. Tingið hevur fyri árum síðani havt nevnd sitandi til at viðgera hetta spurning, men einki úrslit kom burturúr.

Ein navnabók kom út í 1930, tað vóru M. A. Jacobsen og Chr. Matras, sum góvu hana út. Hon er uppseld fyri langari tíð síðan, og úrvalið av nøvnum í henni er ov lítið.

Síðani hetta bók kom út, er nakað av arbeiði gjørt fyri at kanna nøvn og navnasiðir. Upp á prent eru komin avriðini hjá Jákupi í Jákupsstovu. Hann hevur skrásetl nøvn á øllum fólkum í Føroyum í 1801. Onnur navnasøvn eru til, sum møguliga kunnu koma eini nýggjari navnalóg til góðar.

Tað eru prestarnir, sum umsita navnagávuna í Føroyum. Tað er skylda teirra at ansa eftir, hvørji nøvn verða givin børnum, samstundis sum prestarnir ikki hava myndugleika til at taka endaliga avgerð um ávís nøvn. Støðan kann læt vera tann, at prestarnir góðtaka ivasom nøvn, tá ið teir ikki hava reglur at ganga eftir.

Tað er ikki rætt at lata ein ávisan statt avgera, hvussu fólk í øllum landinum skulu eita. Tað er eisini ein ógvuliga stór ábyrgd at leggja á prestarnar, sum teir neyvan eru glaðir fyri.

Ein almenn regla í tí dansku navnalógini er, at børn eiga ikki at fáa ósømilig nøvn. Tað er fornavnið ella fornøvnini, her er hugsað um. Ósømilig nøvn verða helst ikki givin hjá okkum, men rettiliga nógv nøvn verða givin, sum sita ógvuliga illa á føroyskum máli -- bæði smíðað og útlendsk -- nøvn, sum tey, ið bera tey, neyvan verða serliga glað fyri, og sum tey sjálvi ikki høvdu funnið uppá at tikið sær.

Eftirnøvnini í føroyskum navnasiði eru ikki meira enn um 150 ára gomul. Fyri 1800 høvdu flestu fólk bert eitt fornavn, og fyri at skilja fólk við sama navni frá hvørjum øðrum, varð so navnið á pápanum skoytt uppi við soni ella dóttir. Føroyingar áttu at havt høvi til at fingið sær eftirnavn, sum hóskar til føroyskan navnasið.

Umhugsað eigur at vera, um tað skal verða loyvt at brúka faðir- ella móðurnavnið við soni/dóttir uppií sum eftirnavn, eisini um tað skal verða loyvt at fáa sær eitt húsa- ella staðarnavn til eftirnavn.

Nógv eldri fólk og fleiri ung fólk verða skrivað við dansku navnasniði, men verða ropt við føroyskum navnasniði. Fólk eiga at fáa høvi at broyta stavsetingina av navni sínum til tað, tey verða ropt. Í hesum sambandi verður neyðugt at taka støðu til kelinøvn og navnastyttingar.

Flest ølt fólk verða bert ropt við fornavni, tí kunnu vit kenna fornavnið uttan at kenna eftirnavnið, tí eigur at umhugsast, um vit skulu skráseta fólk eftir fornavni. Í mongum førum hevði tað verið lættari at funnið fram til ávíst fólk á henda hátt.

Ein navnalóg eigur at vera rúm og liðilig, tí eigur føst nevnd at sita, sum tekur støðu til ivaspurningar.

Vit mæla til, at løgtingið setur nevnd — ikki tingnevnd — at viðgera málið.

Á Føroya Løgtingi, 1. mars 1977.

Sjálvstýrisflokkurin.

1. viðgerð 8. mars, málið beint í lógarnevndina, sum 29. april legði fram hetta

Álit

Eftir hesum uppskoti skal løgtingið seta 3-manna uttantingsnevnd við tí setningi at seta fram uppskot um fornøvn, eftirnøvn, stavseting av nøvnum, skráseting av nøvnum og fasta nevnd til at taka stoðu til ivaspurningar.

Mál um føroyska navnalóggávu hava áður verið til viðgerðar í løgtinginum, seinast í tingsetuni 1969, sml. løgtingstíðindi 1969, bls. 116-23.

Ein meirilutí í lógarnevndini mælti tá til at fáa dansku lógina frá 17. mai 1961 «om personnavne» setta í gildi í Føroyum við ymiskum broytingum, meðan ein minnilutí mælti til at seta uiður 5-manna nevnd við serkønum til at gera uppskot um løgtingslóg um persónnøvn og at áleggja landsstýrinum at leita samráðingar við dansku ríkisstjórnina við tí endamáli, at lóg nr. 137 frá 23. mars 1948 varð soleiðis broytt, at persónnavnalóggávan í Føroyum varð føroyskt sermál.

Men hæði uppskot meirilutans og uppskot minnilutans fullu.

Í viðmerkingum minnilutans í tingsetuni 1969 varð beint á, at fyrsta treytin fyri at fáa skil á navnalóggávuni í Føroyum var at hetta mál varð gjørt føroyskt. Eftir heimastýrislógini var hin vegin navnalóggávumálsøkið hvørki A ella B mál. Tað varð tí neyðugt at broyta heimastýrislógina. Mælt varð til, at gjørt varð uppskot til veruliga føroyska navnalóg, og at samstundis stig vórðu tikin til at broyta lógina frá 23. mars 1948.

Málið um føroysk persónnøvn er nú aftur reist á tingi, og mælir meirilutin (J. Fr. Øregaard, Tórálvur Mohr Olsen og Pauli Ellefsen) til at samtykkja uppskot sjálvstýrisflokksins.

Minnilutin (Erlendur Paturssou og Eliesar Arge) mælir tinginum til at samtykkja hesi uppskot:

I.

Løgtingið velur 3-manna millumtinganevnd við tí setningi at gera uppskot til løgtingslóg um persónnøvn og annars at seta fram uppskot um fornøvn, eftirnøvn, stavseting, skráseting av nøvnum, og at taka stoðu til ivaspurningar nøvnum viðvíkjandi.

II.

Landsstýrinum verður álagt at taka upp samráðingar við dansku ríkis-

stjórnina við tí endamáli, at lóg nr. 137 frá 23. mars 1948 verður soleiðis broytt, at persónnavnalóggávan í Føroyum verður føroyskt sermál.

Lógarnevndin, 29. april 1977.

Erlendur Patursson Eliesar Arge J. Fr. Øregaard

Tórálvur Mohr Olsen Pauli Ellefsen

2. viðgerð 2. mai.

Uppskotið frá Sjálvstýrisflokkinum varð samtykt við 22—0. atkvøðum. Uppskotini I og II frá minnilutanum í lógarnevndini (Erlendur Patursson og Eliesar Arge) fullu við 11—0.

---

48. Sínámillum fiskirættindi Føroyar-EEC.

Ár 1977, 2. mars, legði løgmaður, Atli P. Dam, fram hetta

Uppskot
til samtyktar

Løgtingið samtykkir í, at landsstýrið skrivar undir sáttmála um sínámillum fiskirættindi millum Føroyar og EEC (Evropeiski Búskaparligi Felagsskapurin) sambæt hjáløgdu skjøl.

Viðmerkingar:

Landsstýrið hevur saman við ríkisstýrinum samráðst við EEC um sínámillum fiskirættindi millum Føroyar og EEC. Seinasta umfarið av hesum samráðingum var í Bryssel 23. februar 1977. Partarnir samdust tá um ein

sáttmála. Hetta er ein rammusáttmáli, sum fyrisetur lær hovuðsreglur, ið sínámillum fiskiskapur skal skipast eftir og sostatt hevur til endamáls at veita báðum pørtum heimild til at geva hvørjum øðrum fiskirættindi. Hann fyrisetur einki um tær nøgdir, sum partarnir skulu kunna veiða hjá hvørjum øðrum.

Sambært grein 2 í sáttmálanum skal hvør parturin fyri sítt fiskiøki árliga áseta loyvdu heildarveiðuna, og eftir samráðing millum partarnar skulu ásetast veiðinøgdir hjá fiskiførum frá hinum partinum, og hvar hesar nøgdir kunnu veiðast. Miðað skal vera ímóti eini hóskandi javnvág (statisfactory balance) í veiðinøguleikunum hvør hjá øðrum. Undir samráðingunum um veiðinøgdir skulu partarnir hava í huga vanliga fiskiskapin hjá pørtunum, trupulleikarnar fyri partarnar av minking av veiðinøguleikunum og «øll onnur viðurskifti av týdningi».

Millum tey viðurskifti av týdningi, ið havast skulu í huga, verð undir samráðingunum serligur dentur lagdur á tað, sum í fortalunni stendur um samtyktina í Ráðnum tann 4. februar 1974 um Føroya serligu viðurskifti og um tann avgerandi týdning, fiskivinnan hevur fyri Føroyar.

Haraftanat eru í grein 3 og 4 áseltar reglur um, at fiskiskapur kann verða treytaður av veiðiloyvi, og at fiskiførini skulu rætta seg eftir teimum reglum fiskiskapi viðvíkjandi, sum hvør av pørtunum ásetur á sínum fiskiøki.

Partarnir skulu sambært grein 6 samarbeiða um stýring og varðveiting bæði av fiskastovnunum innan egið fiskimark og av øðrum stovnum av felags áhuga.

I grein 9 er fyrisett, at sáttmálin ikki skal nerva rættindi hjá føroyingum í danska kongaríkinum.

Aftan fyri hetta orðalag liggur ein vilji hjá landsstýrinum og ríkisstjórnini til at leggja dent á, at føroyingar við at gera sáttmála við EEC um fiskiskap á EEC økinum, ið umfatar fiskiøkini hjá hinum pørtunum av ríkinum fróknað Grønland, ikki fráskriva sær ley rættindi, ið teir sum ríkisborgarar hava til at fiska á teimum leiðum, ið hoyra til hesar ríkispartar.

Sáttmálin er í fyrstu syftu galdandi í 10 ár og heldur annars fram í 6 ára skeið, um hann ikki verður uppsagdur frá øðrum av pørtunum við 9 mánaða ávaring.

Sáttmáli um fiskiskap millum donsku stjórnina og Føroya Landsstýri og Europeiska Búskaparliga Felagsskapin.

Danska stjórnin og Føroya Landsstýri øðrumegin og Europeiski Búskaparligi Felagsskapurin (hereftir nevndur Felagsskapurin) hinumegin

hava Føroya støðu sum eju sjálvstýrandi part av einum av limalondunum í felagsskapinum í huga;

leggja sær samtyktina í Ráðnum tann 4. februar 1974 um Føroya serligu viðurskifti í geyma;

hugsa um tann avgerandi týdning ,fiskivinnan hevur fyri Føroyar sum landsins týdningarmesti búskaparligi táttur;

hugsa um tað felags ynskið um at varðveita og tryggja skynsama nýtslu av fiskastovnunum í havinum kring strendur teirra;

hava í huga, at ein partur av stovnunum sumstaðni á landleiðunum hjá pørtunum eru fiskasløg, ið eru ógvuliga nærtengd, og sum verða veidd av fiskimonnum frá báðum pørtum;

hava í huga, at viðkanin av fiskimørkunum í Atlantshavinum kann elva til eina flyting av veiðiorkuni, sum kann nerva hesar stovnar;

ásanna, at strandalondini á hesum teiðum undir hesum umstøðum hava allarstørsta áhuga fyri at seta hóskandi tiltøk í verk til tess at varðveita og tryggja skynsama nýtslu av stovnunum ;

hava arbeiðið hjá triðju havrættarstevnuni hjá Sameindu Tjóða í huga;

ásanna, at viðkanin hjá strandalondum av teim havøkjum, har tey hava yvirvaldsrætt yvir fiskastovnunum, og at nýtslan á hesum økjum av yvirvaldsrættinum viðvíkjandi kanning, nýtslu, varðveiting og stýring av hesum stovnum, skulu fara fram sambært og samsvarandi meginreglunum í altjóðarættinum;

taka til eftirtektar, at avgjørt er at víðka fiskiøkið við Føroyar út á 200 fjórðingar frá landi tann 1.1.1977, at Føroyar innan fyri hetta økið hava yvirvaldsrætt til at kanna, nýta, varðveita og stýra fiskastovnunum innan fyri hetta økið, og at felagsskapurin er samdur um, at markini fyri fiskiøkjunum hjá limalondum hansara (hereftir nevnt fiskiøkið hjá felagsskapinum) skal vera upptil 200 fjórðingar, og at fiskiskapur innan hetta økið skal fara fram sambært tann felags fiskivinnupolitikkin hjá felagsskapinum;

ynskja at áseta reglur og treytir viðvíkjandi fiskiskapi av felags áhuga:

og eru komin ásamt um hetta:

Grein 1

Hvør partur skal loyva fiskiførum frá hinum partinum at fiska á tí oki, har hann hevur yvirvaldsrætt viðvíkjandi fiskiskapi sambært reglunum niðanfyri.

Grein 2

Út frá tørvinum á skynsamari nýtslu av fiskastovnunum skal hvør partur fyri sítt fiskiøki og fyri eitt ár ísenn, tó við fyrivarni um broytingar vegna óvæntaðar umstøður, á hóskandi hátt

(a) áseta loyvdu heildarveiðuna av einstøkum ella samtengdum fiskastovnum, útfrá fragast tøkum vísindaligum úrslitum, og við hugsan um hvussu fiskasløgini ávirka hvørt annað, um arbeiðið hjá viðkomandi altjóða felagsskapum og um onnur viðurskifti av týdningi;

(b) aftaná neyðugar samráðingar áseta veiðumøgdir hjá fiskiførum frá hinum partinum, og hvar hesar møgdir kunnu veiðast. Báðir partar skulu miða ímóti eini hóskandi javnvág í veiðumøguleikunum hvør hjá øðrum. Tá hesir møguleikar verða ásettir, skal hvør parturin hava í huga:

(i) hvat hvør parturin er vanur at veiða;

(ii) tørvurin á at minka um trupulleikarnar hvør hjá øðrum í tí føri, har neyðugt verður at minka um veiðumøguleikarnar;

(iii) øll onnur viðurskifti av týdningi.

Tiltøk, ið partarnir seta í verk til less at stýra fiskiskapinum fyri at varðveita ella byggja upp fiskastovnar, so at teir kunnu geva mest møguliga varandi úrtøku, mugu ikki vera soleiðis háttað, at tey forða fyri fullu nýtsluni av fiskirættindunum, ið veitt verða sambært sáttmálan.

Grein 3

Hvør parturin kann krevja, at fiskiskapur á hansara fiskioki við fiskiførum frá hinum partinum skal verða treytaður av loyvi. Viðkomandi myndugleiki hjá hvørjum parti skal á hóskandi hátt og til ásetta tíð boða hinum partinum frá navni, skrásetingarnummari og øðrum neyðugum upplýsingum um tey fiskifør, sum eru ætlað at veiða á fiskiokinum hjá honum. Hin parturin skal síðan geva loyvi, ið samsvara við veiðumøguleikarnar, ið givnir eru undir treytunum í grein 2 (b).

Grein 4

1. Fiskifør frá øðrum partinum skulu, tá ley fiska á fiskiokinum hjá hinum partinum, rætta seg eftir teimum varðveitingartiltokum og øðrum freytum og forskriftum, ið ásett eru av hinum partinum, og eftir reglum og forskriftum fyri fiskiskap hjá hesum partinum.

2. Hóskandi ávaring eigur at verða givin frammanundan um nýggjar regtur, treytir, lógir og reglugerðir.

Grein 5

1. Hvør parturin skal taka øll neyðug stig til at tryggja, at ásetingarnar í hesum sáttmála og aðrar viðkomandi reglur verða hildnar av skipum hansara.

2. Hvør parturin kann á sínum fiskiøki seta í verk tiltøk samsvarandi altjóða lóg, ið eru neyðug fyri at tryggja, at reglurnar í hesi avtalu verða hildnar av fiskiførum frá hinum partinum.

Grein 6

Partarnir binda seg til samstarv til tess at tryggja rætta stýring og varðveiting av tí livandi ríkidømunum í havinum og at lætta um neyðugar vísindaligar ramsóknir serliga viðvíkjandi

(a) stovnum, sum finnast inni á hjá báðum pørtum, við tí í hyggju so vítt gjørligt at seta samsvarandi tiltøk í verk til stýring av veiðuni av hesum stvonum;

(b) stovnum av felags áluga, ið finnast inniá hjá báðum pørtu og á leiðum nærhendis uttanfyri øki teirra.

Grein 7

Partarnir eru samdir um at ráðfora seg hvør við annan um spurningar, ið stinga seg upp, tá ið sáttmálin skal setast í verk og fáast at virka, sum hann eigur.

Um stríð stendst av úllegging ella nýtslu av hesum sáttmála, skulu partarnir samráðast um hetla.

Grein 8

Einki í hesum sáttmála skal ávirka ella á nakran hátt vera bindandi fyri

tey sjónarmið, ið partarnir hava um nakran spurning viðvíkjandi havrætti.

Grein 9

Hesin sáttmáli skal ikki nerva rætfindini innan fyri danska kongaríki hjá donskum ríkisborgarum, sum búgva í Føroyum.

Grein 10

Hesin sáttmáli skal galda øðrumegin fyri Føroyar og hinumegin fyri tey landaøki, har sáttmálin, ið stovnsetur teir Europeisku Búskaparligu Felagsskapirnar, er í gildi undir teim treytum, ið ásettar eru í umrødda sáttmála.

Grein 11

Hesin sáttmáli fær gildi frá tí degi, tá ið sáttmálapartarnir boða hvørjum øðrum frá, at tann málsviðgerð, ið er neyðug í hesum føri, er fullførd. Til hann fær endaligt gildi, skal hann fyribils galda frá 1. januar 1977.

Grein 12

Hesin sáttmáli hevur gildi í einum byrjunartíðarskeiði uppá 10 ár frá tí degi, hann fær gildi. Uppsignur hvørgin av pørtunum sáttmálan við fráboðan um uppsøgn í minsta lagi 9 mánaðar, áðrenn hetta tíðarskeið er úti, skal hann verða galdandi í onnur 6 ára skeið, treytað av at boð um uppsøgn ikki eru givin í minsta lagi 9 mánaðar, áðrenn eitthvørt slíkt tíðarskeið er úti.

Grein 13

Partarnir eru samdir um at kanna sáttmálan, tá ið samráðingarnar um ein multilateralan sáttmála eru lidnar sum úrslit av triðju havrættarstevnuni hjá Sameindu Tjóðunum.

Grein 14

Hesin sáttmáli er skrivaður í tveimum einløkum á donskum, enskum, fronskum, føroyskum, hollendskum, italienskum og týskum. Hvør av hesum tekstunum skal hava sama gildi.

1. viðgerð 4. mars, málið beint í marknaðarnevndina, sum 4. mars legði fram hetta

Álit
í
løgtingsmálunum nr. 48/1976: Sínamillum fiskirættindi Føroyar EEC. nr. 49/1976: Fiskirættindasáttmáli við Noreg og nr. 50/1976: Svensk svartkjaftaveiði undir Føroyum.

Málini vórðu løgd fram av landsstýrinum 2. mars 1977 og vórðu tey undir 1. viðgerð 4. mars 1977 beind í marknaðarnevndina.

Út frá tí,ið fórt varð fram undir 1. viðgerð í løgtinginum, mælir ein samd nevnd løgtinginum til fylgjandi:

1. at samtykkja tey 3 uppskotini til samtyktar, sum landsstýrið hevur skotið upp í fyriliggjandi 3 málum.
2. at samtykkja fylgjandi

Uppskot
til
samtyktar.

Fyri trolfiskiskap á landleiðini verða framvegis reglurnar um forboð móti troling á ávisum 5 leiðum og til ávísar tíðir og ávísar nøgdir í §§ 3 og 4 í kunngerð nr. 251 frá 20. mai 1974 um regulering av fiskiveiðuni á Føroya-økinum at galda, og verða tær at taka upp í kunngerð frá landsstýrinum, og verða hesar reglur í gildi, til aðrar reglur eru góðtiknar av løgtinginum.

Marknaðarnevndin, 4. mars 1977

Erlendur Patursson — Hákun Djurhuus — Jógvan Sundstein

Poul J. Olsen — J. Fr. Øregaard — Jógvan Olsen

Hilmar Koss

2. viðgerð 4. mars.

Uppskot landsstýrisins til samtyktar varð samtykt við 25—0 atkvøðum.

49. Fiskirættindasáttmáli við Noreg

Ár 1977, 2. mars, legði Atli P. Dam, lognaður, fram hetta

Uppskot
til
samtyktar.

Løgtingið samtykkir í,

a) landsstýrið skrivar undir skipan við Noreg um sínamillum fiskirættindi sambært hjálagda skjal, og
b) landsstýrið skrivar undir fyribilsskipan um sínamillum fiskirættindi millum Føroyar og Noreg sambært hjálagda skjal.

Viðmerkingar:

Hin 21. februar 1977 fóru fram í Oslo tingingar millum Foroya landsstýri og stjórn Noregs um sínamillum fiskirættindi eftir, at Noreg frá ársbyrjan setti í verk 200 fjórðingar búskaparligt øki og Føroyar samstundis fluttu fiskimarkið út á 200 fjórðingar.

Niðurstøðan av tingingunum gjørdist fyri tað fyrsta semja um eina skipan, sum er ein karmur um, hvussu sínamillum fiskirættindini skulu leggjast til rættis í fyrstu syftu fey komandi 10 árini ella longur, um ikki annar parturin sigur skipanina upp.

Skipanin fyrisetur einki um nøgdir, sum partarnir kunnu veiða á fiskiøkinum hjá hvørjum øðrum. Sambært grein 2 skal hvor av portunum gera av mest loyvdu veiðinøgdini av teimum einstøku stovnunum. Harnæst skulu partarnir eftir samráðing og við at hava í huga ávís sjónarmið, sum nevnd eru í inngangunum til skipanina og í grein 2, gera av kvoturnar, ið partarnir fáa loyvi til at veiða hjá hvørjum øðrum ló soleiðis, at miðast skal ímóti hóskandi javnvág millum atgongdina til fiskiskap.

Semja var um, at partarnir í seinnu helvt av mars í ár skulu samráðast um tær veiðinøgdir, sum teir í 1977 loyva veiddar á fiskiøkinum hjá hvørjum øðrum.

Fyri tað næsta var semja um at fyribyrgja steðg í sínamillum fiskirættindunum. Tí komu partarnir til sætlis um eina fyribilsskipan eftir 1. mars í ár, tá «kassasáttmálin» fór úr gildi. Fyribilsskipanin loyvir framhaldandi fiskiskapi, til onnur skipan er fingin í lag. Partarnir hava hvør fyri seg

ræt til at seta í verk fyriskipanir viðvíkjandi fiskiskapinum. Tó skulu teir mest møguligt ráðføra seg við hvønn annan, áðrenn lílík liltøk verða sett í verk. Nøgdir, ið veiddar verða undir fyribilsskipanini, telja við í árskvotunum, sum samráðast skal um.

Samráðingar um fyribils fiskirættindi millum Føroyar og Noreg

I sambandi við samráðingar millum Føroya landsstýri og Noregs stjórn í Oslo 21. februar 1977 um fiskivinnuviðurskiftini teirra millum samdust samráðingarnevndirnar báðar um eina fyribils skipan fyri framhaldi av fiskiskapinum hjá báðum partum aftaná 1. mars í ár og til annað verður avgjørt.

Partarnir samdust um, at allur fongur hjá báðum skal roknast sum forskot uppá kvotur, ið verða tillutaðar sambært ta skipan, sum í dag er gjørd um sínamillum fiskirættindi.

Ráðagerðir um kvotuáselingar skulu haldast í næstu framtíð.

Fiskiskapurin hjá báðum partum sambært fyribilsskipanina skal virða tær fyriskipanir, ið partarnir hvør í sínum lagi ásetta.

Partarnir skulu so vítt gjørligt ráðføra seg hvør við annan, áðrenn slíkar fyriskipanir verða settar í verk.

Henda fyribilsskipan um sínamillum fiskirættindi skal leggjast fram fyri avvarðandi myndugleikar til góðkenningar.

Oslo, 21. februar 1977

FRÁSØGN
um tingingar millum
Føroya landsstýri og Noregs stjórn
um sínámillum fiskirættindi

Føroya landsstýri og Noregs stjórn,

sum vilja varðveita og menna samvinnuna Norðurlanda millum,
sum hava í huga, at Noreg hevur fingið búskaparligt øki og Føroyar fiskiøki uppá 200 fjórðingar frá 1. januar 1977.

sum hava í huga grundleggjandi týdningin, sum fiskivinnan hevur fyri búskapin í Føroyum og fyri fólkið við strendur Noregs og samvinnuna, ið verið hevur landanna millum fiskiskapi viðvíkjandi,

og sum ynskja at áseta reglur og treytir fyri sambandið teirra millum viðvíkjandi fiskiskapi,

eru vorðin samd um:

Grein 1

Hvør av pørtunum skal í samsvari við tí, ið niðanfyri verður ásett, loyva fiskiførum frá hinum partinum at fiska á sínum 200 fjórðinga øki uttanfyri 12 fjórðingar frá grundlinjunum.

Grein 2

Hvør av pørtunum skal fyri hvørt ár, á hóskandi hátt og við fyrivarni, ið kunnu gerast fyri neyðini av óvæntaðum orsøkum, áseta:

a) Mestu loyvdu veiðinøgdina av einstøkum stovnum ella bólkum av stovnum, soleiðis at hugsað verður um sambandið stovnanna millum, um tilráðingar frá viðkomandi altjóða felagsskapum og annað av týdningi.

b) aftaná samráðingar, partar (kvotur) til fiskiførini hjá hinum partinum, soleiðis at hugsað verður um tørvin á skynsamari røkt av stovnunum, veiðihættir, søguligu veiðinøgdina hjá hinum partinum, javnvágina í fiskiviðurskiftunum í Norðuratlantshavi og annað av týdningi. Partarnir skulu miða ímóti einari hóskandi javnvág millum atgongdina til fiskiskap hvør hjá øðrum eftir hesi avtalu.

Grein 3

1. Fiskifør hjá øðrum partinum skulu, tá ið tey fiska innia hjá hinum partinum, rætta seg eftir friðingartiltøkum, lógum og fyriskipanum, og øðrum reglum og treytum fyri fiskiskapi, ið viðkomandi partur hevur ásett.

2. Tá ið nýggjar lógir, fyriskipanir, reglur ella treytir verða samtyktar, skal boðast frá hesum í hóskandi tíð frammanundan.

Grein 4

1. Hvør av pørtunum skal ansa eftir, at hansara borgarar og før halda reglurnar í hesari avtalu og aðrar fyriskipanir fyri fiskiskap.

2. Hvør av pørtunum kann á sínum øki, í samsvari við altjóða rætt, seta neyðug tiltøk í verk til at tryggja sær, at førini hjá hinum partinum halda reglurnar í hesi avtalu.

Grein 5.

Avvarðandi myndugleikar hjá hvørjum partinum, skulu boða avvarðandi myndugleikum hjá hinum partinum frá navni, skrásetingarnummari og øðrum upplýsingum av týdningi, og hartil navnið á skipanunum, fyri tey av sínum fiskiførum, ið ætla at fiska innia hjá hinum partinum undir kvotum, ið lætnar eru í samsvari við reglurnar í grein 2 (b). Tá ið teir fáa slíka fráboðan, skulu partarnir, hvør eftir síni lóggávu, geva loyvi, ið neyðug eru til at gera hin partin føran fyri at fiska tær kvotur, ið fingnar eru.

Grein 6

Føroyskir fiskimenn vilja fiska sum lógartil í Skagerak og Kattegat. Føroyskir myndugleikar skulu ansa eftir, at hesin fiskiskapur ikki verður so stórur, at hann ger tey tiltøk, ið norskir myndugleikar seta í verk viðvíkjandi fiskiskapi í norska búskaparliga økinum, fánýtt.

Grein 7

1. Partarnir vilja samarbeiða til tess at tryggja forsvarliga umsiling og varðveiting av ti, sum livir í havinum, serliga, tá talan er um

a) stovnar, ið finnast innia hjá báðum pørtum, og

b) stovnar av felags áhuga, ið finnast innia hjá báðum pørtum og á leiðum nærhendis uttanfyri øki teirra.

2. Partarnir skulu samráðast um, hvussu hendan avtala skal setast í verk, og hvussu samvinnan partanna millum kann mennast.

Grein 8

1. Henda avtala verður fyribils sett í verk 1. mars 1977, og kemur endaliga í gildi, tá ið báðir partar hava boðað frá, at tey krøv, ið stýrisskipan teirra ásetur, eru uppfylt.

2. Henda avtala skal galda fyri eitt tíðarskeið uppá 10 ár, roknað frá tí hon kemur í gildi. Verður hon ikki uppsøgd av øðrum partinum minst 12 mánaðar áðrenn hetta tíðarskeið er runnið út, skal avtalan framvegis galda í onnur 6 ára skeið, um ikki uppsøgn verður givin minst 12 mánaðar áðrenn eitt 6 ára skeið er liðið.

Sett upp í Oslo 21. februar 1977, í tveimum einløkum ávikavist á føroyskum og norskum, ið bæði hava sama gildi.

Fyri Føroya landsstýri: Fyri Noregs stjórn:

1. viðgerð 4. mars, málið beint í marknaðarnevndina, ið legði fram álit (jbr. nr. 48) 4. mars, 2. viðgerð 4. mars.

Uppskot landsstýrisins samtykt við 25- -0 atkvøðum.

---

50. Svensk svartkjaftaveiða undir Føroyum

Ár 1977, 2. mars, legði Atli Dam, løgmaður, fram hetta

Uppskot
til
samtyktar.

Løgtingið góðkennir, at loyvi verður 3 svenskum skipum at veiða svartkjaft á fiskiøki Føroya í 1977 sambæt hjáløgdu skipan.

Viðmerkingar:

Tann 12. januar 1977 fóru fram samráðingar í Keypmannahavn millum landsstýrið og svenskar myndugleikar vegna áheitan frá Svøríki um loyvi til svensk skip at veiða svartkjaft á fiskiøki Føroya. Talan er um framhald av royndarfiskiskapi, sum byrjaði í 1976.

Samráðingarnar hildu fram í Keypmannahavn 22. februar 1977, og samdust partarnir um viðløgdu skipan, sum er dagfest 22. februar 1977.

F.L. j. nr. 1500-1-7-3

Skipanin ber í høvuðsheitum í sær, at loyvt verður 3 svenskum skipum at veiða svartkjaft í 1977 á fiskiøki Føroya. Partarnir skulu lata hvørjum øðrum royndarúrslit viðvíkjandi fiskiskapinum og viðvíkjandi viðgerð av svartkjafti til matna.

S a m r á ð i n g a r
millum Føroya landsstýri og svenskar myndugleikar

Umboð fyri føroyskar og svenskar myndugleikar komu saman í Keypmannahavn hin 22. februar 1977 at tingast um svenska svartkjaftaveiði í føroyskum sjógvi.

Í føroysku sendinevndini vóru:

Alli P. Dam, løgmaður
Petur Reinert, landsstýrismaður
Einar Kallsberg, skrivstovustjóri
Jákup Sverri Joensen, fiskifrøðingur
Árni Olafsson, ráðgevari

Í svensku sendinevndini vóru:

Lennart Hannerz, yvirstjóri, Fiskeristyrelsen
Nils-Urban Allard, sendistovuráð á svensku sendistovuni í Keypmannahavn
Tore Gustavsson, departementsskrivari, Jordbruksdepartementet

Partarnir vóru samdir um:

§ 1

Svenskt fiskifar rak í 1976 royndarfiskiskap eftir svartkjafti á leiðum, sum nú eru innanfyri føroyska 200 fjórðinga fiskiøkið.

§ 2

Svenskir myndugleikar hava áhuga fyri at loyvi verður givið til framhaldandi royndarfiskiskap á føroyska fiskiøkinum.

§ 3

Við tí í huga, at partarnir yuskja at halda fram við útbygging av norður-

lendsku samvinnuni, ásanna teir, at tað er av felags áhuga at kanna mogu-leikarnar fyri rationellum fiskiskapi eftir svartkjafti, og at partarnir eru samdir um at bøta um viðgerðarhættir, ið fáa tað at bera til at brúka hetta fiskaslag til matna, eru partarnir samdir um, at loyvt verður 3 svenskum fiskiførum at fiska svartkjaft í 1977 á føroyska fiskiøkinum.

§ 4

Partarnir eru samdir um at geva hvørjum øðrum øll royndarúrslit á ti øki, ið umrætt er í § 3.

§ 5

Svensk fiskifør á fiskiveii á føroyskum fiskiøki skulu fylgja teimum teimum reglum, ið føroyskir myndugleikar ásetta fyri svartkjaftaveiði.

Keypmannahavn, hin 22. februar 1977

Tore Gustavsson

Staðfest
Atli P. Dam
Petur Reinert

Staðfest
Lennart Hannerz

1. viðgerð 4. mars, málið beint í marknaðarnevndina, sum legði fram álit (jbr. 48—49) 4. mars. 2. viðgerð 4. mars.

Uppskot landsstýrisins samtykt við 25—0 atkvøðum.

51. Norðurlanda Hús í Føroyum

Ár 1977, 4. mars, legði Dánjal Pauli Danielsen, landsstýrismaður fram

UPPSKOT
til samtyktar

Løgtingið samtykkir í samband við byggingina av Norðurlanda Húsi í Føroyum, at landskassin luttekur í bygging og rakstri soleiðis:

1. Rindar byggikláargering av grundstykki t.e. útgrevstur, spreinging, gerð av grund o.t.
2. Rindar helvtina av kostnaðinum til norðurlanda arkitektkapping tó hægst 200.000 kr.
3. Rindar 8% av rakstrarútreiðslunum.

Viðmerkingar:

15. mai 1971 setti Erlendur Paturssson í Norðurlanda Ráðnum fram uppskot um at byggja norðurlanda sjónleikar- og tónleikarhús í Tórshavn. Grundgevingin hjá Erlendi Paturssson, sum eisini hevur verið havd í huga undir viðgerðini av málinum, var henda:

Bæði málsliga og landafrøðiliga liggja Føroyar millum Ísland og hini norðurlanda londini. Føroyingar eru í ti støðu, at nógvir føroyingar lesa og skilja bæði íslendskt, norskt, danskt og svenskt mál. Seinastu árini er tað vorðið meira og meira vanligt, at Føroyar hava havt vitjan av listamonnum — sjónleikarar og tónleikarar — frá hinum norðurlondunum.

Ilesar vitjanir hava havt stóran týdning fyri sínámillum norðurlanda mentunarliga ávirkanina og fyri mentunarlív føroyinga. Tað átti verið felags norðurlanda uppgáva at stuðla á hesum øki.

Neyndu vitjanir eru forðaðar av tveimum umstøðum. Í fyrra umfari av fjarleikanum og av hesum teimum rætluliga stóru ferðaútreiðslunum og í seinra umfari av tørvandi høllum í Føroyum, bæði til sjónleik og tónleik.

Við undirløku av øllum limunum í mentunarnevndini í Norðurlanda Ráðnum varð uppskotið broytt til at byggja eina norðurlanda mentunarmiðstøð í Tórshavn. Uppskotið varð samtykt av ráðnum á ársfundinum í 1972.

Málið kom síðani til viðgerðar í serligari nevnd, har hvørt limalandið valdi 1 lim og Føroyar 2, hesir seinri vóru Marius Johannesen, fyrrv. háskúlastjóri og Georg L. Samuelsen, blaðstjóri. Nevndin legði álit frá sær

25. mars 1974 og mælti til, at mentunnarmiðstøðin verður bygd fyri felags norðurlanda pening og – – í tann mun talan er um bert føroyskan torv – – føroyskan pening.

Í januar mánaða 1975 eru samráðingar við landsstýrið, og í juni sama ár samtykkir ministararáðið at seta niður ein arbeiðsbólk við 3 limum 1 frá hvørjum landinum Danmark, Finland og Svoriki og herafturat 1 frá mentunnarskrivstovuni. Arbeiðsbólkurin hevur samráðingar við landsstýrið í november mánaða 1975. Við ársenda sama ár samtykkir ministararáðið, at arbeiðsbólkurin heldur fram og samtykkir eisini at heita á landsstýrið um at velja ein føroyskan arbeiðsbólk at arbeiða saman við tí fyrra. Í føroyska arbeiðsbólkin velur landsstýrið: Jóannes Rasmussen umboðandi Fróðskaparsetur Føroya, Oskar Hermansen umboðandi Havnar Sjónleikarfelag og Karsten Hoydal umboðandi Listafelag Føroya.

Arbeiðsbólkarnir báðir leggja í december mánað 1976 tilmæli inn til ministararáðið, tilmælið verður samtykt 17. januar 1977.

Endamálið hjá mentunnarmiðstøðini – – Norðurlanda Húsið í Føroyum, sum heitið verður, – – verður bæði at føra norðurlanda mentunnarlív til Føroyar og at føra føroyskt mentunnarlív til hini norðurlondini eins og at tæna føroyskum mentunnarlívi í sjálvum sær.

Húsið verður bygt í Tórshavn í Gundadali á einum øki, sum Tórshavnar kommuna veitir ókeypis og byggibúgvið 9.000 m² til støddar. Grannin verður nýggja útvarpshúsið, og verður samarbeiði millum hesar báðar stovnar. Byggibúgvið grundøki er í 1975 mett til 2,0 mió. kr.

Landsstýrið hevur fyri sín part samtykt at mæla til, at landið rindar kostnaðin av útgrevstri, spreinging og gerð av grund, mett í 1975 at kosta 1,5 mió. kr.

Bruttohæddarmetrarnar verða 2.000. Størsta rúmið verður til sjónleik, tónleik, film og fundir. Rúm verður til fólkadans og onnur til at lesa í, matstova, tvey gestarúm, gestuatelier, forhøll og rúm til fyrisiting.

Viðvíkjandi byggingini er at siga, at fyrst verður opin norðurlanda kapping. Landsstýrið hevur fyri sín part samtyk tat mæla til, at landið rindar helvtina av útreiðslunum av kappingini tó hægst 200.000 kr., kostnaðurin er mettur til 350.000 kr.

Byggikostnaðurin er mettur til 4.500 kr. m² ella 9. mió. kr., tá er byggibúgvin grund, og byggiklárgering ikki uppiroknað, ella føroyski parturin.

Mett er, at byggitíðin verður eini 3 – 4 ár, soleiðis at arkitektkappingin

verður sett til 3/4 ár, byggibúgving og byggiklárgering til ½—¾ ár og byggingin sjálv til 1½—2 ár.

Raksturin er mettur til 1,1 mió. kr. og mælir landsstýrið til at føroyski parturin verður 8%.

Viðlagt er tilmæli frá arbeiðsbólkinum dagfest december 1976.

Dánjal Pauli Danielsen
landsstýrismaður

1. viðgerð 10. mars, málið beint í fíggjarnevndina, sum 15. mars legði fram

Álit

Málið varð framlagt av landsstýrinum tann 4. mars 1977 og undir 1. viðgerð tann 10. mars beint í fíggjarnevndina.

Landsstýrið skjýtur upp, at løgtingið samtykkir í samband við byggingina av Norðurlanda Húsi í Føroyum, at landskassin luttekur við bygging og rakstri soleiðis:

1. Rindar byggiklárgering av grundstykki, t.e. útgrevstur, spreinging, gerð av grund o.t.
2. Rindar helvtina av kostnaðinum til norðurlanda arkitektkapping, tó hægst 200.000 kr.
3. Rindar 8% av rakstrarútreiðslunum.

Landsstýrið metir, at byggikostnaðurin verður umleið 9 milj. kr., tá er byggibúgvin grund og byggiklárgering ikki uppíroknað, ella føroyski parturin. Byggitíðin verður mett til eini 3 til 4 ár, og verður raksturin mettur til 1,1 milj. kr., og mælir landsstýrið til, at føroyski parturin verður 8%.

Í viðmerkingunum frá landsstýrinum verður skilað til, at endamálið hjá mentunarmiðstøðini — Norðurlanda Húsið í Føroyum, sum heitið verður — verður bæði at føra norðurlanda mentunarliv til Føroyar og at føra føriyskt mentunarlív til hini norðanlondini eins og tæna føroyskum mentunarlívi í sjálvum sær. Ætlanin er, at húsið verður bygt í Tórshavn.

Ein meiriluti (Hákun Djurhuus, Poul Jacob Olsen, Jógvan Durhuus, Signar Hansen og Hilmar Kass) mælir at samtykkja uppskotið hjá landsstýrinum.

Ein minniluti (Hilmar Bech) setur einki uppskot fram.

Ein minniluti (Johs. Martin Olsen) mælir til, at húsið verður bygt, men

at tað ikki skal standa í Tórshavn, men norðuri við Streymin, og setur tí fram soljóðandi

UPPSKOT
til samtyktar

Norðurlanda húsið verður at byggja norðuri við Streymin.

Fíggjarnevndin, 15. mars 1977.

Hákun Djurhuus Poul Jacob Olsen Jógvan Durhuus Signar Hansen
Hilmar Kass Hilmar Bech Johs. M. Olsen

2. viðgerð 17. mars, 3. viðgerð 24. mars.

Uppskot landsstýrisins til samtyktar varð samtykt við 17—0 atkvøðum. Broytingaruppskot frá Johs. M. Olsen fall við 7 ja-atkvøðum.

---

52. Orkuráð

Ár 1977, 4. mars, legði Dánjal Pauli Danielsen, landsstýrismaður, fram

UPPSKOT
til

løgtingslóg um orkuráð og orkugrunn.

§ 1.

Landsstýrinum verður heimilað at skipa 5-manna ráð, hvørs uppgáva er at vera ráðgevi hjá polit-

lagtingslov om energiråd og energifond.

§ 1.

Landsstyret bemyndiges til at nedsætte et råd med 5 medlemmer, hvis opgave det er at være rådgi-

isku myndugleikunum í øllum orkuspurningum, herundir av egnum ávum gera tiltøk, sum verða mett deils at veita okkum hollari kunnleika á orkuøkinum og deils at geva myndugleikunum betri grundarlag at taka avgerðir á.

§ 2.

Eru landsstýri og orkuráð samd um, at ávísar metingar, kanningar ella royndir eiga at verða framdar, verða útreiðslurnar,ið standast av hesum tiltøkum, goldnar úr orkugrunninum. Í henda grunn, sum liggur undir landsstýrinum, fer í fyrstu atløgu tann peningur,ið er í grunninum, § 6645: fleggingar í SEV, sum samstundis verður avtikin, og síðan verður, sum tørvur er, játtaður peningur til orkugrunnin á fíggjarløgtingslógunum.

§ 3.

Ráðið fær heimild til eftir loyvi frá landsstýrinum at krevja sær frágreiðingar og aðrar upplýsingar frá stovnum, feløgum og einstaklingum, sum standa fyri virkjum ella virksemi innan orkuøki í víðastu merking.

2. s t k. Tann, sum við vilja gevur rangar frágreiðingar ella noktar fyri at geva frágreiðingar, kemur undir sekt, um hann ikki kemur undir hægri revsing.

§ 4.

Ráðslimir og hjálparfólk tess hava undir ábyrgd eftir reglunum um brot í almennari tænastu tøgnskyldu um viðurskiftti hjá feløgum og persónum, sum tey í starvi sínum fáa kunnleika til.

vende for de politiske myndigheder råd vedrørende alle energispørgsmål, herunder på eget initiativ at træffe foranstaltninger, som anses dels at yde os solid viden på energiområdet, dels at give myndighederne et bedre grundlag at træffe beslutninger på.

§ 2.

Er landsstyret og energirådet enige om, at visse vurderinger, undersøgelser eller forsøg bør finde sted, afholdes udgifterne hertil af energifonden. Til denne fond, som henlægges under landsstyret, overføres i første omgang det beløb, som findes i fonden § 6645: Investeringer i SEV, som samtidig ophæves, og herefter bevilges efter behov penge til energifonden på lagtingsfinanslovene.

§ 3.

Rådet bemyndiges til efter tilladelse fra landsstyret at kræve redegørelser og andre oplysninger af institutioner, selskaber og personer, som forestår virksomheder eller virksomhed inden for energiområdet i videste forstand.

Stk. 2. Den, der forsætlig afgiver forkerte redegørelser eller nægter at afgive redegørelser, straffes bøde, for så vidt højere straf ikke er forskyldt.

§ 4.

Rådsmedlemmer og dets hjælpere har efter bestemmelserne om forbrydelse i offentlig tjeneste tavshedspligt vedrørende forhold hos selskaber og personer, som de i tjenesten bliver bekendt med.

§ 5.

Í fyrsta ársfjórðingi í hvørjum ári skal orkuráðið geva landsstýrinum frágreiðing um:

a. orkuframleiðslu og nýtslu her á landi við teim viðmerkingum, ráðið metir vera av áhuga,

b. hvørji tiltøk innan orkuøkið eftir tess meting eiga at verða framd,

c. hvørjar metingar, kanningar ella royndir í farna ári eru framdar her og aðrastaðni í sambandi við orkuspurningin og

d. møguligt annað, sum hildið verður at vera av áhuga.

§ 6.

Útreiðstur ráðsins og samsýning til ráðslimir og hjálp verða goldnar úr landskassanum.

§ 7.

Tær gjøllari reglur fyri starv ráðsins, tørvur skuldi verið á setur landsstýrið.

§ 8.

Henda lóg kemur í gildi beinanvegin.

§ 5.

I første kvartal hvert år skal energirådet give landsstyret en beretning om:

a. energiproduktion og -forbrug her i landet med de bemærkninger, rådet anser for at være af interesse,

b. hvilke foranstaltninger på energiområdet, der efter rådets opfattelse bør fremmes,

c. hvilke vurderinger, undersøgelser eller forsøg ,der er foretaget i det forløbne år her og andre steder i forbindelse med energispørgsmålet og

d. muligvis andet, som anses for at have interesse.

§ 6.

Rådets udgifter og vederlag til rådsmedlemmer og medhjælp udredes af landskassen.

§ 7.

De nærmere bestemmelser for rådets virksomhed fastsættes i fornødent omfang af landsstyret.

§ 8.

Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Síðani seinasta heimsbardaga hevur mikil imtøkuvøkstur verið í vesturheiminum og harvið betri livikor og størri nýtsla enn kent hevur verið framman undan.

Høvuðsfyritreytin fyri vøkstrinum hevur verið tann, at orkan ikki hevur trotið, og er tað mest oljan, ið hevur verið tøk til hetta endamál. Umfram at vera lutfallsliga bílig, hevur hon altið og allar staðir verið at fingið.

Fyri einum tveimum árum síðani broyttist støðan knappliga. Prísurin varð 3-faldaður og kom hetta sera illa við fíggjarliga fyri stóran part av heiminum. Eyðsæð var nú, at vesturheimurin ikki longur stýrdi prisinum,

og oljuframleiðandi londini vóru fór fyri at seta tilløk í verk, ið raktu ídnaðarlondini meint við felags prísáseting og framleiðsluminking og søluhanni sum liður í politiska stríðnum.

Av hesum og eisini av tí, at oljunøgdin, ið finst, er avmarkað, hevur síðani nógv verið tosað og skrivað um orkuspurningin. Royndt verður at minka um nýtsluna við ymsum tiltøkum, og í øllum framkomnum londum verður royndt at finna nýggjar orkulindir umfram tær kendu úr olju, koli, fossamegi og atomi. Royndirnar hava sum høvuðsendamál at finna teknisk og figgjarliga fullgóðar hættir at vinna orku úr náttúrukreftunum: vindi, streymi, flóð og fjøru, bylgjum, jarðar- og sólarhita og fleiri.

Sjálvir eru vit bert fyri lítlan part forir fyri at gera slíkar kostnaðarmiklar royndir, men vit kunnu fylgja við tí, ið aðrir gera, og táið vit halda, at okkurt er funnið, ið kann verða okkum at gagni, er stundin komin til okkara at gera tær royndir, ið neyðugar eru, at kanna, um tað kann nýtast, og sum møguliga laga tað eftir okkara viðurskiftum.

Ein grundstuðulin undir okkara samfelag er el-framleiðslan, S.E.V., ið er felagsskapur av kommunum í landinum, hevur hesa framleiðslu um hendi við tí endamáli at útvega nóg nógvan og so ódýran streym sum gjørligt til eins pris um alt landið, og hevur hetta eydnast rættiliga væl higartil. S.E.V. hevur ikki aðrar figgjarligar møguleikar enn at nýta tann pening, ið inn kemur fyri sølu av streymi, og hevur felagið sostatt bert møguleika um at byggja út eftir einum mynstri, ið er bundið av tí peningi, ið tøkur er, og hevur als ikki ráð at fara undir útbyggingar, sum í fyrstu syftu ikki loysa seg, men kunnu gera tað í framtíðini, og enn minni hevur felagið møguleika at fara undir kostnaðarmiklar royndir.

Higartil hava politisku myndugleikarnir, løgting og landsstýri, einans verið uppi í, tá neyðug figging skuldi útvegast, men tá saman um kemur hava politisku myndugleikarnir ábyrgd av, at útbyggingin fer fram á tílíkan hátt, at samfelagið ikki verður fyri bakkostum.

Fyri at politisku myndugleikarnir kunnu taka avgerðir í orkuspurninginum á so hollum grundarlagi sum gjørligt, mega teir hava onkran sakkønan, teir kunnu leita til at fáa tær upplýsingar, teimum tørvar, og sum kann ráðgeva á hesum øki.

Landsstýrið hevur tí hildið tað vera rættast at seta eitt orkuráð við teknískum og figgjarligum kunnleika. Hetta ráð skal fylgja við, hvat fer fram aðrastaðni og meta um, hvørjar útbyggingar eiga at fara fram og mæla til tiltøk, ið til eina og hvørja tíð eftir ráðsins meting tykjast neyðug.

1. viðgerð 8. mars, málið beint í serliga orkunevnd, sum 3. mai legði fram soljóðandi

Álit

Hetta mál varð lagt fram av landsstýrinum tann 3. mars 1977 og við 1. viðgerð beint í orkunevndina.

Í viðmerkingunum sigur landsstýrið, at síðan seinasta heimsbardaga er mikil inntøkuvøkstur farin fram og av hesum størri nýtsla og betri livikor enn framunanundan. At høvuðsorsøkin fyri hesum vøkstri hevur verið hon, at orkan ikki hevur trotið, og er tað mest oljan, ið hevur verið tøk til endamálið.

Eisini hevur oljan verið lutfalsliga bílig, meðan tað nú er hent, at bendan støðan er broytt, við tað at prísurin varð tvífaldaður fyri einum tveimum árum síðani, og kemur hetta illa við figgjarliga fyri stóran part av heiminum.

Tað gongur fram av uppskotinum, at gjørdar verða royndir í øllum framkomnum loudum fyri at finna nýggjar orkumøguleikar umfram teir kendu, sum eru úr olju, koli, fossamegi og atomi.

Vist verður í viðmerkingunum á, at SEV, sum er kommunalur felagsskapur, hevur framleiðsluna av el-megi um hendi í landinum, og hevur tað til nú eydnast hesum felagsskapi rættiliga vel at útvega nógvan og ódýran streym.

Hetta fær nevndin eisini lutvist váttan fyri í samrøðu við umboð fyri hendu felagsskap.

Somuleiðis boða teir frá, at felagsskapurin hevur sett niður orkuráð fyri um hálvum ári síðani til viðgerðar av teim ymisku orkumøguleikunum hjá SEV, og tað fyrsta, sum er uppá tal, og sum hevur felagsins størsta áhuga sum er, er at fáa økt mest møguligt um framleiðsluna við fossamegi.

Sum støðan er í dag, so er hendan framleiðslan minni enn 50% av allari framleiðslu, og gerst munurin alsamt størri millum framleiðsluna við vatni og olju, og er hetta tíverri til fyrimuns fyri ta termisku megina.

Hetta økir sjálvandi um figgjartrupulleikar felagsins, at tað verður knýtt meira og meira at oljuni, hvørs prísir vaksa alsamt meira og meira.

Tað er í hesum samhandi vert at gera vart við stoðu okkara undir oljukreppuni, tá prísirnir hekkaðu munandi, og tað sum verri var, at vandi var fyri, at vit ikki fingu neyðuga oljumogd til vinnuna.

Sagt verður nevndini í viðtalu við SEV, at teir í 5 ára ætlanini koma at rokna við eini oljunýtslu við einum virði, sum er um 100 mill. kr., tað er tí rímiligt, at gjørt verður tað sum kann fyri at gera tað møguligt at

nýta vatnmegina mest møguligt, tá hetta verður samfelagnum vunnin peningur við líðini.

Felagið ger vart við, at um hendan framleiðslan skal útbyggjast mest møguligt, krevst nógvur peningur til hetta endamál, og torført kann tað vera hjá felagsskapinum at vinna á hesum trupulleikum, tá teir ikki hava annað enn el-prísin til loysn av figgjartrupulleikunum, men eru hesir órímiligir, verður tað aftur at nerva vinnuliv landsins.

Tað er tí rætt við eini samskipan við Føroya Løgting um hesi mál, tá her er talan um spurning av stórum búskaparligum týdningi.

Nevndin er samd við landsstýrið í, at tað er av størsta týdningi, at Føroya løgting hevur kunnleika til teir orkuspurningar, sum SEV hevur at dragast við, spurningar, sum krevja bæði tekniska og figgjarliga loysn, og helst eigur at verða við til loysn av hesum.

Meirilutin í nevndini (Haldur Hansen, Johan Simonsen, Jákup Mortensen og Asbjørn Joensen) heldur tað verða rættast, at SEV verður tað forum, sum tekur sær av hesum spurningum viðvíkjandi framleiðslu og kanna av orkuspurningum, og setur nevndin tí fram soljóðandi

Uppskot
til
samtyktar.

Løgtingið velur 3-manna nevnd, sum í samarbeiði við orkunevnd SEV's kann geva løgtinghum frágreiðing í orkuspurningum, eins og tilráðing um neyðug tiltøk eiga at verða gjørd til loysn av spurningum í samband við orkuframleiðslu.

Minnilutin (Óli Breckmann) mælir til at samtykkja uppskot landsstýrisins óbroytt.

Orkunevndin, 3. mai 1977.

Haldur Hansen Johan Simonsen Jákup Mortensen

Asbjørn Joensen Óli Breckmann

Málið er útsett til ólavsøku.

53. Broyting í kgl. fyriskipan um góðkenning av handilsskúlum, tekniskum skúlum v. fl. og studning v. m. til hesar skúlar

Ár 1977, 4. mars, legði Finnbogi Isaksen, landsstýrismaður, fram

Uppskot
til
samtyktar.

Løgtingið mælir ríkisstýrinum til at fremja hjálagda uppskot til kgl. fyriskipan um broyting í kgl. fyriskipan fyri Føroyar um góðkenning av handilsskúlum, tekniskum skúlum og maskinmeistara- og maskinistskúlum og studning v.m. til hesar skúlar.

Viðmerkingar:

Við lóg nr. 284 frá 26. juni 1975 um broyting í lóg nr. 191 frá 4. juni 1964 um góðkenning av handilsskúlum, tekniskum skúlum v.fl. og studning v.m. til hesar skúlar eru reglurnar um rakstrarstuðning til lærlingafrálæru í Danmark broyttar frá 1. august 1975 við gildi fyri lærlingasáttmálar, sum eru gjørdir 1. apríl 1975 ella seinri, soleiðis at ríkisrakstrarstuðningurin verður veittur við 80% og kommunali rakstrarstuðningurin við 20% av útreiðslum til frálæruna. Nevnda lóg nr. 191/1964 er sett í gildi fyri Føroyar við kgl. fyriskipan nr. 392 frá 3. november 1965 um góðkenning av handilsskúlum, tekniskum skúlum v.fl. og studning v.m. til hesar skúlar.

Eftir áheitan frá ríkisumboðsmanninum hevur kenslumálaráðið gjørt hjálagda uppskot til kgl. fyriskipan um broyting í nevndu kgl. fyriskipan nr. 392/1965, har reglurnar um rakstrarstuðning til lærlingafrálæruna í Føroyum eru tær somu sum í dansku lógini nr. 284/1975.

Sambært § 2 í hjálagda uppskoti til kgl. fyriskipan verður rakstrarstuðningurin til frálæru fyri lærlingar, sum hava skrivað lærlingasáttmála áðrenn 1. apríl 1975, veittur eftir reglunum í kunngerð nr. 268 frá 28. juni 1965. Eftir hesum reglum er ríkisrakstrarstuðningurin til lærlingafrálæru á tekniskum skúlum 65% og á handilsskúlum 52% av nettoútreiðslunum,

og kommunali rakstrarstuðningurin verður veittur við 30% av ríkisrakstrarstuðninginum, ella ávikavist 19,5% og 15,6% av samlaðu nettoútreiðslunum hjá tekniskum skúlunum og handilsskúlunum. Restin, ávikavist 15,5% og 32,4% av samlaðu nettoútreiðslunum hjá tekniskum skúlunum og handilsskúlunum, verður at krevja inn sum skúlapeningur frá lærumeistarunum.

Hjálagda uppskot til kgl. fyriskipan førir sostatt við sær, at rakstrarstuðningurin til tekniskar skúlar og handilsskúlar verður tann sami, nevniliga 80% í ríkisstuðningi og 20% í kommunalum stuðningi, og at skúlapeningurin dettur burtur fyri lærlingar, sum hava skrivað sáttmála 1. apríl 1975 ella seinri.

Landsstýrið hevur samtykt at leggja uppskotið fyri løgtingið við viðmæli.

1. viðgerð 7. mars, 2. viðgerð 10. mars.

Undervisningsministeriet.
1. afd. 3. kt.

UDKAST

Anordning om ændring af anordning for Færøerne om godkendelse af handelsskoler, tekniske skoler samt maskinmester- og maskinistskoler og tilskud m.v. til disse skoler.

§ 1.

I anordning nr. 392 af 3. november 1965 for Færøerne om godkendelse af handelsskoler, tekniske skoler samt maskinmester- og maskinistskoler og tilskud m.v. til disse skoler, foretages følgende ændring:

§ 5, stk. 1, affattes således:

«Driftstilskud til lærlingeundervisning ydes fra staten med 80 pct. og fra kommunerne med 20 pct. af de med undervisningen forbundne udgifter, jfr. § 8».

§ 2.

Stk. 1. Bestemmelsen i § 1 har virkning fra den 1. august 1975 og omfatter kun lærlingeforhold, der er indgået den 1. april 1975 eller senere.

Stk. 2. Driftstilskud til undervisning af lærlinge, der har indgået lærlingeforhold før 1. april 1975, ydes efter regerne i undervisningsministeriets bekendtgørelse nr. 268 af 28. juni 1965.

Landsstýrisins uppskot til samtyktar varð samtykt við 19–0 atkvøðum.

54. Føroyska umboðanin í Norrøna Ráðnum

Ár 1977, 4. mars, legði Atli P. Dam, løgmaður, fram

Uppskot
til
samtyktar.

Løgtingið tekur undir í, at spurningurin um sjálvstøðuga føroyska umboðan í Norðurlanda Ráðnum verður tikin uppaftur til viðgerðar í ráðnum, og heitir á landsstýrið um at taka upp neyðugar samráðingar hesum viðvíkjandi.

Viðmerkingar:

Frá Norðurlanda Ráðnum hevur landsstýrið fingið til ummælis uppskot um sjálvstøðuga umboðan í ráðnum.

Uppskotið verður hildið at vera í samsvar við støðutakan løgtingsins og landsstýrisins, hóast galdandi skipan er góðkend í løgtinginum.

Samgonguflokkarnir á tingi hava sett sær fyri at fremja tílíkt uppskot og roknað er við, at hetta er áskoðan andstøðunnar eisini.

Uppskotið, sum er sett fram av Erlendi Patursson 8. august 1976, er soljóðandi:

«Nordisk Råd rekommanderer presidiet å utarbeide og forelegge rådet forslag om sådanne endringer i avtalen om Nordisk Råd, at Færøyene blir selvstendigt medlem af rådet like stilt med de øvrige.»

Erlendur Patursson motiverar uppskotið við, at galdandi skipan, har løgtingið hevur 2 og landsstýrið 1 umboð í ráðnum, men soleiðis at umboðini bæði eru partar av sendinevnd Danmarkar, í Føroyum hevur verið og er hildin berl at vera ein fyribils skipan. Tað hevur alla tíð verið ynskt at broyta skipanina, soleiðis at Føroyar verða sjálvstøðugur limur eins og hini 5 londini. Víst verður eisini til samgongusáttmálan frá 11. januar 1975, har teir 3 samgonguflokkarnir umboðandi 18 av 26 løgtingslimum eru samdir um, at fram verður hildið í arbeiðinum, at Føroyar verða javnmettar við hini limalondini í ráðnum.

Erlendur Patursson heldur fram, at ynskið er bæði náttúrligt og sjálv-

sagt, og visir til, at Føroyar eru ein av norðurlanda tjóðunum. Rætt er tað, sigur hann, at føroysku umboðini hava sama talu-, uppskots- og atkvøðurrætt, sum hini umboðini hava, men hóast helta eru umboðini ikki sjálvstøðug. Hertil kemur, at nógv av norðurlanda samarbeiðinum fer fram uttanfyri ráðið — í ministararáðnum, formansskapinum, ymsum nevndum v.m. — og har kunnu Føroyar als ikki medvirka ella luttaka.

Løgtingið samtykti í tingsetuni 1965, Lgt. bls. 134, fylgjandi:

«Løgtingið heitir á ríkisstýrið um at skipa so fyri, at Føroya Løgting og Føroya Landsstýri fáa umboðan í Norrøna Ráðnum, og soleiðis at umboðini verða vald ávikavist av Føroya Løgtingi og Føroya Landsstýri.»

Ríkisstýrið legði málið fyri á ráðsfundinum í 1967, og vísli ráðið málið til juridisku nevndina.

Úrslitið varð tó, at málið varð vist til viðgerðar í serligari ríkisstýris- og parlamentarikaranevnd, samansett av ráðharrum og formansskapinum.

Nevndin kom eisini at viðgera spurningin um umboð fyri Álandsoyggjarnar.

Í sínum metingum gekk nevndin út frá, at tey tvey sjálvstýrandi økini, Føroyar og Áland, í princippinum eiga at hava sama form fyri umboð. Bæði innihald og skipan av sjálvstýrinum eru so lík, at munur ikki kann motiverast. Eisini praktiskar grundir tala fyri eins umboðan.

Eitt annað grundstøði hjá nevndini var, at ein loysn ikki eigur at føra við sær krøv um broyting í lóggávuni um sjálvstýri Føroya og Álands, loysnin eigur tí at verða finnin innanfyri hesar lóggávurammur.

Nevndin arbeiddi við 4 møguleikum. Teir vóru

a. Tey sjálvstýrandi økini verða javnmett við tey ð núverandi limalondini.
b. Umboð fyri løgting, landsting, landsstýri og landsskapsstyrelse verða partar av ávikavist donsku og finsku sendinevndunum.
c. Føroysku og finsku limunum í fólkatinginum og ríkisdegnum skuldi tryggjast rætt at verða limir í ráðnum.
d. Føroynum og Alandi skuldi tryggjast cygleiðarastatus.

Alternativini a (rakk ov langt, og var eisini í stríð við finsku ríkisskipanina), c (gav løgtingi og landstingi ongan møguleika at velja limir og heldur ikki landsstýri og landsskapsstyrelse) og d (var ov snævurt) blivu løgd burtur.

Tað mátti havast í huga, at broytingar í avtalumi um ráðið mátti gerast, um umboðsynskini, skuldu gangast á møti, og til broytingar er neyðugt, at limalondini eru samd.

So var berf alternativið b eftir.

Í tingsetuni 1969, jbr. Lgt. bls. 104, leggur løgtingsformaðurin fram soljóðandi uppskot til samlyktar:

«Løgtingið góðkennir, at umboð Føroya í Norrøna Ráðnum verður valt soleiðis:

Føroya Løgting velur millum limir sínar tveir limir og tveir tiltaksmenn og

Føroya Landsstýri velur ein av sínum limum sum umboðsmann.

Hesir limir og umboðið verða partur av sendinevnd Danmarkar og fáa sama status sum aðrir limir og umboð.»

Uppskotið varð sett undir atkvøðu við navnakalli og varð samtykt við 14—6. Fyri atkvøddu sambandsmenn, javnaðarmenn og sjálvstýrismenn, ímóti tjóðveldis- og framburðsmenn, fólkaflokksmenn atkvøddu ikki. Umboðsmin varð samtykt á fundi í Norðurlanda Ráðnum í 1970 í Reykjavík.

Løgmaður hevði orðið á plenarfundinum, og sigur hann m.a.:

«Det er fra færøsk side blevet præciseret, at man ønskede en selvstændig repræsentation og ikke en repræsentation, der formelt fremtrådte som en del af Danmarks. Det har glædet mig og alle færinger, at både den tidligere regering Jens Otto Krag og den nuværende Hilmar Baunsgaard så hellhjertet har støttet dette ønske både ved fremlæggelsen og under de vanskelige og langvarige forhandlinger, der har været ført, siden Danmark fremsatte forslaget i Helsingfors i 1967. Jeg skal ikke trætte de ærede medlemmer med at referere sagens handlingsforløb. Jeg føler mig dog forpligtet til at understrege, at resultatet, hvorefter Færøerne har to medlemmer valgt af lagtinget og et medlem udpeget af landsstyret, men at alle tre indgår i Danmarks riges delegation, ikke tilfredsstillende opfylder det, man fra færøsk side stræber efter, en selvstændig repræsentation ligestillet med de andre nordiske landes.»

Uppskotið hjá Erlendi Paturssyni er av formansskapinum í ráðnum sent rikisstýrinum til ummælis, og hevur uttanríkisráðið um rikisumboðið biðið landsstýrið um ummæli.

Gongdin í málinum hevur verið, at løgtingið sum greitt frá frammanfyri hevur tikið støðu.

Landsstýrið mælir til, at neyðugar samráðingar verða tiknar upp við ríkisstýrið um málið.

Viðlagt medlemsförslag dagf. 8. august 1976 om självständig färöisk repræsentation i Nordiska rådet, A 495/j.

Atli P. Dam
løgmaður

/ J. Djurhuus

NORDISKA RÅDET A 495/j

Medlemsförslag
om självständig färöisk representation i Nordiska rådet
(Ökt av Erlendur Paturssón)

Etter at det færøyske landsstyre i henhold til en av lagtinget fattet beslutning hadde henvendt sig til den danske regjering om å få i stand at det færøyske landsstyre og det færøyske lagting ble repræsentert i Nordisk Råd, ble det foretatt slike endringer i avtalen om Nordisk Råd, at det færøyske lagting velger to av den danske delegasjons medlemmer mens én representant blir oppnevnt av det færøyske landsstyre.

Færøyene har da siden 1970 deltatt i Nordisk Råds arbeide under de givne betingelser, men på Færøyene har man hele tiden betraktet denne ordning som rent foreløpig og alltid ønsket en endring i den, således at Færøyene ble selvstendig medlem av rådet likestilt med de nåværende fem. I den samarbeidsavtale, som den 11. januar 1975 ble inngått mellem tre av lagtingets partier, og som teller 18 av lagtingets 26 medlemmer, uttales da også at man fortsat skal arbeide henimot en likestilling av Færøyene i Nordisk Råd.

Det skulle være gauske unødvendig å påpeke det naturlige, ja selvfølgelige i dette ønske. Færøyingene er en av de nordiske nasjoner og bør derfor i det nordiske samarbeide ikke ha ringere stilling enn de øvrige. Rett nok har de to færøyske representantene samme tale-, forslags- og stemmeret som de øvrige repræsentanter, men noen selvstendig representasjon er dette likevel ikke. Dertil kommer, at meget av det nordiske samarbeide etter hvert foregår utenfor selve rådet — i ministerrådet, presidiet, kommisjoner, komitéer m.v. — og der er Færøyene helt avskåret fra medvirken og deltakelse.

I henhold hertil foreslås,

at Nordisk Råd rekommanderer presidiet å utarbeide og forelegge rådet forslag om sådanne endringer i avtalen om Nordisk Råd, at Færøyene blir selvstendig medlem av rådet like stilt med de øvrige.

Kirkjubøur, 8. august 1976

Erlendur Patursson (Tvfl)

1. viðgerð 10. mars, 2. viðgerð 16. mars.

Uppskot landsstýrisins til samtyktar samtykt við 2. viðgerð við 21—0 atkvøðum.

---

55. Lán til ídnaðarbátar

Ár 1977, 1. mars, legði Petur Reinert, landsstýrismaður fram

UPPSKOT
til

løgtingslóg um veðhald fyri láni til keyp av reiðskapi til ídnaðarskip í samband við umlegging til svartkjaftaveiði.

§ 1.

Landsstýrinum er heimilt landskassans vegna í figgjaráðinum 1977/78 at veðhalda fyri lánum til keyp av trolreiðskapi til ídnaðarskip, ið leggja um til svartkjaftaveiði.

lagtingslov om garanti for lån til indkøb af redskaber til industrifiskerskibe, der lægger om til fangst af blåhvilling.

§ 1.

Landsstyret bemyndiges til på landskassens vegne i finansåret 1977/78 at garantere for lån til indkøb af trawlredskaber til industrifiskerskibe, som lægger om til fangst af blåhvilling.

F. L. j. nr. 1501-15

2. stk. Veðhaldsupphæddin má ikki fara upp um 70% av kr. 300.000 fyri hvørt skipið.

§ 2.

Henda lóg fær gildi beinan vegin.

Stk. 2. Garantien må ikke overstige 70% af kr. 300.000 for hvert skib.

§ 2.

Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Felagið Ídnaðarskip hevur á fundi við landsstýrið tann 5. januar 1977 heitt á landsstýrið um at útvega møguleikar fyri at veittur kann vera stuðul til ídnaðarskipini í samband við umlegging til svartkjaftaveiðu. Landsstýrið hevur síðani frá felagnum og øðrum fingið útvegað taltilfar viðvikjandi kostnaðinum í samband við keyp av trolum og ávísum tekniskum innleggingum, ið neyðugar eru í nevnda sambandi.

Viðvikjandi teimum teknisku innleggingunum hevur landsstýri heimild eftir galdandi lóg um endurnýgging av fiskisaipkflotanum at veita 15% í studningi, tó 8%, um arbeiðið verður gjørt í útlandinum.

Tað er bráðneyðugt at útvega verður veðhaldsskipan fyri lán til keyp av tørvandi reiðskapi til tey skip, ið ætla at leggja um til troling eftir svartkjafti, tá roknast má við, at hesi skip skulu í vinnu um hálvan mánaða. Havast má eisini í huga, at møguleikarnir hjá ídnaðarbátunum verða skerdir júst í hesum tíðarskeiði, tá svartkjaftaveiðan byrjar.

Petur Reinert
landsstýrismaður

/ J. Djurhuus

1. viðgerð 7. mars, málið beint í fíggjarnevndina, ið 8. mars legði fram soljóðandi

Álit

Málið varð lagt fram av landsstýrinum tann 4. mars 1977 og undir 1. viðgerð tann 7. mars beint í fíggjarnevndina.

Landsstýrið skjýtur upp, at tað í fíggjarárinum 1977/78 landskassans vegna fær heimild at veðhalda fyri lánum til keyp av trolreiðskapi til ídnaðarskip, ið leggja um til svartkjaftaveiðu. Skotið verður upp, at veðhaldshæddin má ikki fara upp um 70% av kr. 300.000 fyri hvørt skipið.

Í viðmerkingunum varð sagt frá, at bráðneyðugt er, at útvegað verður veðhaldsskipan fyri lán til keyp av tørvandi reiðskapi fit tey skip, ið ætla at leggja um til troling av svartkjafti, tá roknast má við, at hesi skip skulu í vinnu um hálvan marsmánað.

Eftir uppskotinum hjá landsstýrinum er heimildin avmarkað til figgjarárið 1977/78. Figgjarnevndin er av teirri áskoðan, at umbidna heimild eisini eigur at vera galdandi í núverandi figgjarári. Sonudeiðis er figgjarnevndin av teirri áskoðan, at mark fyri samlaðu veðhaldsupphæddina eigur at verða sett í lógina, sum vanligt hevur verið við slíkum løgtingslógum. Samsvarandi hesum setur figgjarnevndin soljóðandi

broytingaruppskot

Í § 1 verður í staðin fyri «í figgjarárinum 1977/78» sett «í figgjarárunum 1976/77 og 1977/78».	I § 1 indsættes i stedet for «i finansåret 1977/78» «i finansårene 1976/77 og 1977/78».
Í § 2 aftaná síðsta punktum verður sett: «Samlaða veðhaldsupphæddin má ikki fara upp um kr. 3 milj.»	I § 2 efter sidste punktum tilføjes: «Det samlede garantibeløb må ikke overstige kr. 3 mill.»

Figgjarnevndin, 7. mars 1977.

Hákun Djurhuus Poul Jacob Olsen Hilmar Bech Jógvan Durhuus

Signar Hansen Jákup Mortensen Hilmar Kass

2. viðgerð 10. mars, 3. viðgerð 15. mars.

Broyting frá figgjarnevndini til § 1, 1. og 2. stk. samtykt, § 1 so broytt samtykt við 21-0. § 2 samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

56. Gjald av motorakførum

Ár 1977, 10. mars legði Dennnus Hentze, landsstýrismaður, fram

Uppskot
til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um gjøld av motorakførum.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 23 frá 9. mai 1968 um gjald av motorakførum verða gjørdar hesar broytingar:

1) § 1, A og C verður orðað soleiðis:

lagtingslov om ændring i lagtingslov om afgift på motorkøretøjer

§ 1.

I lagtingslov nr. 23 af 9. maj 1968 om afgift på motorkøretøjer foretages følgende ændringer:

1) § 1, A og C affattes således:

		Vektgjald / Vægtafgift	Útjavningargjald / Udligningsafgift	Viðfestur vognur / Påhængsvogn
«A. Persónvognar, tó ikki bussar og hýruvognar		kr.	kr.	kr.
Personbiler, bortset fra busser og lyrevogne				
Upp til	eginvekt			
indtil 600 kg	egenvægt	450		
601 — 800 —	—	600	200	
801 —1100 —	—	750	250	
1101—1300 —	—	960	335	
1301—1500 —	—	1260	450	
1501—2000 —	—	1740	585	
yvir 2000 —	—	1920	810	
C. Motorcyklur/Motorcykler	3	300	68	

2) § 2 verður orðað soleiðis:

«Hóast reglurnar í § 68 í ferðslulógini, hareftir gjaldið skal rindast í ársfjórðingum frammanundan, verður útjavningargjaldið bert at rinda av tí

2) § 2 affattes således:

«Uanset bestemmelserne i § 68 i færdselsloven, hvorefter afgiften skal betales kvartalsvis forud, skal udligningsafgiften kun betales for den del

partinum av einum fjórðingsári, ið akfarið sambært skrásetingina er í nýtslu.»

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi 1. juli 1977.

af kvartalet, som køretøjet ifølge registreringen har været benyttet.»

§ 2.

Denne lov træder i kraft 1. juli 1977.

Viðmerkingar:

Vegskatturin fyri motorakfør er ásettur í løgtingslóg nr. 23 frá 9. mai 1968 og hevur verið óbroyttur síðani.

Í uppskoti til figgjarløgtingslóg fyri 1977/78 verður vegskatturin mettur at geva umleið 3 milj. kr. meira enn í hesum figgjarári, tí umhugsað verður ein ávís hækking.

Eftir fyriliggjandi uppskoti verður mælt til at hækka vektgjaldið á persónbilum til privatnýtslu og motorcyklum við 50%, meðan vektgjaldið á øðrum akførum verður óbroytt. Útjavningargjaldið fyri akfør við dieselmotori verður óbroytt fyri øll akfør. Harafturat verður skotið upp at sleppa akførum, ið ikki hava verið nýtt fullan ársfjórðing, undan einum parti av útjavningargjaldinum, treytað av at nummarspjøldrini verða latin inn til skrásetingina. Gjaldið verður kravt inn hvønn ársfjórðing frammanundan og eftir núgaldandi reglum verður onki aftargoldið, sjálvt um akfarið bert verður nýtt ein part av ársfjórðinginum.

1. viðgerð 14. mars, málið beint í figgjarnevndina, ið 15. mars legði fram soljóðandi

Álit

Málið varð lagt fram av landsstýrinum lam 10. mars 1977 og undir 1. viðgerð lam 14. mars beint í figgjarnevndina.

Landsstýrið skjýtur upp, at vektgjaldið á persónbilum til privatnýtslu og motorcyklum verður hækkað við 50%, meðan vektgjaldið á øðrum akførum verður óbroytt. Útjavningargjaldið fyri akfør við dieselmotori verður óbroytt fyri øll akfør, og verður eisini skotið upp, at sleppa akførum, ið ikki hava verið nýtt fullan ársfjórðing, undan einum parti av útjavningargjaldinum, treytað av at nummarspjøldrini verða latin inn til skrásetingina.

Ein meiriluti (Hákun Djurhuus, Poul Jacob Olsen, Hilmar Beck, Jógvan Durhuus og Sigurður Hansen) mælir til, at vektgjaldið á persónbilum og motorcyklum verður hækkað við 25% í staðin fyri 50%.

Samsvarandi hesum setir meirilutin soljóðandi

broytingaruppskot

til § 1 1) A og C í uppískoyti landsstýrisins:

til § 1 1) A og C i landsstyrets forslag:

	Vektgjald Vægtafgift	Útjavningargjald Udligningsafgift	Viðfestur vognur Påhængsvogn
«A. Persónvognar, tó ikki bussar og hýruvognar	kr.	kr.	kr.
Personbiler, bortset fra busser og hyrevogne			
Upp til	eginvekt		
indtil 600 kg	egenvægt	375	
601 — 800 —	—	500	200
801 —1100 —	-	625	250
1101—1300 —	—	800	335
1301—1500 —	—	1050	450
1501—2000 —	—	1450	585
yvir 2000 —	—	1600	810
C. Motorcyklur/Motorcykler		250	68

Meirilutin ger ta viðmerking, at heitl verður á landsstýrið, at funnin verður ein formur, sum í samband við avlarnisvognar ger tað møguligt fyri slíkar at sleppa hiligari viðvíkjandi hesum gjaldinum, og verður víst á, at slíkir bílar eftir galdandi tolllóg fáa lætta.

Ein minniluti (Asbjørn Joensen og Johs. M. Olsen) setur eitki uppskot fram.

2. viðgerð 24. og 27. mars málið beint aftur í fíggjarnevndina.

3. viðgerð 29. mars.

Broytingaruppskot frá meiriluta í fíggjarnevndini til uppskot landsstýrisins til § 1 1) A og C samtykt við 15-0, uppskot landsstýrisins soleiðis broytt samtykt við 14-0 atkvøðum.

57. Broyting í lógunum fyri Føroyar um fólkapensjón og um avlamispensjón v. m. (hækking av inntøkumarki)

Ár 1977, 10. mars, legði Jákup Lindenskov, landsstýrismaður, fram

Uppskot
til
samtyktar.

Løgtingið samtykkir, at hjáløgdu «Forslag til ændring af lov for Færøerne om folkepension» og «Forslag til ændring af lov for Færøerne om invalidepension m.v.» verða framd.

Viðmerkingar:

Uppskotini miða ímóti at hækka inntøkumarkið fyri pensjónsviðbót til somu upphædd, sum er galdandi í Danmark. Tá inntøkumarkini verða hækkað, verða niðursettar viðbøtur hækkaðar.

Uppskotini fáa beinleiðis ávirkan á fólkapensjón og avlamispensjón og óbeinleiðis á einkjupensjón, vanliga uppihaldshjálp og hjálp til stakar uppihaldarar.

Tá prístalsviðgerð er troknað, verður inntøkumarkið fyri hjún hækkað frá 3.600 kr. árliga til 7.200 kr. árliga og fyri onnur frá 2.500 kr. árliga til 4.900 kr. árliga.

Ávirkanin verður ymisk fyri teir ymisku bólkarnar:

a) Fyri pensjónistar við ongari inntøku ella inntøku niðanfyri verandi markið 3600/2500 kr. fær uppskotið onga ávirkan, tí tey hava frammanundan fulla pensjónsviðbót.
b) Fyri pensjónistar við inntøku omanfyri nevndu mark, meðan niðanfyri komandi hámark 18.600/15.000 verður pensjónsviðbótin hækkað í flest øllum førum við 1.080 kr. um árið fyri hjún og 720 kr. um árið fyri onnur.
c) Fyri pensjónistar við inntøku omanfyri tey undir b) nevndu hámark, fær uppskotið onga ávirkan.

Útreiðsturnar av uppskotinum eru leysliga mettar til 600.000 kr. um árið; harav rindar rikiskassin 300.000 kr., meðan hinar 300.000 kr. verða goldnar frá føroyskari síðu.

Forslag
til
lov om ændring af lov for Færøerne om folkepension.
(Forhøjelse af grænsen for pensionstillæg)

§ 1.

I lov for Færøerne nr. 58 af 15/3 1967 om folkepension, som ændret ved lov nr. 223 af 27/5 1970, § 1 i lov nr. 176 af 24/5 1972, lov nr. 177 af 24/5 1972, lov nr. 46 af 31/1 1973, lov nr. 293 af 14/6 1974, lov nr. 152 af 24/4 1975, lov nr. 241 af 12/6 1975 og § 1 i lov nr. 590 af 26/11 1975 foretages følgende ændringer:

1. I § 11, stk. 2, ændres «3.200 kr.» til «6.400 kr.»
2. I § 11, stk. 2, ændres «2.200 kr.» til «4.400 kr. »

§ 2.

Loven træder i kraft den 1. oktober 1977.

Forslag
til
lov om ændring af lov for Færøerne om invalidepension.
(Forhøjelse af grænsen for pensionstillæg)

§ 1.

I lov for Færøerne nr. 55 af 15/3 1967 om invalidepension m.v., som ændret ved lov nr. 222 af 27/5 1970, § 2 i lov nr. 176 af 24/5 1972, lov nr. 47 af 31/1 1973, nov nr. 294 af 14/6 1974, lov nr. 153 af 24/4 1975, lov nr. 242 af 12/6 1975, § 2 i lov nr. 590 af 26/11 1975 og lov nr. 241 af 12/5 1976 foretages følgende ændringer:

1. I § 12, stk. 2, ændres «3.200 kr.» til «6.400 kr.»
2. I § 12, stk. 2, ændres «2.200 kr.» til «4.400 kr.»

§ 2.

Loven træder i kraft den 1. oktober 1977.

1. viðgerð 14. mars, málið beint í fíggjarnevndina, sum 15. mars legði fram soljóðandi

Álit

Málið varð lagt fram av landsstýrinum tann 10. mars 1977 og undir 1. viðgerð tann 14. mars beint í fíggjarnevndina.

Landsstýrið skjýtur upp, at løgtingið samtykkir, at «Forslag til ændring af lov for Færøerne om folkepension» og «Forslag til ændring af lov for Færøerne om invalidepension m.v.» verða framd.

Í viðmerkingunum upplýsir landsstýrið, at uppskotini miða ímóti at hækka inntøkumarkið fyri pensiónsgjøld til sonn upphædd, sum galdandi er í Danmark. Tá inntøkumarkini verða hækkað, verða niðursettar viðbøtur hækkaðar. Uppskotini fáa beinleiðis ávirkan á fólkapensjón og avlamispensjón og óbeinleiðis á einkjupensjón, vanliga uppihaldshjálp og hjálp til stakar uppihaldarar.

Landsstýrið metir, at útreiðslurnar av uppskotunum verða um kr. 600.000 árliga. Herav rindar ríkiskassin 300.000 kr., meðan 300.000 kr. verða goldnar frá føroyskari síðu.

2. viðgerð 22. mars.

Landsstýrisins uppskot til samtyktar varð samtykt við 25 - 0 atkvøðum.

58. Bygging av ferðaskipi og ferju til Strandfarasiglingina

Ár 1977, 10. mars, legði Finnbogi Isaksen, landsstýrismaður, fram

Uppskot
til

løgtingslóg um bygging av ferðaskipi og ferju til Strandfarasiglingina,

§ 1.

Landsstýrinum verður heimilað landskassans vegna at taka upp neyðug lán til byggjan av ferðaskipi til Skúvoyarsiglingina og av ferju um Lorviksfjørð.

§ 2.

Henda lóg fær gildi beinan vegin.

lagtingslov om bygning af rutebåd og færge til Kystfarten.

§ 1.

Landsstyret bemyndiges landskassens vegne at optage nødvendige lån til bygning af rutebåd til sejladsen på Skúvoy og færge om Lorviksfjørð.

§ 2.

Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Strandferðslan hevur gjørt skitsutekningar til bygging av einum ferðaskipi til Skúvoyar og einari nýggjari ferju til siglingina um Lorviksfjørð.

Skúvoyggin hevur higartil verið søkt av skipum, sum sigla úr Havn til ymiskar bygdir uttan um Havnina. Ætlanin er í framtíðini at geva Skúvoynni samband av Sandi. Hugsað verður um at byggja eitt far, ið er 11,58 m langt, 4,50 breitt og 1,5 m djúpt. Tað kann taka 25 til 30 ferðafólk og ferðin skal vera 10 mál. Tað verða 2 koyggjur í skipinum og teknningin er gjørd av Skála Skipasmiðju, eftir at Strandferðslan hevur samráðst við bygdarráðið í Skúvoy um farið. Kostnaðurin verður mettur til 400.000 — 600.000,- kr.

M/F TERNAN varð keypt úr Týsklandi í 1970 og ætlanin var longu lá at lata skipið røkja siglingina millum Klaksvík og Eysturoynna í nøkur ár, so at betri metingar kundu gerast um tørvin á einari fergu. Ternan siglir nú nógvar túrar dagliga um Lorviksfjørð, men tað hendir seg ofta, at hon ikki fær tikið allar bilarnar við. Tað er serliga torført við flutn-

inginum av lastbilum, tí innrættingin av skipinum ger, at tað kann hent vera ein stórur lastbilur hvørja ferð. Skipið er eisini nú so gamalt, at ofta eru tekniskir trupulleikar við tí.

Talið av ferðafólki og bilum hevur verið støðugt vaksandi við Tarnini. Síðani bergholið í Eysturoynni varð latið upp fyri almennari ferðslu í august mánaða, er vøksturin av billalinum stórur. Niðanfyri verður vist hvussu hesin vøkstur hevur verið frá 1975 til 1976.

	ferðafólk	vøkstur	bilar	vøkstur
Árið 1975	82.000		16.693	
Seinna hálvár 1975	43.000		9.100	
Árið 1976	95.000	15%	23.600	41%
Seinna hálvár 1976	59.500	38%	14.900	63%

Skála Skipasmiðja hevur gjørt eina skitsutekning til nýtt skip, sum skal verða 40 m langt, 11 m breitt og 4 m djúpt. Tað kann taka upp til 35 persónbilar, men hetta tal verður sjálvsagt minni, um lastbilar eru við. Skipið kann taka 4—5 stórar lastbilar. Talið á ferðafólki verður roknað til 300 um summarið og 200 um veturin. Tað verða 3 salónir og 5 manningarkoyggjur. Tarnin skal hava 2 portur, eitt í hvørjum enda. Skipið verður útgjørt við 2 skrúvum og síðuskrúvum. Tað skal hava 2 motorar. 4—500 hestar hvør og æflanin er, at tað skal sigla 12 mil. Kostnaðurin verður leysliga metur til einar 10 til 12 mill. kr.

1. viðgerð 15. mars, málið beint í fíggjarnevndina, sum 28. april legði fram soljóðandi

Álit

Málið varð lagt fram av landsstýrinum tann 10. mars 1977 og við 1. viðgerð tann 15. mars 1977 beint í fíggjarnevndina.

Landsstýrið skjýtur upp, at tað fær heimild landskassans vegna at taka upp neyðug lán til bygging av ferðaskipi til Skúvoyarsiglingina og av ferju um Lorviksfjørð.

Í viðmerkingunum varð sagt, at strandferðslan hevur gjørt skitsutekning til bygging av einum ferðaskipi til Skúvoyma og einari nýggjari ferju til ferðasiglingina um Lorviksfjørð.

Ferðaskpið til Skúvoyarsiglingina er av landsstýrinum mett at kosta 400 — 600.000 kr., og tá peningur til hesa bygging er tøkur í byggigrunni strandferðslunnar, er fíggjarnevndin samd um at geva landsstýrinum heimild til at fara undir bygging av nevnda ferðaskipi.

Viðvíkjandi ferðasiglingini Lorvík/Klaksvík verður í viðmerkingunum sagt, at «Ternan» nú er vorðin ov lítil, og at ofta eru tekniskir trupulleikar, ferðslan er støðugt vaksandi, og er tí neyðugt at fáa annað skip. Skála skipasmiðja hevur gjørt eina skitsutekning, sum landsstýrið metir er hóskandi til ferðsluna um hesa rutu. Landsstýrið metir leysliga kostnaðin til 10 til 12 milj. kr. Fíggjarnevndin er samd um at geva landsstýrinum heimild at útvega detailprojekt og tilboð viðvíkjandi eini bygging av ferju til sigling Lorvík/Klaksvík fyri ein byggikostnað uppá upp til 12 milj. kr., ið neyðugt verður at læna. Detailprojekt, tilboð og lántreytir verða at leggja fyri fíggjarnevndina til góðkenningar.

Samsvarandi hesum setur fíggjarnevndin fram soljóðandi broytingaruppskot til uppskot landsstýrisins.

§ 1 verður orðað soleiðis:	§ 1 får følgende ordlyd:
Landsstýrinum verður heimilað landskassans vegna at fara undir bygging av ferðaskipi til Skúvoyarsiglingina.	Landsstyret bemyndiges til landskassens vegne at iværksætte bygning af rutebåd til sejladsen til Skúvoy.
§ 2 verður orðað soleiðis:	§ 2 får følgende ordlyd:
Landsstýrinum verður heimilað landskassans vegna at útvega detailprojekt og tilboð viðvíkjandi bygging av ferju til sigling um Lorvík/Klaksvík fyri byggikostnað upp til kr. 12 milj., ið takast skulu í láni. Samlaða málið verður at leggja fyri fíggjarnevndina til góðkenningar.	Landsstyret bemyndiges til på landskassens vegne at tilvejebringe detailprojekt og tilbud vedrørende bygning af færge til sejlads Lorvík/Klaksvík for en byggepris på og til kr. 12 milj., der skal lånes. Sagen i sin helhed skal forelægges finansudvalget til godkendelse.
§ 2 verður § 3.	§ 2 bliver § 3.

2. viðgerð 29. apríl.

3. viðgerð 2. mai.

Broytingaruppskot frá fíggjarnevndini til §§ 1 og 2 í uppskoti landsstýrisins samtykt við 23—0, lógin so broytt endaliga samtykt við 18—0 atkvøðum.

59. Hækking av samsýning til postverkið fyri uppkrevjing av tollgjøldum

Ár 1977, 10. mars, legði Finnbogi Isaksen, landsstýrismaður, fram

Uppskot
til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um innflutningsgjøld v.m.

§ 1.

Í § 13, 2. stk. í løgtingslóg nr. 23 frá 11. februar 1950 um innflutningsgjøld v.m. við seinni broytingum og uppískoytum verður «1 króna» broytt til «3,00 krónur». Aftaná 1. apríl 1977 fær landsstýrið heimild at broyta nevnda gjald eftir góðkenning figgjarnevndarinnar.

§ 2.

Hendla lóg kemur í gildi beinnvegin.

lagtingslov om ændring i lagtingslov om indførselsafgifter m.v.

§ 1.

I § 13, stk .2 i lagtingslov nr. 23 af 11. februar 1950 om indførselsafgifter m.v. med senere ændringer og tilføjelser ændres «1 krone» til «3,00 kroner». Efter 1. april 1977 har landsstyret hjemmel til efter godkendelse fra finansudvalget at ændre nævnte afgift.

§ 2.

Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Við lóg nr. 3 frá 27. januar 1972 varð samsýningin til Post- og Telegrafvæsenet fyri uppkrevjing av tollgjøldum sett til 1,50 kr. Uppkrevjing av tolli kann sammetast við eina vanliga uppkrevjing. Í 1972, tá gjaldið fyri uppkrevjing av tollgjøldum varð sett til 1,50 kr., varð gjaldið fyri eina postuppkrevjing 2,00 kr. Tann 1. apríl 1976 varð gjaldið fyri eina postuppkrevjing hækkað til 4,50 kr.

Postverk Føroya skjýtur upp, at gjaldið fyri uppkrevjing av tolli verður hækkað.

Postverkið upplýsir, at Post- og Telegrafvæsenet í loftini fær 1,50 kr. fyri at skriva blankettirnar í Keypmannahavn. Tollurin verður inngoldin

á giro, og er hetta gjald 1,50 kr. Haraftrat skal blankettin berast út. Hetta kann sammetast við at bera eitt vanligt brev til, og er gjaldið her 1,25 kr.

Mælt verður til, at omanfyri nevnda gjald nú verður sett upp í lógini til 3,00 kr., og at landsstýrið eftir góðkenning frá fíggjarnevndini fær heimild til aftaná 1. apríl 1977 at broyta hetta tal. Tá onnur postgjøld verða ásett av landsstýrinum og góðkend av fíggjarnevndini, verður orsøk hitdín vera til, at hetta gjald verður ásett á sama hátt sum postgjøld.

1. viðgerð 16. mars, málið beint í fíggjarnevndina, sum 28. apríl legði fram soljóðandi

Álit

Málið varð lagt fram av landsstýrinum fanu 10. mars 1977 og undir 1. viðgerð 16. mars 1977 beint í fíggjarnevndina.

Landsstýrið skjýtur upp, at í § 13, 2. stk. í løgtingslóg nr. 23. frá 11. februar 1950 um innflutningsgjøld v.m. við seinni broytingum og uppiskoytum verður «1 króna» broytt til «3,00 krónur». Eisini verður skotið upp, at aftaná 1. apríl 1977 fær landsstýrið heimild til at broyta nevnda gjald eftir góðkenning fíggjarnevndarinnar.

Tað er Postverk Føroya, ið hevur skotið upp, at gjaldið fyri uppkrevjing av tollgjøldum verður hækkað. Upplýst verður, at Post- og Telegrafvæsenet í løtuni fær 1,50 kr. fyri at skriva blankettirnar í Keypmannahavn. Tollurin verður inngoldin á giro, og er hetta gjaldið 1,50 kr. Harumframt skal blankettin berast út, og tá hetta kann sammetast við at bera eitt vanligt brev út, er hetta gjald kr. 1,25. Landsstýrið hevur skotið upp, at gjaldið nú verður lógfest til kr. 3,00. Viðvíkjandi spurninginum um, at landsstýrið eftir góðkenning frá fíggjarnevndini fær heimild til aftaná 1. apríl 1977 at broyta hetta tal, er at siga, at tá onnur postgjøld verða ásett av landssýrinum og góðkend av fíggjarnevndini, er orsøk til, at hetta gjald verður ásett á sama hátt sum postgjøld.

Fíggjarnevndin kann einmælt taka undir við uppskoti landsstýrisins.

Fíggjarnevndin, 27. apríl 1977.

2. viðgerð 29. apríl, 3. viðgerð 2. mai.

Uppskot landsstýrisins samtykt við 16–0 atkvøðum.

60. Broyting í ferðslulógini

Ár 1977, 10. mars, legði Jákup Lindenskov, landsstýrismaður, fram

Uppskot
til

løgtingslóg um broyting í ferðslulógini.

§ 1.

Í ferðslulógini, smbr. lógarkunugerð nr. 10 frá 18. mars 1966 við seinni broytingum verða gjørdar hesar broytingar:

1. Aftaná § 47 verður sett:
«§ 47 a. Á støðum, har loyvi til parkering er tíðaravmarkað, mugu bert parkerast akfør, sum hava parkeringarskivur. Landsstýrið fyrisetir reglur um parkeringarskivur og nýtsluna av teimum.»
2. Aftaná § 58 a verður sett:
«§ 58 b. Fyri brot á reglur fyrisettar eftir § 47, stk. 3, ella § 47 a um steðg og parkering kann løgreglan áleggja gjald, sum fer í statskassan.

2. stk. Gjaldið verður álagt við skrivligari fráboðan, sum fest verður á akfarið, ella handað verður føraranum, um hesin er hjástaddur.
3. stk. Gjaldið skyldar hann, sum hevur steðgað ella parkerað órætliliga. Verður gjaldið ikki goldið til ásetta tíð, ábyrgist eisini eigarin (brúkarin) fyri gjaldinum, uttan so at tað kann prógvast, at føraran uttan rætt

lagtingslov om ændring i færdselsloven.

§ 1.

I færdselsloven, jfr. lovbekendtgørelse nr. 10 af 18. marts 1966, med senere ændringer foretages følgende ændringer:

1. Efter § 47 indsættes:
«§ 47 a. På steder, hvor adgangen til parkering er tidsbegrænset, må kun parkeres biler, som er forsynet med parkeringsskiver. Landsstyret fastsætter bestemmelser om parkeringsskiver og deres benyttelse.»
2. Efter § 58 a indsættes:
«§ 58 b. For overtrædelse af de i medfør af § 47, stk. 3, eller § 47 a givne bestemmelser om standsning og parkering kan der af politiet pålægges en afgift, der tilfalder statskassen.
Stk. 2. Afgiften pålægges ved en skriftlig meddelelse, der anbringes på køretøjet, eller overgives til føreren, såfremt han er til stede.
Stk. 3. Afgiften påhviler den, der har foretaget den uretmæssige standsning eller parkering. Betales afgiften ikke inden den fastsatte frist, hæfter tilligemed ejeren (brugeren) for betalingen, medmindre det godtgøres,

hevði akfarið í varðveitslu. Gjaldið kann krevjast inn við panting.

4. stk. Landsstýrið fyrisetir reglur um:

1) støddina av nevnda gjaldi,
2) mannagongdina við áleggjing og inukrevjing av gjaldinum.

5. stk. Landfútin kann seta serstakar parkeringaransarar til heilt ella partvíst at hava eftirlitið við at reglur fyrisettar eftir § 47, 3. stk., ella § 47 a um stoðg og parkering verða hildnar. Landsstýrið fyrisetir nærri reglur um virksemið hjá parkeringaransarum.»

at føreren uberettiget var i besiddelse af køretøjet. Afgiften kan indrives ved udpantning.

Stk. 4. Landsstyret fastsætter bestemmelser om:

1) størrelsen af nævnte afgift,
2) fremgangsmåden ved påleggelse af afgiften og opkrævningen af denne.

Stk. 5. Landfogeden kan overdrage til særlige parkeringskontrollører helt eller delvis at varetage kontrollen med overholdelse af de i medfør af § 47, stk. 3, eller § 47 a givne bestemmelser om standsning og parkering. Landsstyret fastsætter nærmere regler om parkeringskontrolløreres virksomhed.»

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi 10. juli 1977.

§ 2.

Denne lov træder i kraft den 10. juli 1977.

Viðmerkingar:

Tað vaksandi talið av akførum seinastu árini hevur mangar staðir økt um parkeringartrupulleikarnar, serstakliga í miðbýnum í høvuðsstaðnum. Við at seta upp skeltir um tíðaravmarkaða parkering kann fyribyrgjast, at høglig økir ikki verða nýtt til langtíðarparkering, men í staðin verða tøk til nýtslu hjá so mongum sum gjørligt, jø hava stytri ørindir at avrika.

Fyri betur at kunna hava eftirlit við parkeringstíðini hjá akførum, har loyvi til parkering er tíðaravmarkað, verður eftir lógaruppskotinum álagt at nýta parkeringarskivur, sum skulu vísa, nær parkeringin byrjar.

Fyri at lætta um arbeiðið hjá løgreglumi, so hon kann taka sær av meira krevjandi málum, fær landfútin heimild at útnevna serstakar parkeringaransarar at hava eftirlit við at parkeringartíðirnar verða yvirhildnar. Fyritreytin fyri at hetta arbeiðið kann gerast av øðrum enn útbúnum løgreglumonnum er, at revsireglurnar verða gjørdar einfuldari og sleppast kann undan at skriva frágreiðingar, sektaruppskot og ákærurit. Skotið er til upp at avlaka revsingina fyri parkeringarnisbrot á umrøddu støðum (bót) og í staðin áleggja eitt avgjald.

Uppskotið er gjørt av landfútanum eftir áheitan frá Tórshavnar býráð, ið ynskir at meira verður gjørt við parkeringseftirlit.

Viðlagt fylgja uppskot til kunngerð um parkeringarskivur og gjøld fyri ólógligan steðg og ólógliga parkering.

Uppskot.

Kunngerð
um
parkeringsskivur.

Við heimild í § 47 a í ferðsluløgini sum broytt við løgtingslóg frá hevur landsstýrið fyrisett:

§ 1.

Parkeringsskivur skulu vera úr plastikki, plastikviðgjørdum pappi ella øðrum líka haldgóðum tilfari.

2. stk. Tær skulu vera tilevnaðar samsvarandi viðfesta skjali. Tølini frá 13 til 24 nýtast tó ikki at vera.

3. stk. Vísari og urskiva skulu hava ymiskan lit. Einki má vera prentað innanfyri umhvørvið á urskivuni, uttan tað sum fylgir av 2. stk.

4. stk. Á akførum skrásett uttanlands kunnu nýtast parkeringarskivur, ið fúka krøvini í heimlandinum.

§ 2.

Byrjar parkeringin í einum tíðarskeiði, hvar loyvi til parkering er tíðaravmarkað, skal vísarin á parkeringarskivuni setast á ta klokkutíð, parkeringin byrjar. Byrjunartíðin verður sett til endan á ti korteri, parkeringin byrjar í.

2. stk. Byrjar parkeringin áðrenn tíðaravmarkingin byrjar og heldur fram í hesari, skal vísarin setast á ta tíð, tá ið tíðaravmarkingin byrjar.

3. stk. Kemur eitt skeið uttan tíðaravmarking, meðan eitt akfar stendur parkerað, skal vísarin í seinasta lagi, tíðarskeiðið er úti, setast á ta klokkutíð, tá ið nýggj tíðaravmarking byrjar aftur.

§ 3.

Parkeringarskivan skal setast beint innan fyri forrútin í høgru síðu.

2. stk. Á tí í 1. stk. nevnda plássi mugu ikki vera aðrar parkeringarskívur enn tann, sum nýtt verður til parkeringina.

3. stk. Parkeringarskívan skal kunna lesast lýðiliga utlanfrá.

§ 4.

Vísarin á parkerisgarskívuni má ikki flytast, meðan tað undir parkering er skylda at nýta hana.

§ 5.

Parkeringin skal halda uppat í seinasta lagi, táið tann á staðnum galdandi parkeringarfreist er úti. Freistin verður roknað frá tí stund, sum parkeringarskívan eigur at vísa.

§ 6.

Henda kunngerð kemur í gildi .....

Uppskot.

Kunngerð
um
gjald fyri ólógligan steðg og ólógliga parkering.

Við heimild í § 58 b ,stk. 4, í ferðslulógini, sum broytt við løgtingslóg nr. frá hevur landsstýrið fyriskrivt:

§ 1.

Gjaldið fyri brot á tær eftir § 47, stk. 3, ella § 47 a í ferðslulógini fyrisettu reglum um steðg og parkering er 100 kr.

§ 2.

Gjaldið skal rindast innan 10 dagar frá tí degi, lað er álagt. Verður roynt at krevja gjaldið frá eigaranum (nýtaranum) eftir § 58 b, stk. 3, 2. stk., fær hann eina freist at rinda gjaldið uppá minst 10 dagar roknað frá tí degi, hann hevur fingið boð um gjaldskravið.

§ 3.

Henda kunngerð kemur í gildi .....

1. viðgerð 14. mars, málið beint í lógarnevndina, sum 10. mai legði fram soljóðandi

Álit

Hitt støðugt økta talið av akførum seinastu árini hevur mangar staðir, serstakliga í høvuðsstaðnum, vaksið um parkeringartrupulleikarnar. Við at seta upp skelti um tiðaravmarkaða parkering kann byrgjast fyri, at høglig øki ikki verða nýtt til langtíðarparkeringar, men í staðin verða tøk til nýtslu hjá so mongum sum gjørligt, ið hava stytri ørindi at avrika.

Lógaruppskotið áleggur, at parkeringarskivur skulu nýtast á økjum, har parkering er tíðaravmarkað.

Samtíðis skal fútin hava heimild til at úthevna serstakar parkeringaransarar til at hava eftirlit við, at parkeringartíðirnar verða hildnar.

Meirilutin í lógarnevndini (Erlendur Patursson, Pauli Ellefsen, Eliesar Arge og Tórálvur M. Olsen) mælir til at samtykkja uppskot landsstýrisins við niðanfyri tilskilaðu broytingum.

Broytingaruppskot

1) Í § 58 b, 1. stk. verður orðið «statskassan» broytt til: «landskassan ella eftir samráðing við viðkomandi býar- ella bygda(r)ráð í viðkomandi kommunukassa.»

2) Í § 58 b verður skoytt uppí sum nýtt:
«6. stk. Útreiðslurnar av parkeringaransarum verða goldnar úr landskassanum ella eftir samráðing við viðkomandi býar- ella bygda(r)ráð av viðkomandi kommunu.»

1) I § 58 b, stk. 1, ændres ordet «statskassen» til: «landskassen eller efter forhandling med vedkommende by- eller bygderåd vedkommende kommunale kasse.»

2) I § 58 b tilføjes som nyt

«Stk. 6. Udgifterne af parkeringskontrollorer betales af landskassen eller efter forhandling med vedkommende by- eller bygderåd af vedkommende kommune.»

Minnilutin (Jákup Fr. Øregaard) setur einki uppskot fram.

Lógarnevndin, 9. mai 1977.

Erlendur Patursson Pauli Ellefsen Eliesar Arge

Tórálvur M. Olsen J. Fr. Øregaard

3. viðgerð 11. mai.

Broylingaruppskot frá meiriluta í lógarnevndini til § 1 varð samtykt við 19—0, § 1 so broytt samtykt við 19—0. Lógin endaliga samtykt við 19—0 atkvøðum.

---

61. Fyrispurningur til løgmann

Ár 1977, 8. mars, setti Kj. Mohr, løgtingsmaðnr, henda fyrispurning:

Kann løgmaður gera so væl og svara mær uppá fylgjandi spurningar:

I. Hví fær løgtingið ikki roknskap hjá Skála skipasmiðju, eins og frá øðrum stovnum, sum løgtingið studlar. Føroya løgting er ein tann størsti partaeigari í Skála skipasmiðju við fulltrúa landsstýrisins í nevndini.

II. Kann løgmaður gera so væl og greiða løgtinginum frá, hvat er farið fram til dato við tí sokallaða skrokkamálinum. Hevur figgjarnevndin málið til viðgerðar?

III. Hví var útflutningsloyvi fyri «Ólav Halga» noktað, táið boð uppá 3 milj. kr. fyrilá?
Hvat skal gerast við skipið, ið nú liggur fyri teym og forferst á Skálafjørðinum?

Atli P. Dam, løgmaður, gav 25. mars soljóðandi svar:

ad 1. Skála Skipasmiðja er privat felag, sum ikki hevur skyldu til at almannakunngera roknskap sín. Hinvegin verður roknskapurin sendur landsstýrímum, og vil landsstýrið framyvir handa figgjarnevndini hann.

ad 2. Sum kunnugt hevur landsstýrið biðið um eina meting í hesum máli. Hon var landsstýrinum í hendi 6. mars í ár og var beinanvegin handað figgjarnevndini, har málið í løtuni er til viðgerðar.

ad 3. Landsstýrinum kunnugt hevur eiki veruligt tilboð fyriligið viðvíkjandi Ólavi Halga, so orsøk hevur ikki verið til at taka støðu til eina veruliga umsókn um útflutningsloyvi. Hvat gerast skal við skipið, má felagið, sum eigur tað, fyrst og fremst taka støðu til. Samráðst hevur verið um ymsar møguleikar, men enn er eingin haldgóð loysn funnin.

---

62. Fyrispurningur til Finnboga Isaksen, landsstýrismann

Ár 1977, 8. mars, setti Kj. Mohr, løgtingsmaður, henda fyrispurning fram:

Hevur harra Tummas Arabo, stjóri á Strandferðslunni myndugleika at disponera uttan um løgtingið um keyp og sølu av løgtingsins skipum, t.d. at samráðast um sølu av «Dúgvuni» og «Smyrli».

Hví fær løgtingið ikki roknskapin fyri «Smyrit» (Molsin), ið er bæði í innan og uttanlanda sigling.

28. mars svarar landsstýrismaðurin soleiðis:

Strandferðslan og stjórin á strandferðslunni hava til eina og hvørja tið rætt at samráðast um sølu av skipunum hjá strandferðslunni. Kortini kann strandferðslan ikki taka avgerð um sølu, men verður hetta lagt fyri landsstýrið hvørja ferð.

Tingmenn hava eins og aðrir borgarar altíð rætt til at siggja almennar roknskapir, ið ern til skjals á landsskrivstovuni ella á teimum einstøku

stovnuntum. Føling fyri raksturin av Smyrli eru kunngjørd ferð eftir ferð í løgtinginum, í útvarpi og bløðum. Seinasti roknskapur fyri strandferðsluna er fyri fyrra hálvár av núverandi figgjarári. Hesin roknskapur verður býttur út til tingmenn í dag.

---

63. Fyrispurningur til løgmann

Ár 1977, 9. mars, setti Óli Breckmann, løgtingsmaður, hetta fyrispurning til løgmann:

Loyvi mær hervið at fregnast um sonevnda «laksamálið».

Orsakað av avmarkingum í laksaveiðuni við Grønland frá 1973 og forboð móti hesi veiðu frá 1. januar 1976 avgjørdu eigararnir fyri bornholmsku og tey fýra føroysku laksaskipini, «Leikur», «Vesturland», «Bakur» og «Hvítanes» at reisa endurgjaldskrav móti danska ríkisstjórnini. Veiðiforboðið viðførði dýrar neyðugar umbyggingar til aðra veiðu og gjørdi laksafiskireiðskapin ónýtiligan.

Bornholmsku skipaeigararnir løgdu sak og fingu endurgjald. Sami sakførari, sum vann bornholmarunum sømdir, mælti føroysku skipaeigarunum til at kæra ríkisstjórnina fyri rættinum.

Grundarlagið fyri veiðibanninum var ikki vísindaliga nóg dygt. Heldur kom bannið í gildi, tí danir óttaðust handilslig tiltøk frá kanadisku stjórnini, um danir ikki gjøgnumførdu tað. Tí høvdu føroyskn skipini vunnið sakina móti stjórnini í rættinum eins og bornholmararnir.

Løgtingið viðgjørdi laksamálið, og í uppskoti til samtyktar, samtykt av løgtinginum 18. december 1972, varð álagt landsstýrinum at umhugsa og gera vart við á røttum stað tær avleiðingar, sum ICNAF-samtyktin kundi viðføra fyri fiskiførini, sum vórðu rakt figgjarliga.

Eli Nolsøe, sum tá hevði fiskivinnumál um hendi í landsstýrinum, sigur eisini í brævi til ríkisumboðsmannin: «Landsstyret vil senere tillade sig at vende tilbage til erstatningsspørgsmålet».

Málið endaði úti í landsstýrinum, har tað varð liggjandi. Føroysku laksaskipini hava einki endurgjald fingið, men einans eitt tónt lyfti frá

føroysku myndugleikunum um stuðul ímóti dansku stjórnini.

Tí heiti eg á løgmann við hesum fyrispurningum:

1. Er núsitandi landsstýri sinnað til at taka sakina uppaftur við dansku stjórnina fyri føroysku laksaskipini?

2. Um so er, nær metir løgmaður, at sakin liggur klár úr Tinganesi, so farast kann í rættin við henni?

3. Um løgmaður er ímóti, at sakin verður førd til sin rættvísa enda, hvørja grundgeving hevur løgmaður fyri hesi støðutaknu.

A Føroya løgtingi, 9. mars 1977.

FØLKAFLOKKURIN

Óli Breckmann

25. mars gav løgmaður hetta svar:

ad 1. Nei, sum umstøðurnar eru, heldur landsstýrið ikki orsøk verða at taka sakina upp við stjórnina.

ad 2. Sakin má haldast at verða avgreidd frá landsstýrinum, og landsstýrið hevur ikki fingið áheitan frá skipaeigarunum um at taka hana upp aftur.

ad 3. Fyrreverandi landsstýrið gav eftir sínum tykki sakini rættvísa viðgerð, og vil eg gera vart við, at einki av hesum skipum kann haldast at hava havt slikt tap, at endurgjaldskrav kann verða reist. Hin vegin gav landsstýrið skipaeigarunum tilboð um hjálp til umlegging til aðra veiðu, hetta tilboð var havnað.

Atli P. Dam.

64. Príseftirlit

Ár 1977, 14. mars, legði Dánial P. Danielsen, landsstýrismaður, fram

Uppskot
til

løgtingslóg um príseftirlit.

§ 1.

Endamál lógarinnar er at fyrihyggja órímiligum prísum og vinningum og skeivum vøruupplýsingum.

2. stk. Lógin fevnir, har ikki serligt undantak verður gjørt, allan handil við vørum og alla tænastu ímóti gjaldi, undantikið lønir.

§ 2.

Órímiligir prísir og vinningar eru ikki loyvdir.

2. stk. Avtalur, samtyktir og reglur, sum kunnu hava órímiligar prísir ella vinningar við sær, eru ikki loyvdar.

3. stk. Avtalur, samtyktir og reglur um prísviðurskifti skulu fráboðast prisráðnum.

§ 3.

At hava eftirlit við prísum og vinningum og øðrum viðurskiftum, sum eru nevnd í hesi lóg, verður sett eitt prisráð við 5 limum. Landsstýrið velur prisráðið fyri 4 ár. Tveir av limunum skulu

lagtingslov om priskontrol.

§ 1.

Lovens formål er at forhindre urimelige priser og avancer og forkerte vareoplysninger.

Stk. 2. Loven omfatter, hvor ikke særlige undtagelser er gjort, al handel med varer og alle tjenesteydelser mod betaling med undtagelse af lønninger.

§ 2.

Urimelige priser og avancer er forbudt.

Stk. 2. Aftaler, vedtagelser og bestemmelser, som kan medføre urimelige priser og avancer er forbudt.

Stk. 3. Aftaler, vedtagelser og bestemmelser om prisforhold skal anmeldes til prisrådet.

§ 3.

Til at føre kontrol med priser og avancer og andre forhold, som er nævnt i denne lov, nedsættes et prisråd med 5 medlemmer. Prisrådet vælges af landsstyret for 4 år. To af medlemmerne skal repræ-

F.L. j. nr. 1115-22

umboða áhugamál brúkaranna, tveir áhugamál seljaranna meðan fimti limurin, sum ikki má vera beinleiðis heftur av frammanfyri nevndu áhugamálum, skal vera formaður.

2. stk. Prisráðið hevur ikki eftirlit við viðtøkuskiftum, sum er undir øðrum almennum eftirliti.

§ 4.

Ráðið skal av sínum eintingum hava eyga við prislagnum, og kann kunngera fyri almenningiinum prísir og prismunir á týðandi vorubólkum, tó uttan at nevna navn virkisins.

2. stk. Prisráðið kann kanna prísir og vinningar hjá teinnum einstøku virkjunum.

3. stk. Áðrenn tílík kanning, sum nevnd í stk. 2, verður sett í verk, skal prisráðið samráðast við virkið um grundarlagið undir kanningini.

4. stk. Prisráðið kann frá øllum virkjum og stovnum, almennum sum privatum, krevja allar upplýsingar, sum hava týdning fyri virki ráðsins.

§ 5.

Prisráðið skal viðgera kærur yvir prísir og vinningar, sum av kæraranum vera hildnar at vera órimiligir.

2. stk. Kemur Prisráðið til tað úrslit, at ein prísur ella vinningur er órimiligur, skal ráðið við samráðing við avvarðandi virki royna at fáa viðurskiftini í rættlag. Gev-

sentere forbrugernes interesser, to sælgernes interesser, medens det femte medlem, som ikke må være direkte tilknyttet foranstående interesser, skal være formand.

Stk. 2. Prisrådet fører ikke kontrol med forhold, som er underkastet offentligt tilsyn.

§ 4.

Rådet skal på eget initiativ følge med prisudviklingen og kan offentliggøre priser og prisforskelle på vigtige varegrupper, dog uden at nævne virksomhedens navn.

Stk. 2. Prisrådet kan undersøge priser og avancer hos de enkelte virksomheder.

Stk. 3. For den undersøgelse, som er nævnt i stk. 2 iværksættes, skal prisrådet forhandle med virksomheden om grundlaget for undersøgelsen.

Stk. 4. Prisrådet kan af alle virksomheder og institutioner, offentlige som private, kræve alle oplysninger, som er af betydning for rådets virksomhed.

§ 5.

Prisrådet skal behandle klager over priser og avancer, som af klagerne anser for at være urimelige.

Stk. 2. Kommer prisrådet til det resultat, at en pris eller avance er urimelig, skal rådet efter forhandling med den pågældende virksomhed forsøge at få forholdene i

ur hetta ikki nóg gott úrslit, skal ráðið taka slig eftir reglunum í § 8. Prísráðið skal boða kæraranum frá úrslitinum av kanningini.

3. stk. Tað sama, sum fyriskipað er í stk. 2, er galdandi, um prísráðið sum lið í vanliga eftirlitsarbeiðinum kemur eftir, at prísur ella vinningur er óeimiligur.

§ 6.

Í metanini av, um ein prísur ella vinningur er rímiligur, skal prísráðið leggja til grund tær útreiðslur, sum seljarin hevur havt av vorunni, áðrenn hon er komin á goymslu, serliga innkeypspris, almenn gjøld, farmagjøld, tryggingar o.t. Herumframt skal ráðið hava í huga møguleikar fyri spilli, goymslutíð og annars øll viðurskifti, sum hava týðning fyri prísáseta.

§ 7.

Tað er ikki loyvt at handla ímillum handlandi í sama søluliði uttan so, at tílíkur handil ikki hevur dýrkan við sær.

2. stk. Tá vørur verða flutfar inn úr útlondum, skal verða roynt at sleppa undan óneyðugum dýrkandi millumliðum, og skulu tílíkar vørur, har tað er gjørligt, verða innflutfar beinleiðis frá framleiðslulandinum. Prísráðið kann nokta at góðkenna óneyðugar millumhandlaraútreiðslur.

3. stk. Landsstýrið kann seta bann ímóti innflutningi av vørum, sum føroyskur keypari ikki fær

orden. Giver dette ikke et tilstrækkeligt godt resultat, skal rådet gå frem efter bestemmelserne i § 8. Prisrådet skal underrette klageren om resultatet af undersøgelsen.

Stk. 3. Bestemmelserne i stk. 2 finder også anvendelse, såfremt prisrådet som led i sit almindelige kontrolarbejde finder frem til, at priser eller avancer er urimelige.

§ 6.

For vurderingen af, om en pris eller avance er rimelig, skal lægges til grund de udgifter, som sælgeren har haft af varen, før den er kommet på lager, specielt indkøbspris, offentlige afgifter, fragt, forsikringer o.l. Herudover skal rådet tage hensyn til mulighederne for spild, opbevaringstid og ellers alle forhold af betydning for prisfastsættelse.

§ 7.

Det er ikke tilladt at sælge varer mellem handlende i samme omsætningsled, medmindre sådan handel ikke medfører fordyrelse.

Stk. 2. Ved indførsel af varer fra udlandet, skal importøren forsøge at undgå unødvendigt fordyrende mellemled, og sådanne varer skal, hvor det er muligt, indføres direkte fra oprindelseslandet. Prisrådet kan nægte at godkende unødvendige mellemhandlerudgifter.

Stk. 3. Landsstyret kan sætte forbud mod indførsel af varer, som færøsk køber ikke får lov til at im-

loyvi at innflyta beinleiðis úr framleiðslulandinum.

§ 8.

Prísráðið kann í upp til 6 mánaðar um ferðina fyriseta,

1. at tann ein ávísan dag galdandi prísur á einari vøru ella tænastu ikki má verða hækkaður ella
2. at tann ein ávísan dag galdandi prísur ikki má verða hækkaður við meira enn nærri ásettari upphædd ella prosentum ella
3. at ikki má vera farið upp um nærri ásettan prís.

2. stk. Prísráðið kann, eftir at avvarðandi virki ella felog hava havt høvi at geva uttmæli, leingja ella broyta tær í stk. 1 nevndu fyrisetingar.

3. stk. Henda grein viðvíkir ikki prísum, sum vera ásettir av landinum ella eini kommunu.

§ 9.

Vørur, sum handlandi seta fram í sýnisglugga ella inni í krambúðini, skulu vera týðiliga prísmerktar. Eisini kann ráðið krevja, at prísir vera tilskilaðir, tá vørur ella tænastur vera bodnar fram í lýsingum.

2. stk. Prísráðið kann fyriskipa, hvussu rokningar fyri gjord arbeiði skulu vera útgreinaðar.

§ 10.

Prísráðið kann krevja, at vørur, sum bert kunnu halda sær avmarkaða tíð, verða merktar annaðhvørt

portere direkte fra oprindelseslandet.

§ 8.

Prisrådet kan for et tidsrum indtil 6 måneder ad gangen fastsætte,

1. at den på en bestemt dag gældende pris på en vare eller tjenesteydelse ikke må forhøjes eller
2. at den på en bestemt dag gældende pris ikke må forhøjes med mere end et nærmere fastsat beløb eller procent eller
3. at en nærmere fastsat pris ikke må overskrides.

Stk. 2. Prisrådet kan, efter at de pågældende virksomheder eller selskaber har haft lejlighed til at udtale sig, forlænge gyldighedstiden for eller ændre de i stk. 1 nævnte forskrifter.

Stk. 3. Denne paragraf vedrører ikke priser, der fastsættes af landet eller en kommune.

§ 9.

Varer, som handlende fremviser i udstillingsvinduer eller inde i forretningen, skal være tydeligt prismærket. Rådet kan kræve, at priser også anføres, når varer eller tjenesteydelser tilbydes i annoncer.

Stk. 2. Prisrådet kan bestemme, hvorledes regninger for udført arbejde skal specifiseres.

§ 10.

Prisrådet kan forlange, at varer, som kun kan opbevares i begrænset tid, mærkes enten med frem-

við framleiðsludegi ella seinast loyvda søludegi. Ráðið ásetir nærri reglur fyri tilíkari merking.

§ 11.

Tá vøra ella tænasta verður boð in út, er ikki loyvt at nýta rangar, villleiðandi ella ófullfiggjaðar upplýsingar, sum eru egnaðir at ávirka eftirspurningin.

§ 12.

Tað er ikki loyvt at bjóða garanti við sølu av vørum ella veitan av tænastu uttan so, at hesin garantir gevur móttakaranum eina betri støðu, enn hann annars hevur eftir galdandi lóg.

§ 13.

Tað er ikki loyvt at geva vørum, sum verða fluttar inn úr útlondum, heiti ella merki, sum er egnað at fáa keyparan at halda, at vøran er framleidd í Føroyum.

§ 14.

Prísráðið kann eftir kæru ella av sínum eintingum taka støðu til, um ein vøra ella eitt gjørt arbeiði lýkur tey góðskukrøv, sum rimiliga kunnu vera sett til vørur ella arbeiði av slíkum slagi.

2. stk. Kemur prísráðið til ta støðu, at ein vøra ella eitt arbeiði ikki lýkur krøvini sambært 1. stk., kann ráðið,

1. tá vøran er nærum virðisleys, krevja, at keyparin fær aðra vøru í staðin, ella tá vandi er fyri, at ein heilur vørubólkur er

stillingsdag eller sidst tilladte salgsdag. Rådet fastsætter nærmere bestemmelser for sådan mærkning.

§ 11.

Ved udbydelse af varer og tjenesteydelser er det ikke tilladt at benytte urigtige, vildledende eller ufuldstændige oplysninger, som er egnet til at påvirke efterspørgslen.

§ 12.

Det er ikke tilladt at tilbyde garanti ved salg af varer eller ydelse af tjenester, medmindre denne garanti giver modtageren en bedre stilling, end han ellers har efter lovgivningen.

§ 13.

Det er ikke tilladt at give varer, som er importeret fra udlandet, betegnelse eller mærke, som er egnet til at få køberen til at tro, at varen er fremstillet på Færøerne.

§ 14.

Prisrådet kan på grundlag af anke eller af egen drift afgøre, om en vare eller et udført arbejde opfylder de kvalitetskrav, som med rimelighed kan stilles til varer eller arbejder af den pågældende art.

Stk. 2. Kommer prisrådet til det resultat, at en vare eller et arbejde ikke opfylder kravene i stk. 1, kan rådet,

1. hvis varen er nærmest værdiløs, kræve, at køberen får en anden vare i stedet, eller når der er risiko for, at en hel varegruppe

virðisleysur, seta bann móti sølu,
2. krevja, avslátt í prísinum,
3. krevja at seljarin greiðir frá, at voran ikki hevur ta góðsku, hon eigur at hava, og
4. har talan er um gjørt arbeiði krevja, at neyðugar ábøtur verða gjørdar, ella at alt arbeiði verður gjørt umaftur ókeypis.

3. stk. Tá ráðið viðgerð mál eftir hesi grein, kann tað taka sær neyðuga sakkøna hjálp.

§ 15.

Kærur yvir avgerðir prísráðsins kunnu verða lagdar fyri yvirprísráðið í seinasta lagi 14 dagar eftir, at prísráðið hevur boðað frá avgerð síni.

2. stk. Yvirprísráðið hevur 3 limir, sum verða valdir av løgtinginum fyri 4 ár.

§ 16.

Við sekt, hefti ella fongsli í upp til 2 ár verður tann revsaður, sum

1. ger brot á §§ 2, 7, 9, 11, 12 og 13,
2. ikki fylgir boðum ella brýtur forboð frá prísráðnum eftir §§ 8, stk. 1, 9, 10 og 14 ella forboð frá landsstýrinum eftir § 7, stk. 3,
3. sýtir fyri at geva upplýsingar, sum prísráðið kann krevja eftir § 4, 4. stk.

2. stk. Somu revsing kemur tann undir, sum gevur ráðnum ella øðrum almennum valdi rangar ella villleiðandi upplýsingar ella tegir

er værdiløs, sætte forbud mod salg,
2. kræve, prisen nedsat,
3. kræve at sælgeren oplyser, at varen ikke har den kvalitet, den burde have, og
4. hvor det drejer sig om udført arbejde, kræve, at nødvendige forbedringer bliver udført, eller at alt arbejdet bliver lavet om gratis.

Stk. 3. Ved behandling af sager efter denne paragraf, kan rådet antage nødvendig sagkyndig hjælp.

§ 15.

Anke over prisrådets afgørelser kan forelægges overprisrådet senest 14 dage efter, at prisrådet har givet meddelelse om sin afgørelse.

Stk. 2. Overprisrådet har 3 medlemmer, der vælges af lagtinget for 4 år.

§ 16.

Med bøde, hæfte eller fængsel op til 2 år straffes den, som

1. overtræder §§ 2, 7, 9, 11, 12 og 13,
2. ikke følger påbæg eller overtræder forbud fra prisrådet efter §§ 8, stk. 1, 9, 10 og 14 eller forbud fra landsstyret efter § 7, stk. 3,
3. nægter at give oplysninger, som prisrådet kræver efter § 4, stk. 4.

Stk. 2. På samme måde straffes den, som giver rådet eller anden offentlig myndighed urigtige eller vildledende oplysninger eller for-

við viðurskiftum, sum kunnu vera av týdningi í einum máli.

3. stk. Verður brotið framt av einum partafelag, lutafelag ella øðrum tílíkum felag, kann felagið sjálvt koma undir sekt.

§ 17.

Henda tóg kemur í gildi 1. juli 1976. Samstundis fer løgtingslóg nr. 25 frá 24. april 1952 úr gildi. Tó verður § 4 framvegis í gildi til onnur lóggáva er framd um valutaviðurskifti.

fier forhold, som kan være af betydning i en sag.

Stk. 3. Er overtrædelsen begået af et aktieselskab, andelsselskab eller andet lignende selskab, kan strafansvar pålægges selskabet som sådant.

§ 17.

Denne lov træder i kraft 1. juli 1976. Samtidig ophæves lagtingslov nr. 25 af 24. april 1952. Dog forbliver § 4 fortsat i kraft til anden lovgivning om valutaforhold er gennemført.

Viðmerkingar:

Við løgtingslóg nr. 39 frá 21. mai 1975 fekk landsstýrið heimild at seta nevnd at kanna lóggávuna um príseftirlit. Eftir uppskotinum, sum tað varð samtykt av løgtinginum, fekk nevndin 5 limir, harav landsstýrið setti 2, harav annar skuldi verða formaður, og 3 limir eftir tilmæli frá løgtinginum. Í nevndina vórðu valdir eftir tilmæli frá løgtinginum Eli Nolsøe, skrivstovumaður, Klaksvík, Jógvan Sundstein, statsaut. grannskoðari, Tórshavn og Johannes Olsen, arbeiðarafelagsformaður, Sandavúgi. Landsstýrið valdi Líggjas í Bø, skrivstovumann, Klaksvík og Kára Petersen, fulltrúa, Tórshavn, tann seinna sum formann.

Tann 9. februar 1976 sendi nevndin landsstýrinum frágreiðing við uppskoti til nýggja lóg um príseftirlit. Nevndin upplýsir í frágreiðingini, at hon ikki var samd um uppskotið í øllum støðum. Einlak av nevndarfrágreiðingini fylgir hjálagt.

Fyriliggjandi uppskot samsvarar uppskoti frá nevndini við nokrum fánum broytingum.

Broytingarnar eru hesar:

Til § 3. Í nevndarfrágreiðingini verður skotið upp, at sett verður prísráð við 5 limum, men er einki tilskilað um starvstíðina. Landsstýrið hevur skotið upp, at starvstíðin verður 4 ár. § 3, stk. 3 í uppskoti nevndarinnar um at ráðið sjálvt setur neyðugt starvsfólk ,er strokið, tá sama mannagongd eigur at verða nýtt viðvikjandi setan av starvsfólki á prísráðnum sum á øðrum stovnum.

Til § 7. Nevndarinnar uppskot til stk. 3 í hesi grein verður metti at stríða ímóti OECD-reglunum, meðan orðingin í uppskoti landsstýrisins ikki verður hildin at vera diskriminerandi fyri tanu fría handilin.

Til § 8. Tá uppskot nevndarinnar møguliga kann skiljast soleiðis, at prísráðið fær heimild til at seta generellan prissteðg, hevur landsstýrið broytt orðingina soleiðis, at prissteðgur v.m. bert kann setast fyri einstakar vørur ella tænastur. Heimildin at seta vanligan prissteðg fyri allar vørur undir einum eigur eins og aðra staðni at vera hjá lóggávuvaldinum.

Til § 14. Landsstýrið metir hesa grein at vera sera vittgaugandi og er í iva, um tað ber til at lata eitt prísráð taka støðu til, um eitt gjørt arbeiði lýkur tey góðsknkrøv, sum rímiliga kunnu vera sett. Trætumál millum tveir partar um slík mál verða vanliga avgjørd annaðhvørt við vanligari rættargongd ella gerðarrætti, um partarnir ikki sjálvir kunnu semjast. Væntast kann, at prísráðið, um henda grein verður sett í gildi, fer at fáa eitt stórt tal av kærum um góðskuna av gjørdum arbeiðum og tí skal virka sum ein dómstólur, meðan aðalendamálið við lógini er, at prísráðið skal hava eftirlit við prislógunum í landinum sum heild. Aftrat hesum kemur, at um prísráðið tekur avgerð um trætur millum partar, hevur tað bert heimild at áleggja bót sambært § 16, meðan ráðið onga heimild hevur at fáa partarnar at gera tað, teimum verður álagt.

Til § 15. Eftir uppskoti nevndarinnar velur løgtingið yvirprísráð við 5 limum, sum skulu umboða brúkara- og seljarasjónarmiðið, meðan fimti limurin ikki beinleiðis skal verða heftur av hesum áhugamáli. Starvstíðin er ikki tilskilað. Landsstýrið metir tað at vera torført hjá løgtinginum at velja limirnar eftir tilskilaðu sjónarmiðum .Skotið verður upp, at yvirprísráðið fær 3 limir, sum verða valdir fyri 4 ár, og at einki verður tilskilað, um hvørji áhugamál teir skulu umboða.

Landsstýrið metir, at við teimum heimildum fyriliggjandi uppskot gevur, og prísráðið fær ta neyðugu arbeiðsorkuna, skuldi ráðið havt eina eftir okkara tørvi hóskandi lóggávu at arbeitt eftir á hesum øki.

Dánjal P. Danielsen
landsstýrismaður

/ J. Djuluus

Frágreiðing
frá
nevndini til kannan av lóggávuni um priseftirlit.

1. Setan av nevndini.

Við løgtingslóg nr. 39 frá 21. mai 1975 fekk landsstýrið heimild at seta 5-mannanevnd til kannan av lóggávuni um priseftirlit. Landsstýrið setir 2 av nevndarlimunum, harav annar er formaður og tríggjar eftir tilmæli frá løgtinginum.

Uppskot um tílíka kanningarnevnd varð lagt fyri løgtingið av landsstýrinum 18. apríl 1975, løgtingsmál nr. 58/1974. Í uppskoti landsstýrisins verður sagt, at landsstýrinum verður heimilt at seta 5-mannanevnd til kanningar av lóggávuni um priseftirlit. Í viðmerkingunum til lógaruppskotið sigur landsstýrið, at tað kundi hugsað sær í hesa kanningarnevnd at valt umboð fyri lønmóttakarar, forbrúkarar, arbeiðsgevarar og handil. Annars verður sagt í viðmerkingunum, at galdandi lóg um prísir og valuta, løgtingslóg nr. 25 frá 24. apríl 1952, ikki kann sigast at vera tíðarhóskandi longur, tá hugsað verður um, hvussu hesi viðurskifti verða umsitin í grannalondum okkara. Í Danmark er t.d. galdandi lóg um monopolir, lóg um prísir og vinningar, lógir um marknaðarføring, sum geva heimild til at seta forbrúkaraumboðsmann eins og stovnað er forbrúkararáð við almennum stuðnli.

Í áliti sínum frá 22. apríl 1975 tekur fíggjarnevndin undir við, at galdandi lóg um priseftirlit verður endurskoðað, men heldur, viðvíkjandi spurninginum um forbrúkaraumboðsmann og forbrúkararáð, at mangt, í milliónsamfeløgini hava, ikki júst er lívið um at gera fyri okkara lítla samfelag at taka undir við, men at vit eiga at skapa tað, sum skal vera, eftir okkara tørvi og fíggjarligu beriorku.

Annars skjýtur fíggjarnevndin upp, at lógaruppskotið verður broytt soleiðis, at 2 av nevndarlimunum, harav annar er formaður, verða settir av landsstýrinum og 3 eftir tilmæli frá løgtinginum.

Lógaruppskotið varð samtykt við broytingaruppskotinum frá fíggjarnevndini.

Aftaná at lógin var komin í gildi, varð nevndin sett. Eftir tilmæli frá løgtinginum vórðu valdir Eli Nolsøe, skrivstovumaður, Klaksvík, Jógvan Sundstein, statsaut. grannskoðari, Tórshavn og Johs. Olsen, arbeiðarafelagsformaður, Sandavági. Landsstýrið valdi Hanus við Høgadalsá, sljóra og Kára Petersen, fulltrúa, lann seinna sum formann. Eftir at Hanus við Høgadalsá hevði boðað landsstýrinum frá, at harn ikki kundi

taka við sum nevndarlimur, valdi landsstýrið Liggjas í Bø, skrivstovumann, Klaksvík, í staðin.

2. Gongdin í nevndararbeiðinum.

Hóast lógin um setan av nevndini í § 1, stk. 2, fyriskipar at nevndin skal hava lokið arbeiði sítt innan 1. november 1975, varð nevndin ikki vald fyrr enn í september mánað og fingu nevndarlimirnir boð um hetta við skrivi landsstýrisins frá 19. september.

Nevndin hevði fyrsta fund sín 30. september 1975. Nevndarlimirnir samdust um, at tann í lógini setta frest var ov stutt. Samtykt var at boða landsstýrinum frá, at nevndarlimirnir roknaðu við, at ætlan landsstýrisins upprunaliga hevði verið, at nevndin skuldi hava rímiliga tíð at arbeiða í, og at nevndin fór til verka undir teirri fyritreyt, at landsstýrið gjørdi útvegir fyri at lougja hesa frest. Á hesum fundi varð avgjørt, at nevndin skuldi vera liðug við arbeiði sítt áðrenn 1. februar 1976.

Á fyrsta nevndarfundinum varð eisini samtykt at senda skriv til fleiri vinnufeløg og til prísráðið og biða um eina metan av nógaldandi lóg um prísir, hvar ið lógini tørvar ábøtur ella broytingar, og annars spyrja, hvørji sjónarmið, avvarðandi felag ella prísráðið hevur í hesum máli.

Áðrenn næsta fund felagsins høvdu fleiri av teimum spurdu feløgunum svarað. Nevndin helt seg kunna skilja av hesum svørum, at feløgini í tí stóra og heila hildu, at lógin um valuta og prísir stórt sað er í lagi, men at einstakar ábøtur eru neyðugar.

Á hesum fundi samdist nevndin um, at hóast talan er um at kanna lóggávuna um prísefftirlit, eigur at verða arbeitt við øðrum spurningum, sum hava týðning fyri prísásetan og eisini at viðgera spurningar, sum vørugóðsku og tílíkt.

Avgjørt varð, at nýta galdandi lóg sum grundarlag undir einum møguligum nýggjum uppskoti.

Síðani hevur nevndin gjøgnumgingið galdandi lóg og roynt at fáa tær har gjørdu fyriskipanir meira tíðarhóskandi. Við síðuna av hesum hevur nevndin gjøgnumgingið donsku lógirnar um «priser og avancer», «lov om forbrugerklagenævn» og «Lov om markedsføring».

Við grundarlag í hesum tilfari gjørdi nevndin síðani eitt fyribilsuppskot til lóg um prísefftirlit. Hetta fyribilsuppskot, sum ikki full semja var um í nevndini, varð síðani sent teimum vinnufeløgunum, sum nevndin fyrr hevði spurt seg fyri hjá. Fleiri av hesum feløgum svaraðu og komu við broytingaruppskotum.

Nevndin hevur í stóran mun rettað seg eftir hesum broytingaruppskotum og leggur saman við hesum áliti frá sær uppskot til lóg um prísefftirlit. Nevndarlimirnir eru kanska ikki heilt samdir í øllum støðum, men er við-

merking gjørd um hetta í sambandi við ummæli av teim einstøku lógargreinunum.

3. Viðmerkingar til lógaruppskotið sum heild.

a. Um príseftirlit.

Fyrst skal verða gjørt vart við, at nevndin hevur gjørt arbeiði sítt undir teirri fyritreyt, at tað ikki hevur verið ætlanin hjá landsstýrinum ella løgtinginum at gera broytingar í samfelagsskipanini, serstakliga tá hugsað verður um handil og innflutning sum frían vinnuvegir.

Ein høvuðstáttur í hesi skipan er, at prísur á vørum og arbeiði lagar seg eftir eftirspurningi og gjaldorku og kapping ímillum handlandi. Har sum henda kapping er til staðar skuldi hon í flestu førum verið nóg mikið at forða fyri órímiligum vinningum við tað, at brúkarin hevur møguleika at velja, hvørjum hann keypir frá, ella hvønn hann letur gera arbeiði fyri seg. Tað ber til eftir tykki nevndarinnar at siga, at tað besta príseftirlitið er brúkarin sjálvum. Tó kann einkarrættur ella avtalur ímillum handlandi gera, at henda kapping ikki er til staðar. Eisini kann ein skjótt vaksandi eftirspurningur ella tørvur á ávísum vørubólkum føra til órímiligar vinningar, um ikki á onkran hátt verður forðað fyri hesum. Tað er ikki ætlanin við hesum uppskoti, sum fyriliggur, at forða fyri at handlandi taka størri ella minni vinningar, ætlanin er at forða fyri, at tiknir verða **órímiligir** vinningar.

b. Um annað enn príseftirlit.

Nevndin hevur umhugsað møguleikan at stovna brúkaraklagunevnd at taka sær av ymsum brúkaramálum og brúkaraumboðsmannastovn at hava eftirlit við handilsviðurskiftunum. Úrslitið av hesi umhugsan er tó, at nevndin metir viðurskiftini hjá okkum at vera ov smá til at arbeiða við so nógvum stovnum, og verður hildið, at ein stórur partur av tí arbeiðinum, sum ein tílík klagunevnd skuldi tikið sær av, lika væl kann verða røkt av prísráðnum. Í § 1 í lógaruppskotinum verður sagt at endamálið við lógini er at fyribyrgja órímiligum prísum og vinningum og skeivum vørumpplýsingum. Herí liggur, at lógin ikki einans fæst við órímiligar vinningar, men eisini fæst við spurningar um vørugóðsku og rætfar upplýsingar fá vørur verða boðnar fram. Hesum arbeiði hevur nevndin hildið, at prísráðið eisini kundi taka sær av, um tað er rætt samansett.

c. Um brúkaraumboðsmann.

Nevndin er samd um, at ein brúkaraumboðsmaður, sum brúkaranna vegna av sínum eintingum og eftir ábeitan frá brúkarunum hevur eftirlit við, at lóggávan um prísir v.m. verður hildin og at reglur givnar av prís-

ráðnum verða hildnar og sum um neyðugt kann reisa sak við dómstólarnar um hesi viðurskiftir, vildi verið til stóra nytta. Tó verður hildið, at ov lítið arbeiði er til eitt fólk við rætturi útbúgving í hesum starvi, og skal brúkaraumboðsmaðurin hava annað starv við síðuna av, rokna vit við, at virkið sum brúkaraumboðsmaður lætfliga kann koma at verða misskunnakokkur.

Hin vegin heldur nevndin, at tørvur óivað er á einum almennum umboðsmanni, sum bæði kann umboða borgararnar mótvegis almennum stovnum og mótvegis teim handlandi. Nevndin loyvir sær at skjóta upp, at landsstýrið urhugsar henda spurning.

4. Viðmerkingar til tær einstaku lógargreinirnar.

Til § 1. Her verður boðað frá, hvat endamálið við lógini er. Í stk. 2 verður sagt, at lógin fevnir um allan handil við vørum og allar tænastur móti gjaldi undantikið løn.

Tað er vert at viðmerkja, at tá her verður talað um handil verður hugsað um handil av vinnuligum slag. Hetta vil siga t.d., at tá ein persónur, sum ikki hevur handil sum vinnuveg, selir ein einstakan hut, er hetta ikki handil, soleiðis sum orðið skal skiljast í hesi lóg. Sonuleiðis um ein persónur selur føstu ogn sína, er hetta ikki handil, um hetta er nakað persónurin ger hesa einu ferðina, og ikki nakað sum hann livir dagliga av.

Lógin fevnir eisini um tænastu móti gjaldi undantikið lønir. Hetta er at skilja soleiðis, at tað er sjálvstøðugt virki ímóti gjaldi, sum lógin fevnir um. Harímóti fevnir lógin ikki um løn fyri at vera til staðar á plássi, sum arbeiðsgevari ávísir og arbeiða undir leiðslu hansara. Sum dømi kann verða nevnt, um hondverksmeistari áteknur sær at gera eitt ávíst arbeiði, um tað so er eftir tilboð ella rokning, er hetta at skilja sum tænasta ímóti gjaldi, meðan ein sveinur í tænastu hjá hesum meistara, sum ger arbeiðið, fær løn frá meistaranum. Henda løn er undantikin frá hesi lóg.

Til § 2. Í hesi § verður sligið fast at órímiligir prísir og vinningar eru ikki loyvdir, og at avtalur, samtyktir og reglur, sum kunnu hava órímiligar prísir ella vinningar við sær eru ikki loyvdar.

Lógin sigur onki um, nær ein prísur ella vinningur er órímiligur, hetta er ein meting sum prísráðið skal gera. Í nevndini hevur spurningurin verið umrøddur, um lógin skuldi ásetta eitt mark fyri, hvussu stórur vinningur, ið skal verða loyvdur. Hetta hevði sjálvsagt verið leiðbeinandi fyri teir handlandi, og møguliga hevði lógin verið lættari at umsiti. Nevndin er tó komin til tað úrslit, at ein tílík føst regla um hægst loyvda vinning kann hava við sær, at ongin priskapping verður ímillum teir handlandi, og at hesin vinningur fer at verða fastur. Verður hesin vinningur settur til eina procentupphædd av útreiðslunum, áðrenn vøran er komin á goymslu,

kann vandi verða fyri, at tann handlandi fær álnuga fyri at keypa so dýrt inn sum møguligt.

Til § 3. Her verður áseld, at eitt prísráð skal hava eftirlit við teimum viðurskiftum, sum lógin fyriskipar reglur um. Nevndin hevur umhugsað at geva hesum ráð eitt annað heiti, við tað at lógin viðgerð onnur mál enn einans prísir, men varð endin tann at hildið varð fast við heitið prísráð. Nevndin hevði upprunaliga hugsað sær, at hetta ráð skuldi hava 3 limir, men fleiri av feløgunum, sum hava nummælt fyribils uppskotið, hildu at ráðið átti at hava fleiri limir, ja, okkurt felag helt enntá, at ráðið átti at hava 7 limir.

Nevndin hevur umhugsað møguleikan at lata ráðslimirnar verða valdar av yrkisfeløgum, men meðan so at siga allir, sum umboða seljaraáhugamál, eru limir í Føroya Arbeiðsgevarafelag, eru løntakararnir spjaddir so nógv, at ógjørligt er at ávisa eitt einstakt felag, sum skal velja ein part av nevndini. Meðan nevndin arbeiddi við uppskotinum, varð stovnað Føroya Brúkarafelag, og kundi tað hugsast, at hetta felag kundi velja teir nevndarlimirnar, sum skuldu umboða brúkaraáhugamál. Men av tí at hetta felag er so nýtt og enn hevur so fáar limir, helt nevndin heldur ikki hetta vera nakran útveg. Nevndin hevur tí skotið upp, at prísráðið fær 5 limir, harav tveir av limunum skulu umboða áhugamál brúkaranna, tveir áhugamál seljaranna, meðan 5. limurin, sum ikki má vera beinleiðis heftur av frammanfyri nevndu áhugamálum skal verða formaður. Landsstýrið skal velja prísráðið, og tað verður sostatt landsstýrisins uppgáva at royna at finna hóskandi umboð fyri teir tveir bólkarnar.

Viðvíkjandi formanninum er at siga, at nevndin hevur umhugsað um serlig krøv til útbúgving skuldu setast her. Hildið var tó, at ikki var rætt at lógfesta tílík krøv, men lata landsstýrið meta um henda spurning hvørja ferð, val fer fram.

Føroya Arbeiðarafelag og Føroya Fiskimannafelag hava í umnæli sínum lagt stóran dent á, at settir verða prísansarar. Hesir prísansarar skulu ikki virka beinleiðis undir prísráðnum, men skulu verða settir av landsstýrinum og skulu fáa ávís øki at arbeiða á. Eftir uppskotinum frá Føroya Arbeiðarafelag skulu prísansararnir vera prísráðnum til hjálpar, men skulu eisini arbeiða óheftir og soleiðis vera millumlið imillum prísráðið og brúkararnar.

Nevndin hevur ikki sett uppskot fram um tílíkar prísansarar. Nevndin hevur heldur ikki tikið støðu til á hvønn hátt, prísráðið skal virka, um tað skal verða starvsfólk undir prísráðnum sum ger dagliga arbeiði, eisini kanningar av prísum og vinningum, ella um setasí skal eitt tal av prísansarum annaðhvørt beinleiðis undir landsstýrinum ella undir prísráðnum. Um henda spurning er nevndin ikki samd. Av sonnu orsøk hevur nevndin

heldur ikki uppskot um starvstíð ráðsins. Víst verður til, at í lógaruppskotinum verður í lesi § sagt í stk. 3, at prísráðið sjálvt setur neyðugt starvsfólk. Viðmerkt skal verða, at nevndin metir, at skal prísráðið hava nakra ávirkan av lýðuingi, er neyðugt, at ráðið verður útbygt umsitingarliga.

Á fleiri økjum, har tænasta verður veitt ímóti gjaldi, hevur tað almenna eftirlit frammanundan, ella gjøldini verða beinleiðis sett av tí almenna. Sum dømi kann verða nevnt, telefon, veitan av elmegi, fólka- og farmaflutningur. Nevndin heldur ikki, at prísráðið eisini skal hava eftirlit við tílíkum virksemi, og er tí fyriskipað í stk. 2 í § 3, at prísráðið hevur ikki eftirlit við viðurskiftum, sum eru undir øðrum almennum eftirliti.

Til § 7 stk. 1. Nevndin hevði upprunaliga umhugsað eina reglu sum segði, at vørur, sum heilsølumaður keypir inn má hann ikki selja øðrum heilsølumonnum, men bert smásølumonnum beinleiðis, men tá ið tað kann koma fyri, at fleiri heilsølumenn við at taka seg saman um størri felags keyp, sum ein einstakur av teimum fornelt stendur fyri, og fær ein vinning við at lata vørur viðari til aðrar heilsølumenn, sum samsýning fyri arbeiði sítt, og hetta størra innkeypið førir við sær lægri útsølupris, enn úrslitið hevði verið, um hvør heilsølumaður keypir fyri seg, kundi ein tílík fyriskipan komi at virka forðandi fyri eini royndl at halda lágar prísir. Nevndin valdi tí í staðin at seta í lógina tað orðaljóði, sum nú stendur, soleiðis at tað avgerandi er, at tílíkur sínámillum handil ikki virkar dýrkandi.

Til § 7 stk. 2 og stk. 3. Tað er greitt at jú fleiri millumlið ein vøra skal um, áðrenn hon kemur til keyparan, jú dýrari verður hon, og heldur nevndin at tað er rætt at seta í lógina, at vørur, so vítt gjørligt, skulu keypast frá framleiðslulandinum. Í fleiri løtum hevur innflytarin í Føroyum onga ávirkan á hesi viðurskifti, men noyðist at keypa frá umboðsmanni í øðrum landi enn har vøran er framleidd, við tað at framleiðarin ikki vil selja beinleiðis. Nevndin heldur, at tað er rætt, at landsstýrið í tílíkum føri hevur heimild til at seta bann ímóti innflutningi av vørum, sum framleiðarin ikki vil selja beinleiðis til Føroyar .Nevndin helt ikki at tað var rætt at lata prísráðið hava tílíka heimild ,við tað at hetta kann vera ein álvarsom avgerð av politiskum slag, sum helst má liggja hjá landsstýrinum. Eli Nolsøe viðmerkir, at hann heldur, at seinasta punktum í stk. 2 er nóg míkið.

Til § 8. Í hesi § verður fyriskipað, hvørja heimild prísráðið hevur um hildið verður at prísir eru órimiligir, ella váðið heldur at ongin rímilig orsøk er til at hækka prísir uppum tað, teir í løtuni eru.

Til § 9. Nevndin hevði upprinaliga skotið upp, at prísráðið kundi krevja, at vørur verða prísmerktar. Tey flestu av felagunum ráddu til, at vørur sum verða settar fram í krambúð ella sýnisglugga undir øllum umstøðum skuldu vera prísmerktar. Hesum hevur nevndin fylgt, men hevur ikki hildið tað verið rætt at hava hetta sum eina ófrávikiliga reglu, tá talan er um lýsingar í blaðunum. Eftir s t k. 2 kann prísráðið fyriskipað hvussu rokningar fyri gjørd arbeiði skulu vera útgreinaðar. Tá uppgerðarhættirnir fyri ymisk arbeiði ikki altíð eru líka, hevur nevndin ikki hildið tað borið til at seta nærri reglur hesum viðvíkjandi í lógina, men hett tað vera tað vera rættast at áleggja prísráðnum at gera tílíkar reglur.

Til § 10. Nevndin heldur at tørvur er á eini reglu um datomerking av matvørum, men at tað er rættast, at prísráðið avgerð hvørjar vørur, ið hava tílíka merking fyri neyðini, og ásetir nærri reglur um hetta.

Til § 12. Ætlanin við hesi § er, at forða fyri, at brúkarin verður villleiddur at keypa eina vøru, tí hann trýr, at hann fær betri trygd fyri, at vøran er í lagi, enn tað trygd hann annars hevur eftir galdandi rætti. Eisini er ætlanin at forða fyri, at ein keypari ger avtalu við seljaran um ein garanti, sum er minni enn tann, keyparin annars hevur.

Til § 13. Henda § er ætlað, sum verja av føroyskari framleiðslu.

Til § 14. Eftir hesi § fær brúkarin møguleika fyri hjá prísráðnum at fáa viðgjørt klagur um, at ein keypt vøra ella gjørt arbeiði er verri, enn hann rímuliga kundi rokna við. Tey krøv sum brúkarin á henda hátt kann fáa gjøgnumførd, eru lutvíst tílík, sum hann higartil einans hevur havt møguleika at gjøgnumføra við vanligum rættarmáli. Vert er at leggja merki til, at umframt at avgera eitt trætumál ímillum ein einstakan brúkara og ein handlandi, hevur ráðið eisini møguleika fyri, at áleggja seljaranum at halda uppat við at selja ein heilan vørubólk, ella at greiða frá, at vøran ikki hevur tað góðsku, hon eigur at hava.

Til § 15. Eftir galdandi lóg um valuta og prísir kann kærast til landsstýrið yvir avgerðir prísráðsins. Nevndin hevur viðgjørt spurningin, um ikki rættari var at hava eitt yvirprísráð sum kærast kundi til, og setur fram uppskot um eitt yvirprísráð uppá 5 limir, sum verða valdir av løgtinginum. Limirnir verða valdir, umboðandi sonu áhugamál, sum í sjálvum prísráðnum. Heldur ikki her er sagt nakað um serlig kunnleikakrøv til formannin, men verður roknað við, at løgtingið vil hava tílíkt í huga, tá hann verður valdur.

Til § 16. Støddin á revsing fyri møgulig brot á lógina er óbroytt frá galdandi lóg.

Til § 17. Galdandi lóg um valuta og prísir viðger eisini valutaviðurskifti, Nevndin hevur varhugan av, at prísráðið sum valutaráð hevur líflan og ongan týdning í dag, og at valutaspurningar ikki hoyra saman við hesi lóg, soleiðis sum viðurskiftini eru nú, og at hesin spurningur fellir uttanfyri arbeiðsøki nevndarinnar. Tó hevur nevndin hildið, at tað var rætt, at lata § 4 í lógini um valuta og prísir verða í gildi til ein onnur loysn er fundin.

Tórshavn, 9. februar 1976.

Nevndarinnar vegna

Kári D. Petersen
formaður.

Uppskot til
lóg um prísefitirlit.

§ 1.

Endamál lógarinnar er at fyribyrgja órímuligum prísum og vinningum og skeivum vøruupplýsingum.

Stk. 2. Lógin fevnir, har ikki serligt undantak verður gjørt, allan handil við vørum og alla tænastu ímóti gjaldi, undantikið lønir.

§ 2.

Órímuligir prísir og vinningar eru ikki loyvdir.

Stk. 2. Avtalur, samtyktir og reglur, sum kunnu hava órímuligar prísir ella vinningar við sær, eru ikki loyvdar.

§ 3.

At hava eftirlit við prísum og vinningum og øðrum viðurskiftum, sum eru nevnd í hesi lóg, verður sett eitt prísráð við 5 limum. Landsstýrið velur prísráðið. Tveir av limunum skulu umboða áhugamál brúkaranna, tveir áhugamál seljaranna meðan fimti limurin, sum ikki má vera beinleiðis heftur av frammanfyri nevndu áhugamálum, skal vera formaður.

Stk. 2. Prísráðið hevur ikki eftirlit við viðurskiftum, sum eru undir øðrum almennum eftirliti.

Stk. 3. Prísráðið setir sjálvt neyðugt fólk.

§ 4.

Ráðið skal av sínum eintíngum hava eyga við prislagnum, og kann kunngerða fyri almenningínum prísir og prísmunir á týðandi vørubólkum, tó uttan at nevna navn virkisins.

Stk. 2. Prísráðið kann kanna prísir og vinningar hjá teimum einstøku virkjunum.

Stk. 3. Áðrenn tílík kanning, sum nevnd í stk. 2, verður sett í verk, skal prísráðið samráðast við virkið um grundarlagið undir kanningini.

Stk. 4. Prísráðið kann frá øllum virkjum og stovnum, almennum sum privatum, krevja allar upplýsingar, sum hava týdning fyri virki ráðsins.

§ 5.

Prísráðið skal viðgera kærur yvir prísir og vinningar, sum av kæraranum verða hildnar at vera órímuligir.

Stk. 2. Kemur Prísráðið til tað úrslit, at eitt prísur ella vinningur er órímuligur, skal ráðið við samráðing við avvarandi virki royna at fáa viðurfskiftini í rættlag. Gevur hetta ikki nóg gott úrslit, skal ráðið taka stig eftir reglunum í § 8. Prísráðið skal boða kæraranum frá úrslitinum av kanningini.

Stk. 3. Tað sama, sum fyriskipað er í stk. 2 er galdandi, um prísráðið sum lið í vanliga eftirlitsarbeiðinum kemur eftir, at prísur ella vinningur er órímuligur.

§ 6.

Í metanini av, um ein prísur ella vinningur er rímuligur, skal prísráðið leggja til grund tær útreiðslur, sum seljarin hevur havt av vøruni, áðrenn hon er komin á goymslu, serliga innkeypsprís, almenn gjøld, farmagjøld, tryggingar o.t. Herumfrámt skal ráðið hava í huga møguleikar fyri spilli, goymsluttíð og annars øll viðurskifti sum hava týdning fyri prísásetan.

§ 7.

Tað er ikki loyvt at handla ímillum handlandi í sama søluliði uttan so, at tílíkur handil ikki hevur dýrkan við sær.

Stk. 2. Tá vørur verða fluttar inn úr útlondum, skal verða roynt at sleppa undan óneyðugum dýrkandi millumliðum, og skulu tílíkar vørur, har tað er gjørligt, verða innfluttar beinleiðis frá framleiðslulandinum. Prísráðið kann nokta at góðkenna óneyðugar millumhandlaraútreiðslur.

Stk. 3. Landsstýrið kann seta bann ímóti innflutningi av vørum, sum koma ígjøgnum óneyðug dýrkandi millumlið í útlondum.

§ 8.

Prísráðið kann í upp til 6 mánaðir um ferðina fyriseta,

1. at teir ein ávisan dag galdandi prísir ikki mugu verða hækkaðir ella
2. at teir ein ávisan dag galdandi prísir ikki mugu verða hækkaðir við meira enn nærri ásettari upphædd ella prosentum ella
3. at ikki má verða farið upp um nærri ásettar prísir.

Stk. 2. Prísráðið kann eftir at avvarandi virki ella feløg hava havt høvi at geva ummæli, leingja ella broyta tær í stk. 1 nevndu fyrisetingar.
Stk. 3. Henda § viðvíkir ikki prísum, sum verða ásettir av landinum ella eini kommunu.

§ 9.

Vørur, sum handlandi seta fram í sýnisglugga ella inni í krambúðini, skulu vera týðuliga prísmerktar. Eisini kann ráðið krevja, at prísir verða tilskilaðir, tá vørur ella tænastur verða bodnar fram í lýsingum.
Stk. 2. Prísráðið kann fyriskipa, hvussu rokningar fyri gjørd arbeiði skulu vera útgreinaðar.

§ 10.

Prísráðið kann krevja, at vørur, sum bert kunnu halda sær avmarkaða tíð, verða merktar annaðhvørt við framleiðsludegi ella seinasta loyvda søludegi. Ráðið ásetir nærri reglur fyri tílíkari merking.

§ 11.

Tá vøra ella tænasta verður boðin út, er ikki loyvt at nýta rangar, villleiðandi ella ófullfíggjaðar upplýsingar, sum eru egnaðir at ávirka eftirspurningin.

§ 12.

Tað er ikki loyvt at hjóða garanti við sølu av vørum ella veitan av tænastu uttan so, at hesin garantiur gevur móttakaranum eina betri støðu, enn hann annars hevur eftir galdandi lóg.

§ 13.

Tað er ikki loyvt at geva vørum, sum verða fluttar inn úr útlondum, heiti ella merki, sum er egnað at fáa keyparan at halda, at vøran er framleidd í Føroyum.

§ 14.

Prísráðið kann eftir kæru ella av sínum eintingum taka støðu til, um

ein vøra ella eitt gjørt arbeiði lýkur tey góðskukrøv, sum rímuliga kunnu verða sett til vørur ella arbeiði av slíkum slagi.
Stk. 2. Kemur prísráðið til ta støðu, at ein vøra ella eitt arbeiði ikki lýkur krøvini sambært stk. 1, kann ráðið

1. tá vøran er nærum virðisleys krevja, at keyparin fær aðra vøru í staðin, ella tá vandi er fyri at ein heitur vorubólkur er virðisleysur, seta hann ímóti sølu
2. krevja avslátt í prísinum
3. krevja at seljarin greiðir frá at vøran ikki hevur ta góðsku, hon eigur at hava og
4. har talan er um gjørt arbeiði krevja at neyðugar ábøtur verða gjørdar ella at alt arbeiðið verður gjørt umaftur ókeypis.

Stk. 3. Tá ráðið viðger mál eftir hesi §, skal tað taka sær neyðuga serkøn ahjálp.

§ 15.

Kærur yvir avgerðir prísráðsins kunnu verða lagdar fyri yvirprísráðið í seinasta lagi 14 dagar eftir, at prísráðið hevur boðað frá avgerð sini.
Stk. 2. Yvirprísráðið hevur 5 limir, sum verða valdir av løgtinginum. Teir 4 limirnir skulu verða valdir soleiðis, at bæði brúkara- og seljarasjónarmið verða umboðað meðan 5. timurin, sum ikki skal vera beinleiðis heftur av brúkara ella seljaraálugamálum, skal vera formaður.

§ 16.

Við sekt, hefti ella fongsli í upp til 2 ár verður tann revsaður, sum

1. ger brot á §§ 2, 7, 9, 11, 12 og 13
2. ikki fylgir boðum ella brýtur forboð frá prísráðnum eftir §§ 8 stk. 1, 9, 10 og 14 ella forboð frá landsstýrinum eftir § 7 stk. 3.
3. sýtir fyri at geva upplýsingar, sum prísráðið kann krevja eftir § 4 stk. 4.

Stk. 2. Sonnu revsing kemur tann undir, sum gevur ráðnum ella øðrum almennum valdi rangar ella villleiðandi upplýsingar ella tegir við viðurskiftum, sum kunnu vera av týdningi í einum máli.
Stk. 3. Verður brotið framt av einum partafelag, lutafelag ella øðrum tillikum felag, kann felagið sjálvt koma undir sekt.

§ 17.

Tá henda lóg fær gildi, fer løgtingslóg nr. 25 frá 24. apríl 1952 úr gildi. Tó hevur § 4 í nevndu lóg framvegis í gildi til ognur lóggáva er framd um valutaviðurskifti.

§ 18.

Henda lóg fær gildi .....

1. viðgerð 16. mars, málið beint í lógarnevndina, sum 10. mai gav hetta

Álit

Høvuðsinnihaldið í løgtingsmáli nr. 64/1976 er – við at skipa prísráð og við øðrum tiltøkum – at fyribyrgja óríminligum prísum og vinningum og skeivum vøruupplýsingum.

Í løgtingsmáli nr. 74/1976 verður mælt til at áleggja landsstýrinum at seta 3 prísansarar.

Lógarnevndin hevur sent bæði málini til ummælis hjá fleiri feløgum og núverandi prísráði. Hesi eru:

Føroya arbeiðarafelag
Føroya fiskimannafelag
Havnar arbeiðsmannafelag
Klaksvíkar arbeiðsmannafelag
Føroya handverksmeistarafelag
Føroya handverkarafelag
Havnar handverksmeistarafelag
Havnar handverkarafelag
Klaksvíkar handverksmeistarafelag
Fiskepigernes fagforening
Føroya keypmannafelag
Kvinnufelagssamskipanin
Havnar detailhandlarafelag
Brúkarafelagið
Føroya arbeiðsgevarafelag
Prísráðið.

Prísráðið.

Í skrivi prísráðsins verður sagt:

1. Viðmerkingar til løgtingsmál nr. 64/1976: **Príseftirlit.**

Vísandi til § 3 um ætlaða nýggja prísráðið, so er eingin fyrimunur at vaksa um limatalið í ráðnum úr trimum limum, sum nú eru, til at verða fimm limir. Ætlandi er oftast soleiðis, at jú størri talið er á limum, tess truplari verður helst at koma til nakra semju og endalig úrslit.

Vísandi til § 15 viðvíkjandi einum yvirprísráð við trimum limum, má sigast nærmast at vera óneyðugt, tá ið ein av royndum veit, hvussu

sjáldan § 6-nevndin í gomlu prislógini varð innkallað. Ein avgerð um klagu kann líka so væl fara til rættaravgerð frá prisráð sum frá einum yvirprisráð, hvørs heimild ikki framgongur av lógaruppskotinum, um avgerð tess er endalig.

Í staðin fyri at vaksa um Prisráðið við tveimum limum og at sela eitt yvirprisráð við trimum limum, hevði verið til ólíka størri hjálp fyri Prisráðið, at Løgtingið ella Landsstýrið valdi, sum nevnt í § 14 stk. 3, tríggjar teknískt sakkønar persónar fyri 4 ár í senn, og sum Prisráðið kundi vent sær til viðvíkjandi kannum av húsabygging, el-arbeiði, umvælum av akførum o.a. Hesir persónar skuldu verið førir fyri at kannað bæði tímatal og góðskuna av arbeiðinum. Í Prisráðnum vita vit av royndum, at tað nyttar ikki okkum at søkja slíka sakkøna hjálp við tað, at hesir teknískt sakkønu persónar ikki vilja kolldøma arbeiðið hjá starvsbrøðrum. Øðrvísi má vera, tá teir eru valdir fyri eitt vist áramál av myndugleikunum.

2. Løgtingsmál nr. 74/1976: **Prísansan.**

Viðmerkingar til uppskot frá Halldor Hansen, logtingsmanni, hesum viðvíkjandi.

Um Løgtingið vil áleggja Landsstýrinum at seta tríggjar nýggjar prísansarar, so er einki skeivt í hesum, men er tað nóg so nógv avgjørt at føra fram, at grundarlagið fyri at seta hesar prísansarar er tað vaksandi misálitið viðvíkjndi tilfarinum, sum prístalið verður útroknað eftir, tá nevnast kann, at fastur prísansari hevur verið í arbeiði síðan 1963.

Í 1968 vórðu fýra mans settir aftrat. Arbeiðstíðin fyri hesar menn varð sett til 5 dagar í hvørjum mánaða, men søgdu tríggir av hesum monnum seg úr aftur starvinum, tá ið undeið 1 ár var farið. Tann fjórði maðurin er framvegis í arbeiði í Suðuroy.

At fáa í lag eina broyting í tí føstu prísleguni fyri at tryggja meira hóskandi prísir verður helst ringt at gera við, sjálvt um settir verða fleiri prísansarar, av tí at innflutt verður nógv tann størsti partur av heildini av brúkaravørum í Føroyum, og prísir, sum verða ásettir uttanífrá, kunnu prísansararnir einki gera við uttan at kanna vinningin.

Í hesum sambandi kann vísast á, at ein reiðiliga stórur partur av brúkaravørunum verður innfluttur gjøgnum Føroya Keypssamtøku, har brúkararnir sjálvir eru eigarar og sostatt seta søluprísirnar sjálvir, og skuldi hetta borið í sær, at um søluprísirnir hjá vanligum handlum lógu høgt, skuldi hetta vist ein mun millum hesar handlar og Keypssamtøkuna, men sambæt kanningar sæst hetta ikki at vera. Tað ber eisini í sær dømi um, at prískanningar fara fram av innfluttum vørum

við tað, at útlendskt seyðakjøt bert kostar kr. 12,00 pr. kilo, meðan føroyskt seyðakjøt kostar kr. 22,00 pr. kilo.

Sum áður sagt er einki skeivt í at velja tríggjar prísansarar at verja um ta hampuligu, fyri ikki at siga góðu, prístegu ,ið nú er. Tað verða neyvan keyptar biligari vørur í hinum norðurlonduunn, enn hvat ein kann keypa tær fyri í Føroyum.

Brúkarafelagið.

Í svari brúkarafelagsins verður sagt:

BF heldur fast við tilmæli sítt frá 7. januar 1976 um, at tað í § 10 verður sett «prisráðið skal krevja» í staðin fyri «prísráðið kann krevja» og at tað, sum serligt ískoyti til grein 11 verður sett, at tað er ikki loyvt at lýsa við lottarium í sambandi við sølu av vørum og tílíkum ella at brúka slíkar «kappingar» yvirhevur, har vinningar verða lovaðir keparunum (sum fríar ferðir, reiðupeningur, krov etc.) og allir brúkarar harvið fáa eina dýrari vøru enn neyðugt.

Í grein 14, 2. stk. verður skotið upp eftir orðini «kann ráðið» at seta «skjóta málið inn fyri brúkaraumboðsmannin til avgerðar». Restin av sonn grein verður strikað.

Sum nýggja grein 15 skjóta vit upp:

«Kærur yvir avgerðir prísráðsins kunnu verða lagdar fyri brúkaraumboðsmannin í seinasta lagi 14 dagar eftir, at prísráðið hevur boðað frá avgerð síni.

2. stk. Brúkaraumboðsmaðurin verður settur av landsstýrinum, sum ger reglugerð fyri virki hansara.»

Brúkarafelagið er samt við viðmerkingar landsstýrisins til grein 14 í tí, at sum greinin er orðað, fer prísráðið at fáa eitt stórt tal av kærumálum viðvíkjandi gjørdum arbeiðum v.m. sum ráðið kortini ikki hevur neyðugan myndugleika at gera nakað við, uttan — á sama hátt sum BF nú — at royna at veita ráð og leiðbeining í hvørjum einstøkum føri ella vísa málini frá sær. Politiskt valt yvirprísráð, sum yvirkærustovnur, tykist okkum eingin heppin loysn heldur. Brúkarafelagið loyvir sær tí at taka upp aftur uppskotið um, at settur verður óheftur brúkaraumboðsmaður at taka sær av tílíkum kærumálum, ið hvussu er teinum, sum hava prinsipiellan týdning. Hann skal eisini ókravdur kunna taka upp mál til kanningar.

Brúkarafelagið heldur ikki, at tað nýtist at vera dýrari við einum heildagssettum brúkaraumboðsmanni, sum saman við prísráðnum hevur tilsvarandi uppgávur og myndugleika sum danska monopoltilsynet og monopolrådet, og sum kann taka sær av prísansingini um alt landið, enn við einum skiftandi politiskt valdum yvirprísráði, sum í hvørjum einstøkum

føri mi ætlast at skula leita sær sakkøna hjálp, umfram skrivstovuhjálp v.m. og sum ikki kann væntast at arbeiða so skjótt og effektivt sum brúkaraumboðsmaðurin, í málum um góðskukrøv, eitt nú viðvikjandi «byggisjúski», er sum er aloftast einasti møguleiki vanlig rætlargongd, og tekur hetta av reyndum so drúgva tíð, at fann kærandi partarin sjáldan hevur líkindi at fáa annað burtur úr enn at uppaftur meira er oyðilagt og farið fyri skeyti, enn um hann læt vera við at leggja sak. Her krevjast skjótar avgerðir. Eitt yvirprísráð, sum fað í uppskotinum nevnda, kann ikki ætlast at vera fært fyri at arbeiða so skjótt sum brúkaraumboðsmaðurin.

Við at settur verður dúgligur brúkaraumboðsmaður meta vit, at samfelagið, bæði tann einstaki og tað almenna, kann spara munandi beinleiðis og óbeinleiðis í óneyðugum útreiðslum, tí tá er betri møguleiki at ansa eftir, at ikki virði fara fyri skeyti t.d. orsakað av skeivum og samfelagsskaðiligum handilslagi, ov vánaligum arbeiði og handverki, og aðrari misnýtslu bæði hjá tí almenna og privatum.

Verður brúkaraumboðsmaður ikki settur á hesum sinni, mælir Brúkarafelagið til í øðrum lagi, at prísansarar verða settir.

Føroya arbeiðarafelag.

Føroya arbeiðarafelag hevur ongar viðmerkingar til uppskotini, men mælir serliga til, at uppskotið um prísansarar verður samtykt óbroytt.

Havnar handverkarafelag.

Havnar handverkarafelag mælir til, at bæði uppskotini verða samtykt óbroytt.

Føroya fiskimannafelag.

Føroya fiskimannafelag tekur undir við uppskotinum um prísansarar. Felagið tekur eisini undir við uppskotinum um príseftirlit, men ger tó vart við, at eftir uppskotinum koma bert 2 umboð fyri brúkararnar at verða við í prísráðinum. Felagið mælir tí til, at «sett verð ein størri umboðsnevnd, har størsti partur av teimum feløgum, sum umboða løntakarar, kunnu vera við, og at ein minni arbeiðsnevnd uppá 5 limir hevði dagliga virkið hjá felagnum um hendur. Umboðsnevndin kundi so komið saman nakrar ferðir um árið.»

Kvinnusamskipanin.

Kvinnusamskipanin hevur sent málið til ummælis hjá Klaksvíkar húsmøðrafelag, ið viðvíkjandi uppskotinum um príseftirlit sigur seg vera nøgt við uppskotið, sum tað fyriliggur. Viðvíkjandi uppskotinum um prísansarar verður hildið, at tann besta loysnin verður, at «brúkarin er sín egni prísansari».

Viðvikjandi prísansarum.

Í máli nr. 74: Prísansarar verður upplýst, at Føroya fiskimannafelag, Starvsmannafelagið, Brúkarafelagið, Føroya handverkarafelag, Havnar arbeiðsmannafelag, Havnar arbeiðskvinnufelag, Klaksvíkar arbeiðsmannafelag og Klaksvíkar arbeiðskvinnufelag taka undir við kravinum um, at prísansarar verða settir.

Í løtuni starvast tveir prísansarar, annar í Tórshavn, hin í Suðuroy.

Meirilutin (Erlendur Paturssson, Pauli Ellefsen, Tórálvur M. Olsen og Jákup Fr. Øregaard) mælir til:

at landsstýrið fær heimild til at seta prísansarar so sum tað metir tørv vera á, tó ikki fleiri enn 2,
at landsstýrið fyri 4 ár í senn útnevnir 3 sakkønar persónar, ið prísráðið kann venda sær til viðvikjandi prísum og vinningum, ið umrøddur verða í lógini,
at landsstýrið setir brúkaraumboðsmann í staðin fyri at sett verður yvirprísráð,
at kærur yvir avgerðir prísráðsins kunnu verða lagdar fyri brúkaraumboðsmannin í seinasta lagi 30 dagar eftir, at prísráðið hevur boðað frá avgerð síni,
at viðkomandi, hevur prísráðið ikki innan fyri 6 vikur tikið avgerð, kann kæra beinleiðis til brúkaraumboðsmannin.

Meirilutin ivast í, um ikki § 7, 3. stk. stríðir móti millumlandaavtalum, og tá meirilutin har atur at heldur, at 2. stk. í somu grein í veruleikanum gevur prísráðnum somu møguleikar til at náa tí ætlaða úrsliti, ið umrøtt verður í 3. stk., mælir meirilutin til, at 3. stk. gongur út.

Uppskot

Meirilutin (Erlendur Paturssson, Pauli Ellefsen, Tórálvur M. Olsen og Jákup Fr. Øregaard) mælir løgtinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins við hesum broytingum:

Í § 3 verður sum nýtt 3. stk. skoytt uppí:	I § 3 tilføjes som nyt stk. 3:
«Landsstýrið fær heimild til at sett prísansarar so sum tað metir tørv vera á, tó ikki fleiri enn 2.»	«Landsstyret bemyndiges til at ansætte priskontrollører efter behov, dog ikke flere end 2.»
§ 7, 3. stk. gongur út.	§ 7, stk. 3 udgår.
§ 14, 3. stk. verður orðað soleiðis:	§ 14, stk. 3 affattes således:
«Landsstýrið útnevnir fyri 4 ár	«Landsstyret beskikker for 4 år

í senn 3 sakkønar persónar, ið prísráðið kann venda sær til viðvikjandi prísum og vinningum, ið umrøddir eru í hesi lóg.»

§ 15, 1. stk. verður orðað soleiðis:

«Kærur yvir avgerðir prísráðsins kunnu verða lagdar fyri brúkaraumboðsmannin í seinasta lagi 30 dagar eftir at prísráðið hevur boðað frá avgerð sini. Hevur prísráðið ikki tikið avgerð innan fyri 6 vikur aftan á, at kæra er send tí, kann viðkomandi beinleiðis kæra til brúkaraumboðsmannin.»

§ 15, 2. stk. verður orðað soleiðis:

«Brúkaraumboðsmaðurin verður settur av landsstýrinum, sum ger reglugerð fyri virki hans.»

ad gangen 3 sagkyndige personer, som prisrådet kan henvende sig til vedrørende priser og avanceer, der er omhandlet i denne lov.»

§ 15, stk. 1 affattes således:

«Anke over prisrådets afgørelser kan forelægges for forbrugerombudsmanden senest 30 dage efter, at prisrådet har givet meddelelse om sin afgørelse. Har prisrådet ikke truffet afgørelse inden 6 uger efter, at klage er sendt dette, kan vedkommende anke direkte til forbrugerombudsmanden.»

§ 15, stk. 2 affattes således:

«Forbrugerombudsmanden ansættes af landsstyret, som udfærdiger instruks for hans virksomhed.»

Minnilutin (Eliesar Arge) mælir til at samtykkja uppskot landsstýrisins í tingmáli nr. 64/1976: Príseftirlit óbroytt.

Lógarnevndin, 8. mai 1977.

Erlendur Patursson J. Fr. Øregaard Pauli Ellefsen

Eliesar Arge Tórálvur M. Olsen

Framhald av áliti

í

løgtingsmálunum nr. 64/1976: Príseftirlit og 74/1976: Prísansarar.

Aftaná 2. viðgerð vórðu málini av nýggjum vist til viðgerðar í lógarnevndini.

Meirilutin (Jákup Fr. Øregaard, Tórálvur Mohr Olsen og Pauli Ellefsen) setur fram hetta

Uppskot

Av ti, at tað frá landsstýrinum undir viðgerðini varð vískt á brek í sjálvum lógartekstinum, verður málið aftursent landsstýrinum, sum leggur tað aftur fyri tingið á ólavsøku.

Minnilutin (Eliesar Arge) mælir framvegis til at samtykkja uppskot landsstýrisins í tingmáli nr. 64/1976 óbroytt.

Minnilutin (Erlendur Paturssson) mælir til at samtykkja uppskot meirilutans í lógarnevndini, undantikið tó: «§ 7, 3 .stk. gongur út».

Lógarnevndin, 11. mai 1977.

Erlendur Paturssson Jákup Fr. Øregaard Tórálvur Mohr Olsen

Pauli Ellesen Eliesar Arge

Uppskot
til
samtyktar.

Álagt verður landsstýrinum at seta 3 faslar prísansarar og syrgja fyri, at neyðugur peningur verður settur á fíggjarlógina til hetta endamál.

Viðmerkingar:

Fleiri ferðir áður, og seinast 7. februar 1976, hevur Føroya Arbeiðarafelag vent sær til Føroya Landsstýri og kravt, at teir seta fastar prísansarar. Hetta hevur verið hildið at verða neyðugt fyri at tryggja hóskandi prísir og ikki minst fyri at fyribyrgja tí vaksandi misáliti viðvikjandi tilfarinum, sum prístalið verður útroknað eftir.

Fleiri felog hava eisini tikið undir við hesum kravi og hava, í hvussu so er nøkur av teinum, sent tað skrivliga til landsstýrið. Hesi felog eru:

Føroya Fiskimannafelag, Starvsmannafelagið, Brúkarafelagið, Føroya Handverkarafelag, Havnar Arbeiðsmannafelag, Havnar Arbeiðskvinnufelag, Kalksvíkar Arbeiðsmannafelag, Klaksvíkar Arbeiðskvinnufelag og møguliga onnur, sum vit ikki vita við vissu.

Eisini kann vísast á, at landsstýrið einaferð hevur kunngjørt, at fastir prísansarar vóru settir, men varð hetta ongatið til veruleika.

Vóna vit sostatt, at uppskotið verður viðgjørt við vælvild.

Vegna Føroya Arbeiðarafelag leggja vit uppskotið á ting við viðmæli.

Á Føroya Løgtingi, 18. mars 1977.

Haldor Hansen.

Málini vórðu viðgjørd saman, Løgtingsmál nr. 64/76: Priseftirlit: §§ 1 og 2 í uppskoti landsstýrisins fullu við 10—0, málið sostatt burturdottið og broytingar til uppskotið somuleiðis. Nýtt uppskot frá meiriluta í lógarnevndini (J. Fr. Øregaard, Tórálvi Mohr Olsen og Paula Ellefsen) samtykt við 22—0, sostatt verða málini send landsstýrinum aftur.

---

65. Bygging av nýggjari royndarstøð

Ár 1977, 15. mars, legði Dánjal P. Danielsen, landsstýrismaður, fram

Uppskot
til

løgtingslóg um bygging av nýggjari royndarstøð.

§ 1.

Landsstýrinum verður heimilað at byggja nýggja royndarstøð og í samráð við figgjarnevndina taka upp neyðug lán til byggingina.

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi beinanvegin.

lagtingslov om opførsel af ny forsøgsstation.

§ 1.

Landsstyret bemyndiges til at opføre en ny forsøgsstation og i samråd med finansudvalget optage nødvendige lån til byggeriet.

§ 2.

Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Um 1870, ella stutt aftaná at monopolhandilin varð avtikin, var laukin um landbúnaðarskúla borin fram av Dalsgarðsbóndanum í Skálavík. Var hetta áðrenn tílíkir skúlar vóru settir á stovn, t.d. í Íslandi. Málið fekk ikki undirtøku.

Um 1900 hevði Jóannes Paturssson eitt sonevnt royndarbrúk í Kirkjubø, har nakrir næmingar vóru, bæði gentur og dreingir. Genturnar lærdu serliga at gera smør og ost, meðan dreingirnir lærdu at fáast við ross og nýta tey maskinamboð, ið vóru á garðinum. Næmingarnir fingu eisini eitt sindur av bókligum kunnleika.

Henda fyrsta byrjanin til ein føroyskan búnaðarskúla vardi nøkur ár, men datt síðani niður fyri.

Í 1920 var Royndarstøðin í Hoyvík sett á stovn, rikin og goldin av danska statinum. Var her tikið rættiliga stóran til, t.d. varð vegur lagdur úr Havn til Hoyvíkar, stór nýmótans hús og úthús bygd. Hoyvíkshøur veltur og samanlagdur v.m. Royndarstjórin var dani - Einar Knudsen, hjálparmenn vóru Jógvan Hansgaard, búfrøðikandidatur og Jóannes Dalsgaard, agrouomur. Harumframt arbeiddi stórur partur av Hoyvíkskingum og Hvítanesmonnum á støðini, summir burtur av, aðrir partar av árinum.

Seinni varð so onnur minni stød sett á stovn í Traðardali á Sandi.

Høvuðsendamálið við støðini var gróðrar- og taðingarroyndir, og vóru hesar bæði í Hoyvík og úti um landið.

Støðin hevði eisini næmingar, einar 4 í tali, og var næmingatíðin eitt ár. Umframt verkligan kunnleika sum vanligt garðsarbeiði, lærdu teir at brúka nýmótans amboð, kenna plantur o.a. Næmingarnir fingu eisini nakað av bókligum kunnleika, uttan at hetta var nakar landbúnaðarskúli.

Aftaná at Knudsen um miðjan av 30-árunum fór aftur til Danmarkar, minkaði starvssemið av ymiskum orsøkum, og tá so kríggið kom, gjørdist játtanirnar frá statinum alt ov smáar, og áhugin hjá føroysku myndugleikunum var lítil og eingin.

Tá kríggið hasaði av, hendi heldur einki, vegna óvissuna um royndarstøðirnar skuldu gerast føroyskt sermál ella ikki, og almenni áhugin fyri málinum var sera lítil, fyri ikki at siga negativur.

Í 1956 varð so kongsjørðin og jarðargrunnurin yvirtikin sum sermál, harundir eisini royndarstøðirnar. Royndarstøðin á Sandi varð niðurløgd, men í Hoyvík koyrdi við sama lag.

Spurningurin um landbúnaðarskúla var alsamt havdur á lofti, men her hendi einki, fyri ein stóran part av tí, at ósemja var um, hvar hesin skúli skuldi liggja. Í Hoyvík ynsktu menn hann ikki, og ikki fekst semja um annan garð.

Endin varð so tann, at flestu hildu Heygsgurð í Kollafirði vera væl egnaðan. Menn hildu hann liggja væl fyri, og við tað at hann var embætis-

garður hjá embætisgarður hjá amtslæknanum, roknaðu menn garðin sum tøkan.

Við jarðarlógini frá 1937 vóru presta- og embætisgarðarnir yvirtiknir av jarðarráðnum og festir undir líknandi skipan sum kongsgarðarnir. Einasti garður, har fyrrverandi uppsitarin ongan sáttmála fekk, var á Heygsgarði. Niels Pauli á Steinum var sitandi á garðinum, men kundi jarðarráðið siga hann upp til eina og hvørja tíð, og vóru grundirnar fyri hesum tær, at garðurin skuldi vera tøkur, um búnaðarskúli ella annað alment tiltak varð gjørt á staðnum.

Niels Pauli av Steinum vendi sær ferð eftir ferð til jarðarráðið og bendi á, at hann kendi seg ótryggan at sita við garðinum undir hesum treytum, og vendi jarðarráðið sær sostatt til landsstýrið við ynskinum um, at ráðnum skuldi vera loyvt at gera leigusáttmála við uppsitararnar, men svaraði landsstýrið, at eingin sáttmáli átti at vera, sum gekk longur enn at brúkarin kundi sigast upp, um garðurin skuldi nýtast til landbúnaðarskúla ella annað tílíkt endamál.

Leigusáttmái varð so gjørdur, dagsettur 21. mars 1961, hareftir Niels Pauli av Steinum kann sigast upp við ársfrest til ein 1. januar.

Frá 1947 til 1950 vórðu avsettar á figgjarlógini 160.000 kr. í grunn til bygging av búnaðarskúla.

Við løgtingslóg nr. 20 frá 9. apríl 1964 fekk landsstýrið heimild at nýta henda pening saman við nýjáttanum til ymisk byggitiltøk á royndarstøðini í Hoyvík landbúnaðinum til fruma, og varð nevndin fyri royndarstøðina biðin um at gera eina byggiætlan, og gjørdi Kristoffur Kristoffersen, og Dan Hofgaard eina tílíka, eftir tilmæli frá Olaf Mortensen, arkitekti. Ætlanin umfataði nýtt fjós og næmingabygning til 8 næmingar við ymsum, ið har til hoyrdi, so sum skúlastova, køkur og annað, og við tí peningi, ið stóð í grunni, var møguleiki at fara undir eina tílíka bygging.

Tað næsta, sum hendi í málinum var bræv frá Bóndafelag Føroya og Føroya Búnaðarfelag, har heitt verður á landsstýrið ikki at byggja í Hoyvík, men flyta norður á Heyggj í Kollafirði, og tók uýggi landsstýrismaðurin Kr. Djurhuus undir við besum sjónarmiði. Hagabýtið varð framt millum Poul Vang og royndarstøðina, soleiðis at royndarstøðin fekk gamla garðin í Hoyvík, allan bøin og niðara partin av haganum, sum fyri ein part er latin til húsabygging, meðan størsti parturin við tíðini verður bygdur og peningurin fyri jurðasølu tí helst førur fyri at figgja neyðugu útbyggingina.

Hóast Kr. Djurhuus gekk inn fyri at byggjast skuldi norðuri á Heyggi, varð ongantíð nøkur formlig samtykt gjørd í landsstýrinum um málið, og eingin áheitan á Føroya jarðarráð at siga brúkaran á Heygsgarði upp.

20. oktober 1972 setti landsstýrið nevnd at kanna hesar spurningar:

1. Hvørja bygd best hóskandi er at flyta støðina til.
2. Um partar av støðini eiga at verða eftir í Hoyvík.
3. Kostnaðar- og rakstrarætlan fyri ymsar loysnir.

Øll nevndin mælir til, at úthyggingin av royndarstøðini fer fram á Heygsgarði.

Ein meiriluti — tríggir — mælir til, at alt virksemi verður flutt, meðan minnilutin — tveir — heldur, at ávísir partar av stovninum framvegis skal vera í Hoyvík.

Álitið er latið landsstýrinum 6. september 1973.

Á ársaðalfundi Føroya búnaðarfelags 21. og 22. juni og á einum seinni fundi 24. juni var spurningurin um skúla og royndarstøð til viðgerðar. Úrslitið av hesum fundi var, at ein fundarfrágreiðing varð send landsstýrinum, har feløgini, matrikulstjórin og landsdjóralæknin gingu inn fyri við undirskrift, at skúla- og royndarstøðarmálið verður loyst undir einum og flutt norður á Heyggj.

Á fundi 18. september 1975, ið landsstýrið hevði við nevndina í feløgunum, landsdjóralæknan og matrikulstjóran var umrøtt, hvussu fram skuldi farast. Landsdjóralæknin og matrikulstjórin vóru fúsir til at luttaka í einari serkønari byggi og arbeiðsnevnd, um landsstýrið gekk inn fyri at byggjast skuldi og góvu positiva tilsøgn um medvirkan stovnanna við undirvising so langt kunnleiki røkkur.

Landsstýrið samtykti síðani at biðja Føroya jarðarráð siga leigusáttmálan við Niels Paula av Steinum upp til 1. januar 1976 og seta ein arbeiðsbólk, hvørs limir vóru Dánjal J. Bærentsen, landsdjóralækni, Olavus Danielsen, matrikulstjóri, Frifleif Joensen, bóndi, Hanus Joensen, bóndi og Jalgrím Hilduberg, landsstýrisfulltrúi.

Arbeiðsbókurin kom við uppskoti sínum 15. december 1976, har ein fullfíggjað úthyggingarætlan er gjørd út frá tí besta, ið yvskjast kann.

Landsstýrið gongur inn fyri, at bygdur verður skúli og royndarstøð í einum, har sami kunnleiki fæst sum á vanligum skúlum í grannalondunum, men metir arbeiðið hjá arbeiðsbólkinum sum eitt uppskot, ið kann broytast, um tað verður hildið heint og roknar við at neyðuga úthyggingin kemur at taka fleiri ár.

Fíggingini viðvíkjandi er tað at siga, at av peningi fyri selda jørð eigur royndarstøðin um 650.000 kr. Innangarðslendið í Hoyvík er 16,1 ha, og lendið vestanfyri Hvítanesvegin, ið mest alt er egnað til bygging og verður bygt, um fólkavøksturin verður sum higartil er 175 ha, so roknast kann við stórum peningaupphæddum fyri jarðasølur.

Í grunninum til bygging av landbúnaðarskúla eru umleið 400.000 kr., sostatt kemur byggingin bert fyri ein part at tyngja landskassan.

Raksturin er roknaður, tá støðin er fult úthygd og fullmannað til

1.345.000 kr., meðan royndarstøðin á uppskoti til figgjarætlan 1977/78 er sett til 800.000 kr.

Tá nú garðarnir í Hoyvík eru býttir, eigur hitt almenna alt Hoydalsøkið, tá trøðin hjá Jóannes Dalsgaard er frárøknað, og allan gamla bøin í Hoyvík.

Køn fólk meta, at gamli Hoyvíksgarður við úthúsum er sera væl egnaður at seta í stand og varðveita sum mynd av einum gomlum føroyskum bóndagarði. Verður gamla royndarstøðin nýtt sum miðstøð fyri urtagarðsbrúki og planting, kundi her fingist eitt umhvørvi tætt við Havnina, ið ikki hevur sín líka í landinum.

Dánjal P. Danielsen
landsstýrismaður

/ J. P. Ellendersen

Frágreiðing frá arbeiðsbólkinum viðvíkjandi flyting av

Royndarstøðini.

Við skrivi landsstýrisins frá 19. januar 1976 setti landsstýrið undirritaðu í ein arbeiðsbólk at koma við uppskoti um arbeiðsuppgávur, byggi- og kostnaðarætlan v.m. í samband við flyting av royndarstøðini í Hoyvík til Heygsgarð í Kollafirði.

Hanus Wardum, royndarstjóri, hevur verið arbeiðsbólkinum til hjálpar og tikið lut í flestu fundunum. Eisini hevur arbeiðsbólkurin fingið hjálp frá landsverkfrøðingsskrivstovuni.

Arbeiðsbólkurin er samdur um, at støðin eigur at umfata undirvising, royndarbrúk og haraftrat verða eitt myndsturbrúk. Haraftrat eru onnur øki, ið eru knýtt til royndarbrúkið í Hoyvík, t.d. ísáðing, maskinstøð og neytaeftirlit, eisini tikin við, meðan onnur arbeiðsøkir ikki eru tikin við, t.d. gartnari, plantuskúli og møguliga okkurt annað.

Heygsgarður er 4 merkur til støddar og áseyðatalið er 155. Umleið 20 ha ber væl til at dyrka í fyrsta umfari og er dyrkilendið hampuliga gott. Landsvegurin Havn — Kollafjørð gongur ígjøgnum lendið hjá Heygsgarði og um ein møguligur landsvegur frá tunnil á Signabø eisini skal gangga ígjøgnum lendið á Heygsgarði, verður tað ikki gjørligt at nýta garðin til royndarstøð. Landsverkfrøðingurin heldur tó, at tað møguliga ber til at leggja vegin so stutt inn í dalin, at hann ikki tekur stórvegis av Heygsgarði.

Mett verður, at Heygsgarður í mesta lagi kann bera 40 mjólkineyt og

20 ungneyt, meðan tað fakliga hevði verið best at kunna havt 50 mjólkineyt og 30 ungneyt.

Bólkurin metir, at brúk verður fyri rúmum til umleið 10 næmingar. Henda tilgongd verður mett út frá, at tað í Føroyum eru 276 jarðarbrúk við meira enn 50 áseyðum.

Spurningurin um bygging av royndarstøð í Kollfjarðadali hevur verið lagdur fyri friðlugarnevndina fyri Streymoyar sýslu og yvirfriðlugarnevndina, og hava nevndirnar í prinsippinum onki at viðmerkja til, at royndarstøð verður bygd á umtalaða lendi.

Hølistørvurin, um støðin skal lúka frammanfyri nevndu treytir, verður mettur soleiðis:

1) **Næmingabústaðir og umsiting**
   a. 10 eittmannshølir, sum kunnu brúkast sum tveymannshølir til skeið.
   b. 2 klassarúm, sum kunnu gerast til eitt til fyrilestrar.
   c. 1 vanlig uppihaldsstova.
   d. køkur og spísistova.

2) **Umsiting**
   a. 2 skrivstovur (starvsfólk + fyristøðumaður).
   b. Arkiv.
   c. Bókasavn (at nýta eisini sum arbeiðsrúm hjá næmingum).
   d. Laboratorium, sum eisini verður at nýta í undirvísingini.

3) **Forstandarahús**
   Húsarúm umleið 120 m².

4) **Hús til húsavørð**
   Húsarúm umleið 100 m².

5) **Landbúnaðarbygningar**
   a. Fjós við plássi til 40 vaksin neyt og 20 ungneyt.
   b. **Súrhoyggjbrunnar**, 500 m³.
   c. **Hoyggjhús**, 500 m².
   d. Goymslurúm við verkstaði til maskinur og amboð.
   e. Goymslurúm til eplir, fræ og kunsttøð.

Landsverkfrøðingsskrivstovan, sum varð biðin um at meta kostnaðin av bygningunum, vegagerð, brúgv v.m. hevur gjørt fylgjandi viðmerkingar og kostnaðarætlan:

TREYTIR:

Uppskoti leggur dent á hesar meginreglur:
Í tílíkari fyriskipan má tað verða ein treyt, at raksturin verður so skilbundin sum gjørligt. Sonnulciðis má yoski verða at fáa eina góða starvsliga loysn úr samanhanginum millum eindirnar og ikki minst eina arkitektoniska heild yvir økið.

1. **Treytir til økið**
   Daglig ferðsla til og frá økinum vil verða, orsaka av mjólkini, fóðri, handilstøðum v.m. Búnaðarskeiðini og vanligur áhugi vil eisini (yvirhøvur) geva nógva ferðslu.

   Uppdyrkingarvegirnir og leðleiðingarnir gera, at tað er ein fyrimunur at garðurin er miðskeiðis í mun til dyrkilendi og beiti.

   Økið skal vera slætt og uttan ov nógva vætu fyri at byggibúningin ikki verður ov dýr og fyri samanhangi í arbeiðslagið.

2. **Treyttr til byggingina**
   Støddin á eindunum, tær innanhýsis kringumstøður og tey skilbundnu krøvini á einum nýmótans brúki krevur tílíkar umhugsingar:

   a) Fráleikar millum arbeiðseindir, skúlan og jørðina.
   b) Veðurlagsverju fyri at minka orku- og tilfarsnýtslu v.m. og í hvørja ætt eindirnar skulu liggja sínamillum.
   c) Støddin á úti- og innirúmunum og byggiháttur.
   d) Lógir og tekniskar umstøður;.
   e) Fíggjarligar umstøður.

Eftir hesum kann sigast, at allir fráleikar skulu vera sinn minstir og eindirnar venda rætt í mun til ættirnar. Allar eindirnar skulu kunna viðkast ella minkast og so vítt møguligt vera óbundnir, hetta gevur minni smittu- og eldsvanda og størri frælsi til broytingar í mun til tørv og ókendar umstøður.

HUGSAN OG INNIHALD í SKIPANINI

Økið

Økið har bygningarnir skulu liggja er so at siga slætt, innibyrgd av tveimum áum, sum renna nøkumlunda vinkulrætt oman í Dalá.

Í mun til treylirnar viðv. legukrøvum kann sigast:

Vegir

Koyring til og frá staðnum er eftir vegi, sum gongur frá landsvegnum og oman til Dalsá. Fyri at koma víðari má brúgv gerast um ánna og tilkoyring til garðsplássi.

Á hesum staði ber væl til at gera uppdyrkingarvegir, bæði oman og niðaneftir dalinum, javnfjaran við Dalá.

Hæddarjavning

Tann minni hæddarmunurin sum er, kann javnast út við at fylla útgravaða jørð á lægri liggjandi økir. Møgulig eftirverandi ifylla kann nýtast til vøllgarðar, soleiðis at útiøkir, urtagarðar o.a. liggja lutvist í lívd.

Ravmagnsleiðingar og frárenningar

Ein háspenningsleiðing gongur ígjøgnum økið, men tað er ikki neyðugt at umleggja hana.

Hugsanin er at alt avfall frá fjósum og húsum skal leiðast í køstabrunnar, har tað verður reinsa og brúkt sum tað.

Fjósið

Hugsanin er, at fjósið lættliga kann skiftu til ymiska røkt og skal sostatt hava eina breidd, sum ger hetta møguligt. Somuleiðis er tað hugsanin, at fjósið skal hava tøðkjallara, so møguleiki er at gera gólv av ymiskum slagi t.d. rimagólv. Luftnýtslan er stór og er hetta eisini hugsa um við at gera brot í tekjuna.

Mjólki- og fóðurhúsið

Við okkara veðurlagi í huga, má tað vera ein fyrimunur at hava beinleiðis innilokað samband millum fjósið og mjólki- og fóðurhúsið. Mjólkirúmið hevur samband við fjósið ígjøgnum savningarstaðið og mjólkifjósið. Fjósið hevur eina fóðurgongd sum hevur beinleiðis samband við fóðurhúsið og súrhoyggjabrunnarnar.

Maskinhøllir
Tað eru tvær maskinhøllir, onnur hevur verkstað, goymslu og vaskihøll v.m. Tær eru lagdar soleiðis, at tær geva hitvísa lívd ímóti vesturættini og eru samstundis við at skapa garðsplássi.

Næmingabústaðir
Hugsanin er at hava 10 verilsir, sum kunnu nýtast sum tveymanshølir til skeið, tvær felags uppihaldsstovur, køk og borðstovu, felags bað, vatnáttlhús og goymslurúm.

Skúlahølir og umsiting
Millum fjósið og næmingabústaðirnar eru tveir bygningar, sum eru samanbundnir av eini gongd, sum hevur beinleiðis samband við næmingabústaðirnir. Annar bygningurin hevur 2 undirvísingarrúm (sum kunnu gerast til eitt til fyrilestrar) og eitt laboratorium. Hin bygningurin inniheldur umsiting, arkiv, wc og bókasavn.

BYGNINGARVÍDDIR OG KOSTNAÐUR

Fjós, mjólki- og fóðurhús 1.150 m² á 1.500 kr.	1.175.000,00
Súrhoyggjabrunnur	200.000,00
Maskinhøllir 600 m² á 1.000 kr.	600.000,00
Goymslurúm 150 m² á 800 kr.	120.000,00
Reinsiverk (køstur)	200.000,00
Næmingabústaðir 480 m² á 3.000 kr.	1.440.000,00
Skúlahølir og umsiting 320 m² á 3.000 kr.	960.000,00
Íbúð til fyristøðunam og húsavørð 230 m² á 2.400 kr.	550.000,00

Samlaða byggingarvídd er sostatt 2.930 m²	5.795.000,00
Samlaða øki til byggibúgving er o.u. 8.000 m² á 50 kr./m²	400.000,00
Uppdyrkingarvegir fram við ánni 900 m² á 1.000 kr./m²	900.000,00
Brúgv yvir um Dalá	100.000,00
falt	7.135.000,00

1) Tað skal viðmerkjast, at allir kostnaður bert er ætlaður og ikki útroknaður.

2) Útreiðslur til keyp av neyðugum amboðum og maskinum er ikki við í kostnaðarætlingini.

Aftrat omanfyri nettu íløgum frá landsverkfræðingsskrivstovuni uppá	7.195.000
koma útreiðslur til	
1) Maskinur	500.000
2) Uppdyrking í fyrsta umfari 15 ha á 3.000 kr.	450.000
soleiðis at samlaðu íløgurnar verða	8.145.000

Her eru ikki tiknar við íløgur til seyðaroyndir, sum náttúrliga hoyra til eina royndarstøð. Heldur ikki er møguligt endurgjald til fyrrverandi festara tikið við.

Eftir áheitan hevur Hanus Wardum, royndarstjóri, gjørt fylgjandi rákstraræflan fyri royndarstøð við lúnaðarskúla.

«Hendan meting er gjørd í tí støðu, at byggingin er liðug og at støðin hevur møguleika at virka sum royndarstøð og skúli sambært teir upplýsingar, ið arbeiðsbólkurin viðvíkjandi flyting av royndarstøðini hevur kunnað givið.

Um byrjað verður beinanvegin uppá hesa bygging, so kann henda ætlan í fyrsta lagi verða galdandi um umleið 3 ár, og eigur ein sostatt at taka fyrivarni viðvíkjandi møguligum prishækkingum.

Inntøkur

Mjólk	400.000,—
Kálvar	10.000,—
Kjøt	40.000,—
Seyður	25.000,—
Eplir, røtur o.a.	30.000,—
Tilsamans inntøkur kr.	505.000,—

Útreiðslur

Skúlastjóri		
Húsavørður		
Skrívstovumaður		
2 lærarar, 1.000 tímar		
Annar undirvísingarkostnaður		
5 starvsmenn		
Økonoma		
2 hjálparkonur		
Aðrar lønir um summarið		
		1.020.000,—
Matur		120.000,—
Ljós og olja		45.000,—
Viðlíkahaldsútreiðslur		30.000,—
Leysafæ, brúkstilfar		40.000,—
Tøð, sproytuveska		25.000,—
Fóður, innistøða o.a.		160.000,—
Skrívstovuútreiðslur, bøkur, líðarril o.a.		30.000,—
Ferðaútreiðslur, tænastuferðir v.m.		20.000,—
Sáð, № o.a. til ísáðing		120.000,—
Keyp av nýggjum maskinum og amboðum		70.000,—
Koyring		30.000,—
Trygging		25.000,—
Koyrigjald til ísáðarar		25.000,—
Tilfar til neytaeftirlit		50.000,—
Aðrar útreiðslur		40.000,—
Tilsamans útreiðslur kr.		1.850.000,—

Tórshavn, desember 1976

Dánjal J. Bærentsen — Fritleif Joensen
Olavus Danielsen — Hannis Joensen
Jalgrím Hilduberg

1. viðgerð 22. mars, málið beint í búnaðarnevndina, sum 5. mai legði fram hetta

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum og undir 1. viðgerð beint í búnaðarnevndina.

Nevndin er samd við landsstýrið í, at nýggj royndarstøð við skúla verður bygd.

Av viðmerkingunum sýnist at framganga, at byggimálið er knýtt at Heygsgarði. Nevndin ivast í, um hetta er rætti loysningurin og mælir til, at landsstýrið kannar møguleikarnar fyri at byggja royndarstøðina aðrastaðni, og síðani at leggja málið aftur fyri løgtingið.

Nevndin mælir tí løgtinginum til nú at taka ta prinsippavgerð, at nýggj royndarstøð verður bygd og setir fram uppskot samsvarandi.

Vit loyva okkum at minna á, at fyri nøkrum fáum árum síðani varð yvir løgtingsfíggjarlógina avsett ávís peningaupphædd til skeiðvirksemi hjá jarðabrúkarum í Føroyum, kr. 75.000,- árliga. Fíggjarárið 1975/76 varð hetta tal skorið niður í kr. 50.000, og árið eftir varð tað heilt strokið. Skeiðini vórðu hildin á Føroya Fólkaháskúla, har luttakararnir búðu ta tíð, skeiðið vardi, og luttøkuáhugin var ógvuliga stórur. Frá búnaðarmonnum hava vit fingið upplýst, at teir vóru sera væl nøgdir við hesi skeiðini. Vit halda tað í ikki vera rætt, at hesi búnaðarskeið skulu falla niðurfyri og heita á avvarðandi myndugleikar um í framtíðini at skapa útvegir fyri, at tey kunnu halda áfram, til vit hava fingið okkara búnaðarskúla.

Um búnaðarmál yvirhøvur loyva vit okkum at skoyta hetta uppí:

Sum kunnugt liggur væl fyri í Føroyum at framleiða gras, og bøur, sum fær bestu røkt, kann sláast 2—3 ferðir um summarið. Eplir vaksa eisini væl í landinum. Út frá hesum halda vit, at endamálið, sum sett eigur at vera í búnaðarmálum, er tað, at vit í minsta lagi framleiða nóg mikið av mjólk, kjøti og eplum. Hin avgerandi tátturin verður at sleppa av við framleiðsluna til lønandi prísir. Vit eru greiðir yvir, at hetta seinna við okkara ógvuliga opnu innflutningsskipan og útlendskum útflutningsstuðningi, kann skapa trupuleikar.

Øll vita, at dyrkilendið í Føroyum heldur er minkandi enn vaksandi. Á teimum størru plássunum verður meginparturin av hesum lendi nýtt til byggigrundir. Á nógvum smáplássum er stórur partur av jørðini uttanbíggjajørð.

Nógvir jarðabrúkarar meina, at tann gamli bøurin í Føroyum er illa nýtandi til nútíðar jarðarbrúk. Nógvastaðni er hann ov grýtutur og ov brattur og er yvirhøvur ikki lagdur við tí í huga, at hann á mest rationella

hátt kann gerast maskintøkur til alt vanligt bóndaarbeiði. Vit eru samdir í hesi áskoðan og vilja tilmæla, at rúmligar studningsveitingar verða latnar til uppdyrking við maskintøknum nýbrúki í huga. At brúkini yvirhøvur verða soleiðis løgd, at komast kann at og arbeiðast á teimum við tíðarhóskandi maskinamboðum, meta vit sum eina høvuðstreyt fyri øktari framleiðslu, og tað, sum hetta kemur at spara í sliti og arbeiðstíð, verður ikki smávegis.

Í samgongusáttmála landsstýrisflokkana verður sagt m.a.: «Samvinnan millum ta almennu umsitingina og stovnar innan landbúnaðarøkið verður útbygt, m.a. við at reglurnar fyri virksemi hjá royndarstøðini og jarðarráðnum verður endurskoðað.» Vit mæla til, at landsstýrið beinanvegin fer undir hetta arbeiðið frá grundini av.

Út frá tí á álitinum framførda setir ein samd landbúnaðarnevnd fram hesi bæði

A.

Uppskot
til
samtyktar.

Løgtingið samtykkir, at nýggj royndarstøð verður bygd og heitir á landsstýrið um at finna annað hóskandi øki at seta hana á, og tá hesin spurningur er greiður, at leggja málið aftur fyri løgtingið.

B.

Uppskot
til
samtyktar.

Álagt verður landsstýrinum og løgtingsins figgjarnevnd at játta árliga, til føroyskur búnaðarskúli er vorðin veruleiki, hóskandi peningaupphædd til landbúnaðarskeið í Føroyum.

Landbúnaðarnevndin, 4 mai 1977.

Vilhelm Nielsen Heðin M. Klein Johan Simonsen
Haldur Hansen Agnar Nielsen

3. viðgerð 20. mai.

§ 1 í landsstýrisins uppskoti fall við 6—0 atkvøðum, uppskotið sostatt burturdottið. Uppskot til samtyktar frá landbúnaðarnevndini vórðu samtykt: A við 17—0 atkvøðum og B við 19—0 atkvøðum.

66. Broyting í forsorgarlógini

I

Ár 1977, 10. mars, legði Jákup Lindenskov, landsstýrismaður, fram

Uppskot
til
samtyktar.

Løgtingið mælir ríkisstýrinum til at leggja fyri fólkatingið hjálagda uppskot til lóg um broyting í lóg fyri Føroyar «om offentlig forsorg (ændrede betingelser for enkepension)».

II

Uppskot
til

løgtingslóg um uppískoytisveiting til einkjur.	**lagtingslov om tillægsydelse til enker**
§ 1.	§ 1.
Veitt verður einkjum uppískoytisveiting úr landskassanum sambært reglunar í hesi lóg.	Der ydes enker tillægsydelse af landskassen efter reglerne i denne lov.
§ 2.	§ 2.
Rætt til uppískoytisveiting eigur tann einkjan, sum eigur rætt til einkjupensjón sambært § 27, stk. 1, samanber § 31 í lóg fyri Føroyar um almenna forsorg.	Ret til tillægsydelse har den enke, som har ret til enkepension i henhold til § 27, stk. 1, jvf. § 31 i lov for Færøerne om offentlig forsorg.
§ 3.	§ 3.
Uppískoytisveitingin er tann sama sum tann til eina og hvørja tíð galdandi avlamisviðbót sambært § 4 í lóg fyri Føroyar um avlamispensjón.	Tillægsydelsen svarer til det til enhver tid gældende invaliditetsbeløb efter § 4 i lov for Færøerne om invalidepension.
§ 4.	§ 4.
Uppískotisveitingin verður at lækka í mun til inntøkuna.	Tillægsydelsen nedsættes i forhold til indtægten.
2. stk. Lækkingin fer fram á	Stk. 2. Denne nedsættelse finder

sama hátt sum lækking av grundupphæddini fyri einkjupensjón.

3. stk. Lækkingin fer fram í framhald av lækkingini av grundupphæddini.

4. stk. Hava reglurnar um lækking við sær, at uppískoytisveitingin verður minni enn eitt sættipartur av størstu upphædd hennara, dettur uppískoytisveitingin burtur.

§ 5.

Uppískoytisveitingin verður umsitin av Almannastovuni og útgoldin saman við møguligari einkjupensjón.

2. stk. Reglurnar, sum eru galdandi fyri einkjupensjónina, hava eisini gildi fyri uppískoytisveitingina.

§ 6.

Landsstýrið kann áseta serligar reglur um uppískoytisveitingina.

§ 7.

Hendla lóg fær gildi fri 1. oktober 1977.

sted på samme måde som nedsættelsen af enkepensionens grundbeløb.

Stk. 3. Nedsættelsen sker i fortsættelse af nedsættelsen af grundbeløbet.

Stk. 4. Hvis reglerne om nedsættelse fører til, at tillægsydelsen bliver mindre end en sjettedel af dens største beløb, bortfalder tillægsydelsen.

§ 5.

Tillægsydelsen administreres af Almannastovan og udbetales sammen med eventuel enkepension.

Stk. 2. De for enkepensionen gældende regler gælder også for tillægsydelsen.

§ 6.

Landsstyret kan fastsætte særlige regler for tillægsydelsen.

§ 7.

Denne lov træder i kraft den 1. oktober 1977.

Viðmerkingar:

Spurningurin um pensjónsviðurskiftini hjá einkjum hevur verið havdur á lofti í løgtinginum, t.d. í løgtingsmáli nr. 22/1974: Broyting í lógunum um fólkapensjón og avlumispensjón (hækking av sosialu veitingunum), har sosiala nevndin í áliti sínum frá 18. mars 1975 heitir á landsstýrið um at arbeiða fyri, at vilkorini hjá yngri einkjum til at fáa hjálp verða eins góð og hjá teimum eldru. Landsstýrið hevur fingið tu fatan, at Føroya

Løgting og Føroya fólk ynskja, at pensjónsviðureskiftini hjá einkjum gerast betri, og hevur eisini fatað tað, ið sagt er á tingi hesum viðvíkjandi soleiðis, at ein bati verður ynsktur fyri einkjur við børnum.

Landsstýrið hevur tingast við almannamálaráðið og fort fram, at reglurnar viðvíkjandi einkjupensjón eiga at verða broyttar, soleiðis at nógv fleiri einkjur fáa rætt til pensjón, og at eisini upphæddin verður hækkað.

Viðvíkjandi upphæddini heldur landsstýrið, at tað er skeivt, at einkjupensjónin bert er tann sama sum fólkapensjónin. Høgur aldur er nakað, sum ein hvør veit kemur til ásetta tíð. Avlatispensjónin er hægri enn fólkapensjónin, og kemur tað av tí, at avlatni, sum mangan kemur óvart, kanst tú ikki búgva teg til. Sostatt eigur einkjupensjónin heldur at verða sammett við avlatispensjón enn við fólkapensjón.

Almannamálaráðið er samt við landsstýrið um, at reglurnar um einkjupensjón eiga at verða broyttar soleiðis, at tær fevna um eina og hvørja einkju við børnum undir 18 ár.

Hinvegin er almannamálaráðið ikki samt við landsstýrið um eina hækking av sjálvari einkjupensjónini, men senja er tó um, at ein føroysk uppiskoytisveiting eigur ikki at hava ávirkan á einkjupensjónina.

Landsstýrið metir báðar hesar broytingar at hava stóran týdning fyri einkjurnar og skjýtur tí upp, at forsorgarlógin verður broytt samsvarandi senjuni millum landsstýrið og almannamálaráðið, og at reglur um uppiskoytisveiting verða ásettar í løgtingslóg við heimild at rinda útreiðslurnar til hesa veiting úr landskassanum.

ad Broytingaruppskot til forsorgarlógina.

Hetta ber í sær, at treytirnar fyri einkjupensjón verða linkaðar. Sum er eigur bert (stórt sað) tann kvinnan einkjupensjón, sum er verðin einkja eftir at hon varð 45 ár.

Orðingin av viðmerkingunum er ætlað fyri fólkatingið og hevur sum fyritreyt, at málið verður samtykt í løgtinginum óbroytt. Um so verður ikki, eigur orðingin at verða broytt.

ad Uppskot til løgtingslóg.

Hetta ber í sær, at einkjur undir 62 ár við børnum, og sum ikki hava stóra inntøku, fara at eiga uppiskoytisveiting úr landskassanum. Orðingin ber í sær, at útreiðslan verður borin av landskassanum burturav (ein settingur verður ikki borin av kommununum sum annars fyri almannaútreiðslur).

Um broytingina í forsorgarlógini verður annars víst til hjálagda «Forslag til lov om ændring af lov for Færøerne om offentlig forsorg (ændrede

betingelser for enkepension» við viðmerkingum og til hjáløgdu avrit av forsorgarlógini §§ 22 - 31 við broytingum.

Um frammanfyri standandi uppskot til løgtingslóg skal verða upplýst, at avlamisviðbótin (invaliditetsheløbet), sum skotið verður upp at leggja til grund fyri uppískoytisveitingina, 1. oktober 1976 var 670 kr. um mánaðan ella 8.040 kr. um árið.

Niðanfyri sæst hvørja ávirkan uppískoytisveitingin fær hjá einkjum í ymiskum inntøkubólkum:

	Higartil			Skotið upp	
Inntøka uttanfrá einkjupensjón um árið	Grundupphædd	Pensjónsískoyti	tilsamans	Uppískoytisveiting	tilsamans
2.000	1.345	255	1.600	670	2.270
7.000	1.345	142	1.487	670	2.157
13.000	1.180	0	1.180	670	1.850
25.000	580	0	580	670	1.250
32.000	230	0	230	670	900
37.000	0	0	0	430	430
41.100	0	0	0	225	225
41.200	0	0	0	0	0

Tá skipanin skal fáast í lag, verða útreiðslur uppá umleið 10.000 kr. til programmering og umleið 15.000 kr. til úrtíðararbeiði ella tilsamans umleið 25.000 kr. Landsstýrið roknar við, at Almannastovan síðani kann umsita skipanina uttan eykaútreiðslur.

Samlaðu nettomeirútreiðslurnar av uppskotinum til broyting í forsorgarlógini og av uppskotinum til løgtingslóg um uppískoytisveiting eru mettar til 1,6 mill. kr. fyri landskassan og 0,8 mill. kr. fyri ríkiskassan.

Forslag
til
Lov om ændring af lov for Færøerne om offentlig forsørg.
(ændrede betingelser for enkepension)

I lov nr. 56 af 15. marts 1967 for Færøerne om offentlig forsørg, som ændret ved lov nr. 224 af 27. maj 1970 og lov nr. 154 af 24. april 1975, foretages følgende ændringer:

§ 1.

1. § 27, stk. 1, affattes således:

«Ret til enkepension har en enke, der har forsørgelsespligt over for et eller flere børn under 18 år.»

2. I § 27, stk. 2, udgår «nr. 2.»

3. I § 28, stk. 1, udgår 2. punktum.

4. I § 29, stk. 1, indføjes som nyt 2. punktum.

Ved indtægtsberegningen tages ikke hensyn til en eventuel tillægsydelse til enker efter hjemmestyrets bestemmelse.»

§ 2.

Stk. 1. Loven træder i kraft den 1. april 1977.

Stk. 2. Enker, der ved lovens ikrafttræden er berettigede til enkepension efter den hidtil gældende affattelse af § 27, stk. 1, bevarer retten til enkepension, sålænge de opfylder betingelserne i nævnte bestemmelse.

Bemærkninger:

Med baggrund i adskillige vedtagelser i Foroya Løgting (Færøernes Lagting) har Færøernes Landsstyre rettet henvendelse til regeringen om forbedring af forholdene for enker på Færøerne.

Begrundelsen for dette har været dobbelt. For det første er antallet af enker relativt set større på Færøerne end i Danmark, hvoraf følger et større behov for hensyntagen til deres særlige forhold. For det andet er den almindelige tankegang på Færøerne den, at enker i særlig grad bør koncentrere sig om deres børn og tage sig af dem. I Danmark / den øvrige del af riget har derimod hovedsynspunktet været, at enker burde tilskyndes til deltagelse i erhvervslivet - bl. a .for at skaffe sig kontakter udadtil,, hvilket imidlertid ikke er et problem af samme omfang på Færøerne.

Fra færøsk side har man ønsket, at forbedringer for enkerne fik to former, dels en udvidet adgang til enkepension og dels en forhøjelse af enkepensionens størrelse.

Regeringen kan tiltræde, at de særlige forhold på Færøerne motiverer en særlig regel om adgangen til enkepension. Derimod mener man ikke, at de anførte synspunkter kan berettige en betydelig ændring af niveauet for enkepensionen.

Stillet over for dette synspunkt har det færøske hjemmestyre besluttet, at der af Færøernes egne midler vil være at yde enker en særlig færøsk tillægsydelse, der alene finansieres fra færøsk side.

Nærværende lovforslag går herefter ud på at gennemføre den fra færøsk

side ønskede udvidelse af adgangen til enkepension. Samtidig foreslås gennemført regler, der sikrer, at den særlige færøske tillægsydelse til enkerne ikke påvirker størrelsen af enkepensionen.

Efter færøsk opfattelse bør det afgørende for ydelse af enkepension være, om enken har børn under 18 år, idet hensynet til børnene som oven for anført tillægges særlig stor vægt. Af denne grund er berettigelsen til enkepensionen efter forslaget begrænset til enker med børn (under 18 år).

ad § 1:

ad 1. Efter dette forslag er enhver enke berettiget til enkepension, hvis hun har et barn under 18 år. Der henvises til de generelle bemærkninger. Bestemmelsen er ufravigelig. Enker med børn over 18 år og barnløse enker må henvises til de almindelige hjælpebestemmelser i loven eller til enkepension efter dispensationsbestemmelsen i § 27, stk. 2.

Det foreslås, at kriteriet for ydelse af enkepension skal være, at enken «har forsørgelsespligt» over for børn under 18 år. Når der ikke foreslås nogen yderligere begrænsning, som eksempelvis at enken «forsørger» børn, skyldes det hensyn til klare og tydelige regler, som de interesserede har let ved at forstå. Enhver begrænsning vil forvolde administrative vanskeligheder og grænsetilfælde, hvor afgørelserne kan forekomme urimelige.

ad 2. — 3.: Redaktionelle ændringer.

ad 4. Efter dette forslag sikres, at den færøske tillægsydelse til enkerne ikke vil bevirke nedsættelse af enkepensionen (dennes grundbeløb eller pensionstillægget).

ad § 2, stk. 1:

Betingelserne for opnåelse af enkepension er efter gældende lovgivning knyttet til andre kriterier end om enken har børn. Dette forslag sigter til at sikre, at den enke, som har erhvervet ret til enkepension efter gældende regler, ikke mister denne ret.

Forslaget medfører ikke administrative udgifter for nogen statslig institution.

Statens nettoudgifter efter forslaget anslås til 0,8 mill. kr. årligt (efter niveauet pr. 1. oktober 1976). Hjemmestyrets samlede nettoudgifter anslås til 1,6 mill. kr.

Som bilag vedlægges det af Færøernes Lagting vedtagne forslag til lagtingslov om tillægsydelse til enker.

1. viðgerð 14. mars, málið beint í fíggjarnevndina, sum 15. mars legði fram hetta

Álit

Málið varð lagt fram av landsstýrinum tann 10. mars 1977 og undir 1. viðgerð 14. mars beint í fíggjarnevndina.

Landsstýrið skjýtur upp, at løgtingið samtykkir í at mæla ríkisstýrinum til at leggja fyri Fólkatingið uppskot um lóg til broyting í lóg fyri Føroyar «om offentlig forsorg (ændrede betingelser for enkepension)», og verður hetta uppskotið til løgtingslóg um uppískoytisveiting til einkjur skotið upp, at veitt verður einkjum uppískoytisveiting úr landskassanum eftir reglunum í fyriliggjandi uppskoti til lóg.

Samlaðu meirútreiðslurnar av uppskotinum til broyting í forsorgarlógini og av uppskotinum til løgtingslóg um uppískoytisveiting eru mettar til 1,6 mió. kr. fyri landskassan og 0,8 mió. kr. fyri ríkiskassan.

Fíggjarnevndin kann einmælt taka undir við uppskoti landsstýrisins.

Fíggjarnevndin, 15. mars 1977.

Hákun Djurhuus Poul Jacob Olsen Hilmar Beck
Jógvan Durhuus Signar Hansen Johs. Martin Olsen
Asbjørn Joensen

2. viðgerð 22. mars, 3. viðgerð 25. mars.

I Uppskot til samtyktar frá landsstýrinum samtykt við 25—0 atkvøðum og II uppskot til løgtingslóg um uppískoytisveiting til einkjur samtykt við 19—0.

67. Broyting í forsorgini

Ár 1977, 10. mars, legði Jákup Lindenskov, landsstýrismaður, fram

Uppskot
til
samtyktar.

Løgtingið mælir ríkisstýrinum til at leggja fyri fólkatingið hjálagda uppskot til lóg um broyting í lóg fyri Føroyar «om offentlig forsorg (udvidet adgang til hjemmehjælp m.v.)».

Viðmerkingar:

Í viðmerkingunum til hjálagda uppskot til lóg um broyting í forsorgarlógini fyri Føroyar, sum inniheldur eina formliga broyting í reglunum um røkt av sinnissjúkum og eina víðkaða heimild at veita heimahjálp til fólk, sum í heiminum ansar einum brekaðum barni undir 15 ár, er gjølla greitt frá lógaruppskotinum, grundarlagnum fyri tí og avleiðingunum av tí, og her skal sostatt bert verða víst til lógaruppskotið og viðmerkingarnar har.

Tó skal verða nevnt, at uppskotið verður mett at føra við sær útreiðslur uppá tilsamans 40.000 kr. árliga, sum verða rindaðar við 20.000 kr. av heimastýrinum og 20.000 kr. úr ríkiskassanum.

Landsstýrið hevur samtykt at leggja uppskotið fyri tingið við tilmæli.

Forslag
til
Lov for Færøerne om ændring af lov for Færøerne om offentlig forsorg.
(Udvidet adgang til hjemmehjælp m.v.)

§ 1.

I lov for Færøerne nr. 56 af 15. marts 1967 om offentlig forsorg, som ændret ved lov nr. 224 af 27. maj 1970 og lov nr. 154 af 24. april 1975, foretages følgende ændringer:

1. 1 § 14, stk. 1, udgår «sindslidende».
2. Til § 32 A, stk. 2, føjes som nyt 2. punktum:

«Der kan tillige udsendes hjemmehjælpere til lejlighedsvis aflastning

af personer, der i hjemmet passer et handicappet barn under 15 år. Det kan i medfør af stk. 4 bestemmes, at der ikke afkræves betaling for sådan hjælp.»

§ 2.

§ 1, nr. 1, træder i kraft ved lovens kundgørelse med virkning fra den 1. januar 1977.

Stk. 2. § 1, nr. 2, træder i kraft den 1. juli 1977.

Bemærkninger:

Den færøske hjemmehjælpsordning, der trådte i funktion i oktober 1973 er under stadig udvikling, men er på den anden side at anse som etableret i et sådant omfang, at en udvidelse nu kan komme på tale. Landsstyret har henvendt sig til socialministeriet med anmodning om at skabe mulighed for at udsende hjemmehjælpere til hjem med handicappede børn.

Regeringen kan tilslutte sig det færøske ønske der svarer til § 3, stk. 2, i den indtil 1. april 1976 gældende lov om husmoderafløsning og hjemmehjælp.

Den samlede udgift ved forslagets gennemførelse anslås til 40.000 kr. årlig, der afholdes med 20.000 kr. af det færøske hjemmestyre og 20.000 kr. af statskassen.

Forslaget vil ikke medføre øgede administrationsudgifter for nogen statslig institution.

ad § 1, nr. 1:

Redaktionel ændring, som følger af vedtagelsen af forslaget til ny lov for Færøerne om sygehusvæsenet, hvorefter den hidtidigt statslige forsorg for sindslidende overgår til hjemmestyret, for så vidt angår ophold på sygehus.

Samtidig ophører efter dette forslag adgangen til anbringelse i kontrolleret familiepleje og til andre former for anbringelse uden for sygehusvæsenet. Efter det oplyste har denne adgang dog ikke været benyttet.

ad § 1, nr. 2, 1. punktum:

Bestemmelsen agtes i overensstemmelse med praksis efter den i foranstående 2. afsnit nævnte bestemmelse benyttet i et omfang, der svarer til en eftermiddag hver anden uge, og kun hvor der er tale om svært handicappede børn. Hjemmehjælpen vil blive ydet af den hjemmehjælper blandt mange, som er disponibel, når hjælpen skal ydes.

ad § 1, nr. 2., 2. punktum:

Det må forventes, at Færøernes landsstyre, der i medfør af § 32A, stk. 4, nr. 3, træffer afgørelse i sådanne sager, vil bestemme, at denne form for hjemmehjælp ydes uden betaling.

ad § 2, stk. 1:

Lov for Færøerne om sygehusvæsenet er trådt i kraft den 1. januar 1977, hvad angår den psykiatriske service.

ad § 2, stk. 2:

Det må anses for rimeligt, at der gives hjemmehjælpsledelsen under landsstyrets socialforvaltning, Almannastovan, en rimelig frist til at iværksætte denne form for hjemmehjælp.

1. viðgerð 14. mars, málið beint í fíggjarnevndina, sum 15. mars legði fram hetta

Ákvæði

Málið varð lagt fram av landsstýrinum tann 10. mars 1977 og undir 1. viðgerð tann 14. mars beint í fíggjarnevndina.

Landsstýrið skjýtur upp, at samtykt verður, at løgtingið mælir ríkisstýrinum til at leggja fyri løgtingið uppskot til lóg um broyting í lóg fyri Føroyar «om offentlig forsorg (udvidet adgang til hjemmehjælp m.v.)».

Eftir lógaruppskotinum er talan um eina formliga broyting í reglunum um røkt av sinnissjúkum og eina víðkaða heimild at veita heimahjálp til fólk, sum í heiminum ansar einum brekaðum barni undir 15 ár.

Mett verður, at uppskotið førir við sær meirútreiðslur uppá tilsaman uppá kr. 40.000 árliga, sum verða rindaðar við 20.000 kr. av heimastýrinum og 20.000 kr. úr ríkiskassanum.

Fíggjarnevndin tekur einmælt undir við uppskoti landsstýrisins.

Fíggjarnevndin, 15. mars 1977.

Hákun Djurhuus Poul Jacob Olsen Hilmar Bech
Jógvan Durhuus Signar Hansen Johs. Martin Olsen
Asbjørn Joensen

2. viðgerð 22. mars, 3. viðgerð 25. mars.

Uppskot landsstýrisins samtykt við 23 0 atkvøðum.

---

68. Nýggjur útvarpssendari

Ár 1977, 10. mars, legði Finnbogi Isaksen, landsstýrismaður fram hetta

Uppskot
til

løgtingslóg um bygging av nýggjum útvarpssendara.

§ 1.
Landsstýrinum verður heimilað landskassans vegna at taka upp neyðug lán til bygging av nýggjum millumbylgjusendara til útvarpið.

§ 2.
Henda lóg kemur í gildi beinanvegin.

lagtingslov om bygning af ny radiosender.

§ 1.
Landsstyret bemyndiges til på landskassens vegne at optage nødvendige lån til bygning af ny mellembølgesender til Útvarp Føroya.

§ 2.
Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Tá útvarpið varð sett á stovn í 1957, fekk tað loyvi at nýta ein millumbylgjusendara, ið var 5 kW sterkur. Henda sendara nýtir útvarpið framvegis, men hevur síðani eisini fingið FM sendarar, ið hava útvegað góð hoyrilíkindi at kalla allastaðni í landinum. Vansin í dag er tann, at útvarpið hoyrist ikki á teimum leiðum, har føroysk skip vanliga royna.

Í fjør var millumlaudafundur í Genève um bylgjulongdir, og har vóru Føroyar umboðaðar. Eftir ynski frá landsstýrinum varð játtað útvarpinum at seta upp ein nýggjan millumbylgjusendara uppá 200 kW á 531 kHz.

Telefonverk Føroya løgtings hevur saman við «radioingeniørtjenesten» kannað møguleikarnar fyri at seta ein slíkan sendara upp. Kannað hevur verið, hvar tað er best at hava sendaran, og hava hesar kanningar verið gjørdar á Raktanga, Hvítanesi, Sand vestur, Sand suður og Sand eystur. Enn er ikki tikin støða til, hvat av hesum plássum er tað besta, men hildið verður, at Sand vestur hóskar best. Komið er til hetta úrslit m.a. til frá tí, at ein slíkur sterkur sendari eigur at liggja so langt frá øðrum sendi- og móttakarastøðum sum til ber, og at hann helst ikki skal liggja ov nær staði, har nógv fólk býr. Tann Antennuhæddin, ið tykist hóska best, er 170 m.

F.L. j. nr. 1902-53

Fyri at tryggja, at tann nýggi útvarpssendarin ikki skal steðga, sjálvt um kaðalslit verður í Skopunarfirði, er uppskot um eisini at byggja eitt eyka ravmagnsverk í Sandoynni, um antennan verður bygd har. Eitt slíkt verk verður mett at kosta 1,2 mill. kr.

Við tí nýggja sendaranum kemur útvarpið at hoyrast um meginpartin av Norðuratlantshavi. Tó kemur sendarin at verða nakað órógvaður um náttina av øðrum sendarum suðuri á meginlandinum.

Mett verður, at byggingin av nýggjum útvarpssendara kemur at kosta einar 10 mill. kr. umfram tað áður nevnda ravmagnsverkið, og umfram grundstykki til mastur og jørðnet. Rakstrarkostnaðurin er mettur til 450.000 kr. árliga. Byggitíðin er mett til 3 ella 4 ár.

1. **Samandráttur av hjálagdu frágreiðing frá**
   Post- og Telegrafvæsenet
   Radioingeniørtjenesten

   Frágreiðingin snýr seg um ætlan í samband við stovnsetan av millumbylgjustøð í Føroyum, ið skal nýtast til at varpa út radiofoni á havøkinum um oyggjarnar.

   Frekvensurin sum útvarpað verður á er 531 kHz. (hetta svarar til eina bylgjulongd uppá 565 metrar). Útvarpsmegin verður 200 kW.

   Frágreiðingin er ikki fullfíggjað, soleiðis at skilja, at hon onga endaliga støðu tekur til antennu-slag og -stødd, men í staðin vísur á ymisk antennu-sløg í mun til útbreiðslu og kostnað.
   Ei heldur tekur frágreiðingin støðu til hvar útvarpsstøðin skal standa, men vísur á ymiskar staðsetingar (5 í alt), ið tykjast at vera egnaðar til eina tílíka útvarpsstøð .

   Hesi støð eru:
   - Raktangi
   - Hvítanes
   - Sand-vestur
   - Sand-suður
   - Sand-eystur

   Staðsetingarnar eru vístar á skjali 1

   Útrokningin av jørð og rúmbylgjunum eru avmyndaðar í frágreiðingini blað 34-40. Við rættleiðingstalvunni, blað 26 og 27, kunnu hesar avmyndingar flytast, so tær koma at galda fyri fyrrnevndu støð. Út-

breiðsluformurin frá teimum 5 støðunum er vístur í frágreiðingini blað 46–48.

Frágreiðingin er ein leiðbeining til teir mongu spurningar, sum skjóta seg upp, tá ið ein tílík útvarpsstøð skal setast á stovn.

2. **Staðsetting av útvarpsstøð.**
Útvarpsstøðin eigur at verða løgd so langt burtur frá øðrum sendi- og móttakistøðum sum til ber, fyri ikki at nerva hesar. Samstundis eigur útvarpsstøðin heldur ikki at verða løgd ov nær støðum, har ið nógv fólk býr, fyri ikki at skerja teirra møguleikar at hurta eftir útlendskum útvarpsstøðum.

Út frá útbreiðsluskapinum sæst, at við at seta sendistøðina á Sand-vestur, fáa vit fevnt um størst øki, næst kemur Sand-eystur.
Tá ið hesi bæði plássini liggja meira avsiðis enn hini, ið umtalað eru, má Sand-vestur metast at verða besta og Sand-eystur næst besta plássið at seta støðina á. Hini trý økini eru ov nær upp at har ið nógv fólk býr, samstundis sum tvey av økjunum eru ov nær øðrum útvarpsstøðum. (Húsareyn og Støðlafjall).

3. **Antenna.**
Viðvíkjandi útvarpsantennu tykist ein sjálvsvingandi antennumastur at verða tann best nýtiliga.

Tann mest búskaparliga antennubæddin sýnist at verða um 170 metrar.

4. **Sendari.**
Við teirri senditíð sum útvarpið hevur í dag, um 2000 tímar árliga má ein 200 kW sendari haldast at vera nóg mikið (heldur enn 2×100 kW), av tí at núverandi útvarpsstøð er nýtulig sum eykastøð.

5. **Ravmagn til útvarpsstøð.**
Viðvíkjandi streymveiting til útvarpsstøðina upplýsur S.E.V., at teir eru førir fyri at útvega la orku, ið útvarpsstøðini torvar. Hertil skal viðmerkjast, at um slit komur á ravmagnskaðalin, ið liggur um Skopunarfjørð, eru ravmagnsverkini á oynni ikki før fyri eisini at útvega

orku til útvarpsstøðina. Umvælingartíðin fyri kaðalslit kann gerast drúgv (hálvt ár) tó her veldst um, hvussu skjótt kaðalskip kann fáast til umvælingararbeiði og um veðrið. Talan kann tí verða um at byggja eitt eyka-ravmagnsverk, ið kann útvega ta neyðturviligu orku til útvarpsstøðina, um kaðalslit skuldi bori á.

Eitt tíllíkt verk verður mett at kosta umleið 1,2 mió. krónir tá ið tað stendur liðugt.

6. **Móttøka um dagin.**
Frágreiðingin ásetur ta minst loyvdu feltstyrkjuna (E min) ið er neyðug at hava, fyri at ein vanligur móttakari (við góðari antennu) kan endurgeva, tað sum útvarpað verður, uttan at verða stórvegis órógvað av óljóði.

Á skjali 2 verða vístar tvær strikur. Úti á striku 1 hava vit E min. Fara vit longur út vil móttøkan verða órógvað av óljóði, og vilja vit, úti á striku 2 hoyra útvarpsstøðina umleið somuleiðis, sum vit í Føroyum hoyra Kalundborg radio á longbylgju. Fara vit uppaftur longur út, verður torførari at hoyra útvarpið. Tó verður mett, at við einum góðum skipsmóttakara, skuldi verði møguligt at hoyrt tohdiga vestanfyri, á leiðum ið liggja 1300-1500 km úr Føroyum.

7. **Móttøka um náttina.**
Um náttina verður móttøkan skerd sunnanfyri eina linju, sum gongur í ein útsynning og landnyrðing norðan úr Føroyum.

Skjal 3 skal vísa at innanfyri striku 1 skuldi móttøkan verið góð. Millum striku 1 og 2 er móttøkan vánalig og á miðari leið heilt ógjørlig orsakað av «fading».

Sunnanfyri áðurnevndu linju vil móttøkan bert versna longur suðureftir vit fara. Hetta kemst av, at vit nærkast útvarpsstøðum, sum liggja á fastlandinum og ið nýta sama frekvens, sum útvarpsstøðin í Føroyum. Mett verður, at norðanfyri linjuna vil verða møguligt (við einum góðum skipsmóttakara) at hoyra útvarpið 1500 – 2000 km burtur.

8. **Kostnaðarætlan**
(í túsund krónum)

Sendari	4.000	
Innlegging	350	
Eykalutir	800	
Málitól	100	5.250
Antenna	2.000	
Jørðnet	400	
Føðikaðal	250	2.650
Háspemingslinja	260	
Transformari	80	
Innlegging	60	400
Programframføring	350	
Bygningar	1.000	
Dokumentatión	150	
Vegagerð	200	1.700
Kostnaður í alt		10.000

Viðmerking: í hesi kostnaðarætlan er ikki íroknað eyka-ravmagnsverkið, ið umtalað varð undir punkt 5 (blað 3). Heldur ikki er íroknað grundøkið til mastur og jørðnet v.m. Ætlaða stødd á grundøkinum er um 100.000 m².

9. **Rakstrarætlan. (í túsund krónum)**

Manning	100
Eykalutir	100
Elnýtsla	220
Viðlíkahald	15
Ymiskt	15
Kostnaður í alt	450

Viðmerking: Kostnaðurin fyri el.megi er settur til 31 oyru fyri hvønn kWh (kilowatt-tíma).

Avskrivingar og rentur eru ikki við í kostnaðarætlanini.

10. **Tíðarætlan.**
Byggitíðin er metti at verða 3—4 ár frá tí at málið er samtykt og tit útvarpsstøðin stendur liðug.

Málið varð útsett til ólavsøku.

---

69. Ábyrgd fyri lánum til Útvarp Føroya

Ár 1977, 10. mars, legði D. P. Danielsen, landsstýrismaður, fram

løgtingsmál nr. 69/1976: Ábyrgd fyri lánum til Útvarp Føroya.

§ 1.
Landsstýrinum verður heimilað landskassans vegna at taka ábyrgd fyri upptil kr. 9.500.000,- í lánum til Útvarp Føroya til byggjan av nýggjum útvarpshúsi.

§ 2.
Henda lóg kemur í gildi beinnan vegin.

§ 1.
Landsstyret bemyndiges landskassens vegne at garantere for indtil kr. 9.500.000,- i lån til Útvarp Føroya til opførelse af nyt radiohus.

§ 2.
Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Landsstýrið hevur tann 7. mars í ár frá útvarpinum móttikið soljóðandi skriv.

«Detailprojekteringin av útvarpshúsinum er nú liðug og tilfarið til útbjóðing av teimum ymiska arbeiðunum liggur klárt.

Hjálagt verður send kostnaðarætlan dagfest 17/12-76 frá J. P. Gregoriussen, arkitekti, yvir sjálvt húsið. Sent verður eisini yvirlit yvir annan kostnað, sum er meltur av útvarpinum saman við yvirliti yvir tøkan pening og figging.

Tað framgongur av yvirlitinum at samlaði kostnaðurin av húsinum verður meltur til kr. 14.975.000 og at tað verður neyðugt við einum byggiláni uppá max. kr. 9.450.000. Tað endaliga lánið verður mett til kr. 6000.000, sum landsstýrið hervið verður biðið um at veita landskassaveðhald fyri.»

Landsstýrið skal vísandi til frammanfyri leggja uppskotið fyri tingið við tilnæli.

1. viðgerð 16. mars, málið beint í figgjarnevndina, sum 5. mai legði fram hetta

Álit

Málið varð lagt fram av landsstýrinum tann 10. mars 1977 og við 1. viðgerð tann 16. mars 1977 beint í figgjarnevndina.

Landsstýrið hevur skotið upp, at tað landskassans vegna verður heimilað at taka ábyrgd fyri láni upp til kr. 9.500.000 til Útvarp Føroya til bygging av nýggjum útvarpshúsi.

Av viðmerkingunum frá landsstýrinum framgongur, at samlaði kostnaðurin av húsinum verður mettur til 14.975.000 kr., og at tað verður neyðugt við einum byggiláni uppá max. 9.450.000 kr. Tað endaliga lánið verður mett til 6 milj. kr., sum landsstýrið verður biðið um at veita landskassaveðhald fyri.

Figgjarnevndin hevur havt fund við Dánjal P. Danielsen, landsstýrismann, og við stjóran fyri Útvarp Føroya, Niels Juul Arge. Á fundinum varð serliga umrøddur spurningurin um rakstrarætlan fyri húsið og nýtsluna av tøkum rúmum. Tað varð upplýst, at gólvøkið í ætlaða húsinum er 2.200 m² fyri allar triggjar hæddirnar. Til sammeting kann upplýsast, at Norðurlanda húsið er 2.000 m². Útvarpsstjórin upplýsti, at útvarpstænastan kann rekast við fí manning, ið nú er tøk, men er lagt upp fyri at rúm verður fyri meiri fólki. Umrætt varð, hvat tað stóra studiorúmið kann nýtast til, og varð har serliga víst á sjónvarpsspurningin. Samlaða

grundøkið í samband við nýggja útvarpshúsið er uppá 11.600 m², og er ætlanin at hava hitaverksmiðstøð saman við Norðurlanda húsinum.

Ein samd fíggjarnevnd kann taka undir við uppskoti landsstýrisins um, at landsstýrið fær heimild til landskassans vegna at taka ábyrgd fyri láni, sum skilað til § 1 í lógaruppskotinum.

Hákun Djurhuus, Poul Jacob Olsen, Ililmar Bech, Johs. Martin Olsen og Asbjørn Joensen skila til, at avvarðandi myndugleikar eiga at ansa eftir, at ikki ov nógv almenn byggiarbeiði verða sett í verk í senn, soleiðis at tørvur verður fyri arbeiðsmegi í ávísum tíðarskeiði á sama plássi verður ov krevjandi.

Fíggjarnevndin, 5. mai 1977.

2. viðgerð 10. mai, 3. viðgerð 11. mai.

Uppskot landsstýrisins samtykt við 21—0 atkvøðum.

---

70. Ríkisborgarrættur

Ríkisumboðið hevur spurt, um landsstýrið hevur nakað at viðmerkja til, at lóg nr. 3 frá 10. juni 1976 um veiting av ríkisborgararætti verður lýst at galda fyri Føroyar.

Landsstýrið loyvir sær at leggja málið fyri løgtingið við viðmæli.

J. Lindenskov
landsstýrismaður

/ J. P. Ellendersen

Málið beint í lógarnevndina, sum 9. mars 1977 legði fram hetta

F.L. j. nr. 508-3

Álit

Sami lógarnevnd mælir tinginum til at samtykkja:
Donsk lóg nr. 3 frá 10. juni 1976 um ríkisborgararætt verður lýst at galda í Føroyum.

Uppskot landsstýrisins vurð samtykt við 22—0 atkvøðum.

---

71. Ríkisborgararættur

Ríkisumboðið hevur spurt, um landsstýrið hevur nakað at viðmerkja til, at lóg nr. 5 frá 17. november 1976 um veiting av ríkisborgararætti verður lýst at galda fyri Føroyar.
Landsstýrið loyvir sær at leggja málið fyri løgtingið við viðmæli.

J. Lindenskov
landsstýrismaður

/ J. P. Ellendersen

Málið beint í lógarnevndina, sum 9. mars 1977 legði fram hetta

Álit

Sami lógarnevnd mælir tinginum til at samtykkja:
Donsk lóg nr. 5 frá 17. november 1976 um ríkisborgararætt verður lýst at galda í Føroyum.

Uppskot landsstýrisins samtykt við 22—0 atkvøðum.

F.L. j. nr. 508-3

72. Studningslán til fiskiskip

Ár 1977, 14. mars, setti Jógvan Sundstein ,løgtingsmaður hendu fyrispurning til Jákup Lindenskov, landsstýrismann:

Eftir hvat, ið mær er upplýst, hevur landsstýrið til viðgerðar fleiri umsóknir um studningslán til fiskiskip. Hesar umsóknir hava ligið langa tíð í landsstýrinum, og vil eg tí spyrja landsstýrismannin um, nær umsøkjararnir kunnu vænta svar?

Viðmerkingar:

Í 1976 vórðu gjørdir fleiri sáttmálar um bygging av skipum. Teir, ið gjørdu hesar sáttmálar, hava søkt um studningslán sambært higartil galdandi skipan. Umsóknirnar eru fleiri mánaðar gamlar, og menn hava ferð eftir ferð rykt landsstýrið eftir svari, men higartil uttan úrslit. Studningslánini eru ein týðningarmikil partur av figgjanini, og byggisáttmálarnir eru gjørdir í áliti á, at tann skipan, sum hevur staðið við í nærum 20 ár, framvegis hevur verið galdandi. Einki er kunngjørt um, at broytingar eru gjørdar hesum viðvíkjandi, og heldur ikki hava umsøkjararnir fingið nakað skrivligt aftur frá landsstýrinum um, at studningslániskipanin er broytt.

Vónandi vil landsstýrismaðurin greiða frá hesum viðurskiftum og gera sítt til, at málini verða avgreidd.

Jákup Lindenskov, landsstýrismaður, gav 25. mars hetta svar upp á fyrispurning frá Jógvan Sundstein:

Tað er rætt, at landsstýrið hevur havt til viðgerðar umsóknir um studningslán til fiskiskip, og at hesar umsóknir hava ligið eina tíð í landsstýrinum; kortini hevur landsstýrið nú tikið støðu til skipaíløgur í øllum hesum umsóknum uttan kanska tveimum, sum ikki hava verið búnar til støðutakan.

Tær flestu av hesum umsóknum komu inn stutt eftir ársskiftið ella beint frammanundan.

Orsøkin til, at landsstýrið ikki avgreiddi umsóknirnar til bygging av nýggjum fiskiskipum, er fyri mesta partin tann, at støðan í dag má sigast at vera óviss um, hvørji slog av fiskiskipum vit eiga at miða ímóti at byggja hereftir.

Eisini hevur landsstýrið í hesum viðfangi havt samráðing við Búskaparráðið, og er landsstýrið av teirri áskoðan, at varisliga má farast fram við

nýløgum, nú óvissa er um stoðu okkara á fremmandum fiskileiðum, og um hvussu fiskimynstrið verður í heimasjógvi.

Landsstýrið hevur avgjørt, at tær umsóknir, sum ikki eru komnar inn áðrenn 20. mars 1977 verða ikki avgreiddar, fyrr enn løgtingið hevur havt høvi til at viðgera løgusporningin og sporningin um umskipan av studningslánum til lán. Hinaftrat ikki at veita studningslán til glasfipurbátar og heldur ikki kurstapslán til innflyting av eldri bátum. Eisini ásetan av reglum um innflytan av brúktum fisktørum, (aldur, góðsku o.a.t.).

Uppskot um broyting í lógini um endurnýgging av fiskiskipaflotanum kemur fyri tingið, so skjótt landsstýrið hevur uppskot greitt at leggja fram.

---

73. Fyribilsskipan um loyvi til skip frá EEC til fiskiskap undir Føroyum

Ár 1977, 18. mars, setti Foroya landsstýri fram

Uppskot
til
samtyktar.

Lugtinginum heimilar landsstýrinum til at fyriseta tær í hjálagda skjali nevndu reglur um loyvi til fiskifør frá limalondunum í EEC burtursið frá Danmark í tíðarskeiðinum 22. mars til og við 30. apríl 1977.

Viðmerkingar:

Undir samráðingunum í Bryssel 23. februar 1977 millum Foroyar og EEC varð frá føroyskari síðu boðað frá, at føroysku myndugleikarnir stutt eftir 1. mars í ár vildu fyriseta neyðugar reglur fyri at verja og rætta upp stovnarnar serliga av toski og hýsu, og at hesar reglur vildu bera í sær minnandi skerjing av fiskiskapinum hjá EEC-londum av toski og hýsu.

Sambært grein 2 í sáttmálanum um sínámillum fiskirettindi Foroyar

EEC, sum varð undirskrivaður í Bryssel 15. mars 1977, skulu partarnir samráðast, áðrenn teir áseta loyvdu veiðinøgdirnar og veiðiøkini fyri fiskiskip hjá hvørjum øðrum.

Slíkar samráðingar fóru fram í Bryssel 15. mars 1977 millum landsstýrið og EEC-nevndina. Partarnir samdust ikki um ta skipan, sum landsstýrið legði fram. EEC-nevndin helt skipanina vera ov viltgangandi, men tók í fyrstu syftu uppskot landsstýrisins til eftirlektar fyri nærri at umhugsa spurningin. Landsstýrið lovaði, áðrenn tær ætlaðu reglurnar í síðsta lagi 18. mars 1977 vórðu endaliga orðaðar, at umhugsa ley sjónarmið, sum EEC-nevndin hevði sett fram. Reglurnar, sum landsstýrið er sinnað at senda til EF- nevndina, eru viðlagdar sum skjal.

Talan er um eina fyribilsskipan, sum skal galda frá 22. mars til og við 30. apríl 1977. Orsøkin er fyrst og fremst, at EEC ikki fyrr enn kanningar, sum fiskifrøðingar gera av teim ymisku fiskastovnunum innanfyri fiskimark EEC's og sum verða til taks um 1. mai í ár, heldur seg hava tað neyðuga grundarlagið fyri støðutakan um kvotur og annað fyri árið 1977, herímillum kvotur til lond, sum eru uttanfyri EEC. Harnæst metir landsstýrið tað vera ráðligt at vinna stundir til at fáa til vega gjølligari heildarmynd, enn tað ber til í løtuni, av teimum viðurskiftunum, sum hava týðning fyri eina haldgóða støðutakan til fiskiáhugamál føroyinga sum heild.

Landsstýrið metir tað bráðneyðugt við tiltøkum fyri at verja toska- og hýsustovnin og vil tí seta umrøddu skipan í verk frá 22. í hesum. Veiðan av toski og hýsu undir Føroyum var í 1974 51.000 t, í 1975 60.000 t og í 1976 67.000 t, meðan sáttmáli frá 18. desember 1973 (kassasáttmáli) fyrisetur, at veiðan av toski og hýsu tilsamans ikki máti vera størri enn 52.000 t. Ovfiskingin í 1975 stóðst einans av útlendskari veiðu. Av ovfiskingini í 1976 uppá 15.000 t veiddu útlendsk skip 7.000 t (harav EEC-skip 5.000 t), meðan føroysk skip veiddu 8.000 t av ovfiskingini. Ovfiskingin má minkast munandi, og má fremmandi fiskiskapurin undir Føroyum bera neyðugu minkingina.

Landsstýrið metir tað vera neyðugt at avmarka fiskiskapin hjá EEC-skipum av toski og hýsu í umrødda tíðarskeiði 22. mars til og við 30. apríl í ár við fyri tað fyrsta at áseta eina munandi minking av veiðinøgdini í apríl samanborið við sama mánaða í 1976, tá EEC-skip veiddu umleið 2.600 t av toski og hýsu. EEC-nevndin kann velja imillum, at loyvda veiðinøgdin í apríl verður 1.250 t ella at samlaða nøgdin fyri mánaðarnar januar-apríl ikki verður størri enn 60% av veiðuni í sama tíðarskeiði í 1976. Hetta svarar til, at loyvda veiðan fyrstu 4 mánaðarnar verður 5.100 t, harav 2.600 t vóru veidd í januar og februar.

Fyri tað næsta metir landsstýrið tað neyðugt, at avmarka ley øki, sum EEC-trolarar mugu veiða í við at vaksa um øki 1 og øki 4, steingja leiðina millum øki 1 og øki 4 út til 16 fjórðingar, (nú nevnt øki 6) steingja Føroya

Banka eins og øki 2 ímillum 12 og 14 fjórðingar í apríl. Frammanundan er stongt í øki 3 á Munkagrunninum. Landsstýrið metir, at rímligt er at loyva 15 smærri trolarum (í mesta lagi 130 føtir langir) at veiða í stongda partinum av øki 2 og í øki 6.

Nýggjar tingingar verða við EEC-nevndina um hálvan apríl við tí máli at fáa í lag semju um sínámillum fiskiskap fyri árið 1977. Veiðan hjá føroyskum skipum á EEC-økinum higartil í 1977 verður roknað uppí kvoturnar fyri árið 1977, tá tær verða fastlagdar. Somuleiðis við veiðuni hjá EEC-skipum undir Føroyum.

Skjal

Fyritilsskipan
fyri
fiskirættindi hjá skipum heimahoyrandi og skrásett í EEC til fiskiskap á føroyska fiskiøkinum í tíðarskeiðinum 22. mars til og við 30. apríl 1977.

1. Samlaða loyvda veiðunøgdin av toski og hýsu, frokuð hjáveiðu ,hjá EEC-skipum verður fyri tíðarskeiðið 1.—30. apríl
   (a) 1250 tons (óslægdur fiskur), ella
   (b) 60% av samlaðu veiðunøgdini hjá hesum skipum fyrstu 4 mánaðarnar í 1976.

2. Í tíðarskeiðnum 22. mars til og við 30. apríl 1977 verður ikki loyvt EEC-skipum at veiða við troli á fylgjandi økjum:
   (a) Øki 1: 24 fjórðingar frá galdandi grundlinju millum 0° rattvísandi úr Eiðiskolli og 90° rattvísandi úr Bispinum.
   (b) Øki 2: 14 fjórðingar frá galdandi grundlinju millum 90° rættvísandi úr Bispinum og 90° rættvísandi úr Akrabergi.
   (c) Øki 3: 24 fjórðingar frá galdandi grundlinju millum 150° rættvísandi úr Akrabergi og 190° rættvísandi úr Akrabergi, og 18 fjórðingar frá galdandi grundlinju millum 190° rættvísandi úr Akrabergi og 240° rættvísandi úr Ørnunipuni.
   (d) Øki 4: 24 fjórðingar frá galdandi grundlinju millum 240° rættvísandi úr Trøllhøvda og 305° rættvísandi úr Mýlingi.
   (e) Øki 5: Faroya Banki innan fyri 200 m dýpdarlinjuna.
   (f) Øki 6: 16 fjórðingar frá galdandi grundlinju millum 305° rættvísandi úr Mýlingi og 0° rættvísandi úr Eiðiskolli.

3. I oki 2 og oki 6 kann eftir umsókn loyvast upp til 15 navngivnum trolarum, sum ikki mugu vera longri enn 130 føtur, at fiska ávikavist millum 12 og 14 fjórðingar og 12 og 16 fjórðingar. Um fráboðan verður givin í rímligari tíð, kann um hálvan apríl veiðiloyvi gevast til aðrar trolarar í staðin fyri teir, sum í fyrstu syftu fingu veiðiloyvi.

1. viðgerð 18. mars, málið beint í marknaðarnevndina, sum 18. mars legði fram hetta

Álit

Málið varð við 1. viðgerð beint í marknaðarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur býtt seg í eina meirilutu og tveir minnilutar.

Meirilutin (J. Fr. Øregaard, Poul Jacob Olsen, Hákun Djurhuus og Jógvan Sundstein) mælir til at samtykkja uppskotið frá landsstýrinum óbroytt.

Minnilutin (Hilmar Kass og Jógvan Olsen) er samdur við meirilutan í tí, at tað er neyðugt at skerja útlendska fiskiveiðu á Føroya grunni, men metir, at niðurskurður frá 2.600 tonsum í apríl 1976 til 1.250 tons sama mánað í ár er so nógv, at tað ikki verður lætt at halda fram við sínamillum fiskivinnusáttmálum millum hesi lond — serstakliga Bretland, men tá løgmaður, ið hevur ført samráðingarnar, greiðir frá, at hann hevur fingið ta fatan av teimum, hann hevur havt samráðingar við, at so verður ikki, setur minnilutin einki broytingaruppskot til stk. 1.

Tá loyvt verður landi ella londum at veiða ávísa mongd, er tað ikki rætt at skerja veiðimøguleikarnar søleiðis, at tað ikki er gjørligt at veiða loyvdu mongdina á figgjarligum grundarlag.

Hjá einum landi sum Føroyar, sum er fiskivinnutjóð burturav, er tað alt avgerandi, at loyvdir fiskimøguleikar á fjarleiðum geva lønsama úrtøku.

Tann skerjing í veiðioki, sum er í uppskotinum, ger tað trupult at fiska loyvdu mongdina við Føroyar á figgjarligum grundarlag.

Minnilutin metir tað vera rættari at friða Føroya Banka fyri allari trolveiði aprll mánaða. Tá er tað ikki beinleiðis eitt tiltak móti útlendingum.

Minnilutin setur fram fylgjandi

Broytingaruppskot

Stk. 2. d) aftaná Trøllhøvda «og 270° rættvísandi úr Mykinesi»
e) Føroya Banki innanfyri 200 m dýpdarlinjuna verður friðaður fyri allari trolveiðu.
f) gongur út.
Stk. 3. gongur út.

Minnilutin (Erlendur Patursson) førir fram:

Við teim grundum, sum førdar vóru fram við 1. viðgerð mælir minnilutin frá at samtykkja uppskot landsstýrisins og setur fram hetta

Uppskot
til
samtyktar.

Løgtingið samtykkir fyri fyrst at loyva EEC-veiði, tó ikki eftir toski og hýsu, á landleiðini uttan fyri 30 fj. úr beinum grundlinjum og uttan fyri 200 m dýpdarlinju á Føroya banka.

2. viðgerð 18. mars.

Uppskot landsstýrisins til samtyktar varð samtyk (við 22—1 atkvøðum. Punkt 1 í fyribilsskipan samtykt við 24 ja-atkvøðum, punktini 2 og 3 samtykt við 22—1 atkvøðum. Broytingaruppskot frá minniluta í marknaðarnevndini (Hilmar Kass og Jógvan Olsen) fall við 8—1 atkvøðum, og broytingaruppskot frá minniluta (Erlendi Patursson) fall við 7—0 atkv.

74. Prísansarar

Ár 1977, 18. mars, legði Haldor Hansen, løgtingsmaður, fram hetta

Uppskot
til
samtyktar.

Álagl verður landsstýrinum at seta 3 fastar prísansarar og syrgja fyri, at neyðugur peningur verður settur á figgjarlógina til hetta endamál.

Viðmerkingar:

Fleiri ferðir áður, og seinast 7. februar 1976, hevur Føroya Arbeiðarafelag vent sær til Føroya Landsstýri og kravt, at teir seta fastur prísansarar. Hetta hevur verið hildið at verða neyðugt fyri at tryggja hóskandi prísir og ikki minst fyri at fyribyrgja ti vaksandi misáliti viðvíkjandi tilfarinum, sum prístalið verður útroknað eftir.

Fleiri felog hava síðani tikið undir við hesum kravi og hava, í hvussu so er nøkur av teimum, sent tað skrivliga til landsstýrið. Hesi felog eru:

Føroya Fiskimannafelag, Starvsmannafelagið, Brúkarafelagið, Føroya Handverkarafelag, Havnar Arbeiðsmannafelag, Havnar Arbeiðskvinnufelag, Klaksvíkar Arbeiðsmannafelag, Klaksvíkar Arbeiðskvinnufelag og møguliga onnur, sum vit ikki vita við vissu.

Eisini kann vísast á, at landsstýrið einaferð hevur kunngjørt, at fastir prísansarar vóru settir, men varð hetta ongatíð til veruleika.

Vóna vit sostatt, at uppskotið verður viðgjørt við vælvild.

Vegna Føroya Arbeiðarafelag leggja vit uppskotið á ting við viðmæli.

1. viðgerð 23. mars, málið beint í lógarnevndina.

(Sí løgtingsmál nr. 64).

75. Søla av gomlu telefonstøðini á Tvøroyri

Ár 1977, 22. mars, legði Finnbogi Isaksen, landsstýrismaður, fram

Uppskot
til

løgtingslóg um sølu av ogn landskassans matr. nr. 477 av Froðbiar bygd.

§ 1.

Landsstýrinum verður heimilað at selja ogn landskassans, matr. nr. 477 av Froðbiar bygd, gamla telefonstøðin.

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.

lagtingslov om salg af landskassens ejendom nr. 477 af Froðbiar bygd.

§ 1.

Landsstyret bemyndiges til at sælge landskassens ejendom, matr. nr. 477 af Froðbiar bygd, den gamle telefonstation.

§ 2.

Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Telefonverkið hevur gjørt avtalu við Tvøroyrar býráð um sølu av gomlu telefonstøðini á Tvøroyri fyri kr. 40.000,-.

Fyri at ognarskiftið kann fara fram, er tað neyðugt, at landsstýrið fær lógarheimild til søluna, tí landskassin er eigari av ognini, jbr. løgtingsmál nr. 51/1958, Løglingstíðindi bls. 101.

1. viðgerð 23. mars, málið beint í figgjarnevndina sum 29. mars legði fram hetta

Álit

Landsstýrið hevur lagt hetta málið fram 22. mars 1977, og við 1. viðgerð varð tað beint í figgjarnevndina.

Landsstýrið skjýtur upp, at tað fær heimild landskassans vegna at selja gomlu telefonstøðina á Tvøroyri til Tvøroyrar býráð fyri 40.000 kr.
Figgjarnevndin kann einmælt taka undir við uppskoti landsstýrisins.

2. viðgerð 29. mars.

3. viðgerð 29. mars.

Uppskot landsstýrisins samtykt við 14 0 atkvøðum.

---

76. Rutusiglingin til Suðuroyar

Ár 1977, 22. mars, setti Sverre Midjord, løgtingsmaður, henda fyrispurning til Finnboga Isaksen, landsstýrismann:

Er landsstýrið vitandi um tað óskil, ið ræður við rutusiglingini til Suðuroyar, har «Dúgvan» ferð eftir ferð ikki fer fyrrenn tímar aftaná ásettu fráfaringartíðina?
Vil landsstýrið syrgja fyri, at hetta óskil verður steðgað beinanvegin?

Motivering:

Meðan «Smyril» er burturi til eftirlits í Danmark, hevur «Dúgvan» verið sett inn í rutuna til Suðuroyar. Hetta hevur ført við sær, at ferðingartíðin er minnandi økt, men tað, sum er ótolandi, er tað, at «Dúgvan» als ikki heldur sína lýstu fráfaringartíð, men ferð eftir ferð liggur ferðafólk upp í 2 tímar umborð á «Dúgvuni» og bíðar eftir at liðugt er at ferma farnagóðs.
T.d. var undirritaði við «Dúgvuni» hósdagin 17. mars 1977. Dúgvan skuldi eftir ferðaætlanini fara av Havnini kl. 18.30, men sigldi ikki fyrrenn klokkan var 20.20, t.v.s. 10 min. undir 2 tímar seinri enn ásett. Orsøkin var søgd at vera, at «Dúgvan» skuldi hava farm við til Suðuroyar. Hetta óskil hevur verið, síðani «Smyril» fór á verft í Frederikshavn 21. februar.

Um «Dúgvan» skal verða sett inn í Suðuroyarsiglingina, meðan «Smyril» er í uttanlandssigling, má krevjast, at «Dúgvan» fer til ásetta tíð.

Einasta farleiðin til Suðuroyar er strandfarasiglingin – tað vil siga «Smyril» ella «Dúgvan» – tað má vera eitt rimligt krav, at hesin «landsvegur» er opin til ásettu tíðir, t.v.s. eftir ferðaætlanini.

1. viðgerð 28. mars.

Fyrispurningurin svaraður 28. mars av landsstýrismanninum soleiðis:

Landsstýrið er vilandi um, at Dúgvan hevur ikki verið før fyri at røkt tann ferðafólka- og farmaflutning, ið er á Suðuroyarrutuni nú, eftir at Smyril hevur røkt ferðasambandið í 2 ár. Ferðaætlanin hevur ivaleyst eisini verið ov trong.

Hesin trupulleiki er burtur nú, eftir at Smyril er komin aftur í sigling.

---

77. Samráðingar við USA um fiskirættindi

Ár 1977, 22. mars, setti Kj. Molin, løgtingsmaður, fram hetta

Uppskot
til
samtyktar.

Løgtingið áleggur landsstýrinum at taka upp samráðingar í fyrstu syftu við tann amerikanska ambassadørin í Danmark viðvíkjandi fiskirættindi føroyinga innanfyri 200 fjórðinga fiskimark teirra.

Viðmerkingar:

Landsstýrið hevur nú havt samráðingar við flest øll lond, ið føroyingar noyðast at fáa fiskirættindi frá. Tað, ið eina mest stendur á, er at fáa rættindi til okkara langfarafiskiflota. Tí er at royna at finna fiskiøki, ið

tey størru skipini kunnu veiða á. Her er eitt uppskot, ið miðar ímóti at fáa loyvi at fiska í Norðuratlantshavinum frá Kanada og suðureftir. Tað skuldi ligið fyri at røkt saltfiskaveiði við teimum saltfiskaskipum, ið vit hava eins og ísfskaskipunum av teimum størru.

Vónandi tekur tingið væl undir við hesum uppskoti.

1. viðgerð 23. mars, málið beint í marknanðrnevndina.

---

78. Friðing av ávísum føroyskum fiskileiðum

Ár 1977, 24. mars, legði Jógvan Olsen, løgtingsmaður, fram hetta

Uppskot
til
samtyktar.

Løgtingið samtykkir at friða eisini fyri føroyskari trolveiðu í apríl mánaða 1977 Føroya Bank uinnan fyri 200 m dýpdarlinjuna og øki 4 eftir kassasáttmálanum sunnan fyri 270° rættvísandi úr Mykinesi.

Viðmerkingar:

Føroya løgting hevur samtykt at forbjóða útlendskari trolveiðu á meginpartinum av okkara landleið í apríl mánaða 1977. Nú er tað soleiðis, at teir ymisku veiðuháttirnir ikki hóska saman, og fyri at skapa betri arbeiðsmøguleikar fyri teir, sum royna við stillstandandi veiðskapi, og fyribyrgja, at vit ikki oyðileggja veiðireiðskap hjá hvørjum øðrum, verður hetta uppskot sett fram.

1. viðgerð 25. mars, málið beint í fiskivinnumevndina, sum 29. mars legði fram soljóðandi

Álit

Málið varð framlagt 23. mars 1977 av Jógvan Olsen, løgtingsmanni, og við 1. viðgerð beint í fiskivinnunevndina.

Tað, ið málið snýr seg um, er friðing móti føroyskari trolveiðu á Føroya banka og øki 4 eftir kassasáttmálanum sunnan fyri 270° rættvísandi úr Mykinesi.

Meirlutin (Poul J. Olsen, Vilhelm Nielsen og Johan Simonsen) førir fram:

Av tí at landsstýrið arbeiðir við hesum máli, heldur meirlutin, at málið eigur at vera sent landsstýrinum, og setur samsvarandi hesum

Uppskot
til
samtyktar.

Málið verður sent landsstýrinum.

Minnilutin (Jógvan Olsen) førir fram, at út frá tí, ið sagt varð við 1. viðgerð, vil hann hava atkvøðugreiðsluna soleiðis at atkvøðast kann fyri øki 4 og Føroya banka hvør sær, og setur fram soljóðandi

Uppskot
til
samtyktar.

a. Løgtingið samtykkir at friða eisini fyri føroyskari trolveiðu í apríl mánaða 1977 Føroya Banka innan fyri 200 m dýpdarlinjuna.
b. Eisini samtykkir løgtingið at friða fyri føroyskari trolveiðu øki 4 eftir kassasáttmálanum sunnan fyri 270° rættvísandi úr Mykinesi.

Uppskotið frá Jógvan Olsen, løgtingsmanni, fall við punkt a. 7—0 atkvøðum, b. 3—0 atkvøður.

Uppskotið frá meirlutanum í fiskivinnunevndini fall við 13—0.

79. Læknasetan í Suðuroy

Ár 1977, 24. mars settu løglingsmenninir Sverri Midjord, Jákup Mortensen, Hilmar Beck og Ove Mikkelsen heinda fyrispurning til ríkisumboðsmannin:

Hvør úthúgving verður krevd fyri yvirlæknarnar á Suðuroyar sjúkrahús, og hvør tryggjar, at teir settu hava neyðuga úthúgving?

Viðmerkingar:

Tá Útvarp Føroya í gjárkvøldið bar tíðindi um, at fyribilssetti yvirlæknin við Suðuroyar sjúkrahús, Arnara Wijenayake, varð frásettur, loyva vit okkum tingmenn fyri Suðuroyar valdomi at seta ríkisumboðsmanninum sum formanni í sjúkrahússtýrinum fyri Suðuroyar sjúkrahús omanfyri standandi fyrispurning. Tá tað nú ljóðar, at fleiri umsóknir eru innkomnar til yvirlæknastørv á Suðuroyar sjúkrahúsi, vilja vit krevja trygd fyri, at leir sum verða settir nú og í framtíðini hava eins góða úthúgving sum leir yvirlæknar, ið settir verða við liknandi sjúkrahús í hinum partinum av ríkinum.

25. mars svaraði ríkisumboðsmaðurin:

Hr. formand! De gældende regler for ansættelse som ledende læge ved et for offentlig regning drevet sygehus findes i § 14 i anordning nr. 35 af 26. februar 1935 for Færøerne om udøvelse af lægegerning, udstedt med hjemmel i lov nr. 72 af 14. marts 1934 om udøvelse af lægegerning.

I henhold til denne bestemmelse må der i statslige og kommunale lægestillinger kun ansættes autoriserede læger, og besættelse af sådanne stillinger sker efter forudgående offentligt opslag. Inden besættelsen af en stilling som ledende læge skal der indhentes en udtalelse fra sundhedsstyrelsen, om, hvilke ansøgere der er kvalificerede til vedkommende stilling. Forinden denne udtalelse afgives, skal sundhedsstyrelsen indhente en sagkyndig vurdering af ansøgernes kvalifikationer. Til at afgive den sagkyndige vurdering udnævnes 2 på 4 år valgte råd, hvert med 3 medlemmer; det ene råd vælges af Dansk kirurgisk Selskab, og det andet vælges af Dansk Selskab for intern Medicin.

Udvalget foretager en vurdering i det konkrete tilfælde, og der er ikke opstillet generelle egnethedskriterier, der gælder for alle sygehuse. Dog må det som minimumskrav regnes, at den pågældende har B-autorisation samt gjort tjeneste i nogle år på sygehusafdelinger inden for sit speciale. B-autorisationen opnås, når en læge efter afslutningen af sin uddannelse

i to år har gjort tjeneste på forskellige specialafdelinger, der er anerkendte uddannelsessteder. For udenlandsk uddannede læger sammenholder § 14-udvalget deres uddannelse med den danske og vurderer på dette grundlag.

Når vurderingen afgives over ansøgere til en bestemt stilling, forekommer del, at én ansøger, der erklæres kvalificeret til én stilling, godt kan erklæres for ikke at være kvaificeret till en anden.

Det kan for en ordens skyld tilføjes, at vikarer ansættes uden denne ansættelsesprocedure.

---

80. Ríkisborgararættur

Ár 1977, 25. februar, legði Jákup Lindeuskov, landsstýrismaður, soljóðandi skriv fram:

Ríkisumboðið hevur spurt, um heimastýrið hevur nakað at viðmerkja til, at lóg nr. 2 frá 29. mars 1974 um veiting av ríkisborgararætti verður lýst at galda fyri Føroyar.

Landsstýrið loyvir sær at leggja málið fyri løgtingið við viðmæli.

Málið beint í lógarnevndina, sum 25. mars legði fram hetta

Álit

Lógarnevndin mælir løgtinginum til at lóg nr. 2 frá 29. mars 1974 um veiting av ríkisborgararætti verður lýst at galda fyri Føroyar.

Uppskot landsstýrisins samtykt við 19 0 atkvøðum.

---

81. Skipan millum Noreg og Føroyar um sínámillum fiskirættindi

Ár 1977, 25. mars, legði Atli P. Dam, lagmaður, fram soljóðandi

Uppskot
til
samtyktar.

Løgtingið samtykkir ta í hjálagda skjali gjørdu fyribilsskipan millum Noreg og Føroyar um sínámillum fiskirættindi.

Viðmerkingar:

Tann 4. mars 1976 góðkendi løgtingið (tingmál nr. 49/1976) eina skipan millum Noregs stjórn og Føroya Landsstýri um sínámillum fiskirættindi og eina fyribilsskipan fyri framhaldi av «fiskiskapinum hjá báðum pørtum aftaná 1. mars í ár og til annað verður avgjørt». Hetta bar í sær, at fiskiskapurin hjá báðum pørtunum á fiskiøkinum hjá hvørjum øðrum aftaná 1. mars 1976 skuldi fara fram eftir teimum reglum, sum hjá báðum pørtum vóru galdandi upp undir nevnda dag. Fongurin skal roknast sum forskot uppá tær veiðunøgdir (kvotur), sum partarnir seinri skulu tilluta hvørjum øðrum.

Tann 22. mars 1976 fóru fram í Keypmannahavn samráðingar millum eina norska sendinevnd og eina føroyska.

Frá norskari síðu lóku hesir lut í samráðingunum:

Gunnar Gundersen, departementsstjóri, Kjell Råsok, varastjóri, G. Sætersdald, fiskifræðingur, Per Mielle, stjóri, Johan J. Toft, form. Norges fiskerlag, Bjarne Saunäs, skrivari Møre og Romsdal fiskersalgslag.

Frá føroyskari síðu:

Atli P. Dam, løgmaður, E. Kallsberg, skrivstovustjóri, J. S. Joensen, statsbiologur, G. Gunnarsson, fulltrúi, Mortan Johannesen, skipari, Osmund Justinussen, skipari.

F.L. j. nr. 1500-4-2

Samráðingarnar snúðu seg um tær nøgdir og/ella skipatal, sum partarnir í 1977 vildu loyva at veiða á fiskiøkinum hjá hvorjum øðrum. Úrslitið gjørdist tann sum skjal viðlagda frásogn, ið er váttað hann 23. mars 1977 av oddamonnunum í samráðingarnevndunum.

Av tí, at óvissa í løtuni er um, hvussu heildarmynndin av fiskirættindunum í Barentshavinum og í Norðsjónum kemur at taka seg út, eru partarnir sundir um seinri í hesum árinum, tá ið hesi viðurskifti roknast at liggja greiðari, at samráðast av nýggjum.

Høvuðsinnihaldið í skjalinum er, at partarnir komu til sættis um kvotur fyri síuámillum fiskiskap av botnfiski av toskaslagi, men fyri annan fisk gjørdist úrslitið einvisar frásagnir frá báðum portum.

Viðvíkjandi botnfiski var **semja um:**

(a) at føroyskum fiskiførum verður loyvt at veiða 8– 10.000 tons í norska fiskiøkinum uttan fyri meginlandið Noreg. tó soleiðis at veiðan í mesta lagi má verða 7.500 tons av toski umfram 1000 tons av hýsu sum hjáveiða. Harumfram kunnu føroysk skip veiða sum vanligt á leiðunum við Svaldbard,

(b) at norskum fiskiførum verður loyvt at veiða á føroyska fiskiøkinum 8 – 10.000 tons av longu, brosnu, blálongu og upsa. Uppí hesi verður teimum loyvt at fáa sunnervi nøgdir av toski sum hjáveiðu.

Harnæst eru partarnir sandir um, at nýggjar samrøður, sum nevndar eru frammanundan, skulu miða ímóti, at síuámillum veiðan av botnfiski skal verða 10– 12.000 tons.

Tær **einvísu frásagnirnar** snúgva seg um føroyska fiskiskapin á norskum sjóøki, á Norðsjónarleiðunum og norska fiskiskapin av svartkjaft undir Føroyum.

Her er fyri tað fyrsta talan um, at Noreg loyvir føroyskari veiðu av makreli upp til 15.000 tons og framhald av veiðu av idnaðarfiski í sama mun sum higartil.

Harumfram gevur Noreg tilsagn um at tingast um møguligan føroyskan part av sildaveiðuni á norska sjóokinum, um bannið fyri sildafiskiskap í Norðsjónum verður avtikið.

Fyri tað annað verður frá føroyskari síðu loyvt upp til 20 norskum fiskiførum at veiða svartkjaft á fiskiøki Foroya.

Umseting **Skjal**

Frásogn
av samráðingum
millum føroyskar og norskar myndugleikar í Keypmannahavn
tann 22. mars 1977 um sínamillum fiskirættindi í 1977.

Samráðingar fóru fram í Keypmannahavn tann 22. mars 1977 millum umboð fyri føroyskar og norskar myndugleikar um loyvi til ávikavist føroysk fiskifør at veiða í norskum sjógvi og norsk fiskifør at veiða innan fyri Føroyska fiskimarkið.

Partarnir samdust um:

1. Føroyskum fiskimonnum verður í 1977 loyvt at veiða 8–10.000 tons av botnfiski á norska búskaparliga økinum norðan fyri 62. Breiddarstig, av hesum 7.500 tons av arktiskum toski í norska meginlandsøkinum. Veiðan av hýsu sum hjáveiða í toskafiskiskapinum verður avmarkað til 1.000 tons.

Føroyski fiskiskapurin í Svaldbard-økinum skal ikki økjast, men ætlast at halda fram sum vanligt hevur verið.

2. Norskum fiskiførum verður í 1977 loyvt at veiða 8–10.000 tons í tí føroyska fiskiøkinum. Fiskiskapurin skal verða longu-, brosnu-, upsa- og blálonguveiða. Toskur kann í smærri nogdum vera uppí sum hjáveiða.

Partarnir vóru harumframt samdir um at tingast um viðurskiftini undir petti 1 og 2 seinni í ár út frá teimum veruligu veiðumøguleikunum á Svaldbard-økinum, heildarmyndini av fiskirættindunum hjá 3. loudum í Barentshavinum og tí endaliga úrslitinum av sovjettisk-norsku samráðingunum um hetta økið.

Endurskoðanin eigur at miða móti eini javnvág í sínamillum veiðuni av botnfiski uppá 10–12.000 tons.

Partarnir góvu harafturat hesar einvisu fráboðanir:

3. Viðvíkjandi føroyskum fiskiskapi á norska fiskiøkinum sunnan fyri 62. breiddarstig verður sum ein fyribilsskipan frá norskari síðu givið loyvi til:

(a) at veidd verða upp til 15.000 tons av makreli, og at brislingaveiða heldur áfram sum vant

(b) at idnaðarfiskiskapur (nebbasild, hvítingshróður, o.t.) kann halda fram sum vant

(c) í sambandi við møguligari avtoku av banninum fyri veiðu av sild í Norðsjóarøkinum skal støða takast til eina møguliga kvotu í ti norska fiskiøkinum.

Samráðingar skulu fara fram seinni í ár, tá ið viðurskiftini viðvikjandi Norðsjóarøkinum, serliga mótvegis EEC, eru meira avklárað.

4. Frá føroyskari síðu verður loyvt upp til 20 norskum fiskiførum at luttaka í svartkjaftaveiðuni á økinum undir Føroyum.

Keypmannahavn, tann 23. mars 1977.

váttað:
sign. Atli P. Dam

váttað:
sign. G. H. Gundersen

1. viðgerð 28. mars, málið beint í marknaðarnevndina, sum 28. mars legði fram hetta

Álit

Málið varð lagt fram av landsstýrinum tann 25. mars 1977 og við 1. viðgerð tann 28. mars beint í marknaðarnevndina.

Skotið verður upp, at løgtingið samtykkir ta í hjálagda skjali gjørdu fyrilitsskipan millum Noreg og Føroyar um sínamillum fiskirættindi.

Samráðingar fóru fram í Keypmannahavn 22. mars 1977 millum føroyskar og norskar myndugleikar.

Fundarfrágreiðingarnar eru váttaðar 23. mars 1977.

Tá vissa mí er um fiskirættindi í Barentshavinum og í Norðsjónum, er seinja um framhaldandi samráðingar, tá nevndu viðurskifti eru greiðari.

I. Um botnfisk av toskaslagi eru avtalaðar kvotur

a. **Føroysk fiskifør** á norskum fiskiøki 8 – 10.000 tons, tó mest 7.500 tons av loski og 1.000 tons av hýsu sum hjáveiðu. Við Svalbard veiða sum áður.

b. **Norsk fiskifør á føroyskum** fiskiøki 8 – 10.000 tons av lougu, brosmu, blálongu og upsa. Toskur í smærri nøgdum verður rokuaður sum hjáveiða.

Við nýggjar samráðingar verður miðað ímóti 10 – 12.000 tons.

II. Einvísar frásagnir:
a. Føroysk veiða á norskum sjóøki, á Norðsjóarleiðum.
b. Norsk veiða við Føroyar eftir **svartkjafti.**

ad a: **Makrelveiða** 15.000 tons og framhaldandi ídnaðarfiskiskapur. Sildaveiða á norskum sjóøki um loyvi verður givið.
ad b: Veiðuloyvi til 20 norsk skip eftir svartkjafti.

Marknaðarnevndin kann einmælt taka undir við uppskoti landsstýrisins til samtyktar.

Uppskotið framt.

Uppskot landsstýrisins samtykt við 15—0 atkvøðum.

---

82. Hækking av minstuløninni og minstaforvinninginum

Ár 1977, 28. mars, legði Petur Reinert, landsstýrismaður, fram soljóðandi

Uppskot
til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um minstuløn og annan stuðul til fiskivinnuna.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 69 frá 26. september 1974 um minstuløn og annan stuðul til fiskivinnuna verða gjørdar hesar broytingar:

lagtingslov om ændring i lagtingslov om mindsteløn og anden støtte til fiskerierhvervet.

§ 1.

I lagtingslov nr. 69 af 26. september 1974 om mindsteløn og anden støtte til fiskerierhvervet foretages følgende ændringer:

1. 2. punktum í § 2 verður orðað soleiðis:

«Er eingin tilíkur sáttmáli, er treytin fyri minstuløn at mynstrað er eftir sáttmála millum viðkomandi reiðara ella skipaeigara og viðkomandi yrkisfelag.»

1. 2. punktum i § 2 formuleres således:

«Såfremt en sådan overenskomst ikke foreligger, er det en betingelse for mindstelønn, at der er mønstret i henhold til overenskomst mellem vedkommende reder eller ejer af skibet og vedkommende fagforening.

2. § 3, 1. stk., 2. punktum, jfrt. Løgtingslóg nr. 28 frá 21. mai 1975, verður orðað soleiðis::

«Aftarat minstulønini verður veitt í viðbót 500 kr. um mánaðin.»

2. § 3, stk. 1, 2. punktum, jfr. lagtingslov nr. 28 af 21. maj 1975, formuleres således:

«Til mindstelønnen ydes i tillæg 500 kr. om måneden.»

3. Í § 4 A verður talið «125» broytt til «135».

3. I § 4 A ændres tallet «125» til «135».

4. Sum nýtt 2. stk. til § 4 A verður sett:

«Minstiforvinuingurin verður lækkaður við 3,75 kr. fyri hvørji 3 stig, prístalið er omanfyri 100. Fellur prístalið niður um 100, verður eingin prístalsviðgerð. Dýrtíðarviðgerðin fer fram hvonn ársfjørðing eftir prístalinum 1. í ársfjórðinginum.»

1. Som nyt 2. stk. til § 4 A indsættes:

«Mindsteindtægten forhøjes med 3,75 kr. for hver 3 point, pristallet overstiger 100. Falder pristallet under 100, finder ingen pristalsbehandling sted. Dyrtidsreguleringen finder sted hvert kvartal efter pristallet den 1. i kvartalet.»

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi 1. apríl 1977.

§ 2.

Denne lov træder i kraft 1. april 1977.

Viðmerkingar:

ad. 1. Treytin fyri minstuløn, tá eingin høvuðssáttmáli er.

Treytin fyri at fáa minstuløn er, at mynstrað er eftir sáttmála millum Føroya Reiðarafelag og viðkomandi yrkisfelag. Tó sigur lógin eisini:

«Er eingin tilíkur sáttmáli, skal tann lonaravtala, sum fyriliggur millum viðkomandi reiðara (skipseigara) og manningina ella part av manningini, sendast lønjavningargrannunum til noteringar, áðrenn mynstrað verður.»

Reglan varð sett í lógina í 1969, og varð hon ætlað sum ein gongd leið, har eingin sáttmáli er. Hóast reglan hevur staðið sína royna í mongum

førum, so hevur hon í summum førum givið trupulleikar, tí illa gongst at fáa menn at yvirhalda ásettu treytirnar, sum t.d. at sáttmáli skal gerast fyri hvønn einstakan fúr. Fylgjan er tí, at hóast menn kundu komið undir minstuløn, verða teir avvislir, tí ikki er mynstrað eftir reglunum. Spurningurin hevur eisini verið til viðgerðar í nevndini hjá lonjavningargrunninum, og har hevur nevndin tikið undir við, at reglurnar um mynstring eiga at gerast so liðiligar, at ikki er neyðugt at koma út í teir trupulleikar, sum í veruleikanum hava verið av hesum.

Føroya Fiskimannafelag hevur heitt á landsstýrið um at fáa reglurnar broyttar soleiðis sum landsstýrið nú skjýtur upp.

ad 2. Hækking av minstulonini.

Í einsljóðandi skrivi dagfest 16. februar 1977 til løgtingið og til landsstýrið hevur fiskimannafelagið skotið upp, at minstalonin verður hækkað.

Felagið sigur, at strembað hevur verið eftir, at minstalonin ikki liggur undir mánaðarlønini hjá einum arbeiðsmanni við vanligum arbeiðsdegi. Í løtuni er minstalonin 4.005 kr. pr. m. Timalonin hjá einum arbeiðsmanni er 23,57 kr., sum við 42,5 tíma viku og 4,3 viku um mánaðin gevur 4.307 kr.

Felagið mælir til, at minstalonin verður 5.000 kr.

Minstaløn er seinast hækkað, tá ið prístalsviðgerðin er undantikin, 15. juni 1975 við 200 kr., samtykt av løgtinginum í apríl mánaða 1975.

Arbeiðsmenn gjørdu 2-ára sáttmála frá 1. mai 1975 og fingu 1,15 kr. pr. tíma og pr. 1. mai 1976 1,00 kr. afturat.

Til samanmetingar er niðanfyri skilað til, hvør minstaløn og arbeiðsmannaløn hevur verið ávís tíðarskeið:

Minstaløn:

1/4 75	3.474 kr.
1/7 75	3.690 - (inkl. 200 kr.)
1/1 77	4.005 - -

Arbeiðsmannaløn	**pr. t.**	**pr. mánaða**
1/4 75	19,75 kr.	3.576 kr.
1/5 75	20,72 - -	3.787 - -
1/7 75	20,77 - -	3.796 -
1/1 77	23,57 -	4.307 -

Eftir hesum hevur minstaløn ligið um 100 kr. undir mánaðarlønini hjá einum arbeiðsmanni pr. 1. apríl og pr. 1. juli 1975, tá hava fiskimenn fingið 200 kr. eyka (frá 15. juni) og arbeiðsmenn 1,15 kr. eyka (pr. 1. mai).

At munurin nú er um 300 kr. kemst av lí eini krónuni arbeiðsmenn fingu pr. 1. mai 1976.

Eftir uppskotinum verður viðbótin hækkað við 300 kr. um mánaðin úr 200 kr.

ad 3 og 4. Minstiforvinningurin.

Minstiforvinningurin kom inn í lóggávuna frá 15. juni 1975 við 125 kr. um dagin og hevur staðið óbroyttur síðani.

Landsstýrið heldur, at hesin stuðul eins og minstalønin eigur at vera undir dýrtýðarviðgerð.

Nú skotið er upp at hækka minstulønina við 300 kr. um mánaðin ella við 10 kr. um dagin, verður mælt til, at minstiforvinningurin verður hækkaður tilsvarandi.

1. viðgerð 28. mars, 2. viðgerð 29. mars, 3. viðgerð 29. mars.

Uppskot landsstýrisins samtykt við 15—0 atkvøðum.

---

83. Forboð móti laksaveiðu

Ár 1977, 28. mars, legði Petur Reinert, landsstýrismaður, fram hetta

Uppskot
til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um fiskiveiðu á landleiðini.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 12 frá 10. mars 1964 um fiskiveiðu á landleiðini verður í § 3 sett sum nýtt 4. stk.:

«Veiða eftir laksi er bert loyvd,

lagtingslov om ændring i lagtingslov om fiskeri på fiskeriterritoriet.

§ 1.

I lagtingslov nr. 12 af 10. marts 1964 om fiskeri på fiskeriterritoriet indsættes i § 3 som nyt stk. 4:

«Fiskeri efter laks er kun tilladt,

um landsstýrisins loyvi er fingið frammanundan.»

§ 2.

Henda lóg fær gildi beinanvegin.

såfremt der forinden er indhentet tilladelse hertil fra landsstyret.»

§ 2.

Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Veiða av laksi undir Føroyum hevur sammanborið við annan fiskiskap verið av ógvuliga litlum týdningi. Hugsast kann tó, at týdningurin verður størri, nú fiskimarkið er flutt út.

Eins og onnur lond hava gjørt tað á okkara leiðum og á øðrum leiðum við, heldur landsstýrið tað vera neyðugt at laksurin er undir eftirliti og regulering og mælir tí til, at loyvi frá landsstýrinum er neyðugt til henda fiskiskap.

1. viðgerð 29. mars.

Málið beint í Fiskivinnunevndina, men seinni útsett til ólavsøku.

---

84. Brennioljustudningur

Ár 1977, 28. mars, legði Petur Reinert, landsstýrismaður, fram

Uppskot
til

løgtingslóg um brennioljustudning til fiskiskip.

§ 1.

Løgtingslóg nr. 40 frá 6. mai 1976 um brennioljustudning til

lagtingslov om brændselsolietilskud til fiskerskibe.

§ 1.

Lagtingslov nr. 40 af 6. maj 1976 om brændselsolietilskud til fisker-

F.L. j. nr. 1539-2-1

Løgtingstíðindi 1976 A — 42.

fiskiskip verður eisini at galda fyri tíðarskeiðið 1. apríl 1977 til 31. mars 1978, tó soleiðis at markið fyri at studningurin lækkar verður broytt frá 71,5 oyru til 80 oyru.

§ 2.

Henda lóg fær gildi beinnan vegin.

skibe gælder også for perioden 1. aprit 1977 til 31. marts 1978, dog således at grænsen for, at tilskudet reduceres, ændres fra 71,5 øre til 80 øre.

§ 2.

Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Studningsskipanin fer úr gildi ultimo mars 1977, jhr. løgtingsmál nr. 38/1976.

Landsstýrið hevur givið løgtinginum lyfti um at leggja málið aftur fyri løgtingið áðreun 1. apríl 1977.

Oljustudningurin er veittur soleiðis:

1. mai 1975 til 31. mars 1976: 12 oyru fyri liturin, at lækka við 1 oyra fyri hvørt oyra niðanfyri 67,5 oyru.

1. apríl til 31. december 1976: 16 oyru fyri liturin, at lækka við 1 oyra fyri hvørt oyra niðanfyri 71,5 oyru .

1. januar til 31. mars 1977: sama skipan sum fyri tíðarskeiðið 1. apríl til 31. december 1976.

Prislegan nevndu tíðarskeið hevur verið henda:

april	1975:	.....	67,5 oyru fyri liturin
mars	1976:	.....	84,5 — — —
mai	1976:	.....	80,0 — — —
august	1976:	.....	84,0
januar	1977:	.....	81,5 — — —
4. mars	1977:	.....	84,0 — — —

Oljufelagini meta, at eingin hækking verður beinanvegin, t.v.s. fyrsta mánaðin. Hækkingin í januar í ár av ráoljuprísinum er ikki enn sligin fult ígjøgnum. Tá hálvt ár er farið, kann tað hugsast, at prisurin hækkar nøkur oyru, kanska 3—4 oyru.

Broytingin í mun til galdandi skipan er, at markið fyri, at studningurin lækkar er óbroytt frá 71,5 oyru til 80 oyru.

Ársnýtslan er 50.000 tons.

1. viðgerð 28. mars, málið beint í fíggjarnevndina, sum 29. mars legði fram hetta

Álit

Tað er landsstýrið, sum hevur lagt málið fram 28. mars 1977 og varð tað við 1. viðgerð beint í fíggjarnevndina.

Fíggjarnevndin hevur viðgjort málið og hevur býtt seg í ein meirilutu og ein minnilutu.

Meirilutin (Hákun Djurhuus, Haldur Hansen, Hilmar Beck, Jógvan Durhuus, Signar Hansen og Asbjørn Joensen) tekur undir við uppskoti landsstýrisins.

Minnilutin (Johs. M. Olsen) er av leirri áskoðan, at vegna tann fyrimun, ið trolbátar fáa í brennioljustudningunum, eigur ein studningur at verða veittur til agnútreiðslur, t.d. 1,00 kr. pr. kg. og setur sostatt fram soljóðandi broytingaruppskot til landssýrisuppskotið.

Sum nýggj § 2 verður sett

§ 2.	§ 2.
Veitt verður í agnstudningi 1,00 kr. pr. kg. Nærri reglur hesum viðvíkjandi verða at áseta av landsstýrinum.	I agntilskud ydes 1,00 kr. pr. kg. Nærmere regler herom fastsættes af landsstyret.

§ 2 í uppskotinum verður § 3.

Uppskot landsstýrisins samtykt við 14—0 atkvøðum.

85. Bráfongis stuðul til flaka- og saltfiskaframleiðslu

Ár 1977, 28. mars, legði Petur Reinert, landsstýrismaður, fram hetta

Uppskot
til

løgtingslóg um leingjan av løgtingslóg um bráðfongis stuðul til flaka- og saltfiskaveiðu.

§ 1.

Løgtingslóg nr. 41 frá 6. mai 1976 um bráðfongis stuðul til flaka- og saltfiskaveiðu verður framlongd soleiðis, at lógin eisini hevur gildi fyri allar túrar byrjaðir í 1977, sjálvt um veiðan verður landað aftaná 1. januar 1978.

§ 2.

Henda lóg fær gildi beinanvegin.

lagtingslov om forlængelse af lagtingslov om midlertidig støtte til filét- og saltfiskfiskeri.

§ 1.

Lagtingslov nr. 41 af 6. maj 1976 om midlertidig støtte til filét- og saltfiskfiskeri forlænges således, at loven også gælder for alle ture påbegyndt i 1977, selv om fangsten landes efter 1. januar 1978.

§ 2.

Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Í løgtingsmáli nr. 23/1976 legði landsstýrið fyri løgtingið uppskot um at leingja bráðfongis stuðulin til flaka- og saltfiskaveiðu soleiðis, at stuðulin eisini kom at galda fyri feir túrar, ið byrjaðir eru í 1976, men har veiðan verður landað í 1977. Uppskotið varð samtykt.

Bráðfongis stuðulin verður eins og vanligi stuðulin latin manningini.

Føroya Fiskimannafelag søkir í skrivi dagfest 16. februar bæði til landsstýrið og løgtingið um, at studningsskipanin verður galdandi eisini fyri árið 1977. Felagið motiverar umsóknina við, at flestu av hesum skipum gera langar túrar, vinnumøguleikarnir í langfaraveiðu eru skerdir, vinnuiugurin hjá fleiri er ikki rimiligur, serliga hjá garnaskipum, og útlitið fyri, at saltfskaprísirnir fara at hækka er ikki lað besta, eftir seinastu upplýsingunum eru prísirnir falnir.

Stuðulin hevur verið hesin:

Fiskaflak	kilaskorið utlan skrædu	annað flak
5/5-75 — 12/5-76	24 oyru	19 oyru
1/4-76 seinasta túr 1976	15 oyru	12 oyru

Saltfiskur	snøri, snella, trol, lína, garn	
5/5-75 — 15/2-76	18 oyru	32 oyru
1/4-76 seinasta	trol	annað
túr 1976	11 oyru	20 oyru

Verður landað í freamandari havn verður studningurin hálvur av 88% av veiðuni.

Sallfiskalandingar í 1976 vóru 9.000 tons,
Flakalandingar sama árið vóru 1.200 tons.

1. viðgerð 28. mars, málið beint í fíggjarnevndina.
2. viðgerð 29. mars, 3. viðgerð 29. mars.

Uppskot landsstýrisins samtykt við 15—0 atkvøðum.

---

86. Regulering av útróðrastudninginum

Ár 1977, 28. mars, legði Petur Reinert, landsstýrismaður, fram hetta

Uppskot
til

løgtingslóg um fyribils avmarking í reguleringini av studninginum til avreiðing av feskum fiski.

§ 1.

Fyri tíðarskeiðið 1. apríl 1977 til 31. august 1977 verður § 4, 1. stk. í løgtingslóg nr. 69 frá 26. september 1974 um minstuløn og

lagtingslov om foreløbig afgrænsning i reguleringen af tilskudet til indhandling af fersk fisk.

§ 1.

For perioden 1. april 1977 til 31. august 1977 ændres § 4, stk. 1 i lagtingslov nr. 69 af 26. september 1974 om mindsteløn og anden

annan stuðul til fiskivinnuna broytt soleiðis, at studningurin til avreiðing av feskum fiski ikki kemur niður um 15 oyru fyri kg.

§ 2.

Henda lóg fær gildi beinan vegin.

sløtte til fiskeriet således, at tilskudet til indhandling af frisk fisk ikke bliver mindre end 15 øre pr. kg.

§ 2.

Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

I løgtingsmáli nr. 26/1976 legði landsstýrið fyri løgtingið uppskot um fyri tíðarskeiðið 1. oktober 1976 til 31. mars 1977 at broyta studningsskipanina til avreiðing av feskum fiski soleiðis at studningurin ikki kom niður um 15 oyru fyri kg. Sum grundgeving gav landsstýrið, at inntøkurnar hjá hesum partinum av fiskiflotanum í mun til inntøkuleguna hjá fólki annars eru soleiðis, at upprunaliga botnmarkið 15 oyru fyri studninginum átti at verða sett í gildið aftur fyri avmarkað tíðarskeið.

Studningurin verður latin fiskimonnunum.

Við avreiðingarprísinum í dag skuldi studningurin, um einki botnmark var, verið 12 oyru.

Landsstýrið heldur, at somu umstøður tala fyri, at botnmarkið verður galdandi enn eitt avmarkað tíðarskeið.

Samlaðu landingarnar í Føroyum í 1976 av feskum fiski, kruvdur við høvdi var 62.000 tons.

1. viðgerð 28. mars, málið beint í fíggjarnevndina.

2. viðgerð 29. mars, 3. viðgerð 29. mars.

Uppskot landsstýrisins samtykt við 14—0 atkvøðum.

87. Troling innanfyri 12 fjórðingar

Ár 1977, 28. apríl, legði Petur Reinert, landsstýrismaður, fram soljóðandi

Uppskot
til

løgtingslóg um troling innanfyri 12 fjórðingar.

§ 1.
Troling innanfyri 12 fjórðingar úr grundlinjunum kann bert fara fram eftir reglum ásettar av landsstýrinum.

§ 2.
Ólógligur fiskiskapur og brot móti teimum av landsstýrinum ásettu reglum koma undir bót og konfiskatión eftir § 5, 1. stk. í løgtingslóg nr. 12 frá 10. mars 1964 um fiskiveiðu á landleiðini.

§ 3.
Henda lóg kemur í gildi beinanvegin.

lagtingslov om trawling indenfor 12 sømil.

§ 1.
Trawling indenfor 12 sømil fra basislinierne er kun tilladt efter bestemmelser fastsat af landsstyret.

§ 2.
Ulovligt fiskeri og brud på de af landsstyret fastsatte bestemmelser straffes med bøde og konfiskation i henhold til § 5, stk. 1 i lagtingslov nr. 12 af 10. marts 1964 om fiskeri på fiskeriterritoriet.

§ 3.
Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Troling á landleiðini innanfyri 12 fjórðingar varð upprunaliga viðgjørd í frágreiðing frá Fiskirannsóknarstovuni «Fiskiroyndir 2», har mælt var til at geva 6-8 bátum loyvi, undir eftirliti at brúka trol innan fyri 12 fjórðingamarkið einar 3-4 mánaðar á sumri, fyri at veiða sløg, sum ikki fingust við øðrum reiðskapi.

Tann troling, sum kom, fylgdi ikki hesum, men er varðin ein toskahýsufiskiskapur (74% í 1976) sambært frágreiðing frá Fiskirannsóknarstovuni 1976.

Útrokningar sýna, at frá einum fiskifrøðiligum sjónarmiði er trolingin, sum hon nú fer fram til ógagns fyri stovnin og ger at minni kemur burtur úr í vekt av hesum báðum nevndu stovnum. (Ummæli frá Fiskirannsóknarstovuni dagsett 3. 3. 1977).

Hóast fastar avtalur ikki eru gjørdar langt fram í tiðina, er tað eyðsæð at vit í ár fáa víðari ræsir uttan fyri 12 fjórðingar hjá føroyskum førum á sumri. Gongdin hevur verið í summartrolingini, at talið av teimum stóru útróðrarbátunum er vaksið númandi, og samstundis hava hesir bátar í størri og størri mun royndt uttan fyri 12 fjórðingar serliga vestan fyri Mykines. Støddarbýti og slagið hevur á hesi leið yvirhovur verið betri enn nærri landi.

Hesi viðurskifti benda á, at førvurin fyri summartroling innanfyri 12 fjórðingar er minni í ár enn árini frammanundan og at fiskifroðiligar grundir bera á sama bógvin. Troling innanfyri 12 fjórðingar eigur fyrst og fremst at fara fram á leiðum, har flatfiskur er at fáa. Av tí, at fiskimynstrið undir Føroyum er í støðugari broyting, verður hildið rættast at bíða við ásetan av nágreiniligum forskriftum um troling innanfyri 12 fjórðingar til myndin helst um 1. mai gevur eitt betri grundarlag fyri støðutakan. Summartrolingin innan fyri 12 fjórðingar fer fram eftir heimild frá Føroya landsstýri og undir eftirliti frá Fiskirannsóknarstovuni.

1. viðgerð 29. apríl, málið beint í fiskivinnunevndina, sum 2. mai legði fram hetta

Álit

Málið varð framlagt av landsstýrinum og varð við 1. viðgerð beint í fiskivinnunevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur í fyrsta lagi býtt seg í tríggjar minnilutar.

Minnilutin (Poul J. Olsen og Signar Hansen) kann ikki taka undir við uppskoti landsstýrisins, við tað at hetta uppskotið helst kemur at føra við sær, at bert eitt avmarkað tal av bátum kemur at fáa trolloyvi, og eisini tí, at ongar leiðir eru fastlagdar, hvar ið trolast kann. Av teimum royndum, sum gjørdar eru, hevur tað vístseg, at lann royndartroling, sum fiskirannsóknarstovan hevur havt, í mongum førum hevur nervað smábátaútróður meira enn summartrolingin á ávísum leiðum, ivaleyst tí at ongar leiðir vóru fastlagdar, so útróðrarmenn vistu, hvar trolbátarnir vóru.

Harnæst heldur minnilutin, at mangir av teimum bátunum, sum hava trolað inn ímóti 6 fjórðingum eru so smáir, at um teir fara út um 12 fjórðingar, har tað í mongum førum er djúpari vatn, so verða veiðimoguleikarnir hjá teimum so nógv skerdir, at ívasamt er, um teir hava nakrun moguleika í hesi vinnuni, og soleiðis sum viðurskiftini eru á okkara leiðum, heldur minnilutin, at henda støddin av bátum hevur smáar moguleikar við øðrum veiðiháttum í summartíðini.

Við hesum viðmerkingum mælir minnilutin til at framleingja lógina frá 21. mai 1975 um trolveiðu á landleiðini til at galda fyri 1977, tó soleiðis at § 2 í tí gomlu lógini dettur burtur.

Ein annar **minniluti** (Vilhelm Nielsen og Jógvan Olsen) kann heldur ikki taka undir við uppskoti landsstýrisins og førir fram, at troling á hesum leiðum lekur nógvan smáan fisk hæði av hýsu og toskastovninum, og samtíðis tað, sum fiskifrøðingar vísa á, so fer fram ein ovveiða av hesum báðum stovnum, hetta bendir á, at vit eiga at bera so í handi, at vit ikki veiða hesar stovnar niður, og serstakliga at ansa eftir í fann mun, tað letur seg gera ikki at veiða fiskin, áðrenn hann er vaksin, og tí eiga vit at vera varnir við at loyva ov nógva troling innan fyri 12 fjórðingar, hin vegin eru tað fiskasløg, sum bert kunnu veiðast við troli, og tað hevur verið loyvt mannum at trola innanfyri 12 fjórðingar nú í fleiri ár við víðari og víðari ræsum, tað eru sostatt nógvir sum hava lagt um til hendan fiskiskap, og gjørt stórar ílogur, og hevði ein alt ov brádlig avmarking komið teimum illa við. Út frá hesum framførda heldur minnilutin, at troling innan fyri 12 fjórðingar ikki eigur at vaksa, men heldur at minka, og skal sostatt mæla til, at trolað verður eftir sama reglum í 1977 sum í 1975 og 1976 við teimum broytingum, at tíðin verður stytt við tilsamans einum mánaða við einum hálvum mánaða í hvorjum endanum.

Minnilutin (Poul J. Olsen og Signar Hansen) setur fram soljóðandi

Uppskot
til

Løgtingslóg um trolveiðu á landleiðini.	**Lagtingslov om fiskeri med trawl på fiskeriterritoriet.**
§ 1.	§ 1.
Landsstýrinum verður heimilað at geva fiskiførum 55 br. reg. t. til støddar og minni loyvi til trolveiðu á landleiðini í tíðarskeiðinum 15. mai til 15. september 1977 báðar dagar iroknaðir á hesum portum av landleiðini innanfyri 12 fjórðingar úr grundlinjuntum, jfr. viðlagda kort:	Landsstyret bemyndiges til at meddele fiskefartøjer på 55 br. reg. t. og mindre tilladelse til fiskeri med trawl på fiskeriterritoriet i tiden fra 15. maj til 15. september 1977 begge dage medregnet på disse områder af fiskeriterritoriet indenfor 12 sømil fra grundlinierne, jfr. vedlagte kort:

1. Uttanfyri 6 fjórðingar úr landi millum tvær linjur, onnur drigin úr Settorva 62° 23,6' N. 6° 33,0' W. rættvísandi norðan og hin úr Bispinum 62° 20,5' N. 6° 14,0' W. rættvísandi 68°.

2. Uttanfyri 6 fjórðingar úr landi millum tvær linjur, onnur drigin úr Skoruni (Syðritangi) 62° 10,5' N. 6° 26,5' W. rættvísandi austan og hin úr Borðuni (vitanum) 61° 56,8' N. 6° 37,5' W. rættvísandi 117°.

3. Uttanfyri 6 fjórðingar úr landi millum tvær linjur, onnur drigin úr Akrabergi 61° 23,8' N. 6° 40,0' W. rættvísandi 230° og hin úr Ørnanípuni 61° 38,7'N. 6° 58,2' W. rættvísandi 230°.

4. Uttanfyri grundlinjuna millum tvær linjur onnur drigin úr Trollhøvda 61° 55,0' N. 6° 57,0' W. rættvísandi 230° og hin úr Dragasundi (Vágoy) 62° 04,5' N. 7° 24,3' W. rættvísandi 230°.

5. Uttanfyri 8 fjórðingar úr landi millum tvær linjur onnur drigin úr Snoppuni 62° 15,1' N. 7° 13,7' W. rættvísandi 315° og hin úr Mykineshólmi (vitanum) 62° 06,0' N. 7° 40,5' W. rættvísandi 315°.

§ 2.

Fyri troling á ikki loyvdari leið galda straffireglurnar í løgtingslóg nr. 12 frá 10. mars 1964 um fiskiveiðu á landleiðini.

§ 3.

Henda lóg hevur gildi í árinum 1977.

1. Udenfor 6 sømil fra land mellem to linier, den ene trækkes fra Settorva 62° 23,6' N. 6° 33,0' W. retvisende nord og den anden fra Bispinum 62° 20,5' N. 6° 14,0' W. retvisende 68°.

2. Udenfor 6 sømil fra land mellem to linier den ene trækkes fra Skoruni (Syðritangi) 62° 10,5' N. 6° 26,5' W. retvisende øst og den anden fra Borðuni (fyret) 61° 56,8' N. 6° 37,5' W. retvisende 117°.

3. Udenfor 6 sømil fra land mellem to linier, den ene trækkes fra Akrabergi 61° 23,8' N. 6° 40,0' W. retvisende 230° den anden fra Ørnanípan 61° 38,7' N. 6° 58,2' W. retvisende 230°.

4. Udenfor basislinien mellem to linier den ene trækkes fra Trøllhøvda 61° 55,0' N. 6° 57,0' W. retvisende 230° den anden fra Dragasundi (Vágoy) 62° 04,5' N. 7° 24,3' W. retvisende 230°.

5. Udenfor 8 sømil fra land mellem to linier den ene trækkes fra Snoppan 62° 15,1' N. 7° 13,7' W. retvisende 315° den anden fra Mykineshólmi (fyret) 62° 06,0' N. 7° 40,5' W. retvisende 315°.

§ 2.

For trawling på et ikke tilladt område gælder straffebestemmelserne i lagtingslov nr. 12 af 10. marts 1964 om fiskeri på fiskeriterritoriet.

§ 3.

Denne lov har gyldighed i året 1977.

Minnilutin (Vilhelm Nielsen og Jógvan Olsen) lekur undir í uppskotinum frá minnilutanum (Poul J. Olsen og Signar Hansen), tó soleiðis, at tíðarskeiðið 15. mai til 15. september í § 1 verður broytt til: 1. juni til 31. august.

Minnilutin (Johan Simonsen) mælir til at samtykkja uppskot landsstýrisins óbroytt.

2. viðgerð 4. mai, 3. viðgerð 11. mai.

§ 1 í landsstýrisins uppskoti fall við 4—0 atkvøðum, uppskot landsstýrisins sostatt burturdoltið.

Uppskot frá Poul J. Olsen og Signar Hansen §§ 1 og 2 samtykt við 17—0, § 3 samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

Broytingaruppskot frá Jógvan Olsen og Vilhelm Nielsen til § 1 í uppskotinum frá Poul J. Olsen og Signar Hansen fall við 3—0.

Lógin endaliga samtykt við 17—0 atkvøðum.

---

88. Val av álitismonnum og nevndum

Ár 1977, 28. april, fór fram val av álitismonnum og nevndum.

Løgtingsvalnevndir.

A. Suðurstreymoyar prestagjald:

a. Fastir limar:
Herman í Stórustovu, Trygvi Árting og Olaf Nielsen, Tórshavn.

b. Tiltakslimir:
Niels Debes og Sune Jacobsen, báðir Tórshavn.

B. Norðstreymoyar prestagjald:

a. Fastir limir:
Heine Johansen, bankamaður, Vestmanna, Óla Chr. Debes, bóndi, Kollafjørður, Sámal J. Samuelsen, skipari, Haldórsvík.

b. Tiltakslimir:
Gunnar Joensen, lærari, Hvalvík, Kjartan Nielsen, Vestmanna.

C. Eysturoyar sýsla:

a. Fastir limir:
Ólavur Gregersen, Gøtu, Herluf Bertelsen, lærari, Fuglafirði, Arnold Abrahamsen, lærari, Fuglafirði.

b. Tiltaksmenn:
Sigfríður Vorðhamar, Fuglafirði, Jens Vestertún, Eiði.

D. Norðoya sýsla:

a. Fastir limir:
Dánjal Nielsen, stjóri, Klaksvík, Jósup Henriksen, skósmiður, Klaksvík, Sámal Christiansen, skrivari, Klaksvík.

b. Tiltakslimir:
Einar Waag, stjóri, Klaksvík, Sylvan Jacobsen, fiskimaður, Klaksvík.

E. Vága sýsla:

a. Fastir limir: Napoleon Petersen, lærari, Sørvági, Hensar Ellingsgaard, lærari, Sørvági, D. Danielsen, lærari, Sørvági.

b. Tiltakslimir: Kamma Thomassen, húsmóðir, Miðvági, Snorri á Steig, Sandavági.

F. Suðuroyar sýsla:

a. Fastir limir: Niels P. Nolsoe, lærari, Vági, Arne Brattaberg, arbeiðsform., Vági, Johan O. Djurhuus, fyrrv. skúlastjóri, Vági.

b. Tiltakslimir: Jaspur Hohn, skrivstovumaður, Tvøroyri, Hjørleif Enni, keypmaður, Tvøroyri.

Grannskoðari í Føroya Sparikassa:
Dánjal J. Kjærbo, Fuglafirði.

Skipafelagið Føroyar, í nevndini fyri: Tórálvur Mohr Olsen, løgtingsmaðnr, Sund, Ove Mikkelsen, løgtingsmaður, Vági.

Skipafelagið Føroyar, umboðsmaður á aðalfundi hjá: Martin Joensen, Hvítanes, Jákup Veyhe, yngri, Tórshavn.

Kirkjustjórn: J. Fr. Øregaard, Kjartan Mohr, Vilhelm Nielsen.

Sjóvinnubankin, umboðsmaður á aðalfundi: Karsten Højgaard og Kjartan Mørkøre, báðir Tórshavn.

Mentunargrunnur Føroya løgtings: Fyribils útsett.

Føroya listasavn: Ottar Jacobsen, skúlastjóri, Tórshavn, Øssur Dam Jacobsen, lærari, Vestmanna, Flemming Samuelsen, Tórshavn.

Grønlandsfelagið: Fastir limir: J. Fr. Øregaard, Norðagøtu, P. H. Weihe, Sørvági, Frederik Hansen, Søldarfirði.

Flogsamband Føroya, umboðsmaður á aðalfundi: J. Fr. Øregaard, Norðagøtu.

Føroyskt kirkjumál, grunnur: J. Fr. Øregaard, Norðagøtu, Jóhannes av Skarði, Tórshavn.

Menningargrunnurin: Útsett til ólavsøku.

Yvirfriðingarnevndin: Fastir limir: Rólant Lenvig, lærari, Kvívík, Janus Kamban, myndlahøggari, Tórshavn.
Tiltakslimir: Jákup Joensen, Kvívík, Kjartan Nielsen, Vestmanna, Poul Martin Joensen, Fuglafirði, John Reid Bjartalíð, Klaksvík.

89. Framhald av fyribilsskipan um rættindi hjá fiskiførum frá felagsmarknaðarlondum at veiða á sjóøki Føroya

Ár 1977, 29. apríl, legði Atli Dam, lógmaður, fram

Uppskot
til
samtyktar.

Løgtingið samtykkir í,

at skipan, ið er galdandi fyri fiskiskip á sjóoki Foroya hjá skipum heimahoyrandi EEC-londunum, til og við 30. apríl 1977, verður framlongd til og við 10. mai 1977, og

at veiðan hjá hesum skipum í nevnda tíðarskeiði verður roknað sum partur av tí nøgd, ið loyvd verður at veiða í mai og juni 1977.

Viðmerkingar:

Við tingsamtykt 18. mars 1977 (tingmál nr. 73/1976) fekk landsstýrið heimild til at fyriseta fyribilsreglur fyri tíðarskeiðið 22. mars til og við 30. apríl 1977 um loyvi til skip frá EEC til fiskiskap undir Føroyum.

Sambært grein 2 í sáttmálanum um sínámillum fiskirættindi Føroyar-EEC, sum varð undirskrivaður í Bryssel 15. mars 1977, skulu partarnir samráðast, áðrenn teir ásetla loyvdu veiðunøgdirnar og veiðuøkini fyri fiskiskap hjá hvørjum øðrum.

Samráðingar um eina skipan fyri fiskirættindi hjá EEC-skipum á sjóøki Føroya fyri mai og apríl 1977 fóru fram í Bryssel 26. og 27. apríl 1977. Partarnir samdust ikki í fyrstu syftu um eina skipan. EEC-ráðharrastovnurin skal fann 3. mai 1977 viðgera spurningin.

Sambært verandi fyribilsskipan hevur landsstýrið ikki heimild til at loyva skipum úr EEC-londum at veiða á sjóoki Foroya eftir 30. apríl. Fyri at umganga steðg í øllum EEC-fiskiskapi undir Føroyum og harvið ivaleyst eisini steðg í øllum føroyskum fiskiskapi í EEC-sjógvi, meðan spurningurin um eina skipan fyri mai og juni er til viðgerðar í EEC-ráðharra-

stovninum, mælir landsstýrið til, at galdandi skipan verður framlongd til 10. mai, og at veidda nøgdin verður roknað upp í la nøgd, sum verður loyvd EEC-skipum at veiða í mai og juni. Tað er ein treyt fyri framhaldandi fiskiskap hjá EEC-skipum á sjóeki Foroya, at føroyskum skipum verður loyvt at halda fram við at fiska í EEC-sjógvi.

1. viðgerð 29. apríl, málið beint í marknaðarnevndina, sum 29. apríl legði fram soljóðandi

Álit.

Máið varð lagt fram av landsstýrinum 29. apríl 1977 og við 1. viðgerð beint í marknaðarnevndina.

Marknaðarnevndin hevur viðgjørt málið og hevur býtt seg í ein meirilutа og ein minniluta.

Meirilutin í marknaðarnevndini (J. Fr. Øregaard, Poul J. Olsen, Hákun Djurhuus, Jógvan Sundstein, Pauli Ellefsen og Hilmar Kass) mælir til at samtykkja uppskot landsstýrisins óbroytt.

Minnilutin (Erlendur Patursson) mælir frá at samtykkja uppskot landsstýrisins og mælir í staðin tinginum til at samtykkja soljóðandi

Uppskot
til
samtyktar.

Løgtingið samtykkir í,

at skipan, ið er galdandi fyri fiskiveiði á landleiðini hjá skipum heimahoyrandi í EEC-londunum til og við 30. apríl 1977, verður framlongd til og við 10. mai 1977,

at veiðan hjá hesum skipum í nevnda tíðarskeiði í hægsta lagi verður ¼ av ti, ið teimum varð loyvt at veiða í tíðini 22. mars til 30. apríl 1977,

at hesum skipum aftaná 10. mai 1977 fyri fyrst verður loyvt at reka fiskiveiði, tó ikki eftir toski og hýsu, á landleiðini uttan fyri 30 fjórðingar úr beinum grundlinjum og uttan fyr 200 m dýpdarlinju á Føroya banka.

2. viðgerð 29. apríl.

Uppskot landsstýrisins samtykt við 18- 0.

Minnilutauppskot frá Erlendi Patursson fall við 3--0.

90. Loyvi til fiskifør heimahoyrandi í Póllandi og Týska Demokratiska Lýðveldinum (DDR) til at veiða svartkjaft á sjóøki Føroya

Ár 1977, 29. apríl, legði Petur Reinert, landsstýrismaður, fram hetta

Uppskot
til
samtyktar.

Løgtingið heimilar landsstýrinum til at loyva 2 skipum úr Póllandi og 2 skipum úr Týska demokratiska Lýðveldinum til at veiða svartkjaft á sjóøki Føroya í 1977.

Viðmerkingar:

Sum partur í skipanini frá 18. des. 1973 um fiskiveiðu á Føroyaøkinum átók Pólland sær avmarkingarnar viðvíkjandi fiskiskapinum hjá skipum tess undir Føroyum. Síðani 1. apríl 1977 hava fiskifør heimahoyrandi í Pólandi ikki havt loyvi til at veiða undir Føroyum (smbr. kunngerð nr. 22 frá 28. mars 1977).

Pólland hevur biðið um at fáa loyvi til at fiska undir Føroyum fyrst og fremst svartkjaft. Umstøður hava ikki verið til formligar samráðingar við pólsku myndugleikarnar um eina skipan fyri pólskan fiskiskap á sjóøki Føroya, og ikki er líkt til, at slíkar samráðingar kunnu fara fram, áðrenn svartkjaftaveiðan tekur seg upp á sjóøki Føroya.

Landsstýrið mælir til, at loyvt verður 2 pólskum fiskiførum at veiða svartkjaft undir Føroyum í 1977.

DDR hevur eisini biðið um loyvi til at fiska svartkjaft undir Føroyum. Skip frá DDR hava av og á veitt á sjóøki Føroya, men DDR luttók ikki í sáttmálanum frá 18. des. 1973.

Tingingar millum umboð fyri DDR og umboð fyri landsstýrið fóru fram í Keypmannahavn 22. februar 1977. Endalig støða varð ikki tikin til sáttmála millum londini. Samráðingar hava ikki verið síðani, og kunnu valla haldast áðrenn veiða av svartkjafti tekur seg upp á sjóøki Føroya á hesum sinni.

F.L. j. nr. 1500-1-7-3

Landsstýrið mælir til, at loyvi verður givið 2 fiskiførum frá DDR til at veiða svartkjaft í sjóøki Føroya í 1977.

Landsstýrinum er kunnugt, at ætlanin bæði hjá skipunum úr Pólandi og úr DDR er at veiða svartkjaft til matna.

Lagt verður afturat, at landsstýrið undir tingingum í Keypmannahavn 25. og 27. apríl 1977 hevur avtalað eina skipan fyri 1977 um sínámillum fiskirættindi Føroyar - Sovjetsamveldið. Hendan skipanin verður løgd fyri tingið ein av fyrstu døgunum. Sovjettisku skipini ætla at byrja fiskiskap eftir svartkjafti 10. mai 1977.

1. viðgerð 29. apríl, málið beint í marknaðarnevndina, sum 29. apríl legði fram soljóðandi

Álit

Málið varð lagt fram av landsstýrinum 29. apríl 1977 og varð við 1. viðgerð sama dag beint í marknaðarnevndina.

Samd marknaðarnevnd mælir til at samtykkja uppskot landsstýrisins óbroytt.

Uppskot landsstýrisins samtykt við 21-- 0 atkvøðum.

---

91. Broyting í skiftilógini

Ár 1977, 2. mai, legði Jákup Lindenskov, landsstýrismaður, fram

Uppskot
til
samtyktar,

Við heimild í § 5 í lóg nr. 412 frá 18. december 1963 «om ændringer i skifteloven» verður henda lóg sett í gildi í Føroyum við kgl. fyriskipan við hesum broytingum:

F. L. j. nr. 613-1

1) § 1, nr. 4. I § 58 verður «lov om tinglysning nr. 111 af 31. marts 1926 § 48, stk. 1» broytt til «lagtingslov nr. 55 af 16. august 1962 § 48, stk. 1».

2) § 1, nr. 15. I § 66 verður «lov om tinglysning nr. 11 af 31. marts 1926 § 48, stk. 1» broytt til «lagtingslov nr. 55 af 16. august 1962 § 48, stk. 1».

3) § 2 verður orðað soleiðis:
«Denne anordning træder i kraft .....»

4) § 4 verður orðað soleiðis:
«Fra lovens ikrafttræden ophæves Norske lov 5-2-24 og 26, forordning af 21. juni 1799 § 2, lov nr. 276 af 30. juni 1922 om ægteskabs indgåelse og opløsning § 66, stk. 2, samt lov nr. 56 af 18. marts 1925 om ægteskabs retsvirkninger § 23, stk. 2, 2. pkt.»

5) § 5 fer út.

Viðmerkingar:

Lóg nr. 412 frá 18. december 1963 «om ændringer i skifteloven» kom í gildi í Danmark 1. august 1964 samstundis sum nýggja arvalógin nr. 215 frá 31. mai 1963 kom í gildi. Onki sæst tó vera til hindurs fyri at seta broytingar í skiftilógini í gildi fyri seg.

Nevnda broyting í skiftilógini var saman við nýggjari arvalóg og hjúnarlagslóg lagd fyri tingið í tingsetuni 1969 (løgtingsmál nr. 69/1969), men varð málið ikki avgreitt.

Høvuðsbroytingarnar í lógarbroytingunum snúgva seg um skifti av deyðsbúgvum, har annar hjúnarfelagin livir eftir, og um skifti av separatións- og skilnaðarbúgvum. I løgtingstíðindi 1969, síðu 277-281 er nærri greilt frá teimum einstoku broytingunum.

Skiftirættirin hevur gjørt vart við, at torvur er á at fáa lógarbroytingina setta í gildi her, og verður serliga hugsað um § 70 a, sum gevur skiftirættinum heimild til í separatións- og skilnaðarbúgvum í serligum førum at víkja frá vanligu reglunni um framumhjáarætt at yvirtaka lutir og ognir, ið ein sjálvur hevur útvegað. Broytingin gevur t.d. skiftirættinum møguleika fyri at lata fatan hjúnafelagan, ið fær foreldrarættin yvir børnunum, yvirtaka bústaðin, sjálvt um hann ikki hoyrir til búpartin hjá viðkomandi.

1. viðgerð 3. mai, málið beint í lógarnevndina, sum 10. mai legði fram soljóðandi

Álit

Hetta mál var til viðgerðar í løgtingssetuni 1969, smbr. løgtingstíðindi 1969, bls. 265-66, men varð ítsett til komandi ólavsøku.

Síðan hevur málið ikki verið til viðgerðar á tingi, men hevur nú landsstýrið aftur lagt tað fram.

Høvuðsbroytingarnar í uppskotinum snúgva seg um skifti av deyðsbúgvum, har annar hjúnarfelagin livir eftir, og um skifti av separatións- og skilnaðarbúgvum. Serstakliga verður hugsað um at veita skiftirættinum heimild til í separatións- og skilnaðarbúgvum í serstøkum førum at víkja frá vanligu reglum um framihjárætt til at yvirtaka ognir, ið viðkomandi sjálvur hevur útvegað. M.a. fær skiftirætturin møguleika til at lata tann hjúnarfelagan, ið fær foreldrarættin yvir børnunum, at yvirtaka bústaðin, sjálvt um hann ikki tilhoyrir búpartin hjá viðkomandi. Í løgtingstíðindum 1969, bls. 277-81 verður nærri greitt frá teimum einstøku broytingunum.

Lógarnevndin metir, at málið eigur at avgreiðast nú og mælir løgtinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

2. viðgerð 11. mai.

Uppskot landsstýrisins samtykt við 17—4 atkvæðum.

92. Fyribilsskipan um loyvi til skip frá EEC til fiskiskap undir Føroyum

Ár 1977, 2. mai, legði Alli Dam, løgmaður, fram

Uppskot
til
samtyktar.

Løgtingið heimilar landsstýrinum til at fyriseta reglur saubært viðlagda skjali um loyvi til fiskifar úr limaríkjunum í EEC burtursæð frá Danmark í tíðarskeiðinum 1. mai til og við 30. juni 1977.

Viðmerkingar:

Tann 26. og 27. apríl 1977 fóru fram samráðingar í Bryssel millum umboð fyri landsstýrið og felagsmarknaðarnevndina um eina skipan fyri mai og juni í ár fyri rættindi hjá EEC-skipum at veiða á sjóøki Føroya og rættindi hjá føroyskum skipum at veiða í EEC-sjógvi.

Partarnir samdust í fyrstu syftu ikki um allar tættirnar í eini skipan. Óseinjan snúði seg fyrst og fremst um talið á smærri EEC-trolarum, sum skulu fáa loyvi til at fiska tosk og hýsu á ávísum økjum, ið annars verða stongd fyri útlendska veiðu við troli. Semja var um loyvdu veiðunøgdina av toski og hýsu og um veiðuøkini.

Viðvikjandi veiðunøgdini av toski og hýsu góðtók felagsmarknaðarnevndin, at EEC-skip ikki mugu fiska meir enn 60% av veiðuni í mai og juni 1976 ella 1620 tons. Av tí at EEC-skip í apríl møguliga ikki hava veitt fey 1250 tonsini, sum var ásetta kvotan, var semja um, at loyva yvirflyting til mai og juni part av apríl-kvotuni, sum kanska ikki er veiddur. Samlaða loyvda nøgdin fyri apríl, mai og juni verður sostatt 2870 tons.

Veiðuøkini eru nakað broytt í mun til skipanina fyri apríl (sb. tingmál nr. 73/1976 og viðlagda skjal). Øki 1 er broytt til at verða 20 fjórðingar frá grunnlinjuni. Sonuleiðis verður øki 2 stongt út á 20 fjórðingar. Harnæst er øki 4 broytt soleiðis, at undantaksloyvi til smærri trolarar til at veiða her ikki er galdandi millum 12 og 14 fjórðingar frá grunnlinjuni í mai mánaða. Føroya Banki verður stongdur fyri útlendskari trolveiðu. Eftir hesi skipan verður sostatt loyvt avmarkaðum tali á smærri EEC-trolarum at veiða í øki 1, 4 og 6.

F.L. j. nr. 1198-2/77

Eftir § 2 í sáttmálanum um sínámillum fiskirættindi Føroya-EEC frá 15. mars 1977 mugu tiltøk, ið partarnir seta í verk til tess at stýra fiskiskapinum fyri at varðveita ella byggja upp fiskastovnar, ikki vera soleiðis háttað, at tey forða fyri fullu nýtslumi av fiskirættindunum, ið veilt verða sambært sáttmálan.

Felagsmarknaðarnevndin metir, at 15 smærri trolarar (ikki longri enn 130 føtur), sum fáa loyvi til í senn at fiska tosk og hýsu á teimum ávísu leiðunum, ikki eru førir fyri at veiða loyvdu nøgdina. Landsstýrið hevur umhugsað hendan spurningin og mælir til, at landsstýrið og marknaðarnevndin eftir nærri kanning áseta loyvda talið.

Felagsmarknaðarnevndin skal 3. mai leggja fyri ráðharrastovnin úrslitið av samráðingunum við landsstýrið. Ráðharrastovnurin skal taka støðu til samráðingarúrslitið, herundir um føroyskur fiskiskapur í mai og juni kann halda fram eftir sama myndstri sum sonn tíð 1976 ella um serligar reglur skulu setast í verk fyri føroyskan fiskiskap í EEC-sjógvi. Samtykkir ráðharrastovnurin at seta í verk serlig tiltøk mótvegis føroyskum fiskiskapi, er fortreytin fyri omanfyri umrøddu skipan fyri EEC-fiskiskap undir Føroyum burturi.

1. viðgerð 2. mai, málið beint í marknaðarnevndina, sum 2. mai legði fram soljóðandi

Álit

Málið varð lagt fram av landsstýrinum 2. mei 1977 og eftir 1. viðgerð sama dag beint í marknaðarnevndina.

Nevndin býtti seg í ein meirilutu og tvein minnilutar. Meirilutin (Poul J. Olsen, J. Fr. Øregaard, Hákun Djurhuus og Jógvan Sundstein) tók undir við uppskoti landsstýrisins.

Annar minnilutin (J. Durhuus) setir einki uppskot fram.

Hin minnilutin (Jógvan Olsen og Hilmar Kass) tekur støðu í tingsalinum.

2. viðgerð 2. mai.

Uppskot landsstýrisins samtykt við 15—0 atkvøðum.

93. Veðhald fyri láni til P/f Fiskaaling

Ár 1977, 2. mai, legði Petur Reinert, landsstýrismaður, fram

Uppskot
til

løgtingslóg um veðhald fyri láni til p/f Fiskaaling.

§ 1.

Landsstýrinum verður heimilað at veðhalda fyri upp til 2,3 mió. kr. í láni til p/f Fiskaaling. Lánið verður at tryggja við panti í virkinum.

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi beinnvegin.

lagtingslov om garanti for lån til p/f Fiskaaling.

§ 1.

Landsstyret bemyndiges til at garantere for et lån på indtil 2,3 mio. kr. til p/f Fiskaaling. Lånet skal sikres med pant i virksomheden.

§ 2.

Denne lov træder straks i kraft.

Viðmerkingar:

Í løgtingsmáli nr. 111/1969 samtykti løgtingið at heimila landsstýrinum at seta upp til 150.000 kr. í partapeningi í felag í stovnan við tí endamáli at reka sílastøð og at taka upp lán til hetta endamál. Tær treytir vórðu lagdar við, at landsstýrið í samráð við fíggjarnevndina skuldi áseta stødd-ina á partapeningsinnskotinum, og skuldu viðtøkur felagsins góðtakast av landsstýrinum og fíggjarnevndini. Eisini vórðu landsstýrið og fíggjar-nevndin heimilað at ganga í við fyri rakstrarlán til sílastøðina, tó ikki upp um 200.000 kr., jbr. løgtingstíðindi 1969 bls. 380.

Landsstýrið teknaði og hevur síðani goldið 125.000 kr. í partapeningi í p/f Fiskaaling og givið veðhald fyri 200.000 kr. í rakstrarlán.

Í 1973 kom p/f Fiskaaling í trongstøðu, og skjeyt felagið m.a. upp, at landsstýrið keypti tey partabrøv, ið vóru á privatum hondum, nominelt 125.000 kr. Landsstýrið keypti partabrøvini fyri 50.000 kr. Felagið er síðani rikið við landsstýrinum sum eigara av øllum partapeninginum.

Tað hevur ikki hignartil verið gjørligt at rikið felagið utlan studning, og hevur landsstýrið veitt hesar studningar:

Úr grunninum til fiskiroyndir (lán)	200.000 kr.
Úr landskassanum av játtanum til praktiskar fiskiroyndir og laksa- og sílaaling	435.000 kr.
tilsamans	635.000 kr.

Eisini hevur landsstýrið lagt út sum veðhaldari fyri lánum um 128.000 kr.

Síðani hevur landsstýrið við heimild í fíggjarløgtingslógini 1974/75 og við heimild í løgtingslóg nr. 21 frá 6. mai 1975 um veðhald fyri láni til smærri idnaðarvirki veðhildið fyri eykalánum uppá tilsamans 830.000 kr.

Partafelagið søkir nú um veðhald fyri láni til ymsar nýíløgur, og eru íløgurnar hesar:

Á Oyrabakka	555.000 kr.
Við Áir	140.000 kr.
í Skálabotni	110.000 kr.
Annað	20.000 kr.
tilsamans	825.000 kr.

Eftir hesa útbygging metir felagið seg fært at framleiða 150 - 200 tons av sílum um árið til útflutnings. Umframt heldur felagið seg fært at framleiða so nógv smásil, ið eru klár at fara í sjógv, at felagið kann lata til onnur virkir av somu stødd sum felagið. Felagið metir hetta vera av stórum týdningi, nú menn eru hugaðir at fara undir sila- og laksaaling í sjónum.

Fleiri av teimum lánum, felagið hevur fingið við landskassaveðhaldi, eru í eftirstøðu við rentu og avdrátti og eru eisini yvirtrekt. Sokt verður tí um, at hesi lán, sum tey eru pr. 31. december 1976 tilsamans um 1.846.000 kr., kassakredittur roknaður við, verða løgd saman og saman við uppiskoytisláni til nýíløgur og, at landskassin veðheldur fyri hesum nýggja láni, sparikassin er tá sinnaður at veita 300.000 kr. í láni uttan veðhald.

Lániskipanin verður tá hendla:

Sparikassi, uttan veðhald	300.000 kr.
Bankalán, við veðhaldi	2.300.000 kr.
Kassakredittur, nýggjur, uttan veðhald	200.000 kr.
	2.800.000 kr.

Viðlagdur er roknskapur felagsins fyri 1976 og yvirlit yvir roknskapin 1975 og 1976 og ætlan fyri 1977.

P/f Fiskæling

	Roknskapur 1975	Roknskapur 1976	Rakstrar-ætlan 1977
Søla av sílum	420	1.286	2.450
Goymsla 31. december	923	1.106	1.000
	1.343	2.392	3.450
Goymsla 1. januar	659	923	1.106
	684	1.469	2.344
Kostnaður:			
Fóður	227	534	820
Virking	110	238	380
Arbeiðsløn	279	344	356
Bilútreiðslur	48	52	75
Umsiting	51	63	100
Ferðaútreiðslur	24	10	20
Irma	10	10	10
Annað	91	94	100
	840	1.345	1.861
Úrslit	÷ 156	124	483
Studningur	175	303	150
Úrslit áðrenn rentur og avdráttir	319	427	633

Frammanfyristandandi rakstrarætlan fyri 1977 er gjørd út frá samrøðum við og ætlanum gjørdar av leiðslu felagsins.

Sølan fevnir um 150 tons á kr. 17 pr. kg. Nú verður selt fyri upp til kr. 18 pr. kg. Í sølunni er frádrigið kr. 100.000 til farmagjald.

Rakstrarætlanin er gjørd út frá tí fyritreyt at tað verður eins lætt at fáa fatur á slógvi v.m. sum seinasta ár. Eftir ætlan verður keypt fóðurmaskina og skuldi fóðurblandingin verið betur og uppá seg bíligari.

Út frá tí ætlan um nm- og meirfíggjan sum felagið kemur at hava nevnliga lán úr:

Føroya Sparikassa	300.000
Føroya Banka — fast lán	2.300.000
Føroya Banka kassakredit	200.000
Ialt	2.800.000

verður talan um rentur og avdrátt fyrsta árið uppá gott og væl kr. 400.000. Framman fyri nevnda úrslit fyri 1977 er sostatt rikiligt til dekning av rentum og avdráttum, eisini áðrenn studning frá tí almenna.

Yvirlit yvir ætlanina um nýløgur er hjálagt.

Viðmerkjast skal at revisión er ikki farin fram.

Tórshavn, tann 16. februar 1977

Pauli Ellefsen
statsaut. revisor

Nýløgur afturat

Á Oyrabakka

Fóðurhús	300.000
Innleggingar v.m.	125.000
Truckur	80.000
Ristir	30.000
Liðugtgerð av demningi	20.000
	555.000

Við Ár

6 stór kør	60.000
6 automatir	5.000
2 pumpir	10.000
4 filtur	12.000
Rørleiðingar frá Just í Túni	40.000
Annað	13.000
	140.000

í Skálabotni

Filtur	25.000
Pumpir	25.000
Plastrør	33.000
Niðurlegging v.m.	27.000
	110.000

Annað

2 flótibúðir	20.000

PF. FISKAALING

Uppskot til ársroknskap fyri 1976

Rakstrarroknskapur fyri tiðina 1. januar til 31. desember 1976

Søla av sílum	1.285.972,67
Síl á goymslu 31. december 1976	1.105.600,00
	2.391.572,67
Síl og yngul á goymslu 1. jan. 1976	923.250,00
	1.468.322,67
Aðrar inntøkur:	
Studningur frá Føroya Landsstýri	303.700,00
	1.772.022,67

Kostnaður:

Fóður	534.012,63	
Virking og pakking	238.663,29	
Arbeiðsløn	344.383,99	
Bilútreiðslur	52.372,46	
Umsiting	63.970,71	
Ferðaútreiðslur	10.161,95	
Promatiónstilskot - Irma	10.000,00	
Leiga av frystihúsi	58.896,00	
Trygging	8.203,00	
Súrevni	4.456,30	
El	5.796,78	
Telefon og porto	3.271,95	
Revisión	6.400,00	
Aðrar útreiðslur	5.200,54	1.345.789,60
		426.233,07
Rentuútreiðslur	151.121,53	
Rentuinntøkur	310,77	150.810,76
Skattur		975,80
Avskriving fyri 1976		210.274,77
Úrslit fyri árið 1976		64.171,74

Fíggjarstøða pr. 31. desember 1976

A K T I V :

Goymsla:		
sí blaðsíða 5		1.172.600,00
Faroya Fiskasøla:		
Skuldbinding	400,00	
Tiltaksgrummur	2.483,52	
Leypandi konto	210,77	3.094,29

Fóðurmaskina v.m.:		
Saldo 1/1 - 1976	44.120,66	
Tilgongd 1976	115.951,60	
	160.072,26	
÷ Avskrivað	48.021,68	112.050,58
Anlegg á Oyrabakka:		
Saldo 1. janúar 1976	1.234.824,16	
Tilgongd í 1976	416.877,67	
	1.651.701,83	
÷ Avskriving	99.102,11	1.552.599,72
Anlegg í Skálabotni	273.694,00	
÷ Avskrivað	16.421,64	257.272,36
Anlegg við Áir:		
Saldo 1. janúar	44.260,55	
Tilgongd í 1976	565,50	
	44.826,05	
÷ Avskriving	13.447,82	31.378,23
Anlegg í Hvalvík	9.027,00	
÷ Avskrivingar	2.708,10	6.318,90
Bílur:		
Saldo 1. janúar 1976	5.125,40	
Tilgongd í 1976	96.786,00	
	101.911,40	
÷ Avskriving	30.573,42	71.337,98
		3.206.652,06

PASSIV:

P/F Føroya Banki:		
K.K. nr. 60.148-9		
(max. kr. 62.500,00)	443.008,11	
K.K. nr. 60.138,—		
(max. kr. 75.000,00)	112.365,61	
K.K. nr. 60.110-1		
(max. kr. 175.000,00) rakstur	305.720,48	
Útlán nr. 82267-1	346.680,61	
Lán	530.000,00	
Lán nr. 80.912-9	108.162,73	1.845.937,54
Keypssáttmáli nr. 4322		61.110,00
Kreditorar		198.094,26
Fiskiraunsóknarstovan		831.294,55
(Renta er ikki útreiðshuført og avdráttartíð er ikki avtalað)		
Partapeningur		250.000,00
Undirskotssaldo 1. januar 1976	+ 43.956,03	
Samlað úrslit	64.171,74	20.215,71
		3.206.652,06

I 1975 evur landsverkfrøðingurin grivið út 3 hyljar í Skálabotni. Onki er bókað hesum viðvíkjandi.

Fyri útlán nr. 80.912-9 hevur Føroya Banki veðhald í aulegginum í Skálafirði. Landskassin veðheldur fyri lánunum og kassakredittum burtursað frá 60.110-1 í Føroya Banka.

Stjórn:

Nevnd:

Framlagt og góðkent á aðalfundi felagsins tann / 197

Frammanfyristandandi roknskap, sum samsvarar við bøkur felagsins, hava vit reviderað. Vit hava ikki kannað goymsluna av silum.

Tórshavn, hin 16. februar 1977

Pauli Ellefsen
statsaut. revisor

Vøringoyunsla:	
Hvalvík og Vík	
13.000 kg fryst síl 16/-- netto	208.000,00
Oyrabakki	
200.000 stk. síl á 160 gr. 32.000 kg 15/-	480.000,00
40.000 stk. síl á 520 gr. 20.800 kg 12/-	249.600,00
20.000 stk. síl á 840 gr. 16.800 kg 10/-	168.000,00
	897.600,00
190 posar fóður	35.000,00
4.200 eskir	14.200,00
Plastikposar	17.800,00
	67.000,00

1. viðgerð 3. mai, málið beint í fíggjarnevndina, sum 3. mai legði fram soljóðandi

Alit

Málið varð lagt fram av landsstýrinum tann 2. mai 1977 og við 1. viðgerð 3. mai 1977 beint í fíggjarnevndina.

Landsstýrið skjýtur upp, at tað fær heimild at veðhalda fyri láni upp til 2,3 mió. kr. til P/T Fiskauling. Lánið skal veðtryggjast, í viðmerkingunum frá landsstýrinum verður greitt frá løgtingsmáli nr. 111/1969, har løgtingið samtykti, at heimila landsstýrinum at seta upp til 150.000 kr. í partapeningi til felag til stovnan við tí endamáli at reka sílastøð og taka upp lán til hetta endamál. Tað var landsstýrið, ið saman við fíggjarnevndini skuldi áseta støddina av partapeningsinnskotinum, og skuldu viðtøkur felagsins eisini góðtakast av fíggjarnevndini og landsstýrinum. Sonuleiðis vóru landsstýrið og fíggjarnevndin heimlað at veðhalda fyri rakstrarláni.

Higartil hevur ikki verið gjørligt at rikið feelagið uttan studning, og verður í viðmerkingunum greitt frá tenuru peningaupphæddum, ið rindaðar eru, umframt at landsstýrið sum veðhaldari hevur lagt út kr. 128.000. Síðani hevur landsstýrið við ávisum heimildum veðhildið fyri eykalánum uppá kr. 830.000. Søkt verður nú um veðhald fyri láni til vinsar íløgur

uppá kr. 825.000, og metir felagið seg eftir hesa útbygging fört fyri at framleiða upp til 200 tons av silum um ári til útflutnings. Í viðmerkingunum frá landsstýrinum verður figgjarskipanin fyri felagið útgreinað.

Figgjarnevndin kann einmælt taka undir við uppskoti landsstýrisins, at veðhildið verður fyri upp til kr. 2,3 mió. í láni til P/f Fiskaaling, meu vísandi til tað,ið fyrst er nevnt í hesum áliti viðvíkjandi luti figgjarnevndarinnar í hesum máli, er figgjarnevndin samd um, at veðhaldsheimildin skal verða givin landsstýrinum saman við figgjarnevndini, og setur figgjarnevndin sostatt soljóðandi

Broytingaruppskot

til § 1 í lógaruppskotinum:

§ 1, 1. pkt. verður orðað soleiðis:	§ 1, 1. pkt. formuleres således:
Landsstýrinum saman við figgjarnevndini verður heimilað at veðhalda fyri láni upp til kr. 2,3 mió. til p/f Fiskaaling.	Landsstyret bemyndiges til sammen med finansudvalget at garantere for et lån på indtil kr. 2,3 mio. kr. til p/f Fiskaaling.

2. viðgerð 5. mai, 3. viðgerð 11. mai.

Broytingaruppskot frá figgjarnevndini til § 1 samtykt við 18—0 atkv.

Lógin so broytt endaliga samtykt við 21—0 atkvøðum.

94. Vegir og lendingar

Ár 1977, 3. mai, varð frá havna- og veganevndini lagt fram soljóðandi

Álit

Havna- og veganevndin hevur viðgjørt tær 75 umsóknirnar sum innkomnar eru.

I. Vegir.

Á fíggjarløgtingslógini eru settar av 37,0 mill. kr. til vegabyggingar og umsitingina av landsvegunum v.m.

Viðvíkjandi nýtslu av hesum peningi skal nevndin loyva sær at seta fram soljóðandi

Uppskot

A. Til útbygging av og ábøtur á landsveganetini og umsiting teirra, harumframt til brýr, bilferjur o.a. ..... kr. 35.147.500
Til niðanfyri nevndu arbeiði ..... kr. 1.852.500

kr. 37.000.000

Kommuna	Til	Studningur ¾ av kr.
Svínoyar		
	Veg um Eiðið	60.000,—
Viðareiðis		
	Veg inn í Dalar	60.000,—
	Dyrkingarveg	60.000,—
Klaksvíkar		
	Dyrkingarveg niðan á Háls	40.000,—
	Dyrkingarveg á Norðoyri	40.000,—
Húsa		
	Dyrkingarveg á Syðradali	60.000,—

Elduvíkar

Koyriveg norðan fyri ánna	100.000,—
Koyriveg vestur um bygdina	100.000,—

Oyndarfjarðar

Veg á Heltnini	100.000,—

Gøtu

Veg úr Syðrugøtu í landsvegin	120.000,—

Runavíkar

Veg frá Hússtoft út á Glyvradal	120.000,—

Nes

Veg millum Nes og Toftir	120.000,—
Veg til fótbóltvøll á Toftum	40.000,—

Skála

Veg til ítróttarøki	120.000,—

Sjóvar

Veg suður frá Selvindi	120.000,—

Sunda

Veg til Kirkjugarðin við Norðskála	120.000,—

Gjáar

Umvæling av brúgv	40.000,—

Haldórsvíkar

Veg út á Rongugjógv í Tjørnuvík	50.000,—

Kvívíkar

Veg uppi í Trøð og omau fyri skúlan	100.000,—

Vestmanna

Ovara veg	120.000,—

Kirkjubøar	
Veg norður í Fossdal	60.000,—
Sandavágs	
Veg úti á Bakka	120.000,—
Sørvágs	
Veg í útriðingshønum	120.000,—
Veg norður í Húsadal	120.000,—
umvæling av verjugarði á Strandavegnum	40.000,—
Bíggjar	
Dyrkingarveg í Gásadali	30.000,—
Mikines	
Dyrkingarveg	50.000,—
Húsavikar	
Veg í Húsavik	60.000,—
Umbygging av vegi í Dali	60.000,—
Porkeris	
Veg frá Gjónni Stóru	120.000,—
Tilsamans ¾ av kr.	2.470.000,—
— kr.	1.852.500,—

II. Lendingar.

Játtanir fyri figgjarárið 1977/78, sum samtyktar eru áður, eru hesar:

Kommuna	til	Studningur ¾ av kr.
Fugloyar		
Leinging av atløgubryggju við Trøllagjógv (2. ársgjald av 3 ára játtan) bygt		50.000,—
Svínoyar		
Leinging av bryggju við Eiðið (3. ársgjald av 5 ára játtan) bygt		80.000,—

Hvannasunds

Lendibrúgv við flakavirkið (Viðareiðis og Hvannasunds kommunur í felag)
(6. ársgjald av 8 ára játtan) bygt ..... 180.000,—

Bátahyl n.f. byrgingina um Hvannasund
(3. ársgjald av 5 ára játtan) í gerð ..... 80.000,—

Klakksvíkar

Bátahavn í Klakksvík
(8. ársgjald av 10 ára játtan) bygt ..... 100.000,—

Lendibrúgv í Arnafirði
(6. ársgjald av 6 ára játtan) ikki bygt ..... 50.000,—
(3. ársgjald av 4 ára játtan) ikki bygt ..... 75.000,—

Kunoyar

Lendibrúgv í Haraldssundi
(1. ársgjald av 2 ára játtan) ikki bygt ..... 50.000,—

Mikladals

Lending á Trøllanesi
(3. ársgjald av 3 ára játtan) ikki bygt ..... 50.000,—

Abøtur á lendingina á Trøllanesi
(2. ársgjald av 2 ára játtan) ikki bygt ..... 60.000,—

Oyndarfjarðar

Leingjan av lendibrúgv
(5. ársgjald av 6 ára játtan) ikki bygt ..... 60.000,—

Fuglafjarðar

Bryggjan vestanfyri
(8. ársgjald av 8 ára játtan) bygt ..... 70.000,—

Leirvíkar

Atløgubryggja fyri bátar
(3. ársgjald av 5 ára játtan) bygt ..... 60.000,—

Gerð av lívd og atløgu fyri opnum bátum
(2. ársgjald av 4 ára játtan) bygt ..... 50.000,—

Gøtu

Bátahavn í Norðrugøtu (atløguplass)
(2. ársgjald av 4 ára játtan) bygt ..... 50.000,—

Runavíkar

Bátahavn á Bakkanum á Glyvrum	
(2. ársgjald av 4 ára játtan) í gerð	50.000,—

Nes

Leinging av pieri við Toftagjógv	
(5. ársgjald av 5 ára játtan) bygt	150.000,—
Bátahavn í Oyrunum	
(3. ársgjald av 3 ára játtan) ikki bygt	80.000,—
Leinging av pieri við Toftagjógv	
(4. ársgjald av 5 ára játtan) bygt	100.000,—
Abøtur á bátahavnina í Oyrunum	
(3. ársgjald av 5 ára játtan) ikki bygt	100.000,—
Bátahavn í Oyrunum	
(3. ársgjald av 4 ára játtan) ikki bygt	100.000,—

Skála

Leinging og breiðkan av lendibrúgv í Skálabotni	
(8. ársgjald av 9 ára játtan) bygt	50.000,—
Bátahavn á Skála	
(2. ársgjald av 5 ára játtan) bygt	60.000,—

Sjóar

Útbygging av Heyggsstøð til bilfluttnings	
(6. ársgjald av 6 ára játtan) bygt	80.000,—
Útbygging av Heyggsstøð	
(5. ársgjald av 5 ára játtan) bygt	60.000,—
(4. ársgjald av 5 ára játtan)	100.000,—

Sunda

Bátahyl á Oyrabakka	
(6. ársgjald av 6 ára játtan) bygt	50.000,—

Eiðis

Lendibrúgv í Svínáum	
(6. ársgjald av 6 ára játtan) bygt	80.000,—
Bátadrátt við Ljósá	
(2. ársgjald av 2 ára játtan) ikki bygt	30.000,—

Haldórsvíkar

Bátahavn	
(4. ársgjald av 4 ára játtan) ikki bygt	100.000,—

Hvalvíkar

Bátahyl í Hvalvík
(3. ársgjald av 6 ára játtan) í gerð ..... 50.000,—
Støði fyri netavirki
(3. ársgjald av 6 ára játtan) ikki bygt ..... 75.000,—

Hósvíkar

Bátahyl í Hósvík
(3. ársgjald av 4 ára játtan) í gerð ..... 50.000,—

Kollafjarðar

Bátahyl innanvert Sjógv
(8. ársgjald av 8 ára játtan) bygt ..... 60.000,—
Atløguplass í bátahavnini
(2. ársgjald av 3 ára játtan) bygt ..... 50.000,—

Kvívíkar

Breiðking av bátahyli
(2. ársgjald av 2 ára játtan) ikki bygt ..... 100.000,—

Hests

Bryggja niðri á Heflu
(6. ársgjald av 6 ára játtan) bygt ..... 150.000,—

Sandavágs

Bátahavn
(8. ársgjald av 8 ára játtan) í gerð ..... 120.000,—
Bátahavn
(6. ársgjald av 6 ára játtan) í gerð ..... 80.000,—
(2. ársgjald av 5 ára játtan) í gerð ..... 120.000,—

Miðvágs

Vegagerð út til brimgarðin,ið gerast skal út frá prestlandinum
(3. ársgjald av 6 ára játtan) ikki bygt ..... 100.000,—

Sørvágs

Bátahavn
(8. ársgjald av 8 ára játtan) bygt ..... 80.000,—
Bátahavn (uppískoytisjáttan)
(2. ársgjald av 3 ára játtan) bygt ..... 60.000,—

Sands
Støði fyri fiskavirki
(3. ársgjald av 4 ára játtan) í gerð ..... 150.000,—

Skálavíkar
Leinging av pieri
(2. ársgjald av 5 ára játtan) bygt ..... 120.000,—

Húsavíkar
Skarvasker
(5. ársgjald av 5 ára játtan) bygt ..... 40.000,—
Lendingarábøtur í Dali
(2. ársgjald av 2 ára játtan) bygt ..... 40.000,—

Skúvoyar
Leinging av atløguhryggju v.m. í Skúvoy
(3. ársgjald av 3 ára játtan) bygt ..... 50.000,—
(3. ársgjald av 4 ára játtan) bygt ..... 80.000,—

Hvalbiar
Leinging av lendibrúgv í Sandvík
(6. ársgjald av 6 ára játtan) ikki bygt ..... 70.000,—

Froðbiar
Bátahavn í Trongisvági
(8. ársgjald av 8 ára játtan) bygt ..... 80.000,—

Fámjins
Ymiskar ábøtur og eftirgerð eftir brimskaða
(2. ársgjald av 3 ára játtan) ikki bygt ..... 50.000,—

Porkeris
Lendingarábøtur
(2. ársgjald av 4 ára játtan) ikki bygt ..... 50.000,—

Sumbiar
Bryggja í Lopra
(10. ársgjald av 10 ára játtan) bygt ..... 250.000,—
Brimverjutiltak vestan fyri dróttin í Pollinum
(3. ársgjald av 3 ára játtan) í gerð ..... 50.000,—
Verja upp undir Kirkjugarðsbakkan
(3. ársgjald av 3 ára játtan) bygt ..... 40.000,—

Tórshavnar

Stabba fyri strandfaraskipi
(2. ársgjald av 5 ára játtan) bygt ..... 100.000,—

Tilsamans ¾ av kr. 4.520.000,—

kr. 3.390.000,—

Játtað fyri 1977/78 sambært løgtingslóg
nr. 52 frá 24. mai 1974

Hvannasunds/Viðareiðis

Bryggja í Norðdepli
(4. ársgjald av 5 ára játtan) bygt ..... 160.000,—

Elduvíkar

Bryggja í Funningsfisði
(4. ársgjald av 5 ára játtan) í gerð ..... 100.000,—

Runavíkar

Bátahavnir á Glyvrum og í Søldarfirði
(4. ársgjald av 5 ára játtan) í gerð ..... 400.000,—

Sunda

Bryggja og havnaøki á Oyri
(4. ársgjald av 5 ára játtan) í gerð ..... 170.000,—

Kaldbaks

Bryggja á Sundi
(4. ársgjald av 5 ára játtan) bygt ..... 260.000,—

Nólsoyar

Brimgarður v.m.
(4. ársgjald av 5 ára játtan) bygt ..... 570.000,—

Sandavágs

Bátahylur v.m.
(4. ársgjald av 5 ára játtan) í gerð ..... 300.000,—

Skálavíkar

Leinging av brimgarði
(4. ársgjald av 5 ára játtan) bygt ..... 240.000,—

Húsavíkar
Bátahavn á Skarvaskeri
(4. ársgjald av 5 ára játtan) bygt ..... 150.000,—

Hvalhiar
Bátahylur á Nesi v.m.
(4. ársgjald av 5 ára játtan) ikki bygt ..... 320.000,—

Sumbiar
Leinging av atløgubryggju í Lopra
(4. ársgjald av 5 ára játtan) ikki bygt ..... 400.000,—

Tilsamans ¾ av kr. 3.070.000,—

= kr. 2.302.500,—

Játtað fyri 1977/78 til lendingar ..... 3.390.000,—
Ikki nýttar gjaldkomnar játtanir pr. 31/3 1977:
Av vanligum lendingajáttanum ..... 3.826.185,—
Av 5 ára ætlanini til smærri havnir ..... 2.280.000,—

kr. 11.798.685,—

í grunninum pr. 1/4 1977: ..... kr. 5.067.343,—
Játtað fyri 1977/78 ..... 13.500.000,— 18.567.343,—

Til góðar ..... kr. 6.768.658,—

Viðvíkjandi nýjáttanum skal nevndin loyva sær at seta fram soljóðandi

Uppskot

A. Kommuna	Til	Studningur ¾ av kr.
Fugloyar		
Lending við Skoragjógv		
¾ av 100.000 kr./árið í 3 ár		100.000,—
Lending við Trøllagjógv		50.000,—

Klaksvíkar

Lending í Árnafirði

¾ av 200.000 kr./ársið í 5 ár ..... 200.000,—

Lending á Norðoyri ..... 50.000,—

Viðareiðis - Hvannasunds

Bátahavn í Hvannasundi ..... 85.000,—

Kunoyar

Veg niðan frá lendingini

¾ av 300.000 kr./ársið í 3 ár ..... 300.000,—

Mikladals

Elektromotor tit rennistrong á Trøllanesi ..... 30.000,—

Veg til lendingina í Mikladali ..... 30.000,—

Oyndarfjarðar

Bátahavn

¾ av 200.000 kr./ársið í 5 ár ..... 200.000,—

Eldavíkar - Funnings

Afløgubryggju í Funningsfirði

¾ av 375.000 kr./ársið í 4 ár ..... 375.000,—

Leirvíkar

Bátahyl

¾ av 100.000 kr./ í 1980/81 og 1981/82

Til at regulera og festa øki uttanum flakavirki á havnarøkinum ..... 150.000,—

Gøtu

Bátahyl í Norðragøtu

¾ av 80.000 kr./ársið í 3 ár ..... 80.000,—

Lending í Syðrugøtu ..... 80.000,—

Runavíkar

Øki til oljugoymslu í Søldarfirði

¾ av 120.000 kr./ársið í 3 ár ..... 120.000,—

Ahøfur á lendingina í Æðuvík ..... 50.000,—

Bryggja við Bakkafrost á Glyvrum

¾ av 200.000 kr./ársið í 5 ár ..... 200.000,—

Nes

Dekkshátahavn á Oyrunum á Toftum
¾ av 200.000 kr./ársið í 4 ár ..... 200.000,—
Byggibúning fyri fiskavirki á bryggjuni í Oyrunum v.m.
¾ av 300.000 kr./ársið í 5 ár ..... 300.000,—

Sjóvar

Bátahyl á Selatrað
¾ av 50.000 kr./ársið í 2 ár ..... 50.000,—
Lendingarveg í Kolheinargjógv
¾ av 75.000 kr./ársið í 4 ár ..... 75.000,—
Bátahyl við Sjógv
¾ av 75.000 kr./ársið í 4 ár ..... 75.000,—
Til byggibúgving av øki á havnarplássi til fiskiídnaðarvirki
¾ av 150.000 kr./ársið í 2 ár ..... 150.000,—

Haldórsvíkar

Bátahyl í Haldórsvík
¾ av 100.000 kr./ársið í 6 ár 100.000

Hvalvíkar

Bátahyl
¾ av 50.000 kr./ársið í 4 ár ..... 50.000,—

Kollafjarðar

Bátahyl í Kollafirði
¾ av 80.000 kr./ársið í 3 ár frá 1978/79

Tórshavnar Uttanbýggja

Bátahyl á Argjum
¾ av 500.000 kr./ársið í 2 ár ..... 500.000,—
Restin av byggipeninginum, ¾ av 1 mill. kr., verður veitt í nýggju ætlanini fyri smærri havnir, ið byrja skal í 1979/80

Nólsoyar

Byggibúning av grundøki, gerð av bryggju, umvæling av vegi gjøgnum fjøruna
¾ av 200.000 kr./ársið í 5 ár 200.000,

Sandavágs

Bátahyl í Sandavági

¾ av 150.000 kr./ársið í 4 ár frá 1978/79

Miðvágs

Bátahyl í Miðvági

¾ av 200.000 kr./ársið í 5 ár ..... 200.000,—

Sørvágs

Radarreflex á Skerhólmi ..... 40.000,—

Bátahavn í Sørvági

¾ av 100.000 kr./ársið í 3 ár ..... 100.000,—

Sands

Øking um byggiøkið við havnina

¾ av 150.000 kr./ársið í 2 ár ..... 150.000,—

Skopunar

Ymisk arbeiði í sambandi við flakavirkið

¾ av 300.000 kr./ársið í 2 ár 300.000,

Skálavíkar

Dýping og víðkan av innsiglingini, brimgarð, grótgarð og spesialportur

¾ av 300.000 kr./ársið í 4 ár (eykajáttan og nýjáttan) 300.000,—

Húsavíkar

Bátaspæl í Húsavík ..... 40.000,—

Lending á Skarvaskeri

¾ av 200.000 kr./ársið í 4 ár ..... 200.000,—

Lending í Dali

¾ av 200.000 kr./ársið í 2 ár ..... 160.000,—

Hvalbiar

Brimgarð í Sandvik

¾ av 200.000 kr./ársið í 3 ár ..... 200.000,—

Tvøroyri

Bátadrátt í Froðba

¾ av 40.000 kr./ársið í 2 ár 40.000,

Fámjins
Leinging av bryggju
¾ av 75.000 kr./ársins í 2 ár ..... 75.000,—

Porkeris
Lending
¾ av 200.000 kr./ársins í 2 ár ..... 200.000,—

Sumbiar
Pollin í Sumba
¾ av 100.000 kr./ársins í 2 ár ..... 100.000,—

Tilsamans ¾ av kr. 5.905.000,—

kr. 4.428.750,—

B.

Landsverkfræðinginum verður álagt at kanna viðurskiftini gjøllari í sambandi við umsóknir viðvikjandi:

Lendibrúgv á Norðskála
Bátahyli í Signabø
Bátahyli á Válinum
Bátahyli í Vestmanna
Bátahyli í Ánnum
Útbygging av lendingini í Fámjin
Útbygging av Pollinum í Sumba
Útbygging av lendingini í Syðrugotu.

2. viðgerð 4. mai

Uppískoytisálit
til
løgtingsmál nr. 94/1976: Vegir og lendingar.

Í løgtingssetuni 1968 varð lagt fyri tingið lógaruppskot, løgtingsmál nr. 82, av táverandi landsstýri. Málið varð beint í vega- og havnanevndina,

men kom onganfið aftur úr nevndini. Aftur í fjør kom hetta mál til viðgerðar í løgtinginum, men fekk ov lítla undirtøku.

Ein minniluti í vega- og havnanevndini (Jógvan Olsen og Kjartan Mohr) metir hetta mál hava stóran týðning, av tí at her er talan um nógvan almennan pening.

Minnilutin loyvir sær tí at seta fram fylgjandi

uppskot
til

løgtingslóg um eina sitandi løgtingsnevnd í vega- og havnamálum.

§ 1.

Løgtingið velur fyri hvørt valskeið 4 tingmenn, sum saman við landsstýrismanni/mannum fyri vega- og havnamál og undir hansara fyrisæti skulu útgera nevnd, hvørs uppgáva er at vera lið millum tingið og landsstýrið í havna- og vegamálum.

2. stk. Fyri hvønn av nevndarlimunum verður samstundis valdur varamaður.

§ 2.

Nevndin skal viðgera og góðkenna høvuðsætlanirnar innan landsvegagerð, havnagerð, umsiting, innkeyp av amboðum og tilfurt, og annars geva sitt viðmæli, táið talan kann vera um broytingar í landsvegaskránni.

§ 3.

Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.

lagtingslov om et permanent lagtingsudvalg i vej- og havnesager.

§ 1.

Lagtinget vælger for hver valgperiode 4 lagtingsmedlemmer, der sammen med landsstyremanden for vejanliggender og under hans forsæde skal udgøre et udvalg, hvis opgave det er at være forbindelsesled mellem lagtinget og landsstyret i anliggender vedrørende vejene.

Stk. 2. For hvert udvalgsmedlem vælges samtidig en suppleant.

§ 2.

Udvalget skal behandle og godkende de planlagte hovedidispositioner vedrørende anlæg og vedligeholdelse, indkøb af redskaber og materiale, og iøvrigt udtale sig, når der kan være tale om ændringer i landsvejfortegnelsen.

§ 3.

Denne lov træder i kraft straks.

Uppskot frá Havna- og veganevnd løgtingsins I, vegir A samtykt við 22—0. Nýjáttan til lendingar samtykt við 22—0 og B samtykt við 22—0. § 1 í uppiskoytisáliti frá Kjartan Mohr og Jógvan I. Olsen til løgtingslóg um eina sitandi løgtingsnevnd fall við 12—0.

95. Skipan millum Føroyar og Sovjetsamveldið um sínámillum fiskirættindi

Ár 1977, 3. mai, legði Atli P. Dam, løgmaður, fram

Uppskot
til
samtyktar.

Løgtingið góðkennir viðløgdu skipan frá 28. apríl 1977 um sínámillum fiskirættindi millum Føroyar og Sovjetsamveldið.

Viðmerkingar:

Tann 25. og 27. apríl 1977 fóru fram samráðingar í Keypmannahavn millum øðrumegin umboð fyri uttanríkisráðið og landsstýrið og hinumegin umboð fyri sovjettisku myndugleikarnar. Samráðingarnar snúðu seg um føroysku áhugamálini viðvíkjandi fiskirættindum á sjóøki Sovjetsamveldsins í Barentshavinum og sovjettisku áhugamálini viðvíkjandi rættinum til fiskiskap á sjóøki Føroya.

Partarnir samdust um eina skipan fyri sínámillum fiskirættindi í 1977.

Høvuðslátturin í hesi skipan er, at báðir partar loyva framhald av fiskiskapi á sjóøkinum hjá hvørjum øðrum. Hetta ber í sær, at føroysk skip kunnu halda fram við at fiska serliga tosk og hýsu, men harumfram eisini at fiska lodnu á sjóøki Sovjetsamveldsins uttan fyri 12 fjórðingar. Somuleiðis skulu sovjetisk fiskifor kunna halda fram við at veiða svartkjaft á sjóøki Føroya.

Skipanin fyrisetur ikki beinleiðis veiðunogdir (kvotur) ella skipatal, sum partarnir loyva at fiska hjá hvørjum øðrum. Hetta stendur í samband við, at viðurskiftini sum heild viðvíkjandi fiskiskapi í Hvitahavinum og Barentshavinum ikki enn eru heilt avklaraði.

Partarnir eru samdir um at miða móti skjótast gjørligt í 1977, at samráðast um ein sáttmála um sínámillum fiskiáhugamál, sum ætlast at røkka yvir nøkur ár.

Miðað verður móti, at sovjetiska svartkjaftaveiðan kann byrja 10. mai 1977.

F.L. j. nr. 1500-4-39

Veiddu nøgdirnar hjá báðum pørtum skulu roknast við í kvoturnar fyri 1977, sum partarnir møguliga semjast um seinni.

Báðir partar siga seg áhugaðar fyri samvinnu viðvíkjandi fiskirannsóknum.

1. viðgerð 3. mai, málið beint í marknaðarnevnslina, sum 3. mai legði fram soljóðandi

U m s e t i n g

Váttað frásøgn.

Umboð fyri Sovjetsamveldið øðrumegin og fyri donsku stjórnina og Føroya Landsstýri hinnumegin hittust 25. og 27. april 1977 til at umrøða spurningar í samband við sovjettisk fiskaríáhugamál á sjóøki Føroya og føroysk fiskaríáhugamál á sjóøkinum undir jurisdiktión Sovjetsamveldsins í Barentshavinum uttanfyri 12 fjórðingar í 1977. Yvirlit yvir samráðingarúttakararnar er viðlagt.

Partarnir samdust um fylgjandi:

Grein 1.

Partarnir mettu seg at hava áhuga fyri at miða móti at gera ein sáttmála um sínámillum fiskarímál í 1977. Við hesum fyri eyga samdust partarnir um, so skjótt tað ber til at samráðast um ein slíkan sáttmála. Inntil ein tílíkur sáttmáli er gjørdur, skal sínámillum fiskiskapur í 1977 fara fram frá 10. mai 1977 sambert reglurnar í eftirstandandi greinum.

Grein 2.

Føroysku myndugleikarnir skulu loyva sovjettiskum skipum at halda fram við at veiða svartkjaft á sjóøki Føroya.

Sovjettisku myndugleikarnir skulu loyva føroyskari veiðu av fiski av toskaslagi og av lodnu á økinum undir jurisdiktión Sovjetsamveldsins í Barentshavinum uttan fyri 12 fjórðingar.

Grein 3.

Partarnir skulu skjótast gjørligt senda hvørjum øðrum ein lista yvir skip, sum veiðuloyvi verður umbiðið fyri. So leingi henda skipanin er galdandi, kann hvør av pørtunum biðja um, at fiskiloyvi verðir flutt yvir til onnur skip.

Grein 4.

Hvør parturin skal taka øll neyðug stig til at tryggja, at skip hansara halda tær lógir og aðrar viðkomandi reglur viðvíkjandi fiskarí innan fyri fiskarijurisdiktiónina hjá hinum partinum.

Grein 5.

Veiðan hjá hvørjum partinum innanfyri fiskarijurisdiktiónina hjá hinum partinum skal roknast uppí kvoturnar fyri 1977, sum semja kundi fingist um.

Partarnir frambóru áhuga teirra í at fremja felags tiltøk fiskiramsóknum viðvíkjandi.

Gjørd í 2 eintøkum í Keypmannahavn tann 28. april 1977.

Álit.

Málið varð lagt fram av landsstýrinum 3. mai 1977 og eftir 1. viðgerð sama dag beint í marknaðarnevndina.

Nevndin tekur einnælt undir við uppskoti landsstýrisins.

Uppskot landsstýrisins varð samtykt við 18 - 0 atkvøðum.

96. Havnaætlan 1978/85

Ár 1977, 12. mai, legði havna- og veganevndin fram

Uppskot
til
løgtingslóg um 8 ára ætlan fyri útbygging av havnunum.

§ 1.

Úr landskassanum verður veittur studningur til útbyggingar av havnum í niðanfyri nevndu kommununum, soleiðis at studningurin verður til støddar 50% av byggipeninginum, tó í mesta lagi 50% av niðanfyri tilskiluðu upphældum og rindaður við eins stórum ársgjøldum í 8 fylgjandi fíggjarárum frá og við fíggjarárinum 1978/79 at rokna:

Kommuna	Kr.
Klakksvíkar	25.000.000
Fuglafjarðar	10.000.000
Leirvíkar	5.000.000
Gøtu	10.000.000
Runavíkar	15.000.000
Nes	8.000.000
Skála	10.000.000
Sjóar	8.000.000
Eiðis	8.000.000
Haldórsvíkar	6.000.000
Kollafjarðar	6.000.000
Tórshavnar	20.000.000
Vestmanna	12.000.000
Miðvágs/Sandavágs	8.000.000
Sørvágs	8.000.000
Skopunar	7.000.000
Sands	8.000.000
Hvalbiar	10.000.000
Froðbiar	15.000.000
Porkeris	5.000.000
Vágs	12.000.000
Tilsamans kr.	216.000.000

§ 2.

Tann partur av játtanini, sum ikki er arbeitt fyri, tá ið fíggjarár er komið at enda, verður við uppískoytisjáttan á løgtingsfíggjarlógini fyri fylgjandi ár javnaður samsvarandi broytingum í indeksinum fyri havnabyggingar, sum gjørt er til útrokningar av føroysku tjóðarroknskapunum við føstum prístum sum grundarlag.

§ 3.

Eingin studningur verður goldin ella bundin til gjaldingar, fyrr enn allar treytir, landsstýrið skuldi sett í sambandi við góðkenning av byggiætlan, eru loknar.

§ 4.

Landsstýrinum verður heimilað at veðhalda fyri lánum, kommunurnar mega taka í sambandi við fremjing av útbyggingunum sambært hesi løgtingslóg.

§ 5.

Landsstýrinum verður heimilað at prioritera fremjingina av byggingunum sambært hesi 8 ára ætlan fyri at sleppa undan teim samfelagsligu ampum og teim eykaútreiðslum hjá kommunum, sum kunnu standast av, at farið verður undir stóran part av arbeiðunum í senn.

§ 6.

Landsstýrið verður at taka upp samráðingar við ríkisstýrið um studning til byggingar undir hesi ætlan.

§ 7.

Uttanda løgtingslóg kemur í gildi beinanvegin.

Viðmerkingar:

Tá ið seinra kríggið byrjaði, var komið stutt áleiðis við havnabygging her á landi — eins og við so mongum øðrum — og var tí eitt tað fyrsta, tingið studlaði til nuns, tá ið inntokur landskassans fóru at vaksa undir krígnum, havnarbyggingarmálini.

Undir krígnum og fyrstu árini aftaná kom ikki nógv á skaftið í havnabygging, tí timbur og jarn l.d. fingust at kalla ikki til hetta endamál; men seinasta sløkn 30 árini er so játtaður studningur til útbyggingar sambært trinnum 10 ára ætlunum og til aðrar havnabyggingar eisini.

Hóast íleggingarnar hava verið stórar, tørvar sjóvinnuni framvegis í stóran mun meiri alløgupfáss og tryggari og betur útgjørdar havnir. Í

seinastu setu varð tí sagt tinginum frá, at nýggj havnaætlan fór at verða løgd fram í hesi setu.

Tann minkingin av peningavirðinum sum stuðugt er farin fram, gjørdi at báðar undanfarnu 10 ára ætlanirnar máttu supplerast við eykajáttanum, tá ið partur av tíðarskeiðinum var farin. Fyri at sleppa undan eykajáttan er í uppskotinum ásett, at tann parturin av játtanunum ,sum ikki er bygd fyri við enda á fíggjarárið, skal vera javnaður samsvarandi broytingunum í indeksinum fyri havnubygging, sum gjørt er til útrokningar av føroyska tjóðarrokuskapinum við føstum prísum sum grundarlag.

Tað kann verða til umpa fyri vinnulivið annars og til ógagns fyri fíggjarviðurskiftini í samfelagnum, um fremjingin av hesum havnabyggingum ikki verður javnað yvir tað tíðarskeiðið, studningurin fellur til gjaldingar í; slík trygging ger tað eisini møguligt at rinda studningin til hvørja bygging sær, meðan arbeiðið fer fram og minkar hetta munandi um rentuútreiðslurnar hjá kommununum. Tað kann gerast neyðugt í onkran mun at prioritera arbeiðini, um ikki farið skal vera undir stóran ella størra partin av byggingunum í senn, og tí er í uppskotinum givin landsstýrinum heimild til tílíka prioritering.

Dánjal P. Danielsen

/ M. Hehnsdal

LANDSVERKFRØÐINGURIN

Tórshavn, 3. maj 1977.

Havnaætlan 1978/85

Hóast 10 ára ætlanin, sum byrjaði í 1969, enn ikki er útrunnin var í tinginum løgd tílík áherðsla á at fáa studningsjáttanir til ymiskar havnabyggingar, at landsstýrið í seinastu tingsetu lovaði at leggja fram uppskot til nýggja havnaætlan í hesi setuni.

Vil hava í hesum sambandi havt samráðingar við øll avvarðandi bygdaráð og viðgjørt teirra ynski og umsóknir so gjølla, sum tann tíð, ið til taks hevur verið, hevur loyvt.

Eins og undan seinastu 10 ára ætlan hevur eisini frammanundan hesi verið tosað um 5 ára ætlan: men heldur ikki hesa ferð verður broyting í, tí um so varð, var neyðugt at býta havnirnar í tvíningar, so bert annar parturin kom upp í part í fyrsta atlogu (fyrra 5 ára skeiðið); at fáa tílíka skipan í lag annað hvørt í senju ella sum áseting nam vera ógjørligt at kalla.

Niðanfyri er so greitt eitt sindur frá, hvat tey ymisku bygdaráðini meta tørvin at vera og hvørjar byggingar talan kann verða um at fremja:

Klaksvíkar havn.

Ein stórur partur av fiskiflotanum hoyrir heima í Klaksvík og oftum er trongligt at fáa alløguplass. Tað er tí neyðugt at byggja meiri alløgusíðu og her verður fyrst og fremst hugsað um vestursíðuna á vánni frá Stórubrúgv og áleftir. Men eisini á Stongunum verður hugsað um úlbygging, soleiðis at útróðrarbátarnir fáa betri umstøður til upp- og innskipan av reiðskapi.

Umstøðurnar hjá farmaskipunum eru heldur ikki tíðarhóskandi og neyðugt er at gera meiri alløgusíðu og at fáa øki til pakkhús. Við at leingja alløgusíðuna undir Skipafelagshúsinum suðureftir kann verða komið hesum báðum áhugamálum á møti.

Í 1980 gongur sáttmálin út, sum Klaksvíkar kommuna hevur við oljufelógini. Av fleiri orsøkum er býráðið ikki sinnað at framleingja hesar sáttmálar. Yvskilgt er, at oljan fer út um býn, og at serstøk bryggja verður bygd í hesum sambandi. Hesin spurningur kann møguligga loysast í sambandi við typping av Haraldssundi.

Fuglafjarðar havn.

Hóast Fuglafjørður ikki er brimpláss, er ofta so nógvur súgur og vindvág, at teir smærru útróðrarbátarnir eru noyddir at liggja fyri teymi. Fyri at henda vinna ikki skal fána burtur, er neyðugt við eini skipa- og bátahavn, sum ætlað er at liggja innan fyri tað nýggja trolvirkið P/f Vónin.

Eisini er tørvur á meiri alløguplássi bæði inni við trolvirkið og utanfyri sildaverksmiðjuna. Kommunan hevur søkt um studning til gerð av 100 m.

Hesi arbeiði eru metti at kosta 10 mill. kr.

Leirvíkar havn.

Kommunan hevur søkt um studning til leingjan av gamla pieriunum og til gerð av høvdi á bringarðinum á Kráarlanga.

Øll skip, sum eru komin inn í havnina, liggja trygg á øllum ættum og í øllum veðri; men tá ið ódnarveður er av norðri, kann vera vandamikið at sigla inn.

Við at leingja gamla pierin verður bøtt um innsiglingina samstundis sum økt verður um alløguplássið til tey stórstu skipini, ið ikki kunnu koma inn í havnina (her verður mest hugsað um frystiskip, ið koma eftir flaki).

At fryggja innsiglingina við einum høvdi á bringarðinum er rímuligt,

tá ið hugsað verður um, at ferðamannaskip siglir inn her fleiri ferðir um dagin.

Nevndu arbeiði eru metti at kosta 5 mill. kr.

Gøtu havn.

Yuski er frá Gøtu kommunu at fáa studning til gerð av brimgarði sunnan fyri havnina í Norðragøtu.

Sum er, kann havnin hert nýtast í góðum veðri, og er tað tí neyðugt at skapa meiri livd, so størri og smærri fiskifør kunnu liggja trygg í øllum veðri.

Arbeitt hevur verið við hesum máli, og hava modelroyndir vist, at besta úrslitið í mun til kostnaðin, fæst við at gera ein brimgarð 160 m sunnan fyri havnina, sum er.

Enn vanta nakrar kanningar, áðrenn endaligt projekt kann verða gjørt, og er tí ikki lætt at meta um kostnaðin av hesum arbeiðinum; men verða játtáðar 10 mill. kr., verður helst nakað av avlopi til at planera økið millum verandi havnarlag og ætlaða brimgarðin.

Runavíkar havn.

Umstøðurnar í Runavíkar havn eru ikki tær bestu, tí rættiliga stórur partur av havnini er ov grunnur fyri vanlig fiskifør. Ætlanin er tí at dýpa hendu partin og gera fleiri atløguplkáss. Dýpingin krevur stórt spreingiarbeiði og verður tí rættiliga kostnaðarmikil.

Kommunan hevur søkt løgtingið um studning til hesi arbeiði, ið verða metti at kosta stívar 22 mill. kr. Tá verður roknað við at fáa 670 m av bryggjusíðu, so her má sigast at rívan er tikið til.

Ætlanin er at turrleggja økið, sum dýpast skal, so hesin parturin av arbeiðinum má helst verða framdur í einum; hareftirat eigur so at verða gjørdir einir 2—300 m av atløgusíðu. Kostnaðurin verður mettur til u.l. 15 mill. kr.

Nes kommuna. (Havnarlagið á Toftum)

Í løtuni fer fram arbeiði við at víðka bryggjuna í Oyrunum, men henda øking kemur bert fyri ein part tí tørvi, sum er, á møti.

Flakavirkið (P/f Nykur) hevur ætlanir um stóra úthygging, og krevur hetta, at bæði verður økt um plássið á landi og um longdina av atløgusíðu.

Skulu skip liggja trygt á Toftum má verða skapt verja móti lágattunum, og er tí ætlanin hjá bygdaráðnum at byggja brimgarð sunnan fyri atløgupierin við Toftagjógv.

Skála havn.

Kommunan hevur søkt um studning til gerð av 130 m atløgusiðu fram við landi um Langasandsleiðina.

Við tað at nýbygningar og skip, ið koma til Skála Skipasmiðju til umvælingar, ofta liggja leingi við bryggju, er tørvurin her stórur á atløgusiðu.

Sum er, er ofta trongligt við teir báðar pierarnar, og verður roknað við, at tá ið turrdokkin, sum er í gerð, verður liðug, koma uppaftur fleiri og støvri skip higar til umvælingar og eftirsýn.

Skotið verður tí upp at koma umsóknini á møti. Kostnaðurin er mettur til 10 mill. kr.

Sjóar kommuna.

Kommunan hevur søkt um studningsveitan til útbygging av havnarlagnum við Heyggsstøð. Ætlanir eru um at seta eitt flakavirki har og at fáa gjørt nýtt atløgupláss til «Tróndi» á útsíðuni á grótkastinum um bátahylin. Um hetta nýggja atløgupláss skal vera nýtuligt í flestu førum, verður uttan iva neyðugt at leingja pierin á Heyggsstøð eitt fitt petti.

Fyri at nóg stórt øki kann fáast til flakavirkið verður neyðugt at fylla nakað út sunnanfyri pierin á Heyggsstøð.

Kommunan hevur eisini søkt um studning til at gera teir 80 m, sum liggja ímillum ta eldru bryggjuna á Hulki og hina nýggju.

Higartil hevur Hulkurin verið roknaður sum havnarplássið, ið skuldi útbyggjast og brúkast til tey vinnuligu endamálini, meðan byggingin á Heyggsstøð kom til samferðsluliga tørvinum á møti.

Vart verður gjørt við, at skal broyting verða í hesum, krevur tað sera stórar íleggingar um Heyggsstøðarleiðina.

Eiðis havn.

Síðan flakavirki kom á Eiði hevur stór menning verið í bygdini. Nú hoyra til kommunina 3 skip og 5 útróðrarbátar umframt fleiri seksæringar.

Tað ið tørvur er á, er deils meiri atløgupláss og deils betri lívd. Ætlanin er tí at byggja bringarð í ein landssymning úr pierinum, sum er, og at gera atløgusiðu á innasta parti av innsiðuni á bringarðinum. Hetta grótkast hevði so eisini gjort tað møguligt at bygt atløgupláss fram við landi undir flakavirkinum.

Haldórsvíkar havn.

Í Vík er komið flakavirki, sum bevur stóran lýdning fyri bygdina og útróðurin í øllum grannabygdunum .

Umstøðurnar við havsíðuna gera hesa vinnu so tvorliga — eftir mátiðar máti — at ivi er í, um flakavirkið framyvir fær neyðugu rávorunna.

Kommunan ynskir at leingja pierin við 15 m fyri at bøla um landingarumstøðurnar og at gera ein bringarð eystanfyri havnarlagið sum kann skapa ta lívd, ið neyðug er, fyri at bátar og smærri skip kunnu liggja har í øllum veðri.

Kostnaðurin er mettur til 6 mill. kr.

Kollafjarðar havn.

Í Kollafirði eru 108 m av atløgusiðu. Av hesum eru 36 m bygdir undir krígnum og tørva hesum nú ábøtur.

Kommunan hevur søkt um studning til hesar ábøtur og til bygging av 76 m atløgusiðu og gerð av uppkoyring frá havnarplássinum. Hesi arbeiði verða mett at kosta góðar 7 mill. kr.

Á seinasta havnaætlan fekk kommunan játtan uppá 2 mill. kr. og síðani eina cykajáttan uppá 1 mill. kr. Av hesum hevur kommunan higartil bert brúkt u.l. 0,7 mill. kr.

Tórshavnar havn.

Kommunan hevur søkt um studning til útbygging í Vágsbotni, á Sundi og til gerð av bátahavn í Álakersvík.

Fyri at tryggja tí vinnu, sum nú er á vestaru bryggju betri innstøður og vakstrarmøguleikar, er neyðugt við meiri atløguplássi á Vestaru vág.

Tá ið oljutangarnir einaferð verða fluttir av Viðarnesi inn á Sund, verður eisini her tørvur á meiri atløguplássi til tey skip, ið skulu higar við og eftir olju.

At tað er rímuligt, at eisini bátaeigarar í Tórshavnar kommunu fáa umstøður at leggja bát frá sær, so at ongin ampi er av honum, eru helst øll samd um. Tað er tó ikki vist, at rætta loysnin er at halda áfram við at taka av tí dýrgoldna kyrruvatni, sum Havnarvág er nú, til hetta endamál.

Møguleikin at gera stóra bátahavn á Kaldbaksfirði átti at verið kannaður.

Skotið verður upp at játta 50% av 20 mill. kr.

Kostnaðurin av samlaðu bryggjubyggingini er mettur til 14 mill. kr. og til gerð av bátahavn og bátabrúm til 6 mill. kr.

Vestmanna havn.

Í Vestmanna hevur staðið toluliga til viðvikjandi atløguplássi, men stórt nýtt flakavirki varð tikið í nýtslu fyri stuttum, og fer hetta tiltak uttan iva at bera við sær økta skipaferðslu, og umframt er at siga, at 1. juli 1978 kemur í gildi reglugerð um reinføri á fiskavirkjum og á bryggjuøkjum frammanfyri virkjum og at ásetingarnar í hesi reglugerð skerja brúkið av bryggjuni munandi, tí aftaná ta tíð kann henda næstan bert brúkast av skipum sum landa fisk ella taka inn fiskavøru.

Tað er tí neyðugt við meiri atløgusiðu og ætlanin er at byggja frá ferjulegum og vestureftir. Somuleiðis er ætlanin at skapa lívd til útróðrarbátarnar, ið eru vorðnir fleiri í tali tey seinastu árini.

Miðvágs- Sandavágs havn.

Í løtuni verður brimgarður bygdur í Miðvági fyri at skapa trygga havn har. Hetta arbeiði verður væntandi liðugt um árslok.

Skipatalið í Miðvági og Sandavági er í vøkstri og harumfram koma onnur tør hagar til umvælingar, so ynskjandi er, at eisini nakað av atløgusiðu verður bygt í hesum viðfangi.

Sørvágs havn.

Kommunan hevur søkt um studningsveitan til gerð av einum brimgarði út frá landi uttanfyri havnarlagið til verja móti vindvág av norðri og útnyrðingi.

Skopunar havn.

Tey seinastu árini er farin fram stór útbygging av havnini í Skopun; men ásannast má, at úrslitið ikki er so gott sum roknað varð við. Tað er tí neyðugt at gera nakað fyri at bøta um viðurskiftini.

Hvat ið gerast skal fyri at fáa best møguligt úrslit, er ikki støða tikin til enn, men tað er kostnaðarmikið at byggja móti opnum havi og á djúpum vatni.

Skotið verður tí upp at játta 50% av 7.000.000 kr.

Sands havn.

Kommunan hevur søkt um studning til 50 m leingjan av pierinum sunnan fyri havnina og til gerð av bátabryggju fram við norðurendanum á bátahavnini.

Longu nú er talið á útróðrarbátum so stórt, at trongligt er inni í sjálvari havnini.

Mett verður, at um pieruriu sunnan fyri havnina verður longdur við 50 m, verður forhavnin tað kyrrari, at liggjandi er her í vanligum likindum. Eisini kemur henda útbygging at bøta munandi um umstøðurnar hjá størri skipum.

Mælt verður til, at gingið verður umsóknini á møti. Kostnaðurin er metur til 8 mill. kr.

Hvalbiar kommuna.

Kommunan hevur søkt um studning til gerð av skipahavn innan fyri pierin á Hamranesi.

I Hvalbiar kommunu er ógvuliga smáligt við fiskiførum og kemst hetta kanska av, at umstøðurnar at hava skip eru sera vánaligar í kommununi.

I komandi árum verður útróðurin kanska ein lann mest týðandi vinnuvegurin, so umráðandi er, at tær bygdir, har møguligt er at hava fiskifør, bøta so væl sum gjørligt um viðurskiftini.

Tað er torført at gera havn í Hvalba og tí er neyðugt at gera eitt nágreiniligt kanningararbeiði av viðurskiftunum og teimum ymsu møguleikunum.

Tvøroyrar havn.

Fyri fáum árum síðani varð stórur partur av hylinum innan fyri høvuðspierin dýptur og bryggja bygd fram við landi. Rímuligt hevði verið, um dýpingin bleiv fullfíggjað, soleiðis at góð atløgusiða fekst runt allan hylin.

Vestari pierurin er illa farin og krevst stórt umvælingararbeiði nakað skjótt.

Av tí at strandfaraskipini tarna arbeiðinum á flakavirkinum mælir býráðið til, at ferðsluhavn verður løgd á Hvítanesi. Um so verður, er tað rímuligt um vegasamband verður lagt gjøgnum fjørina millum bæði havnaløgini.

Porkeris havn.

Sambært havnaætlanini 1959/69 varð bygdur pierur frá eystara landinum, og í 1976 varð hesin longdur við 60 m longum grótkasti. Ætlanin er at longja grótkasti uppaftur meira og gera eitt grótkast frá hinum landinum so lívd verður inni á víkini. Síðani er ætlan um at byggja atløgusiðu til skip og bátar innanfyri.

Hesi arbeiði eru metti at kosta 5 mill. kr.

Vágs havn.

At gera teir frestandi 50 m av atløgusíðuni fram við flakavirkinum á Tjørn er metti at kosta 3 mill. kr. Hartil ætlar kommunun at fremja eitt gamalt ynski, sum er at byggja atløgusíðu á 5 m dýpi millum bæði havnaverkini og gera nýggjan atløgupier til oljugoymslurnar á Oyrunum; hesi arbeiði eru metti at kosta ávikavist 6 og 3 mill. kr.

Mælt verður tí til at játta 50% av 12.000.000 kr.

1. viðgerð 12. mai, málið beint í figgjarnevndina.

Málið útsett til ólavsøku.

---

97. Forboð fyri troling á Føroya Banka og hægri minstumesku fyri trol v. m.

Ár 1977, 3. mai, legði Petur Reinert, landsstýrismaður, fram

Uppskot
til
samtyktar.

Landsstýrið fær saman við fiskivinnunevndini heimild til:

1. at seta forboð til 30. apríl 1978 fyri veiði við troli, snurriváð ella liknandi neti á Føroya Banka innan fyri 200 m dýpdarlinjuna.
2. at seta forboð frá 1. januar 1978 fyri at nýta nakað trol, snurriváð ella liknandi net, sum í teimum 8 aftastu metrunum hevur smærri meskur enn 155 mm, í trolinum annars er minstameskan 135 mm.
3. at seta forboð fyri at nýta toskagørn ella upsagørn, sum í nøkrum parti hevur smærri meskur enn ávikavist 170 mm og 160 mm.

Viðmerkingar:

ad uppskot 1: Fiskiskapurin í ár á Føroya Banka kundi týtt uppá, at stovnurin er ovurfiskaður, m.a. kann nevnast, at garnafiskiskapurin er so at siga misseydnaður.

Í samráðingum við lond, ið vanliga hava fiska á bankanum við troli, er bildið fram, at neyðugt er at verja stovnin, og hevur serliga verið fort fram at seta trolforboð. Torført hevur verið at fáa losi lond at góðkenna tilíkt forboð, um forboðið ikki eisini er galdandi fyri føroyingar sjálvar.

Eisini kann vísast til, at bankin er ógvuliga virðismikil leið hjá garna- og línuskipum, men letur tað seg illa gera at hava handa reiðskap standandi í frið, samstundis sum royni verður við troli.

Tá ið forboðstíðin í hesum umfarinum er sett til 28. apríl 1978, so er orsokin at fáa gýtingartíðina við.

ad uppskot 2: Í viðlagda umrøkni frá fiskirannsóknarstovnni dagfest 20. apríl 1977 verður greitt frá avleiðingunum, um minstamátið fyri meskuvíddina í troli verður lækkað til 155 mm úr 120 mm. Eftir 5 árum

er vinningurin í heildartírtøkuni fyri toska- og hýsustovnarnar rokkin. Mælt verður tí til at hækka meskuviddina

ad **uppskot 3:** Tær meskuviddir, ið verður skotið upp, eru tær vanliga nýttu.

Skjal: Unnmali frá fiskirannsóknarstovuni dagf. 20. apríl 1977.

Notat viðv. broyting av meskavidd í troli.
Um maskarnar í troli verða storri, hendir tað, at ein størri partur av fiskinum sleppur íggjøgnum meskarnar og fær moguleika at vaksa meira. Hugsa vit okkum t.d. at ein meskavídd tekur fisk niður í 44 cm, so tekur ein størri meskur kanska bert niður til 57 cm (verður vanliga uppgivið sum 50% seleksjónspunktið, t.e. tann stødd har 50% av fiskinum verður tikið og 50% steppur íggjognum. Yvirgongdin frá, at ein stødd verður tikin í minni talið, til hon verður tikin 100% er liðandi, ymisk fyri ymisk fiskasløg). Við øðrum orðum, í hesum dømunum sleppur fiskurin at vaksa úr 44 til 57 cm áðrenn hann verður tikin við troli, og gevur tað meira vekt. Tað er tó ikki alt, ið fær loyvi at vaksa upp til 57 cm, tí ein partur verður veiddur við øðrum reiðskapi, og ein partur doyr av náttúruorsøkum, áðrenn hann kemur so langt.

Útrokningar av avleiðingunum av meskuviddarbroytingum verða tí gjørdar á tann hátt, at roynt verður at finna fram til, hvussu stórur missurin er í **fyrstu syftu** (av tí at eitt minni tal av fiski verður tikið), og hvussu stórur **langtíðarvinningurin er** (tá fiskurin hevur havt tíð til at vaksa seg upp til ta stødd, sum verður tikin av trolinum við tí storra meskanum).

Arbeiðsbólkurin undir ICES fyri Føroyar hevur gjørt kanningar hesum viðvíkjandi fyri tosk og hýsu. Fyri upsa eru ongar beinleiðis kanningar, men út frá vitan um, at tað einannest er eldri og storri upsi, sum verður tikin við troli, verður metti, at ein lítil missur er fyrsta ári, men longu árið eftir er útrøkan komin á hitt sama, sum hon var áðrenn broytingina.

Av tí at 155 mm meskur tykjast at verða brúktar í NEAFC región I í framtíðini (Ísland hevur broytt og Noreg ætlar at broyta), so verða her útroknaðu avleiðingarnar av at flyta meskuviddina upp í 155 mm settar upp. Broytingin er útroknað í %.

Avleiðingar av at meskavíddin í troli verður broytt til 155 mm (nylon). Toskur

ár eftir broyting	Føroyar trol	lina	garn	snella	Bretland trol	allur reiðskapur tils.
1	—14.8	+ 0.5	+	+ 1.0	—15.2	— 8.8
2	—12.7	+ 2.3	+ 1.63	+ 3.6	—13.3	— 6.9
3	— 9.8	+ 5.0	+ 4.0	+ 6.7	—10.6	— 4.1
4	— 6.9	+ 8.1	+ 7.2	+ 9.6	— 7.9	— 1.2
5	— 4.7	+11.0	+10.7	+11.9	— 5.7	+ 1.2
10	— 1.8	+16.4	+17.0	+15.5	— 2.3	+ 5.3
20	— 1.7	+16.8	+17.2	+15.8	— 2.1	+ 5.5

Hýsa

ár eftir broyting	Føroyar trol	lina	Skotland trol	Ongland trol	Allur reiðskapur tils.
1	—84.4	+ 15.0	— 87.9	—84.6	—51.2
2	—78.2	+ 49.9	—83.5	—79.2	—35.8
3	—67.7	+ 85.6	— 75.0	— 69.4	—17.8
4	— 55.7	+115.5	—66.0	— 57.2	— 0.6
5	— 48.0	+138.6	—59.3	—48.2	+12.2
10	— 44.7	+192.7	—55.8	43.0	+33.6
20	44.7	+206.0	55.8	— 43.0	+38.2

Hetta kann sigast stutt soleiðis:

1. Øking av meskavíddini til 155 mm ger, at trolið kemur at missa í mun til annan reiðskap. Serliga bretar koma at missa í hýsuni, og hevur hetta stóran týdning fyri teir, ti hýsan er so stórur partur av veiðu teirra.
2. Vinningurin í heildarúrtøkuni fyri stovnin er rokkin eftir 5 árum hæði hjá toski og hýsu, og nýggj javnvág við einum vinningi uppá 5% fyri tosk og 38% fyri hýsu er rokkin eftir um 10 árum. Við TAC virðinum fyri 1978 vildi hetta verið ein vinningur uppá 1.500 t av toski og 6.500 t av hýsu árliga.

3. Stovnurnir tola við størri meskuvídd hægri deyðatøl. Hetta hevur kanska serliga áhuga beint nú, har vit vita, at deyðatølini fyri báðar stovnar eru ov høg.

Umlugsið eigur at vera at lata landsstýrið fáa heimild til at geva smærri bátum loyvi at trola við smærri meskum, sum t.d. eftir flatfiski.

Fiskirannsóknarstovan, 20. apríl 1977.

J. S. Joensen

Viðv. meskavídd í toska- og upsagørnum verður mælt til at seta minstamát, soleiðis at meskarnir ikki verða smærri enn teir, ið nú vanliga verða brúktir.

1. viðgerð 3. mai, málið beint í fiskivinnunevndina, sum 11. mai legði fram soljóðandi

Álit

Málið varð framlagt av landsstýrinum og varð við 1. viðgerð beint í fiskivinnunevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og er samd um at taka undir við landsstýrinum í pkt. 1 at seta forboð til 30. apríl 1978 at veiða við troli á Føroya Banka.

Meirilutin í nevndini (Poul J. Olsen, Vilhelm Nielsen, Signar Hansen og Jógvan Olsen) kunnu ikki taka undir við pkt. 2 í uppskoti landsstýrisins um at økja meskaviddina til 155 mm, men mælir í staðin fyri til, at meskaviddin verður sett til 135 mm.

Minnilutin (Johan Simonsen) mælir í fyrstu syftu til at samtykkja pkt. 2 í uppskoti landsstýrisins óbroytt.

Ein annar meirilutí (Poul J. Olsen, Vilhelm Nielsen, Signar Hansen og Johan Simonsen) mælir til at samtykkja pkt. 3 í landsstýrisins uppskoti óbroytt.

Minnilutin (Jógvan Olsen) tekur undir við, at ikki er loyvt at nýta smærri meskar enn 170 mm í toskagørnum, men skjýtur upp, at í staðin fyri «160 mm» til upsagørn verður sett «150».

Meirilutin (Poul J. Olsen, Vilhelm Nielsen, Signar Hansen og Jógvan Olsen) setur soljóðandi

A. **broytingaruppskot**
til pkt. 2.
Í staðin fyri «155 mm» verður sett «135 mm».
Minniluti (Jógvan Olsen) setur soljóðandi

B. **broytingaruppskot**
til pkt. 3.
Í staðin fyri «160 mm» verður sett «150 mm».

2. viðgerð 11. mai.

Pkt. 1 í landsstýrisins uppskoti samtykt við 21—0 atkvøðum. Broytingaruppskot frá meiriluta í fiskivinnunevndini (P. J. Olsen, Signar Hansen, Vilhelm Nielsen og Jógvan Olsen) til § 2 í landsstýrisins uppsk. samtykt við 22—0, pkt. 2 so broytt samtykt við 22—0, pkt. 3 samtykt við 22—0. Broytingaruppskot frá minniluta (Jógvan Olsen) til pkt. 3 fall við 8—0.

---

98. Partapeningur í flakavirkið í Haldórsvík

Ár 1977, 3. mai, legði Jákup Lindenskov, landsstýrismaður, fram

Uppskot
til

løgtingslóg um broyting í lóg um partapening í P/F Føroyskt- íslendskt Fiskavirki, Haldórsvík.	**lagtingslov om ændring af lov om aktier i P/F Føroyskt-íslendskt Fiskavirki, Haldórsvík.**
§ 1.	§ 1.
Í løgtingslóg nr. 66 frá 11. sep-	I lagtingslov nr. 66 af 11. sep-

tember 1975 um partapening í Føroyskt-íslendskt Fiskavirki, Haldórsvík, § 1 verður «168.000 kr.» broytt til «258.000 kr.».

§ 2.

Henda lóg fær gildi beinnavegin.

tember 1975 om aktier i P/F Færøysk-islandsk Fiskavirki, Haldórsvík, § 1 ændres «168.000 kr.» til «258.000 kr.».

§ 2.

Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Málið um, at landsstýrið setur partapening í p/f Føroyskt-íslendskt Fiskavirki í Haldórsvík, var fyrstu ferð fyri í løgtingssetuni 1973, jbr. Løgtingstíðindi bls. 110. Byggikostnaðurin var tá mettur til 3 mió. kr., og fekk landsstýrið heimild at seta í partapeningi 100.000 kr. av einum samlaðum partapeningi uppá 500.000 kr.

Orsakað av prísvøkstri og eisini tí, at byggiætlanin varð broytt, kom felagið í 1975 í trupulleikar í figgingini. Kostnaðurin varð tá mettur til 4,2 mió. kr. Landsstýrið legði aftur málið fyri løgtingið og fekk heimild at seta 68.000 kr. afturat í partapeningi, jbr. løgtingsmál nr. 15/1975. Samlaði partapeningurin varð tá 837.500 kr.

Byggiarbeiðið er nú liðugt, og hevur virkið eisini verið í rakstri rættiliga leingi.

Eftir endaligu metingini er byggikostnaðurin gjordur upp til 6,5 mill. kr. Meirkostnaðurin hevur aftur sína orsøk í prísvøkstri og í, at projektið er vorðið størri.

Felagið hevur fingið lán úr banka til byggingina, m.a. 3.459.963 kr., sum landskassin veðheldur fyri eftir lógini um veðhald fyri lánt til frysti- og flakavirkir.

Felagnum tørvar nú um 1,1 mió. kr. í byggifinansiering, og er ætlanin, at hesin peningur skal útvegast soleiðis:

	kr.
Hækkan av partapeninginum	263.000,—
av hesum úr landskassanum 90.000 kr.	
Landskassaveðhald fyri uppískoytislán	406.000,—
Bankalán uttan landskassaveðhald	450.000,—
	1.119.000,—

Samlaði partapeningurin verður eftir hesum 1.100.500 kr., av hesum til landskassan 258.000 kr. ella um 22%.

1. viðgerð 4. mai, málið beint í fíggjarnevndina, sum 10. mai legði fram soljóðandi

Álit

Málið varð lagt fram av landsstýrinum 3. mai 1977 og undir 1. viðgerð 4. mai beint í fíggjarnevndina

Landsstýrið hevur skotið upp, at landskassans partapeningur í P/F Føroyskt-íslendskt Fiskavirki, Haldórsvík, verður hækkaður úr kr. 168.000,— upp til kr. 258.000,—.

Í viðmerkingunum frá landsstýrinum verður greitt frá málinum, sum tað byrjaði, og nú er endaligi byggikostnaðurin gjørdur upp til kr. 6.500.000,— sambært meting. Meirkostuaðurin er orsakaður av prísvøkstri og at projektið er vorðið størri.

Í byggifíggjan førva um kr. 1,1 mió. Partapeningurin skal hækkast við 263.000,—, av hesum kr. 90.000,— úr landskassanum. Samlaði partapeningurin verður kr. 1.100.500,— av hesum til landskassan kr. 258.000,— ella um 22%.

Á fundi millum fíggjarnevndina og landsstýrið í Tinganesi 9. mai 1977 hevur løgmaður upplýst, at tað frá landsstýrinum ikki var ætlað præcedensskapandi, at landskassapartur in av partapeninginum ikki verður 20%, men 22%,

Á fundi seinni í fíggjarnevndini var landskassaíløguprocentið og fíggjarmyndstrið umrøtt.

Ein meiriluti (Hákun Djurhuus, Poul Jacob Olsen, Tórálvur M. Olsen, Jógvan Durhuus, Signar Hansen og Pauli Ellefsen) tekur undir við uppskoti landsstýrisins.

Ein minniluti (Hilmar Kass) skilar til, at landskassans partur av partapeninginum ikki eigur at fara upp um 20%.

2. viðgerð 11. mai, 3. viðgerð 11. mai.

Uppskot landsstýrisins samtykt við 19—0 atkvøðum.

99. Løgtingslóg um endurnýgging av fiskiskipaflotanum

Ár 1977, 3. mai, legði Jacob Lindenskov, landsstýrismaður, fram sólj óðandi

Uppskot
til

løgtingslóg um endurnýgging av fiskiskipaflotanum.

Deild I.
Stuðulslán, lán og studningur.

§ 1.

Úr grunninum til endurnýggingar av fiskiskipaflotanum, stovnaður við løgtingslóg nr. 40 frá 4. mai 1957 fær landsstýrið heimild til at veita hesi stuðulslán, lán og studningar eftir reglunum í § 2 og fylgjandi í lógini:

1. Stuðulslán og studning til bygging,
2. Stuðulslán til maskinur og aðrar tekniskar innleggingar.
3. Studning til farmagjald av tilfari til bygging,
4. Veðhald fyri lánum.
5. Kurstapslánum.

Deild II.
Stuðulslán til bygging av deksfiskifari ella opnum útróðrarbáti.

§ 2.

Stuðulslán til bygging av deks-

lagtingslov om fornyelse af fiskerflåden.

Afsnit I.
Støttelån, lån og tilskud.

§ 1.

Landsstyret får bemyndigelse til af fonden til fiskerflådens fornyelse stiftet ved lagtingslov nr. 40 af 4. maj 1957 at yde disse støttelån, lån og tilskud efter reglerne i lovens § 2 og følgende:

1. Støttelån og tilskud til bygning,
2. Støttelån til maskiner og andre tekniske installationer.
3. Tilskud til fragt og materialer til bygning,
4. Garanti for lån.
5. Kurstabslån.

Afsnit II.
Støttelån til bygning af dæksfiskerfartøj eller åben båd.

§ 2.

Støttelån til bygning af deks-

fiskifari ella opnum útróðrarbáti kann veitast við upp til 20% av virðinum við maskinu og øðrum tilhoyri, tá bygt verður deksfiskifar á foroyskari skipasmiðju, tó upp til 25%.

2. stk. Verða skip ella bátur bygd aðrastaðni enn í Føroyum, er tað liggjarnevndin saman við landsstýrinum, sum tekur avgerð, um studulslán verður veitt.

§ 3.

Lánsveiting er treytað av, at viðkomandi eigari hevur í eginpeningi í minsta lagi 10% av virði skipsins.

§ 4.

Studulslán verður tryggjað við pantirætti í viðkomandi fiskifari innanfyri 90% av virðinum. Lánið verður goldið kontant og verður at afturrinda grunninum, tey fyrstu 3 árini eru avdráttarfri, lánið verður síðani at rinda aftur yvir 17 ár. Rentan er 4% p.a.

2. stk. Um so er, at skip ella bátur skiftir eigara ella fer í aðra vinnu enn fiskiskap, fellur lánið ella tað, sum stendur eftir til gjaldingar. Landsstýrið kann tó geva loyvi til, at tað, sum eftir stendur av lánintum, verður standandi í skipinum ella bátinum.

§ 5.

Studningur kann veitast skipasmiðjum í Foroyum upp til 6% av sáttmálaprísinum til fyrsta deksfiskifarið úr stáli, hvor av teimum fer undir at byggja.

2. stk. Til fulla ella partvísa endurrinding av serliga innflutningsgjaldinum av tilfuri til bygging av deksfiskifari í Foroyum

fiskerfartøj eller åben båd kan ydes med indtil 20% af værdien med maskine og andet tilbehør, ved bygning af deksfiskerfartøj på færøsk værft dog indtil 25%.

Stk. 2. Såfremt skib eller båd bygges andetsteds end på Færøerne, er det finansudvalget sammen med landsstyret, der træffer afgørelse om støttelån skal ydes.

§ 3.

Ydelse af lån er betinget af, at vedkommende ejer i det mindste har en egenkapital på 10% af skibets værdi.

§ 4.

Støttelånet sikres ved pant i vedkommende fiskerfartøj indenfor 90% af værdien. Lånet udbetales kontant og tilbagebetales fonden, de første 3 år er afdragsfri, lånet tilbagebetales derefter i 17 år. Renten er 4% p.a.

Stk. 2. Såfremt fartøjet skifter ejer eller overgår til andet erhverv end fiskeri, forfalder lånet eller det, der står tilbage af det, til betaling. Landsstyret kan dog give tilladelse til, at det, der står tilbage af lånet, bliver stående i skibet eller båden.

§ 5.

Tilskud kan ydes skibsværfter på Færøerne med op til 6% af kontraktsummen til det første stålfiskefartøj, som enhver af disse måtte påtage sig at bygge.

Stk. 2. Til fuld eller delvis dækning af den særlige indførselsafgift af materiale til bygning af deksfiskerfartøj på Færøerne kan

kann skipasmiðjan fáa í stuðningi upp til 9,75% av virði skipsins eftir meting.
3. stk. Aðrenn stuðningurin verður goldin, má skipið vera sýnað, góðkent og skrásett.

skibsværftet få et tilskud på op til 9,75% af skibets værdi efter vurdering.
Stk. 3. Forinden tilskudet udbetales, må skibet være synet, godkendt og registreret.

Deild III.
Stuðulslán til maskinu og aðrar tekniskar innleggingar.

§ 6.

Stuðulslán til nýggja maskinu ella maskinu nýklassað frá verksmiðju við í minsta lagi 1 árs garanti og aðrar tekniskar innleggingar í deksfiskifar ella opnan útróðrarbát, umbygging í samband við omlegging til aðra veiðu ella til at gera skipið meira nýtiligt í vinnuni ella leingjan av skipinum kann veitast við upp til 15% av kostnaðinum, heruppí innleggingarkostnaðinum.
2. stk. Verður arbeiðið gjort í útlandinum, verður stuðulslánið upp til 8%.

Afsnit III.
Støttelån til maskiner og andre tekniske installationer.

§ 6.

Støttelån til ny maskine eller maskine, der er nyklasset fra fabrikken med mindst 1 års garanti og andre tekniske installationer i et dæksfiskerfartøj eller åben båd, ombygning i forbindelse med omlægning til andet fiskeri eller til at gøre skibet mere anvendeligt i erhvervet eller forlængelse af skibet kan ydes med indtil 15% af omkostningerne, heri medregnet installationsomkostningerne.
Stk. 2. Udføres arbejdet i udlandet, er støttelånet indtil 8%.

§ 7.

Viðvíkjandi freyt til egingpening galda reglurnar í § 3 tilsvarandi. Egingpeningurin verður roknaður av tí virði, skipið hevur, aftaná at tað t.d. hevur fingið nýggja maskinu.

§ 7.

Vedrørende krav til egenkapital gælder reglerne i § 3 tilsvarende. Egenkapitalen beregnes af den værdi, skibet har, efter at det f.eks. har fået installeret ny maskine.

§ 8.

Viðvíkjandi tryggjan av lániunum, eigaraskifti, og at skipið fer í aðra vinnu enn fiskiskap, galda reglurnar í § 4 tilsvarandi. Lánið verður at afturrinda grunninum, fey fyrstu 2 árini eru avdráttarfrí, lánið verður síðani at rinda yvir 8 ár. Rentan er 4% p.a.

§ 8.

Vedrørende sikkerhed for lånet, ejerskifte, og det at skibet overgår i andet erhverv end fiskeri, gælder reglerne i § 4 tilsvarende. Støttelånet tilbagebetales fonden, de første 2 år er afdragsfri, lånet tilbagebetales derefter i 8 år. Renten er 4% p.a.

Deild IV.
Farmagjaldsstudningur.

§ 9.

Til fulla ella partvísa endurrinding av farmagjaldsútreiðslunum av tilfari til byggingar av deksfiskifari í Føroyum kann studningur veitast við upp til 4,5% av virði skipsins eftir meling.

Deild V.
Veðhald fyri lánum.

§ 10.

Landsstýrið saman við figgjarnevndini er heimilað landskassans vegna at veðhalda fyri lánum til munandi umbygging av deksfiskifari við tí endamáli at gera skipið meiri nýtiligt í vinnuni.

2. stk. Veðhaldið kann vera upp til 70% av ileggingini eftir meting.

§ 11.

Landsstýrinum verður heimilað í samráð við figgjarnevndina landskassans vegna at veðhalda fyri lánum til bygging av deksfiskiførum og fyri at føroyskar skipasmiðjur líka treytirnar eftir sáttmálanum um bygging av fiskiskipum.

§ 12.

Lán, landskassin veðheldur fyri, skal tryggjast við pantirætti í viðkomandi skipi innanfyri 90% av virðinum.

§ 13.

Veðhald hevur ikki við sær, at stuðulslán ikki kann veitast eftir § 6.

Afsnit IV.
Fragttilskud.

§ 9.

Til hel eller delvis dækning af fragtudgifterne for materiale til bygning af et dæksfiskefartøj på Færøerne kan der ydes tilskud med indtil 4,5% af skibets værdi i henhold til vurdering.

Afsnit V.
Garanti for lån.

§ 10.

Landsstyret bemyndiges til efter forhandling med finansudvalget på landskassens vegne at garantere for lån til væsentlig ombygning af dæksfiskerfartøjer med det formål at gøre skibet mere brugbart i erhvervet.

Stk. 2. Garantien kan andrage indtil 70% af investeringen i henhold til vurdering.

§ 11.

Landsstyret bemyndiges til efter forhandling med finansudvalget på landskassens vegne at garantere for lån til bygning af dæksfiskerfartøjer og at afgive garanti for, at færøske skibsværfter opfylder kontrakter om bygning af fiskerskibe.

§ 12.

De lån, som landskassen garanterer for, skal sikres med pantelæn i vedkommende skibe indenfor 90% af værdien.

§ 13.

En garanti medfører ikke, at støttelån ikke kan ydes i henhold til § 6.

Deild VI.
Kurstapslán.

§ 14.

Lán kann veitast svarandi til ein part ella alt kurstapið av lánum, ið verða givin móti panti í deksfiskifari.

§ 15.

Kurstapslán verða tryggjað við pantirætti í viðkomandi fiskifari innanfyri 100% av virðinum.

2. stk. Viðvikjandi treyt til eginpening, eigaraskifti og at skip fer í aðra vinnu enn fiskiskap galda reglurnar í §§ 3 og 4 tilsvarandi.

Deild VII.
Felagsreglur.

§ 16.

Stuðulslán, lán og veðhald eftir hesi lóg verða fyrst og fremst veitt fiskimonnum og skipaeigarum, ið røkja fiskiskap sum høvuðsvinnu.

2. stk. Til avgerðar um støddina av stuðulsláni, láni og veðhaldi verða inntøku- og ognarviðurskifti umsøkjarans lagd í huga.

§ 17.

Umsøkjarar, ið eru farnir undir skipabygging, hava keypt maskinu, hava longt um skip v.m. uttan frammanundan at vissa sær góðkenning landsstýrisins, kunnu ikki rokna við stuðulsláni, láni ella veðhaldi.

§ 18.

Landsstýrið uppnevnir 3 metingarmenn, av hesum ein skipakønan og ein maskinkønan, at meta um

Afsnit VI.
Kurstabslån.

§ 14.

Der kan ydes lån svarende til hele eller en del af kurstabet af lån, der gives mod pant i et dæksfiskerfartøj.

§ 15.

Kurstabslån skal sikres ved pant i vedkommende fiskerfartøj indenfor 100% af værdien.

Stk. 2. Vedrørende kravet til egenkapital, ejerskifte og at skibet overgår i andet erhverv end fiskeri, gælder reglerne i §§ 3 og 4 tilsvarende.

Afsnit VII.
Fællesbestemmelser.

§ 16.

Støttelån, lån og garanti efter denne lov ydes fortrinsvis til fiskere og skibsejere, der driver fiskeri som hovederhverv.

Stk. 2. Ved afgørelse af spørgsmålet om størrelse af støttelån, lån og garanti, vil der være at tage hensyn til ansøgerens indkomst- og formueforhold.

§ 17.

Ansøgere, der har påbegyndt bygning af skib, har anskaffet maskine, har forlænget et skib m.v. uden i forvejen at sikre sig landsstyrets godkendelse, kan ikke regne med støttelån, lån eller garanti.

§ 18.

Landsstyret udnævner 3 vurderingsmænd, hvor en skal være skibskyndig og en maskinkyndig,

virði og góðsku av skipinum, teknískum innleggingum, leingjau v.m. í tann mun, tað hevur týdning eftir hesi lóg.

§ 19.

Einhvør, sum hattekur í viðgerð av umsóknum eftir hesi lóg, er undir andsvari eftir reglunum um brot í almennari tænastu ella starvi undir straugari tagnarskyldu úteftir um viðurskifti umsokjaranna, sum komin er til hansara kunnleika.

§ 20.

Henda lóg kemur í gildi beinan vegin, og samstundis fara úr gildi Løgtingslóg nr. 28 frá 30. mai 1970, nr. 65 frá 17. september 1970, nr. 74 frá 24. september 1970, nr. 39 frá 22. juni 1972, nr. 55 frá 28. august 1972, nr. 28 frá 1. mai 1973, nr. 63 frá 3. september 1975 og nr. 12 frá 5. mars 1976.

2. stk. Nýggja lógin ávirkar ikki givnar tilsagnir um studningslán v.m. eftir higartil galdandi lóggávu. Hesar tilsagnir verða at viðgera í síni heild eftir tí lóggávu, ið galdandi var, tá tilsagnin varð givin.

at vurdere skibets værdi og egnethed, tekniske installationer, forlængelse m.v. i det omfang, dette er af betydning efter denne lov.

§ 19.

Enhver, der deltager i behandlingen af ansøgninger i henhold til denne lov, er under ansvar efter bestemmelserne om forbrydelse i offentlig tjeneste eller hverv, forpligtet til at bevare fuldstændig tavshed udadtil om de forhold ansøgerne vedrørende, der er kommet til hans kundskab.

§ 20.

Denne lov træder i kraft straks og samtidig ophæves lagtingslov nr. 28 af 30. maj 1970, nr. 65 af 17. september 1970, nr. 74 af 24. september 1970, nr. 39 af 22 juni 1972, nr. 55 af 28. august 1972, nr. 28 af 1. maj 1973, nr. 63 af 3. september 1975 og nr. 12 af 5 marts 1976.

Stk. 2. Den ny lov påvirker ikke givne tilsagn om tilskudslån m.v. efter den hidtil gældende lov. Disse tilsagn bliver at behandle i sin helhed i henhold til den lov, der var gældende, da tilsagnet blev givet.

Viðmerkingar:

Landsstýrið leggur við hesum fram uppskot um broyting í lagtingslóg um endurnýggjan av fiskiskipaflotanum, sum gevur landsstýrinum heimild til at veita:

1. Studdslán og studning til bygging .
2. Studdslán til maskinur og aðrar tekniskar innleggingar.
3. Studning til farmagjald av tilfari til bygging.
4. Veðhald fyri lánum.
5. Kurstapslán.

Uppskotið er, umfram ein savnan av teimum lógarbroytingum sum so við og við eru gjørdar, ein prinsippbroyting av heimildini til studningsveitan, soleiðis at heimildin hereftir verður til veitan av studulslánum ístaðinfyri galdandi heimild til veitan av studningslánum til nýbygging av fiskiskipum.

Sambært uppskotið verða studulslánini at afturrinda grunninum til endurnýggjing av fiskiskipaflotanum, tey fyrstu 3 árini avdráttarfri, lánið verður síðani at rinda aftur yvir 17 ár við 4% rentu árliga.

Landsstýrið segði løgtinginum frá í mars mánaða, at fleiri umsóknir um studningslán til bygging av fiskiskipum, sum vóru komnar landsstýrinum í hendi um ársskiftið 1976/77, og at hesar vóru avgreiddar og viðgjørdar í mars mánaða og samtykti landsstýrið síðani, at umsókuir, sum ikki vóru komnar landsstýrinum í hendi 20. mars 1977, ikki vildu vera avgreiddar, fyrrenn tingið hevði havt høvi til at viðgera spurningin um umskipan av studningslánum til beinleiðis lán og harumfram spurningin um íløgu í fiskiskipaflotan sum heild.

Tað er landsstýrisins metan, at tað eigur at vera farið varisliga fram við nýíløgum í fiskiskipaflotan í hesi broytingartíð okkara í møguleikunum til veiðu á fjarum leiðum og við teirri broyting ,sum stendur fyri í okkara heimafiskiflota.

Við tí stóru íløgu, sum hevur verið í fiskiskipaflotanum í árunum 1974 - 1975 - 1976 við meira enn 400 milj. krónum hesi ár til nýbyggingar, er tað landsstýrisins metan, at beint má vera nú at taka spurningin um studningsveitan til nýbyggingar til viðgerðar og samstundis spurningin um innflutning av brúktum fiskiskipum, sum hevur verið rættuliga stórur seinni árini.

Í ummæli sínum um spurningin til nýíløgur í fiskiskipaflotan aftamá fund við landsstýrið sigur Búskapurráðið:

Tað er ikki rætur íløgupolitikkur at yvirinvestera, heldur ikki á fiskiflotan. Beint nú hava vit uttan iva nokk av fiskiskipum í mun til talið av fiskimonnum , og er tað skeivt at byggja skip afturat, tá ein veit, at tað vil føra til, at onnur, relativt nýggj skip, koma at liggja vegna manningartrot. Fleiri av stállinuskipunum sigla við ov lítlari manning, meðan onnur, í hvussu so er til tíðir, liggja vegna manningartrot.

Vit hava tað seinasta áriið fingið 9 nýbygd línuskip úr Póllandi fyri umleið 45 milj. kr. Tað skuldi helst ikki hent, at hesi og onnur feskfiskaskip, sum hava alstóran týdning fyri at tryggjað verðmi flakaviðkjunum javna tilgongd av rávøru, ikki kunnu reka fiskiskap, tí tey ikki fáa manning.

Tey seinastu trý árini hava íløgurnar í fiskiskip av ymiskum slag verið óvanliga stórar: Í 1974 91 milj. kr., í 1975 132 milj. kr. og í 1976 168 milj. kr. Í hesum árinum koma íløgurnar í nýggj skip nokk at verða 80 — 90

milj kr., ella tilsamans í 4 ár eru slík hálv milliard krónur. Tølini eru netto, skipasolur út av landinum eru trektar frá. Sum vera man hava tær stóru skipaløgurnar havt sína ávirkan á gjaldsjavnan, sum í 1974 og 1975 var negativur við tilsamans 240 milj. kr.

Tað sær út í løtuni, at menn yvirhøvur gera sáttmálar um bygging av smærri trolarum, upp til umleið 90 føtur og trolbátar úr træ. Serliga teir smærru stáltrolararnir eru rættiliga dýrir, kosta upp móti 6 milj. kr. Vit kenna ikki rentabilitetin hjá teimum, heldur ikki veiðuorkuna, ella hvussu teir koma at roynast fa ringu árstíðina til veður. Í løtuni, og kanska ikki tað fyrsta hálva árið, kenna vit hvussu veiðumynstrið verður. Vit vita ikki hvussu stórar nøgdir og hvørji fiskasløg okkum verður loyvt at veiða innanfyri fiskimarkini hjá øðrum fjóðum. Heldur ikki hvussu nógv vit verða noyddir at lata burtur av okkara egnu fiskastovnum í býti fyri at sleppa at veiða hjá øðrum. Ikki má gloymast, at vit hava undleið 25 ídnaðartrolarar, sum hava veitt og enn veiða í Norðsjónum, í bretskum ella í EF-sjógvi. Hvussu lagnan hjá teimum verður, er ikki greitt í løtuni, men um teimum verður bannað at veiða har teir hava veitt, ella um økið verður minnandi minkað, koma uttan iva fleiri av teimum at veiða í føroyskum sjógvi eftir fiski til konsum.

Fleiri veiðumenn halda trolið vera meinari fyri fiskastovnin enn húkurin, og tey bæði amboðini, trolið og linan, hóska ikki vel saman. Tí er vandi fyri illstøðu millum hesar báðar, línumenninar og trotmenninar. Og vandin er størri, jú fleiri trolarar vit fáa.

Um føroyingar verða noyddir at avmarka veiðunøgdina á landleiðini og harvið heudan veiðuflotan, so kann hugsast, at neyðugt verður at býta hesa veiðu millum tey einsføku flakavirkini, og gerst hetta einans, um flotin ikki er ov nógv útbygdur.

Sambært galdandi lóg fáa menn, sum byggja fiskiskip, landskassastudning uppá 20% av kostnaðinum, um skipið verður bygt uttanlanda og 25%, um skipið verður bygt her heima. Tað kundi nokk verið vert at gjørt eina broyting í studningsskipanini, fyri betur at kunna stýra fløgunum í fiskiskip. Tað kundi gjørst á ymiskan hátt, studningsprosentið kundi verið minkað, tað sum nú verður givið sum studningur kundi verið veitt sum lán, evt. rentufrítt, kanska eisini avdráttarfrítt tey fyrstu árini. Ella ein blanding av studningi og láni.

Vit halda tað vera neyðugt, at gjølla eftirlit verður við innflutningi av brúktum skipum. Føroya Landsstýri eigur at venda sær til Fiskaribankan og biðja teir vera aftanfyri viðvíkjandi lánveiting til brúkt fiskifør, sum verða keypt til Føroya.

Samandrigið kann áskoðan búskaparráðsins gerast upp soleiðis:

1) Størsti skaðin er ein yvirinvestering í fiskiflotan.
2) Ilóast trolarar hava góðan útreiðslustruktur, veiða teir næst av loski, sum longu er á markinum fyri løyvdari veiðu.
3) Smærri før krevja lítlan eginpening, og eru tí lættari at fáa fatur á. Treytin má tí vera, at keyparin sjálvur drívur bátin.
4) Ansað eigur at vera effir, at geografiska býtið av skipunum verður soleiðis, at øllum virkjum verður tryggjað jøvn tilgongd av rávøru.
5) Tað eigur at vera steðgað, ella ihvussu so er, afturhildið við játtanum til fleiri smærri trolarar, til úrslitið liggur fyri frá teimum trimum, sum nú eru í gerð, og hvor av hesum kemur at roynast nýtiligast og geva besta úrslitið.

Til lógaruppskotið sjálvt eru hesar viðmerkingar:

Síðani høvuðslógin um endurnýgging fiskiskipaflotans seinast var til viðgerðar í løgtinginum, jbr. Lgt. 1969 bls. 109, eru fleiri broytingar gjørdar í lógini. Av praktiskum grundum eru hesar broytingar tiknar við í lógartekstini, soleiðis at lógin kemur í staðin fyri núgaldandi lóg við broytingum.

Høvuðsbroytingin og í princippinum einasta broyting í mun til galdandi skipan er, at heimild ikki verður at veita studningslán, men í staðin stuðulslán, ið skulu rentast og afturgjaldast, meðan studningslánini eru bæði rentu- og avdráttarfrí.

Stuðulslánini, eins og studningslánini higartil, kunnu veitast bæði til nýbygging og til tekniskar innleggingar, umbyggingar, ið gera skip meira nýtulig í vinnuni, o.l. Hámarkið er óbroytt 20% til nýggj skip, tó 25% tá bygt verður á føroyskari skipasmiðju, og 15% til tekniskar innleggingar v.m.

Stuðulslánini verða at afturrinda grunninum til endurnýgging fiskiskipaflotans. Er talan um nýbyggingar, eru tey tey fyrstu 3 árini avdráttarfrí, og verður lánið síðani afturgoldið eftir 17 árum, til tekniskar innleggingar eru tíðirnar ávikavist 2 ár og 8 ár. Í øllum førum er rentan 4% p.a., til sammetingar er rentan hjá realkreditstovninum í løtuni 7½% p.a.

Til § 20, 2. stk. er serliga at viðmerkja, at tilsognir givnar áðrenn nýggja lógin fór úr gildi ikki verða ávirkaðar av nýggju lógini, men verða tær

í sini heild at viðgera eftir ti gomlu, eisini tá ið talan er um at geva uppískoytisstuðningslán, t.d. tá skip er blivið dýrari enn upprinnaliga ætlað.

Annars eru bert fáar málsligar broytingar.

1. viðgerð 10. mai, málið beint í figgjarnevndina og síðani útsett til á Ólavsoku.

---

100. Fólka- og farmaflutningur

Ár 1977, 3. mai, legði Vega- og havnanevndin fram álit í løgtingsmáli nr. 100/76: fólka og farmaflutningur, soljóðandi:

Landsstýrið hevur tann 25. februar 1976 lagt fyri tingið uppskot til løgtingslóg um fólka- og farmaflutning. Uppskotið fekk 1. viðgerð 8. mars og varð tá beint í Vega- og havnanevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Haldor Hansen, Kjartan Mohr, Jógvan Olsen, Vilhelm Nielsen og Óli Breckmann) kann ikki taka undir við uppskoti landsstýrisins, men leggur fyri løgtingið fylgjandi

Uppskot
til
samtyktar.

Sitandi samferðslunevnd fær heimild til at fara aftur til arbeiðis. Álagt verður samferðslunevndini at gera uppskot um samskipan av øllum fólka- og farmaflutningi eftir landi.

Álit nevndarinnar skal leggjast fyri løgtingsins vega- og havnanevnd á ólavsøku 1977.

Ein minniluti (Heðin Klein og Johan Simonsen) mælir tinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

broytingaruppskot

Nýggj § 6:

«Eingin ruta til ferðafólk kann setast á stovn av tí almenna ella av almennum stovni ella yvirtakast frá øðrum, uttan at hetta er samtykt av Føroya løgtingi.»

§ 6 verður § 7.
§ 7 verður § 8.

Ny § 6:

«Ingen passagerrute kan oprettes af det offentlige eller af en offentlig institution eller overtages fra andre, medmindre dette er vedtaget af Færøernes lagting.»

§ 6 bliver § 7.
§ 7 bliver § 8.

Á Foroya Løgtingi, 11. mai 1977.

SAMBANDSFLOKKURIN

Jógvan I. Olsen Johs. M. Olsen Agnar Nielsen

Pauli Ellefsen Jákup Mortensen

Broytingaruppskot

Í uppskoti landsstýrisins í løgtingsmáli nr. 70/1975 um løgtingslóg um fólka- og farmaflutning verða gjørdar hesar broytingar:

1) § 2 verður orðað soleiðis:

Vald verður samferðslunevnd til saman við landsstýrinum at samskipa allan fólka- og farmaflutning.

2. stk. Í nevndini skulu sita 5 limir, harav løgtingið velur 2, landsstýrið 2, og landsstýrið eisini tann fimta limin eftir tilmæli frá bilfelagnum. Starvsfið og arbeiðstreytir hjá nevndini verða fyrisettar av landsstýrinum.

2) § 3, 1. stk. verður orðað soleiðis:

Til fólka- og farmaflutning krevst skrivligt loyvi (serloyvi) frammanundan frá landsstýrinum ella øðrum

1) § 2 formuleres således:

Der vælges et trafikudvalg til sammen med landsstyret at samordne al person- og fragttransport.

Stk. 2. I udvalget sidder 5 medlemmer, hvoraf lagtinget vælger 2, landsstyret 2, desuden vælger landsstyret også det femte medlem efter indstilling fra bilselskaberne.

2) § 3, stk. 1 formuleres således:

Til person- og fragttransport skal der foreligge skriftlig tilladelse (dispensation) forinden fra landsstyret eller anden

myndugleika, sum landsstýrið gevur heimild hertil. Loyvið verður givið fyri ávíst áramál.

myndighed, som landsstyret bemyndiger hertil. Tilladelsen meddeles for en bestemt periode.

Vega- og havnanevndin, 11. mai 1977.

Hatdor Hansen Johan Simonsen Heðin M. Klein Óli Breckmann
Vilhelm Nielsen Kjartan Mohr Jógvan Olsen

§ 1 í landsstýrisins uppskoti samtykt við 15—0, broytingaruppskot til § 2 í staðin fyri § 2 í landsstýrisins uppskoti varð samtykt við 14—0. Broytingaruppskot til § 3, 1. stk. varð samtykt við 15—0, § 3 so broytt samtykt við 15—0. Broytingaruppskot frá sambandsflokkinum, nýggj § 6, samtykt við 16—0, lógin soleiðis broytt endaliga samtykt við 22—0 atkvøðum.

---

101. Veðhald fyri láni til Klaksvíkar kommunu

Ár 1977, 3. mai, legði Petur Reinert, landsstýrismaður, fram

Uppskot
til

løgtingslóg um veðhald fyri láni til Klaksvíkar kommunu.

§ 1.
Landsstýrinum er heimilað

lagtingslov om garanti for lån til Klaksvík kommune.

§ 1.
Landsstyret bemyndiges til på

landskassans vegna at veðhalda fyri láni upp til 10 mió. kr. til Klaksvíkar kommunu.

landskassens vegne at garantere for lån på indtil 10 mio. kr. til Klaksvik kommune.

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi beinanvegin.

§ 2.

Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Við skrivi frá 28. apríl 1977 hevur Klaksvíkar kommuna sent umsókn um veðhald fyri einum láni uppá 10 mió. kr. Í umsóknini verður upplýst, at peningurin skal nýtast til keyp av húsi til kommunala fyrisiting fyri umleið 5 mió. kr. og til kommununnar part av komandi bygging við umleið 4—5 mió. kr. Handelsbanken í Keypmannahavn arbeiðir við málinum, og er útlit til eitt lán úr U.S.A., og væntast endaliga tilboðið at ljóða uppá eitt dollarlán yvir 9—10 ár við rentu ikki yvir 10%. Kursurin fyri lánið verður 98,5.

Sambært figgjarstøðu kommununnar pr. 31. mars 1976 er eginognin 4.256.000 kr. út av eini javnvág uppá kr. 36.150.000. Lániskuldin er 23.894.000 kr., og er viðheft yvirlit yvir hesi lán. Sonuleiðis er sum skjal figgjarstøðan pr. 31. mars 1976.

1. viðgerð 4. mai, málið beint í figgjarnevndina, sum 11. mai legði fram soljóðandi

Álit

Málið varð lagt fram av landsstýrinum 3. mai 1977 og undir 1. viðgerð 4. mai beint í figgjarnevndina.

Eftir lógarupplskotinum verður landsstýrinum heimilað landskassans vegna at veðhalda fyri láni upp til 10 mió. kr. til Klaksvíkar kommunu.

Í viðmerkingunum verður sagt, at talan er um utanlandslán US-dollars, væntiliga at rinda aftur yvir 10 ár og renta ikki yvir 10% p.a.

Upplýst verður, at peningurin skal nýtast til keyp av fyrisitingarhúsi til kommununa og til kommununnar part av komandi bygging við 4-5 mió. kr.

Lánskuldin hjá kommununni er pr. 31. mars 1976 upplýst at verða kr. 23.894.000.

Á fundi eftir áheitan frá figgjarnevndarformanninum millum figgjar-

nevndina og landsstýrið í Tinganesi 9. mai 1977 segði figgjarnevndarformaðurin frá, at neyðugt var at fáa fleiri upplýsingar um málið, og setti landsstýrinum hesar spurningar:

Spurningur 1:
Vil landsstýrið við hesum máli skapa nýggjan præcedens fyri kommunulán?

Spurningur 2:
Er tað ætlanin at skapa henda præcedens til tess at hjálpa ávísum felag?

Spurningur 3:
Orðingin í viðmerkingunum 4- 5 mió. kr. til komandi bygging, sipar hon til, at umsitingarbúsið skal um- ella útbyggjast?

Løgmaður greiddi frá, at hetta er fyrstu ferð, at føroysk kommuna lænir frá uttanlandslánsmarknaðinum við landskassaveðhaldi, og at landsstýrið gjølla hevur umhugsað hetta.

Fyri landið er umdømið sum lántakari og borgsmaður av mesta týdningi, og verður tí farið varliga fram. Í slíkum spurningum var og er tað landsstýrisins ætlan at reka ein restriktivan politikk. Í landsstýrinum hevur verið umhugsað at taka eitt stórt utanlandslán, t.d. 50 - 100 mió. kr., og at læna kommununum út aftur vegna tey dýru innanlands lánini.

Landsstýrið hevur fyrireikað lántøku av 10 mió. kr. til grunnin til endurnýggjan av fiskiskipaflotanum við heimild í figgjarløgtingslóg 1977/78 frá sama banka, og tá her er teygl fyri álítandi viðurskiftum, hevur landsstýrið viðvíkjandi eini kommunu í hesum serstaka føri, mett ikki at gera nakað skeivt við at gera eitt undantak.

Sostatt er tað ikki fritt fyri kommununum at fara á uttanlandslánsmarknaðin við landskassaveðhaldi, men umhugsað verður ein skipan, har landsstýrið hevur ein avgerandi tátt í málinum.

Figgjarnevndarformaðurin spurdi, hví landsstýrið ger so nógv burturúr hesum lánmáli, um ætlanin er at útvega Klaksvíkar kommunu eitt fyrisitingarhús, ella um møguliga ein heilt onnur orsøk liggur aftanfyri, kanska eitt skattamál hjá einum felag.

Løgmaður svaraði, at eitt ávist skattamál uppá umleið 5 mió. kr. fyriliggur hjá einum felag í Klaksvík, viðvíkjandi freist til útlíknan av negativari saldo (samsvarandi við skattskyldugar afturvunnar avskrivingar uppá skip) í sambond við skipasølu - henda freist er longd av landsstýrinum undir ávísum treytum. Tann endaliga stoða hjá tíkningarráð Føroya var ikki greið í málinum enn. Um so er at felagið ger ilagu aftur, hevur landsstýrið játtað útselan av javningini av negativu saldoini.

Figgjarnevndarformaðurin gjørdi vart við, at eftir áskoðan hansara var her talan um eina præcedensskapandi avgerð.

Á fundi í figgjarnevndini varð málið síðani viðgjørt, og samtykti figgjarnevndin at taka undir við uppskoti landsstýrisins, formaðurin Háku Djurhuus og Pauli Ellefsen skilaðu til, at teir tóku undir við uppskotinum út frá tí sjónarmiði, at hervið er skaptur ein præcedens.

2. viðgerð 11. mai, 3. viðgerð 12. mai.

Uppskot landsstýrisins samtykt við 23– 0 atkvøðum.

---

102. Ríkisborgararættur

Ár 1977, 2. mai, legði Jákup Lindenskov, landsstýrismaður, soljóðandi fram:

Ríkisumboðið hevur spurt, um heimastýrið hevur nakað at viðmerkja til, at lóg nr. 1 frá 30. mars 1977 um veiting av ríkisborgararætti verður lýst at galda fyri Føroyar.

Landsstýrið loyvir sær at leggja málið fyri løgtingið við viðmæli.

Málið beint í lógarnevndina, sum 10. mai legði fram soljóðandi

Álit

Samb. lógarnevnd mælir løgtinginum til at samtykkja, at lóg nr. 1 frá 30. mars 1977 um veiting av danskum ríkisborgararætti verður lýst at galda í Føroyum.

2. viðgerð 11. mai.

Uppskot landsstýrisins varð samtykt við 22 -0 atkvøðum.

---

103. Undantaksloyvi til fremmand skip at umskipa veiðu á føroyskum sjóøki

Ár 1977, 10. mai, legði Atli P. Dam, lognaður, fram

Uppskot
til

løgtingslóg um loyvi til fremmand fiskiskip at umskipa veiðu á landleiðini.

§ 1.

Hóast reglurnar í § 2 í løgtingslóg nr. 12 frá 10. mars 1964 um forboð hjá fremmandum fiskiførum at umskipa veiðu á landleiðini verður landsstýrið heimilað í tíðarskeiðinum 10. mai til 30. mai 1977, at loyvi verður givið fremmandum skipum at umskipa svartkjaft til norska verksmiðjuskipið «Nordglobal».

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.

lagtingslov om tilladelse til fremmede fiskerfartøjer at omlade fisk på fiskeriterritoriet.

§ 1.

Uanset bestemmelserne i lagtingslov nr. 12 af 10. marts 1964 om forbud mod fremmede fisker fartøjers omladning af fangst på fiskeriterritoriet, bemyndiges landsstyret til i tidsrummet 10. maj til 30. maj 1977 at give fremmede skibe tilladelse til at omlade sortmund til det norske fabriksskib «Nordglobal».

§ 2.

Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Eftir galdandi lóg er ikke loyvt fremmandum fiskiførum at umskipa veiðu á føroyskum sjóøki.

Eftir sáttmálum hava útlendsk skip loyvi at veiða svartkjaft undir Føroyum í ár. At taka ímóti veiðuni er ætlanin at nýta verksmiðjuskipið «Nordglobal».

Tá føroyska fiskamjølsvirkini ikki enn eru útbygd at kunna taka ímóti teimum veiðunøgdum, talan kann vera um at fiska, heldur landsstýrið, at undantaksloyvi í ár eigur at verða givið til umskipan av veiðu til nevnda verksmiðjuskip, men vónandi bert í ár, tá roknað verður við allari framleiðsluorku hjá føroyska virkjunum komandi árini.

Talan kann verða um landingar frá íslendskum, svenskum, møguliga danskum og einstøkum føroyskum skipum, um biðitiðin verður ov long.

1. viðgerð 11. mai, 2. viðgerð 11. mai, 3. viðgerð 11. mai.

Uppskot landsstýrisins samtykt við 16--0 atkvøðum.

---

104. Læknaviðurskiftini á Suðuroyar sjúkrahúsi

Ár 1977, 10. mai, setti Kj. Mohr, løgtingsmaður, henda fyrispurning til løgmann:

Hvi tók landsstýrið ikki sama støðu sum stýrið fyri Suðuroyar Sjúkrahúsi og setti Thomas Paula Westergaard í starvið sum yvirlækni á Suðuroyar Sjúkrahúsi?

Viðmerking:

Tá ið starvið sum yvirlækni á Suðuroyar Sjúkrahúsi varð lýst leyst komu 17 umsóknir, og av teimum 17 umsøkjarunum varð ein innstillaður av stýrinum fyri Suðuroyar Sjúkrahúsi.

Í sjúkrahússtýrinum var við atkvøðugreiðsluna meiriluti fyri at mæla til at Th. P. Westergaard varð settur í starvið.

Síðani hevur landsstýrið tikið sjúkrahússtýrið av ræði, og hevur sett fran Cazabon í starvið.

Við hesum fyrispurningi eftirlýsi eg grundirnar hjá landsstýrinum til ikki at ganga eftir innstillingini hjá meiriluta í sjúkrahússtýrinum.

12. mai svaraði Finnbogi Isaksen, varalogmaður, fyrispurninginum:

Landsstýrið kannaði, áðreum tað tók støðu, hvørjar heimildir tað hevði og kom til tað úrslit, at tað vóru ikki grundir at fylgja tilmælinum frá sjúkrahússtýrinum. Í hesum føri hevði sjúkrahússtýrið bert givið tilmæli

um ein lækna, og um landsstýrið var bundið til at fylgt tí, hevði tað ongar valmøguleikar. Á fundi við sjúkrahússtýrini hevur landsstýrið greitt frá, at tað metir seg at hava rætt til at velja millum allar kvalificerðnar umsøkjarar til slík størv, uttan mun til um sjúkrahússtýrið gevur tilmæli um ein ella fleiri.

Eg kann ikki her greiða gjølligari frá teimum grundgevingum fyri setanina sum vórðu førdar fram í landsstýrinum, av tí at landsstýrisfundirnir eru ikki almennir.

---

105. Broyting í lóg um fuglaveiðu v.m.

Ár 1977, 12. mai, settu løgtingsmenninir (Jógvan Durhuus, Aguar Nielsen, Eliesar Arge og Jona Henriksen) fram hetta

Uppskot
til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um fuglaveiðu v.m.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 27 frá 9. september 1954 um fuglaveiðu v.m. við seinni broytingum verða gjørdar hesar broytingar:

1) Í § 17, 2. stk., a) gangu orðini «lomviga, álku» út.
2) Í § 17, 2. stk., b) verður skoytt uppi: «1. september - 14. mai.»

lagtingslov om ændring i lagtingslov om fuglefangst m.v.

§ 1.

I lagtingslov nr. 27 fra 9. september 1954 om fuglefangst m.v. med senere ændringer foretages følgende ændringer:

1) I § 17, stk. 2, a) udgår ordene «lomvie, alke».
2) I § 17, stk. 2, b) tilføjes: «1. september 14. maj.»

Málið avgreitt saman við nr. 19, 1976, (Broyting í lóg um fuglaveiðu v.m.)

- - Grein 1 fall við 14—0 við tað at málið kravdi kvalifiseraðan meirilutta, málið sostatt fallið.

---

106. Hækking av samsýning til postverkið fyri uppkrevjing av tollgjøldum

Ár 1977, 12. mai, legði Finnbogi Isaksen, landsstýrismaður, fram

Uppskot
til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um innflutningsgjøld v.m.

§ 1.

Í § 13, 2. stk. í løgtingslóg nr. 23 frá 11. februar 1950 um innflutningsgjøld v.m. við seinni broytingum og uppískoytum verður «1 króna» broytt til «3 krónur». Aftaná 1. apríl 1977 fær landsstýrið heimild at broyta nevnda gjald eftir góðkenning fíggjarnevndarinnar.

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi beinnvegin.

lagtingslov om ændring i lagtingslov om indførselsafgifter m.v.

§ 1.

I § 13, stk. 2 i lagtingslov nr. 23 af 11. februar 1950 om indførselsafgifter m.v. med senere ændringer og tilføjelser ændres «1 krone» til «3 kroner». Efter 1. april 1977 har landsstyret hjemmel til efter godkendelse fra finansudvalget at ændre nævnte afgift.

§ 2.

Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Hetta uppskot hevur verið fyri fyrr í hesi tingsetu og hevur fingið viðgerð í fíggjarnevndini, men fall í tinginum av tekniskum orsøkum. Tað verður tí lagt fram aftur, og fyri at samtykkja tað krevst nú kvalifiseraður meiriluti, t.v.s. at 16 atkvøðnir mugu vera fyri.

1. viðgerð 12. mai, málið beint í fíggjarnevndina.

2. viðgerð 12. mai, 3. viðgerð 12. mai.

Uppskot landsstýrisins samtykt við 16 – 0 atkvøðum.

F. L. j. nr. 304-8

Eykatingsetan

1976

1. Framhald av fyribilsskipan um rættindi hjá fiskiførum frá felagsmarknaðarlondunum at veiða á sjóøki Føroya

Ár 1977, lýsdagin 21. juni legði Atli P. Dam, løgmaður, fraun soljóðandi

Uppskot
til
samtyktar.

Løgtingið samtykkir í,

at skipanin, ið er galdandi fyri fiskiskap á sjóøki Føroya hjá skipum heimahoyrandi í EEC-londunum til og við 30. juni 1977, verður framlongd til og við 31. juli 1977, tó soleiðis, at loyvda veiðan av toski og hýsu í juli verður 1320 tons umfram ta nøgd, sum EEC-skipini ikki veiddu av loyvdu kvotuni fyri 1. april - 30. juni í ár, og

at landsstýrið verður heimilað til í samráð við marknaðarnevnd løgtingsins at gera skipanir fyri í mesta lagi 3 mánaðar um sínámillum fiskirættindi millum Føroyar og onnur lond.

Viðmerkingar:

Tann 2. mai 1977 samtykti løgtingið (tingmál nr. 92/1976) verandi skipan fyri rættindi til skip frá EEC-londunum til fiskiskap á sjóøki Føroya. Hendan skipan er galdandi til og við 30. juni 1977.

Umboð fyri landsstýrið samráddust 13. juni 1977 í Bryssel við EEC-

nevndina um sínámillum fiskirættindi Føroyar - EEC eftir 30. juni íár. Partarnir samdust ikki.

Landsstýrið metir tað ikki vera ráðligt at gera broytingar í verandi skipan ella framleingja hana fyri meira enn 1 mánuð. Orsokin er fyrst og fremst, at EEC-londini ikki hava tikið støðu til fiskarískipanina, sum ætlast sett í verk í EEC og harvið heldur ikki tær nøgdir, ið kunnu tillutast uttanfyri standandi londum. Upplýst er, at EEC-ráðharrastovnurin síðst í juni skal viðgera spurningin. Soslatt verður møguliga betri støði undir samráðingum í juli millum landsstýrið og EEC.

Verandi skipan ber í sær, at EEC-skip í tíðarskeiðinum 1. april til 30. juni hava loyvi til at veiða 2870 tons av toski og hýsu svarandi til 60% av veiðuni sonn lið 1976. At framleingja hesa skipan til juli ber í sær, at loyvda veiðan í juli av toski og hýsu verður 1320 tons. Av tí at avmarkingarnar undir verandi skipan hava fort við sær, at EEC-skip hava havt trupulleikar við at veiða loyvdu nøgdina, metir landsstýrið tað vera vimuligt, at EEC-skipini í juli kunnu veiða tann partin, sum tey møguliga hava eftir av loyvdu nøgdini fyri tíðarskeiði 1. apríl til 30. juni íár.

Ongan broytingar eru í loyvdu veiðiøkjunum.

Tað er eio fortreyt fyri framleingjan av verandi skipan fyri fiskiskap hjá EEC-skipum á sjóoki Føroya, at EEC ikki skerjir verandi rættindi hjá føroyskum skipum at veiða í EEC-sjógvi.

Í farna partinum av hesum árinum hava viðurskiftini viðvíkjandi fiskirættindunum serliga mótvegis EEC verið tvørlig, og hevur verið neyðugt at gera fyribilsskipanir. Ilt er at meta um EEC-londini í komandi tingingum sonjast um ein felags fiskivinnupolitikk. Soslatt kann ikki siggjast burtur frá, at tað eisini eina tíð aftur gerst neyðugt við fyribilsskipanum fyri stytri tíðarskeið. Hetta ber eisini í sær, at tað kann gerasl neyðugt at kalla løgtingið saman, viðhvørt kanska við stuttari freist, til viðgerðar av stuttfreistaðum fyribilsskipanum. Landssýrið metir hetta at vera eina ópraktiska og treka mannagongd og mælir tí til sum eina fyribilsloysu, at løgtingið gevur landsstýrinum heimild til saman við marknaðarnevndini at gera skipanir fyri upp til 3 mánaðar við onnur lond um sínámillum fiskirættindi.

Málið beint í marknaðarnevndina, sum 21. juni legði fram hetta

Álit

Málið varð framlagt av landsstýrinum 21. juni 1977 og við fyrsta viðgerð sama dag beint í marknaðarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur samtykt at taka undir við 1.

parli í uppskotinum til samtyktar, tó við tí broyting, at «31. juli 1977» verður broytt til «5. august 1977» og «juli» verður broytt til «hesum tíðarskeiði».

2. parti í uppskotinum til samtyktar tekur nevndin ikki undir við.

Landsstýrið verður biðið um at geva marknaðarnevndini upplýsingar um, hvussu býtisforholdið er ikomið millum EEC-veiðu undir Føroyum og føroyska veiðu í Norðsjónum. Tá hesar upplýsingar fyriliggja, mælir nevndin til, at landsstýrið og marknaðarnevndin taka tíðingar upp um sínámillum fiskiveiðu.

Uppskot landsstýrisins, 1. partur, samtykt við broyting frá marknaðarnevndini við 22—0 atkvøðum. 2. punkt í uppskotinum burturdottið.

---

2. Broyting í sjúkrahúslógini

Ár 1977, týsdagin 21. juni, legði Ove Mikkelsen, løgtingsmaður, fram

Uppskot
til
samtyktar.

1. Løgtingið samtykkir: Reglugerðin til løgtingsmál nr. 72/1975 Nýggj sjúkrahúslóg, § 6, 2. stk. verður broytt soleiðis:

   «Sygehusbestyrelsen ansætter overlæger, ledende læger, direktør, inspektører og forstanderinder ved det pågældende sygehus.»

2. Reglugerðin soleiðis broytt fær gildi frá sama degi sum reglugerðin (Reglement for det færøske sygehusvæsen) til nýggju sjúkrahúslógina hevur verið nýtt.

Viðmerkingar:

Vist verður til: Reglement 4. april 1941 for Dronning Alexandrines Hospital, Klaksvig sygehus og Sygehuset på Suderø:

Stk. 2. Bestyrelsen ansætter en hospitalsdirektør, som fører tilsyn med sygehusenes ledelse.

Stk. 13. De ledende læger ved sygehusene ansættes af bestyrelserne.

Stk. 30. Dette reglement træder i kraft 1. april 1941, og samtidig ophæves de ældre reglementer.

I henh. til § 7 i Lov for Færøerne nr. 76 af 15. marts 1939.

Færø Amt, den 4. april 1941.

1.000,-	1.000,-	500,—	1.000,-	500,-	27.000,—
30.000,	20.000,	23.000,	5.500,-	3.000,—	321.500,
25.000,-	8.000,-	11.000,	2.000,—	3.000,	184.000,
2.500,—		2.500,	25.000,-		113.000,—
1.500,—	1.500,-	1.000,	1.000,	2.500,—	58.000,-
3.000,	1.200,—	600,—	5.500,—	10.000,	53.800,-
					18.000,—
					15.000,-
					10.000,—
10.000,—	20.000,	15.500,-	6.000,	4.000,—	380.500,
					25.000,—
					15.000,-
2.500,—	16.000,	1.000,-	2.000,	1.000,	53.500,—
					15.000,—
					60.000,—
3.000,—	6.000,—	4.000,		2.000,	59.000,—
5.000,—	1.000,-	1.500,-	1.500,	2.500,	31.500,
					130.000,
83.500,—	74.700,-	60.600,	40.500,—	28.500,—	
80.000,—	60.700,	55.600,	49.500,-	25.500,	1.497.300,-
3.500,—	14.000,	5.000,—		3.000,—	117.500,—
					35.000,—
					15.000,—
					5.000,—

Sbrt. skriv dagf. 25. okt. 1976 frá ítróttasambandi Føroya:

til landsstýrið:
Sambert avtalu á fundi fríggjadagin 22. oktbr., senda vit hjálagt avrit av skrivi til Fíggjarnevnd Føroya Løgtings.

Vónandi kann hetta koma til viðgerðar á fyrst komandi fundi landsstýrisins.

Sum kunnugt hava Føroyar moguleika at luttaka í V.M. í C-bólkinum í bordbólti, í dogunum 25. novbr. til 2. decbr. í ár, og meta vit okkum at hava góðan moguleika fyri at fara víðari til B-bólkin. Kappingin fer fram í Oporto í Portugal.

Vit hava boðað frá luttoku, men treylin fyri at kunna luttaka er at umsókn okkara verður gingin á mati.

— — — — — —

til fíggjarnevnd Føroya løgtings dagfest 6/5 1976:

Ítróttasamband Føroya loyvir sær hervið at sokja fíggjarnevnd Føroya Løgtings um eykajáttan — kr. 123.000,00 —, ið er halli fyri síðsta roknskaparár.

Um omanfyri nevnda hall skal gjaldast av tí veitta stuðningi, siggja vit okkum ikki stórar moguleikar at loysa tær uppgávur sum eru, og enn minni tær í liggja fyri stavn.

Við núgaldandi tímaløn lata ítróttaleiðarar innan F.S.F. í ókeypis arbeiði **kr. 4.000.000,-** til ungdómsarbeiði í Føroyum.

Við vón um at fíggjarnevndin sýnir okkum vælvild.

Viðmerking frá landsstýrinum:
Av játtanini eru 123.000 kr. ætlaðar til rindan av halli hjá felagnum í farna ári.

Ad § 14-2290/3115: Meginfelag Føroyskra Studenta.

Sbrt. skriv dagf. 7. okt 1976:

Sambart brev tykkara dagfest 10. sept. 1976 j. nr. 400-23[37] viðvikjandi uppskoti felagsins til fíggjarlogtingslóg 1977/78 § 14-2290/3115 senda vit hervið hjálagda skjal.

Vit fara samstundis at bera fram yski um at felagnum verður lovað ein fund við landsstýrið umsóknini (uppskotinum) viðvikjandi so skjótt sum til ber.

Hervið umsókn til fíggjarlogtingslóg fyri 1977/78.

§ 14.8.1. Grannurin til lærdan lestur

Fíggjarligu umstøður teirra lesandi gerast verri og verri. Moguleikarnir fyri studningi og bíligum lánum gerast minni, og livikostnaðurin hækkar. Ferðaútreiðslurnar til og úr Føroyum kunnu eisini væntast at hækka.

Tí meta vit tað av stórum týðningi, at lánimoguleikarnir úr grunninum hækka rímiliga í mun til nevndu hækkingar.

Vit hava í løtuni ikki talið á teimum, sum fóru undir lærdan lestur heystið 1976. Umleið 200 tóku students- og HF-prógv í Føroyum summarið 1976 — og rokna vit við at talið á umsóknum 1976/77 fer at liggja uml. 200 — moguliga eitt sindur hægri. Talið fyri 1977/78 verður væntandi uml. 250. Sonuleiðis at meðalupphæddin verður uml. 1600 kr.

250 umsóknir á 1.600 kr.	400.000 kr.

§ 14.8.14. Meginfelag Føroyskra Studenta.

Rakstur

Ætlan yvir væntaðar rakstrarútreiðslur fyri rokuskaparárið 1977/78:

Húsaleiga (+ ljós og hita)	7.000 kr.
Skrivstovuútreiðslur:	
Skrivstovuamboð, pappír, prentlutir, bøklingar, postgjald og lýsingar	7.500 kr.
Pisan	3.000 kr.
Telefon	1.500 kr.
Millumtjóðaarbeiði	6.000 kr.
Lon til skrivstovufólk	20.000 kr
	45.000 kr.

Viðm. til «Løn til skrivstovufólk».
Í samband við ynski okkara um at fáa felagið meira effektivt og arbeiðið í felagnum meira kontinuert, verður arbeiðsumráðið hjá viðkomandi skrivstovufólki m.a.:

Skrivstovumarbeiði uml. 2 tímar dagliga, at rokja sambandið við hini norrænu meginfelógini, samla upplýsingar frá útbúgvingarøkinum í fyrst og fremst norrænu londunum, margfalding, passa telefon, fyrireiking av fundum og tilfokum, munsiting av rabatskipanum, og so at rokja aðrar sosialar og fakligar uppgávur hjá finnunum, at eggja føroyskum lesandi at viðgera føroysk viðurskifti í lesnaði teirra.

Studningur til styfri lestrarferðir

Setan 1975/76 vísti, at torvurin á og álugin fyri viðkomandi studningi er vaksandi t.d. at vit fingu umsóknir, vit ikki kundu játta pening til. Talið av teim lesandi er vaksandi, ferðaútreiðslurnar hækkandi, og sokja vit tí til árið 1977/78 nu kr. 25.000.

Uppskot Meginfelagsins til lestrarlán	
§ 14.8.1.	400.000 kr
Umsókn Meginfelagsins um studning til felagið.	
§ 14.8.14.	70.000 kr.

Ad § 14-2295/3136 Føroya Skúlasavn.

Sbrt. skriv dagf. 10. okt. 1976 frá Føroya Skúlasavni:

Uppskot til fíggjarlogtingslóg 1977/78 viðvíkjandi Rakstrarstað 2295 Konto 3136 Føroya Skúlasavn.

Skotið verður upp, at stuðningurin verður kr. 40.000 eins og seinasta fíggjarár.

Grannskoðaður roknskapur fyri seinasta fíggjarár verður sendur.

Ad § 14-2295/3138 Norrøna Felagið.

Sbrt. skriv dagf. 7. nov. 1976 frá Norrøna Felganum:

Norrøna Felagið loyvir sær hervið at søkja um ársstudning. Vit hava síðani aðalfundin í apríl arbeitt við at fáa felagið aftur á fotur — og hava at kalla fingið greiðu á teinum viðurskiftum, vit hava við hini norrønu felogini. Skyldur okkara eru sera stórar mótvegis hesum felogum, serliga orsakað av, at álugin fyri Føroym er so stórur — serliga í Svøriki og Finnlandi. Vit hava nógv arbeiði av at fáa til vega upplýsandi tilfar o.t.

Sum kunnugt verður nógv av tí arbeiði, ið samband hevur við grannatjóðirnar, goldið av hinum feløgunum og Foreningerne Nordens Forbund, søndirnar eru stórar, fríplass fyri skeiðluttakarar o.s.fr., men vit hava nakað av peningi fyri neyðini sjálvir fyri at klára skyldur okkara.

Ársstudningurin frá Landsstýrinum hevur í fleiri ár verið 6000 kr. — og vit ynskja sjálvsagt, at hann verður prístalsviðgjørdur. Eg loyvi mær at nevna, at Thorolf Bjørklund, júst heimkomin av ársfundi felaganna í Álandi, upplýsir, at Norrøna Felagið í Álandi við telur einar 200 limir, fær eina peninganøgd frá Alendska Landstinginum, ið svarar til umleið 20.000 kr. í okkara peningi (umfram umleið 3.500 kr. í okkara peningi frá býráðnum í Mariehamn).

Vit eru sjálvandi altíð til reiðar at greiða nærri frá arbeiði okkara, um Landsstýrið ynskir tað.

Ad § 15-2310 Føroya Landsbókasavn.

Sbrt. skriv dagf. 8. okt. 1976 frá Føroya Landsbókasavni:

2310 Føroya Landsbókasavn	Roknskapur 1975/76	Játtan 1976/77	Umsókn 1977/78	Viðm.	Uppskot 1977/78
KONTO NR.					
790 Ymiskar inntøkur	+ 98	+ 100	+ 100		+ 1.0
1004 Løn/tænastumenn	123.600	121.000	132.000	1)	132.0
1014 Løn/sturvsfólk	287.200	378.000	357.000	2)	413.0
1016 Løn/sáttmálalønt	176.000	126.000	139.000	3)	139.0
1022 Løn/reingerð	7.900	13.000	13.000	4)	13.0
1028 Løn/onnur	14.800	8.000	8.000	5)	8.0
1305 Fólkatrygging (nýggj konto)	000	000	700	6)	1.0
2110 El, hiti og vask	21.100	17.000	20.000	7)	20.0
2140 Umvælingar v.m.	14.000	000		8)	0.0
2150 Húsaumsiting	000	17.000	22.100	9)	22.0
2170 Tryggingar	000	5.100	5.100	10)	5.0
2180 Leiguútreiðslur	37.800	40.000	60.000	11)	60.0
2240 Flutningur	3.100	4.000	5.000	12)	5.0
2305 Skrivstovuinnbúgv	000	8.000	8.000	13)	8.0
2310 Skrivstovuhald	6.700	10.000	16.000	14)	16.0
2315 Prentlutir 12.500					
÷ endurgjald .. ÷ 2.500					
10.000	2.700	2.500	10.000	15)	10.0
2325 Postgjald	1.800	6.000	7.500		8.0
2335 Telefon og telex	4.700	4.500	5.000		5.0
2340 Leiga av maskinum	000	5.000	5.000	16)	5.0
2508 Bókakeyp og innbinding	194.000	140.000	200.000	17)	200.0
2590 Aðrar útreiðslur	300	2.000	5.000	18)	5.0
(2590) Eykajáttan	000	15.000	000	19)	0.0
	895.698	922.000	1.018.300		1.074.0

Viðmerkingar:

Roknskapurin 1975/76 er settur upp eftir kontoavriti frá Gjaldstovuni, sum tó í einstøkum førum víkir smávegis frá tí, tó úvist er hiðani.

1) Landsbókavørðurin er frá 1. aug. 1968 settur í 29. lønarrammu.

2) Savninum vantar 3 bókavørðir — 1 til Føroyadeildina, 1 til útlánsdeildina og 1 til fólkabókasavnsarbeiðið á bygd. Savnið gerst ikki fært fyri at rokja uppgávur sínar, fyrr enn manning við neyðugum kunnleika og útbúgving fæst. Umsókn hiðani um ein bókavørð aftur at frá 1. jan. 1976 varð ikki játtað. — Sum er, hevur savnið bert ein bókavørð (útlendiskan) til lesistovu og bibliografiskt arbeiði umfram til bókakeyp v.m. og til umsjón við sjúkrahúsbókasavnsarbeiðinum. — Á vísindadeildini er 1 bókavørður og 1 hjálparfólk. Hini fastlønta hjálparfólkini eru 4. Eitt teirra arbeiðir stútt við skráseting o.fl. fyri fólkabókasavnini og eigur ti at verða lønt av rakstrarstað nr. 2320 konto nr. 1014, men er í núverandi játtan á bestum rakstrarstaðnum (2310). Sí viðm. 1) til rakstrarstað 2320.

Lønir til starvsfólk Landsbókasavnsins verða so hesar:

Lesistovubókavørður	20. lønarflokkur	3. stig	kr.	94.395
Hjálparfólk	9. lønarflokkur	7. stig	kr.	66.966
—	9. lønarflokkur	7. stig	kr.	66.966
—	7. lønarflokkur	10. stig	kr.	65.949
—	7. lønarflokkur	8. stig	kr.	62.696
			kr.	356.972

3) Vísindabókavørðurin er lønur eftir sáttmála við danska felagið Magisterforeningen. Mánaðarlønin er um kr. 11.560 við pensjónstrygging. Gjaldslovan upplýsir, at nakað av lønini hjá lesistovubókavørðinum er bókað her.

4) Lønin til reingerð hevur verið óbroytt kr. 8.200 árliga seinastu árini. — Arbeitt verður við at fáa nýggja reglugerð fyri reingerð og stepst fá ikki undan lønarhækking.

5) Roknast má framvegis við eykuhjálp av og á, umfram lon til avloysarar.

6) Nýggj konto. Hevur áður verið uppi í húsantreiðslum.

7) El-nýtslan hjá bókasavninum (+ vísindadeild og onnur leigað beli) fer nú av felags útreiðslunum rakstrarstað 2384 konto 2110.

8) Eftir uppskoti landsstýrisins er hendan konto nú lagd saman við 2150.

9) Til umsiting av bókasavninum innan og uttan.

10) Nýggj konto. Fyrr farin av húsaútreiðslum.

11) Til nýggja bókasavnið er liðugt, noyðist savnið at leiga goymsluholi - - í lotuni 3 ynsa staðni í Havn. Árliga leiga er nú:
a) 25.000 kr.
b) 24.000 — (prístalsviðgjørd)
c) 3.800 — (uppsøgd, neyðugt við øðrum holi í staðin)

52.800 kr. + nýggja leigu + 3.800 kr.

12) Hækkingar í farma- og bilflutningi gera at játtanin 1976/77 fer ikki at halda.

13) Nýggj konto. Fyrr farin av húsaútreiðslum og/ella skrivstovuhaldi. Okkurt keypt skrivstovutól er misbókað á konto 2310.

14) Mesti vøksturin her er á nýtslunni av minigrafi, lesiprentitóli og helst rank-xerox-tólinum, sum nýtt verður av øllum stovnunum á tnðni.

Útreiðslurnar til makatøku eru uml.	9.000 kr.
Inntøkurnar av makatøku er uml.	3.000 kr.
	6.000 kr.

15) Roynt verður at fáa SAMSKRÁNNA — yvirlitið yvir afturatkomnu bokurnar — prentaða 3—4 ferðir árliga. Hoknað er við endurgjaldi fyri skránna frá øðrum søvnum uppá uml. 2.500 kr. árliga.

16) Rank-xerox fyri 380 kr. um mánaðin.

17) Innflytingin í nýggju bókasavnshúsini byrjar í 1978. Fleiri túsund bokur, ið vil hava liggjandi burturgoymdur og óinnbundnar, skulu vera klárar at seta upp tá. Innbindingin kostar uml. 35 kr. bindið. Nevðugt er eisini at økja um keypið av føroyskum bókum serliga.

18) 19) 15.000 kr. sum eykajáttan í sambandi við flyting av tveimum bókagoymshum, sbrt. skriv landsstýrisins 26. juli 1976 j. nr. 323-5-4.

Ad § 15-2320 Fólkabókasøvn.

Sbrt. skriv frá landsbókavørðinum:

Uppskot landsbókavørðsins til fíggjarlógina 1977/78 viðv. rakstrarstaðnmonari.

2320 **Fólkabókasavn**	Rokuskapur 1975/76	Játtan 1976/77	Umsókn 1977/78	Viðm.	Uppskot 1977/78
konto nr.:					
1014 Løn/starvsfólk (nýggj konto)	1.000	000	110.000	I.	0.0
1028 Løn/oonnr (nýggj konto)	000	000	30.000	II.	0.0
1050 Samsýningar	000	000	000		0.0
2501 Umsjón	400	(500)	2.000	III	2.0
2517 Nýstovnan av bókasøvnum ..	000	000	150.000	IV.	0.0
2520 Rithøvundasamsýning	19.900	24.000	24.000	V.	24.0
3710 Rakstrarstudningur	671.900	840.000	909.600	VI.	1.000.0
Tilsamans	693.200	864.500	1.315.600		1.026.0

Viðmerkingar:

I. Sum nevnt frammanfyri (undir rakstrarstaði 2310, viðm. 2) arbeiðir altið eitt - stundum tvey — av hjálparfólkunum bara við bókakeypi og skráseting fyri fólkabókasøvnini. Viðkomandi er lønt í 12. lønarflokki 10. stigi (pr. 1/6 1977). Árslønin við 24 tíma viku verður 56.000 kr.

Sum nevnt niðanfyri í viðm. IV er í uppskoti at nuleggja bókasavnsarbeiðið á bygd, gera tað betri og effektivari, við bókabilstenasta, ið kann byrja í fyrsta lagi í november 1977. Uppskotið var við í fíggjarætlanini í fjor og verður endurtikið í ár, hesa ferð sent serskilt eftir at tað hevur verið viðgjørt á bókasavnsstevnuni í Havn 20. oklober í ár.

Til bókabílstænastuna krevst ein bókavorður, sum søkt verður um at fáa normeraðan frá í seinasta lagi 1. august 1977. Lon bansara fyri 8 mánaðar er sett til 54.000 kr.

II. Lon til fólkið, ið koyrir bókabílin og eisini er hjálparfólk á fróðunum í mtl. 5 mánaðar.

III. Av játtanini 1975/76 upp á 3.000 kr. eru bert umt. 400 kr. bróktar. Hetta kemst av, at landsbókasavnið seinasta árini hevur ikki havt nøgtur at vitja sovnini nóg ofta. Í uppskotinum til 1976/77 strikaði landsstýrið alla umsjónina, men hevur seinni (j. nr. 323-12) mælt til at 500 kr. vórðu settar av. Tað verður ov lítið komandi ár og uppskotið um 2.000 kr. verður tí líkið uppaftur. — Ætlanin er at bil-bókavorðurin skal taka sær meira av hesum umsjónararbeiði saman við landsbókavorðinum.

IV. Bókasavnsarbeiðið á bygdunum er í mongum førum ein viðfáningur. Sovnini eru ov smá og illa útgjørd bæði til holis, fíggjarliga og mannfingarligu. Gagnið av teimum sum fólkabókasovn er tí yvirhovur ov lítið. Mælt verður tí til at hesi sovn, sum eru í skúlunum Trammanundan, verða gjørd til skúlabókasovn bartarav ella til skúla- og fólkabókasovn í einum í samráð við avvarðandi myndugleikar. Hetta eigur fyrst at verða gjørt í Streymoynni (uttan fyri Havnina), í Eysturoynni og helst eisini í Vágum. Skúlabókasovnini hoyra sum er — hóast eingin fost skipan er — saman við skúlanum og eiga tí rætt til studning eisini frá ríkinum. Í uppskoti, sum sent verður landsstýrinum um fáar dagar, verður mælt til, at bókasavnstænastan annars í hesum nevndu umráðum fyrst og fremst verður rokt við bókabili frá landsbókasavnipunn. Sum greitt frá í hesum uppskoti, eru fyrimunirnir við slíkari skipan storstir í sunnum spjaddum bygdasamfelagnum við sínámillum vegasambandi.

Verður uppskotið samtykt, kunnu vit ætlandi byrja bókabílstænastuna longu í november 1977. Eftir galdandi skipan við studningsveitan verða so moguleikar fyri lækking í landskassastuðninginum í fíggjarárinum 1979/80.

Nýtiligur bókabílur við umt. 2.000 bókum, sum verða útskiftar eftir tørvi, fæst við útgerð fyri um 130.000 kr. Rakstur in fyrsta árið er mettur til um 20.000 kr. og 25.000 kr. annað árið. Tað er lítið meira enn fyrr hevur verið játtað til árliga nýstovnan av smáum fólkabókasovnum. Ongar ætlanir eru um nýstovnan av fólkabókasovnum í løtuni og tað finnst heldur ringin játtan til tess.

V. 1. apríl 1975 vóru 35 føroyskir rithøvundar umboðaðir í fólkabókasovnunum við meira enn 20 bindum hvor. Samsýningin varð: 2.399 bd. á 8,30 kr. = 19.911,70 kr. — Í § 8 í lógini um fólkabókasovn er upphæddin sett til 10.000 kr. árliga. Hiðani hevur verið mælt til í sambandi við aðrar broytingar í lógini at seta ein hóskandi prosentpart av samlaðu játtanini til fólkabókasovnini inn í staðin.

VI. Landskassastuðningurin til fólkabókasovnini er sbrt. lög 60% av rekstrarútreiðslunum árið fyri.

I yvirlitinum niðanfyri eru tær ætlaðu rekstrarútreiðslurnar í 1976/77 fyri hvørt savnið sær settar upp sbrt. fíggjarætlan hjá viðkomandi savni, har slík hevur fingist.

	ætlaður rekstur 1976/77	landskassastuðningur 1977/78
Býarbókasavnið, Tórshavn	1.262.000	757.200
Klaksvíkar bókasavn	173.200	103.920
Fuglafjarðar bókasavn	40.000	24.000
Froðbiar sóknar bókasavn	30.000	18.000
Sørvágs bókasavn	30.000	18.000
Vágs bókasavn	25.000	15.000
Glyvra bókasavn	21.300	12.780
Kollafjarðar bókasavn	21.000	12.600
Sandavágs-Miðvágs bókasavn	20.000	12.000
Vestmanna bókasavn	17.500	10.500
Bókasavnið í Nes kommuna, Toftir	8.000	4.800
Sandoyar bókasavn, Sandi	8.000	4.800
Sunda Bókasavn, Oyrabakka	6.000	3.600
Eiðis bókasavn	4.000	2.400
Tilsamans	1.666.000	999.000

Viðmerking frá landsstýrinum:

Ad 1014: Ítreiðslurnar til eitt skrivstovufólk, sum skotið verður upp at bókum undir fólkabókasovn, er flutt aftur undir landsbókasavnið, har lað av rottum hoyrir heima.

Ad § 15-2330 Føroya Landsskjalasavn.

Sbrt. skriv dagf. 29. oktober 1976 frá Føroya Landsskjalasavni:

		Roknskapur 1975/76	Játtan 1976/77	Uppskot 1977/78
1001	Løn/Tænastumenn	44.900	000	000
1014	Løn/Starvsfólk	146.400	255.500	255.500
1022	Løn/Reingerð	2.400	000	000
1120	Ferða- og dagpeningur	300	1.000	1.000
2110	El, liti og vask	10.200	000	000
2140	Løn/úrtíðarlon	000	1.000	000
2180	Leiguútreiðslur	12.700	000	000
2310	Skrivstovuhald	8.900	2.000	4.000
2315	Prentlutir	300	16.000	16.000
2325	Postgjald	200	1.000	1.000
2335	Telefon og Telex	3.000	3.000	4.000
2340	Leiga av maskinum	000	5.000	6.000
2356	Aðrar skrivstovuútreiðslur	21.100	12.500	16.000
		250.400	297.000	303.500
0	Keyp av lesi- og kopieringstóli			37.500
				341.000

ad 1014 Løn/Starvsfólk er í dag ávikavist kr. 9.053,00, 5.360,25 og tvey 2.315,92 um mánaðin.

Hjálagt verður sent Føroya Landsstýri: Uppskot til fíggjarætlan fyri Landsskjalasavnið fyri 1977/78., sum tíverri er eitt sindur seinkað, orsakað av, at vit hava bíðað eftir tilboði uppá eitt lesi- og fotokopieringstól.

Sum tað sæst vikur fíggjaruppskotið fyri 1977/78 einki stórvegis frá játtanini fyri 1976/77 uttan viðvíkjandi konto 0 kr. 37.500,00, sum er ætlað til keyp av omanfyri nevnda lesi- og kopieringstóli, sum Landsskjalasavnið ikki kann vera fyri uttan. Vit hava ein hóp av mikrofilmum, sum hjálagda yvirlit vísir; men uttan nevnda tól kunnu vit ikki brúka filmirnar. Vit hava hingartil við okkara náverandi xerox-tóli tikið koplir av kirkjubókum til nýtslu á ættargranskingarskeiðinum á Fróðskaparsetrinum og á bygdabókasovnum, har hugurin fyri ættargransking er stórur og stoðugt vaksandi. Hesi kopi hava vit tikið, bóast vit hava vitað, at tær gomlu kirkjubøkurnar ikki tola viðferðina við kopiering. Tíðsum hava vit stoðgað nú, og serliga síðani Rigsarkivet í Keypmannahavn hevur sett forboð móti at fotokopiera

kirkjubøkurnar. So gamlar og ofta illa farnar kirkjubøkurnar eru, fáu fólk tær ikki til láns á savnsins lesistovu. I skeiðinum hjá ættargranskingini á Fróðskaparsetrinum er eisini neyðugt at brúka skifti- og pantiprotokollir, sum ganga aftur til 1700; men vit hava ikki kunna lánt hesar bøkur til nevnda granskingararbeiði. Síðani er tað hent, at Arni Thorsteinsson savnsvorður hevur byrjað eitt skeið á Fróðskaparsetrinum viðvikjandi gomlum húsum, sum upplýsingar eru fyrst og fremst at finna í skifti- og pantibókunum umfram í yvirlitinum yvir kongshús frá 1721 o.s.fr. I hesum skeiði hjá Arna Thorsteinsson luttaku okkum kunnugt 13 fólk, men vit hava ikki kunnað játtað honum lán av hesum nevndu bókum, og vil tað siga, at skeiðið neyvan kann halda fram. Tí er tað, at Landsskjalasavnið hevur sett eina nýggja konto o — uppá kr. 37.500,00 til keyp av lesi- og kopieringstóli, og kann hetta tól latast nú beinanvegin úr Danmark.

Men av tí at tað bastar, loyva vit okkum at biðja Føroya landsstýri leggja benda pening út nú móti vøntandi játtan á komandi fíggjarlóg. I hesum sambandi loyva vit okkum at viðleggja fotokopi av skrivi frá Føroya Landsstýri viðvikjandi hillum, sum bókamiðsalan fekk fyri einki frá Landsskjalasavninum - - kr. 12.000,00.

Føroya Landsstýri kunnugt er og hevur Landsskjalasavnið ikki verið landinum ein dýrur kleppur, og vóna vit tí við hesum, at Landsstýrið og fíggjarnevndin ganga okkum á møti við at geva savninum eina forskotsjáttan uppá kr. 37.500,00 til keyp av nevnda lesi- og kopieringstóli, soleiðis at vit kunnu ganga skeiðinum í ættar- og húsagransking til handa. Vit kunnu gera vart við, at Landsbókasavnið hevur eitt slíkt tól — teir hava mikrofilmar av gomlum føroyskum bløðum — men teir mikrofilmar, sum Landsskjalasabnið hevur, passa ikki til tólið á Landsbókasavninum.

Ad § 15-2340 Føroya Fornminnissavn:

Sbrt. skriv dagf. 7. okt. 1976 frá Fornminnissavninum:

Hjálagt verður sent landsstýrinum uppskot til fíggjartogtingslóg 1977/78 fyri rakstrarstað 2340 Føroya Fornminnissavn og rakstrarstað 2350 Bygdasovn v.m.

		R. 1975/76	J. 1976/77	H. 1977/78	Uppskot 1977/78
620	Endurgjald frá Havnar kommunu fyri rokt av Skansanum	0.0	— 4.0	— 5.0	— 5.0
1004	løn/lærnastunnenn	46.2	0.0	0.0	0.0
1014	Løn/starvsfólk	205.3	342.0	603.7	529.0
1016	løn/sáttmálalønt	137.6	245.0	350.0	255.0
1018	løn/nævningar	72.9	0.0	0.0	0.0
1022	løn/reingerð	16.4	18.0	20.0	20.0
1028	løn/onnur	221.7	300.0	452.5	400.0
1120	Ferða- og dagpeningur	0.0	40.0	115.0	60.0
2090	Upplýsingarvirksemi	10.5	10.0	10.0	10.0
2110	El, hiti og vask	8.7	10.0	10.0	10.0
2140	Umvælingar v.m.	11.5	15.0	15.0	15.0
2310	Skrivstovubald	8.7	10.0	10.0	10.0
2325	Postgjald	2.5	4.0	4.0	4.0
2335	Telefon	8.8	8.0	8.0	8.0
2508	Bókakeyp og innbinding	4.2	5.0	10.0	10.0
2511	Ymiskar útreiðslur, fornfrøði	33.8	15.0	15.0	15.0
2526	Ymiskar útreiðslur, byggifrøði	41.8	20.0	20.0	20.0
2530	Amboð	16.9	15.0	15.0	15.0
2531	Aðrar umsitingarútreiðslur	2.7	22.0	22.0	22.0
2532	Ymiskar útreiðslur, fólkalívsfrøði	5.1	10.0	10.0	10.0
2590	Aðrar útreiðslur	5.1	5.0	5.0	5.0
		860.3	1.090.0	1.690.2	1.413.0

Viðmerkingar.

Niðanfyri eru gjørdar viðmerkingar til einstakar konti, men av tí at kontoskipanin ikki vísir útreiðslubýtið millum ymisku arbeiðsokini, hevur savnið sett upp eitt yvirlit, sum er hjálagt.

ad kt. 620

Eftir avtalu rindar Tórshavnar kommuna løstu lønina til røkt av Skansanum við 50%. Bruttolønin kr. 10.000 verður ført undir konto 1028.

ad kt. 1014

normeraðu storvini:

landsantikvarur	kr.	112.2
savnsskrivari	- -	75.3
skrivstovufólk	-	41.1
savnshjálpari	---	56.8
savnshjálpari	- —	74.6
savnshjálpari	-	56.8
½ savnslæsari		36.6

Lønirnar eru roknaðar eftir galdandi lonum pr. 1.10.76. Tó er roknað við prístalsviðbótum pr. t.d., 1.7. og 1.10. 77.

Skotið verður upp at nýnormera storv sum

Gripakonservator	kr.	75.0
Fotografur		75.0

Gripakonservator er á einum forminnissavni avgjort neyðugur fyri at fornlutir skulu kunna varðveitast. Bæði teinum lutum, sum á savninum eru, teinum sum inn koma og ikki mínst teinum, sum grivnir verða upp úr joðini torvar viðgerð, konservering. Viðagripir, sum fram verða grivnir, torna og fúna burtur, leirflátabrot flosna sundur og jarn og bronsa eirast í molar, verða gripirnir ikki viðgjordir. Hesi arbeiði kunna bert verða gjord til litar av komnu gripakonservatori.

Forminnissavnið eigur stórt mynslasavn við gomlum glasnegativum í tósundlatati, og roynt verður at savna inn bæði negativir og positivar myndir, tí gamlar myndir hava stórt siðsoguligt keldugvirði. Fyri at betta tilfar kann koma til nýtslu er neyðugt við fotografi at taka sær av tí tekniska arbeiðinum og eisini viðgera negativini, sum kunna vera í ringum standi, álopin av svampi og við framhaldandi keminskum prosessum í emulsjónini, sum neyðugt er at steðga. Eisini er fotografur neyðugur tí að nógva fotoarbeiði í sambandi við virksemi savnsins annars.

ad kt. 1016

normeringar:

savnvorður, unsiting	kr. 155,0	(roknað 10% eftirlonargjald)
savnvorður, fólkalivsfr.	- - 105,0	(roknað 10% eftirlonargjald)

uppskotin nýnormering:

húsakonservator	kr. 90,0	(roknað 10% eftirlonargjald)

Ein av hovuðsuppgávum Fornminnissavnsins er varðveiting av gomlum bygningum. Tann vokstur, sum løgting og landsstýri hava játtað Fornminnissavninum seinru árini hevur gjørt savnið fort fyri at gera tær neyðugu siðsøgulign kanningar og metingar í hesum sambandi. Men savnið er ikki fort fyri at taka sær av ti tekniska partinum av arbeiðinum við varðveiting og kannan av gomlum bygningum, uppmátingum, eftirliti við friðaðum bygningum og teimum umvælingararbeiðum, ið gjørd verða, og vegleiðing viðvíkjandi bygningarokt. Fyritreytin fyri at arbeiði savnsins á hesum øki kann koma í eina fasta og trygga legu er, at ein húsakonservator, restaureringsarkitektur, verður settur á Fornminnissavnið. Savnið skal ti loyva sær at skjóta upp, at slíkt starv verður játtað í komandi fíggjarári.

ad kt. 1028

Bundnar útreiðstur eru:

Vaktarhald í fostu framsýningunum	kr.	35.0
Rok tav Skansanum	—	10.0
Flagging á Skansanum	—	2.5

Útreiðstur til arbeiðshjálp annars:

Fornfrøðiligt virksemi	kr.	290.0
Byggifrøðiligt virksemi	—	80.0
Fólkalívsvirksemi	—	25.0
Upplýsingarvirksemi	—	10.0

Viðvíkjandi arbeiðshjálp til fornfrøðiligt virksemi er at viðmerkja at játtanin, sum er eru ov lágar í mun til tað arbeiðstrýst, sum stendst av anleggsarbeiðum av ymiskum slag, og skal savnið ti loyva sær at skjóta upp, at játtanin verður okt.

ad kt. 1120

Fornfrøðiligt virksemi	kr.	85.0
Byggifrøðiligt virksemi	—	15.0
Fólkalívsvirksemi	—	15.0

Sum er, er játtanin alt ov lítil og er tað sjálvandi arbeiðstarnandi.

Viðmerking frá landsstýrinum:

Roknað er við núverandi manning og haraftrat nýnormering av einum starvi sum konservator.

Ad § 15-2350 Bygdasøvn.

Shrt. skriv frá Fornminnissavninum:

Uppskot til fíggjarlogtingslóg 1977/78

2350 Bygdasøvn v.m.

Konto		R. 1975/76	J. 1976/77	Uppskot 1977/78
2501	Eftirlit	0.8	5.0	5.0
3710	Rakstrarstuðningur	50.0	50.0	50.0
3790	Umvætingarstuðningur	49.2	80.0	80.0
		100.0	135.0	135.0

Ad § 15-2335 Fiskirannsóknarstovan.

Shrt. skriv dagf. 13. oktober 1976 frá Fiskirannsóknarstovuni:

		Roknskapur 1975/76	Játtan 1976/77	Umsókn 1977/78	Uppskot 1977/78
605	Endurgjald/ríkið	— 383.0	— 475.0	— 490.5	— 490.0
1016	Løn/sáttmálaløn	582.7	660.0	732.0	660.0
1028	Løn/onnur	21.3	18.0	21.0	21.0
1120	Ferða- og dagpeningur	12.0	15.0	20.0	20.0
2180	Leigutreiðslur	40.7	45.0	45.0	45.0
2530	Auðboð	13.1	22.0	25.0	25.0
2533	Leiga av skipum, royndir v.m.	77.6	100.0	120.0	120.0
2536	m/s Jens Chr. Svabo	1.061.1	1.040.0	1.140.0	1.140.0
2590	Aðrar útreiðslur	18.3	15.0	18.0	18.0
		1.444.1	1.440.0	1.630.5	1.559.0

Viðmerkingar:

605 Ríkið rindar helvingin av øllum konti uttan konto 2536, rakstur av Jens Chr. Svabo, har ríkið einki letur. Til nýggja fiskifrøðingin, ið nú er settur, letur ríkið heldur einki, men søkt verður aftur í ár á donsku fíggjarlógini um helmingin.

1016 Sokt verður um ein hjálparmann afturat. Hesin varð ikki játtaður seinast, loyva okkum tí at taka umsóknina uppaftur. Vit vísa til avrit av umsókn til danska fíggjarlógina, ið er hjálagd.

1120 Av tí at vit fáa ein fiskifroðing afturat, verður meira brúkt í ferðapeningi. Afturat hesum kemur, at bæði ferða- og dagpeningur er mannandi uppfarin.

Vit gera vart við, at umsókn um sonn upphæddir eru sendar til Fiskeriministeriet (avrit hjálagt). Heitt verður við hesum á landsstýrið um at taka uppaftur samráðingar við ríkið um raksturin av Fiskirannsóknarstovuni og m/s Jens Chr. Svabo.

Forslag til budget for 1977/78.

1.	Bevilling fra staten	+ kr.	490.500
2.	Lønninger	—	732.000
3.	Medhjælp	—	21.000
4.	Rejseudgifter	—	20.000
5.	Husleje m.m.	—	45.000
6.	Redskaber, instrumenter m.m.	—	25.000
7.	Leje af fartøjer, forsøg m.m.	—	120.000
8.	m/s Jens Chr. Svabo	—	1.140.000
9.	Andre udgifter	—	18.000
		kr.	1.630.500

Fiskeriministeriets andel i udgifterne specificeres således:

Lønninger:	Antal				
Tjenestemænd	1	kr.	93.000		
Overenskomstansatte	2	—	90.000		
Biologassistenter	4	—	150.000		
Kontorassistenter	1	—	33.000		
Medhjælp		—	10.500	kr.	376.500

Driftsudgifter:

Rejser	kr.	10.000		
Husleje	—	22.500		
Redskaber m.m.	—	12.500		
Leje af fartøjer, forsøg m.m.	—	60.000		
Andre udgifter	—	9.000	kr.	114.000
			kr.	490.500

Ad § 15-2370 Føroya Náttúrugripasavn.

Sbrt. skriv dagf. 15. oktober 1976 frá Náttúrugripasavninum:

			Umsókn	Uppskot 1977/78
1004	Endurgjald til ríkið	kr.	92.400,—	93.0
1014	Løn/starvsfólk	—	80.000,—	80.0
1022	Løn/reingerð	—	20.000,—	20.0
1028	Løn/onnur	—	140.000,—	70.0
1120	Ferða- og dagpeningur	—	15.000,—	15.0
2030	Lýsingar	—	1.000,—	1.0
2110	El, hiti og vask	—	18.000,—	18.0
2150	Húsaumsiting	—	20.000,—	20.0
2170	Tryggingar	—	1.500,—	2.0
2180	Leigútreiðslur	—	10.000,—	10.0
2305	Skrivstovuinnbúgv	—	10.000,—	10.0
2315	Prentlutir	—	1.500,—	2.0
2325	Postgjald	—	600,—	1.0
2335	Telefon og Telex	—	8.000,—	8.0
2356	Aðrar skrivstovuútreiðslur	—	6.000,—	6.0
2533	Leiga av føruu	—	150.000,—	150.0
2539	Kanningar av savnarbeiði	—	30.000,—	10.0
2590	Aðrar útreiðslur	—	1.000,—	1.0
		kr.	605.000,—	kr. 517.000

Hervið verður sent inn uppskot til fíggjarløgtingslóg 1977/78 fyri Føroya Náttúrugripasavn, rakstrarstaður 2370, við viðmerkingum.

Viðmerkingar til fíggjarløgtingslóg 1977/78. Føroya Náttúrugripasavn. Rakstrarstaður 2370.

1011 Løn til konservator

1022 Løn til vaskikonu og eykareingerð

1028 Løn til ½ skrivstovukvinnu, D. G. U. ber útreiðslur av ½. Leyst bønarfólk og samsýning til vísindaligt arbeiðsfólk viðv. hotnkanningum.

1120 Ferðir í Føroyum og uttanlanda. Bilfutningur, frakt o.t.

2110 Ljós er á felagskonto fyri stovnarnar á Dehesartroð, hitt er roknaður til kr. 17.000,— og vaskitilfar til kr. 1.000,- -.

2150 Máling og umvelingar.

2170 Trygging av Bátahollini er sett á Fornminnissavnið.
Henda upphædd umfatar «lítlahús» og innbúgv.

2180 Leiga av kjallara og frystiboks.

2305 Plakatskrivimaskina, skáp, stólar.

2356 Bøkur, tíðarrit, kort, fotoútreiðstur, pappir og vanl. skrivstovuluntir.

2588 Leigu av «Dagstjørnuni».

2589 Tilfar, tól, service, magasinering (herundir til botnkanningar).

Ad § 15-2375 Fróðskaparsetur Føroya.

Sbrt. skriv dagf. 20. okt. 1976 frá Fróðskaparsetrinum:

Uppskot til fíggjarætlan 1977/78

Vísandi til skriv landsstýrisins, dagfest 10. september 1976, F.L. J. nr. 400-23-48, verða hjálagt send 2 eintok av uppskoti til fíggjarætlan 1977/78 fyri Fróðskaparsetur Føroya.

Tølini eru fyri Fróðskaparsetrið í ti útbúgvingartiga líki, tað hevur í lotuni; roknað er ikki við fleiri lesandi í dagundirvísingini og heldur ikki við eyka hølisútreiðslum. Men her skal alt fyri eitt verða skoytt uppí, at setursráðið er sinnað til at taka uppaftur tilmælið til landsstýrið frá november 1975 um hægri útbúgving í Føroyum.

Sum kunnugt spurdist bert ein útbúgving burturúr í fyrsta umfari, nevniliga gudfrøðilesturin, meðan hinar 3 útbúgvingarnar — fiskiidnaðar-, odv- og fyrisitingarútbúgving — sum uppskot var um at fara undir í 1976, vóru av ongum.

Ráðið fer í november komandi at seta fram uppskot viðv. hesum útbúgvingum saman við fíggjarætlan.

Við fyrivarni um hetta hevur setursráðið á fundi 12. oktober 1976 góðkent uppskotið við fylgjandi broytingum:

Føroyamálsdeildin:

konto 1014: Nýnormering av nemingi er ikki við ÷ 55.000 kr.

konto 1016: Nýnormering av bóknumentafrøðingi afturat er ikki tikið við ÷ 120.000 kr.

konto 1040-2590: Góðkent er bert at hesi konti verða játtanirnar 1976/77 samanlagdar + 10% ÷ 82.000 kr.

Støðisútbúgving:

konto 1016: Nýtt starv sum deildarleiðari í evnafrøði er ikki tikið við ÷ 144.000 kr. Ikki verður skotið upp at viðka frálæruna í pædagokk/psykologi ÷ 33.000 kr.

Samlaða yvirlitið verður hetta:

	Uppskot frá deildunum:	Uppskot frá ráðnum:
Setursskrivstovan og gudfrøðideildin	445.000,—	445.000,—
Føroyamálsdeildin	1.185.100,—	928.000,—
Støðisútbúgvingin	1.030.000,—	853.000,—
Stovnar á Debesartrøð	390.000,—	390.000,—
	3.050.100,—	2.616.100,—

Av praktiskum orsøkum er uppskotið liðað sundur í 3 rakstrarstøð (á sjálvari fíggjarlógini verða tey øll løgd saman í eitt — rakstrarstað 2375: Fróðskaparsetur Føroya):

2375 Setursskrivstovan og gudfrøðilesturin
- 2376 Foroyamálsdeildin
- 2377 Støðisútbúgvingin

Harumfram eigur Friðskaparsetrið part í serligum rakstrarstað: Stovnar á Debesartrøð (felagsútreiðslur). Uppskotið til hetta rakstrarstað er góðkent av øllum stovnunum á trøðni og verður sent fyri seg.

Hjálogd skjøl: Samlaða figgjarvetlanin

Rakstrarstað	2375
—	2376
—	2377

Uppskot
til
figgjarætlan 1977/78 fyri rakstrarstað 2375: Setursskrivstovan og gudfrøðislesturin

		Rokn-skapur 1975/76	Játtan 1976/77	Uppskot 1977/78	Viðm.
1012	Lon/lærarar	54.1	65.000	120.000 (+30.000)	1)
1014	Lon/starvsfólk	135.8	167.000	195.000	2)
1016	Lon/sáttmálalønt	0	25.000	25.000	3)
1018	Lon/onnur	0	5.000	5.000	
1050	Samsýningar	22.7	8.000	8.000	4)
1120	Ferða- og dagpeningur	1.9	8.000	10.000	5)
1305	Tryggingar (starvsfólk)	(0)	1.000	1.500	6)
2030	Lýsingar	7.6	7.000	8.000	
2040	Dagbløð, tíðarrit v.m.	(0.3)	1.000	1.000	
2305	Innbúgv (skrivstovu-)	80.7	8.000	15.000	7)
2310	Skrivstovuhald	4.3	4.000	4.500	
2315	Prentlutir	1.7	4.000	4.000	
2325	Postgjald	3.5	5.000	5.000	
2335	Telefon og telex	(13.4)	3.000	3.000	8)
2508	Bókakeyp og innbinding	0	10.000	10.000	9)
2590	Aðrar útreiðslur	43.9	30.000	30.000	10)
790	Ymiskar inntøkur	- 11.4	0	0	11)
		344.8		445.000	
	+	(13.7)		(30.000)	12)
	Tilsamans	358.5	351.000	475.000	

Uppskot
til
fíggjarætlan 1977/78 fyri rakstrarstað 2375: Setursskrivstovan og gudfrøðilesturin

Viðmerkingar:

1) **Løn/lærarar:** Tímalønir til leysalærarar í undirvising, sum setursskrivstovan stilar fyri:

	Rokniskapur 1975/76	Játtan 1976/77	Uppskot 1977/78
a) Læraraskeið í náttúrusogu	0	8.000	8.000
b) Onnur skeið	0	7.000	12.000
c) Kvøldundirvising	54.1	35.000	60.000
Tilmeldingargjald	÷ 11.4	÷ 10.000	÷ 10.000
d) Gudfrøði við einum flokki	0	25.000	50.000
			120.000
d) Við nýggjum gudfrøðiloen, í 1977			30.000
Tilsamans	42.7	65.000	150.000

a) Sbr. skránni verður eitt skeið fyri jól og eitt aftur ímóti sumri 1977.

b) Ætlanin er í hesum undirvísingarári at hava læraraskeið í bíbliukunnleika. Á skránni er eisini latfundirvísing fyri studentaskúlanæmingar á samfelagslinju. Ilækkaða upphæddin 1977/78 er ætlað at fevna um eitt eyka læraraskeið.

c) Longu í 1976/77 kemur kvøldundirvísingin upp á 55-60.000 kr. Tað eru ikki ætlanir um at minka um hana komandi ár.

d) Í 1976/77 skal játtanin bert rokka til 7 mán. við einum flokki, meðan hon komandi ár fevnir um eitt heilt ár umfram tað, at tímarnir dýrka eftir byrjanarundirvísingina. — Skal nýggjur flokkur takast inn í 1977, kostar hann í tímalønum um 30.000 kr.

Tímalønir setursins eru í løtuni: 55 kr. + 40 min. fyrireik. = 91,67
55 kr. + 90 min. fyrireik. = 137,50

2) **Løn/starvsfólk:** 3 starvsfólk á setursskrivstovuni: **Uppskot**

1. Setursskrivari í 23. lønarfl. (1.10.76, 3. stig = 101.274; við viðbótum og frítíðarløn mett til)	105.000
2. Assistentur í 9. lønarfl. (1.8.76, 7. stig = 65.340; ársløn 77/78 mett til 70.000; við 6/7 arbeiðstíð)	60.000
3. Nævningur (1.9.76, 40% av 9. lønarfl., 1. st. = 55.582, 1.9.77, 50% av 9. lønarflokki, ársløn 77/78 mett til)	30.000
	195.000

3) **Løn/sáttmálaløn:** Viðbót fyri leiðslu av gudfroðilestrinum (sum 2 fimalærarar fyribils hava í felag).

Skal gudfroðislesturin halda fram, sambindast við faklæraralestur, og baraftrat ætlanin um stovnsetan av granskingar- og týðingarstovni fremjast, gerst meira og meira átroðkandi at seta ein deildarstjóra burturav. Í fyriliggjandi uppskoti er **ikki tikið fyrivarni** viðv. hesum.

4) **Samsýningar:** Tolini fevna um:

	Roknskapur	Játtan	Uppskot
Kvøldfyrilestrar	9.1	6.000	6.000
Innbodnir fyrilesarar (uttaneftir)	0	2.000	2.000
Kanningar viðv. lægri útbúgving + eyka hjálp (nú kt. 1028)	13.6	0	0
Tilsamans	22.7	8.000	8.000

5) **Ferða- og dagpeningur:**

Innbodnir fyrilesarar (í Føroynum og uttaneftir)	0.3	4.000	4.000
Setursskrivstovan	1.6	4.000	6.000
Tilsamans	1.9	8.000	10.000

Tær 6.000 kr. í uppskotinum eru eisini ætlaðar at røkka til eina uttanlandaferð at samráðast um framhaldslestur fyri lesandi hiðani.

6) **Tryggingar:** Starvsfólkatryggingin fyri 76/77 kostaði góðar **1.300** kr.

7) Innbúgv: Setursskrivstovan kemur at hava torv á:

I rokninaskinu	1.500
Útgerð til kvoldundirvisingina	4.000
Útgerð til fyrilestrasalin	7.500
Øðrum	2.000
Tilsamans	15.000

I roknskapartalinum er m.a. alt innbúgvið, sum keypt varð til tann partin av starvsstovuhúsunum, sum Fróðskaparsetrið hevur.

8) **Telefon og telex:** Roknskapartalið fevnir um 3 telefonlinjur, harav Føroyamálsdeildin (rakstrarstað 2376) nú stendur fyri tveimum, setursskrivstovan fyri einari; tiskil er upphæddin lækkað.

9) **Bókakeyp og innbinding:** Upphæddin er fyrst og fremst ætlað til gudfrøðiligt handlbókasavn og undirvisingartilfar.

10) **Aðrar útreiðslur:**

	Roknskapur	Játtan	Uppskot
Flutningsendurgjald til herurar utlaneflir, sum fáa starv við setrið	29.0	25.000	25.000
Kanningar av hægri útbúgving	9.4	0	0
Ymist	5.5	5.000	5.000
Tilsamans	43.9	30.000	30.000

11) **Inntøkur:** Tilmeldingargjald í kvøldundirvisingini, í játtan og uppskoti er lað drigið frá í lønunum, sí viðm. 1 e).

12) Konti 1305, 2040 og 2335 stóðu áður á rakstrarstað 2378, sum 1.4.76 varð avlikið. — Viðv. upphæddini í klombrum, 30.000, sí viðm. 1 d).

Fíggjarætlan 1977/78 fyri rakstrarstað 2375:
FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA

Vist verður til uppskotið, ið varð sent landsstýrinum við skrivi biðani dagfest 20. oktober 1976.

Á fundi í avgreiðslunevnd setursins 16.11.1976 varð avrátt við deildirnar, at setursráðið vildi taka broytingaruppskot frá teimum til viðgerðar, treytað av at tey vórðu liðlin innan fyri ta ramman, ið sett varð á ráðsfundi 12.10.1976.

Hjálagd eru endurskoðað uppskot frá deildunum, soleiðis sum setursráðið nú hevur góðkent tey. Í uppskotinum frá Føroyamálsdeildini eru gjordar broytingar í kontoupphæddum og viðmerkingum, ikki í teirri endaupphædd, sum ráðið góðkendi 12.10.1976. Stoðisútbúgvingin hevur eisini gjort broytingar í kontoupphæddum og viðmerkingum, og samlaða upphæddin er 44.400 kr. hægri, enn samtykt varð á fundinum 12.10.1976. Hertil er at siga, at ráðið undir fyrru viðgerðini tók eina upphædd burtur av sáttmálalonum, ið lá góðar 50.000 kr. ovan fyri tað, ið deildin hevði skotið upp. — Fyri setursskrivstovuna og gudfroðilesturin stendur fyrra uppskotið við.

Uppskotið til fggjarætlan 1977/78 fyri Fróðskaparsetur Føroya er nú hetta (saman-talt):

Rk.		Rokn skapur 1975/76 (1.000 kr.)	Játtan 1976/77 (1.000 kr.)	Uppskot 1977/78
2375	Setursskrivstova og gudfroðislestur	344.8	351.0	445.000
2376	Føroyamálsdeild	774.3	855.0	937.500
2377	Stoðisútbúgving	876.4	868.0	897.400
		1.995.5		
2378	Setrið (felags)	186.3		
2375	Tilsamans	2.181.8	2.074.0	2.279.900

Viðv. rakstrarstað 2378 verður vist til viðmerkingar sendir frammanundan.

Uppskot til fíggjarætlan 1977/78 fyri rakstrarstað 2376: FØROYAMÁLSDEILDIN

Konto		Roknskapur 1975/76	Játtan 1976/77	Uppskot II 1977/78	Viðm.:
1012	Løn/lærarar	33.011,34	18.500,00	27.000,00	1)
1014	Løn/starvsfólk	59.000,00	94.000,00	112.000,00	2)
1015	Avloysarar			13.000,00	3)
1016	Løn/sáttmálalønt	456.200,00	600.000,00	628.000,00	4)
1028	Løn/onnur	42.093,22	29.400,00	23.500,00	5)
1050	Samsýningar	4.877,51	11.000,00	6.000,00	6)
1120	Ferða- og dagpeningur	19.828,05	15.000,00	23.000,00	7)
1130	Kilometurgjald			0,00	
1210	Skeið (Ferðastyrk)			7.500,00	8)
2040	Bløð og tíðarrit		1.100,00	1.500,00	9)
2060	Borðfø			0,00	
2140	Umvælingar		1.000,00	0,00	
2180	Leiguútreiðslur	20.000,00	20.000,00	20.000,00	
2305	Innbúgv	15.465,90	22.000,00	12.400,00	10)
2310	Skrivstovuhald	2.026,70	3.000,00	3.500,00	
2315	Prentlutir	822,00	2.000,00	3.000,00	11)
2325	Postgjald	1.983,10	4.000,00	5.500,00	
2335	Telefon og Telex		10.000,00	10.000,00	12)
2356	Aðrar skrivstovuútreiðslur	1.957,60	1.000,00	4.000,00	13)
2507	Rannsóknarútferðir			0,00	
2508	Bókakeyp og innbinding	18.882,00	8.000,00	10.000,00	
2530	Amboð	73.717,25		0,00	14)
2590	Aðrar útreiðslur	25.792,17	15.000,00	27.000,00	15)
	Samantalt	775.656,84	855.000,00	937.500,00	

Okkara upprúvliga uppskot var kr. 1.195.100,58.

Uppskot til fíggjarætlan 1977/78 fyri rk. 2376: Føroyamálsdeildin

Viðmerkingar:

1) 1012 Løn/lærarar: t.e. leysar lærarar, ið neyðugt er at biðja aftrat til undirvísingina á læraraársskeiði og prógvnámi í føroyskum. Tímatalið er mett so: málsøga og ljóðfroði 32 t., náttúra og málvenjingar 40 t., bókmentir 40 t., uppalingarsálarfroði 50 t., ymsar lærugreinir 50 t., tils. 212 t.

2) 1014 Løn/starvsfólk:

1 skrivstovufólk í 9. lønarfl. (01.4.76, 10. st.),		
løn pr. 1.10.76 70.218, við viðb. og frítíðargj.	mett til	74.000
½ skrivstovufólk í 9. lønarfl. (15.9.76, 12 st.),		
løn pr. 1.10.76 36.736, við viðb. og frítíðargj.	mett til	38.000
Tils.		112.000

3) 1015 Avloysarar; t.e. fyri skrivstovufólk burturstatt í útbúgvingarorindum — ½ skrivstovufólk í 9. fl., 12. st. frá 1.4 til 18.76. mett til 13.000 kr.

4) 1016 Løn/sáttmálaløn: 4 størv eru normerað við deildina:

Deildarstjóri, magistari (pr. 1.7.76 á 11. st.):		
Bruttoløn pr. 1.10.76	122.623,16	
Landskassans eftirlønargj.	12.262,32	
Deildarstjóraviðbót	25.000,00	
Tils.	159.885,48	í 77/78 mett til 164.000
Annanuensis, magistari (pr. 1.1.76 á 14. st.):		
Bruttoløn pr. 1.10.76	137.130,82	
Landskassans eftirlønargj.	13.713,08	
Viðbót í løtnni	16.763,25	
Tils.	167.607,15	í 77/78 mett til 174.000

2 av størvunum (eitt í málfroði og eitt í bókmentafroði) eru í 76/77 fyribils sett. Verða fyri 77/78 mett til 145.000 × 2 ella 290.000

Tils. 628.000

5) 1028 Løn/onnur: útskriving 15.000, tímalønt arb. 4--500 t. 7.500, teknisk hjálp til bandupptøkur v.m. 1.000, tils. 23.500.

6) 1050 Sansýningar: til gestafyrilesarar og prøvdómarar serstakliga.

7) 1120 Ferða- og dagpeningur: gestafyrilesarar og prøvdómarar 5.000, savningarferðir 6.000, aðrar ferðir 12.000, tils. 23.000.

8) 1210 Skeið: ferðastyrkur til næmingar á deildini, ið fara á norðurlendsk summarskeið (5 næm. á 1.500).

9) 2040 Bløð og tíðarrit: vórðu í 75/76 bókað á rk. 2378 (felags fyri setrið).

10) 2305 Innbúgv: 2 skrivimaskinur 8.000, skáp til upptøkutól 3.000, hillar 800, 2 persiennur 600; tils. 12.400.

11) 2315 Prentlutir: oyðubløð til savnskipan, innsavningar o.t., prøvskjøl.

12) 2335 Telefon og telex: varð í 75/76 bókað á rk. 2378 (felags fyri setrið).

13) 2356 Aðrar skrivstovuútreiðslur: orðaseðlar og -kassar o.a.t.

14) 2530 Amboð: t.e. tól til innsavning, undirvísing o.t. Rokuskapartatið fevnir um nútímans upptøkutól, útgerð til lesisal v.m.

15) 2590 Aðrar útreiðslur: til innsavningar 24.000 (5.000 til savnarar, 11.000 til bond, filmir o.t., 2.000 til myndir til staðanavnaavmerking); til ymist 3.600, tils. 27.600.

Uppskot til fíggjarlóg 1977/78 — rakstrarstað 2377 — STØÐISÚTBÚGVINGIN

Uppskotið er sum heild gjort undir H fyritreyt, at nýggir ummingar verða tiknir upp í sept. 1977. Henda fyritreyt hevur í serligan mun gjort seg galdandi í samb. við konto 1012 og 1016. Við teimum trongu holisumstoðunum Stoðisútbúgvingin hevur, er neyðugt, at onnur og storri høli verða fingin til vega. Vit minna á umsókn okkara, um at kunna nýta partar av gamla Apotekinum.

Konto		1000 kr. Nýtsla 1975/76	1000 kr. Játtan 1976/77	1000 kr. uppskot 1977/78	Viðm. sí í neðra
1012	Løn/lærarar (ráðg.)	61.5	40.0	30.0	+
1014	Løn/starvsfólk	58.8	62.0	60.0	+
1016	Løn/sáttmálalønt	477.3	492.0	640.0	+
1028	Løn/onnur	2.5	5.0	7.0	
1050	Sansýningar	0.0	8.0	8.0	
1120	Ferða- og dagp.	15.5	15.0	15.0	
2140	Umvælingar v.m.	5.7	5.0	5.0	+
2190	Ymiskar húsaútr.	0.1	1.0	1.0	
2305	Skrivstovuimbúgv	11.4	10.0	10.0	+
2310	Skrivstovuhald	4.1	6.0	6.0	
2315	Prentlutir	0.2	1.0	1.0	
2325	Postgjald	1.2	3.0	2.0	
2335	Telefon og telex	11.8	12.0	12.0	
2508	Bókakeyp og inubinding	15.2	20.0	30.0	+
2530	Amboð (tól)	167.6	135.0	150.0	+
2531	Umsitingarútr. (rakstur)	16.9	50.0	50.0	
2590	Aðrar útreiðstur	1.7	3.0	3.0	
	Tilsamans kr.	851.8	868.0	1030.0	

1022	Løn/reingerð	15.7 frá 76/77 av RK. 2379
2110	El, hiti og vask	8.9 frá 76/77 av RK. 2379
		+ 24.6

Viðmerkingar:

1012 Tørvurin á ráðgevum er mettur út frá hvorjir sáttmálamettir lærarar eru samb. kt. 1016.

1014 I skrivstovufólk lønt eftir 9. fl./4. stlg í starvsmannafelagssáttmálanum.

1016 I løtuni starvust 3 deildarleiðarar á Støðisútb., 1 í lívfrøði, 1 í alisfrøði og 1 í støddfrøði. Harumfram er normerað 1 deildarleiðarastarv í heimspeki, ið ikki hevur verið sett síðan 1/8-75.

Bruttoløn (8. stig)	108.8	
Lands. eftirl. gj.	10.8	
Viðbót	25.0	
	143.8 × 3 =	431.4

Støðisútb. skjýtur upp, at settur verður 1 deildarleiðari í evnafrøði, og at núgaldandi sáttmáli við kærara í pædagogikk/psykologi frá 1/8-76 til 31/7-77 við $^{4}/_{5}$ arbeiðstíð verður endurnýggjaður, soleiðis at hann verður galdandi frá 1/8-77 til 31/7-78 við fullari arbeiðstíð.

Deildarleiðari í evnafrøði settur frá 1/8-77.

Bruttoløn (6. stig)	100.0	
Lands. eftirl. gj.	10.0	
Viðbót	25.0	
	135.0 × $^{2}/_{3}$ =	90.0

Lon til kærara í pæd./psyk. 4×6,3+8 × 10.5 = 109.2.

2140 Setta upphæddin er mett eftir avmarkaðum tarvi. Verður farið í nýggj høli, har neyðugt er við nomandi umvælingum, kann ikki væntast at upphæddin fer at røkka.

2305 —

2306 Á hesi konto er eisini ætlanin at keypa ymiskt audio-visuelt tilfar (t.d. video-bond).

2530 Nærri greitt frá á hjálagda lista.

Ad § 15-2370 Stovnar á Debesartrøð.

Uppskot

til

fíggjarætlan 1977/78 fyri rakstrarstað 2384: Stovnar á Debesartrøð (felagsútreiðslur)

		Játtan 1976/77 Rk. 2379	Uppskot 1977/78 Rk. 2384	Viðm.
1014	Løn/starvsfólk	62.000	70.000	2)
1015	Løn/avloysarar	5.000	5.500	3)
1022	Løn/reingerð	100.000	100.000	4)
1028	Løn/onnur	37.200	40.000	5)
2110	El, hiti og vask	78.000	100.500	6)
2140	Umvælingar	10.000	10.000	7)
2170	Ognartrygging	10.800	12.000	8)
2190	Ymiskar húsaútreiðslur	9.000	10.000	9)
2310	Skrivstovuhald	15.000	25.000	10)
2340	Leiga av maskinum	5.000	5.000	11)
2535	Umsiting av Debesartrøð	7.000	7.000	12)
2590	Aðrar útreiðslur	5.000	5.000	13)
	Tilsamans	344.000	390.000	

Rokniskapartølini eru at finna á hesum rakstrarstøðum:

2310 Landsbókasavnið
2330 Landsskjalasavnið
2340 Fornminnissavnið
2355 Fiskirannsóknarstovan
2370 Náttúrugripasavnið
2375 Fróðskaparsetrið við deildum
2380 Heilsufrøðiliga Starvsstovan

Ein tolilig neyv útrokning av útreiðslunum til tey endamál, felagsraksturin sbr. uppskotinum fevnir um, vísir eina samlaða upphædd upp á knappar 295.000 kr.

Uppskot
til
fíggjarætlan 1977/78 fyri rakstrarstað 2384: Stovnar á Debesartrøð (felagsútreiðslur)

Viðmerkingar.

1) Hóast talini á rakstrarstað 2379 í fíggjarlógini 1976/77 vórðu lagd saman við rakstrarstað, eru tey eftir avtalu stovnanna millum og við gjaldstovnna varðveidd sum eitt frábýlt rakstrarstað. Viðv. talinum 2384, sí fylgiskrivið.

2) **Løn/starvsfólk:** Húsavørður, sum arbeiðir á øllum stovnum uttan Landsbókasavnínum; verður lontur eftir 9. lønarfl. í Starvsmannasáttmálanum; 1.9.76 á 7. stigi = 65.340 kr., við viðbótum og fritiðargjaldi mettur til 70.000 kr. komandi fíggjarár.

3) **Løn/avloysarar:** Til avloysara, tá ið húsavørðurin hevur frí, uml. ein mánaðarløn.

4) **Løn/reingerð:** Samskipan er fyri 5 vaskikonur til 3 hús við 4 stovnum: Landsskjalasavnið, Fiskirannsóknarstovan, Fróðskaparsetrið (í 3 stoðum) og Heilsufrøðiligu Starvsstovan. Føstu lønirnar mettar til 85.000 kr., Innvuðsreingerð til 500 tímar á 30 kr. = 15.000 kr.

5) **Løn/onnur:** a) Umsjónarmaður, sum rokir alla trøðna fyri uml. 3.000 kr. um mánaðin; ársløn 1977/78 mett til 38.800 kr. b) Maður, sum hevur ábyrgd av flaggstong og flagging á trøðni; føst samsýning 1.200 kr. árliga.

6) **El:** Málari í starvsstovuhúsunum, sum tekur alla nýtslu á trøðni uttan Postmeistaraluísini (skrivstovu- og arbeiðsholi Fornminnissavnsins), J. C. Svabosgotu 7 (Stoðisútlógving, sum tó verður roknað upp í felagsnýtsluna) og Vísindadeildi Landsbókasavnsins. **Mett**

Nýtslan roknað eftir tolum juli 75 til juni 76:

Um 150 KW á 27 kr.	4.050	
Um 100.000 KWT -- 26 oyru	26.000	
J. C. Svabosg. 7: 12 × 190 kr.	2.280	
	32.330	35.000

Hitl: Starvsstovuhúsini (3 stovnar), setuleshúsini (1 stova, 1 deild, búrum), J. C. Svabosg. 7 (1 deild).

Nýtslan roknað eftir tolum juli 75 til juni 76:

36.000 l á 90 oyru (uml.)	32.400	
24.000 l á 90 oyru (uml.)	21.600	
9.000 l á 90 oyru (uml.)	8.100	
	62.100	63.000

Vask: Sankeyp av ti, omanfyri nevndu 5 vuskikonur nýta; sama upphædd sum í ár 10.000

El, hiti og vask, tilsamans mett til 108.000
+ leiguinntøkur fyri búrúmini á Fróðskaparsetrinum, mettar til uml. 40 mánaðar á 190 kr. 7.500

Konto 2110 tilsamans 100.500

7) **Umvælingar:** Ymist, sum húsavorðurin skipar fyri undir einum - - og viðlikahald av anhoðum hansara.

8) **Ognartrygging:** Starvsstovuhúsini, ið hýsa 3 stovnum. Brunatryggingin mælir til hækking í tryggingarupphæddini frá 4,5 til 5 milj. kr.

9) **Ymiskar húsaútreiðslur:**

Kloakkreinsan og -viðlikahald (ott troðin)	2.500
Karoinreinsan (starvsstovuhúsini, setushúsini, J. C. Svabosgøta 7)	1.500
Oljufýrsservice (somu)	600
Viðlikahald av fløggum og flaggstong	1.400
Óvæntaðar húsaútreiðslur	4.000
Tilsamans	10.000

10) **Skrivstovuhald:** Nýtsla av Xerox-tóli og tilfar til tað. Hetta er felagstól, sum allir stovnar nýta uttan Landsbókasavnið og Landsskjalasavnið, ið hava sínt egnu tól (har hinir hava atgongd, tá ið felagstólið er í ólagi). Nýtslan 7 vetrarmánaðar 1975/76 var meira enn 20.000 kr.

11) **Leiga av maskinum:** Leiga av Xerox-tólinum (felags).

12) **Umsiting av Debesartrøð:** Tilfar sum hegn, steyrar o.a. til at halda trøðna í góðum standi.

13) **Aðrar útreiðslur:** Til at taka. T.d. fyriliggur uppskot um felags blað.

Ad § 15-2380 Heilsufrøðilig Starvsstova.

Sbrt. skriv dagf. 10. oktober 1976 frá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni:

		Roknskapur 1975/76	Játtan 1976/77	Umsókn 1977/78	Uppskot 1977/78
790	Ymiskar inntøkur		— 15.0	— 20.0	÷ 20.0
1004	Løn/Tænastumenn	31.7			
1014	Løn/Starvsfólk	47.1	280.0	345.0	280.0
1015	Løn/Avloysarar		20.0	20.0	20.0
1028	Løn/onnur		5.0	5.0	5.0
1040	Ørtíðarløn		5.0	5.0	5.0
1120	Ferða- og dagpeningur		10.0	10.0	10.0
2310	Skrivstovuhald		5.0	5.0	5.0
2315	Prentlutir		5.0	5.0	5.0
2325	Postgjald		1.0	1.5	2.0
2335	Telefon og telex		10.0	10.0	10.0
2508	Bókakeyp og innbinding		10.0	15.0	15.0
2530	Amboð		0.0	50.0	50.0
2590	Aðrar útreiðslur	457.2	25.0	25.0	25.0
2592	Tænastuakfør, rakstur		20.0	20.0	10.0
2592	Laboratorierekstur		65.0	70.0	50.0
2358	Aðrar skrivstovuútreiðslur		2.0	3.0	3.0
2350	Sakkøn hjálp		0.0	10.0	10.0
		509.0	448.0	579.5	485.0

Kommenturer til budsjettforslaget:

790 Det regnes med en økning i antall betalte oppdrag etter hvert som tiden går. Særlig ser det ut til at det blir økende behov for attestutstedelse, hvilket det hittil er tatt betalt for i en viss utstrekning.

1014 For inneværende finansår (76/77) er det følgende lønnsbevilgninger:

1 laborant ..... ca. 65.000

1 laborant (delt i 2 halvtidsstillinger)	ca.	65.000
1 laborant (foreløpig ubesatt)	ca.	65.000
1 inspektør (foreløpig ubesatt)	ca.	85.000

I tillegg til dette søkes det om bevilgning til en laborantstilling til for finansåret 77/78.

2325 Det søkes om en økning på 500.0 siden portotakstene er gått opp.

2508 Det er søkt om en økning på 5000.0 for å kunne fortsette å komplettere det fagbiblioteket som er under utvikling.

2530 På et eller annet tidspunkt vil det bli nødvendig med en betydelig anskaffelse av utstyr til forsøksvirksomhet i forbindelse med fremstilling av nye fiskeprodukter for eksport, og undersøkelser omkring utnyttelsen av «nye» fiskearter. Mye av dette utstyret er kostbart, og vil ikke kunne anskaffes for den summen det her er søkt om. En vil bare ha innført kontoen i kontoplanen for å ha gjort oppmerksom på dette. Ved betydelig instrument og utstyrsanskaffelse antar en at det må tas opp direkte med de bevilgende myndigheder da planene er mer konkrete om de er i øyeblikket.

2593 Ingen kommentar.

2350 Ingen kommentar.

2350 Ingen kommentar.

Ad § 15-3201 Barnablað.

Sbrt. skriv dagf. 9. okt. 1976 frá «Barnatíðindi».

Eg sendi her umbidna roknskap fyri «Barnatíðindi» 1975.

Um studningur er veittur blaðnum fyri 1975/76, verður biðið um at gera so vel at ávisa hann.

Ad § 15-2390/3201 Barnablað.

Sbrt. skriv dagf. 23. sept. 1976 frá Bókadeild Føroya Lærarafelags:

Vísandi til brev landsstýrisins dagsett 10. í h. — j. nr. 400.23[50] - - loyvi eg mær vegna Barnablaðið at søkja um kr. 12.000 í studningi komandi ár. Í fjor søktu vit um 8.000 kr.

Ásannandi tað stóra trotið á ungdómslesnaði hava vit gjort av frá og við hesum skúlaári at gera blaðið til eitt barna- og ungdómsblað og ti vaksa tað við 8 síðum. Hetta er orsøkin til, at vit hava biðið um størri studning.

Nevndin vónar, at tað fer at bera til at ganga umsóknini á møti.

Ad § 15-2390/3205 Mentunnargrunnurin.

Sbrt. skriv dagf. 23. sept. 1976 frá Bókadeild Føroya Lærarafelags:

Vísandi til skriv landsstýrisins dagsett 10. í h. — j. nr. 400-23[50] . . loyvi eg mær vegna bókadeild okkara at søkja um hendu studning í komandi fíggjarári (rakstrarstað nr. 2390 kt. nr. 3201: skúlabókaútgáva):

til barnabókaútgáva kr. 100.000, ið er tað sama sum seinast. Harumframt fari eg at søkja um kr. 15.000 til at geva **út ljósmyndarøð** eftir kendar høvundar og teknarar: hetta er tilfar hóskandi tit barnagarðar og teir fyrstu 3 skúlaflokkarnar: eisini søki eg um 40.000 kr. at gera eina **myndasogu** týdda úr svenskum fyri. Hon skal ætlandi koma út við einum hefti um mánaðin, og krevst tí, at nógv hefti verða prentað niðurfyri. At enda fari eg at søkja um kr. 50.000 at geva **ungdómsbøkur** út fyri, tí á hesum øki eru vit stutt at siga púra hvassir. Nýggjastu kanningar, sum lærararskúlanæmingar undir leiðslu av Iyðuni Joensen, cand. psyk. hava gjort, vísa skilliga stóran vøkstur av litblaðslesnaði millum ungdómin — tey hava einki tilfar á móðurmálinum at triva í og fara tí henda vegin.

Tað er nevndarinnar vón, at tað ber til at ganga umsóknini á møti.

Viðmerking frá landsstýrinum:

Rokuskapurin er til skjals á landsskrivstovuni.

Ad § 15-3209 Doyvan av radioóljóði:

Sbrt. skriv dagf. 6. okt. 1976 frá Telefonverki Føroya Løgtings:

Vísandi til skriv landsstýrisins j. nr. 400-2355, dagsett 10.9.76 skulu vit mæla til, at á fíggjarlogtingslóg 77/78 á konto nr. 3209: Doyvan av radioóljóði, verða settar kr. 120.000,-. Hetta er sama uppbædd, sum biðið varð um til núgaldandi fíggjarløglingslóg.

Ad § 15-3211 Skútabókaútgáva.

Sbrt. skriv dagf. 4. sept. 1976 frá Føroya Skúlabókagrunni:

Fyri Føroya Skúlabókagrunn skal eg, eftir at nevndin hevur kannað um tær útreiðslur, ið ætlandi koma at vera fíggjarárið 1977/78, heita á landsstýrið um at seta á fíggjarløglingslógina sum studningsveitan **kr. 477.000,00.**

Hjálagt verður sent landsstýrinum til upplýsingar:

1. Yvirlit yvir ventandi útreiðslur hjá Føroya Skúlabókagrunni 1977/78.
2. Rokuskapurin fyri 1975/76.

3. Yvirlit yvir bøkur hjá Føroya Skúlabókagrunni á goymslu í BMS 1. apríl 1976.
4. Yvirlit yvir útkonnar bøkur 1975/76.
5. Yvirlit yvir bøkur, ið væntandi verða lidnar í skúlaárinum 1976/77 og 1977/78.

Viðmerking frá landsstýrinum:

Tey undir 1-5 nevnlu skjøl eru til skjals á landsskrivstovuni.

Ad § 16-2401 Vrakarastovnurin.

Sbrt. skriv dagf. 27. oktober 1976 frá Fiskivinnustovuni:

Vísandi til skriv frá landsstýrinum dagfest 10/9-1976 (F.L. j. nr. 400-23[58]) verður framsett niðanfyri standandi uppskot til figgjarløgtingslóg fyri 1977/78 fyri **vrakarastovnin.**

Rokskapartølini fyri 1975/76 og játtanin fyri 1976/77 eru uppsett til samanetingar:

Rakstrarstað 2401	Rokskapur	Játtan	Uppskot
Konto	1975/76	1976/77	1977/78
1004 tænastumenn	643,4	689,5	735,0
1120 ferða- og dagp.	100,7	55,0	70,0
1015 avtoysarar	?	?	60,0
2120 leiguútreiðslur	?	10,5	12,0
2325 postgjald	0,2	2,0	2,0
2335 telefon og telex	6,1	18,0	20,0
2356 aðrar útreiðslur	8,5	20,0	0
	758,9	795,0	899,0

Útgreiningin er gjørd eftir ynski frá gjaldstovuni.

Samlaðu útreiðslurnar fyri 1. hálvár av 1976/77 eru kr. 390.000,- t.v.s. at samlaðu útreiðslurnar fyri árið 1976/77 koma uppá uml. kr. 780.000,-, og hesum árinum hevur eingin yvirvrakari verið, so fyri 1977/78 má roknast við løn hansara, og oktari útreiðslu til ferðing v.m.

Ad § 16-2410 Nautiskt royndarkamar.

Sbrt. skriv dagf. 22. sept. 1976 frá Nautiskum rondarkamar:

Vísandi til tygara skriv j. nr. 400-23-59. viðv. uppskot til figgjarlogtingslóg 1977/78 konto 16-2, rakstrarstað nr. 2410, skal hervið sigast frá, at útr. Nautisk Royndarkamars nakað sum seinasta ár kunnu setast til:

	Samsýning	6.600 kr.
	Rakstrarútreiðstur	4.400 —
*)	Umvæling av kumpashúsi	8.000 —
	Herfrá gongur væntað prógvgjald	1.000 —
	falt	18.000 kr.

*) Kumpashúsið er enn ikki líðugtgjørt, men tær 6.000 kr. á figgjarættanini í ár sláa ikki til. Tí nú havi eg líka fingið tilboð um, at umvæling av taki, takrennum, útbúrð, vindleygum og aluminiumskæðing og máling kann gerast fyri 16.000 kr. Eg uttaði so at býta arbeiði sundur til hettar figgjarár og næsta, men akkurát hálverast kann tað ikki, men arbeiðstakarin gongur inn fyri at goldið verður 8.000 kr. í ár og 8.000 kr. aftaná 1. april n.á., táið alt er fullført. Tí er biðið um at seta av 8.000 kr.

Ad § 16-2420 Sjómansheim.

Sbrt. skriv dagf. 6. oktober 1976 frá Hini føroyska sjómansmissiónini:

Vit takka mikið fyri studningarnar vit fingu á figgjarlogtingslógini 1970/77 til sjómansheimið í Foroyingahavn, og til arb. í Reykjavík og Onglandi/Lerwick. Konto nr. 2420.

Til komandi figgjarlogtingslóg 1977/78 § 16-2420, loyva vit okkum at biðja um hesar studningar. (F.L. j. nr. 400-23[59]).

1. Til rakstur og umvælingar av sjómansheiminum «Lívd» í For-

oyingahavn ..... kr. 80.000,--
2. Til rakstur av sjómb. í Reykjavík og Lerwick ..... kr. 10.500,-

ad. 1. Roknskapur fyri 1975 er innsendur 27/4-76. Tað bleiv eitt halt uppá kr. 81.042,69.

Í mong ár hevur tað liglð figgjarliga tungt fyri sjómansheimið í Foroyingahavnini, og tað hevur tí ikki verið gjørligt at fáa endarnar at rokka saman uttan tann stuðul, vit hava fingið frá lagtinginum. Tá vit samstundis ikki vistu, hvørn veg tað fór at ganga við fiskiskapinum í Grønlandi, hevur sjómansheimið ikki fingið tað viðlíkahald sum neyðugt var. Men nú, tá nýtt liv tók seg upp í ár, gjørdi stýrið av aftaná ymsar ábeitanir at gera heimið hugnaligari bæði fyri sjómonnum og øllum teimum mongu, sum nú starvast har.

Heimið hevur nú fingið eina høvuðsumvæling bæði innan og uttan og nýtt innbúgv í uppihaldsrúmunum. Alt hetta stórarbeiðið kom at kosta kr. 230.000,-.

Hetta er orsøkin til at vit biðja um heilar 80.000,- kr. í studningi bæði til rakstur og umvæling av heiminum.

ad. 2. Roknskapur fyri 1975 er innsendur 27/4-76. Vit hava 3 fólk á sjómansh. í Reykjavík, og 2 fólk í Lerwick seinasta vetur.

Viðvíkjandi byggjan av sjómansh. í Reykjavík, minna vit á sjátvstøðuga umsókn frá byggineyndini í Reykjavík.

Sbrt. skriv dagf. 5. oklober 1976 frá Kirkjuliga Missiónsfelagnum:

Vit takka fyri brev dagfest 10. september í ár viðvíkjandi rakstrarstaði grein 16-2420 í figgjarlogtingstógini 1977/78. Um henda studning er at siga, at vit seinastu 3-4 árini ikki hava sent nakra umsókn, men hava kortini fingið peningin játtaðan, og hava roynt at nýta hann til gagn fyri sjómenn okkara á besta hátt.

Síðani sjómansstovurnar í Ravns Stóroy í Grønlandi og í Vestmannaoyggjunum vórðu niðurlagdar av orsøkum, sum eru øllum kunnugar, hava vit, sláðin fyri at flyta til onnur stoð, lagt dent á at gagna sjómonnum okkara við at leggja bókapakkar við góðum kristiligum bókum umborð í skipini. Hesar bøkur verða allar keyptar fyri pening, sum sjómansmissiónin fer, og givnar skipunum til ognar. Vit føra kartotek yvir bókurnar, og leggja nýggjar umborð á hvørjum ári um tað er gjørligt. Hetta arbeiðið, sum sostatt er rættiliga nýtt, fer nú at vera komið í fasta legu, og hon, sum stendur fyri hesi grein av arbeiðinum, hevur higartil í ár fingið

kr. 10.000 frá felagnum til keyp av slíkum bókum, umfram at vit lata allar okkara egnu føroysku bøkur ókeypis.

Vit sokja heldur ikki hesaferð um nakran studning, men vilja nýta ham á besta hátt, um hann verður okkum latin.

Sbrt. skriv dagf. 25. aug. 1976 frá Jakob Mortensen, Reykjavik:

Byggineyndin fyri føroyska sjómansheimínum í Reykjavík takkar háttvirda Landsstýri Føroya fyri tær 50.000,- krónurnar, sum veittar eru til bygging av sjómansheimínum í Reykjavík, og biður vinsamligast um, at hesin peningurin verður sendur til hr. Ríkard Mortensen, Argir, sum er kassameistari fyri hina føroysku sjómannsmissiónini.

Hin 19.8.1976 hevði undirritaði viðtal her í Reykjavík við hr. Petur Reinert, landsstýrismann, sum ynskti eftir at umsókn okkara frá juli 1975 varð endurtikin og send Føroya Landsstýri saman við fleiri upplýsingum.

Innlagt í hesum brevi senda vit rakstrarrætlan, húsateknings og eina frágreiðing um húsabyggingina (tað, sum hígartil er gjørt og goldið), og eisini hvussu vit hava útvega peningar fyri hesum.

Smá ígrip frá starvi byggingaeyndar.

Byggineyndin fyri føroyska sjómansheimínum í Reykjavík tók til starva hin 10.4.1972.

Tað tók um eitt árs tíð at fáa grundstykki, og tað sakar kanska ikki at taka fram, at borgaryvirvald í Reykjavík hava í allar staðir verið málið okkara valviljað. Eitt gløggt dømi um hesa valvild, er júst tann staður, sum sjómansheimið fær at standa á — beint norðanfyri «Sjómannaskólan», við góðum útsýni móti sjóvarsíðu.

Eisini við vali av arkitektum halda vit okkum hava verið heppnir. Teir eru eftir okkara dømi menn, sum ikki bert arbeiða fyri okkum peningarnar vegna, men eisini við okkum tí hugur fylgir máli.

Viðvíkjandi arkitektum okkara hr. Ormar Þór og hr. Ornólfur Hall, er annars at siga, at teir hava júst fingið 1. heiðurslan í eini arkitektkapping, sum evnt var um í sambend við skipulegging av Seltjarnarnesakeypstað.

Við vón um at háttvirda Landsstýri Føroya fraunvegis fekur vel undir umsókn okkara, takka vit fyrifram, og skriva

Frágreiðing um húsabygging, og hvussu vit hava útvegað henda pening.

Frá Løgtingið Føroya:
for. kr. 70.000,-- ísl. kr. 2.000.000,--

Útvega sjálvir í Føroyum og Íslandi:
basar, happadr. o.l. ísl. kr. 13.360.542,

gr. Grundstykki 2.300 m²		ísl. kr. 3.236.000,-
gr. Innigyrt grundstykki		ísl. kr. 602.000,--
gr. Arkitektur		ísl. kr. 1.967.117,--
gr. Verkfrøðingar		ísl. kr. 2.010.000,--
gr. Útgrevstur, spreinging, kloakk o.a. ravmagn, vatn til húsið og stoypt søklar og bolnplátu		ísl. kr. 7.395.425,--
	ísl. kr. 15.360.542,	ísl. kr. 15.360.542,--

Við øðrum orðum, tað, sum higartil er gjort, er skuldleys ogn. Sostatt hava vit sjálvir útvega kr. 13.360.542,-- í umleið 3½ ár ella umleið ísl. kr. 4.000.000,-- árliga.

Tað er torført at siga við vissu hvussu mikið, vit eru førir fyri at útvega sjálvir, men einar umleið før. kr. 150.000,-- árliga rokna vit so við.

Viðmerking frá landsstýrinum:

Ad § 16-2420: Sjómansheim.

Studningurin verður at býta soleiðis:

Arbeiðið í Reykjavík	10.500 kr.
Bygging av sjómannsheimi í Reykjavík	50.000 —
Kirkjuliga Missiónsfelagið	10.500 —
Sjómannsheim í Føroyingahavnini (til umvæling og rakstur)	80.000 —
	151.000 kr.

Ad § 16-2430 Vaktar- og bjargingarskip.

Sbrl. skriv dagf. 21. okl. 1976 frá Vaktar- og bjargingartænastuni.

V og B Skrivstovan.	Umsókn		Uppskot i 1000 kr.	
Leiðarin	180.000		180.0	
Húgv (telefon + telex o.a.)	40.000		10.0	
Reisur	30.000		10.0	
Hjátpari	85.000		85.0	
Veðurprognosur (Meteorolog + Tórshavn Radio)	55.000		55.0	
½ skrivstovugenta	30.000	420.000	0	340.0
TJARLDIÐ				
Lønir	1.800.000		1.800.0	
Olja	1.200.000		1.200.0	
Proviantur	100.000		100.0	
Dekk Stores	80.000		80.0	
Maskin Stores	50.000		50.0	
Skipasmiðjuútreiðslur	400.000		400.0	
Trygging	275.000		275.0	
Skeið	20.000	3.925.000	20.0	3.925.0
DAGSTJØRNAN				
Lønir	985.000		985.0	
Olja	300.000		300.0	
Proviantur	75.000		75.0	
Stores	40.000		40.0	
Trygging	40.000		40.0	
Skipasmiðjuútreiðslur	140.000		140.0	
Skeið	20.000	1.600.000	20.0	1.600.0
Flogfelag Føroya				
430 tímar á kr. 2.000		860.000		400.0
Bjarningarfeløg		200.000		0.0
÷ inntøkur	falt	7.005.000		6.265.0
				300.0
			kr.	5.965.0

Ad § 16-3301 Fiskivinna, sigling o.t.

Sbrt. skriv dagf. 14. oktober 1976 frá Lønjavningargrunni Skipsfiskimanna:

Sbrt. brev háttvirda landsstýrisins dagf. 10. sept. 1976 seta vit niðanfyri útreiðslurnar 1975/76:

Minstaløn		4.814.325,99
Prísfskoyti, heimatandað	2.590.287,50	
— útlandið	346.221,45	2.936.508,95
Útróðrastudningur		5.620.472,53
Landingarstudningur til mynstraði skip		4.704.211,25
Eigarastudningur		1.220.652,72
Studningur til Grønlandsútróður		66.931,80
Flakastudningur		254.612,25
Matsildastudningur		2.204.023,60
Idnaðarstudningur		8.012.949,06
Jákupsskeljastudningur		123.833,20
Oljustudningur		4.499.818,63
Frítíðarløn		555.550,50
Fyriseti		761.033,95
Renteútreiðslur		424.777,08
Avskriving innbúgv		3.993,00
		36.233.694,51

Útgoldið frá 1/4 — 31/8-76:

Minstaløn	1.023.011,15
Minstivinningur útróðramanna	31.744,00
Prísfskoyti saltfisk	1.056.766,65
Flakastudningur	67.080,30
Útróðrastudningur	1.753.474,37
Landingarstudningur til mynstraði skip	1.872.566,65
Frítíðarløn	744.136,48
Brennoljustudningur	3.292.255,99
Idnaðastudningur	3.422.853,30
Jákupsketstudnigur	9.240,50
Matsildastudningur	695.880,00
Studningur til Báfiskagrunnin	2.000.000,00
Kostnaður	352.889,48
Renteútreiðslur	55.238,23
	16.377.137,40

Ad § 16-3302: Studningur til grunnin til endurnýgging av fiskiskipaflotanum.

Sbrt. uppgerð:

Byggiætlan 1977/78	Byggipeningur:	Studningur
Føroyar	33.500.000,—	15.000.000,—*)
Noreg	22.900.000,—	4.580.000,—
Ongland	4.650.000,—	930.000,—
Danmark	2.800.000,—	560.000,—
Tekn. innleggingar		4.000.000,—
Bátar		230.000,—
	63.850.000,—	25.300.000,—

*) herí roknað 14,25 % skipasmiðjustudning kr. 2.850.000,— fyri skip til danskan byggiharra.

Viðmerking frá landsstýrinum:

Grunnurin hevur í dag eitt hall uppá 18,1 mill. kr., og tá reststudningur í hesum figgjarári eru útgoldnir, verður hallið mett til 36,7 mill. kr.

Ad § 16-3305 Laksa- og sílaaling.

Sbrt. skriv frá P/f Fiskaaling dagf. 14. oktober 1976:

Konto	Rokskapur 1975/76	Játtan 1976/77	Uppskot 1977/78
2590 Aðrar útreiðslur	250.0	150.0	200.0

Viðmerkingar:

Ætlunin er at keypa rogn av stórlaksi úr Íslandi í vetur og klekja tey norðuri við Ár. Laksurin, ið vit higartil hava gjørt royndir við, er føroyskur laksur — eitt lítið laksaslag, ið komið er úr Íslandi. Tað loysir seg nógv betur at ala stóran laks. Men hann má fórðast í 3 ár, áðrenn hann er nóg stórur at taka, og kostar tað tí vel av peningi.

Higartil hevur tað ikki verið moguligt at fáa lán við veðhaldi í livandi sílum. Vit hava nú sí gangandi til eitt virði uppá um 1,5 mill. kr., og ger hetta sjálvandi at gjaldføri felagsins er váttaligt.

Ad § 17-2501 Landsdjóralæknaembætið.

Sbrt. skriv dagf. 26. sept. 1976 frá Landsdjóralæknaembætinum:

Konto	R. 1975/76	J. 1976/77	Umsókn 1977/78	Uppskot 1977/78
1004 Løn/tænastumenn	297.7	290.0	315.0	315.0
1015 Løn/avloysara	0	0	20.0	0.0
1120 Ferða- og dagpeningur	14.0	20.0	20.0	20.0
2325 Postgjald	0	1.0	1.0	1.0
2335 Telefon/telex	2,4	5.0	5.0	5.0
2590 Aðrar útreiðslur	1.5	2.0	3.0	3.0
2180 Leigugútreiðslur	3.0	3.0	3.0	3.0
	318.6	321.0	367.0	347.0

Viðmerkingar:

Ad. 1004: Bruttoløn 1/10 - 1976

1 landsdjóralækni	169.318,19
1 deildarleiðari (sáttmála)	137.794,77

Ad. 2590: Lýsingar, skrivstovulutir, viðlíkahald av sóttverjuhúsintun í Hoyvík v.m.

Ad § 17-2505 Seyðaráðgevarin.

Sbrt. skriv frá seyðaráðgevaranum dagf. 15. okt. 1976:

Roknskapur 1975 - 76:

Seyðaráðgevarin (løn)	24.000,00
Kunsttøð (670 sk.) o.a.	5.320,43
Formur til vaskibrunn	7.278,00
Lýsing (vaskibrunnar)	29,09
El. klippimaskina	659,70
Útreiðslur til hegn	8.879,25
6 Gotlandsseyðir (frá Aksel Hansen, Havn)	4.000,00
4 brundseyðir	1.800,00
Rentur og avdrag av láni til 2 seyðahús	12.684,81
Ferðaútreiðslur og tlf. 1975	4.100,00
	70.558,04

Játtan 1976 - 77.

Løn, onnur	10.000,-
Samsýningar	24.000,-
Aðrar útreiðslur	31.000,-
	65.000,-

Uppskot 1977 - 78.

Løn, onnur	15.000,00
Samsýningar	42.000,00
Aliarbeiði og royndir	35.000,00
Avgjald av láni, graving o.a.	30.000,00
	122.000,-

Ad § 17-2510 Matrikulstovan.

Sbrt. skriv dagf. 18. okt. 1976:

	Rokuskapur 1975/76	Játtan 1976/77	Umsókn 1977/78	Uppskot 1977/78
1. Løn ir	1.871.142	1.968.000	2.104.000	2.104.0
2. ferða- og dagpeningur	87.192	100.000	100.000	100.0
3. húsaútreiðslur	129.279	130.000	140.000	140.0
4. bønafólk	43.626	40.000	50.000	50.0
5. amboð (instrum., skrivimask. o.a.)	99.463	60.000	150.000	70.0
6. tænastumkfor	0	70.000	40.000	40.0
7. tilfar til skrivst. og teknist.	57.204)			
tilfar til uppmáting	23.539)	200.000	350.000	200.0
luftfotogr., kortkonstr. o.a.	375.861)			
8. porto, telefon, lýsingar o.a.	30.317	25.000	35.000	35.0
9. aðrar útreiðslur	32.725	100.000	70.000	70.0
10. : inntokur	1.082.904	900.000	900.000	900.0
	1.667.504	1.793.000	2.139.000	1.909.0

Viðmeckingar til uppskotið:

Roknað er við hesi manning:

Tænastumenn

stjóri	33.	lønarrammu
2 landmálarar	31.	—
2 hjálparlandmálarar	20.	—

Sáttmálalønt fólk

3 landmálarar — løntir eftir sáttmála fyri «statsansatte landinspektører».

6 hjálparlandmálarar — løntir eftir sáttmála millum landsstýrið og teknikarafelagið.

1 mænningur — løntur eftir sama sáttmála.

3 teknikarar — løntir eftir sama sáttmála.

1 teknimænningur — løntur eftir sama sáttmála.

1 skrivstovufulltrúi — løn sambært sáttmála millum Landsstýrið og starvsmannafelagið.

4 skrivstovufólk — løn eftir sama sáttmála.

1 skrivstovumænningur — løn eftir sama sáttmála.

1 fotokopiering vun. — løn eftir sama sáttmála.

Lønir sambært lønartalvu pr. 1. juli 1976.

Tænastumenn

stjóri		135.758,—	
landmálari	1	128.720,—	
—	2	128.720,—	
hjálparlandmálari	1	91.216,—	
—	2	91.216,—	575.630,
		—	—

Starvsfólk

landmálari	3	170.463,	(íroknað eftirløn)
—	4	113.333,—	
—	5	117.556,—	
hjálparlandmálari	3	85.551,—	
—	4	85.551,—	
—	5	82.491,—	
—	6	81.693,—	
—	7	75.041,—	
—	8	75.041,	
— mænningur	1	28.235,—	

teknari	1	39.828,—	(fyri ½ dag)	
—	2	77.787, -		
—	3	55.155, -		
— nemingur	1	21.842,—		
skrivstovufullm.	1	89.974,—		
skrivstovufólk	1	79.656,—		
—	2	71.438,		
—	3	35.414,—	(fyri ½ dag)	
—	4	52.261,—		
— nemingur	1	30.106,—		
fotoarbeiði o.a.	1	60.121,—		1.528.537,—
				2.104.167,—

Hvat teinum ymisku útreiðslunum viðvíkur verður viðmerkt:

ad. 1. Her verður vist til uppsetingina frammanfyri.

ad. 2. Í fíggjarárinum 1975/76 var ferða- og dagpeningur kr. 87.000,—. Nýtslan á hesi konto pr. 1. oktober í ár er umleið 56.000, , og út frá hesum verður útreiðslan í uppskotinum nett til kr. 100.000, -.

ad. 3. Bókaðu útreiðslurnar í rokskaparárinum 75/76 vóru kr. 129.200,—. Her er talan um fastar útreiðslur, leigu, hita, el, og reingerð. Árliga leigan er nú umleið kr. 85.000, . Út frá hesum verður útreiðslan í uppskotinum nett til kr. 140.000,—.

ad. 4. Í rokskaparárinum 1975/76 eru nýttar kr. 43.600,—. Til bonafólk eru í fíggjarárinum 76/77 játtaðar kr. 40 tús. Útreiðslan í uppskotinum verður nett til kr. 50.000,—.

ad. 5. Á hesi konto verður bókað instrument til landmálingsarbeiði, skrivi- og roknimaskinur, invenfar o.a., og sonuleiðis umsiting av nevndu lutum.

Matrikulstovan bað um eina játtan stór kr. 80 tús. í fíggjarárinum 1976/77, men varð hetta talið sett niður til 60 tús. kr. Í rokskaparárinum 1975/76 varð nýtt til keyp av amboðum kr. 66 tús. og til umsiting kr. 33 tús. og kom umsitingin av bilunum undir hesar útreiðslur.

Ætlanin er móti vári at gera ymiskar broytingar innanhýsis, við tað, at ljóðviðurskiftini eru sera vánalig.

Hvat instrumentkeypi viðvíkur, kann verða vist á, at vit hava havt so stóra nyttu av einum borðkalkulatori, sum stendur á stoðisútbúgvingini, at tað verður hildið neyðugt, at Matrikulstovan sjálv keypir eina tilíkan.

Hesin borðkalkulator kann programmerast og seinni útbyggjast soleiðis, at

mogudeiki verður fyri, yvir ein terminal, at koma inn á t.d. datafólini hjá telefonverkinum við øllum upplýsingum sum matrikulin gevur.

Roknað verður við, at ein tilík útgerð fultúlbygd kostar einar 150-200 túsund kr., men tað sum ætlanin er í fyrsta umfari at keypa er ein Hewlett Packard kalkulator — moguliga við plottara ið kann úttekna og berokna allar vanligar landmálarauppgávur. Til hesa útgerð rokna vit við í komandi fíggjarári at nýta kr. 80 túsund og verður samlaða útreiðslan á hesi konto mett til kr. 150 túsund.

ad. 6. Matrikulstovan hevur nú tríggjar bilar, og verður roknað við kr. 40 túsund til rakstur.

ad. 7. Á hesi konto verður bókað tilfar til skrivstovu og teknistovu, tilfar til uppmáling, t.d. marknamerki, pelar, rør og landmálarastavir. Sonuleiðis luftfotografering og myndir, og endaliga konstruktión av kortum, ið er stórsta útreiðslan á hesi konto.

Í roknskaparárinum 1975/76 vóru nýttar 456.000,— og í hesum árinum 76/77 pr. 1. okt 175. túsund kr., og tá 20 bygdir liggja fyri at verða kortlagdar, verður útreiðslan í komandi fíggjarári mett til 350 túsund kr.

ad. 9. Her verða bókaðar yvirútskiftingarútreiðslur o.a.

Í fíggjarárinum 1976/77 eru játtaðar ca. 100 túsund kr. á hesi konto, av hesum umleið kr. 70 túsund til flyting av húsum o.a. í sambandi við útskifting.

Mett verður, at hendu úlreiðsla fer at verða nakað minni í komandi ári, og verða samlaðu útreiðslurnar í uppskotinum settar til kr. 70 túsund.

Ad § 17-2520 Royndarstøðin í Hoyvík.

Sbrt. skriv dagf. 7. okt. 1976 frá Royndarstøðini:

	Rokoskapur	Játtan	Umsókn	Uppskot
Eiti á útreiðsluni:	1975/76	1976/77	1977/78	1977/78
1004 Løn/tænastumenn	87.273	85.000	100.000	100.0
1014 Løn/starvsfólk	290.253	340.000	340.000	340.0
1028 Løn/onnur	36.811	10.000	25.000	25.0
2140 Byggningar	16.880	30.000	40.000	40.0
2235 Leysafe (brúkstilfar)	7.839 +			
		20.000	20.000	20.0
N.kr.	82			
2525 Tøð, fóður, innistøða v.m.	27.499	40.000	40.000	40.0
2310 Skrivstovunátr. v.m.	25.352 +			
		17.000	25.000	25.0
N.kr.	543			
1120 Ferðaútreiðslur og studn. til ísáðarar	25.153	26.000	30.000	30.0
2060 Borðfæ	2.000	2.000	2.000	2.0
3401 Sáð, N₂ o.a. til ísáðingarstøðina	43.490 +			
		80.000	80.000	100.0
N.kr.	20.000			
2201 Keyp av nýggjum amboðum og maskin.	26.544	20.000	60.000	60.0
2592 Koyring (áður 2240)	47.895	17.000	22.000	22.0
2170 Trygging	8.068	11.000	12.000	12.0
2527 Vakstrarhúsið	37.856 +			
		40.000	45.000	45.0
N.kr.	9.260			
2590 Aðrar útreiðslur (eisini tænastuferðir og skeið fyri ísáð.)	23.077 +			
		22.000	28.000	28.0
N.kr.	57			
F.kr.	705.990	760.000	869.000	889.0
N.kr.	29.942			
790 Inntøka	163.230	110.000	90.000	90.0
Studningur			779.000	799.0

Viðmerkingar:

1004: 21. lønarrammu til royndarstjóra og landbúnaðarráðgevara.

1014: 9. lønarflokk til 2 starvsfólk.

7. lonarflokk til 4 starvsfólk.

1028: Lán til hjálparfólk um summarið.

2140: Byggiog og umvæling av fjósi, leðu, 3 úthúsum, set- og dívhúst.

2235: Brúkstilfar til allar deildirnar.

2525: M.a. eisini keyp av kávum, brundum o.ø.

2310: Skrivstovuamboð, porto, telefon, nýggjar bøkur, tíðarrit og innbinding av hesum og aðrir prentlutir.

1120: Ferðaútreiðslur innanoyggja og kilometurgjald til ísáðarur.

2060: - "

3401: M.a. neyfasáð (55.000) og kovievni (20.000).

2201: Orsøkin til hesa konto-øking er, at ætlanin er at keypa eitt tól at taka feitt-prøvar av mjólk, ið vil rasjonaliserað hetta arbeiði samstundis sum hetta verður gjørt meiri gjolla.

2592: Roknskapurin 75/76 er stórur, men er orsøkin at nýggjur bílur varð keyptur (31.000).

2170: Flutningstrygging av fangum, kovievni og sáð millum lond, bil-, maskin-, húsa- og fólkatrygging.

2527: Rakstrar- og viðlíkahaldsútreiðslur.

2590: M.a. til skeið uttanlendis til upplæring av ísáðarum.

Sbrt. skriv dagf. 25. okt. 1976 frá Royndarstøðini:

Í samband við uppskot til fíggjarætlan fyri 1977/78 varð undir konto 3401 Sáð, Nø o.a. til ísáðingarstøðina søkt um kr. 80.000 (krónur áttatítúsund).

Okkum er nú upplýst sambæt viðlagda skjal, at prísurin á tarvasáð er lækkaður úr kr. 25 til kr. 40 pr. portión, og verður tí biðið um, at henda konto verður lækkað úr kr. 80.000 til kr. 100.000 (krónur eittlundraðtúsund).

Sbrt. skriv dagf. 5. nov. 1976 frá Royndarstøðini:

Í samband við uppskot til fíggjarætlan 1977/78 varð undir konto 2201 (keyp av nýggjum amboðum) roknað við keyp av einum tóli til at taka feitt-prøvar av mjólk.

Við hesum tóli kunnu vit lettliga átaka okkum eisini at taka feitt-prøvar av mjólk frá meiarínum.

Hetta arbeiðið vil geva støðini eina inntøku, soleiðis at henda kann gjalda tólið aftur uppá eini 4 ár.

Hetta landsstýrinum til upplýsingar.

Ad § 17-3405 Studningur til mjólkaframleiðslu.

Sbrt. skriv dagf. 11. nov. 1976 frá Jarðarráðnum:

	1975/76 rokn.skap	1976/77 játtan	1977/78 fíggjætlan
mjólkarstudningin	1.124.042,06	975.000,—	1.200.000,—
studn. til súrh.brunn.	263.642,71	250.000,	275.000,—
veltistudningin	197.805,65	215.000,—	300.000,—
studn. til bún.skeið	49.459,50	0,—	0,—
studn. til húsdýralóg.	74.002,90	75.000,—	100.000,—
rentustudningur	66.867,31	200.000,—	250.000,—
studn. til jarðargr.	200.000,00	400.000,—	400.000,—
meirinýtsla í 1975/76		383.210,23	
	1.975.820,13	2.498.210,23	

Viðm. til mjólkarstudningin:

Brúktar vórðu í 1975/76 kr. 1.124.042,06, og varð studningurin goldin út soleiðis:

privatsøla	kr.	59.169,64
mjólkarsøla	—	277.560,91
flutningur	—	321.536,96
kjøtstudn.	—	306.772,80
róni	—	448,00
javningarstudn.	—	86.010,67

Tá ið reglugerð um kjøtstudning aftur er lýst í inniverandi fíggjarári, og roknast má við, at skipanin eisini kemur at galda í 1977/78, er upphædd tikin fyri hesum. Viðmerkt skal verða, at roknast má við eini eykajáttan fyri kjøtstudning í 1976/77 uppá kr. 275.000,00, eins og sagt varð frá í viðmerkingunum fyri fíggjarætlanina fyri sama ár. Annars verður vist til roknskapin, ið her er viðlagdur.

Viðm. til studningin til súrhoysbrunnar:

Brúktar vóru í 1975/76 kr. 263.642,71, og má roknast við, at umleið sama tal verður brúkt í 1977/78 tá nógv nýggj og stór fjós eru í umbúnað at byggja, eitt nú í Oyndarfirði, á Velbastað og aðrastaðni. Annars verður vist til viðlagda roknskap.

Viðm. til veltistudningin:

Brúktar vórðu í 1975/76 kr. 197.805,05, og má roknast við, at heilt tal má okjast munandi í fíggjarárinum 1977/78 við tað at stórar uppdyrkingar eru at fara fram,

og at lann játtanin, sum er givin í 1976/77 uppá kr. 215.000,00, er um kr. 80.000,00 ov lítið ætlað.

Uppdyrking fer fram um allar Føroyar, men í stórum fer uppdyrking serliga fram í Oyndarfirði, Gotu og Leirvík, og er ætlað at fara fram í Saksunardali.

Viðm. til studningin til húsdýrafólgina:

Brúktar vórðu í 1975/76 kr. 74.002,90, og má ætlast, at hetta tal er ov lítið í 1977/78, við tað at roknast má við, at upphæddirnar til samsýningarnar nugu verða hækkaðar og reglugerð gjørd fyri hetta.

Viðm. til rentustudningin:

Lánið, stórt kr. 2.000.000,00, sagt varð frá í viðmerkingunum til fíggjarlógina 1976/77, er nú upptikið. Frammanundan hesum er lántøka, stór kr. 1.260.000,00. Hesar báðar upphæddir mugu avsetast í rentustudningi í 1977/78 kr. 250.000,00. Viðmerkt skal verða, at í hesum tali er ikki tikin upphæld fyri rentustudningi til lán, kr. 500.000,00, til Pf. Sandoyar Mjølka- og Slátursvirki. Annars skal verða upplýst, at royndt verður at fáa Pf. Sandoyar Mjølka- og Slátursvirki og Sandoyar Búnaðarsamtøku at samskipa seg, og um hetta eydnast, sum tað í løtuni sær út til, so kann verða komið aftur til møguliga meirjáttan.

Viðm. til studningin til jarðargrunnin:

Fyritreytin fyri, at áðurnevnda lán varð upptikið, var játtanin frá tinginum uppá kr. 400.000,00 um árið frá fíggjarárinum 1976/77, viðtað, at lánini, upptikin eru til útlán, eru stuttfreistaði, og annars vildu gjørt grunninum ógjørligt at lænt til onnur endamál.

Í 1975/76 vórðu útlagdar kr. 383.210,23 fyri landskassan, og kom hetta fram soleiðis:

veltistudn.	kr.	143.049,98
húsdýrafólgin	+	4.759,68
súrhoysbrunnar		111.483,87
mjólkarstudn.		133.436,06
lalt	kr.	383.210,23

Av hesum tali vóru kr. 110.963,84 frá árinum 1974/75. Hesar kr. 383.210,23 verður

neyðugt at biðja um eykajáttan fyri í inniverandi fíggjarári, og verður tað gjørt við hesum.

Samantikið kann verða sagt, at í Suðuroy verður bygt nýtt meiari, á Sandoynni og í Streymoynni er í umbúna at byggja landbúnaðarhús, og at landbúnaðurin við hesum húsum kemur at koma inn í eina nýggja tíð.

MJÓLKASTUDNINGUR.

	Privatsøla		Mjólkarsøla		Flutningur
	litr.	kr.	litr.	kr.	litr.
Norðoyggjar	53.997	8.039,63	163.646	24.516,90	324.109
Eysturoy	7.632	1.144,80	41.482	6.446,95	34.717
Streymoy	115.719	16.870,51	948.777	143.572,45	720.449
Vágar	118.732	17.791,81	90.477	13.613,86	57.949
Sandoy	79.049	11.857,28	507.680	76.873,00	518.257
Suðuroy	23.104	3.465,61	83.297	12.507,75	95.423
	398.233	59.169,64	1835.359	277.560,91	1750.904

fíggjarárið 1975/76

	Kjøtstuðn.		Rómi		Javnstuðn.		Gall kr.
kr.	kg	kr.	litr.	kr.	litr.	kr.	
46.333,60	7.559	35.134,50	443	443,00	158.939	7.950,46	122.448,00
6.659,10	8.616	43.147,50			38.162	1.867,11	59.265,40
141.648,38	21.560	110.018,60			949.164	48.311,89	460.421,83
8.669,06	13.802	55.481,20			21.458	823,14	96.379,07
103.651,40	8.918	48.916,00			469.199	22.897,59	264.195,27
14.575,42	2.815	14.075,00			83.180	4.160,48	48.784,26
321.536,96	63.270	306.772,80	443	443,00	1720.102	86.010,67	1051.493,98

ROKNSKAPUR

fyri studningar fyri 1975/76.

Studningur til súrhoyggjabrunnar, fíggjarárið 1975/76.

Sýsla	m³	studningur
Norðoyggjar	172	20.349,36
Eysturoy	1076	140.945,91
Streymoy	654	77.179,59
Vágar	40	4.312,00
Sandoy	—	0,00
Suðuroy	122	15.855,85
ialt	2064	258.642,71

Yvirlit yvir veltistudning 1975/76.

	m²			kr.
	N1	N2	B	
Norðoyggjar	2708	12000	5900	8.170,60
Eysturoy	86185	87750	1320	80.899,00
Streymoy	9450	30902	800	19.175,80
Vágar	14779	13000	2838	17.849,50
Sandoy	1420		46890	12.716,50
Suðuroy	21538		35930	24.059,10
	136080	143652	93678	162.870,50

Teknfrágreiðing:

N1: fyrri partur av studningi til nýdyrking

N2: seinni partur av studningi til nýdyrking

B : bøunvæling

Studningur til kostar og landbrunnar 1975/76.

Eysturoy	kr.	18.891,90
Streymoy	kr.	5.575,00
Vágar	kr.	2.093,75
	kr.	26.560,65

Ad § 17-3407 Træplanting.

Sbrt. skriv dagf. 25. okt. 1976 frá Skógfriðingarnevndini:

Skógfútin (løn)	kr.	85.000,00	
Ferðapeningur	—	12.000,00	
Útreiðslur av bilum o.ø. amboðum	—	20.000,00	
Keyp av nýggjum bili	—	30.000,00	
Keyp av plantum	—	56.600,00	
Keyp av tøðum	—	7.000,00	
Keyp av tegni	—	18.800,00	
Árlig røkt av plantaðum oki (stødd c. 83 hektarir), 5800 arbeiðstimar á kr. 26,00	—	150.800,00	380.200,00
Av tí at útreiðslurnar vera nógvar til Alistøðina (plantiskúlan) og Arboretið, vegna grundleggjandi arbeiði, so sum veltan av nýggjum, 1 vakstrarhús og ymiskar royndir, so haldi eg at hesi bæði økini mugu hava eina upphædd fyri seg sjálvan uppá			100.000,00
			480.200,00

Ad § 18-2710 Arbeiðseftirlitið.

Sbrt. skriv dagf. 20. oktober 1976 frá Arbeiðseftirlitinum:

Konto:		Brúkt 1975/76	Játtað 1976/77	Umsókn 1977/78	Uppskot 1977/78
790	Ymiskar inntokur	÷ 16.900	÷ 20.000	÷ 10.000	÷ 10.0
1014	løn/starvsfólk	31.800	190.000	316.000	316.0
1016	løn/sáttmálaløn1	184.500	207.000	207.000	207.0
1050	samsýningar	0	0	3.000	40.0
1120	ferða- og dagpeningar	14.300	15.000	20.000	20.0
2030	lýsingar	0	0	5.000	1.0
2170	tryggingar	0	0	2.000	2.0
2305	innbúgv	0	15.000	3.000	3.0
2310	skrivstovuhald	23.400	5.000	0	0.0
2315	prentlutir	0	5.000	8.000	3.0
2325	postgjald	0	0	1.000	1.0
2335	telefon og telex	0	6.000	4.000	1.0
2350	sakkon hjálp	0	10.000	10.000	6.0
		316.300	433.000	569.000	598.0

ad 1014 Upphæddin greinar seg soleiðis:

Løn til skrivstovumann	72.000,00
Løn til eftirlitsmann	104.000,00
Løn til eftirlitsmann	50.000,00
Løn til nýggjan eftirlitsmann	90.000,00
	316.000,00

ad 1016 Løn til stjóran sama sum fyri 1976/77.

ad 1120 Um nýggjur maður verður settur verða ferðaútreiðslurnar stórri.
Játtanin fyri 1976/77 verður brúkt.

Viðmerking frá landsstýrinum:

Ad 1050: Her eru tiknar við 37.000 kr. í endurgjaldi til Justervæsenet fyri nýtslu av justermeistaranum til ymsar eftirlitsuppgávur fyri Arbeiðseftirlitið.

Ad § 18-2720 Bileftirlitið.

Sbrt. skriv dagf. 4. nov. 1976 frá Bileftirlitinum:

		Rokn skapur 1975/76	Játtan 1976/77	Umsókn 1977/78	Uppskot 1977/78
790	Ymiskar inntokur	444.2	656.0	751.0	736.0
1004	Løn/Tænastumenn	67.0	0.0	0.0	0.0
1014	Løn/Starvsfólk	261.7	432.0	660.6	538.0
1022	Løn/Reingerð	16.1	15.0	20.0	20.0
1028	Løn/Onnur	96.2	0.0	53.0	53.0
1040	Ortiðarlønir	0.0	15.0	15.0	15.0
1120	Ferða- og Dagpening	47.4	30.0	70.0	50.0
2030	Lýsingar	0.0	0.5	0.5	1.0
2040	Dagbl., tíðarrit v.m.	0.8	1.0	1.0	1.0
2110	El, Hiti, Vask	3.9	6.5	5.0	5.0
2180	Leiguútreiðslur	63.4	81.0	135.0	135.0
2305	Inubúgv	6.8	5.0	15.0	15.0
2310	Skrivstovuhald	10.8	15.0	15.0	15.0
2315	Prenthutir	0.0	0.0	15.0	5.0
2325	Postgjald	3.1	10.0	10.0	10.0
2335	Telefon og Telex	29.6	12.0	20.0	20.0
2355	E.D.V. útreiðslur	10.4	15.0	25.0	25.0
2530	Amboð	12.8	10.0	105.0	10.0
2590	Aðrar útreiðslur	23.2	10.0	20.0	20.0
2592	Tænastuskfor	2.1	10.0	20.0	20.0
	Eftirútbúgving	0.0	0.0	20.0	10.0
					232.0

Vísandi verður undirritaði at seta fram viðmerkingar viðvikjandi figgjarstøðu og tørvi.

ad 790 Inntøkur

Skrásetingarsýn	56.0	
Lógpliktigsýn	480.0	
		536.0
Koyrikort til bil	200.0	
Koyrikort til prutl	15.0	
		215.0
		751.0

Uppskot til nýggja inntøkukeldu er koyrikort til prutl.
300 koyrikort á kr. 50,—.

ad 1014 Lønir

Skrivstovumaður	5.5	
1. 1 sýnsmaður	5.5	
1. 2. do	6.5	
1. 3. tímaløntur sýnsm.	4.5	
2. sýnsmaður	6.5	
3. do.	7.0	
4. do.	7.5	
Stovusleiðari	11.0	
do. fyri at verða t. taks ..	1.05	
	55.05	
Lønir um árið		660.6

Stóri vøkstur í lønarútreiðslunni skilhast uppskotinum um setan av 3 meðarbeiðarum í komandi ári.

ad 1022 Løn/Reingerð

Løn fyri reingerð er sambart sáttmálar.
Kr. 20.0 verður nett til at passa.

ad 1028 Løn/Onnur

Vísandi til eykajltanina 1976/77 har kr. 20.0 eru játtaðar verður fyri komandi fíggjarár sokt um heilársin til lkki fastansettan handverkara.

ad 1040 **Ørtiðarløn**

Sama sum seinast.

ad 1120 **Ferða- og dagpeningur**

Vísandi til cykajáttanina fingu vit kr. 50.0, tørvur er á kr. 70.0, við tað at mannatalið og effektiviteturin verður storri í komandi ári.

ad 2030 **Lýsingar**

Sama sum seinast.

ad 2040 **Dagblað, tíðarrit v.m.**

Sama sum seinast.

ad 2110 **El, Hiti og Vask**

Brúk tykist ikki verða fyri so nógvum peningi sum játta varð seinast.

ad 2180 **Leiguútreiðslur**

Við tað at stovnurin nú hevur sýningarholi í Suðuroy, Kollfjarðardali, Runavík og Klaksvík, fyri utan holi í Tórshavn er húsaleigan vorðin kostnaðarmikil.

ad 2305 **Innbúgv**

Til teorihøli í Klaksvík og á Tvøroyri er framvegis tørvur á innbúgv.

ad 2310 **Skrivstovuhald**

Sama sum seinast.

ad 2325 **Postgjald**

Sama sum seinast. Um vit í komandi ári verða fleiri mans, verða fleiri tilsøgnir um sýn skrivaðar.

ad 2335 **Telefon og Telex**

Við tað at avgreiðsla av sýningararbeiði skapar nógva telefonnýtslu er kostnaðurin stórur.

Ofta er neyðugt við uttanlanda ringing, oftast viðv. tekniskum fyrispurningum.

ad 2355 **E.D.V. útreiðslur**

Sum er verða útreiðslurnar til E.D.V. at vaksa og tað í stórum. Skipanin

arbeitt verður eftir í dag er seur ópraktisk og krevur nógv manuelt arbeiði afturat E.D.V. viðgerð.
Vísast skal til tað uppskot, ið arbeiðsbólkur greiddi úr hondum, fyri eitt ár síðan. Kr. 25.0 eru sostatt fyri neyðini, um arbeiðsgongdin verður óbroytt.

ad 2530 Amboð

Sama sum seinast.

ad 2590 Aðrar útreiðslur

Torvur er á hækking við tað at stovnurin er vaksin, og mangt fyrikomandi vísir seg at vera.

ad 2592 Tænastuakfør

Afturat tí stóra «Bileftirlitsbilinum» hava vit nú keypt ein annan persónbil (brúktan politibil) sum menn skulu brúka at ferðast við.

Eftirútbúgving

Hóast eitki var játtað okkum seinasta ár, verða vit aftur einaferð enn at søkja um pening til útbúgvingar. Tað má vera hvørjum manni greitt at tað er ógjørligt at greiða tær uppgávur til lítar sum hvíla á okkum, uttan so at menn vera lærdir um tað í nýtt er. Nevnast kann at allir bileftirlitsmenn í Danmark og Noreg, eru til skeið minst annaðhvort ár.
Okkum slendur í boði at vera við og fáa vit undirvísingina ókeypis.

Um so skuldi verið, at menn ikki halda seg kunna ganga umsóknini á møti, er tað mítt ynski at hovi verður givið til samráðing, ella um neyðugt meira nágreiniliga frágreiðing.
Møguligar meirinntøkur kundu verið av týdningi at tingast um.

Tað er vón okkara at umsóknin fær vælvildarliga viðgerð.

Viðmerking frá landsstýrinum:

Ad 1014 og 1028: Roknað er við selan av tveimum hjálparmonnum aftrat, harav annar uppá tímalon.

Ad § 18-2720 Ráðið fyri størri ferðsluttrygd:

Sbrt. br. dagf. 8. okt. 1976 frá ráðnum fyri størri ferðsluttrygd:

Figgjarætlan fyri 1977/78.

Tilskot frá landinum	kr.	200.000,00	1. Lonir	kr.	126.400,00
Tilskot frá Tryggingarsambandinum	—	200.000,00	2. Serrevndir: Samsýning, útistoða og ferðapeningur	—	25.000,00
Tilskot og limagjald frá kommununum	—	76.000,00	3. Sakkon hjálp	—	70.000,00
			4. Prentlutir og upplýsingararbeiði	—	150.000,00
			5. Lýsingar	—	50.000,00
			6. Telefon og porto	—	10.000,00
			7. Ferða- og útistøðupeningur	—	12.000,00
			8. Skrivstovuútreiðslur	—	5.000,00
			9. Leiga, ljós og hiti	—	12.600,00
			10. Grannskoðan	—	4.000,00
			11. Reingering	—	6.000,00
			12. Aðrar útreiðslur	—	5.000,00
	kr.	476.000,00		kr.	476.000,00

Viðmerkingar til tær triggjar storstu upphæddirnar á útreiðslusiðuni:

1. Er ætlað sum lon til dagliga leiðarin + hálvdagsstarv til eitt skrivstovufólk.
3. Her verður hugsað um at fáa hjálp frá serfroðingum innan ferðslutrygd.
4. Á hesa konto koma t.d. útreiðslur til prentsmiður, teknarar, fotografar, lay out, foldubloð, útgávu av undirvísingartilfari til skúlabrúks o.a.

Ad § 18-2730 Skipaskráin.

Sbrt. skriv dagf. 11. okt. 1976 frá Skipaskránni:

Tilbagesendes Føroya landsstyre med bemærkning, at udgifterne i finansåret 1975/76 har andraget kr. 430,00.

For finansåret 1977/78 vil udgifterne kunne anslås til 5000 kr.

Viðmerking frá landsstýrinum:

Ad § 18-2730: Skipaskrá.

Við í játtanini er peningur til keyp av eini skrivimaskinu og leigu av fotokopitóli til skipaskrásetingina.

Ad § 18-2733 Føroya Læruráð.

Sbrt. skriv dagf. 8. okt. 1976 frá Læruráðnum:

Konto nr.	R. 1975/76	J 1976/77	Uppskot 1977/78
0790 Ymiskar inntøkur	+ 4.7	+ 4.0	+ 4.5
1028 Lon/onnur	1.7	7.0	7.0
1050 Samsýningar	38.5	35.0	45.0
1120 Ferða- og dagpeningur	0.6	2.0	2.0
2030 Lýsingar	0.0	0.0	0.8
2180 Leiguútreiðslur	0.0	1.0	1.0
2315 Prentlutir	0.7	2.5	2.5
2590 Aðrar útreiðslur	3.3	2.5	2.5
	40.1	46.0	56.3

Ad § 19 — 2805 — 2810 — 2820 — 2830 — 2840 — 2845 — 2850 — 2855 — 2860: Fólkapensjón v.m.

Sbrt. skriv dagf. 7. okt. 1976 frá Almannastovnni, her:

Vísandi til skriv landsstýrisins 10. september 1976, j. nr. 400-23[79] og j. nr. 400-23[80] um uppskot til fíggjarlogtingslóg 1977/78 viðvikjandi almannamálunum skulu vit siga frá, at vit hava nett útreiðslurnar til niðanfyri nevndu tol fyri tey ymisku høvuðsøkini og hava til samanburð eisini sett upp fyribils roknskapartøl 1975/76 og játtaninar fyri 1976/77.

kt. nr.		Rokoskapur 1975/76	Játtan 1976/77	Uppskot 1977/78
			í 1,000 kr.	
	Fólkapensión			
	Øll útreiðslan	60.246	58.800	67.500
0605	÷ Endurgj. ríkið	30.123	29.400	33.750
	Føroya partur	30.123	29.400	33.750
0095	÷ Fólkapen.skattur	12.412	11.800	13.200
		17.711	17.600	20.550
0620	÷ Endurgj. komm.	2.842	2.933	3.425
		14.869	14.667	17.125
0095	+ Fólkap.skattur	12.412	11.800	13.200
0603	Landskassans partur	27.281	26.467	30.325
	Avlamispensión			
	Øll útreiðslan	29.220	30.000	32.000
0605	÷ Endurgj. ríkið	14.610	15.000	16.000
	Føroya partur	14.610	15.000	16.000
0620	÷ Endurgj. komm.	2.435	2.500	2.650
0605	Landskassans partur	12.175	12.500	13.350
	Barnastyrkur til stakar upphaldarar			
	Øll útreiðslan	2.176	1.750	2.380
0605	÷ Endurgj. ríkið	1.088	875	1.190
	Føroya partur	1.088	875	1.190
0620	÷ Endurgj. komm.	181	147	195
0608	Landskassans partur	907	728	995

	Einkjupensión			
	Øll útreiðslan	2.394	2.410	2.650
0605	÷ Endurgj. ríkið	1.197	1.205	1.325
	Føroya partur	1.197	1.205	1.325
0620	÷ Endurgj. komm	200	201	225
0609	Landskassans partur	997	1.004	1.100
	Vanlig forsorg			
	Øll útreiðslan	2.168	1.800	2.500
0605	÷ Endurgj. ríkið	542	450	625
	Føroya partur	1.626	1.350	1.875
0620	÷ Endurgj. komm.	271	225	315
0610	Landskassans partur	1.355	1.125	1.560
	Viðkað hjátp			
	Øll útreiðslan	783	840	550
0605	÷ Endurgj. ríkið	392	420	275
	Føroya partur	391	420	275
0620	÷ Endurgj. komm.	65	70	45
0611	Landskassans partur	326	350	230
	Einkjuhjálp			
	Øll útreiðslan	5.200	4.800	6.600
0605	÷ Endurgj. ríkið	1.300	1.200	1.650
	Føroya partur	3.900	3.600	4.950
0620	÷ Endurgj. komm.	650	600	825
0612	Landskassans partur	3.350	3.000	4.125

	Barnaforsorg			
	Øll útreiðslan	2.826	2.444	3.200
3645	Inntokur	111	90	50
	Nettoútreiðsla	2.715	2.354	3.150
0605	÷ Endurgj. ríkið	1.357	1.177	1.575
	Føroya partur	1.358	1.177	1.575
0620	÷ Endurgj. komm.	226	196	260
0613	Landskassans partur	1.132	981	1.315
	Heimahjálp			
	Øll útreiðslan	2.370	2.086	3.150
0790	Inntøkur	138	80	150
	Nettoútreiðsla	2.232	2.006	3.000
0605	÷ Endurgj. ríkið	1.116	1.003	1.500
	Føroya partur	1.116	1.003	1.500
0620	÷ Endurgj. komm.	186	167	250
0614	Landskassans partur	930	836	1.250
3661	**Ellisheim**	184	180	350

Landskassans útreiðslur til almannamál eru sostatt hiðani tilsarpans mettar til 54.600.000 kr. fyri 1977/78, meðan játtaðar eru 47.171.000 kr. fyri 1976/77, og fyribils roknskapurin fyri 1975/76 vísir 48.637.000 kr.

Metingin er gjørd eftir útgjoldunum 1. apríl til 30. september 1976, t.v.s. eftir talinum á persónum, sum tá fingu hjálp, og eftir ti tá galdandi prístalsjavning.

Í álrokningini av kommunupartinum av fólkapensiónsútreiðslunum hava vit nýtt tað talið, sum fólkapensiónsskatturin í fíggjarlógini fyri 1976/77 er mettur til, 13.200.000 kr.

Allar hækkingar kunna sigast at koma av, at talið av móttakarum av sosialum veitingum veksur so við og við, og at lógarbroytingar (hækkingar av veitingunum) og prístalsjavning fara fram.

Ad § 19-3684 Fráhldsfelag:

Sbrt. skriv dagf. 12. nov. 1976 frá Felagsnevnd Føroyskra fráhaldsfelaga:

I samband við uppskot til fíggjarlogtingslóg 1977/78, loyvir felagsnevndin sær at føra fram niðanfyri standandi:

